ANNALES SOCIETATIS SCIENTIARUM FÆROENSIS

SUPPLEMENTUM IV

*LOUIS ZACHARIASEN*

# FØROYAR
## SUM RÆTTARSAMFELAG
## 1535—1655

DANSK SAMMENDRAG



FØROYA FRÓÐSKAPARFELAG

TÓRSHAVN 1961

*Of Supplementa* have been published till now:

1. *Joensen, H. D.:* Studier over brysternæringens udbredelse og betydning. Tórshavn 1954. Pp. 445.
2. *Poulsen, A.:* Bidrag til den tuberkuløse primærinfektions klinik. Tórshavn 1959. Pp. 94.
3. *Rasmussen, R. K.:* Gomul føroysk heimaráð. Tórshavn 1959. Pp. 151.

Copyright 1961
by
Føroya Fróðskaparfelag — Tórshavn

—

Printed in Pf. H. N. Jacobsens Bókahandil — Tórshavn.

# EVNISYVIRLIT

| | | Bls. |
|---|---|---|
| Deild I. | Samfelagsviðurskifti. | |
| | a. Lóg og rættur | 9 |
| | b. Kirkju- og kongsvald | 11 |
| | c. Handilssambandið | 14 |
| | d. Fremmand ávirkan | 17 |
| | e. Ognarmenn og ognarleysir | 19 |
| Deild II. | Dómsmál á tingi. | |
| | a. Deyðadómar I—VI | 22 |
| | b. Dráp og serlig brotsmál I—XXI | 26 |
| Deild III. | Kongsinntøkur av Føroyum. | |
| | a. Bøtur til kongs o. a. | 50 |
| | b. Kongstíggjundin | 68 |
| | c. Hvalaveiða og reki | 87 |
| | d. Jarðarbøkurnar | 97 |
| | e. Fútaroknskapirnir sum heild | 103 |
| Deild IV. | Fremmand innrás á Føroyar. | |
| | a. Sjórán | 117 |
| | b. Fremmandur fiskiskapur | 129 |
| | c. Loynihandil | 143 |
| Deild V. | Føroya handil o. a. | |
| | a. Hamborgarhandil um siðaskiftið | 161 |
| | b. Føroyar á skiftandi hondum | 184 |
| | c. Magnus Heinason | |
| | d. Handilin aftur á ymsum hondum | 214 |
| | e. Bjørgvin fær Føroya handil og missir hann | |
| | f. Hitt íslendska handilsfelagið | |
| | g. Føroyar sum len | |
| | h. Tórshavn og landsins verja | |
| Deild VI. | Ymist um føroyska jørð. | |
| | a. Jarðarspurningar á tingi | |
| | b. Jørð á útlendskum hondum | |

Bls.

Deild VII. Ættir og skyldskapur.
a. Lambaættin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .
b. Aðrar ættir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .

Deild VIII. Rættur og umsiting.
a. Lóg og rættur á landi . . . . . . . . . . . . . . . . . . .
b. Løgmenn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .
c. Sorinskrivarar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .
d. Fútar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .
e. Sýslumenn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .
f. Prestar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .

Deild IX. Samfelagsstovnar.
a. Føroya skúli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .
b. Argja hospital . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .

Deild X. Tingbøkur.

Deild XI. Gamlar føroyskar jarðar- og virðiseindir.
a. Formæli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .
b. Gomul føroysk virðismetan . . . . . . . . . . . . . . .
c. Takstir í eldri skjølum . . . . . . . . . . . . . . . . . .
d. Viðurskifti í Føroyum eftir Seyðabrævinum . .
e. Hin føroyski gyllinin . . . . . . . . . . . . . . . . . . .

Dansk sammendrag . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .
Navnalisti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .
Keldutilfar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .

## FORORÐ

Henda bók er ætlað at fevna um tíðarskeiðið í Føroya søgu frá siðaskiftinum til gabelstíðina, og roynt hevur verið at fáa alt við av týdningi, sum kann leggja ljós yvir samfelagsviðurskiftini í Føroyum í hesi tíð. Uppbyggingin av bókini er í deildum, sum endurgeva tættir í teirri søguligu mannagongdini. Fyrsta deild, *Samfelagsviðurskifti*, er tó bert ætlað sum inngangur í tey søguligu evnini, sum aftaná verða viðgjørd. Bæði skjøl og prentað bókverk eru nýtt, soleiðis sum yvirlit yvir keldutilfar aftast í bókini vísir. Fólkasagnir eru als ikki nýttar sum keldutilfar, men tær eru viðhvørt samanbornar við aðrar haldbetri keldur. Evni, sum í hesi frágreiðing hava sín uppruna í søguligum miðaldri, eru kortini viðgjørd soleiðis, sum tey mega ætlast at hava ligið fyri, táið tíðarskeiðið byrjar.

Skjøl, sum mett eru at vera av søguligum týdningi, eru endurgivin í bókini, summi í síni heild, onnur lutvís. Tey flestu skjølini finnast á gomlum donskum máli, men fyri at gera tey lættari hjá hinum vanliga lesaranum at skilja, eru tey endurgivin í nútíðarhóskandi stavseting. Tey fáu skjølini í bókini, sum av uppruna eru á látínskum máli ella á gomlum skotsk-enskum máli, eru av somu grund endurgivin í føroyskari týðing. Niðast á blaðsíðuni eru settar viðmerkingar um, hvar keldutilfar, sum nevnt er, er at finna, og í vissum førum er endurgeving úr keldu, sum er hildin at vera søguliga avgerandi, sett inn í viðmerking.

Evnisyvirlit og útlegging av styttingum eru sett fremst í bókina — styttingarnar beint eftir fororðið — og aftast í bókini finnast *Dansk sammendrag*, navnalisti yvir persónar og keldutilfar, og blaðsíðutalið, hvar hvør persónur er nevndur, er viðmerkt á listanum.

Eg ynski her at siga Asgaut Steinnes skjalavørða á ríkisskjalasavninum, Oslo, mína bestu tøkk fyri leiðbeining givin mær í brævaskifti um gamlar føroyskar virðiseindir. Eisini Svend Aakjær skjalavørða á ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn minnist eg við stórum takksemi fyri beinasemi og rættleiðing, hann hevur sýnt mær í ávikum. Prestarnir P. Burla og A. Tórgarð eiga mína bestu tøkk fyri góða hjálp við týðing av teim látínsku skjølunum, somuleiðis Th. Nygaard skúlastjóri við týðing av teim skotsk-ensku.

Tøkk hava eisini mentamálaráðið danska og Føroya mentunargrunnur uppiborna fyri gjøgnum Føroya fróðskaparfelag at hava veitt stuðul til prentingar av bókini.

Eg leggi hetta arbeiði frá mær í teirri vón, at bæði leikur og lærdur maður kann hava gagn av tí, og ikki minst hugsi eg her um skúlaskapin í Føroyum, sum í mongum førum viðvíkjandi Føroya søgu hevur noyðst at byggja á berum botni. Fullfíggjað er einki mannaverk og ivaleyst heldur ikki hetta, men vónandi kann tað tó verða nýtt sum lutvíst grundarlag hjá ungum ættarliðum at føra arbeiðið við Føroya søgu víðari fram.

Tórshavn, oktbr. 1959.

*Louis Zachariasen.*

---

## STYTTINGAR

Bls. = blaðsíða.
N. A. Fær. = N. Andersen: Færøerne 1600–1709.
Lb. = løgtingsbók 1615–1654.
Fær. kongsb. = A. Degn: Færøske Kongsbønder 1584–1884.
D. D. R. A. = Det danske rigsarkiv.
D. D. K. = Det danske kancelli.
N. g. L. = Norges gamle Love.
Dipl. Fær. = Jakob Jakobsen: Diplomatarium Færoense.
A. C. E. = A. C. Evensen: Savn til Føroya søgu í 16. øld.
N. R. R. = Norske Riksregistranter.
L. D. = Lucas Debes: Færøerne og Færøernes Beskrivelse.
A. M. = Arn. Magn. = Den Arne-magnæiske samling á lærda háskúlanum, Keypmannahavn.
Th. T. = Thomas Tarnovius: Færøers Beskrivelse utgitt av Håkon Hamre.
K. B. = A. Degn: Kommissionsbetænkningen 1709–1710.
Kongs. Str. = A. Ræstad: Kongens Strømme.
T. L. = Troels Lund: Mogens Heinesøn.
Bóndabókin = A. Degn: Færøske Kongsbønder 1584–1884.

# DEILD I.

## *Samfelagsviðurskifti.*

### a. Lóg og rættur.

Ikki ber til at meta mál, sum rættur hevur avgjørt fyri fleiri hundrað árum síðan, við nútíðar sjónarmiðum um rættvísi og órættvísi. Í fyrstu syftu guldu aðrar lógir í samfelagnum tá enn nú, og tá eitt mál endaliga kom fyri rættin, komu bókstavirnir í lógini ofta at verða meira avgerandi enn tey viðurskifti, undir hvørjum gerðin, her brotsgerðin, varð gjørd. Har sum lógirnar vóru minni fullfíggjaðar, hevur rætturin ofta víst aftur á gamlan tingsið.

Aftaná 1273 tykjast Føroyar fyri stóran part at hava fylgt norskari lóggávu í yngru Gulatingslógini ella Landslógini, men oyggjarnar høvdu tó her sína serstøðu sum norskt krúnland. Á týðandi øki fingu Føroyar sína serlóg 1298 í Seyðabrævinum[1]), og ymist bendir á, at í kirkjumálum hevur lóggávan verið eins fyri Føroyar og Ísland upp um siðaskiftið. Frá 1035[2]), tá Leivur Øssursson tók oyggjarnar í len av Magnusi kongi góða, hava Føroyar í hvørt fall verið norskt skattland ella krúnland, men innan 1273[3]) tykist lóggávan á landi at hava verið meira óheft av Noreg. Rættarviðurskiftini tykjast longu tíðliga at hava verið skipað á landi gjøgnum sýsluting (várting) og alting ella løgting, og rættarlimirnir, løgrættumenninir, og eisini formaðurin í rættinum, løgmaður, mega innan 1273 hava verið valdir av føroyingum sjálvum. Eftir hetta ár man kongur hava havt sín egna skattkrevjara ella fúta á hvørjum sumri í Føroyum, og kongur skuldi tá eisini fáa til vega handilssigling inn á oyggjarnar.

Um siðaskiftið og fram eftir hava løgrættumenninir verið valdir av kongsins fúta; løgmaður varð settur í starv av kongi sjálvum, aftaná at løgtingið sjálvt hevði sett á hann ella valt hann. Hetta tykist at hava verið ein leivd frá gamlari tíð, men hesin siður varð brotin, tá ið Balzar Jacobsøn, illi løgmaður kallaður, var settur í starv 1655[4]).

Várthingini vóru undirrættir fyri hvørja sýslu, meðan løgtingið var yvirrættur fyri allar Føroyar. Sýslurnar vóru seks, og í hvørji sýslu vóru seks løgrættumenn. Løgmaður var dómari bæði á vártingum og á løgtingi, og løgrættumenn skuldu ásanna dómar hansara. Sjálvt í

---

[1]) Dipl. Fær. bls. 5. [2]) Føroyingasøgur, útg. V. U. Hammershaimb 1884, bls. 134.
[3]) Dipl. Fær. bls. 23–24. [4]) Norske rigsregistranter XI, bræv dagssett 10. febr. 1655.

týðandi málum vóru ikki allir løgrættumenninir við í eini dómsgerð. Við í dómsgerðini var tá heil ella hálv tylft. Um miðjuna av 17. øld gjørdist landsskrivarin, seinri kallaður sorinskrivarin, dómari á vártingum. Sum lóggávuting hevur løgtingið ikki virkað í hesi tíðini. Lógirnar vóru tá fáar og einstakar heilt gamlar. Um hetta mundið hevur løgtingið tigandi góðkent, at lóggávuvaldið var hjá kongi, meðan tingið skuldi halda rætt og skjal á landi.

Tær flestu bøtur, tingið dømdi fólk í, átti kongur. Løgtingsbókin 1615—54[1] vísir, at hospitalið á Argjum tá fekk einstakar bøtur tildømdar, helst eftir Seyðabrævinum, men tær fækka tó seinri í bókini, og grund kann tí vera at halda, at hospitalið hevur fingið fleiri av tingbótunum áður.

Lógirnar skuldu vera eins fyri øll og dómsgerðirnar somuleiðis, men týðuligur munur kom tó at vera í rættarávirkan á ríkan og fátækan. Reinir straffidómar, t. d. fongsil, brennimerking, ja, sjálvt deyðadómar, kundu aloftast verða umskiftir við peningabót, sum var eins høg fyri fátækan og ríkan. Fylgjan var tann, at hin ríki ofta kundi keypa seg leysan frá straff. Vit hava eisini dømi um, at meira múgvandi menn við peningi hava hjálpt fátækum undan straff. Hetta er prógv um, at menn kortini hava havt kenslu av, at lógin í síni virkan hevur ikki verið eins fyri fátækan og ríkan. Táið menn viðhvørt vera dømdir frá ogn síni, er vanligt at hoyra, at har er einki at fáa, altso reinur fátækdómur.

Stórur partur av málunum, sum komu til dóms, vóru barna- og horssakir, og táið brotið var hildið at vera grefligt, tók tingið vanliga til *Stóradóm* á Íslandi, sum veruliga var ein lóg gjørd á Íslands altingi 1564[2] og staðfest av kongi. Henda lóg bygdi á eldri íslendskan kristinrætt eftir Árna bisp, og táið Føroya løgting hevur nýtt hana, bendir hetta á gamlan rættarfelagsskap, helst í kirkjuviðurskiftum, millum Føroya og Íslands. Nú kann verða víst á, at Føroya løgting eisini hevur viðtikið Stóradóm. Vit vita eisini av tingbókini, at løgtingið hevur nýtt hann at døma eftir, og so vita vit, at hann saman við kongligari ásanning er innskrivaður í føroyska lógardeild í handritinum A. M. 316 fol.[3] Hin føroyski tingskrivarin, Gabriel Mitens, hevur gjørt hetta og gjørt handritið, sum er skrivað av fleiri monnum, liðugt ár 1600. Bæði Stóridómur og kongsins ásanning av honum finnast í handritinum á fornum máli, sum óivað stendur næst íslendskum ella føroyskum tá í tíðini.

Í staðin fyri norsku Landslógina kom í 1604 hin Norska løgbókin á donskum máli. Ætlað var, at hon skuldi vera mest sum ein týðing av Landslógini, men fleiri broytingar komu kortini inn í hana. Tær komu ikki allar at galda fyri Føroyar. Í formælinum til hina Norsku løgbókina stendur eisini tilskilað, nær øll tey norsku løgtingini skulu koma saman, men Føroya løgting er ikki nevnt.

Burtursæð frá nøkrum forskrivtum, sum Fríðrikur kongur annar hevði givið um føroyska jørð, vóru allar tær lógir, sum nýttar vórðu í Føroyum til 1604 á fornum norskum máli. Seyðabrævið varð fyrst

[1] Landsskjalasavnið, Tórshavn. [2] Universitetsskjalasavnið, í handritinum A. M. 316 fol. [3] Lb. fol. 327 b–328 b.



umsett á danskt mál 1637[1], og tað er líkt til, at Stóridómur hevur verið nýttur í Føroyum á fornum máli til 1682, tá hann varð endurnýggjaður á donskum máli, av tí at fransar í 1677 rændu landsins kistu. Í 1653[2] síggja vit, at løgtingið við síðuna av Stóradómi er farið at nýta Stóru recess Kristians kongs fjórða av 27. febr. 1643. Dómurin yvir Poul Johannessøn ella Páll fanga og Siggu Torbergsdóttur í 1653 er soleiðis gjørdur eftir recessini. Týðingin av Stóradómi 1682 hevur fingið søguskrivarar, teirra millum íslendingar, til at halda, at Stóridómur er fyrst gjørdur galdandi fyri Føroyar hetta árið, men so er ikki.

Løgtingsbókin frá 1615 vísir, at løgtingið í mongum føri hevur nýtt hina Norsku løgbókina, t. d. í stuldursmálum. Ofta verður tá víst á, eftir hvørjum staði í bókini dómurin er gjørdur. Uttan víðari tykist hin Norska løgbókin ikki at hava goldið fyri Føroyar. Tað sæst sum sagt longu í formælinum ella í tingfarabólkinum, hvar Føroya løgting ikki er nevnt. Best sæst tað av kongl. skipan 6. juni 1606[3], sum sigur, at mát og vekt eftir Norsku løgbókini ikki galda í Føroyum, men at føroyingar, tá teir ynskja tað, skulu hava mát og vekt eftir gomlum ásetingum. Hetta var eisini framhildið, hvørja ferð kongur leigaði einahandilin í Føroyum út.

Táið Kristian kongur triði í brævi 12. mars 1550[4] nevnir føroyingar: «Norges riges rette medborgere og indfødte mænd», kunna vit ikki sum framman undan ávíst leggja tann týdning í hesi orð, at Føroyar tá vóru ein vanligur partur av Noregs ríki. Hin galdandi lóggávan var jú bert fyri ein part norsk, og líkt er til, at Føroyar, helst gjøgnum løgtingið, sjálvar hava avgjørt, hvussu nógv av hesi norsku lóggávu skuldu vera galdandi lóg á landi. Í Stóradómi nýttu føroyingar íslendsk-føroyska lóggávu, og Seyðabrævið var føroysk serlóg, sum varð nýtt heilt upp at okkara døgum.

Føroyar vóru norskt skattland og hoyrdu beinleiðis undir Noregs krúnu[5].

## b. Kirkju- og kongsvald.

Eins og á Íslandi legði kongur við siðaskiftið alt kirkjugóðsið í Føroyum undir seg, og tað er størsta atvoldin til, at kongsvaldið tá mennist á landi. Um 10 ár eftir siðaskiftið síggja vit tó, at kongur nevnir kirkjugóðsið undir sínum valdi fyri seg, og av hesum sæst, at ein triðingur av kirkjugóðsinum tá nøkur ár eftir siðaskiftið hevur ligið undir kirkjuni. Stutt aftaná vóru bert prestagarðarnir eftir, og teir vóru tá smærri, enn teir seinri vóru. Tá høvdu prestar tó ofta bóndagarðar aftrat í festi.

Síðsti katólski bispurin í Føroyum, Ámundur Ólavsson, tykist bert

[1] Norska rigsregistranter skjal 24/2 1637. [2] Lb. fol. 327 b—328 b. [3] Norska rigsregistranter IV b. [4] N. A. Fær., bls. 171, Varðin bind 17 bls. 208. [5] Kongs. Strømme bls. 87: «Arild Hvidtfeldt anvender om forholdene på dronning Margarethas tid det udtryk, at skatlandene lå til kongens fatebur».

at hava virkað í 8–9 ár; eftir kongsbrøvum[1] er siðaskiftið viðtikið á Føroya løgtingi 1535. Ikki kann vera ávíst, nær fyrsti og síðsti lutherski bispurin, Jens Gregersøn Riber, kom til Føroya, men hann tykist at vera rýmdur úr Føroyum í 1556, og umframt herjan av sjórænarum mundi størsta atvoldin til tess vera, at hald av kirkjuognunum í Føroyum og harundir ikki minst hald av hinum stóra bispagarðinum í Kirkjubø gjørdist ov dýrt fyri tær smáu inntøkurnar, sum góðsið undir kirkjuni tá gav. Í 1550 vóru 20 merkur úti á Bø í Kirkjubø, sum áður høvdu ligið beinleiðis undir bispagarðinum, givnar táverandi løgmanni, Andrasi Guttormssyni, í festi[2].

Við brævi 15. oktbr. 1551[3] gevur kongur Jens Riber bispi rætt til at senda skip til Noregs eftir viði fyri harvið at bøta um kirkjuna og bispagarðin í Kirkjubø. Harav mega vit ætla, at tey tá trongdu til ábót, men tá bispurin rýmdi av landi 1556[4], man henda ábótin aldri vera gjørd, og valla kann kirkjan hugsast eftir tí, sum farið var fram, at hava havt ráð til at halda hin stóra bispagarðin í standi. Um stórt hundrað ár seinri veit Lucas Debes einki at siga um bispagarðin uttan, at har tá stóðu nakrar leivdir eftir. Bøndur, sum lítlan ans mundu hava fyri fortíðini á bispasetrinum, komu tá aftur á staðin. Soleiðis fór Føroya mentunarstøð í miðaldri fyri skeytið.

Siðaskiftið í norðurlondum yvirhøvur var ein mennan av kongsvaldinum. Í fyrsta umfari var tað kirkjan, sum mátti boyggja seg inn undir státin. Innan hetta skifti kom, hevði kongur tó fingið væl av valdi á kirkjuni, soleiðis gjøgnum setan av bispum. Við at lova ikki at ganga kirkjuni ov nær fíggjarliga hevði kongur vanliga fingið henda rættin eftir avtalu við pávan, sum áður hevði givið dómkapitlinum við avvarandi dómkirkju rætt til at velja bisparnar.

Eftir brævi í januar 1533[5] fekk Ámundur Ólavsson soleiðis lívsbræv frá kongi til bispadømið í Føroyum «efter deres udvælgelse, kår og begæring, som der på landet bo». Ámundur var tá kannikur í Bjørgvin. Eftir hesum bispavali er líkt til, at hann hevur verið kendur av føroyingum.

Í 1529 fekk Thomas Koppen Føroyar í len[6] av Fríðriki kongi fyrsta. Áður hevði Peder Fresenborg havt Føroyar í len í 5[7] ár; men 4. des. 1531 finnst kongsbræv[8] skrivað á Gottorp, sum gevur Joachim Wullenweber, ið var hamborgari eins og Th. Koppen, helmingin av Føroyum at njóta saman við sínum býarfelaga eftir avtalu teirra millum, sigur brævið. Joachim Wullenweber man hava dugað væl at tala fyri sær, tí í 1533[9] biðja Ámundur bispur og Andras løgmaður í felag um, at kongur gevur Wullenweber Føroyar í len. Bræv frá Andrasi Guttormssyni løgmanni 1534[10] vísir, at samanhaldið við bispin tá man vera klovnað, tí tá krevur løgmaður, at Føroyar verða tiknar frá hamborgarmonnum og lagdar «under Norges riges krone, som det af gammel tid været haver. Det var vi vel tilfredse med». Klovningurin ber týðuliga upp undir siðaskiftið, men hann kemur at verða ímillum

1) D. D. R. A., D. D. K., B 13, skjøl dagssett 10/4 1535 og 17/2 1536. 2) A. C. E. skjal 64, Fær. kongsb. bls. 11. 3) A. C. E. skjal 71. 4) A. C. E. skjal 82. 5) A. C. E. skjal 34. 6) A. C. E. skjal 27 og Varðin bind 17 bls. 205. 7) Norska rigsregistranter 8 b, A. C. E. skjal 16. 8) D. D. R. A., D. D. K., Frederik I Norske registre. 9) D. D. R. A., Langebaks Dipl. 10) D. D. R. A., Langebaks Dipl.



báðar hamborgararnar. Kongsvaldið hevði tá høvuðssetur sítt á Gottorp. Stríðið kom at standa millum Hamborg og Lübeck ella millum Kristian kong triðja og Kristian annan, umboðaðan av Kristofferi greiva av Oldenborg. Har hevur løgmaður hildið við Thomas Koppen, ella Hamborg, meðan bispur hevur hildið við Wullenweber, ella Lübeck. Hetta skilst eisini av tí, at Kristian annar áður hevði givið norskum katolikkum vón um stuðul. Uppgerðin millum hesar báðar politisku tættirnar kom við siðaskiftinum 1535.

Kongsbrøvini frá 1535–1536[1] benda á, at siðaskiftisstríðið í Føroyum mest hevur staðið millum Thomas Koppen og Joachim Wullenweber, ella millum Kristian kong triðja og Kristian annan. Reint katólskt kongsevni var ikki í teirri tíðini í Danmark-Noreg. Ámundur bispur kann tí væl hugsast at hava viljað havt Kristian annan aftur til kong. Hann kann í hvørt fall ikki hava boðið sær at taka við siðaskiftinum, tí hann hevur verið skumpaður til viks sum bispur nøkur ár aftan á hesa hending. Vit síggja, at hann livdi enn í 1551[2] og hevði tá frillu, og at kongur gevur honum strong boð at skiljast frá henni.

Vit vita einki, hvat ið hendi við kirkjujørðini beint eftir siðaskiftið, men vit mega rokna við, at kongur hevur skattað hana. Skattafrælsi helt hin katólska kirkjan fast um til tað síðsta. Táið farið er um 1541 síggja vit, at kongur hevur lagt tveir triðingar av kirkjugóðsinum undir seg, og nógv ár eru ikki gingin aftrat, fyrrenn hann hevur lagt alt kirkjugóðsið umframt prestagarðarnar undir sítt vald. Harav vaks kongsvaldið, og kongsins umboðsmaður, fútin, fekk meira ræði á landi.

Hin katólska kirkjan í Føroyum tykist at hava verið ógvuliga lík hini íslendsku. Eins og teir íslendsku hava teir føroysku klerkarnir havt frillur. Vit vita, at *Ljómur*, yrktar av hinum síðsta katólska bispinum á Íslandi, Jóni Árasyni, komu til Føroya og vórðu varðveittar her á fólkamunni. Viðurskiftini benda eisini á felags kirkjurætt við Ísland. Eftir siðaskiftið klovnaði sambandið við Ísland. Sálmar, sum vóru yrktir á Íslandi eftir hesa hending, lærdu føroyingar aldri at kenna.

Eftir siðaskiftið hevur hin føroyska kirkjan ligið undir Bjørgvins bispi. Táið bispurin rýmdi av landi 1556[3], gjørdust Føroyar próstadømi og hava verið tað síðani. Seinri varð kirkjan í Føroyum løgd undir Sælands bisp. Ávísast kann ikki, hvat ár hetta hendi, men tað var í hvørt fall longu hent í 1632[4]. Søguliga er tað væl hugsandi at vera hent júst í 1620[5], tí hetta árið fór Føroya handilssamband út eftir at ganga um Keypmannahavn, hvat tað hevur gjørt til dagin í dag.

Í 1609 var fyrsta kirkjan bygd í Havn úti á Reyni. Áður hevði kirkjan í Kirkjubø verið sóknarkirkja eisini fyri Havnina. Frá teirri katólsku tíðini var tíggjundin í Føroyum býtt í 4 partar, harav bispur átti ein, men tann partin tók tá kongur. Hinir tríggir partarnar vóru til tey fátæku, sóknarprestarnar og kirkjuna. Fátækratíggjundina vildu menn yvirhøvur ikki geva frá sær, men søgdu seg at geva hana sum

1) D. D. R. A., D. D. K., B. 13, dagssett 10/4 og 17/2. 2) A. C. E. skjal 72. 3) A. C. E. skjal 82. 4) Lb. fol. 198 b og 199 a. 5) N. A. Fær., bls. 28 og Lb. fol. 87–90.

olmussu til tey fátæku. Um hetta stóð nógv stríð í Føroyum gjøgnum langar tíðir. Í 1631 klagaðu føroyskir prestar um hetta[1]), tí teir søgdu seg vera við sviðið soð, av tí at tíggjundin eftir fyriskipan frá kongi bert skuldi fara í trý. Eingin verulig broyting tykist kortini at vera hend tá, men í 1632 fingu prestar eftir umsókn náðisgarðar lagdar aftrat gørðum sínum[2]).

Við siðaskiftið minkaði talið av kirkjum í Føroyum, og burtursæð frá Havnar kirkju, sum altso kom aftrat í 1609, tykjast kirkjubygdirnar í Føroyum at hava verið tær somu upp at okkara døgum. Í katólsku tíðini vóru umframt bønhús í bygdum, sum ikki høvdu kirkju. Hesi vórðu øll niðurløgd við siðaskiftið.

### c. Handilssambandið.

Táið forntíðarsigling føroyinga helt upp at, lovaði kongur Føroyum tvey handilsskip á hvørjum ári[3]). Bjørgvin var tá Føroya handilssamband við útheimin og var tað, til Hamborg kom upp í leikin síðst í 15. øld. Frá Bjørgvin hava hansiatar kanska longu tá havt handilssamband við Føroyar.

Siðaskiftisøldin í Føroyum ella 16. øld vísir ófrið á nærsagt øllum samfelagsøkjum. Landið var nógv plágað av sjórænarum. Viðhvørt hevði kongur í kvittan, at geva føroyingum sjálvum rætt til at handla við útheimin. Í 1571[4]) gjørdi hann álvara av tí, men hetta kom ikki at bera til, tí møguleikar fyri slíkum tiltaki vóru ikki til staðar í fólkinum.

Sum áður nevnt fekk Thomas Koppen Føroyar í len 1529, og í 1533[5]) fekk Joachim Wullenweber helmingin av hesum leni. Óivað hevur Wullenweber gingið hansiatunum gjøgnum Lübeck til handa og styðjað Kristian annan. Hetta sæst av kongsbrævi 1536[6]), og av kongsbrævi 1535[7]) sæst, at Koppen hevur styðjað Kristian kong triðja. Hann var tann, sum gekk av við sigurin í Danmark—Noreg, og Thomas Koppen var tí eisini tann, sum fekk ræði í Føroyum. Hann sat við Føroyum í len, til hann doyði 1553 og hevði í hesi tíð eisini handilin á sínum hondum.

Av løgmannsbrævi 1534[8]) og av kongsbrøvum 1536[9]) sæst, at Eske Bille, sum tá var høvuðsmaður á Bjørgvins húsi, hevði givið føroyingum boð um ikki at greiða kongsskattin úr hondum, fyrrenn hann segði teimum, hvør ið skuldi taka ímóti honum, at kongur sigur Eske Bille frá, at hann hevði biðið Thomas Koppen heinta sær skattin úr Føroyum, og at hann vónar, at Eske Bille ongan tvørleika vísir honum. Enn 1536 stóð kongsvaldið hjá Kristiani kongi triðja ótrygt í Noreg.

Í 1539 síggja vit, at Thomas Koppen fær kvittan fyri gjald av

1) N. A. Fær. bls. 348, D. D. R. A., D. D. K., B 161. 2) Lb. fol. 193 a, dagssett 23/4 1632. 3) Dipl. Fær., bls. 24—25. 4) R. C. E., skjal 128 og 134. 5) D. D. R. A., D. D. K., Fredr. I Norske registre, bræv dagssett 4/12 1531. 6) D. D. K., B 13, skjal dagssett 17/2. 7) D. D. K., B 13, skjal dagssett 10/4. 8) Dagssett 23/5, finnst D. D. R. A., Langebeks Diplomatarum. 9) Dagssett lørdagen efter St. Velentini dag, Langebeks Diplomatarum.



Føroyum til kongs, 100 mark lübsk[1]), og hetta man vera fyri táverandi kongsjørð. Í 1544 sæst, at Koppen hevur fingið tveir partar av kirkjugóðsinum aftrat, sum tá hevði ligið undir Bjørgvins húsi. Í komandi árum sæst, at árliga gjaldið hjá Thomas Koppen til kongs fyri jørðina í Føroyum var 100 lübskar merkur fyri upprunaliga len sítt við gamlari kongsjørð frá miðaldri og 400 merkur fyri kirkjugóðsið[2]), og tað vil væl siga fyri teir tveir partarnar av hesum góðsi.

Í 1545 boyggir kongsins hamborgarapolitikkur seg fyri Bjørgvins gamla kravi um at sleppa at handla við Føroyar, og hetta verður ásannað í brævi 1548[3]). Táið so Thomas Koppen er deyður í 1553[4]), gevur kongur Føroya handil frían til allar borgarar í Noreg og Danmark. Hesin handilsskapur vardi bert til 1556[5]). Føroyar, sum fyrr aftur vóru lagdar undir Bjørgvins hús, komu nú beinleiðis undir kong, og kongur gevur sínum manni, Mikkjal Skrivara, landið upp í hendur. Í 1559[6]) sendi kongur Andras Júta í staðin, og í 10 ár tykist hann at hava røkt Føroyar og dugað væl at sæta sær sjálvum. Vit síggja, at hann hevur lagt jørð undir seg, hóast kongur í 1566 sendi føroyingum boð um, at hann, kongur, vildi hava fyrsta rætt at keypa ta óðalsjørð, sum kom til sølu[7]). Føroyingar klagaðu eisini um Andras Júta, og í 1568 sendi kongur teimum Mourits Skrivara, sum skuldi ansa eftir rætti og skjali[8]). Hesin Andras Júti (Matssøn) tykist mestsum at hava havt Føroyar í len. Av skjølum sær tað út, sum rætturin hevur ikki torað at døma honum ímóti.

Í 1569 verður lenið givið Mads Lampe og Andras Júta, sum báðir vóru borgarar í Keypmannahavn[9]). Lenið skuldi teir hava í 4 ár. Tað, sum kongsins skrivari í Føroyum flýddu teimum í hendi, skuldu teir gjalda kongi í Keypmannahavn við einum gomlum dála fyri hvønn føroyskan gyllin. Fyri handilsrættindini skuldi kongur hava 100 dálar árliga. Kongsins fúti í hesi tíðini var Mourits Skrivari. Føroyingar klagaðu nógv um handilin hjá hesum báðum monnum, t. d. var ofta viðatrot[10]).

Eftir áheitan frá Guttormi Andrassyni løgmanni gav kongur føroyingum sjálvum handilin at røkja 1571[11]). Sama árið doyði Guttormur løgmaður. Longu í 1573[12]) fær hamborgarin Jochim Thim loyvi at handla við Føroyar, men føroyingum verður tó framvegis loyvt at handla við aðrar. Hetta stóð við til 1578, tá kongur avger sjálvur at reka handilin í Føroyum[13]). Av brævi sæst, at Mourits Skrivari hevur verið fúti í Føroyum enn í 1575.

Longu tíðliga í 1579 fær tó Magnus Heinason saman við nøkrum monnum í Bjørgvin einarætt til Føroya handil[14]), men í 1583 varð handilin tikin frá Magnusi[15]), og frá 1584 letur kongur Niels Skinkel til Gjerskov standa fyri Føroya handli kongsins vegna[16]). Kongur gevur tó 1586 Jochim Wichmand í Hamborg og Oluf Matssøn í Keypmannahavn rætt til í 10 ár at reka Føroya handil[17]). Táið kongur frætti, at hesir menn deilvís leigaðu handilsrættindi síni burtur

1) A. C. E., skjal 51. 2) A. C. E., skjal 59 og 60. 3) A. C. E., skjal 58. 4) A. C. E., skjal 75 og 76. 5) A. C. E., skjal 84. 6) A. C. E., skjal 92. 7) A. C. E., skjal 110. 8) A. C. E., skjal 116. 9) A. C. E., skjal 118 og 119. 10) A. C. E., skjal 121 og 128. 11) A. C. E., skjal 121 og 134. 12) A. C. E., skjal 138. 13) A. C. E., skjal 143. 14) A. C. E., skjal 145. 15) A. C. E., skjal 172. 16) A. C. E., skjal 178. 17) A. C. E., skjal 187.

til aðrar, fór rætturin teim úr hendi, og frá 1592 tók kongur sjálvur handilin aftur við keypmanni Søren Nielssøn (Islænding) og fútanum Mogens Nielssøn sum sínar umboðsmenn[1]). Í 1594 síggja vit, at hesir menn hava býtt um starv, men bæði í 1595 og 1596 síggja vit Sevrin Islending aftur nevndan sum keypmann[2]).

Í 1597 gerst Strange Madssøn fyrstu ferð fúti í Føroyum[3]), og sama ár leigar kongur Føroya handil út til eitt handilsfelag í Bjørgvin[4]). Menninir itu: Søren Andersson, Claus Liudt, Johan Wendelcke og Jacob Jacobssøn. Sevrin Íslendingur fekk fútastarvið í Føroyum 1598[5]) fyri 80 dálar um árið í løn, men longu í 1599 tók Strange Madssøn við aftur fútaembætinum, og hann hevði tað tá til sín deyðadag. Hin 6. mai 1601 fingu hesir somu menn í Bjørgvin handilsrættindi síni endurnýggjað í 3 ár[6]). Eina tíð sær tað nú út, sum Bjørgvin hevur vunnið síni gomlu handilsrættindi í Føroyum aftur. Bjørgvin fekk aftur síni handilsrættindi endurnýggjað við brævi 16. apríl 1603[7]), galdandi í 3 ár. Menninir vóru: Claus Liudt, Jacob Jacobsøn, Henrik Didriksøn og Nicolaus de Frunt, apotekari. Somu handilsrættindi vórðu endurnýggjað triðja hvørt ár at galda til 1. mai 1614[8]), men 1608 fór Henrik Diriksøn burtur úr felagnum.

Frá 1. mai 1614 til 1620[9]) lá Føroya handil undir einum 3-manna-felag, hvarav ein var sjálvur Føroya fúti, Strange Madssøn. Hinir báðir vóru borgmeistarin í Bjørgvin, Søren Sørensøn, og Nicolaus de Frunt apotekari. Av tí at fyrst kenda løgtingsbókin tekur við í 1615, fáa vit frá hesum ári betri greiðu á, hvat ið hendi við handilinum. Tær innfluttu vørurnar hava verið ringar, og loynihandilin nógvur. Skilaloysi viðvíkjandi Føroya handli var í hesi tíð út av lagi. Keypmaðurin, sum felagið hevði fyri seg í Tinganesi til 1618, tykist at hava svikið bæði føroyingar og teir, sum áttu junkarajørð[10]) í Føroyum, ógvuliga grovliga. Ivaleyst hevur handilsfelagið eisini verið svikið, og aftaná alt hetta tykist hesin sami maður enntá at hava fingið sorinskrivarastarv í Føroyum.

Táið íslendska handilsfelagið 1620 tók við Føroya handli, kom frægari skil á sjálvan handilsskapin, men teir fyrstu keypmenninir, sum tá komu í Tinganes, vóru harðir at hava við at gera. Sum frá leið, batnaðu viðurskiftini nakað, men klagurnar á tingi um handilin vóru tó nógvar. Miðstøðin fyri hetta sonevnda íslendska handilsfelagið var Keypmannahavn, ið hevði Oyrasundsbýirnar, Malmø og Helsingør, við í felagsskapinum. Frá 1620 mugu vit tí rokna við, at miðstøðin fyri Føroya handli er flutt frá Bjørgvin til Keypmannahavnar. Hamborg kom sum áður nevnt eftir siðaskiftið tó nógv upp í føroyskan handilsskap.

Tá ið komið er um ár 1600, tykjast føroyingar stig fyri stig at gerast meira heftir. Vanliga síggja vit í 16. øld, táið kongur leigar burtur føroysku handilsrættindini, at hann leggur tær treytir við, at føroyingar skulu sleppa at ferðast aftur og fram við handilsins skipum,

1) A. C. E., skjal 215. 2) A. C. E., skjal 224 og 227. 3) A. C. E., skjal 228. 4) A. C. E., skjal 229. 5) A. C. E., skjal 231. 6) A. C. E., skjal 231. 7) Norske rigsregistranter, eisini skjal 16. jan. 1605, skjal 3. juni 1608, sjá annars N. A. Fær. bls. 5–7. 8) N. A. Fær., bls. 9. Annars D. D. K., B 86 dagssett skjal 25/4 1613 og 8/4 1613. 9) Sjá viðm. 5 bls. 13. 10) Lb. fol. 68 e–72 a.



sjálvt um ørindi teirra vóru at føra klagur um handilin fram fyri kong[1]). Skrivligar klagur høvdu føroyingar eisini loyvi at taka við sær av landi, uttan at tær fyrst skuldu vera eftirhugdar.

Í 17. øld bendist hesi viðurskifti tann vegin, at føroyingar sluppu ikki út at ferðast uttan loyvi, og hetta bandið gjørdist fullfíggjað, táið kongl. skriv 1661 avgjørdi[2]), at av landi mátti einki klagurit sleppa, uttan at landsskrivarin ella sorinskrivarin hevði ført tað í pennin. Hetta var tað, sum mest skapti hina ringu Gabelstíðina í Føroyum.

Henda vaksandi bindingin av føroyingum saman við hinum kongliga bundna handlinum hevur ikki framt lóglýdniskensluna hjá hinum meiniga manninum í Føroyum. Framstandandi menn komu ofta illa fyri av øllum hesum forboði, helst í handilsskapi við fremmandar. Aræði til fríhandil vaks tó ikki fram hjá føroyingum undir slíkum viðurskiftum. Hugurin til handilsskap við fremmandar røkk bert hinum einstaka, ið vildi vinna sær fyrimun av tí, sum beyðst í løtuni.

Táið nýggjur fúti kom til Føroya við handilsskiftið 1620, sæst týðuliga, hvussu ringt skilið hevði verið á handilsskapinum framman undan. Hetta ringa skilið á ymsum økjum var longu farið at koma til sjóndar í løgtingsbókini, og hóast tað sæst í hesi tíðini einki rættarmál um loynihandil at vera reist á tingi. Løgrættumenninir hava nærsagt allir verið sekir og aðrir mætir menn við. Teir hava biðið kong um fyrigeving.

## d. Fremmand ávirkan.

Yvirhøvur kann verða sagt, at føroyingar komu lítið saman við fremmand fólk. Av og á vórðu tó fremmandir menn í Føroyum, og eina ávirkan hava føroyingar fingið ígjøgnum teir. Ikki var tað uttan ótta, at føroyingar fingu við nógvar av hesum fremmandu at gera.

Menn frá Algier, nevndir turkar, komu higar bert sum sjóræningar. Trúgv teirra var Mohameds læra. Væl kann tað vera, at teir hava borið við Føroyar fleiri ferðir. Í 1627 gjørdu teir stórt álop á Ísland og rændu har nógv fólk og fæ, men søguliga kunna vit tá ikki vísa á, at teir hava borið við Føroyar. Harímóti sigur løgtingsbók okkara frá, at hesir turkarnir frá Algier løgdu inn á Hvalbø í 1629 við tveimum skipum[3]). Teir rændu, drupu og fóru av stað við 30 fólkum.

1) Norske rigsregistranter, skjal 22/2 1586: . . . «at samme skib kan i lige måde udtage og udføre med sig af Færø hvilke af undersåtterne der på landet, som begærer at udsejle udi deres ærender og bestilling eller og til at beklage deres Nød, om de i nogen måde vorder besværget, hvilket udi ingen måde skal være undersåtterne forbødet eller forment.» Um føroyingum verður hetta noktað, so sigur kongur: «da skulle forn. købmænd dermed have forbrudt dette vort åbne brev» (síni handilsrættindi í Føroyum). Lb. fol. 88 b, skjal 16/12 1619: «Dersom der og kunne være nogen på forn. vort land . . . Færø . . , som ville drage derfra og hid til os og beklage deres sager, da skulle forn. købmænd være pligtige for en billig fragt at lade dennem komme ind på vores skibe ud af landet. 2) N. A. Fær. bls. 82. 3) Lb. fol. 170–171.

Annað skipið fór á land í ódnarveðri, og manningin doyði. Fólkasøgnin, sum annars ikki brýtir nógv av frá tingbókini, vil vera við, at skipini vóru trý.

Søgn er um, at eitt turkaskip eina ferð skal vera rent á land á Sunnbiarhólm í ódnarveðri. Um nakað er um hetta, kann tað hava verið, um somu tíð árásin fór fram á Ísland í 1627. Søgnin sigur, at ein maður kom sær upp á hólmin. Tað vardi nakrar dagar, áðrenn sunnbingar sluppu út eftir honum. Fýra ár livdi hann í Sunnbø og legði har eftir sær ein leysingarson, sum seinri fór norður um at búgva.

Fransar og bretar vóru ofta í Føroyum sum sjóræningar. Sum fiskimenn og handilsmennn bóru teir annars nógv við Føroyar. At øll henda fremmanda árásin hevur sett sítt merki í Føroya fólk, er sjálvsagt. Enn á døgum síggja vit einstøk dømi í fólki okkara um, at heilt fremmand fólkasløg hava verið við í hesi innrás.

Í løgtingsbókini eru dømi um, hvørjar havnir mest hava verið nýttar av hesum fremmandu, sum bóru við Føroyar[1]).

Skotskir fiskimenn tykjast innan 1618 at hava vitjað nógv Havnina. Júst hetta árið varð fiskimarkið um Føroyar fyri bretar sett at vera oyggjarnar í eygsjón.

Mál á tingi 1618 greiðir frá, at tvær kvinnur høvdu verið handfastar og kallast úti í Havn við orðum sum «skotske flag» og «skotske rylle». Orð sum «bådsmands hore» vóru eisini á lofti, men hetta kann sjálvsagt benda á menn við handilsskipunum. Í hesum tíðarskeiði verður t. d. ókendur onglendingur lagdur undir leysingarbarn, ella kvinna sigur seg vera neyðtikna úti í haganum av manni frá hvalastingara.

Í 1615 mælir løgtingsbókin[2]) bæði um bretsk og hálendsk skip á Vestmanna, og sjálvsagt høvdu slík skip verið í Føroyum áður, men vit eiga nú ov lítið skrivligt tilfar at ávísa tað meira gjølla. Bretar vóru ofta ófriðaligir í Føroyum. Soleiðis eru eisini írar nevndir, meðan hálendingar mest sum ongan ófrið tykjast at hava gjørt føroyingum. Oftast vóru ørindini hjá slíkum skipum loynihandil, men um hann ikki fekkst í lag, kundi ófriðaskapur verða burtur úr. Fremmand skip, sum fiskaðu í Vesturhavinum, hava óivað nýtt Vestmanna, helst eisini Vágarnar, sum havn. Nógv dømi eru um, at bretsk skip, sum fiskaðu á Norðurhavinum, hava nýtt Funningsfjørð sum havn, og vit kunna vísa á, at samarbeiði má hava farið fram millum hesar bretar og føroyingar. Eisini sæst, at teir fremmandu komu ofta inn á Klaksvík og Hvannasund. Eftir 1618 tykjast teir harímóti lítið at vera komnir á Havnina. Loynihandilsskipini kundu einki gera har. Í slíkum ørindum fóru tey inn á bygd. Alment hava føroyingar ikki torað at viðganga, at teir høvdu við fremmandar menn at gera, ella at hesir høvdu lært teir nakað nýtt. Um so var, mátti tað verða dult sum mannsmorð.

Nógv gomul lánorð tykjast ikki at sita eftir í føroyskum máli frá hesum tíðarskeiði, men nøkur merki er tó eftir í máli okkara. Føroyskt orð sum t. d. *fittur* man helst vera komið úr bretskum máli í hesi tíðini, ætlandi eisini orðið *smílur* fyri lukt ella anga, sum hevur verið nýtt í Norðuroyum.

1) Sjá seinri undir Fremmand innrás á Føroyar. 2) Lb. fol. 5 a og b.



## e. Ognarmenn og ognarleysir.

Í hinum gamla føroyska samfelagnum, sum vit møta í tingbókini eftir 1615, var stættarmunurin stórur. Hóast føroyingar í fyrra parti av 17. øld ikki tykjast at hava havt meira enn stívt 4000 menniskju[1]), eitt sindur meira ella minni eftir góðum og ringum tíðum, og eftir sum umfarasjúkur herjaðu, hevur landið havt eina nøgd av fátækum fólki, og fátæk vil her siga jarðarleys. Føroyar hava tilsamans 2406 merkur av jørð[2]), og eftir tí skuldi stív hálvmørk verið undir hvørt fólk, børnini viðroknað. Javnt býtt og væl røkt skuldi jørðin við eitt sindur av frammihjávinnu lættliga kunna føtt tey fólk, sum tá vóru á landi; men bæði býtið og røktin av jørðini hava væl trotið. Soleiðis sum vinnan var tá, var jørðin størsta ríkidømi.

Innan løgtingsbøkurnar taka við, er ikki sørt at finna um ringar tíðir í Føroyum, men eftir 1615 fáa vit betri hylling á hesum. Tingbókin nevnir fleiri ferðir, at fólk eru deyð í hungri (orðatakið sigur: Hvør kelling livir til jóla)[3]), og vanliga verður tá handilin skuldsettur fyri ongar vørur at hava havt, táið út leið á veturin. Óivað hevur nógv verið í hesum. Ofta hoyra vit, at tingbókin nevnir hungursneyð eftir eitt summar við miðvøkstri — tað gav vanliga korntrot við handilin — ella eftir long fiskaloysi, men kanska tey stóru fellisárini tóku fólkinum eina mest. Eina ferð sigur tingbókin í hesum tíðarskeiði, at meginparturin av seyðinum var deyður og fleiri hundrað kýr[4]). Føroyingar gjørdu einki fyri at koma undan slíkum óeydnuárum. Neyt og seyður doyðu í raki og hungri, og aftaná kom at standa á menniskjum. Kenningarhaldið gjørdi, at seyðaskipanin var løgd føst, men føroyingar tykjast heldur ikki at hava viljað sett neytaskipanina niður eftir eitt summar við misvøkstri.

Ótrúligt er, so nógv dómsmál á tingi galda heilt fátæk fólk. Týðum hoyra vit tá, at tey eru ikki bótafør, og ofta verður eisini sagt, at har var einki at taka. Í stuldursmálum kemur ofta fram, at fólk hava stolið av neyð og hungri.

Óðalsjørðin hevur sitið nógv á einstøkum hondum, og í mongum førum hava hesar einstøku hendurnar verið kongsbøndur og prestar. Gjøgnum uppgávufólk við eitt sindur av óðalsjørð, men ov lítið til at føða tey á ellisárum, hava kongsbøndur og prestar lagt nógva óðalsjørð undir seg. Væl ásetti Norska løgbókin 30 ára innloysingarrætt av óðalsjørð til næsta frænda[5]), men tá hesi fólk framman undan á tingi høvdu boðið seg upp við jørð síni til næsta frænda, uttan at hann tók av, kundi innloysingarrætturin ikki gerast galdandi aftaná. Slík var ellisforsorgin í tátíðar samfelagi.

1) N. A. Fær. bls. 35—37. 2) Fær kongab., fororð 1. bls. 3) Lb. fol. 162 a, 179 b og 203 a. 4) Lb. fol. 203 a. 5) Odels Balken kap. VI, petti 2.

A henda hátt kom jørðin javnt og samt aftur á einstakar hendur, sjálvt um hon í fyrsta umfari varð arvað út í stór óðalsbúgv helst frá kongs- og prestagørðum. Kongsbøndurnir vóru nógv færri enn kongsfestini í teirri tíðini orsakað av, at menn ofta sótu við fleiri festum í ymsum bygdum, og at prestar javnan høvdu kongsfesti aftrat prestagørðum sínum. Talið av jarðarmonnum í landinum var tí ávikavist lítið. Soleingi fólkatalið ikki vaks, hava gomul óðalshús tó hildið sær í bygdum við nógvari óðalsjørð, men har sum tað stóra markatalið var kongsjørð, hava slík óðalsbúgv havt ilt við at halda jørðina í húsinum.

Nógv fólk er í teirri tíðini deytt av farsóttum. Tær komu higar deils við fremmandum fiskimonnum ella loynikeypsskipum og deils við skipum, sum á vári og sumri sigldu í handilsins tænastu. Tingbókin sigur eitt sindur um hetta[1]).

Ivaleyst hava farsóttirnar farið ringast við hinum vánaligara endanum á fólkinum, og tá tær fullu saman við hungursárum, man mannfallið ofta hava verið stórt.

Fátæk fólk sløddust allar staðir um bygdirnar, men vit síggja tó, at tey høvdu lyndi til at støðast í Havn. Har var handilin og landsins verja. Eitt sindur av arbeiði góvu tey. Myndugleikarnir, løgtingið og fútin, gjørdu tó alt fyri at fáa fólk frá at búsetast í Havn. Teir vildu hava tey at luttaka í jarðararbeiðinum á bygd; men hesi fólk áttu jú onga jørð, og tað var ofta ringt at fáa tey til at geva seg inn undir húskallatreytirnar. Farsóttirnar fóru ofta verst við Havnini. Manntalið í býnum man í hesum tíðarskeiði hava verið ymist, væl niður um hundrað og upp um stórt hundrað menniskju.[2]). Eftir 1630 kom skansaarbeiðið at hvíla tungt á Havnar monnum. Kortini vísa øll tekin, at Havnin hevði lyndi til at vaksa, men pokurnar í 1651 fóru óivað illa við býnum, hóast talið av skattaborgarum 1652 ikki bendir á slíkt[3]). Nógv Havnarfólk fingu loyvi at fara um landið at biðja ull fyri at kunna vinna nakað við ullavirking. Hetta var kortini ikki vælsætt, tí Norska løgbókin hevði forboð fyri, at arbeiðsfør fólk gjørdu slíkt[4]). Fútin gav hesum havnarfólkum slíkt undantaksloyvi.

Lívið við leysum kvinnum í Havn frá 1618, tá ein kvinna, ættað av Toftum, við dómi varð víst burtur haðani, finna vit aftur í 1645. Tingskrivarin hevði hetta árið í fútans navni sett havnarfólki forboð fyri at fara um landið at biðja ull, og samstundis hevði hann tá noktað leysum gentum at leiga sær verilsi í Havn. Vit síggja soleiðis, at leysar gentur tá høvdu lyndi til at leita til Havnar uttan at hava nakað fyri sær har í staðnum fram fyri at arbeiða sum arbeiðskonur á bygd.

Samfelagsliga sæð var sum sagt munurin stórur millum jarðarmenn og ognarleysar. Felags fyri allar føroyingar var, at teir livdu undir stórum ótta. Fyrst var tað óttin fyri sjóræningum. Síðan var tað óttin, ið stóðst av tí loynihandli, sum so at siga allir teir, ið nakað áttu, nýttu, og tey fátæku bóru støðugt ótta fyri ikki at fáa bitan í munnin.

---

1) Lb. fol. 131, ár 1623. 2) Fútaroknskapirnir hava 7—18 skattgjaldarar. 3) Eftir fútaroknskapi árini 1651 og 1652 vóru 17 bæði árini. 4) Mandhelgebalken XXIV.



Eftir løgtingsbókini at døma hava árini frá o. u. 1626 til o. u. 1640 verið serliga ring; ringast vóru árini um 1630. Frægari hava viðurskiftini verið í tíðini um 1620. Tá hevur nakað av fiski verið at fáa, og í 1622 síggja vit fleiri rættarbøtur goldnar við fiski[1]). Fiskaloysi sæst at hava verið í 1627[2]) og fylgjandi ár, og koma vit upp um 1630, hava bæði misvøkstur og felli verið. Veturin 1632—33 var mikil fellisvetur. Bert árið 1601—2 segðist at vera ringari. Tekin eru til, at enn ringari kann hava verið summi ár longur aftur í tíðina. Tær ringu tíðirnar um 1630 finnast aftur í serliga nógvum stuldursmálum á tingi. Nógv av hesum er hungursstuldur. Siðloysi vant upp á seg og javnbjóðis harvið óttin fyri yvirvaldinum.

Um sjálvt siðaskiftið tykjast prestarnir í Føroym at hava verið føroyingar, men lutherdómurin flutti skjótt útlendskar prestar inn í landið. Miðskeiðis í hesum umrødda tíðarskeiði vóru tó fleiri føroyskføddir prestar, men teir danskføddu høvdu væl tá yvirlutan. Teir vóru nærsagt altíð búgvandi í Føroyum alla ævi sína, og aðrir embætismenn komu eisini inn í landið í hesum tíðarskeiði. Nógvir giftu seg inn í tær frægastu bóndaættirnar á landi. Vit síggja tí, hvussu hesir innfluttu spakuliga eta seg inn við løgrættin. Hetta sæst best við at hyggja eftir, hvørjir hava verið føroyskir løgmenn gjøgnum árini. So sterk var tó hin føroyska muran í fólkinum, at tað var ført fyri skjótt at súgva hetta fremmanda fólkatilfarið upp í seg.

---

1) Lb. fol. 123 a—125 a. 2) Lb. fol. 162 a.

## DEILD II

*Dómsmál á tingi.*

### a. Deyðadómar.

Áðrenn løgtingsbókin tekur við 1615, er bert lítið at finna um teir dómar, tingið hevur gjørt, og teir, sum finnast skrivliga, eru bert bótamál, ið kongur hevði inntøku av. Deyðadómar eru ikki til skjals, fyrrenn tingbókin tekur við, men tað er týðuligt, at teir hava verið ikki so fáir.

Løgtingið ella rættari sagt kongur hevði fastløntan bøðil — «mestermanden» — sum fekk 6 gyllin árliga av kongsins inntøku av oyggjunum. Í eini uppgerð frá 1600[1]) yvir leysalutir við handilin, sum fútin skuldi ansa eftir, sæst soleiðis ein bøðilsøksa at hava verið. Í roknskapinum fyri árið 1601—02 sigur Strange Madssøn fúti undir sínum kongligum útreiðslum av Føroyum: «Haver jeg haft 4 fanger siddende en måneds tid på min omkostning, hvoraf 3 er rettet for deres misgerninger og haver kostet mig 12 gl.»

Teir aftaná nevndu deyðadómar eru tiknir eftir løgtingsbókini 1615 — 1654[2]).

*I.* Fyrsti deyðadómur er innførdur í løgtingsbókina 2. aug 1615[3]). Maður og kvinna vóru komin fyri barn saman: «Olof Magnussøn havde avlet et barn med sin afdøde kones søster». Kvinnan, Billa, var úr Gásadali, og barnið varð komið síðsta heyst. Fútin reisir klaguna, og tá tey sigast at hava viðgingið «utvunget og unødt», krevur hann «først, om de ikke hermed haver forbrudt deres liv, og hvad straf de bør at have for deres slemme gerning.»

Stóridómur á Íslandi er ikki nevndur, men hann liggur ivaleyst aftanfyri, tá løgtingið dømir bæði tvey til deyða, «efterdi forn. Olof Magnussøns forrige ægtekvinde og denne Bille Michelsdatter er fulde søstre både til fader og moder.»[4]) Fyri slíkt brotsverk ásetti Stóridómur deyða. Tað stendur, at dómurin er gjørdur í tingstovuni í Tórshavn «både efter Guds og al verdslig lov.» Undirskrivað dómin hava:

«Zacharias Thormodsøn, lagmand her på Færø, Hans Pedersøn, herredsfoged, Jacob Poulsøn, Isak Ismaelsøn, Daniel Nielssøn, Anders

1) D. D. R. A., fútaroknskapurin fyri hetta árið. 2) Føroya landsskjalasavn, Tórshavn. 3) Lb. fol. 10 a og b. 4) O. Stephensen og J. Sigurðsson: Lovsamling for Island, bind I, bls. 85—86.



Olofsøn, Gutte Andersøn, Laurids Ellendsøn, Zacharias Pedersøn, Joen Thomassøn, Peder Bertelsøn og Olof Poulsøn, svorne lagrettesmænd.»

Ongar undirskrivtir í tingbókini eru persónligar, tí øll skjøl í bókini eru úr enda í annan innførd av tingskrivaranum.

*II.* Hin 14. juli 1625 er innført í tingbókina[1]), at táverandi fútí (frá 1620) Mads Christensøn las upp deyðadóm á løgtingi yvir 3 brøður í Funningi: Andras, Blásius og Mikkjal (Nicolaussøn), sum vóru dømdir á Selatraðar vártingi at verða hongdir í einum gálga; men av tí at fólk bað fyri teimum, og løgtingið helt, at teir høvdu stolið av neyð, gekk fútin við til at veita teimum lív ímóti, at nakrir menn settu seg fyri at gjalda kongi bót, stóra 110 gyllin. Avgerðin kann finna stuðul í Norsku lógbókini, 1. kap. undir tyvebalken, táið víst er á, at stolið er av neyð. Menninir, sum settu seg fyri peningabótina, vóru hesir:

| | |
|---|---|
| Jóan Jústinusson, Fugloy, | 50 gl. |
| Mikkjal Jóansson, Lamba, | 20 gl. |
| Sakaris Jóansson, Koltur, | 20 gl. |
| Sakaris Tormóðsson, løgmaður, | 10 gl. |
| Jákup Pállsson, Hvalvík, | 10 gl. |

Fútin tók við bótini kongsins vegna, og allir menninir hava óivað goldið beinan vegin uttan Mikkjal í Lamba, sum seinri skal verða greitt frá.

*III.* Undir 8. juli 1626[2]) stendur innført í tingbókina: «Dom og sentens over Peder Jacobsøn, som blev rettet på Selletrede ting.»

Løgtingsbókin fyri hetta ár vísir annars, at tingið hevur verið saman um ólavsøkuna. Tað kundi tí verið líkt til, at tað løgtingið, sum hevur verið saman 8. juli, hevur verið eykating. Vit síggja, at brotsmaðurin er hongdur á Selatrað, og hetta tykist at vísa, at tingið hevur avgjørt hetta málið har á staðnum. Deyðadómurin er undirskrivaður av løgmanni og 11 svornum monnum, tað er løgrættumonnum; harav sæst, at hesin dómur er ikki endaliga avgjørdur við einum vártingi. Sama ár er eisini hesin dómur innførdur í tingbókina: «Jacob frá Tofte, for han ikke mødte på Selletrede ting at følge en misdæder til retterstedet, skal bøde til kong. majestæt 1 mark sølv.»

Hesin Jákup er óivað faðir at hinum deyðadømda. Hann hevur verið kravdur at koma á Selatraðar ting fyri at síggja sonin hongdan, noktaði og var so dømdur í bót. Peder Jacobsøn hevði viðgingið at hava stolið veturin fyri:

*Í Eysturoy* 12 fiskar, 4 pør av hosum, einar brøkar, 8 ostar, 1/2 lambskrov, 1 tvøstlykkju, nakað spik.

*Í Streymoy* 2 pør av hosum, 8 pør av skóm, 2 ærskinn, 2 kújúgur, 1 kjøtmørsvomb, 2 fótamørir, 2 ostar, 1 krov.

*Í Vágum* 1 1/2 gamalseyðakrov.

Hesin stuldur var tilsamans mettur 6 gyllin í peningi. Dómurin legði aftrat, at fólk vistu, at maðurin hevði stolið áður, og var hann tí dømdur at «skulle hænges udi en galge efter loven i tjuvebalken i i det første kapitel og hans gods at være forbrudt til kongl. maje-

1) Lb. fol. 147 a. 2) Lb. fol. 153 a.

stæt.»[1]). Undirskrivtirnar í løgtingsbókini vísa, at teir, sum dømt hava, kunna ikki hava verið meira enn 12 saman við løgmanni:

«Lagmanden Zacharias Thormodsøn og 12 svorne mænd, som var Michel Joensøn, Hendrik Thomassøn, Oluf Lauridssøn, Isak Nielssøn, Johannes Thorlofsøn, Joen Thomassøn, Poul Jacobsøn, Andfind Jacobsøn, Joen Olufsøn, Joen Poulsøn og Johannes Eliassøn.»

Ein mørk í peningi ella silvuri galt tá í tíðini 2 gyllin 8 skinn. Fyri hesa mørkina fannst tá eingin myntur, men hon stóð í lógini, og eina ferð hevði hon verið norskt myntvirði, ið galt 48 alin í vadmali. Hvussu skinn í føroyskari metan av gyllinum kemur inn fyri alin, verður umtalað seinri.

*IV.* Í 1638 er maður dømdur til deyða á Sandoyar vártingi, nevndur Hans Esaiassøn[2]). Dómurin er ætlandi bert tikin til eftirtektar á løgtingi, men hevur ikki verið serliga viðgjørdur har, tí innføringin í tingbókina er bert gjørd stutt undir vár- og løgtingsdómum frá Sandoyar sýslu. Dómurin er fyri stuldur og er týðuliga gjørdur eftir Norsku løgbókini:

«Hans Esaiassøn, for han stjal fra Oluf Joensøn på Skarvenæs 5 krov, 8 fodemør, 3 skind tællig, 2 oste, vurderet 1 gylden, og var hans anden forseelse, nok fra hr. Jens 2 gammel krov, vurderet 1 gylden, og var hans tredje forseelse, nok stjal han fra forn. hr. Jens 2 gammel krov, vurderet 1 gylden, er dømt efter egen bekendelse at miste sit liv. Haver stået sin ret.»[3]).

Hitt stolna er í dóminum mett 3 gyllin í peningi. Ymis er metingin av teim stolnu lutunum, tí á Skarvanesi hevði maðurin umframt nógv annað stolið 5 krov, kanska lambskrov, og virði av øllum verður sett til 1 gyllin, men frá prestinum og próstinum Jens Jenssøn Skive á Sandi hevði hann stolið 4 krov — væl var tað gamalseyðakrov — og metingin av tí er 2 gyllin. Vit mega hugsa okkum hesi krovini sum geldæra- ella geldseyðakrov. Táið vit vita, at metingin av lívsseyði ella áseyði frá hesi tíðini hevur ligið um 7, hægst 8 skinn fyri seyðin, tykjast krovini frá presti at hava verið mett til nærum tvífalt virði av lívsseyði.

*V.* Á ólavsøkutingi 29. juli 1642[4]) var til staðar sum kongsins umboðsmaður Pros Mund til Grevens Vænge. Hann hevði kongl. yvirvald á Íslandi, og Føroyar lóu eisini undir honum. Føroya prestar klagaðu tá á tingi mann úr Streymoy, nevndur Jóan Ólavsson (Joen Olufssøn), sum, teir søgdu, grefliga var farin fram í brotsgerðum. Hin 1. aug. løgdu teir skriv um hetta á ting, og Pros Mund bað tá fútan taka sær av málinum, hvat hann eisini gjørdi.

Prestarnir siga, at hesin maður, sum var giftur, hevði livað saman við øðrum konufólki. Teir høvdu havt hann fyri á prestamøti, og hann hevði lovað at betra seg. Kona hansara hevði eisini lovað at

---

1) Norska løgbókin frá 1604 sigur: «Stjæl tyv første gang til en mark fuld værd, da haver han forbrudt alt sit gods og lide straf, kongens befalingsmand hannem pålægger, og beholde sit liv. Men stjæl han oftere, da haver han forgjort land og løsøre og sit liv tilmed.» 2) Lb. fol. 245 b. 3) Hesin Hans Esaiassøn kann væl vera tann í søgnini um harra Klæmint, «Færøske Folkesagn og æventyr», nevndi *Runti*, sum man hava verið eyknevni. Í 1638 var harra Klæmint komin til Sands sum hjálparprestur hjá verfaðir sínum, Jens Jenssøn Skive. 4) Lb. fol. 263 a.



fyrigeva honum hansara ógerðir og taka hann til náði, men hóast tað helt hann fram við sínum ólevnað og vildi «heller leve som en tyrk end et kristent menneske,» og tí bóðu prestarnir um, «at vi for forn. person måtte blive entlediget.»

Skrivið frá prestunum er undirskrivað av:

«Hans Rasmussøn Færø, egen hånd på sin og provstens vegne, Hans Christensøn Ganterup, Clement Lågesøn Follerup, Peder Hellesøn Viborg.»

Hans Rasmussøn var prestur í Suðurstreymoy 1630—1651, um hetta mundið hjálparpróstur hjá Jens Jenssøn Skive, Sandoy, og próstur 1646—1651. Eftirnavnið Færø merkir, at hann hevur verið føddur í Føroyum. Rasmus Christensøn Ganterup var faðir at fyrrnevnda, prestur í Vágum 1602—1627 og í Eysturoy 1627—1642. Hann var tí nú heilt gamal maður. Um hetta mundið var Clemend Lågesøn Follerup hjálparprestur (1638—1648) hjá gamla próstinum, Jens Jenssøn Skive í Sandoy, og gjørdist sóknarprestur har 1648—1688. Peder Hellesøn Viborg man hetta árið nýliga vera komin til Eysturoyar sum hjálparprestur hja Rasmus Ganterup, tí hann er prestur í sama gjaldi 1642—1679.

Eftir klaguriti prestanna setti løgrætturin Jóan Jústinusson løgmann við 12 løgrættumonnum til dóms í málinum: «Simon Thomassøn, Heine Justinussøn, Blasius Eilensøn, Gregers Poulsøn, Christen Zachariassøn, Joen Joensøn, Jacob Holdansøn, Poul Isaksøn, Bertel Danielsøn, Morten Holdansøn, Joen Thomassøn og Anders Simonsøn,» og dømdu teir, at «Joen Olufsøn for sådan hans høje angivende og grove forseelse bør at straffes på hans liv.»

Táið deyðadómurin var fallin, sendu allir Føroya prestar 2. aug. sama ár Pros Mundi bønskriv um, at hann kongsins vegna vildi lata hin dómfelda sleppa við lívinum, men «at han måtte komme ud af landet.»

Løgtingsbókin sigur einki um, hvat víðari hendi í málinum, men maðurin er óivað komin niður á Bremerholm at arbeiða í jarni. Sama ár kunnger Pros Mund á løgtingi eftir tilráðing sýslumanna kgl. dómsbræv um tjóvar og landastrok[1]) og sendir 14 føroyingar niður á Bremerholm, og verður hetta umtalað seinri.

*VI.* Undir 31. juli 1652[2]) stendur dómur, hvareftir maður, Enevold Thormodsøn, er dømdur friðleysur, og má hetta vera at rokna sum deyðadómur eftir manhelgebalken II í Norsku løgbókini. Ein friðleysan hevði hvør loyvi at drepa, uttan at hann kundi verða straffaður fyri tað.

Hin dømdi hevði her neyðtikið eina kvinnu, Maren Joensdatter, «som åbenbarligen havde udråbt sig at være voldtagen af Enevold Thormodsøn, og klagede hun vold den samme dag.»[3]) Aftaná at hava granskað málið sigur løgrætturin: «Kan vi ikke andet forefinde, end forn. Enevold Thormodsøn skal være fredløs.»

---

1) Lb. fol. 262 a. 2) Lb. fol. 321 a. 3) Norska løgbókin kap. II: «Voldtages nogen kvinde, og der er to forskellige vidner til, da er det halsløs gerning. Men er der ikke vidne til, og hun klager vold den samme dag, det er sket, da skal 12 mand ransage sagen. Findes han da skyldig udi gerningen, være fredløs.»

Dómin gjørdu Jóan Jústinusson løgmaður saman við fylgjandi løgrættumonnum:

«Joen Isaksøn, Søren Rasmussøn, Joen Simonsøn, David Nielssøn, Joen Joensøn, Peder Simonsøn, Anders Arendsøn, Gregers Poulsøn, Anders Simonsøn, Ellend Pedersøn, Jesper Joensøn og Thormod Thomassøn.»

Einki verður nevnt um, hvaðan hin dømdi er ættaður, og heldur ikki verður nakað sagt um kvinnuna.

Tylvt av tingmonnum dømir altíð á løgtingi, hvar lív áleikar, men vit síggja, at meðan Sakaris Tormóðsson løgmaður aloftast roknar seg sjálvan við til tylvtina, telur Jóan Jústinusson seg sum løgmann og dómara út yvir tylvtina.

Jú longri vit koma út í 17. øld, jú meira tykist tingið at hava lyndi til at sleppa frá deyðadómum. Sjálvt stór tjóvsmál verða tá avgjørd við brennimerking, hóast Norska løgbókin fyri slíka straff ásetur hægstavirðið av stolnum lutum at liggja undir eina mørk í silvuri.

## b. Dráp og serlig brotsmál.

*I.* Fyrst í juli mánað 1617, eftir løgtingsbókini at døma hin 4.[1]), kom fyri á løgtingi mál: «Om den dreng udi Lamhauge, som havde uforvarende slagen en tjenestekvinde med et lidet stykke af en tøndestav, og kvinden døde straks den samme time.»

Hetta hendi inni í roykstovuni hjá Mikkjali í Lamba, og nú kallar fútin til vitnis á tingi tey fólk, sum har vóru til staðar. Tingbókin nevnir tey:

«Abraham Pedersøn, Nicolas Pedersøn, Laurids Simonsøn, Katrine Lauridsdatter, Katrine Holdansdatter, Elsebe Gunnarsdatter, Katrine Joensdatter og Bille Nielsdatter.»

Eisini vóru sjálvsagt inni í roykstovuni drongurin, Olof Joensøn, sum sló, og gentan Anna Olofsdatter. Íalt hava soleiðis 10 fólk verið í roykstovuni.

Abraham Pætursson vitnaði, at Ólavur Jóansson sat eitt kvøldið og seymaði sær føroyskar skógvar, helst húðaskógvar, og at Anna Ólavsdóttir tá søplaði eitt skøði burtur hjá honum. Ólavur leitaði eftir tí og fann tað tá í einum kálfati, hon hevði sett frá sær. Hann gjørdist illur um, at hon soleiðis læt kálið fara fyri einki, og meðan Anna nú stóð og hongdi hosur upp yvir eimingin at torna, tók Ólavur brot av einum tunnustavi og sló hana beint á síðuna við flata trænum. Hon setti seg beinan vegin niður, bannaði honum og kallaði hann ein tramans búrtjóv, meðan hon gav seg illa. Hann fór tá út í tún, og stutt aftaná fór hon eisini. Har rópti hon hart og gramdi seg, men tá kom Ólavur til hennara, reisti hana upp og gav henni at drekka. Fólkini, í roykstovuni vóru, fóru tá øll út í tún, har Anna lá svímað.

1) Lb. fol. 28 b.



Mikkjal og Magdalena, sum vóru farin í song, komu skjótt til staðar. Magdalena fekk fatur á nøkrum vínedikki at leska Onnu við. Mikkjal bað tey tá bera hana inn aftur í roykstovuna, og Magdalena hjálpti tá Ólavi og Abrahami at bera Onnu inn, hvar hon skjótt andaðist. Har varð hon tá latin úr og aftur í rein klæði av teim kvinnum, sum til staðar vóru, og tær sóu «hverken blå eller blodige tegn på hendes krop.»

Dagin eftir vórðu boð send eftir sýslumanninum (Johannes Thorlofsøn), Olof Lauridssøn, Torkil (Lauridssøn á Toftum?) Hendrik á Nesi og fleiri, og meðan teir vóru hjástaddir, legði Ólavur Jóansson hondina á líkið, sum ikki harav stakk upp at bløða[1]). Hesin vitnisburður kom fram á løgtingi.

Tá kallaði Strange Madssøn fúti fram á løgtingi Sjúrð Ólavsson, sum var bróðir teirra deyðu, Onnu Ólavsdóttur, og spurdi hann, um hann hevði nakað at klaga um viðvíkjandi systur síni. Sjúrður segði seg hvørki at krevja dóm ella bót yvir hin seka, «men vilde de unde hannem noget, da måtte det stå til Gud og hannem, han klagede ikke pa hannem.»

Fútin biður tá tingið meta um, hvørja bót Ólavur Jóansson skuldi hava fyri at hava sligið Onnu Ólavsdóttir, og ljóðar tingsins dómur soleiðis:

«Efterdi der sås ingen tegn på hendes legeme, der hun blev besigtiget, og at hun fik et slag for hendes onde mund og banden, da kunde vi ikke andet påsige eller dømme derom, end det var uvilje og ulykke, endda det skete udi hastighed.»

Ein merkiligur dómur, sum líka nógv vendir sær móti gentuni, ið doyði, hóast hon eftir vitnisburði á tingi læt ikki eið falla, fyrrenn Ólavur hevði sligið hana; eisini byggir hann á børuroyndina á líkið eftir deyðan. Dómurin er óivað gjørdur eftir Norsku løgbókini manhelgebalken kap. 12 um óhappsgerð (vådeværk)[2]), men rímar tó illa við ásetingarnar í lógini.

Beint aftaná hesum máli í tingbókini, bert við lítlari striku ímillum, stendur um Sjúrð Ólavsson, at hann frá hospitalinum á Argjum hevði innloyst hálvmørk í jørð, sum spedalski bróðir hansara, Pætur, hevði ført við sær hagar. Hann hevði loyst jørðina út við 8 gyllin í peningi. Av hesum stendst tann illgruni, at Sjúrður hevði fingið henda peningin frá Lambamonnum, og hetta kann eisini vera grundin fyri, at hann hvørki krevur dóm ella bót yvir mannin, sum hevði sligið systur hansara til deyða.

Ólavur Jóansson hevur sjálvur ivaleys verið av Lambaættini, helst sonur Gyðju Jógvansdóttur, gift við Jóani Pállssyni í Elduvík, og kundi hann soleiðis verið systursonur Mikkjals. Helst man søgnin um Óla Jarnheys sipa til sama mann, men har verður hann skeivt sagdur at vera sonur av Ólavi Lavarssyni.

1) Børuroyndin — á donskum nevnd bâreprøven — hevur aldri verið lógfest í norðurlondum, men hon sæst kortini at vera nýtt her bæði í 16. og 17. øld. Í Fraklandi varð hon nógv nýtt longu í 12. øld. 2) «For vådeværk bødes ikke til konningen.» «Det må ikke kaldes vådeværk, at man hugger og slår til med vred hue, at han vil skade hannem og rammer en anden.» Fyri óhappsgerð kundu næstringar í vissum førum fáa góðgjørslu.

Hitt vanlukku kvøldið í roykstovuni í Lamba vóru 10 fólk inni, og vísir hetta, hvussu stórmannsligt húshaldið hevur verið. Teirra millum var Elsupa Gunnarsdóttir, 18 ára gamla systurdóttir Mikkjals.

*II.* Hin 30. juli 1618 er mál á løgtingi um, at ungur drongur í Sandavági, Gunnar Harildsøn, er komin fyri barn við systkinabarni sínum, Bille Mortensdatter úr Miðvági, og at Strange Madssøn fúti krevur lívsstraff yvir tey[1].

Løgrætturin vil tó ikki ganga við til hetta, men dømir tey í bót, 4½ mørk í silvuri hvørt til kongs, «eftersom den *Store Islandske Dom* formelder, og eftersom her til forne altid haver været dømt, uden så er, at kongl. majestæt nådigst herom vil gøre anden forordning, hvorefter vi os underdaneligen haver at rette, og skal han (Gunnar Harildsøn) nu straks rømme der fra øen.»

Til dóms sat Sakaris Tormoðsson løgmaður saman við fylgjandi løgrættumonnum:

«Hans Pedersøn Morsing, herredsfoged, Jacob Poulsøn, Anders Olufsøn, Gutte Andersøn, Joen Thomassøn, Oluf Poulsøn, Jørgen Throndesøn, Hans Trødegård, Hans på Velbestad, Joen Joensøn og Simon Thomassøn.»

*III.* Hin 13. aug. 1619 klagar fulltrúi fútans, Rasmus Pedersøn — Strange Madssøn man hava verið burtur ella sjúkur — meistaran ella stjóran á Argja hospitali, Simon Joensøn, fyri at hava stungið Sjúrð dragara við knívi í armin. Brennivín og fyllskapur tykist at hava verið uppi í leikinum, sum tingbókin sigur frá[2].

Inni hjá David Joensøn í Havn vóru umframt hjúnini í húsunum Sjúrður dragari ella hjálparmaður við handilin, Símun Jóansson av Argjum og ein maður úr Hesti nevndur David. Símun tykist har at vera komin til illna við David í Hesti, sum í sama viðfangi er farin út; men Símun, sum hevur fingið berserkagongd, sveiggjaði við knívi í hendi innandura og kemur tá at stinga Sjúrð í armin.

Stingurin tykist at hava verið ringur og man hava tikið ilt fyri seg, tí Sjúrður doyði 3 vikur seinri. David Joensøn og kona hansara vitna, at Sjúrður var stungin óvart, tí Símun og Sjúrður vóru bestu vinmenn, men at tað var David í Hesti, Símun var úti eftir. Síðan vitnaði Tørnir Magnusson og Hans Wæver, sum báðir búðu í Havn, at teir høvdu talað við Sjúrð einar tveir dagar, áðrenn hann doyði, og at hann tá hevði sagt, at Símun og hann altíð høvdu verið bestu vinmenn og skyldmenn, og at tað var óvart, at Símun var komin at stinga hann. Hesir báðir vitna, at Sjúrður hevði sagt: «den skade, som han havde fået, det var sket uforvarende imod Simons vilje, og gav hannem sin død til.»

Eisini Magga, kona Sjúrðar, vitnaði: «at hun slet intet havde hannem at beskylde eller på at klage . . . og gav hannem sin sag til.»

Løgrætturin dømir tá, at Símun var komin at stinga Sjúrð óvart, og at tað tí var óhapp og ikki tilætlað, og fyri slíkt fær kongur onga bót, «men forn. Simon skulde stille afgangen Sjuords fattige kvinde og børn til freds og være dennem behjælpeligen til det bedste efter

[1]) Lb. fol. 43 a. [2]) Lb. fol. 62 b.



hans formue.» Dómurin tykist at vera gjørdur eftir Norsku løgbókini manhelgebalken kap. 12.

Símun var veruliga fríkendur; honum verður tó álagt at hjálpa einkjuni og børnunum eftir Sjúrð, so mikið hann kann.

Dómin hevur Sakaris Tormóðsson løgmaður gjørt saman við fylgjandi løgrættumonnum:

«Jacob Poulsøn, Isak Ismaelsøn, Anders Olofsøn, Gutte Andersøn, Laurids Ellendsøn, Antonius Hendriksøn, Anders Barnabassøn, Michel Joensøn, Poul Thorsvig, Jørgen Throndesøn, Simon Thomassøn og Hans Joensøn.»

Sjúrður dragari er annars nevndur í 1618 undir sakarmálinum við Wendell Mattisdatter[1]). Hann var staddur inni í «hellige bod» á Tinganesi, táið kvinnurnar, Wendell og Lisabett N., «Marrette Brocks tjenestepige», har ruku saman at deila.

*IV.* Undir 25. juli 1621 er innførdur dómur yvir Isak Jacobsøn og Anna Rasmusdatter í Elduvík, tí tey vóru komin fyri barn saman[2]). Tey vóru skyld í triðja lið, og hetta var fjórða ferð, Ísakur var komin fyri leysingabarn. Hann var tá dømdur at bøta 40 gyllin til kongs, og um kvinnuna stendur, at hon skal «for skyldskab og hendes første forseelse bøde til kongl. majestæt 3 mark sølv efter den *Gamle Islandske Dom,* indtil sålænge hans majestæt derudi vil gøre en anden forordning.»

Teir dømandi vóru:

«Zacharias Thormodsøn, lagmand her på Færø, Hans Pedersøn Morsing, herredsfoged, Jacob Poulsøn, Isak Ismaelsøn, Anders Olofsøn, Gutte Andersøn, Daniel Nielssøn, Joen Guttormsøn, Antonius Hendriksøn, Laurids Ellendsøn, Joen Justinussøn og Hans i Trødegård.»

*V.* Hin 21. aug. 1621 er mál fyri á tingi um, at húskallur keypmannsins, Jacob Mortensøn, nevndur Lundin[3]), hevði stungið ein mann, Hans Børgesøn, við einum knívi í armin. Lundin verjir seg við at siga, at Hanus fyrst hevði sligið hann, men hann kundi ikki prógva tað, og hin noktaði.

Hesir dømdu í málinum:

«Zacharias Thormodsøn, lagmand her udi Færø, Hans Pedersøn Morsing, Daniel Nielssøn, Michel Joensøn, Joen Thomassøn, Hendrik Thomassøn, Johannes Thorlofsøn, Jørgen Throndesøn, Hans i Trødegård, Hans på Velbestad [Nielssøn], Joen Joensøn i Skålevig [unge], Olof Lauridssøn og David Olofsøn i Leinum.»

Dómurin fall soleiðis:

«at forn. Jacob Mortensøn skal med samme kniv, som han gjorde skaden med, stinges igennem hans hånd eller bøde til kongl. majestæt 8 ørtuger og 13 mark sølv, manhelgebalken udi det 13. kapitel.»[4]).

[1]) Lb. fol. 51 a. [2]) Lb. fol. 105 b. [3]) Lb. fol. 111 b og 125 a. [4]) Norska løgbókin sigur: «Stinger mand anden med kniv sagesløs, så han går deraf til sengs og bliver ved livet, da stande han derfor til rette og bøde efter 12 mænds dom, og kongens ombudsmand skal være pligtig at føre hannem til ting og lade samme kniv stikke gennem hans hånd, uden han vil sig derfra købe med 8 ørtuger og 13 mark til konningen.»

Tingbókin sigur Lundan í 1622 at hava fingið bótina setta niður í 20 gl.

*VI.* Av sama slagi er dómur yvir Jacob Joensøn í Elduvík, gjørdur 21. aug. 1623[1]). Hesin Jákup í Elduvík hevði stungið svág sín í fyllskapi 3 ferðir við knívi um náttina, meðan svágurin, Samuel Anthoniussøn, lá og svav. Fútin kravdi her lívsstraff og góðsið hjá Jákupi at fara undir kong, men løgrætturin dømir:

«at han for forn. 3 knivsting skal med samme kniv stikkes igennem hans hånd, uden han vil sig derfra købe med 8 ørtuger og 13 mark for hver sting og stande den til rette, han stak, efter 12 mands dom, om manden bliver ved livet.»

Teir dømandi vóru:

Zacharias Thormodsøn, lagmand på Færø, Hans Pedersøn Morsing, Daniel Nielssøn, Laurids Ellingsøn, Ole Lauridssøn, Gutte Anderssøn, Hendrik Thomassøn, Joen Thomassøn, Johannes Thorlofsøn, Simon Thomassøn, Hans Nielssøn og Absalon Reinichsøn.»

Sama dag borga fyri bótina hjá Jákupi í Elduvík við 80 føroyskum gyllin hesir menn:

«Michel Joensøn udi Lamhauge, Heine Joensøn udi Sørvåg, Laurids Ellingsøn, Ole Lauridssøn, Hans på Velbestad, Joen Thomassøn, Johannes Thorlofsøn, Andfind Jacobsøn.»

Hin dømdi, Jákup í Elduvík, var sonur Gyðju Jóansdóttur, og tað er týðuligt, at tað er Lambaættin við Mikkjali á odda, sum her gongur í veð fyri Jákup. Jóhannes Torleifsson og Jákup í Elduvík vóru systkinabørn, og Mikkjal í Lamba var móðurbróðir teirra. Um hinar menninar, sum borgaðu fyri Jákup, kunna vit einki beinleiðis prógva viðvíkjandi skyldskapi. Líkt er til, at Heini í Sørvági hevur verið bróðir Jákups. Tó at vit vita, at Mikkjal í Lamba átti bróðir, sum æt Heini, kann tað ávísast, at Heini í Sørvági kann ikki hava verið sonur Jóans Heinasonar. Hinir undirskrivandi menninir hava óivað á ein ella annan hátt verið svágdir við Lambaættina. Bóndabókin tykist enntá at benda á, at Anfinnur Jákupsson hevur verið sonur Jákups í Elduvík. Hann festi fyrst í 1628. Ætlandi er hetta tann í søgnini ummælti Anfinnur bóndi í Elduvík.

Menninir borga eisini fyri, at um Sámal Antonisson skuldi doyð av knívstingunum, vildu teir fáa Jákup til vega aftur fram fyri rættin. Undir 1624 stendur, at Jákup[2]) í Elduvík fyri at hava stungið svág sín er dømdur at bøta 40 gyllin. Dómurin 8 ørtugar og 13 merkur skuldi tá á døgum verið 32 gyllin fyri hvønn sting og fyri 3 stingir 96 gyllin. Sámal man vera komin aftur fyri seg, og bótin hjá Jákupi er tá vorðin sett niður.

*VII.* Hin 29. juli 1623 er sakarmál á tingi móti keypmanninum, Laurids Hansøn, fyri at hava sligið ein Skúvoying, Sakaris Magnusson, so hann fekk deyðamein av tí[3]). Tað var faðir Sakarisar, Magnus Ellingsson, sum førdi klaguna fram á ting. Um sama tíðarskeið sæst Laurids Hanssøn at hava fingið bót bæði fyri leysingarbarn og slagsmál.

---

1) Lb. fol. 137 a. 2) Lb. fol. 142 a. 3) Lb. fol. 130 b.



Magnus førir fram 7 vitni: Joen Isaksøn, Joen Olesøn, Joen Joensøn, Jørgen Jonassøn, Holdan Gudlocksøn, hr. Jens og Isak Ismaelsøn. Av málinum sæst, at Laurids Hanssøn hevði sligið Sakaris Magnusson 3 ferðir yvir handliðirnar ella armin við einum tóli (et thaul), og flestir av hesum monnum vitna, at Sakaris, líka áðrenn hann doyði, hevði sagt seg hava fingið deyðamein av hesum sløgum.

Hr. Jens Jenssøn Skive, prestur í Sandoy, vitnaði, at Sakaris hevði sagt, at Laurids Hanssøn hevði meinslað hann við sløgunum, men sama dag sum hetta var hent, gekk hann tó til Velbastaðar, og hann hevði arbeitt aftaná, m. a. smíða árar.

Suðuroyar sýslumaður, Holdan Gudlocksøn, segði, at Sakaris var komin úr Havnini við sær í báti til Suðuroyar, og at har var ein sjúkur maður á bátinum. Sakaris hevði tá róð fyri hann við hvørt. Ísakur Ísmaelson vitnaði, at einar tveir tímar, innan Sakaris doyði, gramdi hann seg um, at hann hevði stingir, og vildi hava prest til sín. Øll hini fyrstnevndu vitnini vildu einans halda, at sløgini frá Laurids Hanssøn vóru atvoldin í deyða Sakarisar.

At Sakaris Magnusson ferðaðist víða um hetta mundið, sæst av vitnisburði, Laurids Hanssøn fekk til vega og annars sjálvur førdi.

Laurids kravdi vitnisburð av Jákupi Jóanssyni í Elduvík, av móður hansara Gyðju og av brøðrum hansara. Løgtingsbókin nevnir 2: Poul og Reinholt. Øll hesi fólkini í Elduvík vitna, at Sakaris hevði verið hjá teim aftaná, at hann var sligin, og Laurids Hanssøn spyr tá Jákup, um Sakaris hevði verið um borð «udi et engelsk skib, som mange folk fik sygdom af, og nogle på skibet var døde.» Jákup og øll hini játta hesum, men siga, at Sakaris hevði ikki klagað seg fyri teimum. Sama vitnisburð føra Ólavur Lavarsson (Ole Lauridssøn) og Lavars Ellingsson (Laurids Ellingsøn), sum Sakaris um somu tíð hevði verið hjá og biðið ull.

Laurids keypmaður helt fram, at Sakaris eisini hevði verið á útróðri annan og triðja dagin eftir, at hann var sligin.

Løgtingið dømir so, at Laurids Hanssøn var ikki atvold í deyða Sakarisar:

«Da efter prov og bevis så og sagens lejlighed kunde vi ikke andet påsige, først at efterdi han samme dag er gået ifra Havnen til Velbestad, item roede ud anden dagen så vel som andre tider, item arbejdede for andre, faren omkring landet derefter og ikke klagede sig, item han haver været udi et engelsk skib, stakket før han døde, og folk der på skibet fik megen sygdom, item nogle døde deraf, desligeste og som her udi landet samme tid såvel som endnu omgår en svar sygdom, som folkene få med svare sting, som forn. Zacharias Magnussøn også havde klaget sig, så at mange mennesker på tredje eller fjerde dag er død hastige, da kunne vi ikke sige Laurids Hanssøn at være skyldig udi hans død, men fri derfor; men hvis de tre slag, af taulet [koyril, kann vera av træ] er anlangende, derfore at bøde til kongl. majestæt 3 mark sølv.»

Teir dømandi vóru:

«Zacharias Thormodsøn, lagmand på Færø, Hans Pedersøn Morsing, Holdan Gudlocksøn, Daniel Nielssøn, Anders Olesøn, Joen

Justinussøn, Peder Nielssøn, Joen Thomassøn, Johannes Thorlofsøn, Morten Holdansøn, Hans Nielssøn og Simon Thomassøn.»

Hesin dómur ásannar ta áskoðan, at bretsk skip í teirri tíðini komu tíðum inn á Funningsfjørð, og úr Elduvík hevur Sakaris Magnusson verið um borð á tílíkum skipi. Óivað eru tá smittandi sjúkur ofta komnar beinan vegin úr Bretlandi til Føroya.

Viðvíkjandi Laurids Hanssøn keypmanni er at siga, at hann í 1622[1]) er dømdur fyri leysingabarn við Sunneva Pedersdatter, og aftur í 1623 er hann dømdur fyri at hava fingið barn við «Sunneva på Husegård» fyri aðru ferð. Hetta er óivað sama gentan.

Undir 1623 stendur eisini um Laurids Hanssøn[2]):

«Hvis han er kommen udi klammeri med nogle af almuen her udi landet formedels hug og slag, han haver givet dennem, ere de forligte om udi kongl. majestæts stue udi lagmandens og flere godtfolks nærværelse, så de har givet hannem deres sag efter.» Hetta stendur innført undir 23. juli, meðan sakarmálið um deyða Sakarisar stendur undir 29. juli, altso seks dagar aftaná.

Aftrat skal verða viðmerkt, at í 1626, trý ár seinri, var fyri rættinum stuldursmál móti Maren Petersdatter[3]), sum veturin fyri hevði tænt hjá vetrarkeypmanninum, David Jeronimussøn, og har hevði hon ikki bert stolið, men «rottet til sig nogle flere, som var Christoffer drager, Simon Olufsøn og Birette Sørensdatter, og brudt forn. købmands kontor og udtaget hans nøgle og tappet øl og vin. Eftersom hun og selv bekendte, at hun ikke vidste, hvor tit hun havde været i kælderen, og efter samme hendes egen bekendelse var forn. Laurids Hanssøn dom begærende.»

Í teirri tíðini var keypmaðurin, her Laurids Hanssøn, bert í Føroyum um summarið og hevði mann fyri seg um veturin, í hesum føri David Jeronimussøn, men keypmaðurin førdi tó sjálvur hetta stuldursmálið til tings og eftirgav øllum sakarmál uttan Marinu. Mál hennara var avgjørt við tylvtardómi soljóðandi:

«Maren Petersdatter var en tyv og alt hendes gods at være forbrudt til kongl. majestæt og at lide slig straf, som kongl. majestæts ombudsmand vil hende pålægge.» Táið tað undir bótamálum sama ár stendur, at Marin er sett til at bøta 6 merkur í silvuri fyri stuldurin, er líkt til, at «kgl. majestæts ombudsmand» ella fútin hevur avrundað dómin við hesari bót.

Dómurin hevur eitt uppískoyti:

«At forn. Maren Petersdatter er ilde slagen af forn. David Jeronimussøn og sat udi fængsel og igen ladet udtage og med hug og slag overhørt, det sætter vi ind for den høje øvrighed.»

Kanska hevur hetta gjørt sítt til, at fútin setti dómin niður, men ikki er tað trúligt, at Laurids Hanssøn av berari hjartagóðsku slapp hinum trimum fríum frá átalu. Eftir tí, sum sagt er um mannin í øðrum málum, man helst okkurt annað hava ligið ímillum.

At vetrarkeypmaðurin, David Jeronimussøn, hevur fylgt harra sínum eftir í øllum lutum, visir fylgjandi mál, sum finnst undir Streymoy 1627[4]):

[1]) Lb. fol. 124 a og 135 b. [2]) Lb. fol. 128 b og 129 a. [3]) Lb. fol. 151 b. [4]) Lb. fol. 163 a.



«David Jeronimussøn for frillelevned med Magge Tørnesdatter skal bøde til kongl. majestæt 2 mark sølv.»

*VIII.* Undir 25. juli 1623 er innført mál um Mýrmann í Dali[1]), helst Syðradali ella Norðadali. Hesin Myrmand Sivertsøn var komin fyri barn við eini kvinnu á Argja hospitali, og fútin spyr løgrættin:

«Efterdi Myrmand tilforn har bekendt for hannem udi Kirkebø og flere godtfolk sådan gerning, så og beligget samme kvindfolk udi de fattiges hus, som haver deres underholdning af Gud og kongl. majestæt, hvad deres bøder og straf bør at være efter loven?»

Mýrmaður fær 6 merkur í bót og konufólkið 3 merkur. Av hesum málinum sæst, at eftirlitið við hospitalinum á Argjum ikki hevur verið hitt besta. Frásagt er áður, at hospitalsstjórin eina ferð í fyllskapi hevði stungið mann við knívi heima í Havn, so hann fekk deyðamein av tí. Hospitalið á Argjum var ikki bert fyri tey spedalsku, men eisini fátæk fólk hovdu innivist har. Frá Lucas Debesar bók[2]) 1673 vita vit eisini, at tey spedalsku og tey fátæku hava etið til felags. Lucas tekur tað sum dømi um, at fólk hóast tað nærsagt aldri verða smittað á hospitalinum.

*IX.* Í Sandavági var hend tann vanlukka, at maður nevndur Thormod Olesøn var komin at skjóta kvinnu, kallað Maren Michelsdatter, til deyða, og 24. juli 1623 er málið fyri á tingi[3]). Maður kvinnunnar, nevndur Joen Holdansøn, var sum vitni spurdur, um hann hevði nakað serligt at føra fram sum klagu í málinum, men hann hevði onga ákæru móti manninum, sum skotið hevði.

Fútin krevur mannin dømdan til deyða og alt góðs hansara at falla kongi til, men løgrætturin dømir:

«at det var vådeværk og var sket imod hans vilje, og hann derfor at bøde til kongl. majestæt 15 gylden.» Aftrat var Thormod Olesøn dømdur útlagin úr Vágum og skuldi tæna fólki aðrar staðir.

Hesin dómur er ikki samsvarandi hina Norsku løgbókina, eftir hvørji kongur onga bót skal hava fyri óhappsgerð («For vådeværk bødes ikke til konningen»). Heldur ikki Gulatingslógin og Landslógin tilskila kongi bót fyri óhappsgerð.

Teir, sum dømdu í málinum saman við Sakarisi Thormóðssyni løgmanni vóru hesir:

«Hans Pedersøn, Anders Olesøn, Laurids Ellingsøn, Antonius Hendriksøn, Michel Joensøn, Peder Nielssøn, Gutti på Myggenæs, Hendrik Thomassøn, Morten Holdansøn, Heine Justinussøn og Joen Joensøn unge.»

*X.* Sakarmál viðvíkjandi drongi og gentu í Haldórsvík, Michel Jacobsøn og Marion Olufsdatter, sum vóru komin fyri barn saman og skyld í annað og triðja lið, er innført undir 14. juli 1632[4]). Fútin setur fram fyri rættin:

«Om forn. både personer dermed ikke havde forbrudt deres liv for sådan deres store forseelse og onde gerning, eller hvad dennem bør at have for straf, som forsvarligt kan være.»

Ikki hevur fútin hugsað sær dómin gjørdan eftir *Stóradómi*, tí eftir honum var bót ásett at vera 3½ mørk í silvuri til hvørt.

[1]) Lb. fol. 132 b. [2]) Útg. «Frams» 1903, bls. 273. [3]) Lb. fol. 131 b. [4]) Lb. fol. 195 a.

Heldur man han hava hugsað sær, at tingið skuldi áseta dómin eftir lítlu recess Kristian kongs IV, grein 26, frá 31. mars 1615[1]). Eftir hesi lóg høvdu tey, sum vóru undir ákæru, verið dømd at missa alt, tey áttu, til kongs fyri síðan at verða koyrd av landinum. Fóru tey ikki, skuldu tey missa lív. Men løgrætturin dømdi:

«at forn. Michel Jacobsøn og Marion Olufsdatter hver for sig bør at bøde til kongl. majestæt halvfjerde mark sølv for sådan deres gerning, eftersom udi den *Store Islandske Dom* står, og eftersom her tilforn altid haver været dømt.»

Løgtingið vildi ikki víkja frá gomlum tingsiði og gamlari lóg, sum hevði verið nýtt, uttan kongur vildi geva aðra lóg, sum galt Føroyar. Tað hevur tingið ikki hildið recessina at gera. Fyrst í 1653, síðsta ár Jóan Jústinusson sat sum løgmaður, tekur tingið í einstøkum føri stóru recess Kristian kongs IV frá 1643 til nýtslu[2]). Hetta merkir eina boyggjan av frá gomlum tingsiði. Teir dømandi, sum nýttu Stóradóm[3]) og gamlan tingsið í 1632, vóru hesir:

«Joen Justinussøn, lagmand her på Færø, Hendrik Thomassøn, Hans Nielssøn, Augustinus Lydersøn, Joen Thomassøn, Simon Thomassøn.»

Tingið hevur altso ikki mett málið til at koma undir tylvtardóm.

*XI.* Poul Rasmussøn, fyrrv. prestur í Hvalbø, var 14. juli 1632[4]) fyri rættinum fyri at geva frágreiðslu um leysingarbarn, sum bróðir hansara, Sørin ella Sevrin, var gingin við til at eiga í 1624. Sevrin kom seinri at búgva í Stórustovu í Húsavík.

Harra Poul Rasmussøn viðgongur á hesum tingfundi, at tað var hann, sum átti barnið, Anna Ólavsdóttir hevði fingið í 1624, og at bróðirin var gingin undir at eiga tað, fyri at hann, harra Poul, sum var prestur og giftur, kundi ganga fríur. Ella sum tingbókin sigur: «Hans broder, Søren Rasmussøn, havde taget sig samme sag på, som han dog var aldeles uskyldig udi; bekendte hr. Poul og derhos, at han havde kommet hannem dertil sig selver til befrielse.»

Í 1624 hevði Sevrin goldið 2 merkur í silvuri fyri barnið, og nú býður harra Poul sær at lata 60 gyllin í bót fyri misgerðina. Fútin tók við bótini við slíkum formæli, at «når han fik talet med den høje øvrighed såvel som med hæderlig og højlærd mand, doktor Hans Reesen [Sælands bispur], som og er biskop over dette fattige land[5]), og fik deres gode betænkende i denne sag, vilde han gerne efterkomme, hvis hannem blev befalet.» Og undir sakarmálum næsta ár sæst, at bótin er góðtikin.

Søgnin sigur, at táið turkarnir (menn frá Algier) rændu í Hvalbø í 1629 gjørdist harra Poul ørur í høvdinum og fór tí úr embæti. Rætt tykist at vera, at harra Poul er farin úr embæti í 1630[6]). Hann kann hava fingið skelk av turkum í Hvalbø, sum eftir søgnini drupu son hansara fyri eygunum á honum og noyddu hann sjálvan at leypa

---

[1]) Staðarsett Kjøbenhavn, finnst í nýprentaðum savni av gomlum donskum lógum innan Donsku lóg Kristians V. [2]) Av 27. febr. 1643, prentað saman við gomlum donskum lógum undan Donsku lóg Kristians V. [3]) Oddgeir Stephensen og Jón Sigurdson: Lovsamling for Island, København 1853, første bind (1090–1720) bls. 84–90. [4]) Lb. fol. 198 b og 199 a. [5]) Tá hava Føroyar altso verið komnar undir Sælands stift. [6]) Fær. kongsb., bls. 250.



niður fyri høgt berg, og tað saman við ringu samvitsku hansara kann hava rivið málið um leysingarbarnið upp av nýggjum. Tingmálið í 1632 vísir okkum ikki harra Poul sum ein øran mann. N. Andersen heldur í síni bók: Færøerne, at nýggi presturin í Hvalbø, Hans Hanssøn Hardi, man hava rivið hetta málið upp.

Allar keldur tykjast at vilja dylja burtur málið um leysingabarnið uttan løgtingsbókin. Jacob Christensøn Klinte, sum var prestur í Suðuroy 1656–79, sigur um harra Poul, at hann gjørdist heilabrekaður av turkunum, og at hann fór úr kalli sínum til Noregs[1]). Ikki man tað hóska, at hann er farin hagar beinan vegin.

Frá 1630 til 1632 er harra Poul leigari av Lítlu Dímun, og í 1633 stendur bótin, 60 gyllin, uppførd undir Streymoy. Í 1632 er harra Poul ætlandi fluttur til Havnar; har búði svágur hansara, Hans Rasmussøn prestur. Í Havn man hann hava búð til 1634.

Frá 1634 til 1642 stendur *Hr. Poul Rasmussøn* uppførdur í bóndabókini sum festari av 6 mørkum í Streymnesi[2]), men í einum fótnota niðri undir talar rithøvundurin um *Hans Rasmussøn*, prest í Suðurstreymoy. Ætlandi er fótnotin eitt mistak. Um so er, man harra Poul eina tíð hava búð í Streymnesi sum avsettur prestur, í hvørt fall til 1642.

Nær Føroya kirkja er komin undir Sælands bisp, finnst ongar staðir týðuliga sagt uttan í bók Lucas Debesar 1573[3]); men søguligar umstøður tala fyri, at tað er hent um 1620, tá hitt íslendska handilsfelagið fekk einarætt til handilin í Føroyum, tí hetta felagið hevði miðstøð sína í Keypmannahavn. Áður hevði Bjørgvin mest verið miðstøð fyri Føroya handil, og í teirri tíðini finna vit javnan ungar føroyingar lesandi í Bjørgvin og menn úr Føroyum ferðandi hagar. Eftir 1620 kom leiðin altíð at liggja um Keypmannahavn.

*XII.* Nøkur dømi skulu verða tikin fram í spurningum um leysingabørn. Eftir 1620 tykist fútin at hava lyndi til at leggja danska lógGávu til grund í slíkum málum, her hina lítlu recessina frá 1615.

Hin 17. august í 1619 var mál fyri á tingi um, at giftur maður í Dali, Niels Arnbjørnsøn, var komin fyri barn heystið fyri við Agathe Simonsdatter úr Skálavík. Hóast Ata (Agathe) nevnir henda mannin og ongan annan sum barnafaðir og greiðir gjølla frá tilgongdini, fær Niels Arnbjørnsøn tó loyvi eftir Norsku løgbókini at svørja seg við manna eiði leysan frá barninum[4]). Bæði ein og tveir dagar ganga og Niels fær eingi vitni, sum vilja svørja. Í staðin fyri at døma útsetur tá løgrætturin málið til næsta ár. Hetta árið er eingin viðgerð av málinum innførd í tingbókina, men vit síggja, at maðurin og gentan eru dømd í bót 6 merkur í silvuri hvør. Árið fyri hevði tó tingið víst gentuni burtur úr Sandoynni. Av málinum sæst, at skyldskapur hevur verið til staðar. Stóridómur er týðuliga lagdur til grund fyri avgerðina.

Hin 2. aug. 1636 sæst dómur gjørdur yvir systkinabørnini, Peder Hermandsøn, sum tænti í Hósvík, og Marion Hansdatter, ið vóru

---

[1]) N. A. Fær., bls. 362 og D. D. R. A., D. D. K., millum skjøl frá «Færø kommissioner» 1672–73 bræv 5/8 1672 frá Jacob Klinte presti. [2]) Fær. kongs. bls. 79. [3]) L. D., útg. «Frams» 1903, bls. 279. [4]) Um «Tylter ed», «Sætter ed» og «Lyritter ed» sjá «Norsku løgbókina, Tyve Balken, kap. XIV, XV og XVI.

komin fyri barn saman. Fútin krevur lívsstraff ella hóskandi dóm, men løgrætturin dømir tey at bøta til kongs $4^1/_2$ mørk í silvuri hvørt, «eftersom udi den Store Islandske Dom formeldes, og efter som her tilforn altid haver været dømt.»[1]). Her varð Peder Hermandsøn dømdur at rýma av oynni.

Beint aftaná stendur innførdur í tingbókina dómur yvir Joen Nicolaussøn og Katrine Trondedatter í Eysturoy, tí tey vóru komin fyri barn saman og maðurin var giftur. Fútin biður um dóm yvir tey. Løgrætturin vísir bert á, hvat Stóridómur sigur um slíkt brotsmál og dømir hvørt teirra at bøta 6 merkur í silvuri til kongs.

Føroya løgting hevur í tílíkum málum einans nýtt Stóradóm sum rættargrundarlag til 1652 og hevur javnbjóðis hervið víst á gamlan føroyskan tingsið. Táið hendan linjan í einstøkum førum verður brotin í 1653, man tað helst vera tí, at gamli løgmaður, Jóan Jústinusson, hetta árið hevur verið við at falla frá. Árið eftir er hann horvin úr løgtingsbókini.

*XIII.* Sum dømi um stuldursmál skulu trý mál verða tikin fram frá 1636, sum kemur inn undir Føroya siðloysis- og neyðartíð. Mannasøgnin sigur eitt av hesum málum vera drápsmál. Tað er málið um *Húsarænararnar*, ið stutt avgjørt er innført í tingbókina soleiðis:

«Gutti Reinholtsøn, Geddion Reinholtsøn, Thorberg Andersøn, Holdan Guttesøn, Hendrik Guttesøn, Nicolas Guttesøn og Isak Guttesøn for deres store ubarmhjertighed imod nogle døde mennesker, som de fandt i en båd på søen og ikke vilde bjerge dennem, men røvede de arme mennesker og tog af båden 3 fiskesnører, 1 flynder [og] 3 fiske, vurderet 2 gylden, er dømt efter egen bekendelse at bøde til kongl. majestæt hver for sig 4 mark sølv, er benådet på 39 gylden.»

Meira stendur ikki, men at hetta sipar til somu hending, sum vit finna aftur í søgnini um Húsarænarnar, er ivaleyst[2]).

Fýra merkur í bót hvør skuldu verið 28 merkur til allar. Eftir tátíðar virði skuldi hetta verið 67 gyllin 4 skinn. Uppfatað má tað vera sum galdandi fyri allar, táið bótin avrundað er sett til at verða 39 gyllin, altso sett næstan niður í helvt. Hesa avrunding tykist løgtingið at hava gjørt. Tað sær út, sum Norðoya várting hevur dømt Húsarænarnar harðari, enn løgtingið gjørdi, og hetta er skiljiligt av tí, at brøgd teirra óivað vóru best kend í Norðuroyum.

Stuldursmál úr Sandoy 1936:

«Simon Zachariassøn for han stjal 3 fjerdinger korn, vurderet 3 gylden, er dømt at have forbrudt til kongl. majestæt alt, han ejer, og lide sådan straf, som ombudsmanden vil hannem pålægge, dog beholde sit liv. Er intet at bekomme.»

Og undir sama ári:

«Magdalena Simonsdatter for der fandtes i hendes kiste en klud,

---

[1]) Lb. fol. 232 b. Tey hava biðið kong um at sleppa at giftast, men kongur svarar løgmanni 22/2 1637: «Da bede vi dig og ville, at du dig udi samme sag efter den Store Islandske Dom, som du dig påberåber, så vidt den utvivlagtig indeholder og befindes, forholder». [2]) Lb. fol. 229 a. Sjá annars Tingakross í 1953 nr. 24 og nr. 25 og søgnina *Húsarænarnir* í «*Færøske folkesagn og æventyr*».



vurderet 1 gylden, og kom samme klud Rasmus Olesøn til. Er hun dømt at have forbrudt til kongl. majestæt alt det, hun ejer, og lide sådan straf, som kongens ombudsmand vil hende pålægge, dog beholde livet. Er intet at bekomme.»

Umframt áðurnevndu trý mál skulu 2 verða tikin fyri Eysturoy frá 1637. Fyrst eitt reint stuldursmál:

«Nicolas Blasiussøn for han stjal et skerpekrov og to fodemør, vurderet 6 skind, er dømt at løse sin hud med 3 mark sølv til konningen. Er intet uden 1 gylden jord og 1 søjd.»

Óprógvað ákæra fyri stuldur:

«Jacob Nielssøn for han sagde, at Jacob Joensøn havde bundet et lamb ulovlig og kunde det ikke bevise, er dømt at sidde i jern og få 3 bytter vand over sig.»

Húsarænarnir tykjast at kunna hava fingið dóm eftir tyvebalken kap. VI og VII í Norsku løgbókini, stuldursmálini úr Sandoy eftir kap. I., stuldursmálið úr Eysturoy somuleiðis.

Sum nevndu dómar vísa, hevur lítið verið av ognum hjá teimum, sum stolið hava. Tey tiknu dømini benda nógv á hungursstuldur.

*XIV.* Ólavsøkudag 1642[1]) var kongl. valdhavandi á Íslandi og tá kongl. sendimaður í Føroyum, Pros Mund til Grevensvænge, møttur á løgtingi í Havn og las har upp umsókn til kongs, sum Føroya próstur og prestar í fjør høvdu sent við bøn um, at kongur vildi taka sær av at fáa betri skil á í Føroyum viðvíkjandi tjóvum og landastrokum.

Fútin, Mads Christensøn, sum tá hevði verið 22 ár í tænastu — tingbókin sigur 24 — tykist at kenna seg eitt sindur undarliga við, og hann krevur vitnisburð frá fólki og tinginum um, hvørt hann hevði framt øll mál eftir lógini, sum klaga var komin til hansara um. Prestarnir svara beinanvegin, at bræv teirra til kanslarans ella kongs avgjørt ikki var at fata soleiðis, at teir høvdu nakað at finnast at fútanum, sum hevði gjørt alt fyri at fremja rættvísi á landi.

Sama dag sigur tingbókin frá:

«Lod ærlig og velbyrdig mand, Pros Mund til Grevensvænge[2]), kongl. majestæts befalingsmand over Island læse og forkynde kongl. majestæts nådigste brev og befaling anlangende løsgængere og tyve. Da blev efterfølgende personer fremført af sysselmændene i hver ø:»

Úr Eysturoy 2, úr Streymoy 4, úr Sandoy 3 og úr Suðuroy 3. Umframt eru nevndir tveir, sum einki verður sagt um, hvaðan teir eru. Tilsamans vóru altso 14 menn, teir flestu «løsgængere (stripper om landet) og vil ikke tjene godtfolk,» einstakir vóru komnir fyri leysingarbarn ella høvdu stolið. Táið tingbókin umtalar ongan teirra gjøllari, eru teir bert nøvn í teirri stóru fjøld, og eftir sammeting við tingdómar um somu tíð skuldi tað verið løgið, um ikki aðrir hava fylgt við. Hetta tingmálið endar soleiðis:

Disse forskrevne er dømt til Bremerholm udi jern efter den miskund, som den høje øvrighed vil gøre med dennem.»

Hvat henda miskunn var, vita vit: tvangsarbeiði í jarni. Við slíkum

---

[1]) Lb. fol. 260 b. [2]) Lb. fol. 262 a.

arbeiðskreftum allar staðir frá í ríkinum er t. d. ein partur av teirri gomlu havnini í Keypmannahavn bygdur upp.

Undir manshelgebalken kap. 24 hevur hin Norska løgbókin frá 1604 harðar ásetanir. Har stendur, at maður, sum er arbeiðsførur og tó fer runt um landið at biðja, hevur mist allan rætt, «bør ingen ret at have.» Í Føroyum var tað tó møguligt at fáa biddararætt við skjali frá fútanum.

Táið vit koma fram á stríðið um vøksturin av Tórshavnar býi og livimøguleikarnar har, eiga vit at minnast áðurnevndu ásetingar í Norsku løgbókini. Áðurnevndi dómur vísir, at bygdirnar hava heldur ikki verið sørar fyri tílíkar biddarar.

*XV.* Ólavsøkudag 1645 varð tingskrivarin, Jacob Willumsøn Hannemand dømdur úr starvi. Eftir N. Andersens bók: Færøerne, var[1]) Jacob Willumsøn tingskrivari 1642—45, men skrivtin í tingbókini vísir, at hann hevur verið skrivari á tingi 1641—44, bæði árini viðroknað, og vit síggja, hann er dømdur úr starvi ólavsøkudag 1645. Handskrivt hansara er eyðkend og vøkur.

Gamli fútin, Mads Christensøn Gullandsfar, var deyður í Keypmannahavn um veturin 1644—45[2]), og tað sær út, sum Jacob Willumsøn ímeðan hevði tikið sær væl so nógv ræði. Kanska hevði hann tá væntað at verða fúti, men kongur sendur nýggjan mann, Hans Selmer, sum fúta til Føroya, og hesin reisir so klagumál á tingi móti Jacob Willumsøn Hannemand við stuðli av løgmanni og løgrættumonnum, mest viðvíkjandi bygging av Tinganesskansanum, sum løgtingið í 1630 kevði fyriskipað.

Oivað hevur Jacob Willumsøn havt Havnarmenn við sær, táið hann noktaði at veita arbeiðskraft til Tinganesskansan, tí hesum arbeiði tykjast Havnarmenn at hava liðið ilt undir. Eftir at Lucas Debes var komin til Havnar í 1651[3]), bóðu teir hann um at hjálpa sær fyri at koma undan hesum arbeiði; harav stóðst nógv stríð, tí løgtingið var altíð ímóti Havnarmonnum.

Ivaleyst hevur tingskrivarin, Jacob Willumsøn Hannemand, ikki havt rætt til at senda boð í brævi út um landið — helst gjøgnum sýslumenninar — í navni gamla fútans, men eina góða mynd gevur hetta bræv okkum kortini av skilinum á landi, helst sum tað var í Havnini. Hin nýggi fútin førir tríggjar klagur fram móti Jacob Willumsøn Hannemand:

1) «Eftersom han først imod kongl. majestæts mandater understod sig imod hans majestæts undersåtter her i landet med ond omgængelse, hug og slag, som hannem lovligen for retten blev overbevist.

2) For det andet eftersom den nybegyndte skanse ikke efter hans vilje funderet var, men efter deres egen vilje og samtykke, som på den tid til stede var den gamle skanse at besigtige enten til preparering eller en anden at fundere, hvis dem selv for godt syntes, landet kunde være udi denne brøstfældige tilstand til defension med mere, samme tid forhandlet blev, da eftersom den nye skanse begyndtes at funderes og grundes, havde han efter afsked med dennem ladet tilsige almuen, hvilke sig mestendels godvilligen haver ladet finde både her i Havnen såvel som de andre samme værk at fortsætte og forfærdige, da på det ingen skulde forskånes, haver forn. hans majestæts foged ladet Jacob Willumsøns folk ved sin tjener, Nichlas Urne, tilsige, ikke en gang, to eller tre, men tidt og ofte haver bekommet onde ord og svaret hannem ilde: de havde ikke bebov at arbejde på den ny skanse, thi deres husbonde, Jacob Willumsøn, havde ikke befalet dem at arbejde på samme skanse. Men dersom den gamle skulde forbedres, da skulde de alle så mange i huset var, men på den nye ingen af huset at gå. Satte derfor udi rette, hvad Jacob Willumsøn for sådan sin ulydighed bør at lide.

3) For det tredje eftersom Jacob Willumsøn havde på den salig mand, Mads Christensøns vegne uden hans commis [loyvi] i alle måder skriftlig budt og befalet som efterfølger:

Eftersom kongl. majestæts ombudsmand, Mads Christensøn, tidt og ofte til tinge haver ladet påbyde, at ingen skal fare omkring landet og bede sig uld tilsammen, og det intet agtes, da skal det nu forbydes, at ingen af dennem her i Havnen skal fare nogen steder at bede uld, eftersom en part stripper omkring landet og dermed kommer i ladhed og dovenhed og ikke vil fare på søen, når Gud giver temmelig vejrlig, men stoler på, hvis de i så måde kan sammen samle, og bruger dermed deres købmandsskab, når skib kommer til landet.

I lige måde er og tilforn forbudt, at ingen løse kvindfolk skal have deres værelser her udi Havnen, hvilket forbud ej heller agtes eller holdes over, som det sig burde, formedels sysselmanden her tildags ingen opsyn dermed haver haft, men går nu i svang jo længer jo mere, at adskillige løse folk, hvorfra de og kommer, da bliver de her beliggende, og en part løse genter, som lægger sig inde hos forældrene og ikke vil tjene, men stoler alt derpå, at de kan samle uld tilsammen og ligge at lunke og have deres egen vilje og øve dennem udi ladhed, hårdnakkenhed, sladder, bagtale og andet sådant.

Da på det, at den gode mands vilje og befaling kan efterkommes, skal ingen mand fordriste sig til at fare bort over nogen fjord, men enhver skal blive udi den ø, som de er, og bede tilsammen, hvis de kan få der, og ikke fare videre.

Såfremt nogen farer bort her af Havnen og ikke bliver til stede, om noget kunde påkomme, hvilket Gud nådelig afvende, da skal de derfor straffes med fængsel og siden udgive deres bøder, når Gud vil, kongl. ombudsmand kommer udi landet, hvis han dennem vil pålægge.

Hvem dette ikke vil agte, han foragter Mads Christensøn. Herefter enhver skal have sig at rette og for skade tage vare.

Kongl. majestæts ombudsmand på Færø

*Mads Christensøn.»*

1) Lb. fol. 280 a—281 b. 2) Lb. fol. 278 a, 280 b og 281 b. 3) Sum hjálparprestur hjá Hans Rasmussøn. Sjá annars Fær. kongsb. bls. 34 og N. A. Fær., bls. 390.

Gamli fútin Mads Christensøn, er altso deyður í Keypmannahavn um veturin 1644—45. Fyrsta klagan, sum nýggi fútin ber fram móti Jacob Willumsøn tykist at benda á, at tingskrivarin hevur verið settur sum vetrarfúti, táið Mads Christensøn fór úr Føroyum um heystið 1644. Klagan um «ond omgængelse, hug og slag» hevur lítla meining, uttan hon er vend móti einum, sum hevði beinleiðis við fólkið at gera, og tað kundi vera hin virkandi fútin ella keypmaðurin.

Onnur klagan er óivað høvuðsklagan í ritinum. Har er Jacob Willumsøn klagaður fyri ólýdni viðvíkjandi skansaarbeiðinum, og ólýdnið er týðuliga vent ímóti Tinganesskansanum og ikki ímóti skansaarbeiðinum yvirhøvur, altso ímóti løgtingsins støðu í skansaspurninginum. Óivað hevur bygging av Tinganesskansanum í síni tíð eisini verið Mads Christensøns støða.

Eftir triðju klaguni sær tað út, sum Jacob Willumsøn hevur misbrúkt Mads Christensøns navn, táið hann hevur sent sýslumonnum rundskriv sítt, og upp á tað verður hann eisini feldur. Óivað gevur hetta skrivið tó eina góða mynd av Føroyum í teirri tíðini viðvíkjandi tí neyðarsliga partinum av fólkinum.

Viðvíkjandi fyrstu klaguni dømdi løgrætturin Jacob Willumsøn at bøta 4 merkur av silvuri til kongs.

Um dómin í øðrum klagumáli stendur:

«For det andet blev Jacob Willumsøn tilkendt for sådan sin ulydighed at straffes med fængsel, uden ombudsmanden vil hannem benåde.»

Dómurin í síðsta klagumáli ljóðar soleiðis:

«For det tredje da eftersom Jacob Willumsøn haver skriftligen budt og befalet udi kongl. majestæts ombudsmands navn uden hans commis og videnskab [viden], da blev for retten kendt ulovligen på den salig mand Mads Christensøn at være skrevet i hans fraværelse og derfor at kvittere sin bestilling og aldrig efter denne dag at betjene, men dersom Jacob Willumsøn sig herefter utilbørligen imod hans majestæts undersåtter forholder, da haver Hans kongl. majestæts foged sig forbeholden sagen påny at appellere og da at straffes efter loven som vedbør.»

Jacob Willumsøn Hannemand fekk altso fyrst bót, so fongsil, og síðan var hann frásettur sum landsskrivari. Teir, sum hava undirskrivað dómin, eru hesir:

«Joen Justinussøn, lagmand, Heine Justinussøn, Joen Isaksøn, Joen Thomassøn, Andres Arentsøn, Joen Olufsøn og Blasius Ellendsøn med vore signeter.»

Undir 31. juli 1647 [1]) er aftur innførdur dómur yvir Jacob Willumsøn orsakað av máli, sum skuldi hava verið fyri á tingi í 1642, men sum tó ikki finnst í tingbókini undir hesum ári, men er líka nevnt undir 1641:

«Simon Guttesøn for retten fremkom og havde sig at klage over Jacob Willumsøn for hans onde og ulovlige skrivende, idet han den skyldige for den uskyldige indskrevet haver.»

Síðan verður skrivið endurgivið, sum er dagsett 29. juli 1642, og

1) Lb. fol. 294 b.



harí stendur, at Peter Børgesen, bóndi á Velbastað, hevur klagað Simon Guttesøn bónda sama stað fyri, at hann hevði funnið eitt tinbelti, sum Pætur átti, og sum Símun var lagstur á, men rætturin avgjørdi, at Símun skuldi geva Pæturi beltið aftur. Og skrivið endar við: «Herefter Peder Børgesøn var en udskrift af tingbogen begærende, som hannem ikke kunde benægtes. At således inden tinge er gået og faret, som forskrevet står, vidner jeg underekrevne svoren landsskriver med egen hånd.»

Jacob Willumsøn kundi nú í 1647 ikki avnokta at hava býtt nøvnini á monnunum um og varð fyri tað dømdur at bøta 4 merkur í silvuri til kongs, uttan fútin vildi eftirgeva honum bótina. Eftir dóminum tykist Jacob Willumsøn enn at hava búð í Føroyum. Teir dømandi vóru:

«Bærent Jacobsøn, Jacob Zachariassøn, David Olufsøn, Andres Arentsøn, Blasius Ellendsøn, Gregers Poulsøn.»

Løgmaður er ikki nevndur, men hann man hava verið við í dóminum. Dómurin vísir, at tingmál viðhvørt eru komin skeivt fyri í tingbókini, hóast teir parthavandi í málinum hava fingið skriv frá tingskrivaranum um avgerðina. Jacob Willumsøn Hannemand var nýkomin til Føroya í 1641, so menninir vóru honum ókendir. Tingbókin sær annars út til at vera hampuliga førd undir hansara hondum.

*XVI.* Ólavsøkudag 1646 dømir tingið annan embætismann, Norðoya sýslumann, Guttorm í Gerðum, úr starvi [1]). Umframt at vera sýslumaður var Guttormur bóndi í Gerðum í Klakksvík (tá norður í Vági). Hann var bróðursonur Guttorms løgmanns og systursonur Mikkjals í Lamba, so hann skuldi havt máttmikla ætt á landi. Sum tingbókin vísur, hevur málið verið avgjørt fellandi fyri hann sum partur av løgverju landsins, og av tí at sakarmálið gevur eitt týðuligt innlit í fólkalív og framferð við loynihandli í teirri tíðini, verður øll innføringin í tingbókini endurgivin her, meðan umtalan av Guttormi annars er løgd undir Lambaættina.

«Vi efterskrevne Joen Justinussøn, lagmand, Simon Thomassøn, Poul Isaksøn, Morten Holdansøn, Jens Simonsøn, David Olufsøn, Gregers Poulsøn, Joen Isaksøn, Ellender Pedersøn, Morten Hanssøn, Jesper Joensøn, Jacob Zachariassøn og Jacob Joensøn svorne lagrettesmænd udi samme land gjører vitterligt, at anno 1646 den 29. juli på et sat lagting udi Thorshavn på Færø for os og flere dannemænd, som samme dag til stede var og ting søgte, lod ærlig, vis og velforstandig mand, Hans Selmer, kongl. majestæts foged her sammesteds, for retten fremkalde Guttorm Nielssøn af Norderø, hannem tiltalte og beskyldte i slig måde, som følger:

Eftersom Guttorm Nielssøn haver udi nærværende årført udi hår sammen tvende fremmede skippere, som var Fermus, en engelskmand, og Richart Olufsøn, en hollænder, og siden faret fra engelsken til hollænderen og varet hannem ad, at engelsken ville tage hannem, hvorfor hollænderen havde givet Guttorm 25 rigsdaler, fordi han varet hannem ad, hvorfor Hans majestæts foged gav hannem fuldkommen sag, efterdi Guttorm Nielssøn som en sysselmand ikke burde at til-

1) Lb. fol. 285 a.

stede nogen fremmed at handle med landets indbyggere imod Hans majestæts privilegier, som han det islandske og færøske kompagni givet haver, og efter mine breve ikke alene i år, men forleden år både skriftlig og mundtlig på Hans majestæts vegne advaret, og dersom det ikke efter mit brev såvel som mine mundtlige påmindelser kan skaffe fragt, vil jeg udi det og andet mere være undskyldt i alle måder, og efter hans ed at være en utro tjener.

Derefter lod Hans kongl. foged, Hans Selmer, fremkalde Andres Arentsøn, Joen Arentsøn, Oluf Arentsøn, Gabriel Andressøn og Zacharias Michelsøn, at de skulde vidne det sandeste, som de havde set og hørt, så sandt som dennem Gud skulde hjælpe og hans hellige ord.

Da fremsagde forn. mænd, som følger, at der Fermus kom ind, roede vi til skibet. Guttorm kom ind fra Fermus' skib og for så til hollænderen, noget førend vi kom til hollænderen. Så kom skibsfolkene farende imod os (dog vi blev stående i båden) og sagde, det var en tyv, der lå ude. Da svarede vi: Gud bevare os! At skulde det være en tyv, der lå ude! Da svarede de, at Guttorm havde sagt det, så vi blev såre ræd, at både bævrede og skjalv vi, thi vi tænkte, at vi var såre ilde forkommen.

Da begærede vi, at de vilde fremkalde os en af Husemænd, og spurgte vi hannem ad, hvem den var, som lå derude. Da svarede han, at det var Fermus. Da vi hørte, at det var Fermus, roede vi hen til hannem. Da vi kom fra Fermus' skib atter til hollænderen, hørte vi Guttorms ord, at Fermus skulde tage hollænderen, og sagde til skipperen, at han var til freds, at han var uden øen.

Anden dagen derefter roede vi ud til hollænderen. Såsom vi kom ud til skibet, gik vi alle op i skibet. I det samme kom islænderen og de andre skibsfolk foran imod os og sagde: Hvor er Guttorm? Han haver penge fra hollænderen. Dertil svarede vi: Hvor mange var pengene? Da svarede skibsfolket, at det var 25 daler. På den tid var ikke Guttorm udi skibet.

En halv time derefter kom Guttorm farende ud til hollænderens skib. Den tid vi først kom til skibet, var hollænderen ikke vel tilfreds, og som Guttorm var kommen om bord, gik han agter i kahytten til skipperen og Fermus. Så sad de nogen tid derefter og drak.

Da fik vi at høre, at der kom noget bulder imellem dennem derinde. Da begyndte skipperen på hollænderen ved navn Richart Olufsøn at true Guttorm, tog fat i hannem og rystede hannem sigende: O, din skælm og din tyv: Du haver haft mine penge og vil ikke betale mig. I det samme lå en kniv på bordet. Den tog købmanden op ved navn Bærent Joensen og slog kniven efter Guttorm, så den blev siddende fast udi bordet. I det samme tog Andres Arentsøn fat på kniven og stak den bort i bjælken. I det samme greb købmanden og efter kniven, men Andres var snarere end købmanden. Der det var sket, kom en af bådsmændene ind og fik fat på Guttorm. I det samme fik Joen Arentsøn fat og holdt hånden på samme bådsmand, at han skulde ikke fordærve manden.

Som det led da ad aften, drog hollænderen i land og Guttorm med hannem. Da sagde hollænderen, at han kunde ikke vide, hvad det



skulde betyde (betye), at Guttorm gik så snart. Som hollænderen kom ind i Gerdum, var alle nøglerne borte. Da viste sidstepigen udi græsset at skulle lede efter dennem. Hvor det siden er afløben, er os ikke bevidst.

Da eftersom at vidnesbyrdene var forhørt, tilspurgte hans majestæts foged, Hans Selmer, Guttorm Nielssøn, om han havde der noget imod at sige, at han da med lovlige prov og vidnesbyrd skulde fremkomme og forsvare sig som en kongl. sysselmand svoren sin ed Hans kongl. majestæt som en tro sysselmand at tjene.

Da efterdi han sig for sligt angivende ikke kunde for defendere, satte Hans majestæts foged udi rette, om han ikke udi hans sysselmandsbestilling havde tjent Hans majestæt som en svoren kongl. utro tjener, om han da ikke bør at være udi kongl. nåde og unåde, hvorpå han var dom begærende.

Da efter tiltale og gensvar og denne sags lejlighed haver vi forn. mænd derudi kendt og dømt således, at efterdi Guttorm Nielssøn imod Hans majestæts brev højligen haver forbrudt og forgrebet sig, at han da skulde have forbrudt sit lejemål og sin bestilling kvittere, medmindre Hans majestæts ombudsmand på Hans majestæts vegne vil hannem benåde,

Til ydermere vidnesbyrd, at således for retten passeret er, vidne vi forn. mænd med vore signeter her nedenfor.»

Guttormur í Gerðum varð soleiðis í 1646 dømdur bæði frá Gerðagarði og sýslumannsstarvi. Festi hansara var 20¹/₄ mørk. Sum festari varð hann tikin til náði og varð sitandi á garðinum, men hann misti sýslumannsembætið. Eftir hann hevði Joen Heinesøn, bóndi í Fugloy, eitt ár sýslumannsstarvið, og í nøkur ár var tá Jóan Pállsson, ið seinri gjørdist løgmaður, Norðuroya sýslumaður. Aftaná hann kom hin tiltikni Hanus í Gerðum, ið var sonur av Norðuroya presti, Hans Gabrielsøn Mitens.

Framman fyri nevnda sakarmál, ið feldi Guttorm í Gerðum, vísir, at loynikeypsskip í teirri tíðini hava nýtt Klakksvík sum havn. Vit síggja, at tvey tílík skip hava ligið inni har ísenn meira enn tveir dagar. Hálendingurin tykist at hava verið væl útgjørdur og hava havt serligan keypmann um borð. Fermus var tá gamal kenningur í Føroyum. Hann hevði mist tvey skip við oyggjarnar. Annað strandaði á Hvannasundi, og annað varð skotið av kápara inni á Hvalbø. Fyri rættinum í Havn hevði Fermus verið í 1643. Hann tykist sjálvur bæði at hava verið eigari og reiðari. Vit síggja Húsamenn til handils inni í Klakksvík tá, og aðrir menn úr grannabygdunum hava óivað eisini vitjað hesi loynikeypsskip.

Teir, sum vitna móti Guttormi í Gerðum, vóru menn úr Vági og av Uppsølum. Tveir bøndur norður í Vági eru nevndir: Jóan og Andras Arantson og ein bóndi av Uppsølum: Oluf ella Ólavur Arantsson. Í tingbókini finnst einki mál um loynikeypsskap av hesum tilburði. Nógv man tó hava verið handlað við skipini, bæði keypt og selt. Húsamenn, sum vóru um borð í hálendinginum og sjálvsagt vóru komnir inn fyri Klakk, vistu at siga frá, at hitt ytra skipið var hin kendi bretski loynikeypmaðurin Fermus.

*XVII.* Í 1646 var eisini eitt mál á tingi, sum tá í tíðini lætt kundi

ført deyðadóm við sær[1]). Tað var um mann í Mikladali, Michel Simonsøn, og bróðurkonu hansara, Marion Nielsdatter, sum vóru skuldsett fyri at sova saman. Brøðurnir, Mikkjal og Tórmóð Símunarson, høvdu í felag festi, 2³/₈ mørk stórt, og líkt er til, at Tórmóð — eisini eftir bóndabókini at døma — var deyður, táið hetta hendi.

Ólavsøkudag, sum málið hjá Guttormi í Gerðum var til viðgerðar á løgtingi, varð eisini dømt í hesum máli; men hendingin skal vera farin fram í 1645, tá Mikkjal og bróðurkonan sigast at hava deilt song saman í 8 dagar.

Presturin, Hans Gabrielsøn Mitens, Guttormur í Gerðum sýslumaður, Jóan Heinason vetrarfúti og bóndi á Glyvrum, og Andras Arantson bóndi í Vági og løgrættumaður, vóru farnir til Mikladals at kanna hetta mál. Har verður avhoyringin gjørd í kirkjuni, meðan presturin og vetrarfútin eru til staðar. Óivað hevur hetta verið um heystið 1645. Trý vitni vórðu aftaná kallað inn í kirkjuna, og táið tey vóru út aftur komin, spurdi vetrarfútin øll, sum á kirkjugarðinum stóðu, um hesi viðurskifti.

Vitnað varð einki annað enn, at Mikkjal og Marjun í eina viku høvdu nýtt song saman, men høvdu ligið íklædd. Ímillum teirra hevði eitt barn ligið, og á gólvinum framman fyri seingini svóvu tvey ung fólk. Sjálv noktaðu tey at hava havt nakað meira saman, og prógv og vitni vóru eingi fyri tí.

Hetta málið vísir, hvussu ússalig húsviðurskiftini hava verið hjá meðalføroyingum í teirri tíðini; tí ætlandi hevur hetta verið eitt meðalheim, sum hevði tætt við hálvatriðju mørk av kongsjørð, og táið so var, mundi nakað av óðalsjørð vera aftrat.

Klaguritið við avhoyringini í Mikladali hava presturin og sýslumaðurin undirskrivað. Eftir tí sigur rætturin:

«Da efter sagens lejlighed blev der for retten således kendt og pådømt: Efterdi forn. 2 personer, Michel Simonsøn og hans broders kvinde, Maren Nielsdatter, udi otte samfulde dage haver søgt seng sammen, og efterdi sligt giver stor forargelse, dennem at have forbrudt deres lejemål og en af dem at rømme øen uden Hans majestæts ombudsmand på Hans majestæts vegne vil dennem benåde.»

Teir dømandi í málinum vóru mest norðoyingar:

«Joen Justinussøn lagmand, Heine Justinussøn, Andres Arentsøn, Joen Poulsøn, Søren Rasmussøn og Joen Olufsøn.»

Bóndabókin vísir, at enn í 1642 høvdu brøðurnir Mikkjal og Tórmóð festi saman[2]), stórt 2³/₈ mørk, og í 1649 hevði maður nevndur Hendrik Justinussøn fest hesa jørð aftrat sínum festi. Alt tað er nú Hússtovufestið, sum er 4⁵/₈ mørk stórt.

*XVIII.* Í 1647 dømir løgtingið Jóan Heinason á Glyvrum í bót og frá garði sínum[3]). Faðir hansara hevur altso itið Heini, og Jóan var abbasonur Jóans Heinasonar løgmanns. Við vissu vita vit ikki, hvar hesin Heini hevur búð. Hann kann ikki vera tann Heini Jóansson, sum sagt er frá búði í Sørvági; líkt er til, at hann hevur búð á Skála ella onkunstaðni í Eysturoy.

Dómurin yvir Jóan Heinason á Glyvrum er bert eitt av nógvum

1) Lb. fol. 288 a. 2) Fær. kongsb. bls. 121. 3) Lb. fol. 296 a.



dømum um tað klandur, sum altíð var til staðar í teirri Heinasonsku ættini ella Lambaættini. Árið fyri, 1646, tekur Nils Jákupsson, Glyvraskrivarin kallaður, við sum tingskrivari. Eftir henda dómin hevur Nils Jákupsson fingið festið á Glyvrum eftir Jóan Heinason. Søguliga sigur hetta tingmálið so nógv, at tað í síni heild skal verða endurgivið eftir innføringini í tingbókini:

«Vi efterskrevne, Simon Thomassøn, Poul Isaksøn, Jesper Joensøn, Jacob Holdansøn, Jacob Joensøn, Joen Pedersøn, Morten Hanssøn, Johannes Guttesøn, Anders Simonsøn, Joen Thomassøn, Oluf Pedersøn, Søren Rasmussøn og Joen Simonsøn kendes med dette vort åbne brev, at år efter Guds byrd 1647 den 31. juli for os for retten fremkom Samuel Michelsøn og havde sig over Joen Heinesøn højligen at beklage udi slige måder, som hans indlæg derom formelder, lydende ord fra ord som efterfølger:

Anno 1647 den 16. marts haver jeg underskrevne på mine egne og min salig faders vegne ladet til *Selletrød* vårting lovligen stævne kongl. majestæts vinterfoged, Joen Heinesøn, boende på *Glivre*, af efterfølgende årsager, at han forleden vinter den 27. nov., som var fra dagen før den første søndag udi advent, da alle og enhver kristen burde udi gudelig kærlighed at berede [skr.: bereide, i=y] sig imod den glædelige højtid, som da tilstundede, min salig fader udi sin høje alderdom og store skrøbelighed, sin egen faderbroder og mig underskrevne stor overvold og uret uformodende haver påført, idet han bemandet med sin båd er faren til vort bjerghus *Qualsins ret* [hvalsins rætt] kaldet og der os udi alle måder uvitterligt haver opbrudt vore låse, som der foresad, ikke alene haver spildt og forkommet, hvis [hvad] udi huset var, imod loven, men og nedbrudt huset, os berøvet, bortført og sig til profit, men sin gamle faderbroder til harm og spot på Glivre opsat og med sådan trodsig adfærd haver ført hans grå hår med sorrig og bedrøvelse i graven. I den sted Joen Heinesøn sin faderbroder og hans børn efter loven skulde defenderet og forsvaret.

Og med sådan sin trodsige foretagende haver han betaget min salige faders børn og folk samt og mig, min hustru og børn samt vore tyende vor kirkevej, Havnefærd, qualregster [hvalrakstur] og fast halvparten af vor næring og bjæring, eftersom alle er vitterligt, med hvad farlighed kirken kan søges om vinteren, udi synderlighed når man skal fare om Østnæs; tilmed kan skrøbelige kvindfolk om vinter dog ikke komme ned af ejdet til båds udi sne og is, hvorfor og forn. hus er af arilds tid bevilget at stå på det sted, som det nu ved øvrighedspåbud og strenge befaling igen er opsat og tilbageført, dog så passeligen lovligt eller forsvarligt, hvilket jeg og haver ladet skellige dannemænd bese, og vil jeg ikke nøjes med sådan igenførsel, medmindre mig bliver nøjagtig husebod tildømt såvel som og fyldestgørelse for, hvis [hvad] min båd er blevet fordærvet af vejr og vand af årsage, at nøstet blev indtrådt, der huset blev afbrudt.

Men eftersom jeg til vårting fik opsættelse i sagen, formedels der var ingen, som kunde søge kongens ret, så og at lagtingsmændene ikke ville understå sig at ordele og dømme udi denne sag for frændskabs skyld, da haver jeg nu forn. Joen Heinesøn til lagtinget citeret

og stævnet, bedende kongl. majestæts landfoged ydmygeligen, han på rettens vegne mig simpel mand i denne min retfærdige sag ville være beforderlig, jeg over Joen Heinesøn måtte bekomme dom og satisfaction efter loven, og at jeg fattige mand, som haver en stor indstød og en tung gård af kongl. majestæt, kunne leve udi fred og for sådan overvoldsmand efter denne dag blive forskånet, bedende, dette mit indlæg måtte læses, påskrives og mig igen tilstilles.

Actum Thorshavn den 29. juli anno ut supra.

*Samuel Michelsøn.*

Da efterdi Joen Heinesøn mod forn. indlæg intet vidste at svare eller sig udi nogen måde kunne undskylde, satte hans majestæts foged sagen udi rette og var dom begærende.

Da for retten fremkom forn. mænd og afsagde således, at efter Samuel Michelsøns indlægs formelding og Joen Heinesøns gensvar — som nu på denne tid intet er til sådan klage og sådanne poster, som samme indlæg udi sig holder — da efter samme sags lejlighed haver vi forn. mænd således forefundet og offentlig pådømt, at forn. Joen Heinesøn skal bøde til kongl. majestæt 10 mark og hver den, med hannem var og til hjælp, 1 mark sølv efter købebalkens første kap.; men nogle af de punkter, som forn. indlæg udi sig holder og kapitlet kan vedkomme, er vi begærende en afvisningsdom. Hvad lejemålet er anlangende, da at være forbrudt.

At så gået og faret er, vidne vi forn. mænd med vore signeter under trykt.

Actum Thorshavn ut supra.»

Hesin dómur er týðuliga gjørdur eftir Norsku løgbókini frá 1604, hvat teim áløgdu bótunum viðvíkir. Umframt varð Jóan Heinason dømdur frá festinum á Glyvrum, men dómurin setur hann ikki frá sum vetrafúta. Hetta man koma av tí, at hin veruligi fútin, sum var av landi staddur um veturin, sjálvur setti vetrafúta í sín stað.

Hvalsin rætt er uttan fyri Lambaeiði á Skálafirði og eitur soleiðis tann dag í dag. Har hava lambabøndur av fyrndartíðum havt hús og neyst standandi, og sjóvegurin suður eftir hjá Lambamonnum hevur nógv og kanska mest gingið henda vegin, sum tað sæst á brævinum hjá Sámali Mikkjalssyni. Vit vita, at um veturin 1624—25 kom ein stórhvalur á Skálafirði, ið Mikkjal í Lamba sum sýslumaður fekk nógv við at gera, men vit hava ikki prógv fyri, at navnið Hvalsins rætt kemur av hesi hending.

Líkindi eru til, at Jóan Heinason hevur ætlað at steingja Lambamenn burtur frá Skálafirði, ella hann hevur hildið seg átt á gamla uppgerð um faðirarv sín við Mikkjal í Lamba. Arvastríðið í Lambaættini hevði verið nógv.

Eftir Jóan Heinason tekur Nils Jákupsson tingskrivari við festinm á Glyvrum. Hann var sonur av Jacob Pedersøn Morsing, kallaður Gullsmið, ið sat sum sorinskrivari til 1640. Hesin Morsing hevði tveir aðrar brøður í Føroyum: Hans Pedersøn Morsing, ið var Streymoyar sýslumaður og kallaði seg herredsfoged, og Suðurstreymoyarprestur Christen Pedersøn Morsing. Sýslumaðurin, ið tykist at hava verið í



Føroyum innan 1600, hevur kanska verið elstur. Jóan Heinason verður nærri umtalaður undir Lambaættini.

*XIX.* Í 1648 fekk sýslumaðurin í Suðuroy, Jákup Hálvdansson[1]), líknandi dóm yvir seg sum Guttormur í Gerðum. Faðir Jákups, Holdan Gudloksøn hevði verið sýslumaður í Suðuroy undan honum.

Í august mánað 1647 fekk Jákup Hálvdansson við Suðuroyar løgrættumonnum givið upp í hendi av rættinum at máta prestinum, Hans Hanssøn Hardi, bøin av í stødd við stong og snóri. Rætturin hevði ásannað, at presturin við umbýti av innangarðsjørðini hevði fingið ov lítlan bø avmáldan. Sýslumaðurin við løgrættumonnunum í Suðuroy máldi tá bøin um, men aftur skeivt av, og fyri hetta og annað fær hann sín dóm. Dómurin er soljóðandi:

«Vi efterskrevne Joen Justinussøn, lagmand udi Færø, Andres Arentsøn, Heine Justinussøn, David Olufsøn, Anders Simonsøn, Oluf Pedersøn, Christian Zachariassøn, Jacob Danielsen, Johannes Danielsøn, Jacob Joensøn, Poul Joensøn, Joen Andfindsøn og Joen Pedersøn kendes og gøre vitterligt, at år efter Guds byrd 1648 den 18. juli på et sat lagting udi Thorhavn opstod ærlige, vellærde og velforstandige mand, Hans Selmer, kongl. majestæts foged over Færø, og for retten fremæskede Jacob Holdansøn og hans medfølgere ved navn Poul Isaksøn, Jesper Joensøn, Ellend Pedersøn, Morten Sivertsøn i. S. [i Suderø] for, at de ikke havde gjort efter Hans majestæts brev og efter lov og dom og overtrådt Hans majestæts mandater, hvorover Hans majestæts foged havde sig højligen over at klage og var derpå dom begærende.

For det andet, efterdi at de ikke haver efterkommet Hans kongl. majestæts bud og befaling imod lagmanden og hans medfølgende dommere, men imod lov og dom dennem højligen haver forset og ikke efterkommet dommen, som det sig burde, hvorpå jeg er dom begærende, om de ikke bør at straffes efter loven.

For det tredie, efterdi de dennem höjligen imod Hans kongl. majestæt mandater og imod loven dennem højligen forset haver og ikke efterkommet Hans kongl. majestæts mandater, hvorfor jeg sætter udi rette på Hans majestæts vegne, om de for deres høje forseelse bør ikke at straffes på deres liv og deres gods at være forbrudt til Hans kongl. majestæt, hvilke tre poster jeg på kongl. majestæts vegne er en absolut dom begærende.

Da efter denne sags lejlighed og eftersom vi haver gransket og erfaret denne sag så meget, som os muligt er, haver vi forn. mænd således forefundet og offentlig pådømt, at Jacob Holdansøn og hans medfølgere skulle bøde for domrov[2]) til kongl. majestæt 4 mark sølv hver for sig og at bøde til deres vederpart 1 mark sølv, og fordi at Jacob Holdansøn med hans medfølgere befindes at have målt jorden uret, da hver at bøde efter kong Christian den tredjes recess kap. 28 15 mark til bonden og så meget til konningen[3]), og Jacob Holdansøn sin bestilling at have forbrudt.

[1]) Lb. fol. 302 b—303 b. [2]) Norska løgbókin 1604, tingfarabalken kap. 6: «River eller straffer nogen den dom, som er dømt på lagtinget og samtykt af lagretten, da bøde den, det gør, konningen fire mark sølv for domrov og hans vederpart en mark sølv.» [3]) Hesa lógina sæst løgtingið annars ikki at hava nýtt.

At så gået og faret er, vidne vi forn. mænd med vore signeter under neden trykt.»

Sama ár varð Jákup Holdansson eisini dømdur fyri ólýdni at bøta til kongs eina mørk í silvuri, tí hann hevði ikki gjøgnum 3 ár stevnt fyri eftirstøður tveimum monnum, sum fútin hevði álagt honum at stevna[1]).

*XX.* Nevnt skal verða dømi um falskan eið, sum gjørdur hevur verið á tingi. Undir málum, sum komin eru úr Sandoyar sýslu í 1648, er fylgjandi dómur innførdur[2]):

«For retten blev fremkaldt Lambert Rasmussøn og gjorde sin bekendelse, at han ved sin ed ikke var skyldig udi den horsag med Elsebe Guttedatter.

Elsebe Guttedatter for retten bekendte, at Lambert Rasmussøn var så sandt fader til det barn, hun havde født, som hun var moder.

Efter sådan tiltale og gensvar dømme vi hendes ord til intet, og at hun skal bøde for sig og den rette barnefader 6 mark.» Aftaná er innført við øðrum blekki: «Antonis Joensøn og Joen Joensøn forlover,» t. v. s. teir veðhalda fyri bótina.

Hesir báðir, sum her geva veðhald, kunna væl ikki vera aðrir enn fedgarnir í Dalsgarði í Skálavík: Ungi Jóan og sonurin Antonis. Teir hava óivað longu tá kent seg vísar í, at Lambert Rasmusson hevði svorið falskan eið; hugsandi er eisini, at Elsuba Guttadóttir hevur tænt í Dalsgarði. Fólkasøgnin fer illa við unga Jóani og synum hansara. Nakað gott man hava búð í Jóani og Antonisi kortini.

Við hesum dómi er at merkja, at rætturin hevði bygt avgerð sína á eiðin hjá manninum, undirkent vitnisburðin frá Elsupu Guttadóttur, sum er ógvuliga týðuliga framborin, og metir hann falskan.

Innan árið er umliðið, kemur málið aftur fyri á Sandoyar vártingi. Tað, sum ímeðan hendi, sigur tingbókin einki um, og frá vártingi kemur tað 1649 aftur á løgting, og tá er bókføringin henda[3]):

«Lambert Rasmussøn for, at han havde svoret en falsk ed. Satte Hans majestæts foged udi rette, hvad forn. Lambert Rasmussøn for for sådan sin falske ed burde at lide. Blev således pådømt, at forn. Lambert Rasmussøn skulle bøde til kongl. majestæt 4 mark sølv og blev benådet at straffes med jern.»

At tingið í 1619 eisini var til reiðar at døma eftir eiði, sum uttanfyri standandi menn svóru um annan mann, Nils Arnbjarnarson, sæst av bókføring frá hesum ári. Slíkur eiður skuldi vera samsvarandi «Tylter ed» (12), «Sætter ed» (6) og «Lyritter ed» (3) í Norsku løgbókini.

*XXI.* Um 1650 sæst løgtingið hveppa seg við at nýta Norsku løgbókina, táið hon var hørð og rá í sínum ásetingum:

«Thomas Gregersøn for, at han stak Anna Thomasdatter med en kniv, blev dømt at bøde til kongl. majestæt en mark sølv[4]).»

Táið einki er sagt um, at stingurin er óhappsgerð, kann her ikki vera dømt eftir Norsku løgbókini.

Frá Eysturoyar vártingi kom í 1650 á løgting fylgjandi stuldursmál: Gutte Holdansøn [ein av húsarænunum frá 1636 æt Holdan Guttesøn] hevði stolið í Elduvík eina klokku, sum vá 12 merkur, frá Jóani Tróndarsyni eina stúku, 2 alin av løriti, 1 gl. krov, 1 gás, 3 fjórðingar av saltkjøti, 1 mørs vomb, tilsamans virðismett 3 gyllin 4 skinn. Dómur: «At eftersom forn. Gutte Holdansøn for sådant sit tyveri intet havde at betale eller bøde for sig, da at udstå den højeste straf, han med slag og fængsel kan udstå[1]).»

1) Lb. fol. 306 b. 2) Lb. fol. 307 a. 3) Lb. fol. 311 a. 4) Lb. fol. 313 b.



Tjóvar vóru annars vanliga brennimerktir, tá teir ikki kundu keypa seg fríar við bót. Hesin dómur sigur einki um tað. Norska løgbókin sigur, at um tað ikki var fyrstu ferð, tjóvur hevði stolið og hitt stolna fór yvir mørk í virði, skuldi hann bøta við lívinum.

Táið farið er um 1650, síggja vit ofta, at broyting er komin í dómsgrundarlagið. Í 1653 finna vit soleiðis barnasakir av sama slag stundum dømdar eftir Stóradómi og stundum eftir recessini, t. v. s. Stóru recess av Kristiani kongi IV frá 27. febr. 1643. Recessin ásetur væl harðari straff enn Stóridómur[2]). Her skulu tríggir dómar frá 1653 verða tiknir sum dømi.

Jákup Ólavsson og Billa Ísaksdóttir í Eysturoy fyri at vera komin fyri barn saman, skyld í triðja lið, vórðu dømd eftir Stóradómi hvørt at bøta 3 merkur í silvuri.

Ísakur Pállsson og Anna Magnusdóttir, eisini úr Eysturoy, skyld í triðja lið, dømd í barnamáli eftir recessini at bøta alt, tey áttu, og gjørd útlagin.

Páll Jóhannesson úr Mikladali (Páll fangi) og Sigga Torbergsdóttir, skyld í triðja lið, dømd í barnamáli eftir recessini at bøta alt, tey áttu, og gjørd útlagin.

Við vissum undantøkum galt Norska løgbókin frá 1604 í Føroyum til 1688, tá Norska lóg kom í hennara stað. Vit síggja her Stóru recessina frá 1643 nýtta í viðurskiftum, hvar Stóridómur, ið veruliga var føroysk lóg, ásetur straffina týðuliga avmálda. Lítla recessin frá 1615, sum hevur somu ásetingar viðvíkjandi málum sum omanfyri nevndu, tykist harímóti aldri at vera nýtt í Føroyum. Hóast hesa blanding í rættargrundarlagnum var Stóridómur framvegis nýttur í Føroyum og enntá endurnýggjaður sum føroysk lóg í 1682[3]).

Viðmerkt skal tó verða, at táið Suðuroyar sýslumaður, Jákup Hálvdansson, í 1648 varð dømdur úr starvi og í bót, gjørdi løgtingið hetta sum frammanfyri nevnt eftir recessini frá Kristiani kongi III, óivað av teirri grund, at føroysk ella íslendsk-norsk lóggáva ongar týðuligar ásetingar hevði fyri slíkt brotsverk, sum hann hevði gjørt.

Mál, sum innførd eru í tingbókina sum komin frá vártingunum og við bótum geva kongi inntøkur, eru sjálvsagt eisini dómsmál, men tey verða kortini tikin undir inntøkumál hjá kongi, og ymist annað kann eisini síggjast av teimum.

1) Lb. fol. 313 b—314 a. 2) Stóra recessin kap. 5: 3—4: «Om nogen, som er hverandre udi andet og tredje så og udi tredje led beslægtet eller udi samme led besvogret, findes at ligge udi et ondt levned sammen og avle børn, da skal vores lensmand eller hvem deres herskab er, sagen med dennem efter deres yderste formue aftinge og siden forvise landet. End rømme de ikke, da straffes de på deres hals.» Sama áseting var frammi í «Forordning for lejemål af 6. april 1610» og upp aftur tikin í § 26 í Lítlu recess Kristian kongs IV 31. mars 1615. Í tílíkum føri áleggur Stóridómur teim seku bert 3 merkur í silvuri hvør til kongs. 3) Upprunaeintakið stolið í Føroyum av fransum 1677. Sjá Fr. Gabels bræv 4/5 1682 til kongs, D. D. R. A., D. D. K., C 21.

## DEILD III.

### *Kongsinntøkur av Føroyum.*

### a. Bøtur til kongs o. a.

Frá 1615 vita vit rættuliga gjølla skil á, hvørjar bøtur fólk vóru dømd í rættinum at gjalda kongi. Tær eru hvørt ár innførdar í tingbókina. Annars førdi fútin tær inn á roknskap sín yvir kongsins inntøku av Føroyum. Hesir fútaroknskapir eru at finna fyri nøkur ár innan 1615: 1584, 1588, 1590, 1600, 1601, 1602 og 1613—15. Hesi árini eru ikki samanhangandi, men kortini skal tað yvirlitið, sum her verður gjørt yvir tingbøtur til kongs, eisini verða tikið frá fútaroknskøpunum innan løgtingsbókin byrjar.

Í fútaroknskøpunum finnast sjálvsagt bert bótamál av tingi, sum geva kongi inntøku. Deyðadómar og kroppsligar revsingar, sum onga inntøku geva, koma sjálvsagt ikki inn á roknskapin. Kongur fekk nærsagt allar tingbøtur tildømdar; men tey fyrstu árini eftir 1615 síggja vit nakrar bøtur verða dømdar hospitalinum á Argjum til, og kann hetta benda á, at hesar bøtur kunna hava verið fleiri áður.

Lætt er at skilja, at tað yvirlitið, her verður gjørt yvir kongsins inntøku av tingbótum, kemur at hava síni brek. Ofta verða fólk dømd í likamliga straff sum til dømis brennimerking, og samstundis kann dómurin siga, at straffin kann verða umbýttt við bót av vissari støðd. Tó nýtist einki at vera til skjals um, hvørt bótin er goldin ella straffin tikin. Annars sæst ofta, at bøturnar hava verið partvís goldnar á staðnum; men einki nýtist tó seinri at standa skrivað um, hvussu hin parturin av bótini er komin til vega. Ábyrgdina av tí yvir fyri kongi tykist fútin at hava havt; men væl kann tað hugsast, at um seinri partur av bótini ikki kundi fáast til vega, varð hann avgjørdur við straff. Vanliga síggja vit, at fólk, sum vórðu ídømd bót, høvdu einki at gjalda við. Stundum kann tað eisini vera ivasamt, um bótin er goldin ella straffin er tikin. Straffirnar kundu vera ymiskar, t. d bøðilsfleingjan, bolt og jarn, fongsil ella brennimerking; hetta síðsta var mest vanligt fyri tjóvar. Vit síggja ofta, at hin dømdi einki hevur at gjalda við, ella at hann ikki er mentur at keypa seg leysan frá straff, «haver slet intet.» Dømi eru eisini um, at valamenn hava lagt út bót fyri at leyskeypa hin dømda.

Burtursæð frá tingmálum um leysingarbørn, sum er størsti flokkurin av bótamálum, geva nærsagt øll hini, helst stuldursmálini, góða



mynd av trongum og betri tíðum. Bótamálini til kongs eru í tingbókini fyri hvørt ár innførd undir einum bólki, sum eitur:

«Kongl. majestæts sager og sagefald, som er forhandlet på alle vårting og lagtinget her på Færø og en del oppebåret udi det nærværende år.»

Bert størri mál fáa nærri frágreiðing í tingbókini; einstakt mál, sum er deyðadómur, finnst uttan frágreiðing. Líkt er til, at løgtingið oftast hevur staðfest vártingsdómarnar. Einstøk ár er einki bótamál at finna frá summum sýslum. Hetta gevur ein lítlan illgruna um, at bótamál frá sýslum okkurt ár kanska eru ikki komin fram til løgtingið. Í einstøkum førum er víst á fyrrverandi bótamál, sum ikki eru at finna áður í tingbókini. Sum seinri skal verða víst á, er tó líkt til, at vártingsbók ella -bøkur, sum nú eru burtur, samstundis hava verið førdar.

Rættarbøturnar, kongur fekk eftir teim varðveittu fútaroknskøpunum 1584—1615, skulu verða settar upp fyrst, og her er at viðmerkja, at fyri árið 1615, sum hin elsta tingbókin byrjar við, má fyrri partur av málviðgerðini á tingi vera førdur inn í eina eldri útskrivaða tingbók. Fútaroknskapurin fyri hetta árið vísir týðuliga, at so er, tí tingbókin hevur nærsagt eingi bótamál frá 1615, men harímóti tykjast allar tingbøtur frá hesum ári at vera komnar upp í fútaroknskapin. Táið vit aftrat vita, at tingbókin, sum byrjar 1615, er keypt í Keypmannahavn og komin til Føroya um várið 1614, kann eingin ivi vera í, at ein eldri tingbók, sum fyrst hevur verið skrivað full miðskeiðis 1615, tá hevur verið til staðar.

Uppgerð úr fútaroknskøpunum av rættarbótum til kongs í tíðarskeiðnum 1584—1615 sær soleiðis út:

| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1584 | 1 | | 1 | | 3 | 27½ | 0 |
| Eysturoy | — | 3 | | 1 | | | 36 | 4 |
| Streymoy | — | 2 | | 2 | 1 | | 28 | 14 |
| Sandoy | — | 1 | | 2 | | 1 | 11½ | 6 |
| Vágar | — | 1 | | 1 | | | 16 | 0 |
| Suðuroy | — | 1 | | 3 | | 5 | 65 | 0 |
| Tilsamans | | 9 | | 10 | 1 | 9 | 185 | 4 |
| Norðuroyar | 1588 | | | | | 1 | 1 | 0 |
| Eysturoy | — | | | 1 | | | 5 | 0 |
| Streymoy | — | 3 | | | | | 5 | 0 |
| Sandoy | — | 1 | | | | | 8 | 0 |
| Vágar | — | 2 | | | | 1 | 9 | 0 |
| Suðuroy | — | 1 | | 1 | 2 | 2 | 23 | 2 |
| Tilsamans | | 7 | | 2 | 2 | 4 | 51 | 2 |

| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1590 | | | | | | | |
| Eysturoy | — | 1 | | | | | 11 | 8 |
| Streymoy | — | 1 | | | | | 1 | 0 |
| Sandoy | — | 1 | | 1 | | 1 | 8 | 0 |
| Vágar | — | | | | | 3 | 10 | 0 |
| Suðuroy | — | 1 | | | | | 6 | 0 |
| Tilsamans | | 4 | | 1 | | 4 | 36 | 8 |
| Norðuroyar | 1600 | | | | | | | |
| Eysturoy | — | 1 | 2 | | | | 12 | 0 |
| Streymoy | — | 7 | | | | | 29 | 0 |
| Sandoy | — | 1 | | 1 | | 1 | 8 | 0 |
| Vágar | — | | 1 | | | 1 | 13 | 0 |
| Suðuroy | — | | | | | | | |
| Tilsamans | | 9 | 3 | 1 | | 2 | 62 | 0 |
| Norðuroyar | 1601 | 1 | 1 | 1 | | 2 | 8 | 8 |
| Eysturoy | — | 2 | 1 | | | 2 | 12 | 0 |
| Streymoy | — | 3 | 1 | | | | 14 | 0 |
| Sandoy | — | 3 | 1 | 4 | | 1 | 28 | 0 |
| Vágar | — | 2 | | | | | 5 | 0 |
| Suðuroy | — | 1 | 2 | | | 4 | 26 | 12 |
| Tilsamans | | 12 | 6 | 5 | | 9 | 94 | 0 |
| Norðuroyas | 1602 | | | | | | | |
| Eysturoy | — | 2 | 1 | | | | 34 | 0 |
| Streymoy | — | 3 | 1 | 2 | 1 | 2 | 28 | 18 |
| Sandoy | — | 1 | 2 | 1 | | 1 | 18 | 8 |
| Vágar | — | 1 | | | | | 2 | 0 |
| Suðuroy | — | | | | | | | |
| Tilsamans | | 7 | 4 | 3 | 1 | 3 | 83 | 6 |
| Norðuroyar | 1613 | 5 | | | | | 48½ | 0 |
| Eysturoy | — | 9 | | | | 3 | 148 | 18 |
| Streymoy | — | 7 | | 2 | | 1 | 157½ | 6 |
| Sandoy | — | 2 | | | | | 8 | 0 |
| Vágar | — | 3 | | | | | 10 | 0 |
| Suðuroy | — | 4 | | 3 | | 3 | 43 | 12 |
| Tilsamans | | 30 | | 5 | | 7 | 416½ | 6 |



| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1614 | | | 2 | 1 | | 12 | 0 |
| Eysturoy | — | 4 | | | | | 21 | 0 |
| Streymoy | — | 3 | | | | 3 | 17½ | 0 |
| Sandoy | — | | | | | | | |
| Vágar | — | | | 2 | | | 9 | 0 |
| Suðuroy | — | 4 | | | | 1 | 14 | 0 |
| Tilsamans | | 11 | | 4 | 1 | 4 | 73½ | 0 |
| Norðuroyar | 1615 | 1 | | | | | 4 | 0 |
| Eysturoy | — | 7 | | 1 | | | 28 | 0 |
| Streymoy | — | 5 | | | | | 22 | 0 |
| Sandoy | — | 1 | | 4 | | 2 | 21 | 2 |
| Vágar | — | 1 | | 1 | | | 6 | 2 |
| Suðuroy | — | | | 1 | | | 6 | 0 |
| Tilsamans | | 15 | | 7 | | 2 | 87 | 4 |

Viðmerkt skal verða, at undir 1584 eru komin 5 bótamál, sum eru sett upp fyri seg í fútaroknskapinum, men søgd at vera frá árinum frammanundan, og bøturnar av hesum málum eru 50 gl. Annars er roknskapurin frá 1584 ógreiður, serliga tí, at inntøkur og útreiðslur av handli eru komnar upp í hann. Hetta árið rak kongur sjálvur handilin í oyggjunum við álitismanni sínum, Niels Schinckell. Merkiligt er tað, at ár 1600 undir «Husmænds og løse karles skatter» er maður nevndur Jacob Schinckell uppførdur sum skattaborgari í Tórshavn, og samstundis er Jacob Urne settur í skatt í býnum. Árið eftir er Jacob Schinckell horvin av skattalistanum, men Jacob Urne finnst har tvey tey fylgjandi árini. Hann er tó horvin 1613, men tykist at finnast aftur tá sum bóndi á bygd, í 1615 á Velbastað, í 1623 eisini í Nólsoy. Nevnt skal verða, at veturin 1600—1601 má ein ræðulig umfarasjúka hava gingið í Havn, tí 1601 er talið av skattaborgarum í Tórshavn knappliga farið niður í helvt, frá 14 til 7.

Hesi nøvnini, Schinckell og Urne, vóru nøvn á donskum harramannaættum, og helst hava nevndu Havnarborgarar verið leysingabørn eftir slíkar harramenn, sum hava vitjað Føroyar. Vit hava sæð, at Niels Schinckell, ið var danskur harramaður, hevði við Føroya handil at gera 1584. Aksel Urne var lensmaður í Noreg 1547—60 og kann haðani lætt vera sendur ørindi til Føroya.

Um várið 1583 misti Magnus Heinason Føroya handil, og vit mega ætla, at teir tveir, sum høvdu handilin saman við honum, tá hava mist hann nakað skjótt, kanska fyrst um heystið ella várið eftir. Jørgen Kyd í Keypmannahavn hevur kanska havt hann longst, tí í 1584 finnst í fútaroknskapinum fylgjandi tingdómur:

«Af Laurids Jørgensøn, Jørgen Kyds tjener og købsvend, for han hårddrog kongl. majestæts og Erik Rosenkrantzes bonde, David Andersøn på Nolsøe, og gav hannem mundslag udi borgestuen på pinsedag, og blev hannem derfor afdømt 2 mark sølv, er 4½ gl. 6 sk.» Her 1 mørk av silvuri = 48 sk.

Einki verður sagt um, hví Laurids Jørgensøn bar seg soleiðis at, men óivað hevur nólsoyingurin latið nøkur hvøss orð falla um handilin, kanska í samband við Magnus Heinason og hansara felagar.

Her er annað dømi frá sama ári um, hvussu harðliga tað eisini gekk fyri seg úti á bygd:

«Gudeloch Thomissøn der sammesteds i Hvalbø, for han med sværd og økse udgik på engen, som hans broder, Simon Thomissøn, gik og høsted, kasted med øksen og hug med sværdet til hannem, dertil på hans eng jord, blev hannem derfor afdømt 15 gl.»

Símun vardi væl fyri sær á bønum, og tí hevur hann, so merkiligt tað ljóðar, eisini fingið bót:

«Simon Thomissøn der sammesteds, for han slog Gudeloch hans broder med en kæp, kaldes en lurck, 3 eller 4 slag og tog sværdet fra hannem, derfor blev han afdømt at bøde til kongl. majestæt 10 gl.»

Óivað vóru hesir brøðurnir komnir at klandrast um jørð, teir høvdu arvað. Merkiligt er at síggja føroying alvápnaðan.

Sama árið var maður í Hvalvík dømdur «for en kvie, han havde mismarket fra hans husbond.» Húsbóndin var Anders Holdansøn prestur í Kvívík. Líkt kundi verið til, at geldneyt tá hava gingið úti í hagaðum alt árið.

Sum dømi um virði av neytum síggja vit 1584 flettan kropp av 2½ ára gomlum oksa mettan 1½ gl. Samstundis síggja vit 1 oksakropp vera latnan í garðfesting fyri 4 gl., men tá man húðin vera við. Sama ár síggja vit kúgv metta 4 gl. Hon hevur tá verið mett javnt við 20 lomb. Í fútaroknskapinum hevur lambið 4 skinnsvirði. Oluf Eriksøn í Bø, sum var dømdur frá øllum góðsi og ætlandi eisini til deyða 1588, hevði átt ein oksa gangandi í Mykinesi. Fútin fekk njósn um oksan og seldi hann 1590 fyri 5 gl. Fyri henda Oluf hevur «Daniel på Sandø» lagt 6 gl. út, ætlandi Dánjal Nigilsson. Hann kom seinri vestur í Vágar, helst fyrst á Steigargarð, seinri á Ryggsgarð í Miðvági. Eftir deyðadóm yvir Jacob Audensøn í Svínoy 1583 er gamal bátur hjá honum seldur fyri 4 gl.

Siðaskiftisøldin ella 16. øld tykist at hava verið ein søgulig broytingartíð í Føroyum á mangan hátt. Prísirnir hækkaðu, men óivað hava menn merkt hetta minni, tí goldið var við vørum móti vørum. Flestu vørurnar fingu tó meira myntvirði. Í føroyskum fólkalívi tykist harðskapurin at hava verið størri, enn vit seinri vita um; men tey skrivligu dømini frá samtíðini eru bæði smá og fá.

Viðmerkt skal verða, at táið rættarbøturnar til kongs eru so nógvar í peningi 1613, kemur hetta mest av tveimum stórum bótum:

«Trond udi Gøte for nogen års hordom skal bøde 60 gl. jord, fisk 20 voger, rester 40 gl.» Ein vág av fiski galt 1 gyllin, og peningagyllinin er her mettur javnt við 1 gl. í jørð. Maðurin slapp altso við at gjalda gyllin í peningi fyri gyllin í jørð. Hann legði út 20 vágir av fiski ella 20 gyllin beinan vegin. Onnur stóra bótin var:



«Johannes Pedersøn for en urigtig seddel skal bøde 100 gl., fisk 28 voger, lyse 12 td.» Tunnan av lýsi kostaði 6 gl. Hesin maðurin, sum sæst at hava búð í Tórshavn 1613—1630, tykist at hava goldið bót sína beinan vegin, Hetta bendir á, at maðurin má hava verið av ríkum fólki. Hann hevði skrivað falskt, helst ein seðil fyri at hava ágóða í leigubúðini ella við handilin. Skúlakunnleika man maðurin hava havt, tí vit síggja nøkur ár seinri, at hann hevur tikið sær av máli á tingi fyri Norðuroya prest, Hans Jørgensøn Fønbo. Tingbøturnar í fiski ár 1613 vísa eisini, at hetta árið má hava verið rættuliga gott fiskiár í Føroyum.

Í Sandoy hesa tíðina hevur ólógligt hundahald verið vanligt, og ivaleyst hava bøndur hildið hetta havt samband við seyðastuldur. Frá 1615 verða her tvey mál nevnd:

«Efraim Isaksøn, for han holdt hunde i forbud, 2 gl.»

«Jon Sebjørnsøn og hans søn for hunde skulde bøde 6 gl.»

Frá 1615 eru bótamálini soleiðis uppgjørd eftir løgtingsbókini:

| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1615 | | | | | | | |
| Eysturoy | — | | | | | | | |
| Streymoy | — | 1 (1 hor) | | | | | 28 | 16 |
| Sandoy | — | | | | | | | |
| Vágar | — | | | | | | | |
| Suðuroy | — | | | 1 | | | 14 | 8 |
| Tilsamans | | 1 | | 1 | | | 43 | 4 |
| Norðuroyar | 1616 | 4 | | | | 4 | 25 | |
| Eysturoy | — | 2 | | | | | 7 | |
| Streymoy | — | 6 (2 hor) | 1 | | | | 51 | |
| Sandoy | — | | | 1 | | 1 | 4 | 10 |
| Vágar | — | | | | | | | |
| Suðuroy | — | 4 | | 2 | | 1 | 14 | |
| Tilsamans | | 16 | 1 | 3 | | 6 | 101 | 10 |
| Norðuroyar | 1617 | 4 | | | | 1 | 25 | 2 |
| Eysturoy | — | 6 | | | | | 35 | |
| Streymoy | — | 7 (1 hor) | | 1 | | | 24 | |
| Sandoy | — | 2 | | | | | 7 | |
| Vágar | — | 2 | | | | | 10 | |
| Suðuroy | — | 1 | | | | 1 | 19 | |
| Tilsamans | | 22 | | 1 | | 2 | 120 | 2 |

| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | Íalt gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1618 | | 1 | | | 2 | 9 | 2 |
| Eysturoy | — | 5 | | | | 1 | 25 | 16 |
| Streymoy | — | 8 (1 hor) | | | | 1 | 49 | 8 |
| Sandoy | — | 2 (1 hor) | | | 1 | 4 | 37 | 16 |
| Vágar | — | 2 | | | | 1 | 29 | 8 |
| Suðuroy | — | 1 | | | | | 10 | |
| Tilsamans | | 18 | 1 | | 1 | 9 | 161 | 10 |
| Norðuroyar | 1619 | 2 | | 2 | | | 7 | 14 |
| Eysturoy | — | 5 (2 hor) | | | | | 50 | |
| Streymoy | — | 4 | | | | 1 | 20 | 18 |
| Sandoy | — | 2 | | | | 1 | 6 | |
| Vágar | — | 8 | | | | | 26 | |
| Suðuroy | — | 2 (2 hor) | | | 1 | 3 | 36 | |
| Tilsamans | | 23 | | 2 | 1 | 5 | 146 | 12 |
| Norðuroyar | 1620 | 4 | | | | 1 | 19 | 12 |
| Eysturoy | — | 4 | | 1 | | 3 | 32 | 12 |
| Streymoy | — | 11 | | | | | 58 | |
| Sandoy | — | 5 (1 hor) | | 1 | | 3 | 46 | 6 |
| Vágar | — | 2 | | 1 | | 2 | 13 | |
| Suðuroy | — | 3 | | | | 1 | 42 | |
| Tilsamans | | 29 | | 3 | | 10 | 211 | 10 |
| Norðuroyar | 1621 | 4 | | | | 2 | 12 | 16 |
| Eysturoy | — | 4 | | | | 2 | 65 | |
| Streymoy | — | 5 (1 hor) | | | | 2 | 54 | 8 |
| Sandoy | — | 2 | | 1 | 1 | 3 | 28 | 12 |
| Vágar | — | 3 (1 hor) | | | | 3 | 54 | 4 |
| Suðuroy | — | 2 | | 2 | | 1 | 28 | 4 |
| Tilsamans | | 20 | | 3 | 1 | 13 | 243 | 4 |
| Norðuroyar | 1622 | 1 | | | | 1 | 9 | |
| Eysturoy | — | 5 (1 hor) | | | | 5 | 105 | |
| Streymoy | — | 5 (2 hor) | | 4 | | 3 | 112 | 8 |
| Sandoy | — | 6 | | | | 7 | 49 | |
| Vágar | — | | | | | | | |
| Suðuroy | — | 2 | | 1 | | | 10 | 12 |
| Tilsamans | | 19 | | 5 | | 16 | 286 | |



| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | Íalt gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1623 | 1 | | | | 2 | 9 | 12 |
| Eysturoy | — | 4 | 7 | 1 | | 2 | 59 | 6 |
| Streymoy | — | 10 | | 1 | | 1 | 98 | 8 |
| Sandoy | — | 4 | 1 | | | 1 | 33 | 8 |
| Vágar | — | 3 | | | | 2 | 41 | |
| Suðuroy | — | 2 | 1 | 2 | | 4 | 12 | 4 |
| Til samans | | 24 | 9 | 4 | | 12 | 253 | 18 |
| Norðuroyar | 1624 | | | | | | | |
| Eysturoy | — | | 1 | 1 | | | 42 | |
| Streymoy | — | 7 | | | | | 55 | 16 |
| Sandoy | — | 3 | | 1 | | 1 | 22 | 18 |
| Vágar | — | | 1 | 1 | | | 8 | 8 |
| Suðuroy | — | 3 | | 1 | | | 18 | 16 |
| Til samans | | 13 | 2 | 4 | | 1 | 147 | 18 |
| Norðuroyar | 1625 | 1 | 2 | 1 | | 1 | 18 | |
| Eysturoy | — | 1 (1 hor) | 3 | | | 1 | 147 | 4 |
| Streymoy | — | | 1 | | | 1 | 7 | 4 |
| Sandoy | — | 3 | | | | 1 | 24 | 16 |
| Vágar | — | | | | | | | |
| Suðuroy | — | 2 | 1 | | | 8 | 12 | 10 |
| Til samans | | 7 | 7 | 1 | | 12 | 209 | 14 |
| Norðuroyar | 1626 | | 4 | | 1 | | 1 | |
| Eysturoy | — | | 2 | 1 | | 4 | 18 | |
| Streymoy | — | 1 | 2 | 2 | | | 24 | |
| Sandoy | — | 1 | 2 | 1 | 2 | | 25 | 12 |
| Vágar | — | | | | | | | |
| Suðuroy | — | | 1 | 1 | | 2 | 9 | 4 |
| Til samans | | 2 | 11 | 5 | 3 | 6 | 77 | 16 |
| Norðuroyar | 1627 | 2 | 3 | | | | 26 | 4 |
| Eysturoy | — | 2 | 1 | | | 1 | 18 | 8 |
| Streymoy | — | 6 | 1 | | | | 33 | 4 |
| Sandoy | — | 2 | 1 | | | | 12 | 4 |
| Vágar | — | 1 (1 hor) | | | | | 20 | |
| Suðuroy | — | 1 | | | | 1 | 10 | |
| Til samans | | 14 | 6 | | | 1 | 120 | 0 |

| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | Íalt gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1628 | 1 | | | | | 9 | 12 |
| Eysturoy | — | 4 | | 2 | | 1 | 13 | 12 |
| Streymoy | — | 3 | | 1 | | | 14 | 16 |
| Sandoy | — | 2 (1 hor) | | 1 | 2 | | 54 | 11 |
| Vágar | — | 2 | | 1 | | | 8 | 18 |
| Suðuroy | — | 1 | | | | | 3 | |
| Til samans | | 13 | | 5 | 2 | 1 | 104 | 9 |
| Norðuroyar | 1629 | | 2 | | | | 4 | |
| Eysturoy | — | 2 | | | 1 | 1 | 9 | 8 |
| Streymoy | — | 2 | 4 | | | | 20 | 14 |
| Sandoy | — | | 2 | 1 | 4 | | 6 | 18 |
| Vágar | — | | 2 | | | | 4 | 4 |
| Suðuroy | — | 1 | 1 | 1 | | | 1 | 10 |
| Til samans | | 5 | 11 | 2 | 5 | 1 | 46 | 14 |
| Norðuroyar | 1630 | 1 | 3 | | | 2 | 11 | 16 |
| Eysturoy | — | 1 | 3 | | | 1 | 11 | 10 |
| Streymoy | — | 3 | 6 | 1 | | 1 | 35 | 2 |
| Sandoy | — | 2 | | | | | 7 | |
| Vágar | — | | | | | 2 | | 16 |
| Suðuroy | — | 1 | | | | 1 | 2 | 10 |
| Til samans | | 8 | 11 | 1 | | 7 | 68 | 14 |
| Norðuroyar | 1631 | | 5 | | | | 5 | 2 |
| Eysturoy | — | 3 | | 1 | | | 11 | 18 |
| Streymoy | — | 1 | 2 | 2 | 1 | | 11 | 8 |
| Sandoy | — | | | 1 | 1 | 2 | 4 | 8 |
| Vágoy | — | | | | | 1 | | 10 |
| Suðuroy | — | 3 (1 hor) | | | | | 31 | |
| Til samans | | 7 | 7 | 4 | 2 | 3 | 64 | 6 |
| Norðuroyar | 1632 | 4 (1 hor) | 1 | | | | 30 | 6 |
| Eysturoy | — | 2 | 4 | | 4 | 2 | 22 | 8 |
| Streymoy | — | 5 | | 1 | | | 31 | 4 |
| Sandoy | — | | | 2 | | 1 | 2 | 16 |
| Vágar | — | | | | | | | |
| Suðuroy | — | 4 | | | | | 11 | 10 |
| Til samans | | 15 | 5 | 3 | 4 | 3 | 96 | 4 |



| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | Íalt gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1633 | | | | | 1 | 10 | |
| Eysturoy | — | 3 | 4 | 1 | 2 | | 13 | 12 |
| Streymoy | — | 4 (1 hor) | 2 | | | 1 | 86 | 10 |
| Sandoy | — | 2 | | 5 | | 1 | 14 | 16 |
| Vágar | — | | 3 | | | | 1 | 16 |
| Suðuroy | — | 2 (1 hor) | | 1 | | | 12 | 16 |
| Til samans | | 11 | 9 | 7 | 2 | 3 | 139 | 10 |
| Norðuroyar | 1634 | 1 | 2 | | | | 9 | |
| Eysturoy | — | 1 | 4 | | 2 | | 33 | |
| Streymoy | — | 1 | 9 | | | 1 | 32 | 2 |
| Sandoy | — | 2 | 1 | | 1 | 2 | 8 | 16 |
| Vágar | — | | | | | | | |
| Suðuroy | — | 7 | 1 | | 1 | | 15 | |
| Til samans | | 12 | 17 | | 4 | 3 | 97 | 18 |
| Norðuroyar | 1635 | 1 | | | | 1 | 19 | 4 |
| Eysturoy | — | | | | | | | |
| Streymoy | — | 3 (1 hor) | 5 | | 4 | | 21 | 12 |
| Sandoy | — | 3 | | | 1 | 1 | 19 | |
| Vágar | — | 1 | 1 | | | | 1 | |
| Suðuroy | — | 2 | 1 | | | | 7 | |
| Til samans | | 10 | 7 | | 5 | 2 | 67 | 16 |
| Norðuroyar | 1636 | | 7 | | | 1 | 42 | |
| Eysturoy | — | 5 (1 hor) | | 1 | | 1 | 39 | 8 |
| Streymoy | — | 8 | | 1 | | | 43 | 4 |
| Sandoy | — | | 2 | | | | | |
| Vágar | — | 1 | 1 | | | | 2 | 6 |
| Suðuroy | — | 2 | | | | | 11 | 16 |
| Til samans | | 16 | 10 | 2 | | 2 | 138 | 14 |
| Norðuroya | 1637 | | | | 1 | | | 18 |
| Eysturoy | — | 2 | 2 | | 1 | 2 | 20 | 5 |
| Streymoy | — | 9 (1 hor) | 2 | | 1 | 3 | 46 | |
| Sandoy | — | 3 | | | | | 9 | |
| Vágar | — | 5 (1 hor) | | | | | 10 | 16 |
| Suðuroy | — | | | | | 1 | 2 | |
| Til samans | | 19 | 4 | | 3 | 7 | 88 | 19 |

| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | Íalt gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1638 | 4 | 1 | | | 2 | 21 | |
| Eysturoy | — | 2 | 1 | 1 | 1 | 2 | 12 | 2 |
| Streymoy | — | 7 | 1 | | | 3 | 27 | 12 |
| Sandoy | — | 1 | 1 | | | | 3 | 10 |
| Vágar | — | 2 (1 hor) | | | | | 3 | |
| Suðuroy | — | 2 | | 2 | | 1 | 14 | |
| Til samans | | 18 | 4 | 3 | 1 | 8 | 81 | 4 |
| Norðuroyar | 1639 | 1 | 2 | | 1 | | 23 | 8 |
| Eysturoy | — | 4 | 2 | | | | 20 | 16 |
| Streymoy | — | 7 (1 hor) | 2 | | | | 50 | 8 |
| Sandoy | — | 3 | 2 | | 1 | 1 | 23 | 4 |
| Vágar | — | 1 | | | | | 2 | |
| Suðuroy | — | 1 | | | | | 1 | |
| Til samans | | 17 | 8 | | 2 | 1 | 120 | 16 |
| Norðuroyar | 1640 | 3 | 5 | | | | 77 | |
| Eysturoy | — | 3 | | | | | 6 | |
| Streymoy | — | 8 (1 hor) | 6 | | 1 | 1 | 49 | 18 |
| Sandoy | — | 4 | | | | | 14 | |
| Vágar | — | 1 | | | | | 3 | 8 |
| Suðuroy | — | 1 | | | | | 1 | |
| Til samans | | 20 | 11 | | 1 | 1 | 151 | 6 |
| Norðuroyar | 1641 | | | | | 2 | 1 | 4 |
| Eysturoy | — | 5 | 4 | | | | 30 | 12 |
| Streymoy | — | 2 | 3 | | | | 17 | 16 |
| Sandoy | — | 1 | 1 | | | 3 | 20 | 12 |
| Vágar | — | 2 | | | | | 4 | |
| Suðuroy | — | 2 | | | | | 2 | |
| Til samans | | 12 | 8 | | | 5 | 76 | 4 |
| Norðuroyar | 1642 | 2 | | | | | 14 | 16 |
| Eysturoy | — | 2 | | | | | 12 | |
| Streymoy | — | | | | | | | |
| Sandoy | — | 2 | 1 | | | 1 | 6 | 8 |
| Vágar | — | | | | | | | |
| Suðuroy | — | | | 1 | | | 14 | 8 |
| Til samans | | 6 | 1 | 1 | | 1 | 47 | 12 |



| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | Íalt gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1643 | 3 | | | | | 9 | 16 |
| Eysturoy | — | 2 | | | | | 12 | |
| Streymoy | — | 2 | | | | | 5 | 8 |
| Sandoy | — | 2 | | | | | 2 | |
| Vágar | — | 2 | | | | 1 | 19 | |
| Suðuroy | — | 2 | | | | 1 | 8 | |
| Til samans | | 13 | | | | 2 | 56 | 4 |
| Norðuroyar | 1644 | 4 | | | | | 20 | 16 |
| Eysturoy | — | 4 | | | | | 8 | |
| Streymoy | — | 5 | | | | | 14 | |
| Sandoy | — | 4 | | | | | 9 | |
| Vágar | — | 3 | | | | | 6 | 10 |
| Suðuroy | — | 1 | | | | | 2 | 8 |
| Til samans | | 21 | | | | | 60 | 14 |
| Norðuroyar | 1645 | | 3 | | | | 14 | 12 |
| Eysturoy | — | 5 | 3 | | | | 31 | 8 |
| Streymoy | — | 3 | | | | | 7 | |
| Sandoy | — | | 4 | | 1 | | 6 | 18 |
| Vágar | — | 1 | | | | | 9 | |
| Suðuroy | — | 3 | | | | | 3 | |
| Til samans | | 12 | 10 | | 1 | | 71 | 18 |
| Norðuroyar | 1646 | | | | | | | |
| Eysturoy | — | 2 | 1 | | | | 30 | 4 |
| Streymoy | — | 3 | | | | | 9 | 10 |
| Sandoy | — | 1 | | | 8 | 1 | 7 | 10 |
| Vágar | — | 3 | | | | | 56 | |
| Suðuroy | — | 2 | 1 | | 1 | | 8 | 14 |
| Til samans | | 11 | 2 | | 9 | 1 | 111 | 18 |
| Norðuroyar | 1647 | 4 | | | 1 | | 6 | 18 |
| Eysturoy | — | 8 (1 hor) | | | | | 48 | 16 |
| Streymoy | — | 12 | | | | | 37 | |
| Sandoy | — | 1 | 1 | | 1 | | 4 | |
| Vágar | — | 1 | | | | | 1 | |
| Suðuroy | — | 2 | | | | | 2 | |
| Til samans | | 28 | 1 | | 2 | | 99 | 14 |

| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | Íalt gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1648 | 2 | | | | 1 | 28 | 16 |
| Eysturoy | — | 7 | | | 1 | 1 | 32 | 2 |
| Streymoy | — | 7 | | | | | 23 | |
| Sandoy | — | 5 (1 hor) | 1 | | | | 41 | |
| Vágar | — | 3 | | | | | 6 | 16 |
| Suðuroy | — | 2 (1 hor) | | | | 4 | 25 | |
| Til samans | | 26 | 1 | | 1 | 6 | 156 | 14 |
| Norðuroyar | 1649 | 1 | | 1 | | | 7 | 16 |
| Eysturoy | — | 3 (1 hor) | | | | | 32 | 16 |
| Streymoy | — | 4 | 1 | | | | 23 | 12 |
| Sandoy | — | 4 | | | | 5 | 36 | 4 |
| Vágar | — | 1 | 1 | | | | 5 | |
| Suðuroy | — | | | | | | | |
| Til samans | | 13 | 1 | 1 | | 5 | 105 | 8 |
| Norðuroyar | 1650 | 3 | | | | 1 | 21 | 8 |
| Eysturoy | — | 5 | 3 | | | | 6 | 4 |
| Streymoy | — | 2 | | 1 | | | 11 | 4 |
| Sandoy | — | 4 (1 hor) | | | | | 27 | |
| Vágar | — | 3 | | | | | 11 | 8 |
| Suðuroy | — | 3 | | | | | 5 | |
| Til samans | | 20 | 3 | 1 | | 1 | 82 | 4 |
| Norðuroyar | 1651 | 5 (1 hor) | | | | | 33 | 4 |
| Eysturoy | — | 2 | | | | | 6 | |
| Streymoy | — | 3 | 1 | | | | 4 | 8 |
| Sandoy | — | | | | | | | |
| Vágar | — | | | | | | | |
| Suðuroy | — | | 1 | 1 | 2 | | 6 | 18 |
| Til samans | | 10 | 2 | 1 | 2 | | 50 | 10 |
| Norðuroyar | 1652 | 2 | | | | | 10 | 12 |
| Eysturoy | — | 4 | | | | | 25 | 8 |
| Streymoy | — | 4 | | 1 | | | 17 | 8 |
| Sandoy | — | 1 | | | | | 4 | 16 |
| Vágar | — | 4 | | | | | 24 | 12 |
| Suðuroy | — | 5 | 3 | | | | 15 | 16 |
| Til samans | | 20 | 3 | 1 | | | 98 | 12 |



| | Árstal | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | Íalt gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | 1653 | 1[1]) | | | | | | |
| Eysturoy | — | 10 | | | | | 39 | |
| Streymoy | — | 8 | | | | | 24 | 12 |
| Sandoy | — | 3 | | | | | 11 | 4 |
| Vágar | — | 1 | | | | 1 | 3 | 8 |
| Suðuroy | — | 2 | | | 4 | 1 | 16 | 4 |
| Til samans | | 25 | | | 4 | 2 | 94 | 8 |
| Norðuroyar | 1654 | 2 | 2 | | | | 12 | 12 |
| Eysturoy | — | | 1 | 1 | | | 5 | 8 |
| Streymoy | — | 2 | | | | | 12 | |
| Sandoy | — | 1 | | | | | 7 | 4 |
| Vágar | — | | 1 | | | 1 | 3 | |
| Suðuroy | — | 2 | 3 | | | | 22 | |
| Til samans | | 7 | 7 | 1 | | 1 | 62 | 4 |

Eysturoyar sýsla og serliga Streymoyar sýsla hava vanliga flest bótamál, men einstøk ár finnast hesar sýslur eisini við ongum bótamálum. Eftirhugt er árið 1618 viðvíkjandi bótagjøldum í fútaroknskapinum, og roknskapurin vísir har 1 gl. hægri gjald enn tingbókin (hjá fútanum 162¹/₂ gl. hvat ætlandi bert kemur av eini misskriving hjá øðrum partinum; løgtingsbókin hevur 161¹/₂ gl.). Hesum viðvíkjandi eru óivað bæði fútaroknskapur og løgtingsbók gjørd eftir somu skjølum, sum hava ligið fyri løgtinginum.

Ikki er gott eftir løgtingsbókini at siga, hvat ið er komið burtur úr einum bótamáli, táið har stendur: «Straffes på yderste formue», og hin vanliga viðmerkingin: «Haver intet uden stor armod», ikki finnst samstundis.

Bólkurin av bótamálum, sum eitur annað, er av ymiskum uppruna. Harundir koma eisini bøtur fyri *skeldsorð*, sum svara til injuriudómar nú á døgum. Talið av slíkum skal verða uppsett, táið hereftir bótamálini fyri allar Føroyar verða tikin í ángarað. Veruliga hoyra hesi málini saman við bólkinum *slagsmál*.

---

1) Páll Jóhannisson (fangi) og Sigga Torbergsdóttir dømd eftir Stóru recess Kristians kongs IV «at straffes på yderste formue og rømme landet.»

| Árstal | Skeldsorð | Barnasakir | Stuldur | Slagsmál | Ólóglig hagagongd | Annað | Íalt gl. | sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1615 | | 1 | 1 | | | | 43 | 4 |
| 1616 | 1 | 16 | 1 | 3 | | 6 | 101 | 10 |
| 1617 | | 22 | | 1 | | 2 | 120 | 2 |
| 1618 | 2 | 18 | 1 | | 1 | 9 | 161 | 10 |
| 1619 | 1 | 23 | | 2 | 1 | 5 | 146 | 12 |
| 1620 | 2 | 29 | | 3 | | 10 | 211 | 10 |
| 1621 | 10 | 20 | | 3 | 1 | 13 | 243 | 4 |
| 1622 | 8 | 19 | | 5 | | 16 | 286 | |
| 1623 | 6 | 24 | 9 | 4 | | 12 | 253 | 18 |
| 1624 | | 13 | 2 | 4 | | 1 | 147 | 18 |
| 1625 | 1 | 7 | 7 | 1 | | 12 | 209 | 14 |
| 1626 | 3 | 2 | 11 | 5 | 3 | 6 | 77 | 16 |
| 1627 | 1 | 14 | 6 | | | 2 | 120 | |
| 1628 | 1 | 13 | | 5 | 2 | 1 | 104 | 9 |
| 1629 | | 5 | 11 | 2 | 5 | 1 | 46 | 14 |
| 1630 | 3 | 8 | 11 | 1 | | 7 | 68 | 14 |
| 1631 | | 7 | 7 | 4 | 2 | 3 | 64 | 6 |
| 1632 | 1 | 15 | 5 | 3 | 4 | 3 | 96 | 4 |
| 1633 | | 11 | 9 | 7 | 2 | 3 | 139 | 10 |
| 1634 | | 12 | 17 | | 4 | 3 | 97 | 18 |
| 1635 | 1 | 10 | 7 | | 5 | 2 | 67 | 16 |
| 1636 | | 16 | 10 | 2 | | 2 | 138 | 14 |
| 1637 | 1 | 19 | 4 | | 3 | 7 | 88 | 19 |
| 1638 | | 18 | 4 | 3 | 1 | 8 | 81 | 4 |
| 1639 | | 17 | 8 | | 2 | 1 | 120 | 16 |
| 1640 | | 20 | 11 | | 1 | 1 | 151 | 6 |
| 1641 | | 12 | 8 | | | 5 | 76 | 4 |
| 1642 | 1 | 6 | 1 | 1 | | 1 | 47 | 12 |
| 1643 | | 13 | | | | 2 | 56 | 4 |
| 1644 | | 21 | | | | | 60 | 14 |
| 1645 | | 12 | 10 | | 1 | | 71 | 18 |
| 1646 | | 11 | 2 | | 9 | 1 | 111 | 18 |
| 1647 | | 28 | 1 | | 2 | | 99 | 14 |
| 1648 | | 26 | 1 | | 1 | 6 | 156 | 14 |
| 1649 | | 13 | 2 | 1 | | 5 | 105 | 8 |
| 1650 | | 20 | 3 | 1 | | 1 | 82 | 4 |
| 1651 | | 10 | 2 | 1 | 2 | | 50 | 10 |
| 1652 | | 20 | 3 | 1 | | | 98 | 12 |
| 1653 | | 25 | | | 4 | 2 | 94 | 8 |
| 1654 | 1 | 7 | 7 | 1 | | 1 | 62 | 4 |
| | 44 | 603 | 182 | 64 | 56 | 160 | 4563 | 12 |



Rokna vit árið 1615 ikki upp í, kemur meðalinntøka kongs av bótamálum hesi árini at liggja um 117 gl. fyri árið. Á hvønn bógvin tey flestu bótamálini falla, og nøgdin av teimum hvørt árið sigur okkum nakað um tann skiftandi standin á landi. Barnasakirnar, sum eru flestar, siga kanska ikki so nógv, men stuldursmál, slagsmál og ólóglig hagagongd hava óivað nakað við siðaskilið í fólkinum at gera og helst eisini við betri og ringari tíðir; ofta verður t. d. sagt, at stolið er av neyð. Nógv av stuldrinum er aldri komið fyri sum tingmál, og av tí at samfelagið var so lítið, o. u. 4000 menniskju, verða málini so fá í tali, at ilt er at taka ein almennan úrskurð bert eftir teimum. Tingklagurnar, sum seinri verða umtalaðar, siga eisini nakað um, hvussu standurin var á landi. Eftir teimum sær tað út, sum frá o. u. 1625 til út móti 1640 hava tíðirnar verið ringar í Føroyum. Eftir tíggjundagjaldinum kundi árið 1635 verið heldur frægari. Burtursæð frá 1628 benda stuldursmálini á tað sama. Góðar tíðir í tátíðar týdningi koma heldur aldri aftur innan Gabelstíðina.

Ymist skal annars verða drigið fram viðvíkjandi bótamálum. Í barnasøkum er maðurin aloftast settur fyri alla bótina, men stundum fær kvinnan sína bót fyri seg. Hetta verður nærsagt altíð gjørt, táið tað er aðru ella triðju ferð, hon er komin fyri leysingabarn, og táið so er, verður bót hennara altíð ásett hægri. Bótin hjá manninum hækkar eisini, um hann fær fleiri leysingabørn, men vanliga kemur hann tá at standa fyri bótini hjá kvinnuni við. Stundum sæst kvinna sett fyri bót í barnamáli, uttan at maður sæst at hava fingið tilsvarandi bót. Í 1621 er soleiðis Marion Olufsdatter á Eiði dømd í bót fyri barn, hon hevur fingið við Johannes Guldsmed, uttan at hesin maður sæst at vera dømdur. Johannes Guldsmed hevur helst ikki verið føroyingur. Táið kvinna einsamøll er dømd í barnamáli, er skuldin stundum sett á onglending ella á ein bátsmann (kanska við handilsskipi), og undir Suðuroy 1652 stendur: «Sunneva Ananiasdatter haver fået et barn og siger sig at være voldtagen udi marken af en bådsmand fra et hvalfangerskib.»

Um hetta mundið royndu nógvir menn stórhvalaveiðu í Norðuratlantshavi. Elstir í hesi vinnu vóru menn frá Biscaia, men í hesi tíðini vóru onglendingar, flamlendingar og norðmenn eina fremstir, ja, enntá íslendingar vóru við. Hvalirnir vórðu skutlaðir frá báti, og skutilin var festur í flot, sum aftur hevði áfast í skipið. Føroyingar funnu tá ofta stórhval rekandi deyðan, sum óivað hevði verið meinslaður av hesi veiðu.

Undir bótamálum sæst annars, at nógv ónorrøn orð eru komin inn sum føroysk fólkanøvn í hesi tíðini. Onnur benda á, at persónarnir mega vera av útlendskum uppruna. Nevnast skulu: Jacob Wefuer (stolið), Hans Hanssøn Skrædder (leysingabarn) og Hans Ribber (leysingabarn), allir undir Streymoy og helst búsitandi í Havn. Hesi nøvn kunnu summi vera yrkisnøvn. Ribber minnir okkum á fyrsta og síðsta lutherska bispin í Føroyum, Jens Gregersøn Riber. Hann sjálvur fór, sum vit vita, aftur av landi, men møguliga kann onkur av ætt hansara vera komin við honum til Føroya. Vit síggja, at tveir aðrir brøður Morsing komu til Føroya, táið presturin Christen Pedersøn Morsing kom higar.

Av øðrum fremmandum nøvnum er áður nevnt ættarnavnið *Urne*, sum fleiri persónar í Føroyum hava borið. Hesir Urnar hava um hetta mundið sitið á smærri gørðum í Føroyum, og sagnir finnast eisini um teir; einstøk staðarnøvn eru merkt av teimum[1].

Fleiri ferðir síggja vit mál fyri á tingi um *seðlar*, sum ikki hava verið rættir. Hetta kann ikki vera prentaðir peningaseðlar, men handskrivaðir seðlar, sum hava havt peningavirði. Tað sær út, sum leigubúðin hevur givið slíkar seðlar frá sær; handilin kann møguliga eisini hava gjørt tað. Slíkur seðil hevur í hvørt fall víst, at maðurin, sum átti hann, hevur havt pening til góðar, og seðilin kundi tá verða nýttur at keypa fyri. Í 1618 síggja vit, at Johannes Pedersøn í Tórshavn kom fyri á tingi um ein tílíkan falskan seðil, men dømt varð ikki tá, tí eldri sáttmáli var um tílíkt mál, sum Johannes Pedersøn viðgekk framvegis at góðtaka. Her man vera sipað til framman fyri nevnda mál frá 1613.

Undir 1617 — á breddanum stendur tó 1616 — er fylgjandi dómur at finna:

«Jesper Jørgensøn udi Kunø for en seddel, han dølte hos sig, bøde til kgl. majestæt 9 1/2 gylden 2 skind.»

Ætlandi man maðurin sjálvur ikki hava átt henda seðilin. Undir Streymoy 1634 stendur fylgjandi:

«Hendrik Jespersøn, for han ville bedrage Morten Nielssøn, fogedens tjener, idet at han vilde komme hannem til at besvige sin husbonde og give hannem en seddel på 20 skind og en halv vog ru tællig, er dømt at bøde til kongl. majestæt 3 mark sølv, er benådet for armods skyld på 5 gl.»

Hesin maðurin man hava viljað havt ein seðil fyri at hava latið vørur inn í leigubúðina, hvat hann so ikki hevði. Fyri slíkan seðil vildi hann óivað kunna keypt vørur við handilin. Ætlandi man tó bókføring hava verið við leigubúðina fyri skuld. Sama man hava verið við handilin. Menn fingu í hvørt fall kvittunarseðlar fyri tað, teir lótu inn — ella skuldu fáa tað. Tað, sum meira var goldið enn skuldin, fingu teir tá ognarseðil fyri. Hóast myntur ikki tykist nýttur hvørki við leigubúðina ella handilin, hava menn ikki havt kontrabøkur. Vit hoyra um hesar seðlarnar, bæði kvittunarseðlar fyri skuld og ognarseðlar, fleiri ferðir. Mistu menn hesar seðlar burtur, kundu teir skjótt koma illa fyri peningaliga. Dømi eru eisini um, at tað er hent. Undir handlinum skal hetta verða umtalað. Einstakir myntir hava tó verið í Føroyum, tí sakarmál finnst um, at teir hava verið stolnir, t. d. dáli. Teir, sum áttu myntir, goymdu teir væl á kistubotninum.

Ein lættlivandi kvinna, ættað av Toftum, varð útvíst úr Havnini 1619, og í sakarmáli undir Eysturoy 1621 kemur hon fyri aftur:

«Wendell Mattisdatter skal bøde til kongl. majestæt, for hun skældet Niels bådsmand for en tyv (tiouf) og hans kone for er nedersmurt hore, og kunde det ikke bevise, 3 mark sølv.»

Eftir hesum sær tað út, sum hevur siglandi maður (bådsmand) um

[1] Sjá Personalhistorisk Tidsskrift fyri 1955: Slægten Urne på Færøerne.



hetta mundið búð fast í Føroyum. Mannasøgn vil vera við, at Ólavur Lavarsson skal hava bygt skip, men løgtingsbókin nevnir einki um tað, og skjal er heldur einki at vísa á.

Fólk eru ofta dømd fyri halgibrot, og tað er vanliga fyri at gera arbeiði sunnudag, t. d. at drepa eina kúgv. Menn eru eisini dømdir fyri at «have forbrudt sig mod sakramentet», og tað vil óivað siga fyri at hava tikið kirkjuvín. Høviskir hava menn ikki altíð verið á tingi, sum tað sæst av dómi frá 1620:

»Johannes Guttesøn på Ejde for banden og anden hans modvilligheds bedrift, som han begyndte på lagtinget i kongl. majestæts fogeds nærværelse, blev derfor tildømt at bøde til kongl. majestæt 5 1/2 gl.»

Merkiligt er ofta at síggja, at fólk koma á ting við heldur smáum málum, sum viðkoma teirra næstu frændum; tað kann vera stuldur. Annars eru tvey sløg av stuldursmálum. Tey nógvu av hesum málum er stuldur, sum er gjørdur av neyð, og vit síggja, at táið dómur fellur, er har heldur einki at fáa. So bókstavrætt var lógin tikin, at hóast dómurin sigur tað vera hungursstuldur, verður bótin kortini ásett líka høg, sum t. d. í einum dómi 1630:

«Peder Gregersøn í Kvivig og Peder Islænder, for de stjal begge en kvie for hungersnød, benådet for deres armods skyld på 2 mark sølv.» Tað er 4 gl. 16 sk.

Viðhvørt er tað týðuligt, at tey, sum hava stolið, hava verið tjóvsk av lyndi. Dømi eru um hetta undir: *Dráp og serlig brotsmál*. Eisini undir málum, sum bert eru innskrivað sum bótamál, finnast slík dømi. Soleiðis er ein maður í Sandoy, sum hevur fingið dóm fyri at hava gingið einsamallur í hagan, eyknevndur *tjóvurin*. Í Eysturoy finna vit faðir og son við eyknevni Locke, sum báðir eru tjóvskir. Um dóm yvir Niclas Joensøn Locke 1623, tí hann frá Joen Joensøn við Sjógv hevði stolið eina leingju av eini oksahúð, mett sjey skinn, og hosur og borðiskar, sum vóru mett 18 skinn, sigur løgtingsbókin:

«Da satte kongl. majestæts foged, Mads Christensøn, udi rette og var dom begærende, hvad hans straf bør at være efter loven, efterdi han tilforn ikke haver været sådant foruden. Blev således forefundet og dømt af lagmanden og lagrettesmændene, at han skal miste sin hud, uden han vil den løse med 3 mark sølv, hvilket blev hannem tildømt at bøde til kongl. majestæt.»

Son Niclasar finna vit í 1639 eisini dømdan fyri stuldur:

«Joen Niclassøn Locke for han stjal fra Poul Jacobsøn tre kvarter fårekød, 12 hyser, 1/2 flynder, vurderet 6 skind, er dømt at løse sin hud med 3 mark sølv til konningen, er benådet for hans store armods skyld på 4 gl.»

Eyknevnið Loki, sum fylgir báðum feðgunum, man ikki vera komið av ongum.

Oyggin Hestur tykist frá gamlari tíð at hava hoyrt til Streymoyar sýslu, men í 1639 stendur eitt størri stuldursmál úr Hesti skrivað undir *Sandoyar sýslu:*

Michel Lauridssøn i Hest for, han stjal fra Joen Holdansøn i Hest 7 bøer, 10 volgar, vurderet 3 1/2 skind, og var hans anden forseelse, er dømt efter egen bekendelse at løse sin hud med 6 mark sølv til konningen, er benådet for hans store armods skyld på 6 gl.»

Sum áður ávíst ásetti Norska løgbókin frá 1604 slíka straff fyri mann, sum stingur annan við knívi, at hin seki skuldi verða stungin gjøgnum hondina aftur fyri, men at hann kundi keypa seg frían við bót, sum galt 8 ørtugar og 13 merkur fyri hvønn sting. Dømi er sum nevnt um, at løgtingið er gingið burtur frá hesi ráu ásetan, sum tíðin leið, tí í 1650 finna vit undir Streymoy henda dóm, uttan at nevnt verður nakað um óhappsgerð:

«Thomas Gregersøn for, at han stak Anne Thomasdatter med en kniv, blev dømt at bøde til kongl. majestæt 1 mark sølv.»

Løgtingsbókin hevur 1622 nógvar bøtur goldnar í fiski, og hetta kundi bent á, at føroyingar hava fiskað væl um hetta mundið, men longu í 1627 hevur fiskaloysi verið. Hetta helt á í fleiri ár, og upp um 1630 komu óveðursár. Veturin 1632—33 var reinur fellisvetur. Neyð hevur gjørt seg galdandi í stórum, og stuldursmálini vuksu í tali, somuleiðis mál um ólógliga hagagongd. Virðingin fyri lóg og rætti minkaði millum manna. Hetta sæst eisini av yvirlitinum yvir bótamálini. Søgnin um Húsarænarnar tykist at vera frá árinum 1636, men tveir av hesum monnum høvdu verið dømdir áður. Undir 1633 stendur:

«Torbierg Andersøn på Husum for skældsord skal bøde til kongl. majestæt 10 gl.» Bókført er í 1634:

«Holdan Guttersøn, for han stjal halvanden kande korn, to fårelår og en fisk vurderet 4 skind, og var hans anden forseelse, er dømt efter egen bekendelse at løse sin hud med 3 mark sølv til kongen, er benådet på 5 gl.»

Dómurin yvir Torberg Andrasson er óvanliga harður, men løgtingsbókin sigur einki um, hvat maðurin hevði sagt. Bæði Torberg og Hálvdan vóru húsarænar, sum ávíst undir: *Dráp og serlig brotsmál*, bls. 36.

## b. Kongstíggjundin.

Eins og bótamálini var kongstíggjundin ein ójøvn inntøka á fútaroknskapinum[1]). Hin fasti jarðarskatturin við kongsleiguni var nógv hitt størsta gjaldið, kongur fekk av Føroyum. Smærri fastar inntøkur komu av pantijørðini og av hinum lítla húsmannsskattinum, sum fyrst sæst á roknskapinum ár 1600. Av tí at kongstíggjundin er ójøvn eftir góðum og ringum áringum, eigur hon at geva eina toluliga mynd av inntøkuviðurskiftunum hjá føroyingum um hetta mundið bæði av sjógvi og landi.

Ein fjórðingur av allari tíggjund var kongstíggjund. Prestarnir fingu annan fjórðingin, kirkjan hin triðja, og hin fjórða skuldu tey fátæku fáa. Kongstíggjundin var tann parturin, sum bispurin í Kirkjubø fekk

1) Finnast á ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn uttan roknskapirnir fyri 1645—46 og 1647—48, sum eru á ríkisskjalasavninum í Oslo.



í teirri katólsku tíðini[1]), og einans gjøgnum hana fáa vit nakað yvirlit yvir tíggjundagjaldið frá teirri tíðini. Tíggjund gekk tá av nærsagt øllum inntøkum, fólk høvdu, og inntøkan hjá øllum fólkinum í Føroyum skuldi eftir tí verið um fjøruti ferðir hitt árliga kongstíggjundagjaldið. Kortini mega vit rokna við, at hon var størri, tí tíggjundin var á mangan hátt givin í minna lagi[2]).

Fyrsti fútaroknskapur yvir Føroyar, sum er til skjals nú á døgum, er frá 1584, so longur kunna vit ikki koma aftur í hesum spurningi. Innan 1613 eru bert 6 ársroknskapir varðveittir. Tey komandi árini til 1653 eru teir flestu at finna, men einstakir eru tó burtur. Viðgerast skal fyrst kongstíggjundin frá teim 6 fyrstu fútaroknskøpunum. Roknskapurin nýtir bert romaratøl, men her verða tó vanlig tøl nýtt.

Nøvnini á teim gomlu vekt- og virðiseindunum, sum fútaroknskapirnir nýta, eru enn varðveitt í Føroyum, sjálvt um støddir teirra eru nakað broyttar. Eindirnar eru ivaleyst komnar til Føroya á fyrsta sinni úr Bjørgvin, sum var handilsstaður Føroya í fyrra helmingi av miðaldri, og tær høvdu tá fylgjandi virði:

1 vág (vog) = 72 merkur (mark). Norska miðaldursmørkin er funnin í meðal at hava vigað 214,32 g. Í vágini vóru 3 pund (bismerpund)[3]). Eftir tí skuldi 24 merkur verið í pundinum, og soleiðis hava føroyingar eisini sagt upp at okkara døgum. Í fútaroknskapinum stendur smørtunnan fyri at viga 7 vágir, ætlandi eftir roknskøpunum 80 marka vágir. Peningavirðið er føroyskur gyllin = 20 skinn ella seyðaskinn. Frá 1588 nýtir fútaroknskapurin vekteindina skinn, sum er 4 merkur, kent í Føroyum enn á døgum í tálgarvekt.

Hin norska mørkin hevur verið grundarlagið undir føroyskum vekteindum, og av henni hava føroyingar so skapt sær serliga føroyska vekteind skinn = 4 merkur. Eftir omanfyristandandi uppgerð skuldu 18 skinn verið í vágini, men soleiðis hava menn ikki roknað í kongsins leigubúð á Tinganesi. Har hava teir roknað 20 skinn í vágini, eins og 20 skinn vóru í gyllinum, og aftrat hava teir lagt eitt skinn í yvirvekt. Í leigubúðini hevur soleiðis vágin við síni yvirvekt til kongs verið roknað í 21 skinnum,[4]) og á tann hátt vóru 7 skinn í hvørjum pundi av hesi kongsvág við síni yvirvekt í staðin fyri 6 skinn í uppрunavágini. Eftir hesum fall vágar- og gyllinsvirðið saman uttan í smøri. Har kostaði vágin 1 1/2 gyllin, fløt somuleiðis. Her nevnda kongsvág hevur eisini verið nevnd tíggjundavág, soleingi ullartíggjund varð givin í Føroyum. Í teirri síðstu tíðini tykist henda vágin ikki

1) Í N. g. L., bindi II bls. 310 undir nýggjari kristinrætti Gulatings stendur umsett til føroyskt: «Tað høvum vær avtalað við biskup váran, at hann skal oss tænastu veita, men vær skulum hana samsýna so, at vær skulum lata tíggjund alla og fulla bæði av ávøksti og neytahaldi, fugli og fiski og allari rættari vinnu; men hon skal so verða býtt, at biskupur skal hava fjórðing, fátækir menn fjórðing, prestur fjórðing og kirkja fjórðing.» 2) T. d. var ein mørk av ull tíggjundað fyri hvønn skurðseyð, og tað var tá bert 1/4 skinn í peningi. Skurðseyðurin við tilhoyrandi várull kom tá at standa í virðinum 2 1/2 skinn. Argjalombini vóru frá 1584 í fútaroknskapinum sett til 4 skinn stykkið. Upp móti miðjuni av 17. øld kostaði skurðlambið eftir løgtingsbókini um 5 skinn. 3) Svend Aakjær: Maal og Vægt; bls. 97. Um mat og vekt í Noreg Ásgant Steinnes herí bls. 84—154. 4) Tíggjundagjaldið í fútaroknskapinum vísir hetta týðuliga.

at vera tikin við yvirvekt, og hon gekk tá fyri 40 donsk pund. Bert við at rokna við kongsvágini fáa vit høpi í tíggjundauppgerðum fútans, sum síggja soleiðis út:

| Ár | Fiskur | Smør | Ull | Fjøður | Í peningi |
|---|---|---|---|---|---|
| 1584[1]) | | | | | |
| Norðuroyar | 13 v. 8 m. | 3 v. 1 p. 4 m. | 11 v. | | 29 gl. 3 sk. |
| Eysturoy | 15½ v. 1 p. | 7 v. 2 p. | 15 v. 8 m. | | 42 gl. 9 sk. |
| Streymoy | 7 v. | 5 v. ÷ 1 p. | 19 v. | | 33 gl. |
| Sandoy | 22½ v. | ½ t. 2 p. | 5½ v. | | 34 gl. |
| Vágar | 6½ v. | 3 v. | 10 v. ÷ 1 p. | | 20 gl. 13 sk. |
| Suðuroy | 22 v. 4 m. | 1 t. | | | 32 gl. 1 sk. |
| Í alt | 87 v. | 1½ t. 18 v. 4 p. 1 s. | 60 v. 5 s. | | 191 gl. 6 sk. |
| 1588 | | | | | |
| Norðuroyar | 8 v. | 3 v. | 11 v. 15 s. | | 24 gl. 5 sk. |
| Eysturoy | 8 v. 2 s. | 8 v. | 20 v. 15 s. | | 40 gl. 17 sk. |
| Streymoy | 6 v. | 4 v. 1½ p. | 15 v. | | 27 gl. 15 sk. |
| Sandoy | 22½ v. | ½ t. | 5½ v. | | 33 gl. |
| Vágar | 7½ v. | 2 v. 14 s. | 13 v. | | 24 gl. 11 sk. |
| Suðuroy | 20 v. | 1 t. | | | 30 gl. |
| Í alt | 72 v. 2 s. | 1½ t. 17 v. 1½ p. 14 s. | 66 v. | | 180 gl. 8 sk. |
| 1590 | | | | | |
| Norðuroyar | 6 v. | 2 v. 2 s. | 6½ v. 6 s. | | 15 gl. 18 s.[2]) |
| Eysturoy | | 7 v. | 13 v. | | 23 gl. 10 sk. |
| Streymoy | 5 v. | 4 v. 1 p. | 10 v. 6 s. | | 21 gl. 16 sk. |
| Sandoy | 14 v. 18½ s. | ½ t. | 6 v. 4 s. | | 26 gl. 2½ sk. |
| Vágar | 8 v. | 2 v. | 10 v. | | 22 gl. 10 sk. |
| Suðuroy | 20 v. | 1 t. | | | 30 gl. |
| Í alt | 53½ v. 8½ s. | 1½ t. 16 v. 1 p. 2 s. | 46 v. 6 s. | | 139 gl. 16½ sk. |

[1]) Eingin samanteljing av vørum og peningi í roknsk. [2]) Her 2 skinn í smøri = 2 sk. pen. í roknsk.



| Ár | Fiskur | Smør | Ull | Fjøður | Í peningi |
|---|---|---|---|---|---|
| 1600 | | | | | |
| Norðuroyar | 20 v. | 3 v. 2 p. | 10 v. 9 s. | | 35 gl. 19 sk. |
| Eysturoy | 14 v. | 6 v. | 16½ v. | | 39 gl. 10 sk. |
| Streymoy | 9 v. | 4 v. 2 p. | 10½ v. | | 26 gl. 10 sk. |
| Sandoy | 18 v. | 4 v. | 6½ v. | | 30 gl. 10 sk. |
| Vágar | 10 v. | 3½ v. | 9 v. | | 24 gl. 5 sk. |
| Suðuroy | 23½ v. | ½ t. 3 v. | | | 33 gl. |
| Í alt | 94½ v. | ½ t. 23½ v. 4 p. | 52½ v. 9 s. | | 189 gl. 14 sk. |
| 1601 | | | | | |
| Norðuroyar | 17 v. | 3½ v. | 11 v. | | 33 gl. 5 sk. |
| Eysturoy | 17 v. | 7 v. | 14 v. | | 41 gl. 10 sk. |
| Streymoy | 5½ v. | 7 v. 7 s. | 17 v. | | 33 gl. 7 sk. |
| Sandoy | 24 v. | ½ t. | 4½ v. | | 33 gl. 10 sk. |
| Vágar | 10 v. | 3 v. 1 p. | 10 v. | | 25 gl. |
| Suðuroy | 30 v. 9 s. | 6 v. 1 p. 7 s. | | | 40 gl. 6 sk. |
| Í alt | 103½ v. 9 s. | ½ t. 26½ v. 2 p. 14 s. | 56½ v. | | 206 gl. 18 sk. |
| 1602 | | | | | |
| Norðuroyar | 14 v. | 3 v. | 5 v. | | 23 gl. 10 sk. |
| Eysturoy | 14 v. | 5 v. 2 p. | 5½ v. | | 28 gl. |
| Streymoy | 11 v. | 5 v. | 5½ v. | | 24 gl. |
| Sandoy | 17½ v. | 3 v. | 1 v. | 1½ v. | 24 gl. 10 sk. |
| Vágar | 10 v. | 2 v. | 5½ v. | 1 v. 5 s. | 19 gl. 15 sk. |
| Suðuroy | 22 v. | 4 v. 1 p. | | 2 v. | 30 gl. 10 sk. |
| Í alt | 88½ v. | 22 v. 3 p. | 22½ v. | 4½ v. 5 s. | 150 gl. 5 sk. |

Tíggjundaroknskapirnir tykjast at vísa, at árini um 1584 hava verið toluliga góð í Føroyum, men um 1590 hevur niðurgongd verið í inntøkunum. Henda niðurgongdin hevur víst seg mest í minkandi inntøkum av veiddum fiski. Um 1601 eru inntøkurnar aftur góðar, serliga fiskiskapurin, men um 1602 síggja vit á ullartíggjundini, at seyðafelli hevur verið; skrivligt prógv er eisini fyri tí. Hetta árið síggja vit fyrst, at fjøður kemur inn sum tíggjundavøra. Av kongsbrævi 17. apríl 1603 sæst, «hvorledes at mesteparten, hvis fæ både oksen, søer, får og lamb, som vore og kronens undersåtter på vort land Færø haver haft, er udi forleden hårde vinter bortdøde.»[1]) «Forleden hårde vinter» sipar her óivað til veturin 1601—02. Smørtíggjundin 1602 er tó ikki minkað heilt nógv, so neytafellið kann ikki hava verið stórt. Aftaná hetta fellisárið fingu bøndur loyvi at lata nakað av síni tálgar- og ullartíggjund í fiski, til teir fingu seyðaskipanina upp aftur, somuleiðis við kongsleiguni.

Suðuroyggin hevur aldri givið ull í tíggjund, Sandoyggin heldur lítið. Hetta kemur ivaleyst av, at meginparturin av seyðinum fyri sunnan tá á døgum var svartur. Hann var tað í hvørt fall í seinra helmingi av 17. øld, tí tað er nevnt í brævi frá prestinum Klinte[2]). Viðmerkt skal verða, at í frammanfyri standandi tíggjundauppgerð, hvar smørið eftir takstinum kostar $1^1/_2$ gl. vágin, meðan allar hinar vørurnar ganga fyri gyllin vágin, er yvirvekt eisini roknað av pundatalinum. Eitt pund av smøri í kongsvágini kom at kosta $^1/_2$ gyllin. Skinnini, sum uppgivin eru í smøri, verða harímóti rætt og slætt roknað fyri peningaskinn, t. v. s. tey missa ein triðing av sínum prísi, og gongur hetta ivaleyst inn í yvirvektina. Av smørtunnuni, sum kostaði 10 gl., varð eingin yvirvekt roknað. Í henni skuldu vera 7 vágir. Var smørið í leysari vekt, skuldi tunnan kosta $10^1/_2$ gl. Yvirvektin var annars eitt skinn av hvørji vág ella eitt skinn av 20 skinnum, sum var kongsvágin.

Í tíðarskeiðinum 1613—1653 eru nakrir fútaroknskapir burtur, men annars sær tíggjundauppgerðin fyri hesi árini soleiðis út:

1) Norske Registranter. 2) D. D. R. A., D. D. K. Bræv 5/8 1672 frá Jacob Christensen Klinte presti til «Færøe Kommissionen» 1673: «. . . sønder i landet i Sandø og Suderø ere fårene stakuldede og sorte».



| År | Fiskur | Smør | Ull | | Fjøður | Í peningi | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1613 | | | | | | | |
| Norðuroyar | $44^1/_2$ v. 8 s. | 3 v. 1 p. | 6 v. 6 s. | | | 56 gl. | 4 sk. |
| Eysturoy | $36^1/_2$ v. | 6 v. | 18 v. | | | 63 gl. | 10 sk. |
| Streymoy | 39 v. | 9 v. | 24 v. | | | 76 gl. | 10 sk. |
| Sandoy | 26 v. | 4 v. | 3 v. 3 s. | | | 35 gl. | 3 sk. |
| Vágar | $47^1/_2$ v. | 3 v. | 5 v. | | | 57 gl. | |
| Suðuroy | 40 v. | 1 t. | | | | 50 gl. | |
| Í alt | $233^1/_2$ v. 8 s. | 1 t. 25 v. 1 p. | 56 v. 9 s. | | | 338 gl. | 7 sk. |
| 1614 | | | | | | | |
| Norðuroyar | 29 v. | 3 v. 1 p. | 8 v. | | | 42 gl. | |
| Eysturoy | 41 v. | 7 v. 1 p. | 10 v. 9 s. | | | 62 gl. | 9 sk. |
| Streymoy | 34 v. | 9 v. | $12^1/_2$ v. | | | 60 gl. | |
| Sandoy | 21 v. | 2 v. 2 p. | 2 v. | | | 27 gl. | |
| Vágar | 43 v. | 3 v. 2 p. | 7 v. | | | 55 gl. | 10 sk. |
| Suðuroy | 32 v. | 4 v. | | | | 38 gl. | |
| Í alt | 200 v. | 30 v. | $39^1/_2$ v. 9 s. | | | 284 gl. | 19 sk. |
| 1615 | | | | | | | |
| Norðuroyar | 24 v. | $^1/_2$ t. | 3 v. | | | 32 gl. | |
| Eysturoy | 27 v. | 4 v. $2^1/_2$ p. | 8 v. | | | 42 gl. | 5 sk. |
| Streymoy | 25 v. | 7 v. 1 p. | 15 v. 2 s. | | | 51 gl. | 2 sk. |
| Sandoy | 18 v. | $1^1/_2$ v. $^1/_2$ p. | $2^1/_2$ v. 5 s. | | | 24 gl. | 1) |
| Vágar | 35 v. | 2 v. 2 p. | $5^1/_2$ v. 5 s. | | | 44 gl. | 5 s.1) |
| Suðuroy | 24 v. | 2 v. | | | | 27 gl. | |
| Í alt | 153 v. | $^1/_2$ t. $18^1/_2$ v. | $34^1/_2$ v. 2 s.2) | | | 220 gl. | 12 sk. |

1) Eftir takstinum skuldi talið fyri Sandoy verið 15 skinn minni og fyri Vágar 10 meira. Niðurteljingin av ullini í roknskapinum vísir, at har má vera nakað galið. 2) (Roknsk. 35 gl. 1/2 sk.)

| Ár | Fiskur | Smør | Ull | | Fjøður | Í peningi | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1617[1] | | | | | | | |
| Norðuroyar | 31 v. | ½ t. | 8 v. | | | 44 gl. | |
| Eysturoy | 31 v. | 1 t. | 20 v. 6 s. | | | 61 gl. | 6 sk. |
| Streymoy | 26 v. | 8½ v. | 22½ v. | | | 61 gl. | 5 sk. |
| Sandoy | 21 v. | 2 v. 2 p. 2½ s. | 3½ v. | | | 28 gl. | 12½ sk. |
| Vágar | 22 v. | ½ t. | 10½ v. 6 s. | | | 37 gl. | 16 sk. |
| Suðuroy | 30 v. | 1 t. | | | | 40 gl. | |
| Í alt | 161 v. | 3 t. 10½ v. 2 p. 2½ s. | 65 v. 2 s. | | | 272 gl. | 19½ sk. |
| 1618 | | | | | | | |
| Norðuroyar | 18 v. | ½ t. | 7½ v. 5 s. | | | 30 gl. | 15 sk. |
| Eysturoy | 24 v. | 1 t. ½ v. | 20 v. | | | 54 gl. | 15 sk. |
| Streymoy | 26½ v. | 8½ v. | 27 v. | | | 66 gl. | 15 sk. |
| Sandoy | 27 v. | 2½ v. 4 s. | | | | 30 gl. | 19 sk. |
| Vágar | 32½ v. 1 s. | 3 v. 1 p. | 12 v. 9 s. | | | 50 gl. | |
| Suðuroy | 30 v. | 1 t. | | | | 40 gl. | |
| Í alt | 158 v. 1 s. | 2½ t. 14½ v. 1 p. 4 s. | 67 v. 4 s. | | | 272 gl. | 14 sk. |
| 1619 | | | | | | | |
| Norðuroyar | 20 v. | ½ t. | 9 v. | | | 34 gl. | |
| Eysturoy | 26 v. | 1 t. 9 s. | 21½ v. | | | 58 gl. | 5 s.[2] |
| Streymoy | 24 v. | 8½ v. | 28 v. | | | 64 gl. | 15 sk. |
| Sandoy | 26 v. 4 s. | 1½ v. 5 s. | | | | 28 gl. | 14 sk. |
| Vágar | 29½ v. | ½ t. | 14 v. | | | 48 gl. | 10 sk. |
| Suðuroy | 38 v. | 1 t. | | | | 48 gl. | |
| Í alt | 163½ v. 4 s. | 3 t. 10 v. 14 s. | 72½ v. | | | 282 gl. | 4 sk. |

[1]) 1616 er burtur. [2]) Útrokningin vísir 6 skinn ov nógv, um 1 skinn í smøri er sett = 1 skinn í peningi og um 1 sk. í smøri = 1½ í peningi, vil hon vísa 1½ sk. ov nógv.



| Ár | Fiskur | Smør | Ull | | Fjøður | Í peningi | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1620 | | | | | | | |
| Norðuroyar | 24 v. | ½ t. | 6 v. | | | 35 gl. | |
| Eysturoy | 36 v. | 1 t. 1½ v. | 19 v. | | | 67 gl. | 5 sk. |
| Streymoy | 27½ v. | 8½ v. | 27½ v. | | | 67 gl. | 15 sk. |
| Sandoy | 27½ v. 5 s. | 2 v. | 2½ v. | | | 33 gl. | 5 sk. |
| Vágar | 28 v. | ½ t. | 14 v. | | | 47 gl. | |
| Suðuroy | 40 v. | 1 t. | | | | 50 gl. | |
| Í alt | 183 v. | 3 t. 12 v. | 69 v. | | | 300 gl. | 5 sk. |
| 1621 | | | | | | | |
| Norðuroyar | 57 v. | 1 t. | 11 v. | | | 78 gl. | |
| Eysturoy | 58 v. | 9 v. 2 p. | 21 v. | | | 93 gl. | 10 sk. |
| Streymoy | 31 v. | 8½ v. 7½ s. | 30½ v. | | | 74 gl. | 12½ sk. |
| Sandoy | 31½ v. 5 s. | 1 v. 2 p. | 2½ v. 6 s. | | | 37 gl. | 1 sk. |
| Vágar | 41 v. | 3½ v. | 10 v. 9 s. | | | 56 gl. | 14 sk. |
| Suðuroy | 42 v. | 1 t. | | | | 52 gl. | |
| Í alt | 260½ v. 5 s. | 2 t. 22 v. 4 p. 7½ s. | 75 v. 15 s. | | | 391 gl. | 17½ sk. |
| 1622 | | | | | | | |
| Norðuroyar | 52 v. | 1 t. | 4 v. | | | 66 gl. | |
| Eysturoy | 60 v. | 9 v. | 10 v. | | | 83 gl. | 10 sk. |
| Streymoy | 39½ v. | 9 v. | 14 v. | | | 67 gl. | |
| Sandoy | 41 v. | 3 v. | 3½ v. | | | 49 gl. | |
| Vágar | 61 v. | ½ t. | 4 v. | | | 70 gl. | |
| Suðuroy | 61½ v. 3½ s. | 1 t. | | | | 72 gl. | 13½ sk. |
| Í alt | 316 v. 3½ s. | 2½ t. 21 v. | 35½ v. | | | 408 gl. | 3½ sk. |

| Ár | Fiskur | Smør | Ull | | Fjøður | Í peningi |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1623 | | | | | | |
| Norðuroyar | 37 v. | 4 v. | 8 v. | | | 51 gl. |
| Eysturoy | 29 v. | 7 v. | 16 v. | | | 55 gl. 10 sk. |
| Streymoy | 25½ v. | 7½ v. | 15 v. | | | 51 gl. 15 sk. |
| Sandoy | 31 v. | 3 v. | 5 v. | | | 40 gl. 10 sk. |
| Vágar | 40½ v. | 3 v. | 7 v. | | | 52 gl. |
| Suðuroy | 55 v. | 1 t. | | | | 65 gl. |
| Í alt | 218 v. | 1 t. 24½ v. | 51 v. | | | 315 gl. 15 sk. |
| 1624 | | | | | | |
| Norðuroyar | 36 v. | 3½ v. | 8 v. | | | 49 gl. 5 sk. |
| Eysturoy | 26 v. | 6 v. | 16 v. | | | 51 gl. |
| Streymoy | 17 v. 6 s. | 7½ v. | 18 v. | | | 46 gl. 11 sk. |
| Sandoy | 24 v. | 3 v. | 2 v. | | | 30 gl. 10 sk. |
| Vágar | 38 v. | 3 v. | 10 v. | | | 52 gl. 10 sk. |
| Suðuroy | 51 v. | 6 v. | | | | 60 gl. |
| Í alt | 192 v. 6 s. | 29 v. | 54 v. | | | 289 gl. 16 sk. |
| 1626[1]) | | | | | | |
| Norðuroyar | 18 v. | 9½ v. | 9½ v. | | | 32 gl. 15 sk. |
| Eysturoy | 15 v. | 7 v. | 11 v. | | | 36 gl. 10 sk. |
| Streymoy | 16 v. | 7½ v. | 21 v. | | | 48 gl. 5 sk. |
| Sandoy | 13½ v. | 3½ v. | 4 v. | | | 22 gl. 15 sk. |
| Vágar | 22 v. | ½ t. | 10 v. | | | 26 gl. 18 sk. |
| Suðuroy | 37 v. | ½ t. | | | | 42 gl. |
| Í alt | 121½ v. | 1 t. 21½ v. | 55½ v. | | | 219 gl. 3 sk. |

1) 1625 er burtur.



| Ár | Fiskur | Smør | Ull | | Fjøður | Í peningi |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1627 | | | | | | |
| Norðuroyar | 18½ v. | 3½ v. | 7 v. | | | 30 gl. 15 sk. |
| Eysturoy | 9½ v. | 7 v. | 18½ v. | | | 38 gl. 10 sk. |
| Streymoy | 12 v. | 7½ v. | 21 v. | | | 44 gl. 5 sk. |
| Sandoy | 17½ v. | 3 v. | 4½ v. | | | 26 gl. 10 sk. |
| Vágar | 16 v. | ½ t. | 11 v. | | | 32 gl. |
| Suðuroy | 34 v. | ½ t. | | | 6 v. | 45 gl. |
| Í alt | 107½ v. | 1 t. 21 v. | 62 v. | | 6 v. | 217 gl. |
| 1628 | | | | | | |
| Norðuroyar | 21 v. | 3½ v. | 3½ v. | | | 29 gl. 15 sk. |
| Eysturoy | 14 v. | 6½ v. | 13 v. | | | 36 gl. 15 sk. |
| Streymoy | 15 v. | 6½ v. | 17 v. | | | 41 gl. 15 sk. |
| Sandoy | 13½ v. | 3 v. | 4 v. | | | 22 gl. |
| Vágar | 13 v. | 2½ v. 2 s. | 10 v. | | | 26 gl. 18 s.[1]) |
| Suðuroy | 23½ v. | ½ t. | | | 5 v. | 33 gl. 10 sk. |
| Í alt | 100 v. | ½ t. 22 v. 2 s. | 47½ v. | | 5 v. | 190 gl. 13 sk. |
| 1629 | | | | | | |
| Norðuroyar | 6 v. | 2 v. | 10 v. | | | 19 gl. |
| Eysturoy | 7 v. | 6½ v. | 14 v. | | | 30 gl. 15 sk. |
| Streymoy | 4½ v. | 6 v. 15 s. | 18 v. | | | 32 gl. 15 s.[2]) |
| Sandoy | 2 v. | 3½ v. | 6 v. | | 3½ v. 5 s. | 17 gl. |
| Vágar | 3 v. | 2 v. 8 s. | 9 v. | | | 15 gl. 12 sk. |
| Suðuroy | 10 v. | ½ t. 2 p. | | | 8 v. | 24 gl. |
| Í alt | 32½ v. | ½ t. 21 v. 2 p. 3 s. | 57 v. | | 11½ v. 5 s. | 139 gl. 2 sk. |

1) Her 1 sk. í smøri = 1½ sk. í peningi. 2) Vísir 2½ sk. ov nógv.

| År | Fiskur | Smør | Ull | | Fjøður | Í peningi |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1630 | | | | | | |
| Norðuroyar | 4 v. | 3 v. | 9 v. | | | 17 gl. 10 sk. |
| Eysturoy | 2 v. 6 s. | 7 v. | 16 v. | | | 28 gl. 16 sk. |
| Streymoy | 4 v. | 6 v. 1 p. | 19 v. | | | 32 gl. 10 sk. |
| Sandoy | 2½ v. 8 s. | 2½ v. | 4 v. | | 2½ v. 5 s. | 13 gl. 8 sk. |
| Vágar | 4½ v. | 2½ v. | 10 v. | | | 18 gl. 5 sk. |
| Suðuroy | 4 v. | ½ t. | | | 13 v. | 22 gl. |
| Í alt | 21½ v. 4 s. | ½ t. 21 v. 1 p. | 58 v. | | 15½ v. 5 s. | 132 gl. 9 s.[1] |
| 1631 | | | | | | |
| Norðuroyar | 15½ v. | ½ t. | 7 v. | | | 27 gl. 10 sk. |
| Eysturoy | 8½ v. | 1 t. | 14 v. | | | 32 gl. 10 sk. |
| Streymoy | 5½ v. | 6½ v. | 12 v. | | | 27 gl. 5 sk. |
| Sandoy | 5½ v. | 3½ v. | 4 v. | | | 14 gl. 15 sk. |
| Vágar | 8 v. 3 s. | ½ t. | 10 v. | | | 23 gl. 3 sk. |
| Suðuroy | 20½ v. | ½ t. 1 v. 2 p. | | | | 28 gl. |
| Í alt | 63½ v. 3 s. | 2½ t. 11 v. 2 p. | 47 v. | | | 153 gl. 3 sk. |
| 1632 | | | | | | |
| Norðuroyar | 12½ v. 5 s. | ½ t. 1 v. | 12 v. | | | 31 gl. 5 sk. |
| Eysturoy | 10 v. | 1 t. | 14 v. | | | 34 gl. |
| Streymoy | 10½ v. | 6½ v. | 17½ v. | | | 37 gl. 15 sk. |
| Sandoy | 13 v. | 3½ v. | 3½ v. | | | 21 gl. 15 sk. |
| Vágar | 8 v. 6 s. | ½ t. | 11 v. | | | 24 gl. 6 sk. |
| Suðuroy | 33 v. | ½ t. | | | 5 v. | 43 gl. |
| Í alt | 87 v. 6 s. | 2½ t. 11 v. | 58 v. | | 5 v. | 192 gl. 1 sk. |

[1]) Bert samlaða úrslitið uppgivið í roknsk., 133 gl. 4 sk., og niðurteljingin av vørunum samsvarar peningin 132 gl. 9 sk. Tíggjunda-roknskapirnir hjá Mads Christensen fúta, 1620—1645, eru annars at kalla lýtaleysir, táið 20 skinn eru roknað í vágini.



| År | Fiskur | Smør | Ull | Hosupør | Fjøður | Í peningi |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1633 | | | | | | |
| Norðuroyar | 19½ v. | 2 v. 2 p. | | | | 23 gl. 10 sk. |
| Eysturoy | 16½ v. | ½ t. | 4 v. | | | 25 gl. 10 sk. |
| Streymoy | 9 v. | 4 v. | 8½ v. | | | 23 gl. 10 sk. |
| Sandoy | 11 v. | 2 v. 1 p. | 3 v. | | | 17 gl. 10 sk. |
| Vágar | 11 v. | 1 v. 1 p. | 5½ v. | | | 18 gl. 10 sk. |
| Suðuroy | 27 v. | ½ t. | | | 8 v. | 40 gl. |
| Í alt | 94 v. | 1 t. 9 v. 4 p. | 21 v. | | 8 v. | 148 gl. 10 sk. |
| 1634 | | | | | | |
| Norðuroyar | 24 v. | 2 v. | 3 v. | | | 30 gl. |
| Eysturoy | 11 v. | ½ t. | 9 v. | 20 hvide | | 29 gl. |
| Streymoy | 12 v. | 4 v. 1 p. | 9 v. | | | 27 gl. 10 sk. |
| Sandoy | 14 v. | 2 v. | 2 v. | | | 19 gl. |
| Vágar | 4½ v. | 2 v. | 7½ v. | | | 15 gl. |
| Suðuroy | 21 v. | 1 v. 4 p. | | | 5 v. | 29 gl. 10 sk. |
| Í alt | 86½ v. | ½ t. 11 v. 5 p. | 30½ v. | 20 hvide | 5 v. | 150 gl. |
| 1635 | | | | | | |
| Norðuroyar | 53 v. | 2½ v. | | | | 56 gl. 15 sk. |
| Eysturoy | 35 v. | 5 v. | 6 v. | | | 48 gl. 10 sk. |
| Streymoy | 18 v. | 6 v. | 11½ v. | | | 38 gl. 10 sk. |
| Sandoy | 14 v. | 2½ v. | 4 v. | | | 21 gl. 15 sk. |
| Vágar | 7 v. | 3 v. | 7 v. | | | 18 gl. 10 sk. |
| Suðuroy | 33 v. | ½ t. | | | 5 v. | 43 gl. |
| Í alt | 160 v. | ½ t. 19 v. | 28½ v. | | 5 v. | 227 gl. |

| År | Fiskur | Smør | Ull | Hosupør | Fjøður | Í peningi |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1636** | | | | | | |
| Norðuroyar | 14 v. | 3 v. | 3 v. | 12 røde | | 24 gl. 10 sk. |
| Eysturoy | 9½ v. | ½ t. 2½ v. | 12 v. | 8 røde | | 32 gl. 5 sk. |
| Streymoy | 5½ v. | 6 v. | 19 v. | | | 33 gl. 10 sk. |
| Sandoy | 6 v. 5 s. | 2½ v. | 4½ v. | | | 14 gl. 10 sk. |
| Vágar | ½ v. 5 s. | 3 v. 3½ s. | 10 v. | | | 16 gl. 10 sk. |
| Suðuroy | 12 v. | 1 t. | | | | 22 gl. |
| Íalt | 49 v. | 1½ t. 17 v. 3½ s. | 48½ v. | 20 røde | | 143 gl. 5 sk. |
| **1637** | | | | | | |
| Norðuroyar | 10 v. | ½ t. | 4 v. | 35 hvide | | 26 gl. 10 sk. |
| Eysturoy | 9 v. | ½ t. 2½ v. | 14 v. | | | 31 gl. 15 sk. |
| Streymoy | 12 v. | 6 v. | 19½ v. | | | 40 gl. 10 sk. |
| Sandoy | 15 v. | 2 v. 6 s. | 2 v. | | | 20 gl. 9 sk. |
| Vágar | 6 v. | 2 v. | 10 v. | | | 19 gl. |
| Suðuroy | 20 v. | ½ t. 1 v. | | | | 26 gl. 10 sk. |
| Íalt | 72 v. | 1½ t. 13½ v. 6 s. | 49½ v. | 35 hvide | | 164 gl. 4 sk. |
| **1638** | | | | | | |
| Norðuroyar | 8 v. 6 s. | 3 v. | 2 v. | 46 hvide | | 24 gl. |
| Eysturoy | 10½ v. | 6 v. | 10 v. | 10 hvide | | 31 gl. 10 sk. |
| Streymoy | 10½ v. 7 s. | 7 v. 5 s. | 17 v. | 10 hvide | | 40 gl. 14½ sk. |
| Sandoy | 11 v. | 2 v. 5 s. | 4½ v. | | | 18 gl. 17½ sk. |
| Vágar | 7 v. | 2 v. | 5 v. | | | 15 gl. |
| Suðuroy | 28 v. | ½ t. | | | 3 v. | 36 gl. 10 sk. |
| Íalt | 75½ v. 3 s. | ½ t. 20½ v. | 38½ v. | 66 hvide | 3 v. | 166 gl. 12 sk. |



| År | Fiskur | Smør | Ull | Hosupør | Fjøður | Í peningi |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1639** | | | | | | |
| Norðuroyar | 7 v. 1½ s. | 2 v. | 1 v. | 53 hvide | | 21 gl. 13½ sk. |
| Eysturoy | 7 v. | 6 v. | 10 v. | 25 hvide | | 31 gl. |
| Streymoy | 9 v. | 6 v. | 15 v. | 9 hvide | | 34 gl. 16 sk. |
| Sandoy | 8 v. | 2 v. 8 s. | 3 v. 5 s. | | | 14 gl. 17 sk. |
| Vágar | 2 v. | 2 v. | 5 v. | 35 hvide | | 17 gl. |
| Suðuroy | 35 v. | ½ t. | | | | 40 gl. |
| Í alt | 68 v. 1½ s. | ½ t. 18 v. 8 s. | 34 v. 5 s. | 122 hvide | | 158 gl. 6½ sk. |
| **1640** | | | | | | |
| Norðuroyar | 31 v. | 2 v. 1 p. | | | | 34 gl. 10 sk. |
| Eysturoy | 27 v. | ½ t. 1½ v. | 8 v. | | | 42 gl. 5 sk. |
| Streymoy | 23 v. | 5 v. | 12½ v. | | | 43 gl. |
| Sandoy | 13 v. 5 s. | 2½ v. | 3 v. | | | 20 gl. |
| Vágar | 9 v. | 1½ v. | 1½ v. | | | 17 gl. 11 sk. |
| Suðuroy | 33 v. | 4½ p. | | 24 hvide | 5½ v. | 40 gl. 15 sk. |
| Í alt | 136 v. 5 s. | ½ t. 12½ v. 5 p. | 25 v. | 24 hvide | 5½ v. | 198 gl. 1 sk. |
| **1641** | | | | | | |
| Norðuroyar | 20 v. | 3 v. | | | | 24 gl. 10 sk. |
| Eysturoy | 16½ v. | 6 v. | 14 v. | | | 39 gl. 10 sk. |
| Streymoy | 14 v. | 6 v. | 17 v. | | | 40 gl. |
| Sandoy | 9 v. | 2½ v. | 4 v. | | | 16 gl. 15 sk. |
| Vágar | 10 v. | 1½ v. | 3 v. | 10 hvide | | 17 gl. 5 sk. |
| Suðuroy | 20 v. | ½ t. | | | | 25 gl. |
| Í alt | 89½ v. | ½ t. 19 v. | 38 v. | 10 hvide | | 163 gl. |

| År | Fiskur | Smør | Ull | Hosupør | Fjøður | Í peningi | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1645[1]) | | | | gl. sk. | | | |
| Norðuroyar | | 1/2 t. | 3 v. | 11 1/2 | | 19 gl. | 10 sk. |
| Eysturoy | 1 1/2 v. | 1 | 14 v. | 1 | | 26 gl. | 10 sk. |
| Streymoy | 3 1/2 v. | 1 | 14 v. | 7 4 | | 34 gl. | 14 sk. |
| Sandoy | 1/2 v. | 1/2 t. | 5 v. | | 3 v. | 13 gl. | 10 sk. |
| Vágar | 1 v. 10 s. | 1 1/2 v. | 4 v. | 6 | | 13 gl. | 15 sk. |
| Suðuroy | 7 1/2 v. 12 s. | 1/2 t. 1 v. | | | 10 v. | 24 gl. | 2 sk. |
| Í alt | 14 1/2 v. 2 s. | 3 1/2 t. 2 1/2 v. | 40 v. | 25 14 | 13 v. | 132 gl. | 1 sk. |
| 1647[2]) | | | | gl. sk. | | | |
| Norðuroyar | 22 v. 12 s. | 3 v. | 3 v. | 10 | | 40 gl. | 2 sk. |
| Eysturoy | 27 v. | 1/2 t. | 12 v. | 7 | | 51 gl. | |
| Streymoy | 10 v. | 4 v. | 11 v. | 6 12 | | 33 gl. | 12 sk. |
| Sandoy | 10 v. | 1/2 t. | 5 v. | | | 20 gl. | |
| Vágar | 8 v. | 1 v. 15 s. | 3 v. 16 s. | 5 7 1/2 | | 19 gl. | 8 1/2 sk. |
| Suðuroy | 34 v. 18 s. | 1/2 t. 2 v. | 20 s. | | | 43 gl. | 18 sk. |
| Í alt | 112 1/2 v. | 1 1/2 t. 10 v. 15 s. | 34 1/2 v. 26 s. | 28 1/2 9 1/2 | | 208 gl. | 1/2 sk. |
| 1649[3]) | | | | | | | |
| Norðuroyar | 26 v. | 1/2 t. | | 45 hvide | | 40 gl. | |
| Eysturoy | 28 v. | 1/2 t. | 3 v. 5 s. | 25 hvide | | 41 gl. | 5 sk. |
| Streymoy | 16 1/2 v. 2 s. | 3 1/2 v. 1 p. | 2 v. | 84 hvide | | 41 gl. | 3 sk. |
| Sandoy | 17 v. | 2 1/2 v. 1 s. | 2 v. 4 s. | | 5 s. | 22 1/2 gl. | 15 1/2 sk. |
| Vágar | 8 1/2 v. | 2 v. 5 s. | | 50 hvide | | 21 gl. | 17 1/2 sk. |
| Suðuroy | 16 v. | 1/2 t. | 10 s. | | 1/2 v. | 22 gl. | |
| Í alt | 112 v. 2 s. | 1 1/2 t. 8 v. 1 p. 6 s. | 7 1/2 v. 9 s. | 40 gl. 16 s. | 1/2 v. 5 s. | 189 gl. | 8 s.[4]) |

[1]) 1642—44 eru burtur. [2]) 1646 er burtur. [3]) 1648 er burtur. [4]) Roknskapirnir 1649—1652 tykjast ógvuliga ógjølla førdir, og feilir í samanteljing av vørunøgdum kunna verða ávístir. Heldur ikki er sagt, um hosupørini eru hvít ella korkalitt (røde), og tey eru ymis í prísi. Hvítar hosur fyri 4 sk. parið vóru vanligt gjald áður, men nøkur korkalitt hosupør fyri 5sk. parið kunna tó vera ímillum. Fútin, Christen Madssøn (1648—1654), hevur ikki farið gjølla um roknskap sín.



| År | Fiskur | Smør | Ull | Hosupør | Fjøður | Í peningi | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1650 | | | | | | | |
| Norðuroyar | 15 v. | 1/2 t. | 3 v. 7 s. | 13 par[1]) | | 25 gl. | 19 sk. |
| Eysturoy | 18 v. 4 s. | 1/2 t. | 7 v. | 30 par | | 36 gl. | 4 sk. |
| Streymoy | 14 1/2 v. 6 s. | 3 1/2 v. 9 s. | 7 v. 7 s. | 52 par | | 38 gl. | 5 sk. |
| Sandoy | 15 v. 5 s. | 1 v. 2 p. | 3 v. 3 s. | | | 20 gl. | 18 sk. |
| Vágar | 10 1/2 v. 5 s. | 1 1/2 v. 1 s. | 2 v. 8 s. | 30 par | | 21 gl. | 9 sk. |
| Suðuroy | 15 v. | 2 v. | | | 1 v. | 19 gl. | |
| Í alt | 89 v. | 1 t. 8 v. 2 p. 10 s. | 23 v. 5 s. | 125 par | 1 v. | 161 gl. | 15 sk. |
| 1651 | | | vog sk. | | | | |
| Norðuroyar | 15 v. | 1/2 t. | 2 1/2 | 30 par | 1 v. | 29 gl. | 10 sk. |
| Eysturoy | 16 v. 4 s. | 1/2 f.[2]) | 6 1/2 | 20 par | | 32 gl. | 14 sk. |
| Streymoy | 13 v. 1 1/2 s. | 3 v. 2 p. | 7 1/2 2 1/2 | 29 par | | 32 gl. | |
| Sandoy | 8 v. 15 s. | 2 1/2 v. 1 p. 1 s. | 2 14 | | 2 1/2 v. 2 s. | 18 gl. | 7 sk. |
| Vágar | 8 1/2 v. 6 s. | 2 v. | 2 1/2 | 20 par | 5 v. | 23 gl. | 6 sk. |
| Suðuroy | 15 1/2 v. | 1/2 t. | | | 1 v. | 21 gl. | 10 sk. |
| Í alt | 77 v. 6 1/2 s. | 1/2 f. 1 t. 7 1/2 v. 3 p. 1 s. | 21 1/2 6 1/2 | 99 par | 9 1/2 v. 2 s. | 157 gl. | 7 sk. |
| 1652 | | | vog sk. | | | | |
| Norðuroyar | 7 v. | 1/2 t. | 2 | 52 par | | 24 gl. | 8 sk. |
| Eysturoy | 9 v. 8 s. | 4 v. | 8 1/2 6 | 20 par | | 28 gl. | 4 sk. |
| Streymoy | 7 1/2 v. 8 s. | 4 1/2 v. 1 p. | 9 4 | 3 par | | 24 gl. | 19 sk. |
| Sandoy | 4 v. | 3 1/2 v. 8 s. | 3 | 25 par | 4 s. | 17 gl. | 2 sk. |
| Vágar | 10 v. | 2 v. | 1 1/2 | 39 par | | 20 gl. | 17 1/2 sk. |
| Suðuroy | 15 v. | 1/2 t. | 10 | | | 20 gl. | 10 sk. |
| Í alt | 53 v. 6 s. | 1 t. 13 1/2 v. 1 p. 8 s. | 23 1/2 1 1/2 | 139 par | 4 s. | 136 gl. | 1/2 sk. |

[1]) Roknskapurin nevnir bert *par* (hosupør). [2]) Eitt fat av smøri vá 8 vágir og kostaði 12 gl.




Mynd 1. Kurva I vísir støddina av allari kongstíggjundini, og hvussu hon broytist ár av ári. Á árstalinum er tíggjundagjaldið avsett í gyllin upp eftir. Millum tey funnu punktini eru linjustykki drigin.

Kongstíggjundin av Føroyum í árunum 1584—1653 eigur at geva góða mynd av vinnuni hjá føroyingum í sama tíðarskeiði. Hon sigur okkum frá, hvussu ársinntøkan á landi hevur gingið upp og niður eftir áringum. Fyri betri at fáa yvirlit yvir góðum og ringum vinnu-úrslitum í hesi tíðini eru árini við tilsvarandi tíggjundagjaldi í gyllin avsett gráfisk. Tey punkt á eini kurvu, sum soleiðis eru funnin, eru






Tá ið tey eru víst brotin yvir árstal, er fútaroknskapur fyri slíkt ár burtur. Kurva II gevur støddina av fiskatíggjundini, og kurva III vísir ullar- ella seyðatíggjundina. Smør- ella neytatíggjundin er ikki avsett í kurvu.

gjørd samanhangandi við linjustubbum, og vit fáa á tann hátt fram tíggjundakurvur fyri nevnda tíðarskeið. Sjá mynd 1, sum er sett yvir 2 blaðsíður.

Fyrst er at viðmerkja, at fleiri ársroknskapir, helst tey fyrru árini, eru burtur, men í slíkum førum er bert punktlinja førd millum tey næstu árini, hvar roknskapur finnst. Fyri tíðarskeiðið 1584—1612

er soleiðis bert roknskapur at finna fyri hesi ár: 1584, 1588, 1590, 1600—01, 1601—02 og 1602—03. Burtur eru eisini roknskapirnir 1616—17, 1625—26, 1642—45, 1647—48 og 1648—49.

Frá árinum 1600 sæst fútin at hava nýtt roknskaparárið 1. mai—30. apríl. Av nøkrum kvittunarlepum, sum enn finnast fyri tíggjundagjald sýslumanna til fútans, sæst, at kongstíggjundin hevur verið goldin fútanum í august, og tí er ársgjaldið av henni ført inn á kurvuna undir hinum fyrst nevnda árinum, t. d. er tíggjundagjaldið á ársroknskapinum 1613—14 ført inn á kurvuna undir 1613.

Kurva I á mynd 1 vísir alt kongstíggjundagjaldið í gyllin, kurva II tann partin av hesi tíggjund, sum er goldin í fiski, fiskatíggjundina, og kurva III vísir seyðatíggjundina ella rættari tann partin, sum er goldin í ullvørum. Til 1634 varð hesin partur bert goldin í ull, men frá hesum ári gerast hosupør ein vaksandi partur av hesum gjaldi, soleiðis at við endan av tíðarskeiðinum varð um helvt av allari seyðatíggjund goldin í hosum. Serliga stórt er gjaldið í hosum sammett við ullargjaldið fyri árið 1649, og óivað hevur árið framman undan tá verið vánaligt seyðaár, hvat ið kann verða ávíst á annan hátt. Hosugerðin gav tá meira av sær í peningi. Eftir seyðatíggjundagjaldinum síggjast ring seyðaár annars at hava verið 1602, 1615, 1622, 1633—35 og 1640. Ávíst kann ikki verða aðrar vegir enn eftir seyðatíggjundini, at 1640 hevur verið ringt seyðaár.

Ikki minni áhugaverd enn seyðatíggjundin er kurva II yvir fiskatíggjundina. Serliga stórt hevur tíggjundagjaldið í fiski og ætlandi eisini góður fiskiskapur verið í 1622. Kurvan yvir fiskatíggjundina, sum veruliga byrjar av nýggjum 1613, og sum tá er niðurgangandi, tykist árið fyri og kanska eisini eitt ár longur aftur at hava ligið enntá hægri. Eftir hesum skuldu góð fiskiár hava verið í Føroyum í 1611—12 og um 1622. Í millum hesi ár tykist ongantíð at hava verið fiskaloysi, men bert minkandi fiskur. Aftaná hitt mikla fiskiárið um 1622 sær tað út, sum er fiskiskapurin minkaður niður í ógvuliga lítið, til hann kom á botn í 1630. Eftir løgtingsbókini sær hetta árið eisini út til at hava verið eitt hitt størsta neyðarárið í Føroyum, og árið fyri var tað, at hitt stóra turkaránið fór fram í Suðuroy. Hetta árið hevur eftir fiskatíggjundini at døma ikki verið stórt betri. Í 1630 sæst tíggjundagjaldið í Føroyum at hava verið á botni. Í 1645 tykist tað tó at hava ligið líka lágt, og tá tykist fiskaloysið enntá at hava verið størri.

Tá vit líta at kurvunum á mynd 1, kann tað viðhvørt síggja út, sum eru fiskatíggjund og seyðatíggjund lækkandi ella hækkandi samstundis. Hetta er einki at undrast yvir, tí tá í tíðini hevði veðurlagið hina størstu ávirkan bæði á fiskaveiðu og á seyðaskurð. Reint fiskaloysi kann eisini hava verið. Tað síggja vit til dømis á árunum 1629—30, tí í árunum 1623—32 tykist seyðaskurðurin at hava verið toluliga javnur. Fallið kemur fyrst við árunum 1632—33. Eftir løgtingsbókini skuldi hesin veturin hava verið fellisvetur.

Í 1633 var ullartíggjundin til kongs bert 21 vágir ella millum tvær og tríggjar ferðir minni enn í meðalárum. Neytatíggjundin tykist hetta árið at vera fallin við einum stívum triðingi. Tað er soleiðis týðuligt, at árið hevur verið fellisár. Kongstíggjund goldin í fjøður hetta árið var 8 vágir, sum góvu átta gyllin í peningi. Nakað av fjøður var viðhvørt goldið, helst í ringum árum og helst úr Suðuroy, ikki sørt úr Sandoy. Suðuroy læt sum sagt onga ullartíggjund, og Sandoy læt ávikavist ógvuliga lítið. Í ringum fiskiárum sum t. d. 1630 og 1645 síggja vit, at Suðuroy hevur latið nógva fjøður í tíggjund. Nógv av hinum veidda fiskinum man tá vera gingið til matfisk.



Stórt tikið er tað væl rætt at siga, at føroyingar í hesi tíðini vóru mest bøndur, men tað er týðuligt at síggja av kurvunum yvir kongstíggjundina, at fiskiskapurin í øllum tíðarskeiðinum hevur havt avgerandi týdning fyri hitt føroyska landshúshaldið. Fiskiskapurin gav bæði mat og søluvøru. Ivaleyst man tað vera torra- og várfiskiskapurin, sum mest kemur fram í tíggjundagjaldinum. Á vetri og vári tornaði toskurin best, so hann kundi gerast góð handilsvøra. Meira enn seyða- og neytahald tykist fiskiskapurin at hava avgjørt, um tíðirnar komu at verða góðar ella ringar. Tað er sjónligt, at hin føroyski bóndaskapurin altíð hevur verið ein sameining av búskapi og útróðri. Eftir tí her framførda skuldi fiskatíggjundin, sum latin var í august, svara til fiskiskap, ið verið hevði um várið og veturin fyri.

Aftaná neyðarárini um 1630 eru tey vinnuligu viðurskiftini í Føroyum aldri batnað aftur til fullnar í viðgjørda tíðarskeiði. Føroyingar gingu inn undir Gabelstíðina í ringum korum. Í hesi ringu tíð tykist hosugerðin hjá føroyingum at hava vundið stórliga upp á seg. Óhugsandi er tað ikki, at hetta kann hava gingið nakað út yvir útróðurin, helst táið lítið var til at fáa av fiski. Í Gabelstíðini vita vit, at hosugerðin var ein høvuðsvinna hjá føroyingum, og táið hosuprísurin tá stóð til at falla, stóðst nógv stríð av tí. Tvinnir vóru hosuprísirnir: ein fyri reyðar ella korkalittar hosur, fimm skinn parið, og ein fyri hvítar hosur, fýra skinn parið. Tær dýru hosurnar vóru sum sagt korkalittar[1]). Vit vita, at gerðin av korkalittum hosum fall fyrr burtur. Í heilt einstøkum førum síggja vit skinn nýtt sum tíggjundavøra, og tá gongur eittt seyðaskinn altíð fyri eitt skinn í peningi. Tað var tað, sum avgjørdi virði av einum føroyskum peningagyllin.

Í 1633 sæst eingin tíggjundaull at vera komin úr Norðuroyum, svarandi til seyðafellisveturin 1632—33. Fylgjandi ár geva Norðuroyar heldur onga tíggjundaull: 1635, 1640, 1641 og 1649. Illa man hava staðið til við seyði norðuri á landi hesi árini eisini. Hitt ringa seyðaárið 1602 var ullartíggjundin úr Norðuroyum tó 5 vágir. Kongur fekk fjórðing av tíggjundagjaldi, vigað í 20-skinna vágum, men smørtíggjundin fór tó bert í triðingar. Har var eingin bóndalutur[2]).

## c. Hvalaveiða og reki.

Fútaroknskapirnir, sum eru til skjals frá 1584 til 1653, siga okkum nakað um hvalaveiðu og rekar, komnir í Føroyum, í hesum tíðar-

1) Thomas Tarnovius: Færøers beskrivelser, utgitt af Håkon Hamre, bls. 70.
2) Landsskjalasavnið. Løgtingsbók 1666—77, fol. 20—21, 19. aug. 1667.

skeiði. Tað er sjálvsagt í samband við kongsins inntøku av hesum fongi, at fútarnir geva sínar frágreiðslur.

Við byrjan av hesi roknskapartíð geva fútarnir ofta langar frágreiðslur, meðan frágreiðingar ikki eru so góðar tey seinri árini. Eftir frágreiðingunum er tað merkiligt, so fáar og smáar grindir komnar eru í hesum tíðarskeiði; fleiri fútaroknskapir eru tó burtur. Stórhvalir síggjast nógvir at vera funnir deyðir og petti av teimum eisini. Hetta hevur óivað samband við stórhvalaveiðuna, sum fór fram í Norðuratlantshavi í teirri tíðini.

Grindarakstur og -dráp mega tó ætlast at hava farið fram í Føroyum longu tá. Løgið er tað kortini, at orðið *grind* aldri sæst nýtt í hesum fútaroknskøpum; sagt verður bert «*små hvale*». Fútarnir máttu fingið orðið grind frá føroyingum, um tað tá var nýtt í Føroyum. Orðið *døglingur* hava teir fingið við og enntá orðið *nýðingur*, so grund kundi vera at ivast um, hvørt føroyingar longu tá hava rikið grind av havinum undir drepning[1]. Í hesum sambandið skal tó verða viðmerkt, at í 1647 nýtir Sámal Mikkjalson í Lamba orðið *qualregster* í einum brævi til løgtingið. Enn skal verða lagt aftrat, at sjálvt Seyðabrævið frá 1298, sum talar um bónda- og jarðarrættindi, eisini nevnir nakað um, hvat jørðin eigur av hvali, sum menn reka á land[2]. Kongsins partur av slíkari veiðu er tó her ikki nevndur.

Út frá hesum mega vit ætla, at føroyingar longu fyrrapart í miðaldri hava rikið hval á land. Henda gamla regla um føroyska hvalaveiðu kann ikki sigast at sipa bert til grindadráp. Bæði døglingar og royðrar, vita vit, kunna eisini verða rikin á land. Seyðabrævið galt fult út í Føroyum í umrødda tíðarskeiði, frá 1274 galt Landslógin, men Norska løgbókin av 1604 kom tá í gildi við vissum undantøkum[3].

Endurgivið skal verða, hvat fútaroknskapirnir í hesum tíðarskeiði siga um hvalaveiðu og rekar, hvat teir siga okkum um virði av hesum, og hvat vit annars kunnu ætla okkum til eftir galdandi reglum.

Í roknskapinum 1584 finna vit fylgjandi søgu um hvalaveiðu:

«Først haver hr. Ismael, boende i Suderø i Kvalbø, udroet på fjorden for Kvalbø og der fundet 3 små hvalfisk, som kaldes *deulinge* [døglingar] og vare levende, vare ungefærlig 6, 7 og 8 alen lange,

[1]) Lb. fol. 74 b, har finnst einans petti í hesi bók, hvar orðið grind verður nevnt ætlandi í samband við grindadráp: «Om to grind hvale, som Olof Lauridsson havde skotten på dybet udi Kvalvig med skuttel anno 1619, den tid de andre hvale rømde bort til havs.» («skodt med skuttelen»). Løgtingið dømdi Ólav at eiga hvalirnar uttan tíggjundagjald. [2]) Grein 8 eftir Seyðabrævinum í skinnbók nr. 33 kvarto, Stockholm, Dipl. Fær., ljóðar soleiðis: «Nú um húskallar hjá bónda hitta hval úti á havi og skera skipsfarm av, tá hava teir sjeynda part av; men flyta teir hann til lands óskornan, tá hava teir slíkt av, sum landsbók mælir. [Helming. Sjá N. g. L. bind II bls. 146–47]. *Nú reka menn hval á land, menn, sum ikki eiga jørð oman fyri, veiða og bjarga úr flóðarmála; teir skulu hava fjórðing burtur av*. So er um træ somuleiðis. Men um menn finna neyt ella seyðir ella annað fæ úti á havi og flyta á land, tá skulu teir hava fjórðing burtur av.» [3]) Í Norsku løgbókini frá 1604, sum bygdi á Landslógina, stendur undir Landslejebalken kap. 61: «Om hvale og Hvalevejde». Ásetanin er mest um rekahval og hval, sum verður skotin. Slík løgskipan kann hava goldið føroyskt grindadráp, tí einasta áseting í henni, sum kundi verið nýtt um hetta, ljóðar soleiðis: «Driver nogen hval ind i vig på anden mands jord, som ikke er hvalgård [tykist



og fik han en trosse fast på den ene og roede dermed ad landet, og de andre to fulgte efter og løbe jævnsides hos den anden ind på grunden, og duer forn. slags hvalfisk ikke at æde. Kongelig majestæts part af samme hvalfiskspæk haver provsten [sýslumaðurin] ved navn Simon Jenssøn[1]) der sammesteds til sig annammet, og deraf blev tran en tønde.»

«Item udi land drev et stykke af en hvalfisk, som var den midterste part, og kaldes samme slags hval *slettebag* [slættibøka], strandet på Østerø ude for Lamhauge, og havde længe drevet udi søen, og bugen vendte op og var alt opædt af andre dyr og fisk udi søen, alt hvis spæk som på ryggen var. Kongelig majestæts part, som blev bjærget og afhugget af samme stykke hval, annammede vinterfogeden, Peder Jacobsøn [seinri løgmaður] til sig, med hvis han solgte af samme spæk for 20 gl. 3 sk. Derpå oppebåret [altso í hondina]: Tællig 1 vog, fisk $6^1/_2$ vog 20 mark, uld 20 mark [tað er í peningi 8 gyllin].»

«Den 4. april udi land drev og strandede et underligt dyr eller troldhval ude for Funding på Østerø for et brat forland og var 26 færøske alen [stikka] lang, var lådden [skrivað: laayen] som en kat og havde ikkun et øje. Det sad midt på ryggen og blev afskåret og bjerget af ryggen af samme dyr, og kongelig majestæts part deraf var 60 stykker spæk, hvilket jeg lod føre til Thorshavn og lod smelte og syde i tran; deraf blev tran $1^1/_2$ tønde. End siden derefter udi et stille veder blev afskåren af samme hval, som provsten [sýslumaðurin] ved navn Niels Andersøn solgte spæk for 2 gl.»

«Sankta Hans dag udi sommer udi en gruelig kulde og fogsne, som skete på Færø, da var af Guds forsyn og vunderbare hændelse udi land kommet på Lille Dimon 4 små hvalfiske, som kaldes nyninger [má á føroyskum hava verið nýðingar]. Provsten, Simon Jenssøn på Suderø, annammede kongelig majestæts part af forn. 4 hvalfisk, som blev vurderet for gl. $4^1/_2$, derpå oppebåret, fik 2 voger [helst av fiski vert 2 gl.][2]).»

Fýra nýðingar kundi hóskandi verið fýra gyllinsfiskar, og av tí at vit vita, at Lítla Dímun øll í gomlum døgum var kongs, skuldi kongur í landpart átt tveir gyllinsfiskar, og gyllin av grind skuldi soleiðis tá verið tveir peningagyllin verdur.

ikki at kunna merkja hvalvág], da beholder de dem begge til halvnet [hvør helvtina].» Um rekahval stendur t. d. «Driver hval ind på nogen mands jord indengærdes eller uden, da hør kongen halvparten deraf og jorddrotten halvparten.» Jarðarhvalurin av grind í gomlum døgum í Føroyum var $^1/_2$ av tí, sum kom til skiftis. Hetta sæst av teim elstu skrivligu grindaskiftunum, vit kenna, frá um ár 1800. Við reglugerð av 1. nov. 1832 ásetti kongur, at landparturin av grind skuldi vera $^1/_4$ av tí, sum kom til skiftis. Kongur átti jarðarhvalin av kongsjørðini. Fyrst við skipan av 26. juli 1837 gav hann kongsbóndum eitt sindur burtur av hesum jarðarhvali. Helmingur av grindini í jarðarhval svarar til ásetingina í Norsku løgbókini, so rímuligt er at hugsa sær, at Norska løgbókin, áður Landslógin, og ikki Seyðabrævið er grundarlagið undir grindareglugerðini í Føroyum. Rakstrarmannaparturin er við reglugerðini 1. nov 1832 skiftur út um eitt ásett grindaøki. Nú er jarðarhvalurin avloystur og burturfallin við lóg av 11. mai 1935. [1]) Ivaleyst bóndi á Laðangarði í Sumbø; sjá Fær. kongsb. bls. 278. [2]) Landparturin 2 nýðingar hava minst verið 2 gl. av grind, og táið skinnið av grind, sum tað seinni sæst, hevur kostað stív 2 skinn í peningi, hóskar væl, at kongur fyri sínar 2 hvalir hevur fingið $4^1/_2$ gyllin.

Hetta merkiliga djórið, sum er rikið á land við Funning, og sum er sagt at hava havt bert eitt eyga, ið sat mitt á rygginum, er ringt at siga nakað um. Tað má hava havt spik undir húð og ikki hvølju. Frásøgnin um eygað ljóðar sum eitt ævintýr. Tað kann hava verið ein roysningur ella kanska ein sjókúgv, men sjókýrnar hava, tað vit vita um, bert livað í norðasta parti av Havinum Kyrra. Víðari stendur um rekavið í 1584:

«For regeved eller drivstokke, som kommer drivende i søen fra Grønland med stærk nordveststorm og der bjerges i landet af bønderne: Oppebåret af Sylvester Simonsøn [Vágar] fisk 1 vog, hos Simon Jenssøn provst på Suderø for regeved gl. 2½.»

Um hvat kongur sum heild í 1584 hevur fingið av peningi úr hvalaveiðu stendur:

«Summarum indtægt for adskillige slags hvalfisk oppebåret er udi dette år: gl. 16½ skind 3, tran 2½ td., tællig 1 vog, fisk 9½ vog 20 mark, uld 20 mark.

Hvalraf, som kaldes ambre, oppebåret af de bønder i Lervig, som blev fundet under Lervig fjæld, og provsten, Niels Andersøn og Peder Jacobsøn vinterfoged mig leverede i Thorshavn, som vog 3 voger. End annammet af Peder Bastiansøn i Funding, som han havde fundet hvalraf, 2 bismer pund.» Eftir galdandi taksti skuldi áðurnevndi peningur, roknaður í gyllin og skinnum — umframt ambráið verið: *42½ gyllin 3 skinn.*

Í roknskapinum 1588 stendur:

«I 1588 en flok hvaler døde i Skålefjord. Heraf kongelig majestæt 23 hvaler, solgt pr. stk. op til 2 vog fisk.» Skinnið av grind má her hava kostað meira enn tvey peningaskinn, tí vágin av fiski kostaði tá 1 gyllin.

Í roknskapinum 1600—01 finnst henda viðmerking:

«Anno 1599 den 14. nov. indkom udi Våge i Norderø 90 små hval; deraf tilkom kongelig majestæt udi sin part 23 hval. Blev solgt for 55 vog» [óivað fiskur]. Eftir hesum má skinnið av grind hava kostað um 3 peningaskinn. Í sama roknskapi stendur:

«Udi Sudergøte kom ind drivende noget hvalamber, hvilket bønderne smeltede, er 1½ vog... På Sand kom nogle små stykker af en rådden hval inddrivende. Blev kongens part solgt for 2 gl., hoser røde 8 par [5 skinn parið]... Udi Suderø kom inddrivende en gammel forrådden hval, som kongens part blev solgt for 8 gl.»

Úr roknskapinum 1601—02 er fylgjandi tikið:

«Anno 1600 den 4. september indkom udi Kvalvig i Strømø 24 små hval, hvoraf tilkom kongelig majestæt udi sin part 8. Blev solgt for fisk 20 vog [altso 20 gl., hareftir má skinnið av grind hava kostað minnst 3 peningaskinn]... Udi Husevig var funden en rådden hval. Blev kongens part solgt for fisk 4 vog 9 sk. [4 gl. 9 sk.]... Udi Suderø kom ind drivende et stykke rådden hval. Blev kongens part solgt for fisk 9 vog 2 sk. [9 gl. 2 sk.]... Udi Bø [í Vágum] indkom et stykke rådden hval. Blev kongens part solgt for fisk 4 vog 9 sk. [4 gl. 9 sk.].»

Eftir tiggjundagjaldinum var fiskiskapurin um ár 1590 ringur í Føroyum, men um ár 1600 tykist hann at hava verið toluliga góður, men 1602 versnar hann aftur. Í roknskapinum 1602—03 er bert fylgjandi at finna um hvalaveiðu:



«Anno 1602 den 8. aug. indkom udi Strømnæs 60 små hval. Blev kongens part solgt for 48½ gl.... Annammet af Niels Hendriksøn [sýslumaður] udi Norderø for nogen rådden hval, kom udi Norderø inddrivende, fisk 7 voger [7 gl.]... Annammet af Lyder Augustinussøn [Streymoyar sýslumaður] for nogle gamle snøre, var fundet udi en halvtønde, var vurderet for 2 gl., fisk 2 vog.»

Í 1615 komu fleiri grindir, um tær ikki vóru stórar:

«Anno 1615 den 5. september indkom norder i Våge på Bordø land 70 små hvalfiske. Kongelig majestæts part deraf 19. Blev solgt for 26 gl., lyse 26 voger [mótgjald 1 gl. vágin]. Nok for et stykke rådden hval, som indkom samme tid udi Arnefjord på forn. Bordø land. Blev solgt for 6½ gl. 5 sk., lyse 6½ vog 5 sk... Anno 1615 den 25. juli indkom norder i Våge på Bordø land 116 små hvalfiske. Kongl. majestæts part deraf 59 blev solgt for 90 gl. 5 sk., lyse 90 vog 5 sk... Nok anno 1615 den 28. juli indkom norder i forn. Våge på Bordø land 90 små hvalfiske. Kongelig majestæts part deraf 41 blev solgt for 61 gl., lyse 61 voger... Anno 1615 den 28. juli indkom på Kvalvig og Strømnæs land 14 små hvalfiske. Blev kongelig majestæts part deraf solgt for 14 gl., lyse 14 voger... Nok indkom der sammesteds norder ved (wid) Skåle på Østerø land 32 små hvalfiske. Blev kongelig majestæts part deraf solgt for 20 gl., lyse 20 voger... Anno 1615 den 3. juli indkom der udi Suderø på Kvalbø land 20 små hvalfiske. Kongelig majestæts part og blev solgt for 43 gl. 7 sk., lyse 43 voger 7 sk.»

Norður í Vági, Klakksvík, skuldi kongsjørðin átt meginpartin av jarðarhvalinum, táið Uppsalir ikki eru við. Í 1599 síggja vit, at kongur har fær 23 hvalir av eini 90 hvalir stórari grind[1]). Í 1615 sær lutfallsbýtið til kongs í Klakksvík av tí hvalatalinum, ið deytt er, øðrvísi út. Taka vit tær báðar grindirnar, sum doyðu á hásumri hetta ár, fekk kongur 100 hvalir av 206. Eftir hesum skuldi ein trúð, at helmingur av grindini tá fór í jarðarhval; men grindin 5. sept. gevur aftur eitt sindur øðrvísi mynd. Við tað, at hon kemur fyrst á roknskapinum, kundi borið á, at hon veruliga var komin árið fyri. Halda vit okkum framvegis til norður í Vági ella Klakksvík, vísa grindabýtini tó, at avleggingin av jarðarhvalinum í hvørt fall ikki kann hava fylgt seyðabrævsreglunum. Tað nógva hvalatalið, sum kongur fær í 1615, kundi væl verið komið av, at reglurnar í Norsku løgbókini tá veruliga vóru fylgdar, og at Uppsalir tá ongan jarðarhval fingu.

«Anno 1616 den 7. september indkom norder i Våge på Bordø land 150 små hvalfiske. Kongelig majestæts part deraf blev solgt for 93½ gl., lyse 93½ vog... Anno 1616 den 16. oktober indkom vester i Vågø på Midvågs land 130 små hvalfiske. Kongelig majestæts part deraf blev solgt for 42 gl., lyse 42 vog.»

---

[1]) Hetta kann benda á, at Uppsalir, sum hava nógva óðalsjørð, tá fingu jarðarhval í Vági, men at býlingurin hevur mist hesi rættindi 1615. Í vártingsbókini undir Norðuroya sýslu í 18. øld stendur sipað til, at Uppsalir eina ferð áður í tíðini høvdu fingið jarðarhval av grind í Klakksvík.

Hetta árið er kongur ikki sagdur at hava fingið ávíst tal av hvalum. «Anno 1617 den 5. september indkom 80 små hvalfiske på Kvalvig og Strømnæs land på Strømø. Blev kongelig majestæts part deraf solgt for 50½ gl., lyse 50½ vog... Nok anno 1617 den 2. nov. indkom en hval i Kollefjord 23 alen lang. Kongelig majestæts part deraf blev solgt for 43½ gl., lyse 43½ vog... Nok anno 1617 den 9. aug. indkom udi Suderø på Kvalbø land 40 små hvalfiske. Kongelig majestæts part deraf blev solgt for 33 gl., lyse 33 vog.»

Heldur ikki fyri 1618 er kongsins hvalatal uppgivið.

«Anno 1618 den 18. juli indkom norder i Våge på Bordø land 60 små hvalfiske. Kongelig majestæts part deraf blev solgt for 31½ gl., lyse 31½ vog... Anno 1618. den 13. dec. indkom i Øre land i Østerø 150 små hvalfiske. Kongelig majestæts part deraf blev solgt for 128 gl... Anno 1618 den 23. septbr. indkom udi Suderø på Kvalbø land 2 små døglinger. Kongelig majestæts part deraf blev solgt for 10½ gl... Item er indkommen udi Suderø siden beviserne var skrevne [stendur undir 1619] 2 små døglinger. Blev kongelig majestæts part deraf solgt for 18 gl... Item for en gammel egeplanke og en gammel skibsrå, vrag gods, er solgt for 3 gl., hoser røde 12 par [tað er 60 skinn ella 3 gl.].»

«Anno 1619 den 1. juli indkom norder i Våge på Borø land 135 små hvalfiske. Kongelig majestæts part deraf blev solgt for 91 gl... Anno 1619 den 15. jan. indkom en rådden hval på Sjoverland i Østerø. Kongelig majestæts part blev solgt for 17½ gl. 4 sk... Anno 1619 den 9. juli indkom på forn. Øre land i Østerø 90 små hvalfiske. Blev kongelig majestæts part deraf solgt for 85½ gl.[1])»

Í 1620 og 1621 komu tvær stórar grindir hvørt árið.

«Anno 1620 den 16. septbr. indkom norder i Våge på Bordø land 240 små hvalfiske. Deraf tilfaldt kongelig majestæt 55 fiske [hetta tykist at liggja tætt undir fjórðingi av grindini]. Blev solgt for 131 gl., lyse 131 voger er 131 gl.

Anno 1621 den 1. aug. indkom norder i Sundet på Øre og Strømnæs land 300 små hvalfiske. Deraf tilfaldt kongelig majestæt på begge land 93 fiske. Blev solgt for 219 gl. 1 sk., lyse 219 voger 1 sk. er 219 gl. 1 sk.» Seinri í 1621 komu tvær stórar grindir aftrat:

Anno 1621 den 5. septbr. indkom norder i Sundet på Øre og Strømnæs land 500 små hvalfiske. Blev kongelig majestæts part solgt for 410 gl. Deraf oppebåret lyse 497 voger, resten 64 gl... Anno 1621 den 23. septbr. indkom vester i Vågø på Midvågs land 250 små hvalfiske. Blev kongelig majestæts part solgt for 54½ gl. 1 sk., lyse 54½ gl. 1 sk. [hesar báðar grindirnar innførdar undir 1622—23].

«Anno 1622 den 26. maj indkom i Suderø i Kvalbø 200 små hvalfiske. Blev kongelig majestæts part solgt for 66 gl. 7 sk.» Og innført undir 1623—24:

«Anno 1622 i septbr. måned indkom i Kvalbø i Suderø 6 små døglinger [skrivað douglinger]. Blev kongelig majestæts part solgt for 16 gl., lyse 16 voger.»

[1]) Á Oyri í Eysturoy er alt kongsjørð; her kann kongsins partur væl vera helmingur av grindini.



«Anno 1623 den 12. jan. indkom i Kunø udi Norderø et stykke af en rådden hval. Blev kongelig majestæts part deraf solgt for 5 gl., lyse 5 voger... Anno 1623 indkom i Skålevig i Sandøen en rådden gammel hval. Blev kongelig majestæts part solgt for 21½ gl., lyse 21½ vog.» Á Skálafjørðin kom ein lítil grind hetta árið:

«Anno 1623 den 20. aug. indkom i Østersøen i Skålefjord 30 små hvalfiske. Deraf tilfaldt kongelig majestæt 6 fiske. Blev solgt for 12 gl.» Og innført undir 1624:

«Anno 1623 den 30. septbr. indkom i Kvalbø i Suderø 2 små døglinger. Blev kongelig majestæts part solgt for 6 gl., lyse 6 vog... Anno 1623 den 10. dec. indkom et stykke af en rådden hval i Sandø. Blev kongelig majestæts part solgt for 7½ gl., lyse 7½ vog.»

«Anno 1624 den 6. aug. indkom ved Strømnæs land i Strømø 100 små hvalfiske. Blev kongelig majestæts part solgt for 51 gl. Samme dag indkom ved Øre land i Østerø 80 små hvalfiske. Blev kongelig majestæts part solgt for 82 gl. 5 sk... Anno 1624 den 24. juli indkom vester på ejde udi Kvalbø i Suderø et stykke af en gammel rådden hval. Blev kongelig majestæts part solgt for 4 gl., lyse 4 vog.»

«Anno 1626 i jan. måned indkom norder i Våge 3 små hvalfiske. Deraf tilfaldt kongelig majestæt 6 gl., lyse 6 voger.» Og frá 1625:

«Anno 1625 den 29. dec. indkom ved [?] i Strømø et stykke af en rådden hvalfisk. Blev kongelig majestæts part solgt for 15 gl., lyse 15 vog.»

Undir 1627 er innført:

«Anno 1626 den 16. septbr. indkom vester i Vågø 100 små hvalfiske. Deraf tilfaldt Hans majestæt 18 fiske, er solgt for 24 gl. 5 sk... Anno 1626 den 21. septbr. indkom i Suderø en liden døgling. Blev kongens part solgt for 4 gl.»

«Anno 1627 den 27. juli indkom i Våge i Norderø et stykke af en rådden hval. Blev kongens part deraf solgt for 2 gl. 8 sk.»

«Anno 1628 den 16. juni indkom i Norderø i Våge 100 små hvalfiske. Deraf tilfaldt Hans majestæt 22 fiske, er solgt for 35 gl. 2 sk. [hetta kann ikki fara yvir fjórðing av grindini]... Anno 1628 den 24. april indkom udi Østerø ved Øre land [har alt er kongsjørð] 40 hvalfiske. Deraf tilfaldt Hans majestæt 16 fiske, er solgt for 23½ gl. 8 sk... Samme dag indkom på Strømnæs land i Strømø 60 hvalfiske. Deraf tilfaldt hans majestæt 15 fiske, er solgt for 23 gl. [jarðarhvalurin á Ovralandinum er her fáur í tali].

«Anno 1628 den 12. juli indkom i Suderø et stykke af en rådden hval. Blev kongelig majestæts part solgt for 6 gl., lyse 6 voger.»

«Anno 1629 den 10. juni indkom i Suderø udi Kvalbø 20 små hvalfisk. Er kongelig majestæts part solgt for 8 gl., fisk 8 voger.»

«Anno 1629 kom inddrivende udi Trangisvåg udi Suderø en gammel mast, er vurderet og solgt for 2 gl., fjeder 2 voger [prísurin var 1 gl. vágin]... Anno 1629 kom inddrivende udi Norderø i Våge et stykke af en mast og en gammel rå, er vurderet og solgt for 3 gl., fisk 3 voger.»

«Anno 1630 den 23. april indkom i Strømø i Kvalvig 87 små hvalfiske. Deraf tilfaldt kongelig majestæt 19 hval, er solgt for 25½ gl. 5 sk., lyse 25½ vog 5 sk.»

«Anno 1631 den 20. nov. indkom 3 små døglinger i Kvalbø i Suderø. Blev kongelig majestæts part deraf solgt for 24 gl., lyse 24 voger.»

«Anno 1633 den 23. dec. indkom en liden døgling i Kvalbø i Suderø. Blev kongelig majestæts part deraf solgt for 6 gl., lyse 1 td.»

«Anno 1634 den 21. juli indkom norder i Norderø et stykke af en rådden hval. Blev kongelig majestæts part solgt for 4 gl., tran 4 voger... Anno 1634 den 18. juli indkom i Kvalbø i Suderø en liden døgling. Blev kongelig majestæts part deraf solgt for 6 gl., tran 6 vog.»

«Anno 1635 den 28. juli indkom et stykke af en gammel rådden hvalfisk i Sandø på Sand. Deraf blev kongelig majestæts part solgt for 6 gl.»

«Anno 1635 den 20. aug. indkom vester i Vågø 400 små hvalfiske. Deraf tilfaldt kongelig majestæt 54 fiske og er solgt som efterfølger for 101 gl. 5 sk.»

«Anno 1637 den 15. jan. er indkommen i *Purcfjord* i Suderø et stykke af en rådden hval. Er kongelig majestæts part deraf vurderet og solgt for 3 gl.»

«Anno 1637 den 14. juli indkom norder i Våge på Norderø 60 små hvalfiske. Deraf tilfaldt kongelig majestæt 10 fiske og er solgt for 17½ gl. 5 sk... Anno 1637 indkom i dec. måned i Kvalbø i Suderø 2 små døglinger. Deraf blev kongelig majestæts part vurderet og solgt for 12 gl.» [10 hvalir av 60 má vera minni enn fjórðingur av grindini].

«Anno 1638 den 28. april er indkommen norder i Våge på Norderø 56 små fiske. Der tilfaldt kongl. majestæt 12 fiske og er solgt for 23 gl.» [12 hvalir av 56 mátti eisini vera ein lítil fjórðingur av grindini].

«Anno 1638 den 10. juli indkom et stykke af en rådden hvalfisk i Vestmanhavn i Strømø, og er kongl. majestæts part deraf vurderet og solgt for 8½ gl... Vraggods, Suderø, vurderet og solgt for 4 gl.»

«Anno 1640 udi februar måned indkom et stykke af en rådden hvalfisk ind udi Suderø. Er kongl. majestæts part deraf vurderet og solgt for 6 gl.»

«Anno 1641 udi marts måned indkom et stykke af en gammel rådden hvalfisk ind udi Norderø. Er kongl. majestæts part deraf vurderet og solgt for 8½ gl.»

Tríggir ársroknskapir eru nú burtur, men í 1645 sæst eingin grind at vera komin. Roknskapurin fyri 1646 er burtur, men í 1647 finnst henda viðmerking:

«Anno 1647 er indkommen udi Norderø en rådden hval, hvoraf Hans majestæt tilkom 36 gl. 16 sk.» [hetta man hava verið ein royður].

Fyri 1648 er eingin roknskapur at finna.

«Anno 1649 udi februar måned er indkommen en hval udi Strømø, hvoraf kongelig majestæts part er solgt for 25 gl. 1 sk.» [einki um, hvar í Streymoy hvalurin kom. Christen Madssøn var nú vorðin fúti].

«Samme år nogen rådden hval udi Suderø, hvoraf kongl. majestæts part blev solgt for 12 gl.»

«Udi juli måned er indkommen hval udi Norderø, hvoraf kongl. majestæts part er solgt for 6 gl... Samme år indkom hval udi 1.



august måned udi Strømø, hvoraf kongl. majestæts part er solgt for 8½ gl. 6 sk.» [árstalið er ikki nevnt og heldur ikki, hvussu nógvir hvalir doyðu og hvar].

«Udi juli måned indkom hval i Østerø, hvoraf kongl. majestæts part er bleven solgt for 8 gl. 2 sk... Samme år indkom hval i Strømø, hvoraf kongl. majestæts part er bleven solgt for 5 gl. 6 sk. [einki árstal nevnt, men óivað 1651, heldur einki um, hvussu stór grindin var, ella um hetta var ríkin stórhvalur].

«Udi april måned [óivað 1652] er indkommen en rådden hval udi Strømø, hvoraf kongl. majestæts part er bleven solgt for 6½ gl. 7 sk.»

Tey elstu grindaskiftini, vit kenna í Miðvági og norður í Vági (Klakksvík) skulu verða tikin sum fyridømi viðvíkjandi grindaparti kongs úr omanfyri nevndu grindaskiftum í eldri tíðum Hitt elsta grindaskiftið, ið sæst uppgjørt frá Miðvági, er frá 1808, og fekk jørðin tá helmingin av grindini, eftir at tíggjund, finningarfiskur, skaði o.s.fr. var avtikið. Grindin fór síðan í helvt millum jørð og rakstrarmenn. Í Miðvági fingu 48 merkur jarðarhval. Kongur fekk jarðarhval av 8 mørkum og umframt sín tíggjundapart, sum tá tykist at vera triðingur av allari grindatíggjund. Annars fekk kongur fjórðing av øðrum tíggjundagjaldi umframt av smøri, hvarav hann fekk triðingin. Í Klakksvík (norður í Vági) tóku eftir grindaskifti 1808 44 merkur jarðarhval. Harav fekk kongur jarðarhvalin av teim 43 mørkunum (í Gerðum, í Vági og Myrkjanoyri), meðan 1 mørk (Akursmørk í Vági) var óðalsjørð. Eftir hesum reglum skuldi kongsins partur av grind í Klakksvík í eldri tíðum verið fram undir helming av grindini. Sum dømi kann verða nevnt, at av grind í Klakksvík, sum doyði 7. oktbr. 1808, fekk kongur *24 gl. 19¾ sk.* Hon var 107 hvalir og mett at vera *56 gl. 1 sk.* Av grind, sum doyði í Miðvági 1. sept. 1808, stór 99 hvalir, fekk kongur *6 gl. 18½ sk.* Hon var mett at vera *69 gl. 12 sk.* Eftir hesum tølum skuldi lutfallið millum kongsins part og allan hin partin av grindini verið nakað soleiðis:

Í Klakksvík: 5:6.
Í Miðvági: 1:9.

Við øðrum orðum skuldi kongur í Klakksvík átt $^5/_{11}$ av grindini og í Miðvági $^1/_{10}$ av grindini. Vit kunna nú kanna eftir, hvussu hetta hóskar við uppgivið hvalatal og kongsins part av grindunum í eldri tíðum:

| | Ár | Grind stór | Kongsins partur |
|---|---|---|---|
| | 1599 | 90 hvalir | 23 hvalir |
| | 1615 | 70 – | 19 – |
| | 1615 | 116 – | 59 – |
| Í Klakksvík | 1615 | 90 – | 41 – |
| (norder i Våge) | 1620 | 240 – | 55 – |
| | 1628 | 100 – | 22 – |
| | 1637 | 60 – | 10 – |
| | 1638 | 56 – | 12 – |

| | Ár | Grind stór | Kongsins partur |
|---|---|---|---|
| Í Miðvági | 1626 | 100 hvalir | 18 hvalir |
| (vester i Våge) | 1635 | 400 — | 54 — |

Ikki fæst hetta grindabýtið at hóska við tað býtið, sum fór fram í Føroyum um og eftir ár 1800. Kongsins partur av grind í Klakksvík frá 1599 til 1638 má lutvíst hava verið ógvuliga ójavnur. Í tveimum av teim seinri grindunum í 1615 kundi kongsins partur væl hava verið lagdur av eftir hini Norsku løgbókini, men í øllum hinum grindabýtunum avgjørt ikki, og tí er illa hugsandi, at henda lógin strangliga hevur verið nýtt[1]). Heldur ikki í teim tveimum grindunum í Miðvági kann vera gingið gjølla eftir Norsku løgbókini. Uppgerðarreglur yvir grindabýti í Føroyum hava helst verið gjørdar seinri. Norska lóg frá 1688 hevði somu ásetingar viðvíkjandi hvali sum Norska løgbókin. Seinri er so grindareglugerð gjørd. Í grindabýti um og eftir ár 1600 er líkt til, at føroyingar hava ikki fylgt heilt fastari reglugerð, so ójavnur sum kongsins partur lutvíst verður avtikin.

Ymist man vera, um ásetingarnar í Seyðabrævinum um býti av hvali, sum fekkst at gera landgongd [tríggir fjórðingar í landpart] yvirhøvur hava verið nýttar seinra part av miðaldri. Innan svartadeyða hava tær óivað verið nýttar. Hesar ásetingarnar fullu í hvørt fall burtur úr Seyðabrævinum í teirri donsku týðingini 1637, uttan at nøkur lóggáva kom í staðin. Ásetingarnar í Landslógini og seinri hini Norsku løgbókini um býti av hvali kunna føroyingar væl hava ivast um, hvørt tær guldu fyri Føroyar [teir fingu t. d. ásannað, at vekt og mát eftir Norsku løgbókini guldu ikki í Føroyum]. Táið føroyingar góðtóku Norsku lóg 1688, komu teir inn undir allar hennara ásetingar, sum kundu verða nýttar í Føroyum. Beint aftaná vóru t. d. tær rømersku mát- og vekteindirnar gjørdar galdandi á landi.

At enda skal verða bent á, at hóast hvørki orðið grind ella skinn av grind eru nevnd í fútaroknskapinum, kunna vit ætla okkum til, at tað, sum vit nú kalla skinn av grind, í hesum tíðarskeiði kortini man hava verið nýtt, men tað fall tá ikki saman við eitt skinn í peningi. Í 1673 nevnir Lucas Debes orðið grind í bók síni, men skinn av grind nevnir hann ikki, nýtir tó heldur einki annað orð fyri slíkt grindabýti.

1) Í bók síni frá 1673 tekur Lucas Debes soleiðis til um grindabýtið, útgáva «Frams» 1903, bls. 155: «Når hvalen således er opført på det tørre og talt, aftages først tienden, dernæst findingshval for den, som først så den [grindina]. Resten deles i to parter, den ene part til folket, den anden til den, der ejer landet, enten det er kongen, adel eller odelsmand.» Lucas sigur altso, at landið longu tá hevur fingið helvtina av grindabýtinum, men hetta var í Gabelstíðini, og landpart kongs hevur Gabel tá fingið. Annars nevnir Lucas hvørki matarhval ella skaðahval. Í sínum lítla riti: «Whale-Fishing in the Faroe Isles», prentað um 1880, sigur H. C. Müller sýslumaður — sýslumaður frá 1839 —: «Innan 1832 fór grindadráp bert fram eftir gomlum vana, og stundum førdi tað tá óskil við sær. Grindadráp fekk fyrstu ferð sína fyriskipan við reglugerð 1. nov. 1832.»



## d. Jarðarbøkurnar.

Størsta inntøka kongs av Føroyum á fútaroknskapinum í hesum tíðarskeiði er inntøkan av kongsgóðsinum. Har uppi í var eitt sindur av óðalsskatti. Henda inntøkan var t. d. í 1584 1854 gl. 17 sk., og hon broyttist ikki, um áringarnir vóru góðir ella ringir. Triðja hvørt ár kom ágáva afturat, sum var hálvur gyllin av hvørji innangarðsmørk og lá tætt við 500 gyllin av øllum Føroyum. Fútaroknskapurin við sínum jarðarbókaskatti er upprunin til ríkisins kassa í Føroyum: Jordebogskassen. Hann má sigast at vera burtur fallin við lóg um «Jordbrugets fremme på Færøerne» av 24. mai 1937.

Mesta av kongsjørðini er gomul kirkjujørð, sum kongur tók eftir siðaskiftið 1535. Um fimtingur av kongsjørðini tykist tó at hava verið kongsjørð longu í miðaldri. Hetta var jørð, sum kongur — í hvørt fall síðan Landslógin gjørdist galdandi í Føroyum 1274 og kanska eisini áður — hevði fingið tildømda á tingi í óbótamálum. Jørðin hjá honum, ið dømdur var frá lívinum, skuldi eftir Landslógini falla kongi til.

Sum postur fyri seg á roknskapinum kom inntøka av pantijørð. Hetta var jørð, sum var sett kongi í veð fyri peningagjald. Nakað av hesi jørð er seinri komið inn undir kongsjørðina; sumt er aftur innloyst.

Frá árinum 1600 sæst Tórshavn at hava havt serligan húsmannsskatt, 5 skinn árliga fyri hvønn, «husmænd og løse karle». Í hesum tíðarskeiði var talið av skattaborgarum í Havn millum 7 og 17.

Ágávan kundi verða latin í turrum fiski, men leigan av uttangarðsjørðini ella seyðaleigan skuldi mest verða latin í skinnum og tálg[1]), uttan undantak var gjørt. Av innangarðsjørðini kundi leigan vanliga verða latin í fiski. Annars fór smørleiga av tí, sum kallað verður kújørð[2]), og í fleiri førum fóru vaðmal, ull og hosur í leigu og enntá lýsi. Sum nevnt hvíldi ein lítil jarðarskattur á allari jørð bæði kongs og óðal, og hald av heimadjórum hevði eisini sína leigu.

Jarðarbøkurnar eru endurgivnar í A. Degns bók: «Færøske kongsbønder 1584—1884», og harav sæst, at leigan av innstøðuseyði var eins yvir allar Føroyar. Hitt árliga gjaldið var 1 skinn fyri hvønn áseyð. Annað er, at innstøðuseyðurin á mørkini var ymiskur í tali á garðunum, og tað vil mest, men ikki bert siga, at garðarnir bóru ymist av seyði á mørkini, tí innstøðan var altíð minni enn skipanin. Seyðaleigan er einføld í síni fyriskipan, eitt turkað seyðaskinn fyri hvønn áseyð, og hon má tí ætlast at vera gomul og upprunalig.

Taka vit onnur innstøðudjór, er spurningurin ikki so einfaldur. Leigutaksturin tykist tó upprunaliga at vera 5 skinn av hvørjum djóri, tá talan er um neyt, hestar og svín. Geitir eru aldri nevndar. Annars gongur leigan fyri neyt ofta saman við leiguni fyri kújørð. Soleiðis er jørð nevnd, sum kúhald skal vera á, og sum tí hevur smørleigu. Í 1652 sæst tó kúgv úr Koltri flutt inn á tvey-markagarð í Lorvík, og onnur innangarðsmørkin skuldi síðan saman við kúnni

1) Sjá Fær. kongsb. fororð bls. 2 og N. A. Fær. bls. 337. 2) Sjá Fær. kongsb. fororð bls. 2 og N. A. Fær. bls. 337.

geva leiguna eina vág í smøri, sum hevði virði 1½ gyllin. Framman undan hevði innangarðsmørkin leiguna hálvan gyllin ella 10 sk., og tað hevði hin kongsmørkin framvegis. Kúgvin hevði soleiðis givið 1 gyllin í leiguhækkan á garðinum.

Roynt skal vera nú at taka dømi frá teim einstøku sýslunum fyri seg[1]). *Norðuroyar:* Á Trøllanesi kúleiga 5 sk., á Viðareiði kúleiga 10 sk., í Svínoy kúleiga 10 sk. *Eysturoy:* Í Elduvík kúleiga 5 sk., í Lorvík kúleiga av 1 mørk innangarðs við 1 kúgv á 1 vág av smøri = 1 gl. 10 sk., í Norðagøtu kúleiga 5 sk., í Syðrugøtu kúleiga av 1 mørk innangarðs við kúgv 1 vág av smøri = 1 gl. 10 sk., í Sølmundarfirði leiga av 13 mørkum kújørð + 7 kúm + 1 tarvi givin við 1 tunnu í smøri = 10 gl., seinri kújørðin minkað 1 mørk, men sama leiga, rossaleigan her 5 sk., á Glyvrum leiga av kúgv og 1 mørk kújørð 1 vág av smøri = 1 gl. 10 sk., á Toftum kúleiga — kúgvin flutt úr Koltri — 1 vág av smøri = 1 gl. 10 sk., á Strondum (Sjógv) kúleiga — kúgvin flutt úr Koltri — 1 vág av smøri = 1 gl. 10 sk., á Selatrað leiga av kúgv og 1 mørk kújørð 1 vág av smøri = 1 gl. 10 sk., á Oyrargarði í leigu av 12 mørkum kújørð + 7 kúm + 1 kálvi + 1 tarvi givin 1 tunna av smøri = 10 gl. *Streymoy:* Á Húsagarði í Havn rossaleiga 5 sk., í Kirkjubø leiga av 12 mørkum kújørð + 6 kúm + 1 tarvi + 4 ungneytum + 1 fyli = 1 tunna av smøri = 10 gl., á Velbastað kúleiga 1 vág av smøri og leiga av 4 mørkum kújørð og 4 kúm 4 vágir av smøri, men eisini leigan av 4 mørkum av kújørð + 3 kúm = 3 vágir av smøri = 4 gl. 10 sk., í Norðadali leiga av 4¾ mørkum kújørð + 3½ kúgv = 3½ vág av smøri og leigan av 10½ mørk kújørð + 7 kúm + 1 tarvi = 1 tunna av smøri, tað er 7 vágir (kútalið og vágatalið fylgjast sum í Eysturoy), í Leynum og Kvívík kúleiga 5 sk. og annars leiga av 1 mørk kújørð + 1 kúgv = 1 vág av smøri, í Vestmanna leiga av 11 mørkum kújørð + 7 kúm + 1 tarvi = 7 vágir av smøri, rossaleigan 5 sk., og leigan av 5½ mørk kújørð + 3½ kúgv = 3½ vág av smøri (eisini her fylgjast kú- og vágatalið), í Saksum kúleiga 1 vág av smøri — kúgvin flutt úr Koltri —, í Streymnesi leiga fyri kúgv við mørk av kújørð = 1 vág av smøri, í Hvalvík hava 12 merkur kújørð og 7 kýr leiguna 1 tunna (7 vágir) av smøri og 6 merkur kújørð og 3½ kúgv leiguna 3½ vág av smøri, í Hósvík er leiga av 8 mørkum kújørð og 7 kúm 1 tunna av smøri. Alla Streymoy runt gongur hetta aftur, at kútalið saman við kújørð er avgerandi fyri smørleiguna. Soleiðis gevur Heygsgarður í Kollafirði 1 tunna av smøri í leigu fyri 4 merkur kújørð og 7 kýr. Í Hesti og Nólsoy er eingin smørleiga, men í Koltri geva 8 merkur kújørð og 8 kýr saman við 1 tarvi og 2 kálvum í leigu 1 tunnu av smøri. Hetta er einasta lítla avvik frá regluni. *Sandoy:* Á Traðargarði á Sandi geva 12 merkur kújørð + 8 kýr + 2 kálvar + 4 kvígur 1 tunnu av smøri í leigu, og í Dalsgarði í Skálavík geva 10 merkur kújørð + 1 tarvur + 2 kvígur + 2 kálvar 1 tunna av smøri í leigu, men aftrat geva 7 kýr leiguna 1 gl. 15 sk., og í Húsavík, Dali og Skarvanesi er eingin smørleiga. Munurin millum Dalsgarð og Traðargarð tykist at vera tann, at í Dalsgarði eru kýrnar tiknar út úr felagsleiguni við

[1]) Úr Fær. kongsb.



5 skinnum fyri kúnna, og at tarvurin har er roknaður javnt við smørkúgv. Leigan verður tá sum í Koltri eitt sindur minni enn vág av smøri fyri kúnna. Á Stóru Dímun er eingin kújørð, men leigan av 23 kúm + 14 ungneytum + 2 rossum + 2 svínum var 2 tunnur av smøri og víkur soleiðis nakað frá tí, sum áður er nevnt. Í Skúvoy var bert 5 skinna leiga fyri kúnna. *Vágar:* Í Sandavági eru bert 5 skinn fyri kúnna. Í Miðvági brýtur nakað av frá reglunum, tí har finnast bæði 1 vág av smøri og 1 gl. fyri kúnna saman við kújørð. Í Bø er hin elsta smørleigan ½ tunna (3½ vág) fyri 4 kýr + 4 merkur av kújørð. Eingin smørleiga er í Mykinesi. *Suðuroy:* Í Suðuroy sæst eingin smørleiga at hava verið, men nakrar kýr standa har við leiguni 5 skinn hvør. Í tíggjund sæst Suðuroy harímóti at hava givið smør, men onga ull.

Um vit út frá hesum skulu hugsa okkum til nakað upprunaligt viðvíkjandi smørleiguni, so koma vit til tað úrslit, at innangarðsmørkin sum kújørð hevur ligið undir kúnni og givið av sær smørleigu til jarðardrottin, men slík neyt hava óivað havt summargrasning í haganum. Leigan, 5 skinn fyri kúnna, kann upprunaliga bert hava goldið fyri geldneyt, sum kanska hava gingið mestu tíðina av árinum úti í haganum, t. d. oksar og kvígur. Til kújørðina kunna seinri vera knýtt hagarættindi í kenningaseyði. Kújørðin hevur tá fingið somu seyðarættindi sum hin parturin av innangarðsjørðini, ið báðar, so hvørt sum smábýti fór fram av haganum, hava avgjørt talið av kenningaseyði hjá hvørjum jarðarmanni. At fløkja hevur verið í hesum frá gamlari tíð, er sjálvt Seyðabrævið prógv um. Leiguneytini eru ofta flutt av einum garði á annan, og á slíkan hátt og kanska eisini á annan er so tað upprunaliga grundarlagið broytt.

Øll innangarðsjørð, kújørð kanska undantikin, skuldi havt leiguna ½ gl. fyri mørkina, so sum taksturin í fútaroknskapinum sipar til, men hetta er óivað innsett um ár 1600, stórdýrini hava, mjólkneytini á kújørð undantikin, 5 skinn hvørt og áseyðirnir 1 skinn hvør. Í fútaroknskapinum eftir 1584 galt jarðarleigan ½ gl. á mørkini í øllum Norðuroyum, mest sum allari Eysturoy og størsta parti av Streymoy við. Í Vágum tykist leigan av innangarðsjørð í hesum tíðarskeiði at hava ligið um 15 skinn á mørkini, í Mykinesi og Sandoy var leigan hægri, mest sum 1 gl. av mørkini, men í Suðuroy nakað minni, 12—16 skinn av mørkini. Líkindi kunna tó vera til, at leigan 1 gyllin á innangarðsmørkini er upprunalig sum á *Munkalívs kloysturjørð* norður í Vági 1427[1]).

Í hesi tíðini tykist seyðurin at hava verið kenning um allar Føroyar, og helst hevur ognin innangarðs frá fyrst í 17. øld eins og í seinri tíðum avmarkað støddina av hesi kenning hjá hvørjum manni í tilsvarandi hagaparti. Táið Seyðabrævið frá 1298 longu roynir at seta mark fyri yvirskipan av haga við kenning uttan at nevna innangarðsjørð í samband harvið, er rímuligt at hugsa sær, at bøur og hagi í fyrra parti av miðaldri og seinri eisini helst ikki hava hoyrt fast saman, men at viðurskiftini seinri hava lagað seg soleiðis, at lagaligast hevur verið at lata innangarðsjørðini avgera haga-

[1]) Munkalívs kloystur við Bjørgvin átti jørð í Føroyum. Sjá A. C. E., skjal 63.

skipanina hjá hvørjum manni. Ivaleyst hevur hagin, sum hoyrdi við til eina bygd ella ein býling, verið avmarkaður úr fjalli í fjøru longu í ella nær niður at landnámstíðini. Harvið er ikki sagt, at nýbygdir seinri hava ikki fingið sín haga útskiftan, og at markið seinri er ikki flutt orsakað av marknastríði.

Leigugevarin ella jarðardrottin, sum í miðaldri mest var kirkjan, hevur ivaleyst fegin viljað havt nakað av smøri í leigu, tí hetta var góð brúksvøra í húshaldinum. Leigan av seyði skuldi mest verða givin í skinnum og tálg. Leigugjaldið í vaðmali sæst at hava verið nógv í gomlum døgum og eisini nakað av ull, men seinri koma hosupørini inn fyri vaðmalsgjaldið. Leigan av innangarðsjørð, tá hon ikki var kújørð, kundi verða goldin í fiski, og annars kundi fiskur verða goldin í staðin fyri búnaðarvørur í fellisárum.

Aður eru viðgjørdar tær skiftandi inntøkur kongs. Enn skal tó verða nevndur ein lítil skiftandi inntøkupostur, sum hoyrir saman við kongsjørðini. Tað er festigjaldið av gørðum, men serliga skal hesin postur ikki verða viðgjørdur; bert nøkur dømi úr honum um søguligar hendingar skulu verða nevnd.

Undir 1601 í fútaroknskapinum stendur: «Daniel Nielssøn gav til gårdfæstning for Stege gård fisk 10 voger.» Hetta er sama ár, Pætur Jákupsson løgmaður doyr. Tað tykist tí, sum talan hevur verið um at festa Steigargarð burtur, men so man uppskot hava verið frammi um at fáa annan garð gjørdan til løgmannsgarð, og næst liggur fyri at hugsa sær Kirkjubøgarð sum løgmannsgarð, festigarðin hjá Pætri Jákupssyni løgmanni. Dánjál Nigilsson hevði verið sýslumaður í Sandoy. Hann búði í Skálavík, men um ár 1600, kanska áður, tó eftir 1590, er hann horvin haðani. Um Pætur Jákupsson í hesi tíðini hevur latið hann fingið Steigargarð at umsita, meðan hann sjálvur hevur búð á Kirkjubøgarði, vita vit ikki. Táið Pætur Jákupsson løgmaður doyði, man Dánjal í hvørt fall hava søkt um at fáa Steigargarð í festi og fingið hann. Væl er tá hugsandi, at hin nývaldi løgmaðurin, sum tykist at hava verið bóndi í Kaldbak, hevur mótmælt hesum, og Dánjal hevur tá beinan vegin mist Steigargarð. Kanska hevur hann fyribils sitið har sum uppsitari og fingið lyftið um annan garð skjótast gjørliga. Vit vita, at Dánjal er komin á Ryggsgarð í Miðvági 1613 og kanska fyrr. Søgnin sigur, at honum varð tilboðið henda garð. Vísi Jákup Guttormsson, sonur Guttorms løgmanns, sat í hvørt fall á hesum garði 1584—1590. Sonur hansara, Guttormur Jákupsson, kom eftir hann á garðin. Vit síggja hann sum festara 1600—1603, men í 1613 er hann horvin út í Mykines. Í hesum millumbili er Dánjal komin á Ryggsgarð, og líkt er til, at hann tá eisini er vorðin sýslumaður í Vágum. Guttormur Jákupsson hevur verið farin í Mykines at búgva, har hann var nevndur Stóri Gutti, men løgtingsbókin, sum byrjar 1615, nevnir hann ofta «Gutte på Ryg.» Í hesum tíðarbili 1603—1613 vilja menn vera við — og søgnin nevnir tað eisini —, at 50 bátar ein ódnardag gingu burtur í Føroyum. Aftaná hesa hending skal Guttormur vera fluttur út í Mykines. Eftir Pætur Jákupsson kom Símun Jenisson úr Laðangarði í Sunnbø á Kirkjubøgarð. Onkur hevur hildið, at hann var giftur við dóttur av Pætri Jákupssyni, men fyri hetta er einki søguligt prógv. Ávíst



kann vera, at Pætur Jákupsson átti tveir synir, Sakaris og Jákup. Nevnt skal vera, at 1600—1601 hevði Dánjal Nigilsson festi í Skúvoy, Stóra stova, sum var 9¾ mørk, men at annar maður sat á festinum árið eftir.

Undir 1601 stendur eisini: «Isak Ismaelsøn gav til gårdfæstning for Store Dimon fisk 15 voger.» Ísakur var prestasonur úr Hvalbø, og frá 1613—28 hevur hann eisini havt 1 mørk í Skúvoy í festi. Hann var eina tíð sýslumaður í Sandoy. Hitt vanliga festigjaldið hesa tíðina var 1 gyllin fyri mørkina, og Stóra Dímun er sett til 13 merkur. Fiskavágin galt 1 gyllin.

Í takstraðnum fyri fútaroknskapin ár 1600 er: «1 gylden er 20 skind», sum áður stóð á odda, flutt langt niður, og beint aftaná stendur:

«1 skind er 4 bismer mark af fisk, uld, feder, tran og rutællig.» Seinri kemur: «Af hver 20 får til søjdeleje 1 gylden, af hver mark jordeleje ½ gylden, af hver hest eller tyr 5 skind.» Sum ávíst framman undan hevur hálvur gyllin fyri mørkina innangarðs ikki verið nýttur um allar oyggjarnar, men hann sæst tó her at vera hin ásetti takstúrin. Viðmerkt skal vera, at aftast í takstinum 1590 við aðrari handskrivt er innført: «1 skind er 4 mark fisk,» somuleiðis: «1 mark sølv er 2 gylden 8 skind, 1 øre sølv er 6 skind.» Hetta er tað virði í gyllin og skinnum, sum mørkin og oyrin eru roknað fyri í løgtingsbókini frá 1615. Hareftir gekk ørtugin tá fyri 2 skinn.

Av øðrum takstum er at nevna 1 pakka av vaðmali = 60 alin (óivað stikka, vaðmalið 2 alin breitt) og 10 alin av vaðmali = 1 gyllin = 20 skinn.

Í gomlum døgum hevur nógv av kongsgjaldinum verið latið í vaðmali. Hetta sæst á gjaldinum um ár 1600. Ivaleyst hevur hetta vaðmalið í heilt gomlum døgum verið líkt kotavaðmali, av tí at hitt gamla seyðaslagið í Føroyum var svart ella seyðalitt. Í 1584 var kongsgjaldið í vaðmali 43½ pk. 21½ alin = 2631½ alin, í 1588 var gjaldið 3298½ alin, og í 1590 stendur tað fyri at vera 61 pk. 5 alin 9 sk. = 3669½ alin. Táið gjaldið í vaðmali er so stórt hetta árið, kemur tað væl av, at seyðaárið og harav ullarárið framman undan hevur verið sera gott. Í 1584 sigur fútin, at kavarok var jóansøkudag, so veðurlagið man hava verið ringt um hetta mundið. Ár 1600 var vaðmalsgjaldið 2357½ alin, í 1601 var tað 2026 alin, og í 1602 1635½ alin. Táið vit finna vaðmalsgjaldið aftur í 1613 er tað 1117½ alin, men í 1614 er tað kvokkið upp í 1380½ alin fyri aftur at falla í 1615 til 773 alin. Síðan er tað smátt lækkandi eitt sindur upp og niður, men í 1628 verður tað knappliga 1395½ alin. Í 3 tey fylgjandi árini var tað ávikavist: 971½ alin, 1010 alin og 1278 alin, til tað 1632 knappliga fellur niður í 152 alin. Eitt sindur kom tað upp aftur, men fall so í 1637 til 75½ alin. Upp førkaði tað seg viðhvørt, men 1649 helt tað seg undir 100 alin. Kongsgjaldið í ull helt seg toluliga javnt, um 50—60 vágir árliga. Sum vit síggja hevur klædnavevnaðurin í Føroyum í gomlu døgum verið heilt stórur. Innan ár 1600 man hann í góðum seyðaárum ivaleyst hava verið meira enn 1 alin fyri hvørt mannsbarn á landi umframt tað, sum virkað varð til klædna heima. Ikki kann verða ávíst, um vaðmal eisini hevur verið

selt við handilin. Var vaðmalið tá eisini handilsvøra, hevur vaðmalsútflutningur føroyinga í gomlum døgum verið meira enn ein, nærri tveimum alin fyri hvønn íbúgva landsins.

Um somu tíð sum vaðmalsgjaldið er minkandi í hesum tíðarskeiði, er hosugjaldið vaksandi. Í 1584 gingu bert 9 hosupør í kongsgjald, men í 1588 og 1590 sæst einki parið vera farið. Í kongsgjaldinum ár 1600 eru 629 hosupør, hvarav hvítar hosur eru hin størra helvtin, men í 1601 eru hosupørini 154, og harav vóru 100 hvít. Aftur 1602 var hosugjaldið gingið upp í 415 pør, hvarav 249 vóru korkalitt. Talið av korkalittum hosupørum í kongsgjaldinum 1613 var 544, men tá vóru eingi hvít; eingi hvít hosupør vóru heldur 1614, men tá vóru bert 192 korkalitt. Í 1615 vóru eisini bert korkalitt hosupør, 170 í tali. Tey 220 hosupørini 1617 eru eisini øll korkalitt, somuleiðis 153 hosupør í 1618. Niður í 67 korkalitt pør datt hosugjaldið 1620, til so at liggja um 400 pør til 1625. Tey 6 fylgjandi árini var gjaldið í korkalittum hosum javnt vaksandi: 638 pør, 688 pør, 1214 pør, 1442 pør, 1995 pør og 2348 pør, men í 1632 fellur hetta gjaldið niður í 737 korkalitt hosupør. Tað veksur aftur til 1411 pør í 1633, men tá koma 61 pør av hvítum hosum aftrat. Í 1634 var hosugjaldið 1510 korkalitt pør og 253 hvít pør, og fylgjandi 7 ár var talið av pørum hetta: 104 korkalitt, 1586 korkalitt og 9 hvít, 2508 korkalitt og 185 hvít, 1796 korkalitt og 46 hvít, 1884 korkalitt og 172 hvít, 1859 korkalitt og 324 hvít og 1448 korkalitt og 155 hvít.

Vit síggja herav, at til 1631 vóru bert korkalitt hosupør latin í kongsgjald. Hvít hosupør koma fyrst við í gjaldið 1632, og tey eru til 1641 ógvuliga fá. Fyri tey 3 fylgjandi árini er eingin roknskapur at finna, men táið vit finna fútaroknskap aftur fyri 1645, eru tey hvítu hosupørini í kongsgjaldinum 4001, men tey korkalittu eru eingi. Næsta roknskaparár, vit kenna, 1647, hevur 3786 hvít hosupør og eingi korkalitt. Árini 1649—1652 nevna bert hosupør í roknskapinum og einki um, hvørt tey eru hvít ella korkalitt. Av broytingini, sum kom í árunum 1642—44, liggur næst fyri at hugsa sær, at tey flestu av hesum pørunum eru hvít. Hesi 4 árini hevur kongsgjaldið fylgjandi tøl í hosupørum: 5276, 3813, 3988 og 6618. Stór broyting var eingin í tí partinum av kongsgjaldinum, sum latin var í skinnum og tálg, heldur ikki sum áður nevnt í ull. Stórbroytingin hendi í hesi tíðini í útflutningsvørunum: vaðmali og hosupørum. Óivað hevur tað, at hosupørini góvu meira av sær í peningi enn vaðmalið, ført broytingina við sær, kanska eisini tað, at marknaðurin, sum tíðin leið, gjørdist betri fyri hosupørini enn fyri vaðmalið. Líkt kundi verið til, at vaðmalsmarknaðurin áður var bestur í Noreg, og hosumarknaðurin gjørdist serliga góður í Hálandi. Táið tær korkalittu hosurnar eftir 1641 knappliga minka sum gjaldvøra, hevur hetta óivað eisini sína orsøk í marknaðarviðurskiftunum. Eftirspurnin eftir teimum man vera minkaður. Taksturin í leigubúðini fyri vaðmal, korkalittar ella hvítar hosur var alla hesa tíðina óbroyttur.

Táið vit taka gjaldið í hesum her nevndu búnaðarvørum undir eitt, man tað hava staðið toluliga við gjøgnum árini, tí tær flestu av teimum koma undir jarðarbókina. Inntøkan av henni er ávikavíst nógv størst og lítið broytt gjøgnum árini, burtursæð frá ágávuni 3. hvørt ár. Jarðarbókin sjálv gav tætt við 1900 gyllin árliga.



## e. Fútaroknskapirnir sum heild.

Um somu tíð, sum fútaroknskapirnir taka við 1584, kann tykjast at vera hent nakað við føroyskari eindarrokning, tí hetta árið nýtir táverandi fúti, Michel Ibsøn, einans mørk sum minstu vekteind, men fýra ár seinri, altso 1588, hevur fútin Mads Baltzersøn, lagt av at rokna við mørkini og nýtir tá skinnið, sum var 4 merkur, í staðin sum minstu eind. Pundið verður framvegis nýtt í smørvekt. Ikki er hetta tó prógv fyri, at broytingin er hend fyrst tá, tí fútarnir vóru fremmandir menn og stokkuta tíð embætismenn í Føroyum.

Skinnið hevur tá í føroyskari virðisuppfatan merkt bæði pening og vekt, og fyri hesum kunna góðar grundir verða givnar. Í hesi tíðini var tað, at Kølnarvektin fekk almenna viðurkenning í Noreg, men løgfest vekt var hon ikki fyri alt landið fyrrenn við Norsku løgbókini 1604. Í Føroyum kravdi kongur gjald sítt goldið inn í leigubúðina eftir landsins vekt, og ivaleyst man hetta hava verið gomul norsk vekt. Minsta eind í hesi gomlu vekt var hin norska mørkin, sum var minni enn allar aðrar vektmerkur tá á døgum. Eitt sindur av inntøkunum skuldi fútin avhenda fyri kong í Føroyum til ymisk endamál; men meginpartin av inntøkunum hjá leigubúðini skuldi hann avhenda handlinum í Tinganesi eftir keypmannsvektini og harfyri krevja kvittan. Fútin skuldi geva kongi roknskap og geva frágreiðslu um yvirvektina. Gjaldið úr Føroyum kom alt inn í føroyskum vørum og ikki í mynti. Eftir 1584 vísir kongsgjaldið, at allar føroyskar søluvørur hava havt fastar prísir[1]); á annan hátt vita vit, at fastur prísur eisini hevur verið á innfluttum vørum[2]).

Av tí at allir vøruprísir soleiðis lógu fastir, settu keypmenninir, sum høvdu Føroya handil, seg ímóti, at vekteindirnar og eindir fyri longd og mát vórðu broyttar í Føroyum við Norsku løgbókini, og føroyingar tóku undir við teimum, soleiðis at hesar ásetingar í Norsku løgbókini aldri komu at galda fyri Føroyar. Longu ár 1584 síggjast tó fútarnir at hava broytt markatalið í teirri vágini, kongsgjaldið varð vigað inn í leigubúðina eftir, tí markatalið í hesi vág hevur tá verið 80. Tá yvirvektin kom afturat henni, vá hon 84 merkur ella 21 skinn. Henda 80 marka vágin í 20 skinnum svaraði gjølla til peningagyllinin í 20 skinnum, tá hin fast ásetti prísurin fyri vøruna var 1 gyllin, og sum nevnt er framman undan, var hesin prísurin hin mest vanligi á føroyskum vørum. Tað er tí væl hugsandi, at føroyingar lítla og onga mótstøðu hava gjørt móti hesi 80 marka vágini, sum ivaleyst er tikin til brúks í Føroyum væl áður í tíðini, táið kongur var farin at krevja sítt í Kølnarvágum, og líkt er til, at hetta er hent beint innan ár 1500 gjøgnum handil úr Hamborg við Føroyar.

Yvirvektin á kongsgjaldinum stendur í fútaroknskapinum at skula vera 1 skinn á hvørji vág av fiski, smøri, ull, fjøður og tálg. Við yvirvektini vóru tá 21 skinn ella 84 merkur í vágini. Upprunavágin var 72 merkur, annaðhvørt mørkin var norsk ella kølnsk, men sum nevnt vóru tær kølnsku merkurnar tyngri. Henda føroyska kongs-

[1]) Stendur fyrst í hvørjum fútaroknskapi. [2]) N. A. Fær. bls. 12; annars nevnt fleiri staðir í Lb.

vágin man tí vera framkomin á tann hátt, at fútarnir kongsins vegna hava gjørt eina vág í norskum mørkum, sum samsvaraði við Kølnarvágina — ivaleyst var hon tó heldur tyngri —, og sum fall ógvuliga væl saman við hitt føroyska peningagjaldið, táið vøruprísurin var 1 gyllin á vágini. Henda kongsvágin hevur seinri í Føroyum verið kallað tíggjundavág. Í upprunavágini vóru 3 pund, og hvørt pundið vá 24 merkur. Hetta pundið hevur verið merkt á gomlum føroyskum bismarum. Trý pund í kongsvágini geva ikki heilt markatal, uttan vit taka yvirvektina upp í. Tá fáa vit 28 merkur ella 7 skinn í pundinum. Pundið í upprunavágini var 6 skinn. Nakað 28 marka pund sæst aldri við sermerki á gomlum føroyskum bismarum, men harímóti 24 marka pundið. Líkt er tó til, at føroyskir bismarar, sum hava kunnað vigað tungar lutir, hava havt eitt 40 marka sermerki við krossi, sum hevur víst hálva kongsvág. Neyvan er til nakar bismari í Føroyum nú, sum er merktur eftir teirri løttu gomlu norsku mørkini. Ivaleyst man tað vera, at hin føroyska 20 skinna vágin er komin til vega av frammanfyri nevndu grundum, men sum nevnt kann einki víst verða sagt um, hvørt henda vágin eisini hevur verið nýtt við handilin, tí eftir hann finnast eingir roknskapir.

Innan ár 1600 síggja vit, at fútarnir fáa álagt at gera reiði fyri hina kongligu yvirvektina, sum skuldi vera 1 skinn ella 4 merkur á vágini. Ikki fyrr enn farið verður um ár 1600, kemur yvirvektin upp á roknskapin sum serligur inntøkupostur. Á fútaroknskapinum 1590 finna vit tó yvirvektarvørurnar avhendar keypmanninum serskilt og soleiðis uppførdar sum útreiðsla á roknskapinum. Hetta fær okkum tí at halda, at innvigingin í leigubúðina tá og avrokningin á inntøkusíðuni hevur verið gjørd í 84 marka vágum. Eftir jarðfunnum lutum hava menn roknað við, at hin gamla norska mørkin seint í miðaldri vá 214,32 g, og at Kølnarmørkin vá 235 g. Rokna vit tá við 72 marka vág í báðum førum, so finna vit, at Kølnarvágin skuldi svara til 78,95 ella 79 norskar merkur. Kongsvágin skuldi soleiðis vera 1 mørk størri enn Kølnarvágin, og átti hetta reiðiliga at kunna svara til tað svinn, føroyskar vørur, helst fitivørurnar, kundi fáa í leigubúðini.

Mads Baltzersøn gjørdist Føroya fúti 1588, og í *embætisbrævi hansara* 15. mars sama ár[1]) tekur Fríðrikur kongur II soleiðis til: «Vi Frederik ... gøre alle vitterligt, at Vi nådigst haver betroet, forordnet og tilskikket og nu med dette Vort åbne brev betro, forordne og tilskikke denne brevviser, Os elskelige Mads Baltzersøn, at skulle være Vor foged og skriver på Vort land Færø og der lade oppebære al Vor og kronens rente og rettighed, både vist og uvist, *efter landsens vægt* og det altsammen lade til god rede levere til Os elskelige Jochim Wichmand, Vor faktor og købmand til Hamborg, hans fuldmægtige, *med købmandsvægten* efter som gammelt brug haver været, og hvis overvægten kan beløbe sig med landsens vægt højere end købmandsvægten, skal forn. Mads Baltzersøn gøre Os synderlig for sig klar rede og regnskab for, og på alt, hvis han udi så måde

1) N. R. R., bind 2 bls. 730–32.



leverer fra sig og til forn. Jochim Wichmand, hans tjenere og fuldmægtige, derpå skal han tage klar og nøjagtig bevis ...»

Tað, sum fútin avhendir keypmanninum av kongsins vørum í leigubúðini, førir hann sum útreiðslu á roknskap sín, og Mads Baltzersøn hevur har sett yvirvektarvørurnar fyri seg sum serligan post. Annars eru á roknskapinum ymsar útreiðslur, sum kongur hevur átikið sær í Føroyum.

Sum inntøka í jarðarbókini 1584 stendur einar staðir: «Jord 15 alen for 15 skind i pant.» Hetta vísir, at 15 alin í jørð tá hava verið mettar 15 skinn í peningi. Frá hesum elstu fútaroknskøpunum er eisini dømi um, at tveir gyllin í jørð verða nevndir 40 alin, og at áttatiálin (4 gl.) verður nevnd «et stykke jord». Ikki kann verða víst á, at gyllin í jørð hevur verið nýttur sum jarðareind í Føroyum fyrrenn í 17. øld, men ætlandi hevur hann tó verið nýttur áður eftir gamlari metan í alnatali, 20 alin = 1 gl. Fútaroknskapurin 1584 bendir á, at jarðarskinnið tá enn ikki er komið inn fyri *alin í jørð;* men peningaskinnið og alin í jørð verða tá mett samanfallandi í virði. Skinnið kann eftir hesum illa ætlast at hava verið nýtt í føroyskum jarðarbýti innan ár 1600[1]). Henda virðissetingin av jørðini 1584 vísir ikki bert, at alin tá enn hava verið nýttir til sundurbýtingar av jarðarmørkini, og at føroysk jørð longu so tíðliga hevur funnist í smærri pettum enn 1 gyllin. Vektskinnið verður jú ikki nevnt í roknskapinum 1584, og hesin roknskapur hjá fútanum, Michel Ibsøn, er eisini ógreiður við tað, at handilsskapur er blandaður inn í hann.

Fyrst Mads Baltzersøn hevur blakað mørkina burtur og nýtir vektskinnið í sínum roknskapi. Skinnið hevur tá ivaleyst í mong ár verið brúkt sum vekteind av føroyingum, tí í brævi 26. aug. 1579[2]), hvarí fylgjandi menn: Eyðun Andrasson gamli próstur, Tórleivur Grækarisson táverandi próstur, Mortan Jaspirsson Bronck prestur, Jóan Heinason løgmaður, Tummas Símunarson sýslumaður (herredsfoged) og Pætur Jákupsson løgrættumaður, geva vitnisburð um, hvat sjórænarin, Klerck, hevði tikið úr leigubúðini á Tinganesi, verður skinnið nevnt sum undirvekteind av vágini. Í hesum skjali verður t. d. sagt: «Fjødder 13 voger og 4 skind», men í summum førum í sama brævi verður mørkin eisini nýtt í samband við vágina. Harav mega vit ætla, at skinnið longu innan 1580 hevur verið nýtt sum vekteind av føroyingum, men at henda vekteindin tá kortini hevur verið nýtt við síðuna av mørkini. Illa ber til at hugsa sær, at føroyingar hava tikið nýtsluna av vektskinninum heilt upp av sær sjálvum, uttan at tað hevur staðið í samband við, hvat leigubúðin og kanska eisini handilin í Føroyum nýtti. Peningaskinnið í Føroyum er óivað nakað eldri enn vektskinnið. Tað er kanska komið fram um ár 1500 ella heldur fyrr. Tað er í hvørt fall komið fram, tá hin føroyski peningagyllinin = 20 skinn varð tikin til brúks í Føroyum.

1) L. D. útg. «Frams» 1903 bls. 225–26: «Og efterdi markerne bestå udi sådan måling [320 alnir ein mørk], vide de fattige odelsmænd udi arveskiftet at dele det udi mange små parter, nemlig 80, 60, 40, 20, 10 alne. Og eftersom efter gammelt landkøb en mark jord koster 16 gylden færøske [í peningi], så nævne de gemenligen sådanne små parter ved gyldene, nemlig 80 alen 4 gl., 40 alen 2 og så fort, at det bliver så småt, at det går ud på 5 skind jord.» 2) D. D. R. A., D. D. K., B 161.

Gjøgnum fútar sínar í Føroyum er kongur tá aftaná farin at nýta 80 marka ella 20 skinna vágina. Hon fall væl saman við Kølnarvágini, ið var vorðin almenn keypmannsvekt undir handilsveldi hanseata, og eins væl kom hon at falla saman virðisliga og í skinnatali við hin føroyska peningagyllinin.

Í tíðini 1584—1652 hava allir vøruprísir í Føroyum verið takstfastir. Viðvíkjandi teim føroysku vørunum eru fútaroknskapirnir prógv um hetta. Tað, sum vit vita um prísirnir á innfluttum vørum í hesum tíðarskeiði, ber vitnisburð um tað sama. Táið Niels Skinckel til Gjerskov 1584 tók raksturin av Føroya handli kongsins vegna, spurdi hann føroyingar á tingi í Tórshavn, hvat ið fastur keypmannstakstur hevði verið í Føroyum, men eftir skjali á ríkisskjalasavninum svaraðu teir: «Her på landet intet køb [altso fastur takstur] haver været sat fra den tid, salig Thomas Koppen havde Færø udi forlening.»[1]) Thomas Koppen doyði um áramótið 1552—53. Hann hevði havt Føroyar í len síðan 1529. Á løgtingið 1584[1]) vórðu tá settir hesir takstir á tunnuna av innfluttum vørum: bygg = 2 gl., malt = 3 gl., rugur = 2½ gl., byggmjøl = 3 gl., grovt salt = 2 gl. og øl = 3 gl., og kannan av brennivíni skuldi kosta 1 gl. Taksturin á føroyskum vørum er kendur frá fútaroknskapinum og áður nevndur fyri tær flestu vørur. Nevnt skal verða her: 1 lýsitunna = 6 gl., 40 feskir ella 30 saltaðir fiskar = 1 gl., 1 lamb = 5 skinn, 1 pakki (60 alin) av vaðmali = 6 gl. Hesir somu takstir finnast aftur í Arennt Berntsens bók 1656: «Danmarckis oc Norgis fructbar Herlighed.»[2]) Viðmerkt skal verða, at prísurin á Argjalombunum í fútaroknskapinum er settur at vera 4 skinn stykkið, og er hesin takstur ivaleyst eldri.

Kongsins inntøka á fútaroknskapinum kom úr fylgjandi keldum: 1) jarðargóðsið, mest kongsgóðsið, 2) pantigóðsið, jørð, ið var veðsett sum gjald, gav leiguinntøku, til hon var innloyst aftur, 3) kongstíggjundin, 4) festigjøld av gørðum, 5) húsmannsskattur (frá 1600), 6) ræettarbøtur til kongs, 7) hvalur og rekagóðs og eftir ár 1600 sum serligur postur 8) yvirvekt. Nógv hin størsta inntøkukeldan hjá kongi úr Føroyum var gjald av jørðini. Av kongsins inntøkum skuldi fútin gjalda nakrar útreiðslur í Føroyum. Tað, sum so leyp av, skuldi hann lata handilin taka eftir keypmannsvektini og krevja kvittan fyri tað, og handilin skuldi tá gjalda kongi pening eftir hesi kvittan í Keypmannahavn.

Roknskapin fyri 1590 hevur Mads Baltzersøn fúti gjørt, og hann er serliga greiður settur upp. Í honum er úrslitið av øllum inntøkum kongs hetta:

| | |
|---|---|
| «Fisk | 652½ vog 9 sk. |
| Uld | 85 vog 7½ sk. |
| Vadmel | 61 pk. 5 alen 9 sk. |
| Skind | 211½ kippe 7½ sk. |
| Tallig | 313½ vog 2½ sk. |
| Smør | 15 td. 57 vog 1 pd. 2 sk. |
| Feder | 22 vog. |
| Lamb | 60. |

1) N. A. Fær., bls. 12. 2) Bls. 116—19 og 532, L. D. útg. «Frams» 1903 bls. 265—67.



| | |
|---|---|
| Er udi gylden | 2100 skind 7½, lamb 60. |
| Beholdn. fra forrige år | 54 skind 13. |
| Gylden | 2155 skind ½, lamb 60.» |

Allur roknskapur er settur upp í romaratølum. Eftir takstinum kunna vit vísa á, at úrslitið er rætt, tá vit rokna 20 skinn í vágini, og tá smørtakstur ikki verður roknaður av teim 2 skinnunum. Viðmerkt skal verða, at *tallig* her merkir garnatálg, og at 9 sk. undir vaðmali jú er tað sama sum 4½ alin. Vit síggja herav, at fútin má hava nýtt kongsvágina í 20 skinnum, tí rokna vit hvørja vøru — burtursæð frá lombunum — út í peningi soleiðis, at skinnini á øllum vørunum svara til peningaskinn, fæst úrslitið at vera rætt. Ringari er at skilja, hví fútaroknskapirnir, vit kenna innan ár 1600, ikki hava yvirvektina á inntøkusíðuni, tí tað er jú ein inntøka í vøruvekt, sum gongur upp um hina avmáldu vágina, rokavekt. Keypmaðurin fær jú ikki vágina út aftur í rokavekt, men sum rætt og slætt vágvekt. Vit mega tí hugsa okkum, at yvirvektin, um ikki sum serstakur postur, tó er við á inntøkusíðuni í vektini á yvirvektarvørunum: fiski, ull, tálg, smør og fjøður. Útreiðslurnar á hesum sama roknskapi síggja soleiðis út:

«1. Først er leveret Jochim Wichmands fuldmægtige af Hamborg udi adskillige varer, tilsammen beregnet udi gylden efter forn. Jochim Wichmands kvittanc lydelse ........ 1899 gl. 12 sk.
2. Nok leveret forn. Jochim Wichmands tjener hvis, som var til overvægt på de varer udi dette år der på landet oppebåret eftter kvittancens lydelse ........ 52 gl. 5 sk.
3. Nok leveret Melchor Poulsøn, forstander for for de fattige udi hospitalet der på Færø, udi adskillige varer, som de fanger årligen, efter kvittancens lydelse ........ 88 gl.
og 60 lamb regnes for ........ 12 gl.
4. Nok antvordet hr. Christen Pedersøn, prædikanter og skolemester udi Thorshavn på Færø, udi adskillige varer til fattige skolebørns underholdning, som de fanger årligen efter hans kvittanc lydelse ........ 100 gl.
5. Nok givet Gabriel Mitens landsskriver her på landet, som han fanger årligen ........ 5 gl.
6. Item Hans Hendriksøn, som tager vare på kongl. majestæts vægt, som han fanger årligen ........ 6 gl.

Summa summarum for forsk. udgift: 2150 gl. 17 sk.
Lamb 60[1]).

1) 5 lomb ganga her fyri gyllin í peningi, ella 1 lamb kostar 4 skinn. Eftir løgtingsbókini frá 1615 sæst vanligur lambsprísur tá at hava ligið um 5 skinn.

Lignet og lagt udgiften og leveringen imod indtægten og oppebåring da bliver igen, som er overstanding udi restance .............. 4 gl. 3½ sk.»

Fyrst undir útreiðslunum síggja vit Argjalombini sett um í pening. Eisini er at geva gætur, at løn fútans er ikki at finna í hesum roknskapi, og at maðurin, ið hevur umsjón við vektini í leigubúðini, fær 6 gyllin í løn árliga. Á roknskapirnar eftir 1600 er løn fútans altíð uppførd við 80 gyllin árliga. Á hesar roknskapir er maðurin við vektina í leigubúðini als ikki uppførdur, men í staðin er komin «mestermanden» ella bøðilin við somu ársløn, 6 gyllin. Hetta fær okkum til at hugsa, um tað ikki er sami maður, ið hesi bæði størv hevði. Frá 1600 síggja vit eisini yvirvektina førda upp sum inntøkupost. Hetta vísir, at atfinning man hava verið gjørd at hesi eldri roknskaparførsluni. Henda broyting í yvirvektarroknskapinum tykist at vera hend júst ár 1600, tí ongantíð er hesin roknskapur so greitt uppsettur sum hetta árið.

Avrokningin av yvirvektini fyri árið 1600 er týðuligt prógv um, at fútin í øllum kongsgjaldi av oyggjunum hevur roknað við 80 marka ella 20 skinna vágini. Hetta er einasti ársroknskapur, hvar henda avrokningin kemur heilt týðuliga fram. Her verður soleiðis sagt, at allar inntøkurnar hetta árið vóru:

«Fisk 847 vog 6 sk., smør pakket 13½ td., smør løst 54 vog 1½ sk., vadmel 1857½ alen, uld 76½ vog 4 sk., hoser røde 278 par, hoser hvide 351 par, feder 3 vog 5 sk., tællig 495 vog 10½ sk., skind 140 kipper 11 sk., lamb 60 er 12 gl.»

Um útrokning av yvirvektini tekur roknskapurin soleiðis til:

«Overvægt oppebåret af forn. færøske fisk, smør, uld, feder og tællig, på hver vog 1 skind:

| | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fisk, | overvægt | på | 806½ | vog | 9½ | sk., | er fisk | = | 40 | vog | 6½ | sk. |
| Smør, | overvægt | på | 51½ | vog, | | | er smør | = | 2½ | v. | 1½ | sk. |
| Uld, | overvægt | på | 73 | vog | 1 | sk., | er uld | = | 3½ | v. | 3 | sk. |
| Feder, | overvægt | på | 3 | vog | 2 | sk., | er feder | = | | | 3 | sk. |
| Tællig, | overvægt | på | 471½ | vog | 9 | sk., | er tællig | = | 23½ | v. | 1½ | sk. |
| | | Er: | 71½ | gl. | ½ | sk.» | | | | | | |

Í hesi útrokning av yvirvektini er týðuliga roknað við 20 skinnum í vàgini.

Taka vit nú yvirvektina í eini vøru burtur av heildarinntøkuni av somu vøru, fáa vit:

| | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskur | 847 | vágir | 6 | sk. | ÷ 40 | vágir | 6½ | sk. | = | 806½ | vág | 9½ | sk. |
| Smør | 54 | vágir | 1½ | sk. | ÷ 2½ | vág | 1½ | sk. | = | 51½ | vág | | |
| Ull | 76½ | vág | 4 | sk. | ÷ 3½ | vág | 3 | sk. | = | 73 | vágir | 1 | sk. |
| Fjøður | 3 | vágir | 5 | sk. | ÷ | | 3 | sk. | = | 3 | vágir | 2 | sk. |
| Tálg | 495 | vágir | 10½ | sk. | ÷ 23½ | vág | 1½ | sk. | = | 471½ | vág | 9 | sk. |

Vit finna soleiðis aftur somu tøl, yvirvektin var roknað eftir.



Hin elsta løgtingsbókin vísir, at bæði lodd fyri vág og skinn hava verið nýtt í Føroyum, men hesir lutir eru hvørki varðveittir ella jarðfunnir í oyggjunum, so vit kunna einki siga um støddir teirra í nútíðar vekt. Skinnslodd hevur verið nýtt, men um vágaloddini í leigubúðini hava verið í gomlum norskum vágum, Kølnarvágum ella kongsvágum, vita vit ikki. Tað ber til at fáa fram kongsvágina við at leggja tvey skinnslodd aftur at hini norsku vágini. Eftir kongsboðum skuldi fútin krevja kongsgjaldið inn eftir landsins vekt, og tí skuldi hetta víst, at *landsins vekt var kongsvág og norsk mørk*. Kongur legði eisini handlinum eina við at nýta landsins vekt[1]), og eftir hesum skuldi handilin eisini hava nýtt kongsvágina og norska mørk, men illa ber til at fasthalda hetta, táið einki prógv er frá samtíðini í tølum at vísa fram. Í 1673 nevnir Lucas Debes vágina í 72 mørkum undir umtalu av handilsviðurskiftum, men nærri umtalu fær vágin ikki[2]). Í Gabelstíðini (1655–1708) átti Gabel kongsins gjald av Føroyum, og ivaleyst hevur hann nýtt hesa kongsvág til 1691, tá hin rømerska vektin var tikin í brúk í oyggjunum. Um hann eisini hevur nýtt kongsvágina í handlinum, er sum sagt einki prógv fyri, men tað liggur næst fyri at hugsa. Við hini rømersku vektini vaks hin føroyska mørkin frá 214,32 g til tætt við 250 g. Tað er tað, sum vit nú kalla mørk. Í hesi vekteind minnast menn, at kongsvágin ella tíggjundavágin vá 80 merkur, meðan vanlig vág tá skuldi viga 72 merkur í somu vekteind. Vit síggja soleiðis, at minnið um báðar hesar vágir, 72 marka vágina og 80 marka vágina, hevur livað í Føroyum, men summar staðir tykist upprunavágin at vera horvin úr fólks minni. Bæði skinnið (4 merkur) og hitt gamla pundið (24 merkur) hava føroyingar enn til dags nýtt í tálgarvekt, sjálvsagt í teirri nýggju vekteindini.

Sum ávíst frammanfyri úr fútaroknskapinum fyri ár 1600 hevur fútin har týðuliga nýtt 20 skinn ella 80 merkur í vágini, men hetta er eisini einasta árið, hvar roknskapurin fyri yvirvektina er heilt greitt uppstillaður. Í ongum av hinum roknskøpunum síggja vit, av hvussu stórari nøgd í vøru yvirvektin er roknað. Vit kunna bert finna fram á vágatalið í hesi vørunøgd við at draga yvirvektina í vøruni frá heildartalinum, sum finnst í roknskapinum, soleiðis sum víst frammanfyri undir viðgerð av roknskapinum frá 1600. Við slíkari framferð finna vit fram tøl fyri vørunøgdir, ið áttu at vera grundtøl fyri útrokning av yvirvektini; men yvirvekt roknað út eftir teimum fellur ikki altíð heilt saman við ta yvirvekt, fútin hevur ført inn í roknskap sín. Avvikið kemur mest fram í fiskavektini, viðhvørt í smørvektini, men í hinum yvirvektarvørunum eru grundtølini samanfallandi; bert eitt ár av teim aftaná nevndu er eitt lítið avvik í fjøðurvektini. Hvussu hesi smáu avvikini eru komin fram í roknskapinum, skal einki ávíst verða sagt um, men bert mint á, at roknskapur førdur í romaratølum lættari førir við sær roknivillur.

Heildarúrslitið úr roknskapinum fyri hvørja yvirvektarvøru er ført upp, og frá tí er drigin tann yvirvektin, roknskapurin vísir; skuldu

---

1) Lb. fol. 88 a og b. 2) L. D. bls. 267, útg. «Frams» 1903. Lucas kann hava hugsað um kølnarvágina ella keypmannsvágina.

vit tá eftir fyrimynd í roknskapinum frá 1600 fingið út grundtalið í vágum og skinnum fyri útrokning av yvirvektini. Hitt fyrra er roknað út eftir roknskapartølunum og hitt seinra í klombrum eftir teirri yvirvekt, fútin uppgevur í sínum roknskapi, tí er ? sett fyri tal av sk. Tey áttu at vera heilt samanfallandi, sum tey eru fyri árið 1600; men longu í 1601 kemur hetta lítla avvikið fyri fiska- og smør-vektirnar. Hin uppgivna yvirvektin í roknskapinum gevur eitt sindur minni grundtal: av fiski 29½ vág av 1637 vágum og av smøri 1 vág av 53½ vág. Nøkur ár skulu nú verða sett upp við øllum yvirvektar-vørunum Tølini í klombrum eru tøl roknað út eftir yvirvektini í roknskapinum, sum er uppgivin at vera 1 skinn av hvørji vág.

1617.

Fiskur .. 1221 vágir 4½ sk. ÷ 58 vágir 6 sk. = 1162½ vág 8½ sk. (1166 vágir ? sk.)
Smør.... 46 vágir 9 sk. ÷ 2 vágir 3½ sk. = 44 vágir 5½ sk. (43½ vág ? sk.)
Ull ..... 75½ vág 3 sk. ÷ 3½ vág 2 sk. = 72 vágir 1 sk. (72 vágir ? sk.)
Fjøður .. 11 vágir 5½ sk. ÷ 10½ sk. = 10½ vág 5½ sk. (10½ vág ? sk.)
Fløt..... 1 vág 1 sk. ÷ 1 sk. = 1 vág (1 vág ? sk.)
Garnatálg 322½ 3 sk. ÷ 15 vágir 7 sk. = 307 vágir 6 sk. (307 vágir ? sk.)

Strange Madssøn var fúti frá 1599 til 1619. Í 1620 kom nýggjur fúti Mads Christensøn 1620—46).

1622.

Fiskur .. 1948 vágir 4 sk. ÷ 91½ vág 2½ sk. = 1856½ vág 1½ sk. (1832½ vág ? sk.)
Smør.... 56½ vág 4 sk. ÷ 2½ vág 4 sk. = 54 vágir (54 vágir ? sk.)
Ull ..... 37 vágir 5½ sk. ÷ 1½ vág 5½ sk. = 35½ (35½ vág ? sk.)
Fjøður .. 7½ vág 7½ sk. ÷ 7½ sk. = 7½ vág (7½ vág ? sk.)
Garnatálg 309½ vág 5 sk. ÷ 14½ vág 5 sk. = 295 vágir (295 vágir ? sk.)

1632.

Fiskur .. 704 vágir 10½ sk. ÷ 34 vágir ½ sk. = 670 vágir 10 sk. (680½ vág ? sk.)
Smør.... 41 vágir 15⅔ sk.[1]) ÷ 1½ vág 9 sk. = 39 vágir 16⅔ sk. (39 vágir ? sk.)
Ull ..... 22 vágir 1 sk. ÷ 1 vág 1 sk. = 21 vágir (21 vágir ? sk.)
Fjøður .. 31 vágir 8½ sk. ÷ 1½ vág 1 sk. = 29½ vág 7½ sk. (31 vágir ? sk.)
Garnatálg 127½ vág 4½ sk. ÷ 6 vágir 1½ sk. = 121½ vág 3 sk. (121½ vág ? sk.)

Frá 1648—54 var Christen Madssøn fúti.

1) Í roknskapinum stendur: 40 vágir 4 pd. 9 sk. Her er sett 1 pd. = 6⅔ sk., táið trý pund skulu vera í vágini.



1650.

Fiskur .. 422½ vág 4 sk. ÷ 20 vágir 2½ sk. = 402½ vág 1½ sk. (402½ vág ? sk.)
Smør.... 35½ vág 7⅚ sk.[1]) ÷ 1½ vág 4 sk. = 34 vágir 3⅚ sk. (34 vágir ? sk.)
Ull ..... 24 vágir 4 sk. ÷ 1 vág 3 sk. = 23 vágir 1 sk. (23 vágir ? sk.)
Fjøður . 25½ vág 4½ sk. ÷ 1 vág 4½ sk. = 24½ vág. (24½ vág ? sk.)
Fløt..... 80½ vág 2½ sk. ÷ 3½ vág 6½ sk. = 76½ vág 6 sk. (76½ vág ? sk.)
Garnatálg 80 vágir 8½ sk. ÷ 3½ vág 6½ sk. = 76½ vág 2 sk. (76½ vág ? sk.)

Hóast smá og fá avvik vísir henda eftirrokningin, at 20 skinna vágin má hava verið nýtt í fútaroknskapinum, og at fútin tí má hava kravt kongsgjaldið inn eftir hesi vág. Sum nevnt liggur henda vágin nær Kølnarvágini, helst eina norska mørk yvir henni.

Aftaná skal verða sett upp hin samlaða inntøkan á fútaroknskøp-unum saman við teirri samlaðu útreiðsluni, kongur hevði av Føroyum fyri árini 1600—1652. Fyri fleiri av hesum árunum finnst eingin rokn-skapur, t. d. tíðarskeiðið 1603—12. Nógv ár av teimum skuldi ágáva verið goldin, og í slíkum árum var inntøka kongs tætt við 500 gyllin størri enn vanliga. Ágávan varð givin 3. hvørt ár. Árið 1601 var ágávuár, og vit kunna tí rokna út, at árini 1616 og 1625 vóru eisini ágávuár. Fútaroknskapirnir eru allir settir upp í gyllin og skinnum, føroyskir gyllin nevndir. Hesin gyllin hevði sum áður nevnt virðið av 20 føroyskum seyðaskinnum, men upprunaliga hevur óivað út-lendskt gyllinsvirði ligið til grund fyri tí. Hesin føroyski peninga-gyllinin hevur aldri verið útmyntaður. Innan ár 1600 síggja vit henda føroyska gyllinin mettan javnt við ein gamlan dála, og enn eftir 1600, táið kongur setur fútar í Føroyum, lovar hann teimum 80 dálar í løn árliga, men teir hava kortini á roknskapinum tikið av løn sína við 80 føroyskum gyllin. Broyting kom fyrst í 1648, tá Christen Mads-søn fúti fór at taka løn sína av við 80 ríkisdálum. Ríkisdálin var tá 96 skilingar og hin føroyski gyllinin bert 80 skilingar. Hvussu langt aftur í tíðina hesin føroyski gyllinin gongur, er sum nevnt ringt at avgera við vissu, tí hitt søguliga próvtilfar okkara er ov lítið. Vit vita, at teir gomlu, sum týddu Seyðabrævið á danskt mál 1637, settu 20 alin í vaðmali = 1 gyllin. Soleiðis hava teir hildið seg vita, at hugsanin var í hesi gomlu lóg, men tað er ivasamt[2]). Hin føroyski gyllinin hevði í hesi tíðini, her er til viðgerðar, bert virðið 10 alin av vaðmali.

Frammanfyri er roknskapurin frá 1590 tikin fram sum dømi, og vit síggja av honum, at kongsins samlaða inntøka av Føroyum hetta árið var 2112 gyllin 7½ skinn, og at hansara fasta útreiðsla av land-inum tá var 211 gyllin. Heilt stór broyting er ikki hend í kongsins inntøku av landinum tey fylgjandi 10 árini, og enn minni broyting sæst tá at vera hend í tíðarskeiðinum 1603—1612.

1) Í roknskapinum stendur: 35 vágir 2 pd. 4½ sk. Sett er í hesa uppgerð ½ vág = 1½ pd. og ½ pd. = 3⅓ sk., tí fútarnir rokna 1 vág = 3 pd. 2) 10 alin í føroyskum vaðmali hava ivaleyst verið javnmettar við 20 alin í lógoyravaðmali longu um ár 1300.

Úrtøka úr fútaroknskøpum.

| Ár | Samlað inntøka gl. | Samlað inntøka sk. | Samlað útreiðsla gl. | Samlað útreiðsla sk. | Til góðar gl. | Til góðar sk. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1600 | 2494 | 1 | 296 | | 2198 | 1 |
| 1601 | 3205 | 5 | 303 | | 2902 | 5 |
| 1602 | 2796 | 2 | 291 | | 2505 | 2 |
| 1613 | 3991 | | 291 | | 3700 | |
| 1614 | 3616 | 13 | 291 | | 3425 | 13 |
| 1615 | 3305 | 11 | 291 | | 3014 | 11 |
| 1616 | | | | | | |
| 1617 | 2725 | 2 | 291 | | 2434 | 2 |
| 1618 | 2627 | 8 | 291 | | 2336 | 8 |
| 1619 | 3463 | 3 | 291 | | 3172 | 3 |
| 1620 | 2577 | 2 | 291 | | 2286 | 2 |
| 1621 | 3203 | 15 | 291 | | 2912 | 15 |
| 1622 | 3887 | 15 | 291 | | 3596 | 15 |
| 1623 | 2877 | 16 | 291 | | 2586 | 16 |
| 1624 | 2739 | | 291 | | 2448 | |
| 1625 | | | | | | |
| 1626 | 2870 | 15 | 291 | | 2579 | 15 |
| 1627 | 2994 | 16 | 291 | | 2703 | 16 |
| 1628 | 3670 | 1 | 291 | | 3379 | 1 |
| 1629 | 2562 | 19 | 302 | | 2261 | 19 |
| 1630 | 2541 | 8 | 391 | | 2150 | 8 |
| 1631 | 3248 | 6 | 291 | | 2957 | 6 |
| 1632 | 2754 | 1 | 291 | | 2463 | 1 |
| 1633 | 2673 | 16 | 315 | | 2358 | 16 |
| 1534 | 3540 | 4 | 317 | | 3223 | 4 |
| 1635 | 3209 | 13 | 311 | | 2898 | 13 |
| 1636 | 3410 | 10 | 311 | | 2999 | 10 |
| 1637 | 4306 | 19 | 923 | 6 | 3383 | 13 |
| 1638 | 2891 | 16 | 311 | | 2580 | 16 |
| 1639 | 2856 | 5 | 311 | | 2545 | 5 |
| 1640 | 3564 | 16 | 311 | | 3253 | 16 |
| 1641 | 2430 | 8 | 325 | 5 | 2105 | 3 |
| 1645 | 2128 | | 311 | | 1817 | |
| 1647 | 2492 | 18 | 311 | | 2181 | 18 |
| 1649 | 2779 | 17 | 327 | | 2452 | 17 |
| 1650 | 2237 | 8 | 367 | | 1870 | 8 |
| 1651 | 2198 | 6 | 327 | | 1871 | 6 |
| 1652 | 2688 | 4 | 355 | 6 | 2332 | 18 |



Á ársroknskapi fútans av Føroyum í hesum tíðarskeiði tykist kongur at hava havt til góðar miðalroknað um 2660 gyllin. Kongsins føstu árligu útreiðslur frá 1600—1632 vóru 291 gyllin, og tær komu fram á henda hátt:

| | |
|---|---|
| Løn fútans | 80 gyllin |
| Til skúlans | 100 – |
| Til Argja hospital | 100 – |
| Løn landsskrivarans | 5 – |
| Løn bøðilsins | 6 – |
| Til samans | 291 gyllin |

Ár 1600 sigur fútin seg hava havt 5 gyllins eykaútreiðslur fyri nakað, kongur skyldaði, og 1601 sigur hann seg hava lagt 12 gyllin út fyri nakrar fangar. Í 1629 hevði fútin nýtt 11 gyllin til umvøling av hústaki á Tinganesi. Í 1633 kemur nýggj føst útreiðsla, 20 gyllin, sum er løn byrsuskjótarans. Aftaná turkaránið í Hvalbø 1629 er maður komin til Føroya fyri at læra føroyingar at skjóta, og hann verður fastur tænastumaður, sum kongur lønar. Landsins bøðil var løntur av kongi, og kongur lønti eisini fyri ein part landsskrivaranum. Frá 1584 til 1621 var tað Gabriel Mitens, sum eisini var landsins bartskeri. Lønarviðurskifti skrivarans verða umtalað seinni. Argja hospital fekk 60 lomb árliga, og vórðu tey roknað inn í teir 100 gl., sum hospitalið fekk, við 4 skinn hvørt lamb ella 12 gyllin í alt. Allar tær lønir og øll gjøld, kongur legði út, vóru givin í vørum, ætlandi góðum føroyskum vørum úr leigubúðini, sum keypt kundi verða fyri við handilin. Í 1633 hevði fútin eisini lagt út fýra gyllin fyri nævur, ætlandi til at bøta um tak. Tinganesskansin, sum viðtikið varð at seta í gerð eftir turkaránið, varð sýndur av løgtinginum í 1637 og mettur til at hava kostað 600 gyllin. Peningin førir fútin hetta árið upp sum útreiðslu. Enn meira skrivar hann sum útreiðslu: «50 vog næver, hver 6 vog 1 gylden = 8 gl. 6 sk.; 1 td. tjære, smøre låderne på skansen = 4 gylden.» Frá 1633 til 1652 var hin fasta árliga útreiðslan, kongur hevði av Føroyum, 311 gyllin, tó soleiðis, at fútalønin frá 1648—49 varð goldin við 80 ríkisdálum í staðin fyri føroyskum gyllin, og tað var eftir táverandi virði 96 gyllin. Tey síðstu árini var so hin fasta árliga útreiðslan 327 gyllin. Hini seinru árini komu viðhvørt eisini nakrar umvølingar sum útreiðslur á roknskapin.

Eftirstøðan á fútaroknskapinum frá 1620, altso frá Mads Christensøn gjørdist fúti í Føroyum, er avsett á mynd 2 bls. 114. Henda eftirstøðan man eisini geva eina mynd av, hvussu hin almenna fíggjarstøðan var í landinum, soleiðis at fata, at hin stóra eftirstøðan fyrst má vera komin aftaná tey ringu árini. Samanbera vit mynd 1, bls. 84 og 85, undir tíggjundargjaldinum við hesa mynd av eftirstøðuni, síggja vit av teirri fyrru myndini, at neyðarár í Føroyum tykjast at hava ligið millum 1629 og 1634. Hetta svarar til, at eftirstøðan á fútaroknskapinum er størst 1636. Fylgjandi ár mega eftir tíggjundargjaldinum at døma eisini hava verið fíggjarliga vánalig.

Á roknskapinum hjá Strange Madssøn, sum var fúti í Føroyum




Mynd 2. Útistandandi, ikki inngingin skuld á fútaroknskapinum árini 1620—1652, helst leigugjald.

1599—1619, stendur bert nevnt, hvat hann skyldaði kongi hvørt ár, men einki er sagt um, at hesin peningur var eftirstøða, sum úti stóð. Her skal tí bert verða nevnt, at henda skuld fútans til kongs var lítil tey fyrstu árini, men at hon árið 1613 var komin upp í 201 gl. 3 sk., og at fútin sama árið lá eftir at fáa handilin í Føroyum á sínar hendur.



Ósagt skal vera, um hesi viðurskifti høvdu nakað hvørt við annað at gera. Í 1614 eydnaðist tað fútanum at fáa ein triðing av handlinum undir seg. Eftir hetta var skuldin hjá fútanum til kongs minkandi.

Strange Madssøn fúti hevði um ár 1600 og út eftir Lyder Augustinussøn fyri seg sum vetrarfúta, og tá fútin um heystið hetta árið fór av landinum, førir hann upp í ársroknskap sín, hvat hann gav vetrarfútanum upp í hendur av búnyttum. Hesin listi ljóðar soleiðis:

«1 bryggekedel på $3^1/_2$ td., 1 bryggekar, 1 gammelt pibekar, 1 vog 12 skålpund kobbergryder, 1 vog 12 skålpund kobberkedler, 1 brandjern med 4 tænger, 1 træfod, 1 røst, 10 træfade, 1 træstob, 1 håndkværn, 1 trævægt med 2 skåle, *3 kobberlod hvert på 1 vog, 1 stenlod på 1 vog, 1 blylod på 1 skind, 1 måletønde med 2 jernbånd og ringe, 1 bismer*, 1 langt bord i gårdstuen, 1 førstede, 1 kistebænke, gammel; *1 jernbunden skrin med landsens bøger og breve udi*, 1 gammel skriver, 2 skabe, gammel, forfalden; 2 kramkister, *1 mestermandens økse*, 1 jernbolt med 4 fodklover, nok 1 liden bolt med 4 håndklover.»

Hetta má ætlast at vera leysalutir, sum kongur átti, og sum fútin tí hevði í varðveitslu. Beinast liggur tí fyri at hugsa sær teir hoyrandi heima í leigubúðini. Summir av lutunum kunnu tó illa hugsast at vera nýttir har, t. d. ketlarnir og grýturnar, og eitt borð er nevnt at standa í garðstovuni. Um hetta mundið átti kongur øll húsini á Tinganesi. Frammanundan hevði hann eisini viðhvørt sjálvur havt handilin, men júst tá var hann leigaður út. Tí er væl hugsandi, at kongur enn átti leysalutir eftir í handilshúsunum. Frá 1615 síggja vit í tingbókini, at fútin letur handilshúsini á Tinganesi seta í stand.

Vágarloddið finnst í 4 eintøkum í hesi uppgerð; harav eru 3 koparlodd og 1 steinslodd. Umframt finnst 1 skinnslodd í blýggi. Alt hetta saman við hinum nevnda bismaranum og trævektini kann kanska hava verið nýtt í leigubúðini. Vágarloddini eru tó heldur nógv, tá vit bert finna 1 skinnslodd. Hini 3 koparloddini kundu tí væl verið handilslodd. Í leigubúðini skuldi verið nóg mikið við loddi fyri vágina og skinnsloddi fyri yvirvektina. Til smærri vektir var bismarin tøkur. Smørtunnan, sum skuldi viga 7 vágir, kundi í hvørt fall ikki verða vigað við teim her nevndu loddunum. Hvussu hetta er gjørt, ella um smørið bert hevur verið mált upp í málitunnu, er ringt at avgera. Hugsast kann eisini, at menn eru komnir av bygd við heilum smørtunnum, sum teir heima við hús hava fylt í smáum. Bismari til tyngri lutir, nevndur pundari, hevur eftir uppgerðini ikki verið í leigubúðini. Eftir hesum mega vit rokna við, at vágarloddini, í hvørt fall steinsloddið, sum kann hugsast eldri, hava verið hin tyngra vágin, kongsvágin, ella kanska rætt og slætt Kølnarvágin, tí skinnsloddið var eittans.

Landsins skrín við løgtingsins bókum og skjølum, síggja vit, hevur verið í fútans varðveitslu ár 1600, men einki, sum var í hesum skríni, er komið til okkara kunnleika. Okkurt, sum var í landsins kistu tá, hevði kastað ljós yvir eldri tíðir. J. H. Schrøder prestur skrivar, at á døgum Pæturs Jákupssonar løgmanns varð landsins kista rænd, og at løgmaður tí mátti samráðast við menn um at fáa skil aftur á jarðar-

bókunum, sum tá vórðu tiknar[1]). Pætur Jákupsson løgmaður doyði 1601. Árið fyri tykist landsins kista við bókum og skjølum at hava verið til staðar, men hvussu langt hesar bøkur og hesi skjøl gingu aftur í tíðina, vita vit ikki. Í bók síni 1673 vil Lucas Debes eisini vera við, at landsins kista hevði verið rænd tá okkurt um 100 ár síðan. Hann sipar ivaleyst til Klerck sjórænara, sum rændi Tinganes 1579[2]). Vit finna einki, sum talar móti hesum uttan einans tað, at hin elsta nú varðveitta løgtingsbókin nevnir nakað undir 1617, sum skal hava staðið í gomlu tingbók 1557.

Teir varðveittu fútaroknskapirnir hava ikki verið goymdir í landsins kistu. Í henni kunna ætlast at hava verið tingbøkur, kanska skiftibøkur ella skiftiskjøl og lógir og kongligar fyriskipanir um okkara rættarskipan. Einki hesum viðvíkjandi er nú at finna, fyrrenn tann løgtingsbókin, sum byrjar miðskeiðis í árinum 1615, kemur undan kavi. Vit vita einki um nakað óvanligt, sum er hent um hetta mundið í Føroyum; men alt, sum hevur verið framman undan í landsins kistu, er oytt, og enntá nógv, sum seinri má vera afturat komið, er eisini horvið. Hetta gevur okkum illgruna um, at mesta oyðingin úr landsins kistu er gjørd av monnum í okkara egna samfelagi. Okkara forna skrivtmál í handritum úr eldri tíðum hava ráðandi menn í Føroyum neyvan verið førir at lesa, táið komið var út um miðjuna av 17. øld. Nógvar av teim kongligu fyriskipanum fóru so við og við úr gildi. Heldur ikki ber til at geva fransaráninum úr Tinganesi 1677 alla skuldina fyri hesa oyðing, tá vit hava tingbøkur beint undan hesum ári væl varðveittar.

Enn skal verða nevnt, at millum teir lutir, sum finnast í fútauppgerðini ár 1600, er eisini ein bøðilsøksa. Hetta er sjálvsagt, tí bøðilin var jú eftir fútaroknskøpunum kongliga løntur tænastumaður. Sum áður nevnt kann vera líkt til, at sami maður eisini ansaði eftir hini kongligu vektini í leigubúðini.

---

[1]) Hetta við jarðarbókunum hevur í hvørt fall einki søguligt hald. [2]) A. C. E. skjal 149 og 152; L. D. útg. «Fram»s 1903 bls. 220.

# DEILD IV.

## *Fremmand innrás á Føroyar.*

### a. Sjórán.

Ringt er at skilja millum loynikeypsskip og ránsmannaskip av skútum, sum tá bóru við Føroyar uttan at vera í handilsins tænastu. Undantikin eru tey sonevndu turkaskipini, sum komu her bert fyri at ræna.

Alt bendir á, at í tíðini eftir siðaskiftið (1535—36) og fram eftir hava ránsmenn farið serliga illa við Føroyum. Lucas Debes sigur í bók síni 1673[1]), at føroyingar gjøgnum tíðirnar hava avtapt sítt harðbalna víkingalyndi, og at franskir, írskir og enskir sjórænarar áður íðuliga herjaðu landið. Sum dømi úr víkingaøld nevnir hann hendingar úr gomlu føroyingasøgu og bendir annars á tíðina eftir siðaskiftið. Magnus Heinason fær lovorð frá Lucasi fyri, at hann jagaði sjórænararnar burtur og týndi teir. Allar skrivligar keldur eftir siðaskiftið tiga burtur hendingar í hini katólsku tíðini í Føroyum. Einans fólkasagnir peika á ymist, sum tá skal vera hent.

Ivaleyst man tað vera, at tann sjórænarabylgjan, sum gekk yvir Norðuratlantshav eftir siðaskiftið hevði eitt ferðilag av krossferð í sær. Hini sunnaru katólsku londini hava vent sær við serligum ágrýtni móti teim luthersku norðurlondum. Katólskir bispar í Kirkjubø tykjast at hava fingið mestsum frið fyri sjórænarum. Kirkjan hevði tá sína vernd í pávastólinum, og sjálvt katólskir sjórænarar óttaðust hann. Haraftrat kom, at kirkjan innan siðaskiftið kannaði sær rætt til at handla við fremmand skip. Sjórán kom annars ofta av, at hini fremmandu skipini ongan handilsskap fingu við føroyingar, av tí at kongur hótti við hørðum dómi allar teir, sum slíkan handil gjørdu. Hin lutherski kongurin hevði jú lagt alla kirkjuna og kirkjujørðina undir seg, og hann ráddi eisini fyri, hvør ið handilin skuldi hava á landi.

Lucas Debes veit bert um eitt turkarán at siga, navnliga í Suðuroy 1629, og hetta finna vit eisini væl endurgivið í løgtingsbókini. Fólkasøgnin hevur nógv um hesa hending, men hon veit tó einki um onnur turkarán í Føroyum. Ivasamt man tí vera, um turkar, t. e. menn frá Algier og Tunis, áður hava framt stórrán í Føroyum. Teir kunnu kanska hava borið við Føroyar í 1627, tá hitt stóra ránið fór fram

---

[1]) L. D., útg. «Fram»s 1903 bls. 219—20.

í Íslandi, men heilskapaðir kunna teir tá ikki vera komnir á land. Søgn er um, at eitt turkaskip eina ferð strandaði á Sunnbiarhólmi í ódnarveðri, og at sunnbingar nakrar dagar eftir skipbrotið bjargaðu einum manni illakomnum á land. Í søgnunum um Hargarbrøðurnar og Jansaguttarnar er tað írar, sum tá herjaðu Suðuroy[1]. Í Miðeuropa brast stríðið millum katolikkar og lutheranarar út í opnan bardaga 1618 og vardi til 1648 (tríatiárabardagin).

Lucas Debes bendir á tríggjar lutherskar kirkjumenn, sum vóru illa viðfarnir av sjórænarum: hin fyrsti og síðsti lutherski bispurin í Kirkjubø, Jens Gregersøn Riber — Lucas kallar hann Peder Ribe — so «hr. Rasmus sognepræst udi Suderø» — má vera Rasmus Sørensøn, seinri prestur í Vágum — og at endanum skrivar hann:

«Hr. Morten udi Thorshavn trakterede de meget ilde, tillige bortoge landsens skrin med sine documenter, bortførte købmændenes vare og kongens gods, som her kunde findes, optoge skibe, som sejlede her på landet, med mere ondt, de bedreve.»

Enn varðveitt skjøl siga frá, at handilin á Tinganesi við leigubúðini varð rændur 1579[2], men har er einki frágreitt um rán av landsins kistu, men bert um vørurán. Lucas sigur sjálvsagt frá tí, sum munnliga søgnin hevði á máli á hansara døgum, og tað var um 100 ár eftir, at sjálv hendingin var farin fram. Einki nevnir Lucas um, at teir síðstu katólsku bisparnir í Kirkjubø hava havt ónáðir av sjórænarum, men hann skrivar, at Jens Gregersøn Riber «er nogle gange berøvet af frankerne.» Líkt er til, at fransar hava herjað Føroyar illa beint eftir siðaskiftið. Jens Riber rýmdi av landi 1556, og bispagarðurin í Kirkjubø er óivað tá lagdur mest sum oyðin. Illa man bispagarðurin vera farin um miðjuna av 16. øld, tí við brævi frá kongi 16. oktbr. 1551 fekk Jens Riber loyvi at senda skip, 12—14 lestir stórt, til Noregs eftir viði fyri at væla um bispagarðin og kirkjuna við[3]. Ikki var fíggjarliga orkan kirkjunnar stór, eftir at kongur hevði ognað sær kirkjujørðina í Føroyum, so Jens Riber man neyvan hava nýtt hetta loyvi og er so heldur farin av landi.

Jørðin, sum lá beinleiðis undir sjálvum bispagarðinum, mundi vera Kirkjubøgarður við Flatnahaga og kanska Húsagarðarnir við. Hon gjørdist sum onnur kirkjujørð kongsjørð eftir siðaskiftið. Í 1550 fekk Guttormur løgmaður 20 merkur úti á Bø av Kirkjubøgarði í lívsfesti[4]. Teimum hevur hann so sitið við til 1571. Pætur Jákupsson, sum seinri gjørdist løgmaður, sat við øllum Kirkjubøgarði 1584 og hevði Flatnahaga við.

Í 1584 síggja vit, at Syðradalur er vorðin prestagarður í Suðurstreymoy, og náðisgarður kom seinni aftrat í Norðradali, men vit vita einki um, at prestur nakratíð hevur búð í Dølunum. Morten Jespersøn Bronck búði í Havn. «Hr. Morten udi Thorshavn» man helst hava búð í teim gomlu prestahúsunum eystan fyri Havnará, har Steikarhús og húsini í Geil seinri komu at standa, táið tað ránið fór

[1]) L. D. útg. «Fram»s bls. 219: «Dog have Suderinger engang holdt offentligt slag med irske sørøvere, der de ikke straks vilde forlade landet, hvorudover de forsamlede sig imod dennem og sloge alle ihjel.» [2]) A. C. E., skjal 147, 148, 149, 152 og 153. [3]) A. C. E., skjal 71. [4]) A. C. E., skjal 64.



fram, sum Lucas Debes umtalar, ivaleyst sama ránið, sum sagt verður frá í skjølum frá 1583 at vera hent fýra ár áður[1]).

Maðurin, sum framdi sjóránið á Tinganesi 1579, var skotin Klerck. Hann hevði verið í Íslandi í somu ørindum. Magnus Heinason hevði beint tá tikið við handlinum í Føroyum, og hann kom tí undir sviðan av hesum ráni. Saman við føroyingum flutti hann klagu um hetta sjóránið fram fyri kong, og hann bað um nakað av góðgjørslu fyri missin[2]). Hendan góðgjørslan varð drigin inn í hitt fylgjandi stríðið, sum Magnus fekk við Chr. Valkendorf. Annars tók ríkisstýrið sær av at saknast eftir sjórænaranum hjá skotakongi og kravdi mannin straffaðan[3]). Skotakongur læt senda Fríðriki kongi II skrivligt svar á látínskum máli, dagsett 13/4 1580[4]).

Av hesum svarbrævi sæst, at klagan frá Fríðriki kongi II var send skotakongi við onglendinginum Jacob Altray, sum var í tænastu hjá danakongi. Brævið er staðsett í Kirkwall, og tað sigur, at teir haðani gjørdu seg út við trímastraðum skipi at fanga sjórænaran við Hetland, hvar teir vistu, hann var vanur at liggja í vetrarlegu. Jacob Altray skuldi vera við á ferðini; men ódnarveður gjørdi, at teir komu nakað seint avstað, og táið teir komu til Hetlands, var Klerck aftur hildin til havs innan mars mánað. Í brævinum stendur, at Klerck hevði framt sjórán á Íslandi og umliggjandi oyggjum.

Jacob Altray hevði 1579 leitað eftir Grønlandi fyri Fríðrik kong II, kom fastur í ísin á Eysturgrønlandi og vendi aftur. Á heimferðini sá hann undir Hetlandi Klerck liggja. Harum skrivar hann í dagbók síni[5]).

«Item 14 dag oktobris ginge vi til sejls fra Sumsaabratt [á Hetlandi], og blev det os tilkendegivet den dag, førend vi ginge til sejls af forn. havn, at den fribytter ved navn kaptajn Klerck, som ad S. Hans dag midsommer var udi Færø og Island, røvede og tog fra de fattige folk deres gods og pendinge og gjorde dennem så stor skade, var kommet under landet og vilde der ligge vinterleje.»

Nakað um somu tíð sum Lucas Debes gevur út bók sína um Føroyar 1673, skrivar prestasonurin Thomas Tarnovius[6]) stutta frásøgn um landið. Hann nevnir har, at meðan Fríðrikur II var kongur, sendi hann stórt herskip til Føroya, ført av Maurits Prins, fyri at verja landið móti sjórænarum[7]), og sló hann tá trý turkaskip undir Føroyum. Skrivliga er henda søguliga hending annars ikki nevnd av øðrum.

Beinleiðis ávísingar í samtíðar skjølum við frágreiðing um sjórán í Føroyum í 16. øld eru ongar aðrar at finna enn frammanfyri nevnda um sjórænaran Klerck. Sipað verður tó til slíkar hendingar eftir siðaskiftið í søgnum og av monnum, sum skrivað hava um Føroyar, og ivaleyst er nógv farið fram av slíkum í oyggjunum. Soleiðis er frásøgn um, og Lucas Debes nevnir tað eisini, at tá fransar og bretar á vári fóru undir Ísland at fiska, løgdu teir at landi í Føroyum og tóku sær fólk haðani at arbeiða sum trælir um borð í skipum sínum.

[1]) D. D. R. A., D. D. K., B 161. [2]) A. C. E., skjal 153 og 159. [3]) A. C. E., skjal 148. [4]) D. D. R. A. undir uttanríkismálum úr Skotlandi. [5]) Árn. Magn. nr. 770, c. [6]) Sonur av presti í Suðuroy, seinri í Eysturoy, Jacob Christensøn Klinte. [7]) Th. T. bls. 49.

Slíkar menn settu teir á heimferð síni um heystið á land onkustaðni í Føroyum, um teir tá bóru við oyggjarnar. Ivaleyst hava teir eisini rænt góðs og fæ til matna á sínum fiskitúrum. Hesir ránsmenn tóku fólk frá hond, og verður soleiðis sagt, at harra Ísmael í Suðuroy varð tikin av einum breta til fiskiskap undir Íslandi.

Aloftast rýmdu føroyingar til fjalls undan sjórænarum og vardu seg við at ríva grót oman yvir teir. Bardagi man viðhvørt hava verið, tí sum sagt nevna menn enn bæði fransa- og íragravir í Føroyum. Í hvørt fall hevur óttin fyri sjórænarum sitið fastur í føroyingum upp at okkara døgum. Toftir av vaktarhúsum nærindis bygdum, hvaðan gott útsýni er út yvir havið, eru at finna ymsar staðir[1]).

Lucas Debes hevjar Magnus Heinason til skýggja fyri, at hann vardi Føroyar so væl móti sjórænarum við snildum og djørvum tiltøkum, hóast hann ofta var verri útgjørdur at stríðast enn teir. Soleiðis nevnir hann, at ein væl útgjørdur sjórænari kom á Magnus, meðan hann lá á Havnar vág — skansin var tá enn ikki komin í stand — men Magnus goymdi útgerð sína og smeyg sær undan út í Hest. Hann slapp sær niðan á oynna, og sjórænarin var honum í hølunum, men Magnus fekk hann riknan burtur við omankasti.

Ókendur er meginparturin av hesum sjóráni, Føroya fólk hevur liðið undir. Vit hóma eisini, at við byrjan av 17. øld hevur henda sjóræning einki verið í batna, tí løgtingsbókin, sum tekur við 1615, trívur beinleiðis í frágreiðing um slíkan ófriðaskap undir landi. Sagt verður um sjórænarar, sum herja á friðalig fremmand fiskiskip, og sum somuleiðis leggja at landi at herja. Vit skilja av hesi klagu føroyinga, at soleiðis hevur lívið eisini verið árini framman undan. Hetta skriv føroyinga[2]) ljóðar soleiðis í løgtingsbókini:

«Stormægtigste højbårne fyrste, allernådigste herre og konning.

Give vi fattige folk, Eders majestæts underdanigste tjenere udi Eders nådes land og øer, Færø, på det ydmygste og underdanigste til kende, hvorledes nu på nogle års tider haver sig her under landet forsamlet en hob fribyttere at plyndre og tage de engelske skibe, som her under landet ligger og fisker, men nu udi tvende år haver somme af forn. fribyttere begivet sig hid ind udi landet, besynderligen udi Kvalbø og Vestmanhavn, og der plyndret og taget fra de fattige folk, som der er bosiddende, hvis de haver haft, hvorover de fattige folk ikke aleneste haver mistet deres fæ og kvæg, fiskerbåde og andet, men også haver måttet ligge udi marken udi den bedste fisketid, udi hvilken de ellers skulde have søgt deres næring, hvorover de fattige folk ikke aleneste ere komne til agters med Deres majestæts leje og landskyld, men også ere hensatte udi alsomstørste hunger og elendighed og ere befrygtendes, at forn. fribyttere med flere af deres parti ville sig hid forsamle og her have deres tilflugt, eftersom en part af dennem noksom haver ladet sig forstå.

Ere vi fattige folk derfore, allernådigste herre og konning, udi alsomstørste nød og elendighed så vel som udi stor frygt og fare for sådanne tyves og skalkes parti ganske ydmygeligen og på det allerunderdanigste begærendes, Eders majestæt for Guds skyld sådanne vores nød og trang nådelig ville erkende og betænke, så tvivler vi intet på, Eders majestæt dertil finder råd og middel, som allerede af Eders majestæt begyndt er, hvorfore Eders majestæt den evige Gud rigeligen belønne, og forhåber, Eders majestæt endnu for Guds skyld fremdeles vil have os udi Eders majestæts beskyttelse og os fattige folk for sådanne skalkes parti nådigst vil have forsvaret.

[1]) A. Degn: K. B. 1709–10, bls. 180. [2]) Lb. fol. 5 a, N. A. Fær. bls. 224–26.



Vi fattige folk vil også gerne forskaffe os bøsser og værger og hjælpe til at forsvare landet det bedste os muligt er, som vi dog dertil pligtige ere, men efterdi disse fattige folk her udi landet ere ikke tilvante at omgås med bøsser og værger, ere vi på det allerunderdanigste begærendes, Eders majestæt vil forordne og tilsende os en, som almuen her udi landet i så måde kunde undervise.

Dernæst, allernådigste herre og konning, giver vi fattige folk Eders kongl. majestæt på det ydmygste og underdanigste til kende, at her under landet forsamler sig en hob engelske og skotske skibe, flere end nogen tid været haver, og her under landet bruger deres fiskeri, ikke ude på havet, som under Island brugeligt er, men de løber og driver inde under landet på landsens grunde og fiske-klakke og udi så måder bortrøver den fattige næring og Guds gave, som vi fattige folk ellers med vores små både kunde opfiske, hvilket vil blive dette fattige land til alsomstørste fordærvelse, om det så længe skal have sin fremgang. En hob af dennem løber under det skin, at de ville fiske, og tage og røve, hvad de kunne overkomme, som allerede bevisligt er.

Herpå forvente vi Eders majestæts nådige og milde svar, hvilket Gud almægste vil Eders majestæt belønne, og vi som fattige og tro undersåtter stedse og altid med vore bønner til Gud almægtigste ville det ihukomme, som vi det dog pligtige ere. Den samme evige Gud spare og bevare Eders majestæt udi et langtvarende og lyksaligt regimente.

Actum Thorshavn udi Færø, d. 6. aug. 1615

Eders kongl. majestæts allerunderdanigste undersåtter på Færø.»

Sum vit síggja, er hetta ein klaga frá føroyingum bæði um sjórán og alt ov nærgangandi fremmandan fiskiskap, og táið klagan sigur, at tey fremmandu skipini aldri hava verið so nógv í tali sum hesi síðstu árini, samsvarar hetta við tað, sum ávíst er framman undan undir tíggjundargjaldinum, at árini 1611–14 tykjast at hava verið framúr góð fiskiár í Føroyum, og at teir fremmandu fiskimenninir tí hava flykkst undir landi. Sjórænararnir, sum ofta eisini vóru fiskimenn, gingu í somu sporum.

Um somu tíð sum áðurnevnda klaga varð send kongi, sendi løgtingið Christian Hendriksen Friis kanslara soljóðandi bræv[1]):

«Vores ganske ydmyge og pligtige tjeneste nu og altid forsend med Gud vor Herre.

Gunstige og velbyrdige kansler Christian Friis. Eftersom vi haver

[1]) Lb. fol. 6 a, N. A. Fær. bls. 226–27.

erfaret af Strange Madssøn, at Eders strenghed var mest årsag, at dette Hans majestæts skib, «Gabriel», er kommen hid til landet at søge og lede efter disse fribyttere, som her under landet haver nu på tvende års tider plyndret og røvet os fattige folk her udi landet, for sådanne Eders strenghed milde velgerninger den evige gode Gud Eders strenghed igen rigeligen belønne vil, og vi med vores bønner til Gud almægtigste ville det dagligen udi hu komme, og derhos endnu forhåber, Eders strenghed os fattige folk fremdeles vil have hos Hans majestæt i hu kommet, så at sådanne skælmer os herefter ikke skulde tribulere.

Vider, gunstige herre kansler, haver vi endnu herhos sendt en liden supplicats til kongl. majestæt angående vor nød og trang, på det ydmygste ombedendes, Eders strenghed der udi os fattige folk vilde mildeligen forhjælpe, så vi derpå måtte bekomme et nådigt svar og Hans majestæts hjælp derudi.

Sådan Eders strengheds velgerninger vil den evige Gud belønne, og vi fattige folk stedse og altid vil findes Eders strengheds villige tjenere, som vi det dog pligtige ere, hvilket Gud kender. Den samme vi Eders strenghed med timelig og evig velfærd ganske troligen vil have befalet.

Thorshavn udi Færø den 7. aug. 1615.

Eders strengheds ydmyge og villige tjenere laugmand
samt menige laugret udi Færø.»

Hugsast kann væl, at føroyingar hava havt klagu um sama ránsmannaóskilið frammi hjá kongi áður, tí teir takka her kongi fyri, at hann hevur sent herskipið «Gabriel» til Føroya. Har hevði kanslarin lagt eitt gott orð inn fyri føroyingar hjá kongi, og tí vildi eitt viðmæli frá honum óivað nú fáa kong til at fremja umsóknina. Henda ferð «Gabriels» má helst vera gjørd í 1614, tí føroyingar nevna ikki Jørgen Då, sum var í Føroyum við tveimum skipum 1615.

Handilsskip til Føroya kundu heldur ikki kenna seg trygg á hesum leiðum, og nógv komu tey eisini út fyri atsókn. Soleiðis varð eitt handilsskip hjá Søren Sørensøn[1]), Bjørgvin, 1611 ella 1612 álopið av ránsmannaskipi, sum greivin av Orknoyum átti[2]).

Kristian kongur IV var ógvuliga íðin fyri at verja sjógvin í Norðuratlantshavi sum hoyrandi undir hansara ræði. Longu væl innan áðurnevnda umsókn føroyinga var honum í hendi, hevði hann 1. mai 1615 skrivað Jørgen Då, «skibshøvedsmand og embedsmand på vort slot Holbæk»[3]), bræv um við skipunum «Vægter» og «Jupiter» at leggja vestur í hav, og 10. mai helt hann út av Oyrasundi. Í brævinum sigur kongur: «Dernæst er kommet udi kundskab, at der skulde ligge nogen fribytter udi Færø og gøre Hans majestæts undersåtter stor skade og afbræk med mord og plyndreri, desligeste ogå den fattige søfarende mand såvel som de fattige fiskere, som lå der ude omkring for at fiske, og gjort dennem også stor afbræk og skade.»

1) Tollari og borgmeistari, hevði frá 1. mai 1614 triðing av Føroya handli.
2) N. A. Fær., bls. 228. 3) D. D. R. A., Sjæll. Register XVI 115—16.



Jørgen Då helt leiðina til Føroya, og longu 20. mai kom hann inn á Hvalbø. Á ferðini hevði hann tikið tveir fiskimenn um borð fyri at vísa sær leið í havn. Hann sendi brátt Jens Munk loytnant í land í Hvalbø at fregnast, og hesin frætti, at kapteinarnir Mandus og Tockertt fyri 14 døgum síðan høvdu verið har. Bátur varð beinan vegin sendur til vetrarfútans í Havn fyri at frætta, um hann visti nakað um ránsmenninar, men táið byrurin gjørdist góður, helt hann sjálvur norður um fjørð við skipum sínum, innan báturin var aftur komin. Undir Dímun hitti hann bát, ið segði frá, at tveir aðrir ránsmenn lógu á Vestmanna, og hin 22. mai sigldi hann inn á havnina har, hvar ránsmenninir enn lógu. Teir mistu mótið beinan vegin, og 10 írar sluppu sær brátt í land í lítlum báti. Jørgen Då sendi 15 hermenn við byrsu eftir teimum, men teir fóru brátt til gongu, tóku sær bát eystanfyri á Streymoy og hildu leiðina til Hetlands. Hetta sigur Lucas Debes. Tá læt Jørgen Då akkerið falla tætt við sjórænaraskipini og legði seg at skjóta á tey. Um borð á sjórænarunum fullu tá 3 menn og 4 vórðu særdir. Tveir høvuðsmenn á ránsmannaskipunum við 6 øðrum monnum vórðu síðan tiknir og hongdir í gálga í Vestmanna, men 18 monnum slepti Jørgen Då leysum. Hann setti manning um borð í annað skipið og tók tað við sær, og hinum skipinum bað hann vetrarfútan taka sær av. Úr Føroyum setti Jørgen Då leið sína eystur at Norðurnoreg, og har tók hann Mandus, ein onglending, og skip hansara og førdi hann við sær til Keypmannahavnar, hvar hann síðan varð hongdur.

Seinri, 23. mai 1615, helt Laurits Brems við herskipinum «Gabriel» út av Oyrasundi og setti leiðina til Føroya[1]). Hann skuldi sum Jørgen Då leita eftir ránsmannaskipum. Annaðhvørt skuldi hann drepa ránsmenninar ella føra teir fangnar til Keypmannahavnar fyri at líða straff. Enn í august var hann í Føroyum, meðan løgtingið helt fund í Havn.

Aftur 1616 vóru sjórænarar inni á Vestmanna, hvar teir brutu niður gálgan, Jørgen Då hevði reist árið fyri. Fýra vestmenningar, Thomas Jacobsøn, Michell Joensøn, Nicolai Thorbiergsøn og Olaf Joensøn, avløgdu sama ár vitnisburð, ið sigur, at Kristi himnaferðardag kom inn á Vestmanna stórt skip, sum segði seg vera enskt herskip, og skiparin æt Olifer Sandion. Tríggir menn av skipinum komu í land og høgdu niður gálgan. Nakað av trænum bóru teir á kirkjugarðin, og nakað varð liggjandi á staðnum. Seinri komu ensk og skotsk skip inn á Vestmanna, og hesir menn tóku tá tann viðin, ið lá har, sum gálgin hevði staðið, men tveir hálendingar, sum samstundis lógu í í havn, harmaðust yvir hesa gerð bretlendinga[2]).

Í løgtingsbókina 1616 stendur innført bræv frá kongi, dagssett 8. mars 1616[3]) «på vort slot Anderskov». Brævið má vera at skilja sum kongsins svar á hitt føroyska klaguritið árið fyri um sjórænarar og bøn um hjálp. Føroyingar høvdu harí sagt seg fúsar til at vápna seg sjálvar. Týðuligt er, at hetta kongsbrævið kastar føroyingum fyri, at teir fremja loynihandil við fremmand skip. Neyvan hevur kongur tikið hetta upp úr sínum egna brósti. Heldur hava menn í stýri kongs,

1) D. D. R. A., Sjæll. Register XVI fol. 120. 2) Lb. fol. 15 a. 3) Lb. fol. 14 b.

t. d. kanslarin, frætt okkurt um hetta á annan hátt. Tað er lætt at skilja, tí Strange Madssøn fúti var jú í Danmørk um veturin, og saman við monnum úr Bjørgvin, Søren Sørensen borgarstjóra og Nicolaus de Frunt, hevði hann fingið onkarrætt til handilin í oyggjunum frá 1. mai 1614. Handilsrætturin hevur tá sjálvsagt ligið honum frammalaga í huga. Kongsins forboð fyri, at føroyingar handlaðu við fremmandar, hevur bert gjørt ránshugin hjá teimum størri.

Norðuratlantshav var í fyrra parti av 17. øld eitt ófriðaligt øki. Úr ymsum londum ferðaðust har fiskimenn og hvalastingarar, ið viðhvørt fóru fram sum ránsmenn ella høvdu loynihandil fyri. Onnur skip vóru rein loynikeypsskip. Aftur onnur vóru bert sjórænarar, t. d. turkaskipini, og har sum tey komu fram at, herjaðu tey á fólk og fæ á landi. Europeiskir sjóræningar, t. d. úr Bretlandi, tóku mest farmaskip, men viðhvørt herjaðu teir eisini á landi. Fyri turkum var rán av kristnum fólkum ein stórvinna tá í tíðini.

Kristian kongur IV royndi at koma hesum ólevnað til lívs. Hann útsendi sum nevnt næstan á hvørjum ári kríggsskip fyri at revsa ella taka ófriðakropparnar, og tey sigldu um alt Norðuratlantshav ella hitt norska havið, sum tað stundum varð nevnt, og sum Kristian kongur vildi kanna sær harradømi yvir. Hetta sjóøkið var stórt um at fara, og hitt danskt-norska ríkið var fáment í samanburði harvið. Har aftrat kom, at øll stríðsmegi tess var drigin saman við Oyrasund, so langt var at ferðast til ríkisins útjaðarar.

Tey londini, sum liðu mest undir hesum ólevnað, vóru Ísland, Føroyar og Finnmørkin. Hetta var ikki nakað, sum bert hevði tikið seg upp í 17. øld. Í siðaskiftisøldini tykist hetta ólevnað ikki at hava verið stórt mætari, kanska í nógvum førum verri, men vit vita tíverri ov lítið um nógv, sum tá hendi.

Í 1616 varð Jørgen Daa aftur sendur av stað við 6 herskipum fyri at taka ófriðaskip í Norðuratlantshavi, og boðini frá kongi vóru hini somu: annaðhvørt at drepa ófriðakropparnar ella føra teir í fjøtrum til Keypmannahavnar. Tvey herskip, undir leiðslu av Niels Rosenkrantz og Henrik Vind, vórðu í 1618 send í somu ørindum við kongl. umboðsmonnum Frederik Friis og Jørgen Vind[1]), og táið íslendska handilsfelagið 1620 fekk Føroya handil, vórðu handilsskip tess vanliga fylgd av herskipum á sínum handilsferðum.

Á Íslandi gjørdu algierskir sjóræningar stórt rán 1627. Fýra turkaskip komu tá til Íslands fyri at ræna. Oddamaðurin á skipunum var ættaður úr Flandern, men hann hevði tikið við Muhameds trúgv. Við Suðurísland vístu bretskir fiskimenn skipunum leið, og tey fóru fyrst inn í Vestmannaoyggjunum, hvar tey fóru ræðuliga herjandi fram. Síðan fóru tey runt um Ísland og tóku bæði góðs, fólk og fæ. Yvir 250 fólk vórðu tá hertikin og nógv dripin. H. G. Garde sigur í bók síni: «Den dansk-norske sømagts historie 1535—1700»[2]), at hesir sjórænarar gjørdu eisini vart við seg í Føroyum við einum skipi, og at teir eisini tá skulu hava tikið fólk úr Føroyum. Innan ólavsøku 1627 kann einki turkarán vera gjørt í Føroyum, tí løgtingsbókin hetta árið nevnir einki um tað, men hon hevur mangt annað

[1]) N. A. Fær., bls. 233. [2]) Bls. 143.



á lofti. Løgmannsskifti var í 1628, og tá er lítið innført í løgtingsbókina, men turkaránið hevði hon væl nevnt, um tað var hent. Sum áður sagt er søgn um stranding av turkaskipi á Sunnbiarhólmi. Á Íslandi var peningur savnaður saman fyri at leyskeypa hesar fangar, og hann varð eisini nýttur til tess, hóast danska ríkisstýrið fyrst legði peningin út. Mannavinir úr øðrum londum tingaðu við turkarnar um leyskeypan av fangunum, og 1636 komu nógvir teirra til Keypmannahavnar. Árið eftir fóru 27 av teimum til Íslands. Teirra millum var sálmaskaldið, Hallgrímur Pétursson.

Hitt stóra turkaránið í Føroyum fór fram í 1629. Um hetta eru sagnir varðveittar, og løgtingsbókin greiðir somuleiðis nógv frá hesum. Lucas Debes hevur tað eisini á máli. Her skal bert vera endurgivið tað, sum stendur í løgtingsbókini[1]):

«Stormægtigste højbårne fyrste, allernådigste herre og konning.

Giver vi fattige folk, Eders majestæts underdanigste tjenere udi Eders nådes land og øer, Færø, på det ydmygeligste og underdanigste til kende, hvorledes nu udi denne sommer er indkommen her udi landet udi Kvalbø i Suderø tvende[2]) tyrkiske skibe, som havde inde ved 500 mand af allehånde slags skælmer og parti, og haver samme parti frataget de fattige folk udi forn. ø, Kvalbø i Suderø, som er bosiddende, hvis de haver haft, hvorover de fattige folk ikke aleneste haver mist deres kvæg og fæ, fiskebåde og andet, men endogså er de fattige folk der udi øen frataget deres hustruer og børn, over 30 mennesker, hvorover Gud nådeligen sig forbarme.

Og haver de slemme mennesker ihjelslaget 6 mennesker udi samme ø. Haver de fattige folk endogså måttet ligge udi marken udi den bedste fisketid, udi hvilken de ellers skulde have søgt deres næring, hvorover de fattige folk ikke aleneste ere kommen til agters med Eders majestæts leje og landskyld, men også ere hensatte i alsomstørste hunger og elendighed, og er befrygtende, at forn. skælmer med flere af deres parti ville sig hid til dette fattige land næstkommende år begive, eftersom en part af dennem noksom haver ladet sig forstå, at de til kommende år ville hidkomme med elleve skibe, og dersom Vorherre ikke nu så nådeligen havde straffet de slemme mennesker, at det ene skib formedels en heftig storm drev i land og sloges i stykker, da havde de haft udi agt at spolere og afbrænde det ganske fattige land, som en dansk mand, de havde med sig, berettede.

Ere vi fattige folk derfor, allernådigste herre og konning, udi alsomstørste nød og elendighed såvel som udi stor frygt og fare for sådanne tyve- og skalkeparti ganske ydmygeligen på det allerunderdanigste begærende, Eders majestæt for Guds skyld sådan vor nød og trang nådeligen vil ervege [umhugsa] og betænke; så tvivler vi intet på, Eders majestæt vil dertil finde råd og middel, at vi for sådanne ugudelige menneskers vold og store overlast formedels Eders majestæts nådige hjælp bliver forskånet.

Vi fattige folk ville også gerne forskaffe os bøsser og værge og

[1]) Lb. fol. 170 a. [2]) Søgnin nevnir 3 skip. Sjá annnars «Færøske folkesagn og æventyr»: Turkar í Suðuroy, men L. D. nevnir í bók síni 1673 bert 2 skip, útg. «Fram»s 1903, bls. 221.

hjælpe til at forsvare landet det bedste os muligt er, som vi dog dertil pligtige ere. Men efterdi disse fattige folk her udi landet ere ikke tilvant at omgås med bøsser og værge, ere vi på det underdanigste begærende, Eders majestæt vil forordne og tilsende os en, som almuen her udi landet udi så måde kunde undervise.

Herpå forvente vi Eders majestæts nådige og milde svar, hvilket Gud allernådigst vil Eders majestæt belønne, og vi fattige folk og tro undersåtter stedse og altid med vore bønner til Gud allermægtigste ville det ihukomme, som vi det dog forpligtige ere. Den samme evige Gud spare og bevare Eders majestæt udi et langtvarende og lyksaligt regimente.

Actum Thorshavn udi Færø, den 6. juli anno 1629.

Eders kongl. majestæts underdanigste undersåtter på Færø:

Jens Jensøn Skive, Guds ord tjener på Sandø og official på Færø,
Joen Justinussøn, lagmand på Færø,
Michel Joensøn og Jacob Pedersøn, sysselmænd sammesteds.»

Sama dag hava somu menn umboðandi alt Føroya fólk sent Christen Friis kanslara bræv um turkaránið. Teir siga frá, at teir hava sent kongi bønarrit og biðja kanslaran við vælvild taka sær av málinum. Kongur svarar tinginum um turkaránið í brævi skrivað 4. mars 1630 í Keypmannahavn. Ætlandi hevur fútin fingið hetta brævið, áðrenn hann fór aftur til Føroya um várið. Eftir tingbókini ljóðar kongsbrævið soleiðis:

«Eftersom Vi forfare tyrken at have været under Vort land Færø og borttaget med sig derfra nogle af indvånerne der sammesteds, da bede Vi dig og ville, at du med gejstligheden og de fornemste der på landet betænker middel, hvorledes samme fanger med de bedst formuendes hjælp kunne løses, at de ikke skulle lades under tyrkens tyranni og derover tvinges at nægte kristendom. Dermed ske vor vilje.

Skrevet på Vort slot København, den 4. marts anno 1630.

Under Vort signet
Christian.»[1])

Beinan vegin kongsbrævið var komið til Føroya, er líkt til at tingboð eru farin um landið fyri at fáa løgtingið saman skjótari enn vanligt til at viðgera hetta mál. Av tí at henda viðgerðin er so athugaverd, skal hon øll verða endurgivin her:

«Anno 1630 den 21. juni på et sat ting og stævne i Thorshavn på Færø opstod kongl. majestæts foged Mads Christensøn og lod læse Hans majestæts nådigste brev og befaling formeldende om hjælp her udaf landet til de fattige folk, som ere fangen udi barbariet. Og eftersom Hans majestæts brev var læst, tilholdt Hans majestæts foged alle kongl. majestæts undersåtter i forn. Færø, som da til stede var, at enhver af dennem af kristelig kærlighed og medynk, enhver efter

[1]) Lb. fol. 179 a.



deres formue, ville udlove og tilhjælpe de fattige fanger med at randsonere [leyskeypa] og befri af tyrkens tyranni, hvortil blev svaret af provsten, præsterne, lagmanden og lagretten samt menige almue, at enhver efter deres yderste formue gerne vilde tilhjælpe og udlægge, hvis dennem muligt kunde være.

Men efter denne elendige tids tilstand, som nu haver været forgangen vinter udi landet, som ingen af os kan mindes[1]), formedels fiskeriet så aldeles haver slaget fejl for os, at her haver været så stor elendighed, at mange mennesker ere bortdøde af stor hungers nød, hvorover vi fattige folk ikke kunne betale Hans majestæts leje og landskyld, tilmed den største part af os lever udi alsomstørste armod og elendighed, hvilken Gud bedst kender, men når Gud vil give os sine gaver og velsigne af søen, ville vi gerne som tro undersåtter altid findes hørige og lydige og gerne efter vor yderste formue udgive, hvis Hans majestæt os påbyder, som vi til des dog pligtige ere, hvilken vor erklæring og svar på Hans majestæts nådige brev Hans majestæts foged, Mads Christensøn, af os skriftlig var begærende, hvilket vi hannem ikke nægte kunde.

Til ydermere vidnesbyrd, at så udi sandhed er, som forskrevet står, vidne vi efterskrevne hr. Jens Jenssøn Skive, provst over Færø, Joen Justinussøn lagmand, Michel Joensøn, Peder Nielssøn, Heine Justinussøn, Augustinus Lydersøn, Hans Nielssøn, Hendrik Thomassøn, Poul Jacobsøn, Joen Thomassøn, Joen Joensøn og Jacob Holdansøn, svorne lagrettesmænd udi Færø, med vore signeter her neden for.»[2])

Sum áður nevnt hava árini um 1630 verið rein neyðarár í Føroyum við fiskaloysi og stórum felli á landi. Táið løgtingið ber við ringum tíðum, er tað ikki einans undanførsla. Hóast tað lovaði tingið kongi, at føroyingar vildu offra alt, teir orkaðu, fyri at leyskeypa teir føroysku fangarnar. Tað var ikki so lítið av peningi, ið skuldi til. Vit kenna tað frá øðrum norðurlondum. Í Noreg t. d. rændu turkarnir eisini fólk, og har tykist loysunargjaldið fyri vanlig fólk at hava ligið um 400 gyllin hvørt fólk.

Føroyingar høvdu onga umboðan uttan ríkisstýrið, sum umvegis ella beinleiðis kundi føra tingingar við sjóræningaríkini í Algier, og nú hevði kongur fingið orð og lyfti føroyinga. Ríkisstýrið læt tó aldri hoyra aftur frá sær í hesum máli, og fleiri neyðarár komu í Føroyum. Leyskeyptir sum nógvir av íslendingunum vórðu teir føroysku fangarnir aldri úr Algier.

Longu á løgtingi 1629 er sagt frá bjarging av ymsum lutum frá hinum strandaða turkaskipinum, sum eftir hesum at døma má hava verið ógvuliga stórt. Hin 3. aug. 1629 spyr fútin á tingi Suðuroyar sýslumann, Jákup Hálvdansson í Hvalbø, um hann hevði fingið bjargað meira av turkaskipinum; men sýslumaðurin svarar, at tað hevði ikki borið til at fáa meira til sættis enn tað, fútin sjálvur hevði verið við til at bjarga, táið hann var í Suðuroy, og nevnir hann, hvat hetta var:[3])

«4 jernstykker, 3 stenstykker, 2 ankre og 62 jernkugler, stangkugler 18, 6 lænkekugler, urtepotter [kanónir] 2, store jernbolte med

[1]) Sjá tíggjundarkurvuna blaðsíðu 84 og 85. [2]) Lb. fol. [3]) Lb. fol. 176 a.

hoved 40, slette bolte uden hoved 25, rorhager 4, nok bolte, som er gjort kroget ved den ene ende 7, jernhængsler, som hovedtovene haver været gjort fast udi, 12, nogle stykker gammelt tov.
Nok bekendte forn. Jacob Holdansøn, at han vadede (wåede) ud til vraget 2 dage, før han kom til Havnen. Da fandt han under sine fødder udi søen en lærredspung. Deri var halv sjette stykker *von Achten*, hvilke han leverede til Hans kongl. majestæts foged, Mads Christensøn, og sagde derhos, at noget lidet fra vraget på 3 favnes dyb kunde han endnu se 3 stykker liggende, de ikke kunde komme til at bjerge, thi de lå for dybt.»

Fútin bað harnæst Jákup Hálvdansson royna at bjarga øllum, hann kundi. Grunt man hava verið, har skipið rak á land, tí Jákup Hálvdansson hevði vaðað út á vrakið. Á tríggja favna dýpi sá hann haðani enn tríggjar kanónir liggja á botninum.

Peningastykkið *von Acht* var franskt og hevði heldur meira virði enn ein føroyskur gyllin. Í Danmark var við fyriskipan av 10. okt. 1629 ein von Acht sett = 5 markar 14 skilingar. Ein føroyskur gyllin var tá mettur javnt við 37 lybskar skilingar ella 74 danskar. Ríkisdálin var tá 96 danskar skilingar ella 6 markar, men slættadálin bert 64 skilingar.

Av kanónunum, sum nevndar eru í uppgerðini frá Jákup Hálvdansson, komu tvær í hvørt fall seinri á Havnar skansa. Táið uppgjørt var á skansanum 1709, vóru 2 sekspundskanónir har «af de såkaldte tørkenstykker[1].» Summarið 1630 bað fútin Niels Kønig skipara, Thens Jansøn stýrimann og Jacob Pedersøn landsskrivara (Jákup Gullsmið) fara til Hvalbiar at virðisseta tey bjargaðu skipsakkerini. Teir søgdu, at flýggið var brotið av tí størra og betra akkerinum, og tað kundi tí ikki verða hægri mett enn 23 slættadálar ella um 19 gyllin 18 skinn[2]).

Turkaránið í Hvalbø 1629 loypti hvøkk í allar føroyingar. Óttin fyri, at hetta skuldi henda aftur, var stórur. Serliga bangnir vóru menn um, at Havnin og Tinganeshandilin fóru at liggja undir næsta álopi. Vit síggja soleiðis, at Hans Rasmussøn prestur, sum fyri stuttum var komin til Havnar, ætlaði at flyta av landi av slíkum ótta. Óivað eftir løgtingsins áheitan fór Tinganesskansin í gerð 1630, og skuldi hann verja Tinganes bæði frá land- og sjósíðuni. Fyrst í 1637 hoyra vit aftur um henda skansan, táið hann var sýndur og mettur í virði av 12 løgrættumonnum í minsta lagi at hava kostað 600 føroyskar gyllin. Stóri skansi ella Stanganesskansin fór undir líknandi viðurskiftum í gerð 1580 eftir sjórænaraálopið 1579, sum skotin Klerck gjørdi.

Í staðin fyri at versna, sum føroyingar óttaðust, minkaðu sjórænaraálopini á Føroyar eftir 1630, og føroyingar, sum við ídni vóru farnir undir at gera Tinganesskansan, komu skjótt mest at føla hann sum eina byrðu, og serliga Havnarmenn komu at líða undir hesum tvangsarbeiði á skansanum. Tinganesskansin gjørdist tí tá í tíðini eitt politiskt stríðsevni í Føroyum, og hetta stríðið vardi langt út í Gabelstíðina.

1) N. A. Fær., bls. 238 og 284. 2) Lb. fol. 183 a.



### b. Fremmandur fiskiskapur við Føroyar.

Í tíðini nær siðaskiftinum vita vit einki um fremmandan fiskiskap við Føroyar, men ivaleyst hevur slíkur fiskiskapur verið longu tá. Fyrst tá vit koma fram móti árinum 1600, er eitt sindur til skjals, sum bendir á henda fiskiskap. Vit noyðast at síggja hetta í sambandi við alla ta sjóvinnu, sum fór fram í Norðuratlantshavi í hesi tíðini. Í kjalarvatninum á hesi sigling gingu bæði loynihandil og rán, og sjálvt turkar frá Algier vágaðu sær higar norður í kuldan.

Hvalaveiðan fór fram heilt norður at Svalbard og vestur til Grønlands strendur, og harí luttóku menn av ymsum fólkasløgum. Í hesi vinnu vóru baskar, menn frá Biskaya, eina elstir, men bretar og hálendingar gingu teimum skjótt javnt. Eisini menn frá norðurlondum vóru við. Bæði Fríðrikur kongur II og Kristian kongur IV løgdu stóran dent á sum norskir kongar at halda fram krav sítt um yvirvald í Norðuratlantshavi. Fremmandir máttu ikki vága sær ov nær teim norsku ríkislondum, ið gingu heilt vestur til Grønlands, men økið var vítt um at fara og ringt at verja, og fremmand vinna var tí vanlig á hesum leiðum innan fyri tað mark, dansk-norski kongurin vildi kanna sær alt ræði.

Hálendingar vóru um hetta mundið farnir við skipum at fiska nógv fram við Skotlands strendur. Skotar kendu seg soleiðis troðkaðar burtur av sínum egnu fiskimiðum, og nógvir leitaðu tí upp undir Føroyar at royna fiskiskap har. Vitnisburð í samtíðar skjølum eiga vit ikki nógvan um hetta. Í Langebeks diplomatarium á ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn finnast 3 avrit av sama brævi, dagssett 1. apríl 1591, sum Skotlands kongur Jákup VI[1]) sendi føroyingum, og helst hevur hann stutt framman undan havt brævaskifti við danska ríkisstýrið um skotskan fiskiskap við Føroyar. Brævið er skrivað á látíni og ljóðar í føroyskari umseting soleiðis:

«Jákup av Guds náði kongur skotanna til landsstjórans[2]) og íbúgvanna á oynni Føroyum, okkara kæru vinir. Heilsan.

Teim, sum gera seg út hiðani, tegnar okkara, Jóannes Thomson og Patricius Cok, fyri at fara til oynna Føroyar, sum tygum hava fingið umsjón við av alhøga bróður okkara, Danmarkar kongi, mildasta harra tykkara, fyri at teir í vanligari fiskitíð kunna útinna starv sítt og nærvið nevndu oyggj royna at veiða fisk, teimum hava vit givið hetta [skriv], hvarí vit biðja um, at tygum vilja, eygleiða nevndu tegnar okkara við vælvild og vinsemi, loyva teimum at fiska og hvørki krevja av teimum meira gjald enn tað, sum vanligt er,[3]) ella geva teimum aðra viðferð, enn vinmonnum sømir. Gera tygum hetta, kunna tygum vænta somu vælvild frá okkum, um nakar tykkara einusinni

1) Sonur Mariu Stuarts og Darnleys gjørdist sum barn Skotlands kongur 1567, frá 1603—1625 eisini Onglands kongur undir navninum Jákup I, giftur við prinsessu Onnu av Danmørk, dóttur Fríðriks kongs II. 2) Orðið præfectus týtt landsstjórin merkir helst løgmaður. 3) Smbr. Kongs Str. bls. 276: «dronning Anna, Kristian IV's søster, som nettop et år eller to i forvejen [1616] hadde søkt om privilegium på at inddrive avgifter av fremmede fiskere ved de britiske kyster.»


JACOBVS DEI GRA
tia Rex Scotorum Praefecto atq. incolis Insulae Farrie
amicis nris dilectis Salutem
Praesentibus hisce subditis nris Ioanne Thomson et
Patricio Cok versus Insulam Farrie a Serm̄ fratre nostro
Rege Daniae Dño nro clementissimo curae vrae mandatum
ut consueto piscandi tempore ibidem sua procurare possent
et prope Insulam dictam captandis piscibus incumberent.
nos hasce praesentes ijs concessimus quibus vos Rogamus ut
illos subditos nros benevolentia ac favore vro prosequi
velitis ijs piscandi libertatem faciatis nec quicquam praeter
consueta vectigalia ab eis exigere nec aliter eos quam amicos
par est tractetis. Quod si feceritis parem amicis
expectabilis benevolentiam vel quando quis vestrum apud
nos data occasione venerit. Faxit Deus opt. max. omnia
vobis prospere succedant. Datae ex arce nra Dalketh
primo die Mensis Aprilis. 1591. Regni nri 24.

Jacobus R.

Praeclaro atq. honestis viris Praefecto
et custodi caeterisq. incolis Insulae Farrie
amicis nris dilectis.

Mynd 3. Bræv frá Jákupi VI skotakongi til Føroya løgtings 1591 í avriti eftir Gabriel Mitens.



givna løtu kemur til okkara. Gævi Gud hin algóði og alvaldi, at alt má eydnast væl fyri tygum.

Givið á borg okkara Dalketh hin fyrsta dag í apríl mánað, 1591, á 24. ári av stjórn okkara.

*Jacobus R.*

Til hin frama og hinar rættlætnu menn, landsstjóra og verndarmann[1]), og allar aðrar íbúgvar á oynni Føroyum, okkara kærastu vinir.»[2])

Av skjalinum sæst, at hetta er fylgisskriv, sum tveir skotskir fiskimenn skuldu hava við sær til Føroya, stílað bæði til landsstjórans og til føroyinga. Hesin landsstjóri (præfectus) er helst løgmaður, kanska fúti, og við føroyingar man vera hugsað um umboð teirra, løgtingið.

At eitt av hesum avritum, sum gjørt er í prentaðari stavseting, er eftir táverandi tingskrivara, Gabriel Mitens, sæst av, at navn hansara stendur á baksíðuni. Høgrumegin á hesi síðu stendur eisini fylgjandi:

«Copia kongens,
kongens breff af Skodtlandt, som kom hytt thill Ferrø anno 1591, og rette hoffuid breffuitt haffde Madz Baldzersonn, kongl. matz. fougid med sig thill Danmark med Hans nadis zignethe udt kopierett.

Anno 1591 then 4. september i Thorshavn

*Zacharias Pedersonn.*»

Soleiðis síggja vit, at sjálvt upprunabrævið er farið til Danmarkar, men tað finnst nú ikki har longur. Eingi skjøl tykjast heldur varðveitt, sum ganga undan hesum skrivi. Sakaris Pætursson man helst vera sonur av táverandi løgmanni, Pæturi Jákupssyni. Hann varð seinri bóndi á Viðareiði og sýslumaður í Norðuroyum.

Skrivið frá Skotlands kongi nevnir, at skotar hava givið vanligt gjald fyri at fiska við Føroyar. Helst mega vit rokna við, at teir hava fiskað frá egnum skipum og ikki frá landi. Hetta vísir í hvørt fall, at skotskur ágangur um fiskiskap við Føroyar longu hevur verið í hesi tíðini, og at hann ikki hevur verið lógligur uttan játtan eftir umsókn.

At døma eftir endurgivna brævi og eftir kongsbrøvum frá komandi árum tykist allur landgrunnurin um Føroyar tá at hava verið heimasjógvur, í hvørt fall sæð frá dansk-norska kongsins sjónarmiði og eisini viðgingið av teim fremmandu. Henda áskoðan tykist at fáa síni ásanning í brøvum frá skotska ráðnum, Lordis of Secrite Council, hin 12. mars 1618, og í brævi, Jákup I bretakongur sendi Kristiani IV 27. mars 1618. Bretakongur er her sami maður sum Jákup VI skotakongur. Hann gjørdist 1603 kongur av øllum Bretlandi og Írlandi. Hesin Jákup var giftur við systur Kristians IV, sum æt Anna.

Undan árinum 1600 finnst einki um, at Ongland við Írlandi hevur havt nakran fiskiskap við Føroyar, men sørt man tað kortini ikki

[1]) Custos týtt verndarmann merkir helst fúti. [2]) D. D. R. A., Langebeks Diplomatarium, finnst har í 3. avritum.

hava verið. Í teirri tíðini tykjast enskir fiskimenn mest at hava roynt undir Íslandi, og søgn er sum nevnt um, at teir tóku menn úr Føroyum við sær um várið til Íslands og settu teir av bert onkustaðni á heimferðini um heystið uttan nakra samsýning. Ismael Nielssøn, ið gjørdist prestur í Suðuroy 1551, skuldi sum umtalað hava verið fyri tílíkari lagnu. Eingi varðveitt skjøl frá samtíðini nevna tó hesi viðurskifti.[1])

Givið er tað kortini, at ikki bert skotar, men eisini onglendingar árini 1600–1602 hava ligið undir Føroyum og fiskað, tí dagssett 4. aug. 1602 í Tórshavn sendir Føroya løgting Kristiani kongi IV klagu um enskan fiskiskap undir Føroyum. Føroyingar nevna her nøvnini á enskum skiparum, sum hava fiskað við Føroyar tey síðstu árini, so ivaleyst eru teir komnir í havn ymsar staðir í Føroyum. Klagan kom til viðgerðar millum danskar og enskar sendimenn á tingingarfundi í Bremen 1602.[2]) Har hildu donsku sendimenninir fram í skrivi 4. okt. 1602, at hesin enski fiskiskapur við Føroyar var ólógligur. Hann gekk dansk-norska konginum ov nær í sínum yvirrættindum í oyggjunum og var til skaða fyri føroyingar sjálvar. Teir donsku sendimenninir søgdu eisini, at teir høvdu prógv fyri, ivaleyst í klagu føroyinga, at onglendingar hetta árið, altso 1602, og árið fyri høvdu roynt fiskiskap undir Føroyum við nógvum skipum, og at føroyingar í síni klagu høvdu gramt seg um tað tap, hetta hevði volt teimum.

Júst hesi árini vísir fiskatíggjundin úr Føroyum,[3]) at væl av fiski tá má hava verið undir landi, og tessvegna er hugsandi, at ensk fiskiskip, sum annars mest vóru von at fiska undir Íslandi, tá hava steðgað alt summarið undir Føroyum og roynt fiskiskap har. Upp undir byrjanina av teirri elstu nú kendu løgtingsbókini tykjast onglendingar eisini at hava fiskað undir Føroyum. Hetta síggja vit av klaguni um óskilið í Vestmanna, sum finnst fyrst í hesi bók 1615. Tað samsvarar við, at eftir fiskatíggjundini hevur góður fiskiskapur verið í Føroyum 1612–14.[3]) Táið føroyingar 1617 senda klagu um nærgangandi skotskan fiskiskap, men einki nevna um onglendingar, vísir tíggjundin samstundis, at fiskiskapurin í Føroyum tá hevur verið í einum bylgjudali, og tí er væl hugsandi, at onglendingar tá mest hava fiskað undir Íslandi. Samsvarandi hervið noyðast vit at halda, at ensk luttøka í fiskiskapi undir Føroyum í fyrsta fjórðingi av 17. øld hevur gingið upp og niður við góðum og ringum fiskiárum, at skotskur fiskiskapur við Føroyar hevur vundið meira javnt upp á seg, og at føroyingar, sum tíðin leið, ongan víðari skilnað hava gjørt millum skotar og onglendingar.

Nakar sáttmáli millum Danmarkar og Onglands um ensk fiskirættindi við Føroyar sæst ikki at vera komin í lag 1602 í Bremen.

---

1) Kongs. Str. bls. 73. 2) D. D. R. A., forhandlingerne i Bremen 1602. Í klaguritinum heldur danska sendinevndin fram, «hvormeget disse pågående sejladser og fiskerier er forbundet med krænkelse af den danske konge og skade for indbyggerne. At de [englænderne] har forøvet dette indeværende og foregående år omkring øen Færø med en stor mængde skibe, vil de [engelske udsendinge] kunne overbevises om ved sikre vidnesbyrd, vi har til rådighed, idet undersåtterne [færinger] i højeste grad beklager sig og efter at have lidt mange tab ved denne slags sejladser har sendt bønskrivelse til kongelig majestæt.» Sjá eisini Kongr. Str., bls. 198–211. 3) Sjá bls. 84–85.



Brævaskifti sæst tó framvegis at hava staðið við millum bæði ríkini um henda spurning til 1606. Nú var Jákup VI av Skotlandi kongur av øllum Bretlandi undir navninum Jákup I. Hann man longu sum skotskur kongur ætlast at hava boygt seg fyri krøvum frá svágri sínum, Kristiani IV, viðvíkjandi skotskum fiskiskapi við Føroyar. Enntá brævið frá 1591 sipar henda vegin, tá tað talar um *vanligt gjald* fyri skotar, sum fiska við Føroyar.[1]) Jákup bretakongur hevur tí verið bundin av síni skotsku støðu í spurninginum um bretskan fiskiskap við Føroyar, ein støða, sum kemur týðuliga til sjóndar í skotska ráðnum 1618. Longu í brævi 26. september[2]) krevur Kristian kongur IV av Jákupi kongi, at forboð verða sett fyri bretskan fiskiskap við Føroyar. Jákup kongur vil tá halda, at enskur fiskiskapur er farin fram við Føroyar í mong ár, og óivað eftir enskum stýrisráðum aftraði hann seg tá við at góðtaka krøvini frá Kristiani kongi. Í varðveittum brævaskifti, sum hesi árini er farið fram partanna millum, sæst eingin sáttmáli at vera gjørdur. Fyrst í 1617–18 sæst spurningurin at verða tikin aftur til viðgerðar. Í 1615 sendi jú løgtingið klagu til kongs um óskil av fremmandum skipum á Vestmanna og samstundis kæru um bretskan fiskiskap við Føroyar, men hetta sæst onga viðgerð at hava fingið í millumlandaspurningum.

So er tað, at føroyingar senda kongi fylgjandi klagurit, sum er innført í løgtingsbókina[3]) undir 5. juli 1617:

«Om skotter, som ligger her allesteds under landet og i alle havne og fjorde, desligeste udenfor på fiskeklakkene.

Stormægtigste højbårne fyrste, allernådigste herre og konning. Eders kongl. majestæts fattige indbyggere udi Eders nådes land og øer, Færø, giver Eders majestæt på det underdanigste og ydmygste til kende, hvorledes en stor hob skotske skibe haver nu på 2 eller 3 års tid forsamlet sig her under Eders nådes land og øer og med deres små skibe sejler og ror igennem landet og ind udi alle fjorde og havne, fisker og opriver indenfjords og udenfor den fattige næring, som vi fattige folk med vore små både på sådanne steder søge kunne såvel som på alle vore fiskeklakke og grunde. (Hvorhen) Så snart de ser os udi så måde med vore små både sidde og fiske, de straks løbe udi hobetal og der ret tæt hos os udi så måde borttager vor fattige næring, som Gud allermægtigste os fattige folk udi så måde unde vil, thi de allesammen have drivegarn, hvormed de fanger sild, og samme sild bruger de til agn på deres kroge, hvorefter fisken løber; men vi fattige folk haver ingen sild. Derfor kunne de fiske, men vi ligger hos dennem og får slet intet, hvorover dette fattige land med tiden, om det så længe skulle vare, kommer udi alsomstørste elendighed, så at vi ikke kunne købe noget til vores husbehov eller og bliver mægtige at udgive vores leje og landsskyld.

Denne vores forberørte fattige lejlighed bede vi Eders kongl. majestæt på det underdanigste og ydmygste at ville værdes til af kongl.

---

1) Kongs. Str. bls. 112, 113, 135. 2) D. D. R. A., uttanríkismál, Ongland A 1603–1619. Dansk-norskt krav um, at bretar halda seg burtur frá Føroyum og Norðurnoreg; sjá annars Kongs. Str. bls. 211–212. 3) Lb. fol. 23 b–24 a.

gunst og nåde at have udi hukommelse. Det vil den evige gode Gud Eders kongl. majestæt rigeligen belønne.

Actum Thorshavn udi Færø den 5. juli anno 1717.

Under landsens signet.»

Ætlast kann, at henda klaga føroyinga er farin av landi við handils⸗skipi um ólavsøkuleitið 1617. Nær hon er komin til Keypmanna⸗havnar, vita vit ikki. Longu 22. sept. 1617[1]) hevði Kristian IV kongur gjøgnum sendimann sín í Bretlandi, Carisius, sent Jákupi kongi klagu um ólógligan bretskan fiskiskap við Føroyar. Møguliga kann hetta bræv Kristians kongs eisini hava bygt á klaguna frá føroyingum 1615 um ólógligan bretskan fiskiskap undir Føroyum. Í hvørt fall kann klagan frá føroyingum í juli 1617 tá ikki vera komin bretska ríkisstýrinum í hendi, tí Jákup kongur svarar í brævi 22. nov. 1617[2]), at hann hevði ikki fingið nóg mikið at vita um, hvat og hvønn klagan galt. Hetta kongsbrævið hevði Carisius við sær heim til Dan⸗markar um jóltíðir 1617.

Nú er líkt til, at dansk⸗norska ríkisstýrið hevur tikið klaguna frá føroyingum upp til viðgerðar av nýggjum, og tá hevur klagan frá Føroya løgtingi í juli 1617 í hvørt fall verið ríkisstýrinum í hendi, hóast ríkisskjalasavnið í Keypmannahavn nú einki danskt eintak eigur av henni. Hetta síggja vit av, at henda klagan finnst í látínskari umseting á skjalasavni í Edinburgh[3]), send til Bretlands við Carisiusi sendi⸗manni í januar 1618. Samstundis sendi Kristian kongur Jákupi breta⸗kongi bræv, dagssett 10. jan. 1618, viðvíkjandi bretskum sigli⸗ og fiskiveiðurættindum við Føroyar. Føroyska klagan í látínskari umseting er dagssett 4. juli 1617, ivaleyst er tí avritið hjá tingskrivaranum í tingbókina gjørt dagin eftir tingviðtøkuna. Brævið frá Kristiani kongi til bretakongs er sum vanligt í millumlandaspurningum í teirri tíðini skrivað á látínskum máli. Tað finnst bæði á ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn og á skjalasavni í Edinburgh. Hetta brævið er so athugavert, at tað alt skal verða endurgivið her í føroyskari týðing:

«Til hins høga høvdinga, harra Jákup, kong stóra Bretlands, Frak⸗lands og Írlands, verja trúarinnar, kæra skyldmann okkara, svág og bróður.

Kristian fjórði av Guds náði kongur Danmarkar, Noregs, Venda og Gota, hertogi av Slesvík, Holstein, Stormarn og Ditmarsken, greivi av Oldenborg og Delmenhorst til hins høga høvdinga, harra Jákup, kong stóra Bretlands, Fraklands og Írlands, verja trúarinnar, skyld⸗mann okkara, svág og kærasta bróður heilsan og [ynski um] góðan framburð og alt gott.

Tygara hátign, kærasti skyldmaður, svágur, bróður og systkinabarn! Tygara hátign minnast óivað tað, sum vit í farnum døgum vinarligast lótu fyriskipa viðvíkjandi tegnum tygara, serliga skotum, reglur fyri

[1]) D. D. R. A., uttanríkismál, breve og indberetninger fra Carisius, Island og Færøerne. Suppl. 2. [2]) D D. R. A., uttanríkismál, breve og indberetninger fra Carisus, Island og Færøerne. Suppl. 2. [3]) National Library of Scotland, D. D. R. A., Latina 1616—31.



sigling at oyggjum okkara Føroyum og byrjaðum royndum við fiski⸗skapi har á staðnum. Orsakað av hesum okkara skjali bóðu vit tygara hátign fyri okkara vanligu vinarlags skyldu bøta um hetta óreglu⸗semi við egnum tiltøkum og skotskum íbúgvum álvarsamt og heilt at nokta nevnda fiskiskap undir hesum oyggjum og í høvnum teirra og firðum, hvarav oybúgvarnir, sum liva fjalla og kletta millum á nærum oydnum jarðlendi, mega leita sær árliga vinnu fyri at liva.

Hóast soleiðis alment er lovað okkum tygara hátignar bróðurliga vælvild, og vit sanniliga eisini hava tað skrivligt í skjali, at hetta for⸗boðið eftir tygara hátignar boðum langt síðan er vorðið kunngjørt, síggja vit hóast tað tó av endurtiknum klagum til okkara frá síðst⸗nevndu íbúgvum í farnum ári ikki bert, at hitt skyldiga lýdni móti tygara hátignar forboði er vorðið svikaligt, men at fólk úr tygara tjóð nógv tíðari enn áður er komið saman um henda fiskiskap og av nýggjum at hava givið nevndu Føroya íbúgvum størstu grund til klagu um tey teim frátiknu fiskilíkindi. Tá tað sæst av hjáløgdu okkum sendu klagu, at við hesi skotanna árligu átroðkan á nevndu oyggjar hóttir ein rein undirgongd tegnar okkara á hesum staði og ein á allan hátt oyðan av hinum føroyska valdsøkinum, og tað ikki longur kann verða tolt, hava vit framvegis bróðurliga og ógvuliga vinarliga biðið tygara hátign um, at tygum fyrst syrgja fyri, at boð tygara verða fylgd, hvareftir skotarnir fylgjandi ár og ikki minni í framtíðini heilt halda uppat við hesi sigling og hesum fiskiskapi.

Vit vilja av fullum huga annars gera, hvat vit kunna fyri at fáa teimum lagalig kor, um tað er gjørligt, uttan skaða fyri tegnar okkara. Hjá okkum er eingin ivi um, at tað vit biðja tygara hátign bróður⸗liga, vilja vit lættliga fáa, fyri hvat vit frá okkum afturímóti vilja siga okkum fúsar til beinleiðis av bróðurligum kærleika við ídni at vísa vælvild, tá løtan býðst.

Við hesum ynskja vit hjartaliga tygara hátign við Gudi hinum al⸗valda ta størstu eydnu.

Givið á Frederiksborg, 10. jan. 1618.

Tygara hátignar kærasti bróðir og svágur

*Kristian.*»[1])

Av tí at klaga føroyinga bert nevnir skotskar fiskimenn, hevur Jákup kongur sent skotska ráðnum, Lordis of Secrite Council, bæði brævið frá Kristiani kongi og klaguna frá føroyingum til ummælis, og tann viðgerðin av spurninginum, sum tá fór fram í skotska ráðnum, lýsir væl støðuna við bretskum, her helst skotskum, fiskiskapi undir Føroyum í teirri tíðini.

Ráðið sæst at hava verið samankallað í Edinburgh fyrst í mai mánað 1618, og tingingarnar har endaðu í viðtøku av tveimum skjølum til bretakongs, sum sat í London, bæði skrivað á skotsk⸗enskum máli. Tey eru dagssett 12. mars 1618 og finnast bæði á skjalasavni í Edin⸗burgh. Í skjalinum, sum serliga viðger klaguna frá føroyingum, eru nøkur orð fúnað burtur í teim fyrstu reglunum, men avgerandi týdn⸗

[1]) D. D. R. A., Latina 1616—1631 og National Library of Scotland, Edinburgh.

ing fyri innihaldið hava tey ikki. Í føroyskari týðing er skjalið soljóðandi:

«Eftirsum hansara hátign .... havandi .... álvarsamt flutt fram fyri hann av hansara tegnum í Føroyum viðvíkjandi teirri kúgan, sum klagað er um .... á teir av tegnum í hesum landi [Skotlandi] við at fiska inn á teirra [sjógv] og taka frá teimum vinningin av teirra fiskiskapi og harvið oyða teimum møguleikan fyri at gjalda nevnda kærasta bróður hansara hátignar teirra .... og skyldur, gav hansara hátign síðan boð um at royna at kanna hetta mál, um frásøgnin givin hesum viðvíkjandi var álítandi og sonn. Og síðan umboðsmenn frá teim serligu bygdunum og býunum, sum hetta mál viðvíkir, vórðu fingnir higar fyri at svara fyri seg og spurdir gjølla um teirra fisking í nevndu høvum, hava teir viðgingið og játtað, at summir íbúgvar í teirra býum hava roynt nevnda fiskiskap við Føroyar nú í fleiri ár, og førdu teir fram grundir fyri seg, sum, táið havt verður í huga hin eyma virðing fyri góðum vinarlagi, hansara hátign hevur við kæra bróður sín, ikki kunna verða ásannaðar ella loyvdar, og kann eingin heimild verða givin teimum at fiska í nevndu høvum uttan umsjón og loyvi. Og eftirsum tað er hansara hátign nógv um at gera at halda og lúka allar høvdingaligar vinarlagsskyldur við nevnda kæra bróður sín og at rudda burtur allar klagur um mein og órætt gjørd móti fólki hansara av nøkrum av hansara hátignar tegnum hereftir, býður hansara hátign við hesum í hyggju eftir tilmæli frá hørrunum í loyniráðnum [Lordis of Secrite Council] skriving av brøvum, ið bjóða, áleggja og nokta einum og hvørjum av hansara hátignar embætismonnum og tegnum í hesum landi við almennari kunngerð á øllum plássum, sum neyðugt er, at eingin teirra vágar sær ella tekur sær fyri nakratíð hereftir at fiska undir Føroyum nærri enn land í eygsjón, men at teir lata íbúgvarnar av nevndu [oyggjum] eiga tað .... og aðrar tegnar hjá nevnda kærasta bróður hansara hátignar samsvarandi altjóðarættin, og verða brot á hesa fyriskipan sektað við tøku av skipum, førum og góðsi hjá brotsmonnunum og aðrari sekt til teirra eftir avgerð av hansara hátignar ráði, vissandi teimum, sum ikki akta, men gera tvørturímóti, um, at nevnda sekt og straff skal fara fram móti teimum uttan náði.»[1])

Hitt skjalið viðger mest fremmandan fiskiskap við Skotland, Oyrknoyar og Hetland, men sipar eisini til bretskan fiskiskap við Føroyar. Tað er soljóðandi í føroyskari týðing:

«Nevnda dag Thomas Cunynghame, sendimaður fyri býin Crail, Johnne Clapene, sendimaður fyri býin Anstruther, Johnne Kers, sendimaður fyri Pittenweem, og James Younger, sendimaður fyri Musselburgh og Fisherrow, tingandi persónliga í hjáveru av skotska ráðnum, eru samdir um sendiskriv beinleiðis sent býum teirra um hetta mál, og í spurningi, um teir ella grannabýir teirra royna fiskiskap við Føroyar, sum standa undir konginum av Danmørk, viðganga teir, at íbúgvar í teirra býum eru sekir í nevnda fiskiskapi, og at teir vóru drivnir til tess av neyð við vold og trýsti frá hálendingum, sum hvørt

[1]) National Library of Scotland, Edinburgh, Register of The Scottish Privy Council, vol. XI, p. 328.



ár koma við 2000 seglskipum (IIm sailes) og meira inn á hansara hátignar sjóøki og innan fyri fjórðing (myle) úr landi av Orknoyum og Hetlandi, og enntá ikki til friðs við úrtøkuna, sum fiskifrælsi teirra innan fyri nevnda mark árliga gevur teimum, leggja teir stórliga trýst á hansara hátignar fátæku tegnar og fiskimenn, steðga teimum, reka og jaga teir frá sínum fiskireiðskapi, kvetta teirra fiskinet, hótta teirra lív og tvinga harvið teir, sum eru fjøld av fátækum monnum, ið einki annað arbeiði hava at uppihalda húsi og heimi, at leita sær fiskiskap aðrar staðir fjart frá teirra egnu strond við stórum stríði, arbeiði, trupulleikum og útreiðslum.

Ráðið, sum hevur hoyrt vitnisburðin frá nevndu persónum, heldur, at trýst hálendinga á teir er ikki nøkur umbering fyri teir at leggja trýst av hasum slagi á tegnar hjá øðrum høvdingum, og at teir áttu ikki at hava fiskað í nevnda havi uttan loyvi og eftiransan. Tessvegna nevnda ráð frásigur teimum allan víðari fiskirætt inni í nevnda havi og fyriskipar kunngerð útsenda um hesi viðurskifti undir missi av skipi og góðsi og víðari straff, sum ráðið áleggur lógbrótarunum. Og nevnda ráð fyriskipar eisini bræv skrivað kongi kunngerandi hansara hátign tað trýstið, hansara fátæku tegnar líða undir frá hálendingum og heitir menniskjansliga á hansara hátign at geva hesum máli viðmæli hjá virkandi umboðsmanni í Hálandi (Esteatis), so hesin setir fram málið fyri stýrið har at skunda undir at bøta um hetta og beinan vegin seta forboð fyri hálendskar menn, so teir ikki við hansara hátignar strendur fiska nærri enn land í eygsjón (sight of land), men lata hesar grunnar hoyra hansara hátignar tegnum til samsvarandi alheims lóg.»[1])

Við klaguni frá føroyingum í huga síggja vit, at Kristian kongur í brævi sínum sigur við Jákup kong, at teir «í farnum døgum vinarligast lótu fyriskipa viðvíkjandi tegnum tygara, serliga skotum, reglur fyri sigling at oyggjum okkara Føroyum og byrjaðum royndum við fiskiskapi har á staðnum.» Heilt gamal skuldi størri skotskur fiskiskapur við Føroyar eftir hesum ikki verið í 1618, men sum áður nevnt hava skotar fiskað á føroyskum fiskigrunnum longu í 1591, og líkt kundi verið til, at slíkar reglur, sum Kristian kongur sipar til, enntá hava verið nýttar tá. Tað serloyvi fyri vanligt gjald, sum har var biðið um fyri tveir skotar, samsvarar við tað, ið stendur í skjali frá skotska ráðnum 1618: «og kann eingin heimild verða givin teimum [skotum] at fiska í nevndu høvum [við Føroyar] uttan umsjón og loyvi.» Gjald verður tó ikki nevnt her, men tað kann væl hava ligið aftan fyri orðini í tátíðar týdningi. Skotska ráðið sigur týðuliga, at allur sjógvur innan fyri land í eygsjón, sjálvsagt í klárasta veðri, er heimasjógvur eftir alheims lóg.[2]) Soleiðis ásannar skotska ráðið, at føroyingar vóru í sínum fulla rætti at klaga, og tað letur kunngera tað í øllum skotskum fiskibýum. Skotar høvdu einki at umbera seg við, uttan at hálendingar trongdu teir burtur av sínum egnum fiskileiðum, og ráðið bað tí Jákup kong gjøgnum sín sendi-

[1]) National Library of Scotland, Edinburgh, Register of the Scottish Privy Council, vol. XI, pp. 329—30. [2]) Kongs. Str., bls. 113 um bretsk sjónarmið: «påvirkninger fra Skotland,» víðari um landkenning í somu bók bls. 175—177, 180—194.



IACOBVS DEI gratia Magnæ Britanniæ, Franciæ et Hiberniæ Rex Fidei Defensor &c. Serenissimo Principi ac Domino Christiano quarto eadem gratia Daniæ Norvegiæ Vandalorum Gottorumque Regi, Duci Slesvici Holsatiæ, Stormariæ ac Dietmarsiæ, Comiti in Oldenburg et Delmenhorst, Fratri, Consanguineo Compatri et amico nostro charissimo Salutem perpetuamque fælicitatem. Ex literis nostris quas Domino Yone Charisio vobis perferendas tradidimus Ser: Vra: facile perspiciet, nos, de re piscatoria, circa Groenlandiam cum Mercatoribus nostris qui id commercium frequentant ex imperio nostro ea egisse quæ subditis vestris abunde satisfactura confidimus. Quod ad querelam de piscatione circa Fero attinet, haud ita subito respondere potuimus, quia expectandum tempus erat, dum Consiliarij Regni Scotiæ quorum id maxime intererat consuli possent. Et illi quidem examinata serius re, compertoque subditorum vestrorum querelas iusto fundamento inniti,





primo conuocatis ex omnibus oppidis præcipuis quibusdam qui eo nauigare solent, ijs voluntatem nostram verbis exposuerunt, mox edicto nostro nomine publicato monuerunt, vt eorum singuli a piscatione circa dictam Insulam in posterum abstinerent, et a subditis vestris quocunque alio modo molestandis abstinerent. Ita vt iam persuasum nobis sit, ex Ser: Vræ: animo et sententia hoc quoque negotium esse confectum, quomodo cætera alia omnia facturi sumus, quæ fraterno amori et arctissimæ illi quæ nobiscum intercedit amicitiæ possint conuenire. Deus Opt: Max: Ser: Vram: quamdiutissime saluam et incolumem conseruet. Dat: e Palatio nostro Westmonasterij 27 die Martij Anno Domini 1618

Ser. V. Frater amantissimus.

Jacobus R

Mynd 4. Bræv frá Bretlands kongi Jákupi fyrsta til Kristians fjórða, kong Danmarkar og Noregs, dagssett 27. mars 1618. Í brævinum viðgongur Jákup kongur, at bretar skulu ikki fiska við Føroyar.

mann í Hálandi syrgja fyri, at hálendskir fiskimenn hildu seg uttan fyri land í eygsjón við tær skotsku oyggjarnar. Jákup I framførdi kravið fyri hálendska stýrið, men hetta aftraði seg við at góðtaka tað. Hálendskir fiskimenn fingu tí onga kunngjørda noktan um at fiska við Skotland innan fyri land í eygsjón. Fyrst 1623 fingu teir kunngerð um bert ikki at fiska ov nær Skotlandi og teim skotsku oyggjunum.

Slík ummæli í fiskimarksspurningi fekk Jákup kongur frá hinum skotska ráðnum, og ivaleyst hevur hann síðan ráðført seg við ríkisstýri sítt í London, áðrenn hann sendi Kristiani kongi IV svarbræv aftur. Spurningurin um Grønland var eisini frammi í teirri tíðini, og hann kom tí við í tað brævið, bretakongur sendi Kristiani IV hin 27. mars 1618. Umsett ljóðar brævið soleiðis:

«Jákup av Guds náði kongur av stóra Bretlandi, Fraklandi og Írlandi, verji trúarinnar o. s. fr. til hin miskunnsama høvdinga og harra, Kristian hin fjórða, kong Danmarkar, Noregs, Venda og Gota, hertogi av Slesvík, Holstein, Stormarn og Ditmarsken, greiva av Oldenborg og Delmenhorst, bróður okkara og likamliga svág og kærasta vin, heilsan og [ynski um] æviga sælu.

Av brævi okkara, sum vit hava latið Jonas Carisius flyta tygum, hava tygara hátign skjótt sæð, at vit í spurninginum um fiskiskap við Grønland hava samráðst við keypmenn okkara, sum eftir okkara fyriskipan hava henda handil um hendur, soleiðis sum vit eru fullvísir í, tegnar okkara eru nøgdir.

Hvat ið viðvíkir stríðnum um fiskiskapin við Føroyar, hava vit ikki kunnað svarað tygum beinan vegin, tí vit noyddust at bíða, til ráðharrarnir í Skotlands kongaríki, sum í hægsta stigi hava áhuga í málinum, kundu verða ráðspurdir, og hesir hava, eftir at málið er gjølla kannað, og klagan frá tegnum tygara á rættvísum grundarlag er vorðin greið, fyrst samankallað úr øllum teim mest týðandi býum teir menn, sum eru vanir at sigla hagar, og munnliga framført okkara vilja og harnæst við einum í navni okkara kunngjørdum boði mint á, at hvør teirra fram í tíðina skal lata vera at fiska við nevndu oyggjar og halda seg frá at ørkymla tegnar tygara á nakran hátt. Soleiðis eru vit fullvísir í eftir tygara hátignar sinni og frásøgn, at hetta mál er endað somuleiðis, sum vit yvirhøvur vilja samskipa alt annað á tann hátt, sum tað við bróðurligum kærleika kann søma seg fyri hin alnæra vinskap, ið er okkara millum.

Hin algóði og alvaldi Gud varðveiti tygara hátign sunnan og raskan so leingi sum møguligt.

Givið á sloti okkara Westminster h. 27. mars í hinum Harrans ári 1618.

Tygara hátignar alkærasti bróðir

*Jacobus R.*»[1])

Jákup kongur ásannar, at skotar – og ætlandi allir ríkisins tegnar

[1]) D. D. R. A., breve og indberetninger fra Carisius, Island og Færøerne, suppl. 2; harí eisini bræv 22. nov. 1617.



– skulu í framtíðini halda seg frá at fiska við Føroyar og soleiðis ikki ørkymla føroyingar í teirra vinnu. Hetta fall saman við tað, sum Kristian kongur kravdi, og tað var meira, enn bretakongur nakrantíð hevur viljað ásannað viðvíkjandi Íslandi og Finmørkini. Í brævi frá Kristiani kongi IV til bretakongs 26. septbr. 1603 er talan um at seta fiskimarkið fyri bretar um Ísland 2 «milliaria Danica» ella 8 fjórðingar úr landi, men í havinum um Føroyar hevði dansk-norska stýrið noktað bretlendingum loyvi at fiska, tó soleiðis, at serloyvi kundi verða givið einstøkum monnum. Í varðveittum skjølum síggja vit hetta kravið fyrst góðkent av bretskum myndugleikum í brøvunum frá skotska ráðnum 12/3 1618 og í nevnda kongliga bretska skjali 27/3 1618. Havið uttan fyri Føroyar í eygsjón – sight of land – hevur skotska ráðið ivaleyst ikki roknað við til føroyskt havøki.

Ikki mega vit trúgva, at bretlendingar hildu seg heilt burtur frá Føroyum eftir 1618, men at døma eftir teirri elstu løgtingsbókini er tó týðuligt, at tey fyrstu árini aftaná, helst eftir 1619, bera ikki nógv bretsk fiskiskip við Føroyar. Innan hesa tíð hava tey ivaleyst verið vanligir gestir í Føroyum um summarið, í hvørt fall í Tórshavn. Harum vitnar sakarmál móti Wendel Mathisdatter í 1618, sum vísir, at tvey konufólk í Havn høvdu brigslast við orðum sum «skotske flag» og «skotske rylle».

Land í eygsjón kann ikki sigast at vera gjølla sett fiskimark, og í brævi 13. des. 1631 síggja vit, at Kristian kongur IV letur Karl I av Bretlandi[1]) vita, at hann um Føroyar ætlar at halda fiskimarkið «sex milliaria» ella minst 24 fjórðingar úr landi. Skjótt man Kristian kongur tó hava broytt sína hugsan í hesum spurningi, tí longu í brævi til íslendska handilsfelagið 16. des. 1631 og seinri 16. apríl 1636 hevur hann sagt, at 4 «milliaria» ella 16. fjórðingar úr landi skulu galda fyri bretar sum fiskimark og sjómark um Føroyar.[2]) Hetta er tað sjómarkið, sum føroyingar seinri síggjast at hava roknað við. Soleiðis sigur Jóan Jústinusson løgmaður í brævi 8. septb. 1647, hvar hann mótmælir hinum stranga handilsforboðnum, hetta árið kom í gildi, at honum tykir tað løgið, «at vore folk, når de ere fire, fem eller seks mile ude på havet, ikke skal måtte tale med skib.» Her er óivað mest talan um bretsk fiskiskip, sum, heldur hann, føroyingar væl áttu at kunna selt nakrar fiskar í býti fyri øl og breyð uttan at vera lógbrótarar. Táið løgmaður nevnir 4 míl úr landi (16 fjórðingar) og út eftir, vil hann óivað harvið siga, at har úti kundi einahandilin ongan rætt hava, tí hetta var uttan fyri sjómark.

Tær míl ella «milliaria», sum í fyrra helmingi av 17. øld eru nevndar í skjølum, merkja ivaleyst stundum norskar og stundum danskar míl. Fýra míl ella 16 fjórðingar úr landi er ytsta havmið, menn nú á døgum vita um, at føroyingar hava roynt. Hin gamla norska mílin var nakað longri enn hin danska. Í skrivi 26. septbr. 1603 stendur danskar míl ella «milliaria Danica». Tað í gomlum donskum skrivum, sum nevnist «ugesiøs» ella «vike sjø», sipar í hvørt fall til gamlar míl. Henda mílin lá um 9 km í Noreg, í Danmark minni. Í fornmálinum æt hetta vika sjóvar = 1 róðrarskifti hjá vík-

[1]) Sonur Jákups I (1625–49). [2]) Kongs. Str. bls. 218.

ingum. Í norskari uppfatan gjørdist hetta eitt sindur longri, men um og eftir ár 1600 man mílin í dansk-norskum týdningi hava nærkað seg at hini seinri kendu longdareindini 1 míl = 7532,48 m.

Í gabelstíðini lá spurningurin um fremmandan fiskiskap við Føroyar soleiðis fyri, at Bretland tigandi hevði góðtikið kravið frá dansk-norska konginum, sum var 16 fjórðinga sjó- og fiskimark um Føroyar. Mótmæli um hetta frá Bretlandi finnst ikki. Í tíðini eftir 1640 gjørdist Oliver Cromwell mest sum einaráðandi í Bretlandi, og landið gjøgnumgekk eina kollveltingartíð. Hitt tá fastsetta sjómarkið hevur tó goldið eftir Cromwells tíð. Gabels handil sendi 1688 skiparan Carsten Poulsen til Føroya við skipinum «Justitsia» at ansa eftir fremmandum fiski- og loynikeypsskipum og taka tey innan fyri 4 míl úr landi.[1]) Aftur 1698 álegði sami handil Niels Zachariassen av Eiði sum førara av sama skipi ella einum tá í gerð verandi 10-manna-fari at røkja hesa somu skyldu yvir fyri teim fremmandu, sum komu til Føroya.[2]) Hóast hesi strongu forboð vísa løgtingsbøkurnar, at bretlendingar íðuliga komu til Føroya bæði fyri at selja og keypa vørur í loyndum og sum fiskimenn. Eisini hálendingar eru at finna á hesum leiðum.

### Viðmerkingar um almennu søgu sjómarksins:

Romarætturin roknaði við, at havið var frítt at ferðast á og njóta fyri øll í friðartíð. Italskur rættur í miðaldri (Genua og Venedig) setti upp 100 milliaria úr landi sum sjómark (1 milliaria = 1478 m).

Gamal norrønur rættur roknaði við, at land fram við strond átti nýtsluna av havinum uttanfyri. Soleiðis kravdi Noregsveldið alt ræði á havinum vestur at Grønlandi, og fekk tað tí navnið norska havið. Seinri var útmarkið fyri hetta ræði ella tað, vit kalla sjómarkið, sett til at vera landkenning ella land í eygsjón. Undir ávirkan av hesi áskoðan var Skotland, meðan Miðeuropa (Frakland, Háland og Ongland) royndi at byggja sína áskoðan á rættin yvir havinum á romarættin og gamlan italskan rætt, sum illa fingust at hóska saman.

Eftir at skotvápn, kanón, kom í brúk, hildu summir rithøvundar, at veldið hjá einum landi yvir havinum, rakk ikki longri enn kanónin bar, og henda skotvíddin varð skjótt sett at vera 3 fjórðingar. Hesin tankin kom fyrst til sjóndar hjá Hugo Grotiusi í bókini: *Mare Liberum* 1609.

Hitt norrøna sjómarkið, sjónarvíddin ella landkenningin, var skjótt eftir ár 1600 sett at vera 4 míl, sum kanska vóru longri tá enn nú. Sjónarvíddin var hildin at vera hitt mest hóskandi sjómarkið, helst eftir at Stuartarnir við Jákupi I úr Skotlandi fingu valdið í øllum Bretlandi. Í hesum anda gav bretin Selden út bók 1635: *Mare Clausum*, um hitt stongda havið. Skjótt vann tó áskoðanin um tríggja fjórðinga sjómarkið meira viðhald í Bretlandi og harvið í Norðurameriku, og undir bretskum heimsveldi um og eftir ár 1700 fekk henda hugsanin víða hvar størri undirtøku. Uppfatanin av fiskimarkinum fall tó ikki altíð saman við sjómarkið í teim ymsu londunum.

[1]) N. A. Fær. bls. 134. [2]) K. B. bls. 108.



Stundum gekk hetta longri út enn sjómarkið, hvar landsins lóg og rættur galt innan fyri.

Undir hesum brótingum í millumlanda áskoðan um sjó- og fiskimark kom dansk-norska ríki so líðandi at ganga frá sínum gamla 16 fjórðinga sjómarki fyri seinri at fastseta eitt 4 fjórðinga sjó- og fiskimark fram við sínar strendur, roknað frá ytstu hólmum, flúrum og flesjum á hægstu fjøru við beinum linjum um innvik. Hetta er týðuliga sagt í kongligari avgerð 22. februar 1812.

Viðvíkjandi sjó- og fiskimarki vóru Føroyar og Ísland ikki bundin av kongligum avgerðum, uttan at londini serliga vóru nevnd í slíkum reglum, so avgerðin 22. febr. 1812 kann ikki hava goldið fyri Føroyar og Ísland, sum óivað enn einki annað sjó- og fiskimark høvdu, í hvørt fall Føroyar, enn 16 fjórðinga markið. Táið kapt. Bille 1674 fór til Íslands við herskipi at ansa eftir sjómarkinum har, varð honum tó álagt at taka fremmandar innan fyri 12 fjórðingar úr landi, men í Føroyum sæst enn Gabels handil, sjálvsagt eftir kongsboðum, at hava hildið 16 fjórðinga mark um ár 1700. Í 1836 svaraði rentukamarið eftir fyrispurningi frá Bretlandi, at bretar høvdu loyvi at fiska við Ísland, táið teir hildu seg 4 fjórðingar ella 1 míl úr landi, men tílíkt loyvi sæst aldri at vera givið viðvíkjandi Føroyum.

Fyrst við Norðsjósáttmálanum 6. mars 1882 tekur Danmørk við tríggja fjórðingamarkinum saman við Bretlandi, Hálandi og Týsklandi, men hvørki Føroyar ella Ísland komu tá inn undir hesa avgerð. Hin 24. juni 1901 — altso 19 ár seinri — gjørdu so Danmørk og Bretland sína millum sáttmála um, at tríggja fjórðinga sjó- og fiskimark eisini skuldi galda við Føroyar og Ísland. Við hesum 1901-sáttmála varð hitt gamla 16 fjórðinga sjó- og fiskimarkið fyrst sett úr gildi viðvíkjandi Føroyum.

### c. Loynihandil.

Onkuntíð miðskeiðis í miðaldri komu Føroyar undir einahandil. Líkt kann vera til, at einahandilin her á landi hevur tikið seg upp, eftir at Magnus kongur løgbøti gav rættarbót sína fyri Føroyar 1273,[1]) hvarvið hann lovaði at lata tvey handilsskip ganga millum Noregs og Føroya á hvørjum ári. Ivaleyst hevur kongur eftir hetta leigað einstøkum monnum handisskapin við oyggjarnar, men aðrir hava altíð av og á sníkt seg inn á landið við sínum handilsskapi. Slík eru viðurskiftini í Føroyum, táið handilin í oyggjunum søguliga kemur undan kavi í 16. øld. Eitt árið Magnus Heinason hevði handilin í Føroyum undir sær — tað var í 1580[2]) — var t. d. eitt skip úr Hamborg komið til Føroya fult av vørum tíðliga á vári. Tað hevði selt vørur sínar og keypt hópin av føroyskum vørum í staðin. Táið Magnus beint aftaná kom fram við sínum handilsskipi, høvdu nógvir føroyingar gjørt seg av við allan handilsskap tað árið, og hetta minkaði nógv um handilin hjá Magnusi.

[1]) Dipl. Fær., bls. 23 og bls. 31. [2]) A. C. E., skjal 157 og 159.

Slíkur loynihandil er fleiri ferðir nevndur í skjølum, men vit fáa fyrst meira at vita um hann, eftir at hin elsta løgtingsbókin tekur við í 1615, og sjálvt tá fáa vit bert nakað at vita um tey loynihandilsmál, sum komu fyri rættin. Tey, sum ikki komu fyri rættin, fáa vit aldri nakað at vita um. Tey vórðu duld sum mannsmorð, júst tí tey skuldu ikki koma fyri rættin, og sjálvt um nakað av sjóráni fór fram í samband við slíkan handil, kom tað av somu grund aldri fram.

Táið sáttmálin við Bretland um sjó- og fiskimarkið við Føroyar kom í lag 1618, var skilið við loynihandli vorðið út av lagi; men eingin maður sæst tó at vera komin fyri rættin og dømdur fyri henda ólógliga handil. Løgtingsbókin talar um, hvussu tær bestu vørurnar av landsins úrdráttum verða seldar gjøgnum loynihandil, og hvussu hin regluligi handilin hevur tap av tí. Sjálvur fútin var parthavari av hinum regluliga handlinum, men hann tykist tó aldri at hava reist sakarmál móti monnum fyri óregluligan handil. Líkt er til, at hann hevur ikki torað. Hann skuldi sum allir menn í Føroyum við ábyrgd hava skotsmál frá løgtingi. Illa ber til at hugsa, at hann sjálvur hevur átt lut í hesum óregluliga handli. Í 1619 sigur løgtingsbókin enntá, at menn fara um landið við vørum at selja, sum teir hava fingið við slíkan ólógligan handil; hetta tykist mest at hava verið drykkjuvørur.[1])

Brævið, sum føroyingar sendu kongi 1615 við klagu um ófrið av fremmandum á Vestmanna, tykist at hava fingið eitt heldur merkiligt svar í 1616,[2]) og tað er ikki til at misfata, at Strange Madssøn fúti, sum var í Keypmannahavn á vetri 1615—16, og sum var parthavari í handlinum á Tinganesi, hevur verið atvold til, at slíkt svar kom. Kongur talar einki um sjórán við Føroyar ella ólógligan fiskiskap, men kemur bert við einum nýggjum forboði til føroyingar móti ólógligum handli og hóttir teir, ið finnast sekir í slíkum, við straff. Hann tekur soleiðis til:

«Vider, at eftersom Vi kommer udi forfaring, hvorledes fremmede nationer, engelske og andre, understår dennem at komme der til landet og der at bruge købmandsskab med eder, uanset at det er imod Vore breve, som vi nådigst haver givet dennem, som forn. Vort land af Os udi forpagtning haver, hvilket forårsager, at når de, som haver forn. Vort land udi forpagtning, til eder ankomme, lider derover stor skade, da bede Vi eder og ville så og hermed alvorligen og strengeligen befale, at I efter den dag alene med dennem, som forn. Vort land forpagtet haver, bruger eders handel og med ingen fremmede. Dersom nogen findes herimod, eftersom forskrevet står, at gøre, da at straffes som vedbør.»

Í samband við umtaluna av handilsviðurskiftunum letur so fútin hesi orð falla á løgtingi 18 juni 1616:[3])

«Så befindes stor utilbørlighed hos en part af indbyggerne her udi Færø, så at der hemmeligen udsendes af landet skind, fjeder og mere andet udaf den bedste slags vare, købmanden aldeles uvitterligt, hvorudaf købmændene, som landet haver forpagtet af kongelig majestæt, lider stor skade.

---

[1]) Lb. fol. 74 b: «Om opsnappere, som fare om landet og sælge øl og brændevin.»
[2]) Lb. fol. 14 b. [3]) Lb. fol. 16 a.



En part af indvånerne her i landet handler og købslager med engelske og andre fremmede, som er imod kongl. majestæts breve og mandat. Derfor skal enhver nu hermed være advaret, på det de herefter ikke videre skulle komme udi skade.»

Tey komandi árini síggja vit, hvussu fútin javnliga spyr sýslumenninar á løgtingi, hvørji fremmand skip hava verið í havn í sýslum teirra, og um tey hava havt loynihandil fyri. Løgtingsbókin sigur, at sýslumenninir lovaðu at svara skrivliga; einki sæst bókført, um svør eru komin. Óivað hevði hetta nakað at gera við tað, sum fór fram 1617—18 viðvíkjandi fiskimarkinum. Um bretskan fiskiskap undir Føroyum er einki sagt í løgtingsbókini 1619, men loynihandilin man hava verið stórur hetta árið. Fútin, Strange Madssøn, gjørdi tó aldri nakað við hetta, men táið nýggjur fúti kom 1620, hevur alt loynihandilsmálið verið tikið til kanningar, og tá kemur fram fyri dagin, hvussu umfatandi hesin loynihandil hevur verið, og at landsins fremstu menn gingu á odda í honum.

Hin 20. apríl 1620[1]) fingu Føroyar nýggjan fúta, Mads Christensøn borgara í Visby, tí nevndur Gotlandsfari. Samstundis missir hitt gamla handilsfelagið, sum Strange Madssøn hevði verið parthavari av, handilsrætt sín, og hitt sonevnda íslendska handilsfelagið fekk tá onkarrætt til allan handil í Føroyum. Hesin nýggi fútin tykist at hava sæð, at nógv óskil hevði verið í landinum.[2]) Hin 14. august 1620 spyr hann um ymist á tingi, harímillum loynihandilin.[3]) Um hetta sigur løgtingsbókin:

Samme dag fremkaldte kongl. majestæts foged, Mads Christensøn, alle Hans majestæts sysselmænd her udi landet og dennem tilspurgte, hvormange engelske skibe der haver været under hver ø i sommer, og hvad skippernes navne haver været, og hvad by de haver været hjemme udi, og om en fortegnelse på alle deres navne, som haver købslaget med dennem, og hvad enhver haver købslaget udi hver ø, at jeg derpå måtte bekomme en rigtig fortegnelse, som de vilde ansvare, hvilket alle sysselmændene lovede at skaffe hannem skriftligen.»

Slíkan skrivligan vitnisburð frá sýslumonnunum, sum fútin kundi nýta sum grundarlag, tykist hann at hava fingið beinan vegin, hóast vitnisburðirnir ikki standa í løgtingsbókini, tí longu 17. august 1620[4]) leggur fútin fram fylgjandi klagumál á tingi:

«Eftersom findes bevisligt efter alle sysselmændenes fortegnelse, de mig derpå givet haver, på hvis købmandsskab både en del af præsterne såvel som lagmanden og den meste del af lagretten så og den største del af almuen her udi landet med de engelske denne forleden sommer bedrevet og begået haver, uanset at sådan ulovlig købmandsskab er imod begge velbyrdige hr. rentemesters skrivelser, som de gode herrer efter Hans majestæts befaling mig tilskrevet haver, så og imod Hans majestæts eget udgivne brev anno 1616, hvilke breve er dennem lovligen forkyndt og forelæst, og de alligevel sådan Hans majestæts breve og strenge forbud ikke haver villet agte, men som modvillige og uhørsomme undersåtter haver aldeles gjort derimod,

---

[1]) Lb. fol. 85 a. [2]) Lb. fol. 86 b. [3]) Lb. fol. 94 a. [4]) Lb. fol. 96 a.

formener jeg mig på Hans majestæts vegne sådan deres grove forseelse at være sket udimod Hans majestæts højhed.

Sætter jeg derfor i al rette på Hans majestæts vegne for lagmanden og menige lagretten og er dom begærende om alle de, som i så måde haver forgrebet sig imod Hans majestæt, om de ikke haver forbrudt deres lejemål, og hvad deres bøder og straf bør at være efter loven.

Datum Thorshavn den 17. august anno 1620.

*Mads Christensøn.*»

Her hava nógvir týðandi menn verið sekir, og beint aftaná stendur eisini í løgtingsbókini:

«Anno 1620 den 17. august blev dette forsæt læst på lagtinget udi Færø, og blev denne sag efter præsternes, lagmandens og menige lagrettesmænds begæring opskudt til næstkommende år, at de imidlertid kunde besøge Hans majestæt og hr. kansler med deres skrivelse, at Hans majestæt vilde for Guds skyld ganske forlade dennem deres store forseelse.»

Onkur av hesum monnum, helst Sakaris Tormóðsson løgmaður, man vera farin av landi um heystið 1620 við skrivi frá tinginum til kongs við tí í kvittan at fáa ríkisstýrið til at lata hetta sakarmálið falla. Løgtingið hevur bert hugsað um at sleppa sær burtur úr fløkjuni. Tað hevur als ikki hugsað um at vinna fríari handilsræsur á landi. Heldur ikki tykist tað at hava havt í kvittan at reisa klagu móti hinum gamla handilsfelagnum fyri misrøkt av føroyskum handilsviðurskiftum og enn minni móti fyrrverandi fúta, Strange Madssøn, fyri misrøkt av fútastarvinum, hóast løgtingsbókin málber seg soleiðis um skilið 1619:

«Inde på lagtinget blev klageligen berettet, at en part husmænd og tjenestedrenge, desligeste flere andre bissekræmmere, fare nu omkring landet og på bygderne og udsælger både øl og brændevin i kandetal og skindetal udi forprang etc.

Blev så påsagt, at hvem som hermed befindes efter denne dag, skal have forbrudt både øl og brændevin til de fattige udi hospitalet, og skal sysselmændene udi hver ø derpå have flittigt indseende.»[1]

Straff tykjast hesir persónar onga aðra at hava fingið, enn at ølið og brennivínið skuldi verða tikið frá teimum og givið hospitalinum á Argjum, helst til nýtslu.

Kongur tykist at hava bønhoyrt løgtingið viðvíkjandi sakarmálinum, tí hóast tað skuldi koma fyri á tingi árið eftir, verður ikki orð mælt um tað.

Um bretskan fiskiskap undir Føroyum beint eftir fiskisáttmálan av 1618 er einki sagt, men loynihandilin hevur verið nógvur, og tað er at leggja til merkis, at táið fútin spyr um henda loynihandil, vil hann bert vita, hvussu nógv og hvørji skip hava verið í havn. Fútatiltakið 1620 tykist at hava steðgað loynihandlinum, tí fylgjandi ár

1) Lb. fol. 74 b.



sigur løgtingsbókin einki um slíkt. Fyrst 1624 verður sagt nakað, ið bæði kann sipa til fiskiskap og loynihandil:

«Sammeledes tilspurgte kongl. majestæts foged, Mads Christensøn, alle kongl. majestæts sysselmænd, om de ikke vidste ungefær, hvormange engelske og skotske skibe her haver været under landet og fisket i år, om de haver nogensteds været i havn, item om de vidste ikke, hvad deres navne var, og hvor de havde hjemme.

Hvortil alle og enhver besynderlig svarede, at de engelske og skotske skibe, som nu på en tid lang haver været her under landet, haver været altfor mange for dette fattige land.»[1]

Her síggjast bretsk fiskiskip at hava verið undir Føroyum um 1624, men einki sæst um, at tey hava havt loynihandil fyri, ella um tey hava fiskað nær landi. Tað tykist veruliga sum, at skipini hava hildið seg longri burtur, men tey hava verið undir oyggjunum, kanska ikki í so stórum tali sum áður. Heilt nógv kunna tey ikki hava verið innarlaga, tí føroyingar fingu júst hesi árini rættuliga nógvan fisk á bátaleið.

Eftir 1618 tykjast bretsk skip at hava hildið seg burtur frá Havnini, og teirra samband við land hevur tá mest verið við úthavnir í Føroyum. Undir «Dráp og serlig brotsmál», sakarmál VII frá 1623,[2] sæst eisini, at bretsk skip tá hava ligið á Funningsfirði. Somuleiðis síggja vit, at tey um 1630 mega vera komin nógv inn á henda fjørð.

Í 1631 var Andras Ísaksson í Funningi farin til Bretlands at vitja konubróður sín, sum var búsitandi har. Hann man vera farin av stað við bretskum skipi uttan loyvi frá fútanum. Hetta sæst av sakarmáli, sum var reist móti Ísaki á tingi 1632. Kona Ísaks var deyð, og eftir slatri um, at hann skuldi hava havt við konusystur sína at gera, var Ísakur stevndur. Prógv kom einki fram, og maður konusystur Ísaks avnoktaði tað eisini. Tí varð Ísakur fríkendur og fekk bert bót fyri uttan loyvi frá fútanum at vera farin av landi.[3]

Hvussu óvon fólk hava verið við at síggja fremmand skip á Havnini, sum fráleið 1618, og hvussu bangin tey hava verið fyri teimum — turkaránið í Hvalbø 1629 gjørdi kanska sítt — vísir hending 10. mai 1634, táið Jans Kandell frá Wales í Bretlandi kom siglandi inn á Havnina, og Havnar skansi loysti skot eftir honum.[4]

Aftur í 1636 sæst fútin at hava spurningin til sýslumenninar um loynihandil frammi á tingi, og málið vitnar um, at bretsk fiskiskip nú hava verið nakað nógv undir Føroyum. Fútin spurdi:

«hvor mange engelsker der haver været i hver deres ø, og hvad almuen med dennem købslaget haver,»

men sýslumenninir svaraðu:

«at hvad engelsker var anlangende, da vidste de ikke, at de engelske haver bedrevet nogen købmandsskab i nogen af øerne, thi det er ikke uden små fiskere og haver selv lidet eller slet intet uden tyndt couert [øl] og noget brød.»[5]

Aftaná spyr fútin Vága sýslumann, Bertel Danielsøn, hvat hin hálendingurin, sum var settur inn í Vágum undan óveðri, hevðist at har í oynni. Bæði sýslumaðurin og presturin, Oluf Bodilsøn, svaraðu,

1) Lb fol. 142 a. 2) Sjá bls. 30. 3) Lb. fol. 195 b — 196 a. 4) Lb. fol. 214 a. 5) Lb. fol. 225 a og b.

at teir høvdu handlað eitt sindur við hann. Handilin í Tinganesi hevði beint ta vrakað 60 hosupør hjá sýslumanninum og 50 hjá presti. Sýslumaðurin hevði keypt frá hálendinginum 2 tunnur av øli og 1 av tjøru, og hetta var tá ikki at fáa við handilin í Havn. Prestur segði, at hann heldur vildi selja hálendingum hosurnar enn brenna tær ella kasta tær burtur, og at hann helt seg ikki handla í stríð við kongl. handilsrættindi, um hann frá hesum fremmanda til hús⸗brúks keypti sær eitt sindur av øli og breyði, táið hann ikki kundi fáa tað frá handli í Havn.[1])

Suðuroyar sýslumaður, Jákup Hálvdansson, vitnaði, at sami há⸗lendingur aftaná hevði verið inni á Hvalbø:

«Da haver nogen arme folk udaf stor hungersnød kommet til sam⸗me skib og bedet skipperen, at han for Guds skyld vilde hjælpe dennem i deres store hungersnød med en tønde mel, og var 20 fat⸗tige stakler om en tønde mel at købe, så at de fattige folk havde en såre ringe ting at give hannem for samme mel. En part af den⸗nem tog hoserne af benene og gav hannem i betaling, så at skippe⸗ren mere anså deres store hunger og elendighed end, hvis betaling han fik derfor, og lå der ikke uden en nat og løb derfra til Irland.»

Skipið hevur týðuliga verið eitt hálendskt loynikeypsskip, men nøkur verulig ákæra og dómur sæst ikki at vera farin fram í mál⸗inum. Mjøl tykist handilin at hava havt hetta árið. Orsøkin til, at eingin ákæra varð reist, mundi tó nógv vera tann, at handilin var í uppisetri við fleiri vørur. Væl kann tað vera, at sýslumenninir hava ikki avmyndað standin betri, enn hann var; men tað kann tó ikki skerast burtur, at í Hvalbø hevur ein partur av fólki um várið 1636 livað á hungursmarkinum. Tað er at minnast til, at Suðuroyggin lá serliga illa fyri at fáa vørur úr Havn við báti um veturin.

Í 1637 hevur fútin hin sama spurningin um loynikeypsskap frammi á tingi, og svarið frá sýslumonnunum er hitt sama viðvíkjandi bretskum fiskiskipum.

Um somu tíð hevur fútin spurning frammi um eitt stórt enskt skip, sum um várið hevði verið inni í Vágum, og vildi hann hava at vita, um fólk høvdu handlað nakað við tað. Bæði løgmaðurin og sýslumaðurin svaraðu, at teir helst vildu, at hetta skipið aldri var komið har á leið:

«Det var et såre stort skib og havde 18 stykker [kanónir] på, og sagde sig [kaptejnen], at han vilde hen til det ny England. Købmands⸗skab bedrev han der ikke stort uden aleneste, at han købte nogle mere og gamle heste og nogle får, som han sagde at ville føre med sig til forn. land; fjeder eller anden færøsk vare begærede han ikke, og ej heller gjorde han nogen noget ondt og lå der udi havnen udi 4 dage og løb derfra til Vestmanhavn og lå der udi 8 dage, hvor han og købte nogle mere og heste og får, og formente lagmanden og Bertel Danielsøn med flere fattige folk, at de ikke med sådant købmandsskab haver forgrebet sig imod hans majestæts strenge breve og forbud.»[2])

Dóm gjørdi tingið ongan í hesum máli, og her lá heldur eingin

[1]) Lb. 225 b. [2]) Lb. fol. 236 a.



loynikeypsskapur aftanfyri. Uttan at skilja tað vóru føroyingar her komnir saman við fólk í flutningi, búreisingar úr Bretlandi, sum leitaðu vestur um hav fyri at stovna nýggj heim í Nýonglandi (New England) í Ameriku. Hvat skuldu slíkt innilæst oyggjarfólk, sum føroyingar vóru, vita um tann mikla vesturgangandi fólkastreym, ið tá var á veg til Ameriku? Hesir búreisingarnir hava bæði fingið seyð, neyt og ross við sær úr Føroyum vestur um hav.

New England er sjálvt landsynningshornið av sambandsstátunum við státunum: Maine, New Hampshire, Vermont, Massachusetts, Rhode Island og Connecticut. Frá árinum 1620 nomu puritanarar úr Onglandi land á hesum amerikanska øki, og ivaleyst hava tað verið puritanskir flutningsmenn, sum hava verið inni í Vágum og Vest⸗manna 1637. Teir hava roynt at fáa sær húsdjór aftrat úr Føroyum, kanska eisini djór til matna. Óivað hava konufólk verið við í skip⸗inum, men óvist er, um føroyingar hava sæð tey.

Í hesum árunum stóð hart politiskt og trúarligt stríð í Bretlandi, hvar Karl kongur hin I royndi at økja vald sítt á kirkjuni og parla⸗mentinum. Puritanarar, sum trúarliga vóru fyri happinum, leitaðu tá í hópatali vestur um hav, og hesir gjørdust ein aðalkjarni, sum sam⸗bandsstátirnir seinri komu at byggja sína mentan á. Áður var presta⸗sonur úr Havn, Jónas Bronck, fluttur til Ameriku og hevði búsett seg har, sum New York nú liggur,[1]) men um hetta mundu føroy⸗ingar tá ikki hava nakra vitan.

Í 1643 finna vit fyrstu ferð navnið *Johan Fermus* í tingbókini. Fermus var enskur skipari og skipseigari, sum gjøgnum mong ár tykist at hava havt loynikeypsskap við føroyingar, helst í samband við fiskiskap undir landinum. Hann er áður nevndur undir málinum, táið Guttormur í Gerðum varð avsettur sum Norðuroya sýslumaður.[2]) Í 1619 sigur tingbókin, at fulltrúi fútans, Rasmus Pedersøn, klagar á løgtingi um, at Norðuroya sýslumaður, Sakaris Pætursson á Viðar⸗eiði, hevði verið óhøviskur í orðum móti honum. Í sama sambandi verður sagt:

«Svarede forn. Zacharias Pedersøn og sagde, at han intet havde sig at beklage på Strange Madssøn eller Rasmus Pedersøn i nogen måde for deres person og takkede dennem ære og gods [hann bað fútan um fyrigeving á tingi í 1618 og lovaði betring] i alle måder uden alene om det skibsvrag, som var kommen til skade der i Norder⸗øen, som en part mener, Zacharias der ikke med havde handlet, som loven formelder. Mente forn. Zacharias, han ikke havde handlet an⸗derledes med, end lovligt og forsvarligt kunde være, om hvilket han sig herefter ville ydermere erklære og forklare.»[3])

Sakarmálið í 1643 vísir, at tað má vera skip hjá Fermusi, sum í 1619 er farið á land í Hvannasundi. Fermus hevur helst nýtt vanligt bretskt fiskifar til loynihandil sín. Hann hevur óivað verið undir Føroyum stutt aftaná, men hin strangara eftiransanin, sum hin nýggi fútin og hitt íslendska handilsfelagið førdu tey fyrstu árini frá 1620, man hava gjørt Fermus meira varnan. Um hann hevur roynt fiski⸗skap, man hann eisini hava ligið longri til havs hesa tíðina. Í 1643

[1]) Býarparturin The Bronx hevur navn eftir honum. [2]) Sjá bls. 42. [3]) Lb. fol. 15 b.

er Fermus eingin ungur maður, tí hann hevur tá tilkomnan son við. Fútin reisir nú sakarmál móti Fermusi, men løgrætturin fríkennir hann. Fermus var tá ein kendur maður í Føroyum.[1]) Sum mynd av tíðini skal sakarmálið móti Fermusi alt verða endurgivið:

«Anno 1643 den 29. april efter ærlig velagtet og forstandig mand, Mads Christensøn, kongl. majestæts foged på Færø, hans begæring, er vi underskrevne Joen Justinussøn lagmand, Simon Thomassøn, Augustinus Lydersøn, Bertel Danielsøn, David Olsøn, Gregers Poul-søn og Joen Thomassøn lagrettesmænd udmeldte, at vi skulle kende og dømme på en engelskmand ved navn Johan Fermus, som her under landet skal have sejlet fra et sted til et andet med sin købmandsskab, som er imod Hans majestæts forbud.

Da eftersom Johan Fermus er hid til landet ankommet med et lidet fiskerskib, og samme skib stødte for hannem og blev borte på samme tid på Norderø, og han da bjergede, hvis han havde inde, det mest muligt var, og solgte deraf både af skibsvraget, gods, sejl og andet mere til en part af indbyggerne her på landet, som de bleve hannem skyldige for, og siden derefter er han hidkommen at indkræve, hvis hannem tilstod og ikke kunne det bekomme, er så borte bleven en lang tid og ikke været her under landet.

Dog for en tre år siden er han igen kommen at indkræve, hvis hannem tilstod, for hvis han haver solgt, som forskrevet står, og da i lige måde som tilforn mistet sit skib, formedels at en engelskmand skød hans skib i sænk under Suderø i Kvalbø og da samme tid led stor skade og elendighed og lod sin søn blive hér i landet efter sig. Og nu for det sidste er forn. Johan Fermus igen kommen, og da blev angiven at bruge med sin købmandsskab. Efter sådant angivende havde kongl. majestæts foged, forn. Mads Christensøn, affærdiget båd og folk at antaste hannem og lod hannem føre til Thorshavn at ligge udi arrest og straks med dannemænd ladet hans skib overse, og hvis gods han havde inde, ladet antegne, og fandtes udi skibet, som efterfølger:

43½ vog fjeder, en ganske hob udygtige skind, 2½ kip. skind, 500 par hoser, meste delen deraf meget ringe og udygtig, hvilke fjeder, skind og hoser han meste delen haver annammet i sin betaling for hans skibsvrag, han havde mistet her under landet. Nok fandtes 1 tønde talg. Ingen fremmede købmandsvarer kunne findes; dog bekendte forn. Johan Fermus at have udsolgt en ringe del brændevin, så meget som et anker, og derfor igen bekommet nogen udygtig fjeder og udygtige hoser, af hvilke hoser han tilbød købmanden her i landet at ville sælge 20 par af de ringeste for 1 rigsdaler og 10 par af de bedste for 1 rigsdaler.[2]) Så ganske ringe var de.

Kongl. majestæts foged på Hans majestæts vegne satte udi rette, om forn. Johan Fermus ikke jo havde gjort imod kongl. majestæts forbud og derover at have forbrudt hans skib og indeværende gods, og var dom begærende.

[1]) Sjá bls. 42. [2]) Hosuprísurin við handilin var tá 5 skinn parið fyri korkalittar og 4 skinn parið fyri hvítar hosur. Fermus vil altso selja hosurnar fyri undir hálvan prís.



Efter tiltale og gensvar og denne sags lejlighed, og efterdi forn. Johan Fermus tilforn [er] geraden udi skibbrud og stor elendighed her under landet og er igen kommen at indkræve, hvis hannem tilstod for hans skibsvrag, i lige måde findes ingen købmandsvare udi hans skib undtagen den, som ganske ring og udygtig er, da kunne vi ikke tilfinde hannem dermed at have forbrudt skib eller gods undtagen hvis, som bevisliggøres, at han haver sig tilforhandlet videre, end hans vrag er anlangende, den samme tilforhandlede vare at have forbrudt, og dennem, som kan overbevises at have handlet imod kongl. majestæts forbud, tilbørlig derfor at stande kongl. majestæts foged på Hans majestæts vegne til rette efter lov og dom.

Dertil svarede Island og Færøs kompagnis købmand, Hans Sørensøn, at efterdi forn. Johan Fermus er af lagmanden og lagrettesmændene frikendt, er han på kompagniets vegne begærende at måtte bekomme samme tilforhandlede vare for sådan pris, som dannemænd derpå kunne kende at være værd, [og] som han hannem igen udi Holland ved kompagniets faktor, Philip Pelt, vilde betale, hvortil forn. Johan Fermus svarede, at han selv gerne vilde beholde sine varer og forhandle sig selv til bedste.

Dog efterdi forn. Hans Sørensøn hannem det ikke uden videre forhindring af øvrigheden turde lade passere, da er med begge deres samtykke udmeldt 6 mænd, som varerne skulle vurdere efter sit værd, som hannem igen udi Holland skulde betales, som forskrevet står.»[1])

Vit síggja herav, at fyri nógvum árum síðani er Fermus við skipi sínum strandaður í Norðuroyum. Hann hevur tá selt føroyingum av skipsvraki sínum, men hevur havt væl av skuld fyri vrakið útistandandi. Fyrsta stranding Fermusar man hava verið í Hvannasundi í 1619. Løgtingsbókin nevnir hetta árið stranding har. Fermus sjálvur man tá vera farin av stað aftur við bretskum fiskiskipi. Seinri hevur hann verið aftur í Føroyum, óivað við fiskiskipi, og roynt at fáa skuld føroyinga til sín goldna, men lítið hevur batt.

Fyri trimum árum síðan, altso í 1640, var hann komin aftur til Føroya við skipi fyri at innkrevja skuld. So sigur tingbókin. Hesa ferð skeyt ein onglendingur, óivað kápari, skip hansara til botns á Hvalbø. Tá læt hann son sín verða eftir í Føroyum, og sjálvur man hann vera farin heim aftur við fiskiskipi. Annað enn loynihandil hevur Fermus ikki havt fyri í Hvalbø. Væl man hann hava kent føroyingar, tí óttaleyst læt hann son sín eftir hetta óhappið verða eftir í Føroyum. Óivað skuldi hin ungi Fermus royna at fáa nakað inn av tí skuldini, sum faðirin enn átti til góðar í Føroyum.

Ivaleyst hevur hesin ungi Fermus verið minst ein vetur í Føroyum. Eingin grund er til at hugsa, at gamli Fermus hevur ikki verið aftur undir Føroyum í 1641 og 1642, men av sakarmálinum vita vit, at hann varð tikin sum loynihandismaður í 1643 um várið, men løgtingsbókin sigur einki um, hvar hann tá var staddur. Fútin sendi skansabátin eftir honum, førdi hann til Havnar og legði hendur á skip og farm.

Fermus varð sum víst frífunnin á løgtingi 1643, men í 1646 finna

[1]) Lb. fol. 270 a og 271 a og b.

vit aftur mannin við skipi inni á Klakksvík, hvar sum áður nevnt Guttormur í Gerðum nýtir hann til at ræða ein hálending við, sum hann, Guttormur, fekk lokkað 25 dálar av. Føroyingar tala tá um Fermus sum gamlan kenning.

Hin 5. mai 1643 stendur Norðuroya prestur, Hans Gabrielsøn Mitens, klagaður fyri løgtingi um, at hann síðsta heyst skuldi havt handlað við Fermus. Hesin skuldi havt latið hann fingið 85 dálar fyri seldar vørur, men presturin avnoktaði at hava fingið pening frá Fermusi, og vitni vóru heldur eingi, sum kundu siga gott fyri klaguna. Hans Gabrielsøn Mitens gjørdist prestur í Norðuroyum í 1625, so hann kann væl ikki hava keypt nakað av skipsvrakinum í Hvannasundi í 1619. Løgtingsbókin meldar heldur einki um tað. Presturin lovaði í 1643 fyri rættinum framvegis at vilja standa til svars í hesum máli, um slík klaga kundi prógvast sannroynd við vitnisburðum.

Hin 13. maj 1643 bókføra løgmaður, sorinskrivari og Havnar prestur, hvat Fermus og maður á skipi hansara, Nicolaus Manduelle, undir eiði hava vitnað:

«Fortegnelse på hvis gods, som Johan Fermus havde bekommet her på landet på enhver ø, som efterfølger, for hans skibsvrag, han havde mist her under landet, efter hans egen bekendelse udi hæderlig og vellærd mand, hr. Hans Rasmussøn, sognepræst og skolemester i Thorshavn, Joen Justinussøn lagmand og Jacob Hannemand landsskriver, deres nærværelse og påhør, og er, som efterfølger:

Norderø.

For det skibsvrag, som blev i Kvannesund, og hvis der blev bjerget deraf, solgt til bønderne og derfor igen bekommet

| | |
|---|---|
| fjeder | 8 voger |
| hoser | 230 par. |

Sandø.

For en båd, som blev bjerget og solgt til hæderlig og vellærd mand, hr. Clemend Lågesøn, der sammesteds, og derfor bekommet

| | |
|---|---|
| fjeder | 5 voger |

Suderø.

For det skibsvrag, som blev skudt i sænk, og en del blev bjerget og solgt til hæderlig og vellærd mand, hr. Hans [Hanssøn Hardi] der sammesteds, derfor bekommet

| | |
|---|---|
| skind | 2½ kip. |
| fjeder | 5 voger. |

Fra Jacob Holdansøn og de andre bønder sammesteds for vrag bekommet

| | |
|---|---|
| hoser | 50 par.» |

Av hesum sæst, at talan er her um tvey skipsvrak: eitt í Hvannasundi og eitt á Hvalbø. Báturin, sum seldur varð á Sandi, er óivað av skipinum, ið fórst á Hvalbø.



Uppteljingin av tí, sum Fermus hevði á skipi sínum í 1643, vísir nakað væl fleiri føroyskar vørur enn tær, hann eftir vitnisburðunum hevði fingið fyri tey tvey skipsvrakini. Draga vit tær føroysku vørurnar, Fermus hevði fingið fyri skipsvrakini og bátin frá teim vørum, sum vóru í skipinum, tá tað varð tikið, og síggja vit burtur frá teim ringu skinnunum, verða til avlops fylgjandi vørur:

| | |
|---|---|
| fjøður | 25½ vág |
| tálg | 1 tunna |
| hosur | 220 pør. |

Hesar føroysku vørur aftrat teim ringu skinnunum má Fermus so hava keypt í Føroyum og annaðhvørt goldið tær við útlendskum vørum ella við mynti av einumhvørjum slagi.

Í 1643 finna vit bert ein føroying dømdan fyri loynihandil:

«Joen Heinesøn i Sørvåg for han haver købslaget med en engelskmand imod Hans majestæts forbud, derfor at bøde 8 gylden.»[1])

Valla hava framman fyri nevndu vørur allar verið keyptar í Sørvági, og av øllum, sum tingbókin nevnir um Fermus, má tað søguliga kunna verða sagt, at hann í okkurt um ein mannsaldur hevur framt loynihandil við føroyingar. Ikki hevur hann verið einsamallur um slíkan handil. Hálendingar vóru við, sum vit m. a. síggja av tingmálinum um Guttorm í Gerðum, og aðrir bretar hava óivað gjørt tað sama, um teir ikki eru nevndir at navni.

Loynikeypmenninir høvdu ivaleyst fleiri vørusløg at selja, og fyri tey keyptu teir føroyskar vørur. Eina mest tykist tó at vera selt av brennivíni og øli, smbr. her tingmál frá 1619 «Om opsnappere.»

Hin 5. aug. 1643 var málið um tær føroysku vørurnar, sum Fermus hevði um borð, aftur fyri á tingi, og har síggja vit, hvussu ringar hesar vørurnar verða sagdar at vera. Ætlandi er tað bert tær ringastu vørurnar, sum verða umtalaðar:

«Da lod kongl. majestæts foged, Mads Christensøn, frembære nogen hoser, som blev tagen til pris fra en engelskmand ved navn Johan Fermus, sum her under landet brugte sin købmandskab imod Hans majestæts forbud efter en udgivedoms videre indhold, og var Hans majestæts foged begærende, at samme hoser måtte vurderes, efterdi de var ganske ringe.

Da blev samme hoser vurderet hvert par for 2 skind, og eftersom kongl. majestæts foged såvel som kompagniets købmand gav klage på almuen her udi landet, at hoserne ere ganske ringe, både ilde valkede og stakkede, da påbød kongl. majestæts foged, at almuen over det ganske land skal fremføre gode og velskikkede hoser, både vel valket og efter det mål udi længden, som tilforn påbuden er, såfremt de ikke derfor vil være straffede, og landet i lige måde derover at komme udi stor foragt.

Desligeste blev påbuden, at almuen skal fremføre skind og tælle

[1]) Lb. fol. 270 a.

udi deres søjdeleje, som tilforn sædvanligt haver været. Såfremt de ikke fremkommer med gode skind og talg, skal enhver derfor straffes og desforuden miste deres lejemål, hvorefter enhver kan vide sig at rette og for skade tage vare.

I lige måde om hvis fjeder, som leveres, at den er meget udygtig, da blev i lige måde påbuden, at enhver skal levere gode og tørre fjeder og ikke blandet med skarn og andet ondt tøj, som tidt og ofte sker, hvilket er Hans majestæts foged, som sådanne onde fjeder og onde hoser skal annamme på Hans majestæts vegne, til stor skade.

At således af kongl. majestæts foged om forn. poster påbuden er, og hoserne således vurderet, som forskrevet står, da var Hans majestæts foged derefter et tingvidne begærende, hvilket hannem ikke kunde benægtes.»[1])

Tøkan av Fermusi og skipi hansara førdi altso við sær, at fútin gav føroyingum stranga fyriskipan um góðskuna av teim vørum, teir góvu frá sær inn í leigubúðina og handilin. Vit vita, at parið av hosum við handilin í teirri tíðini kostaði 5 skinn, tá hosurnar vóru korkalittar, tær hvítu 4 skinn parið, men vit síggja, at hosur tiknar frá Fermusi vóru mettar fyri 2 skinn parið. Nógv av fjøðurini frá Fermusi tykist at hava verið út av lagi ringt. Fútin krevur nú skinn og tálg í seyðaleigu, soleiðis sum tað hevði verið í gomlum døgum. Fjøður hevði áður verið ein av best seljandi vørum landsins, hosur somuleiðis.

Málið vísir, at føroyingar í hesi tíðini hava vandað sær lítið um vørur sínar. Hetta hevur kanska fyri ein part verið orsakað av, at tær vørur, fútin og handilin vrakaðu, vóru loynikeypsskipini altíð til reiðar at keypa. Har sluppu teir uttan um einahandilin sum millumlið og kundu tá óivað fáa næstan sama prís fyri ringar vørur, sum teir fingu fyri góðar vørur við handilin og í leigubúðini, tí Háland og deils Ongland vóru júst marknaðurin fyri føroyskar vørur í teirri tíðini.

Fermus var sum sagt aftur á Klakksvík um várið 1646 sum loynikeypmaður, samstundis sum har lá ein hálendingur í somu ørindum. Hesum er greiit frá deild VI undir *Dráp og serlig brotsmál.*

Hin 2. aug. 1647[2]) er mál fyri á tingi um tveir menn, Morten Sivertsøn og Morten Hanssøn, sum vórðu dømdir fyri at hava keypt mjøð frá hálendingi, hin fyrri 1/2 tunnu og hin seinri 1 tunnu. Báðir tykjast at hava verið løgrættumenn, Morten Sivertsøn fyri Suðuroy og Morten Hanssøn fyri Sandoy; hann búði ætlandi í Dali.

Øll hesi loynihandilsmálini mega hava ført við sær, at bæði fútin og einahandilin hava klagað til kongs um, hvussu loynihandilin hevði tikið yvirhond í Føroyum, og biðið hann seta strangari forboð fyri hesum handli; slíkt kongl. forboð var løgmanni í hendi á sumri 1647, dagssett 26. mars sama ár. Merkiligt er tað, at løgtingsbókin sigur einki um hetta. Brævið var soljóðandi:

«Hilse Vi eder alle vore tro undersåtter, befalingsmænd, bisper [eingin var jú tá], provster [her var bert ein], lagmænd [her var eisini bert ein], sysselmænd og alle, som bestilling haver, så og

1) Lb. fol. 268 b og 269 a. 2) Lb. fol. 297 b og 298 a.



menige almue, som bygge og bo på vort land Færø evindeligen med Gud og vor nåde.

Vider, at Os af det islandske kompagnis forvaltere underdanigst andrages, hvorledes imod dem deres nådigst forundte privilegier hollændere, engelske og andre fremmede understår sig at komme der til landet og der kompagniet ikke til ringe skade at bruge deres købmandsskab. Da efterdi sådant udi sig selv er imod Vores nådigste vilje og mening, så og eftertrykkeligen imod de privilegier og friheder, Vi forn. kompagni nådeligen af kongl. magt og myndighed undt og givet haver, ville Vi alle og enhver strengeligen og alvorligen hermed befalet have, at de ikke alene sådan en straks fra landet udviser, når de ankommer, medens at de sig al omgængelse med dennem entholde, dennem hverken sælger af deres både, når de er ude at fiske eller af deres vare i landet, ej heller noget af dem sig til forhandle, hvad det og være kan.

Fordrister sig nogen herimod at gøre, da skal han, som nogen bestilling haver, den straks have forbrudt, hvad heller han selv handler eller tilsteder andre af Færøerne at handle med formeldte fremmede og udlændiske, og derforuden står Os til rette, som denne Vores mandat overtræder, og med dom samtykker, som det overtræder. Almuen, som sig herimod at gøre til fordrister, skal i lige måde stå til rette som Vort forbuds overtrædere.

Hvorefter alle og enhver sig kan have at rette og for skade at tage vare, det vi derfor til alles underretning haver ladet publicere. Derimod skal kompagniet handle årligen med indvånerne, dennem dygtige og gode varer tilbringe og forskaffe, som de det vil ansvare og være bekendt. Forbydende alle og enhver herimod etc.

Hafnia, den 26. marts 1647.

*Christian.*»[1])

Táið vit minnast, hvussu løgtingið dømdi í Fermus-málinum 1643, var hetta kongliga forboðið eitt slag í andlið føroyingum. Undir hóttan um stranga straff verður teimum beinleiðis noktað at hava nakað samband við fremmandar hvørki á landi ella sjógv, men teir skuldu beinleiðis koyra allar hesar fremmandu aftur til havs, um teir komu í føroyska havn. Av forboðnum sæst týðuliga, at handilsfelagið á Tinganesi hevði klagað føroyingar fyri kongi. Kongur hóttir við at koyra menn úr starvi, sum hava nakað umboð, og vit skilja tí, at prestarnir, sum óivað kendu seg raktar av brigslinum um loynihandil, vóru kvikir at lata ríkisstýrið hoyra frá sær. Kongsbøndur vóru undir somu lagnu, men svar teirra er sjálvsagt givið í skrivinum frá løgmanni, sum svarar fyri allar landsins íbúgvar. Skal tí fyrst her løgmannsins svar, sum er sera væl samansett, verða endurgivið:

«Af den udødelige Herrernes Herre og kongernes konge ønsker Færøernes indbyggere vor allernådigste herre og konning, Christian den Fjerde, lykke og velsignelse med et langvarigt og fredsommeligt

1) D. D. R. A. Langebeks Diplomatarium.

regimente, givendes dernæst underdanigst at vide, at vi haver fået hid til Færø Hans kongelige majestæts mandater og breve, af hvilke vi erfarer os for den kongl. højhed at være beført som de, der med fremmede, hollændiske og engelske og andre, mod Hans kongl. benådning det islandske og det færøske kompagni givet, skulle handle, hvilken angiven vi formener unødvendigen at være gjort, eftersom det endnu er ubevisligt os enten nogle skibe hid at have bestyrt eller med dem vore varer at have kompagniet til afbræk forhandlet.

Ak, herre Gud! Med hvad samvittighed kan kompagniet begære, at vi os fra fremmede skibes omgængelse skulle således entholde, at vore folk, når de er fire[1]), fem eller seks mile ude på havet efter deres fiskeri, ikke skal måtte tale med et skib, om de måske kunde spørge af dem, om Gud endnu sparde Hans kongl. majestæt livet, [og] om der er fred og rolighed udi landet; thi sålænge vi dette hører, da haver vi håb, uanset at forn. vort kompagnis skibe undertiden kan sildig fremkomme, men når vi hører ingen tidende fra vor nådige herres lande, da lever vi udi daglig frygt og bedrøvelse, og om vore folk, som daglig æder den sure og rådne fisk og drikker vand, end byttede med dem en fisk, to eller flere for en kande øl eller et brød, sig på begge sider til forfriskning, udi hvad måder kompagniet derudover kan lide skade, kan vi ikke forstå.

Her bjudes aldeles alvorligen og strengeligen, at forn. engelsker og andre, når de indkommer, skulle udvises, hvilket sjunes os umuligt, thi det tykkes os med ingen billighed at kunne [stendur: kand] udjage en søfarende mand, som enten er fordrevet af storm og uvejr, haver mist sit redskab, vil få sig fersk vand, stoppe sine lækker eller sådant andet, som vi og de, der søger føden på havet, må forsøge og besynderlig de landes folk, hvis konger og høvdinger der enten udi byrd og blod kan være forbunden eller og konfødereret med det kongl. hus af Danmark, og når sådanne skibe ankommer, om man end da kunde tuske med dem for salt eller brød, (kanske ikke haves altid her), en gammel ko, tjur eller et gammelt magert får, hvad afbræk skal komgagniet deraf kunne have? Eftersom det er sådan vare, som kompagniets købmænd, om det blev dem tilbuden, ikke skulde ville anse, og dersom vi af forsæt med sådanne skibe ikke skulde ville tale, skulde de vel derudover således blive forbitrede, at de os og vore folk udi en eller anden måde skulde skade påføre, som endog tilforn er set eksempel på.[2])

Vi ville derfor allerunderdanigst og ydmygeligst begære, at vor allernådigste herre og konning for det kongelige, ja faderlige hjerte, Han og Hans højlovsalige herrer fædre mod dette vort fattige fædrene land altid betet haver, vilde og udi dette fald sådanne mandater (om muligt er) forhindre, men dersom ikke, da ere vi med alle andre Hans kongl. majestæts landes undersåtter af yderste formue erbødige og erkende os pligtige til at holde og vil derhos have Hans kongl. højhed underdanigst ombedet, at forn. kompagni må advares, at det skaffer nok og gode varer hid til landet, så at folkene ikke her, som

---

[1]) Løgmaður nevnir her havið frá sjómarkinum og út eftir. [2]) Handilsforboðið hevur altso ført við sær sjórán.



tidt er sket, lider mangel. Item at de skaffer os sådanne købmænd hid, som udi handelen her er forsøgte, på det at de færdige med folkene, når de ankommer, kan handle, og således [merkir: således at de] straks til deres huse, førend storm og uvejr dem påkommer, kan søge. Dersom derpå ikke sker forbedring, nødes vi udi tilkommende år hvert in spicie klageligen at angive.

Vil desmidlertid have Hans kongl. majestæt med det ganske kongl. hus den evige almægtigste Gud til sjæl og liv med Hans lande og riger trohjerteligen befalet.

Givet på menige mands vegne af mig underskrevne, Hans. kongl. majestæts lagmand, med vort lands signet udi Thorshavn den 8. september anno 1647 undertrykt.

H. K. M.
Underdanigste
*Joen Justinussøn*
egen hand.»[1])

(Innsiglið: gamla veðramerkið)

Undir hesum brævi síggja vit síðstu ferð hitt gamla veðramerki, «vort lands signet», sum løgmaður sigur, nýtt av Føroya løgmannsstóli. Hetta gamla landsinnsigli okkara tykist at vera horvið undir Illa løgmanni, Balzar Jacobsøn, sum varð settur í embæti 1655. Eftirmaður hansara Jóan Poulsøn løgmaður nýtti annað innsigli, ein rennandi seyð. Fyrst er at bíta merki í, at Jóan Jústinusson løgmaður í brævi sínum er ógvuliga bilsin yvir, at kongur noktar føroyingum at hava nakað við fremmandar at gera, táið teir eru á útróðri 4—6 míl úr landi ella 16—24 fjórðingar. Tað er týðuligt, at løgmaður her hugsar um havið frá sjómarkinum og út eftir, sum hann heldur liggur uttan fyri alt lóggávuøki, eitt dømi um, at føroyskir ábyrgdarmenn í teirri tíðini hugsaðu um tað sjómark, sum tá galt, her í handilsviðurskiftum.

Innan løgmaður hevði dagfest hetta bræv sítt, høvdu Føroya prestar heitt á ríkiskanslaran um teirra viðurskifti í sama máli í brævi 31. aug. 1647. Við stórum umsveipi og orðaríkdómi verður her veruliga sagt tað sama sum í løgmannsbrævinum, bert at prestarnir einans tala fyri seg sjálvar ella síni egnu viðurskifti. Bræv prestanna er soljóðandi:

«Nåde og fred af Gud fader og vor herre Jesu Kristo ønsker vi underdanigst Dem, velbårne og store hr. kansler,[2]) næst vor ydmyge og venlige hilsen altid tilforn.

Eftersom vi underskrevne, Guds ords værdige tjenere på Færø, ikke uden stor smerte af kongl. majestæts åbne brev og mandat udgiven, og med Hans kongl. majestæts landfoged, Hans Selmer til Færø, nærværende år udsendt og der på et sat lagting publiceret, erfarer, at vi fattige mænd, som med stor livsfarlighed, møje og besværing Gud og den kristne menighed her betjener, hos den høje øvrighed, med hvad sandfærdighed ved vi ikke, skal være angiven som de, der handler med hollænder og engelsker, og som de, der imod kongl. privilegium, kompagniet givet, os forser, da nødes vi

---

[1]) D. D. R. A., B. 161. [2]) Christian Thomesen Sehested.

for den høje øvrighed, hvilken vi have svoret huldskab og troskab, os at liberere og for sådant angivende at purgere. Thi det er Gud og alle kristne mennesker vitterligt, at vi ikke handler med nogen fremmede, al den stund vi noget hos kompagniet kan bekomme, og skal heller aldrig andet bevises; men når intet er hos kompagniets købmand at bekomme, eller man for uvejrligets farlighed og stedernes distance om vinter, vår og høst kompagniets tjenere ikke kan besøge, og vel muligt kunde ankomme et skib ind på den plads, som vi bor på, og er forfriskning begærendes, vi og som danske mænd, der ere ikke vane at drikke vand til vort livs ophold, kunde være nødtørftigen en tønde skibsøl begærendes, at bytte mad for mad, eller og hvis ringe udygtige vare, vi må tage af fattigfolk udi rettighed som presttal[1]) eller offer, pussefæ[2]) eller andet og købmanden ikke vil eller kan som købmandsgods annamme, ere vi underdanigst begærendes, vi uden vort kalds fortabelse må tilstedes at gøre.

At hvis os af Gud og Hans majestæt er forundt, nyttigt og brugeligt, til vort livs ophold, kompagniet uden skade, vi ere vist forsikrede, den høje øvrighed ikke tilsteder os at dø med vore vare udi hænderne, når vi den først med stor møjsommelighed haver alligeret, ført over bjerge og dale med stor omkostning og siden med båd bliver bragt til kramboden, og når vor fisk og anden vare den bliver forskudt, og vi den skal føre hen igen og kan hos kompagniet derfor intet bekomme og ikke heller må nogen fremmede forhandle, vi var ellers langt heller underdanigst begærendes, vi herfra måtte forløses med vort liv og beholde en nådig herre og konning.

Dog skal Gud være vort vidne til, at vi af letsindighed ikke ville vort kald opsige eller forlade, haver og vel haft årsage ofte os at beklage for den høje øvrighed, haver dog for roligheds skyld ladet bestå, nødes nu til formedels nogle urolige og utilbørlige angivende på det underdanigste ydmygeligen begærende Eders strenghed os fattige mænd som vores gunstige herre og patron hos Hans kongl. majestæt vilde være behjælpelig, herpå vilde ske nogen forlindring, så vi og vore små børn kunde bo udi fred og ikke forårsage nogen oprør eller tummult imellem os og fremmede, engelske eller andre, som begærendes vorder forfriskning, om vi den dem benægter, som tilforn er sket, som højbemeldte kongl. majestæts forn. landfoged vidtløfteligen ved at forklare. Bepligter os derhos aldrig at ville gøre imod kongl. majestæts påbud, uden allerstørste nødvendighed det kauserer, som ingen lov er undergiven.

Gud allermægtigste skal være Eders strengheds store løn, udi hvis beskyttelse vi Eders strengheds adelige børn og ganske stamme vil have underdanigst hjerteligen og troligen comostoeret [befalet].

Thorshavn på Færø den 31. aug. anno 1647.»[3])

Bæði hesi mótmælisskrivini úr Føroyum móti hesum stranga kongliga forboðnum móti loynihandli benda á, at táið føroyingar ikki hava viljað handlað við teir fremmandu, sum komu inn á oyggjarnar, er tað ofta hent áður, at hesir sjálvir hava tikið seg til rættis og farið fram sum sjóræningar. Føroyingar biðja tí um, at slíkt má ikki henda í framtíðini. Prestarnir siga í brævi sínum, at hetta stranga kongliga forboðið er «på et sat lagting publiceret». Við øðrum orðum: alt málið er viðgjørt á ólavsøktinginum 1647, men løgtingsbókin nevnir tað ikki við einum orði. So týdningarmikil mál eru altso ikki nevnd í tingbókini. Eitt annað, sum kemur fram í hesum brøvunum, er, at føroyingar gjøgnum loynihandilin eru sloppnir av við sínar vrakvørur. Hetta siga prestarnir týðuliga í sínum brævi. Løgmaður, sum í sínum brævi talar fyri hitt føroyska fólkið, sigur, at føroyingar yrkadagar bert drekka vatn, meðan prestarnir í sínum brævi siga: «vi og som danske mænd, der er ikke vane at drikke vand til vort livs ophold, kunde være nødtørftigen en tønde skibsøl begærendes.» Herav síggja vit, at tær mongu klagurnar á løgtingi um ringt øl ella trot av øli ikki komu frá fólkinum sum heild, men embætismonnum, kanska stórbóndum, helst prestunum. Sum heild vóru føroyingar í gomlum døgum einki øldrekkandi fólk. Teir drukku mest úr ánni ella úr «vandbekken», sum tað stendur í løgtingsbókini.

Fyrra part av 1648 doyði Kristian kongur IV eftir at hava verið kongur í 60 ár, og sonur hansara Fríðrikur III tók við stýrinum. Tað var hann ella hansara stýri, sum kom at viðgera brøvini úr Føroyum, sum mótmæltu hinum harða kongliga handilsbandinum frá 1647. Heilt uttan úrslit vóru mótmælini úr Føroyum ikki, men eftirgevingin frá kongi var tó lítið verd. Hin 2. apríl 1650 sendi kongur føroyingum hetta skriv:[1])

«Frederik III o. s. fr. gører alle vitterligt, at eftersom anno 1647 vor elskelige kære hr. faders, salig og højlovlig ihukommelse, strenge befaling er udgangen, at undersåtterne på Færø sig fra al omgængelse med fremmede, som did enten nær ved landet eller på landet kunde hænde at komme, skulle entholde, og de nu derom med adskillige bevægelige motiver underdanigst supplicerer sådan meget strenge anordning noget måtte formildes, da ville Vi samme mandat nådigst således have forklaret, at undersåtterne sig fra al trafik og handel med fremmede, som Vort kompagni med billighed sig kunde beklage, skulle entholde, og denne Vores nådigste forklaring således bruge, at vi ikke skulle få årsag efter forrige strenge mandat igen at lade eksekvere, om nogen skulle befindes, som sådan kompagniet til skade skulde misbruge.»

Sum vit síggja, er hetta eingin avtøka av hinum stranga kongliga forboðnum, men bert ein mildari útleggjan av tí, og kongur ráddi sjálvur fyri, um ein strangari nýtsla av forboðnum skuldi verða fylgd. Eitt kongligt orð skuldi bert til, og í gabelstíðini var hetta lætt at fáa. Møguliga hevur kongur hildið tað vera skyldu sína at senda føroyingum slíkt milt bræv, sum hann gjørdi í 1650, tí 3. aug. 1649 hevði Føroya løgting svorið honum trygdar- og hilniseið, og undirskrivað hann høvdu 7 prestar, løgmaður, 6 sýslumenn, 28 løgrættumenn og 12 bøndur.[2]) Sendimenn kongs á Føroya løgtingi, Hendrik Bielche og Gabriel Acheleye, tóku móti eiðinum kongsins vegna.

Footnotes, p. 158:

1) 1 skinn av hvørjum tilkomnum fólki, framhald av Romaskattinum. Sjá Varðan, bind XII, bls. 129  2) Inntøka av brúðarvígslum: gifta = púsa á fornmáli = pouser á fronskum.  3) D. D. R. A., D. D. K.; B 161.



Footnotes, p. 159:

1) N. R. R., 10. bind.  2) D. D. R. A., Langebeks Diplomatarium, skjalið dagssett 3/8 1649.

Táið Chr. Gabel fekk Føroyar í len í jan. 1655, hendi fyri fyrst tann broyting, at lensharrin fekk loyvi at seta fútan í Føroyum, og at kongur setti løgmann ímóti løgtingsins tilmæli. Handilin í Føroyum gekk við sama lag undir íslendska handilsfelagnum til 1661—2. Tá fekk Gabel eisini handilin í Føroyum, og aftrat hendi tað, sum kanska var líka nívandi fyri føroyingar, at einki skjal mátti verða sent av landi, harundir klagur til kongs, uttan sorinskrivarin hevði ført tað í pennin.[1]) Alt skrivligt, sum hereftir varð sent av landi, skuldi verða sáldað sum nú í kríggstíð, og ringt var eisini at sleppa av landi fyri at føra fram munnliga klagu. Í hesum forboðunum hava vit gabelstíðina, tá føroyingar heilt vóru givnir upp til skutils hjá Gabels embætismonnum á landi, ikki minst við handilin. Soleingi Glyvraskrivarin, Nils Jákupsson, sat í embæti, hava viðurskiftini kanska ikki verið út av lagi. Hann gekk jú á odda í síni klagu saman við øðrum monnum fyri at fáa Illa løgmann avsettan, og hetta tykist ikki at hava gjørt hann vælsæddan hjá Gabels embætismonnum. Nøkur ár seinri fingu teir hann smoygdan úr embæti, og í hansara stað kom tá Peder Sørensen Broberg, ið hevði verið tænari hjá fútanum Søren Pedersen Schougárd. Hin nýggi skrivarin giftist tá við fútans frillu, Birgitte Jensdatter Bøgvad, og dóttir teirra var hin kenda Beinta, ofta kalla Illa Beinta. Við fútanum átti Birgitta áður sonin Frederik Schougárd, seinri sorinskrivari í Føroyum. Óivað fekk Gabel ikki altíð sítt frá hesum sínum embætismonnum í Føroyum, helst keypmanninum í Tinganesi. Gabel hevði ivaleyst fingið snevil av hesum, men so í 1673 kom hin stóri eldsbrunin á Tinganesi, sum Gabel helt vera ásettan. Umframt handilshúsini fór har eisini Gildisskálin, hin gamla løgtingsstovan, upp í loga.

Frá byrjan av gabelstíðini síggja vit Lucas Debes í stríði við Illa løgmann, við Gabels fútar og serliga við fútan Søren Petersen Schougárd. Meðan eldsbrunin var á Tinganesi, var Lucas Debes staddur í Keypmannahavn saman við tveimum øðrum føroyingum við klagu um viðurskiftini í Føroyum í gabelstíðini, um festingarviðurskiftini, um skansan og um Gabels handil, og eftir hesa sendimannaferð eru nógv skjøl at finna á ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn. Av hesum skjølum síggja vit t. d., hvussu hitt stranga kongliga forboðið virkaði í hesi tíðini. Lucas Debes var formaður og pennaførari fyri sendimannanevndina. Hann greiðir einastaðni í hesum skjølum frá, hvussu øll fremmand skip, sum komu inn á bygd, skuldu verða beind til Havnar og verða avgreidd har. Ofta vildu tey keypa okkurt, feskt kjøt t. d., seyð ella neyt. So keypti fútin djórini frá bóndum nærindis Havnini fyri lítið og lætt og seldi teim fremmandu fyri nógvan pening. Av hesum fekk fútin sær ofta eina góða inntøku, og soleiðis var tað í so mongum øðrum viðurskiftum, t. d. tók fútin sær stóra eykainntøku av at festa burtur garðar til hægstbjóðandi. Móti slíkum kom nýggj konglig skipan í 1673, hvar kongur setti forboð fyri hesum óskili. Sendiferðin 1672—3 fekk soleiðis mildnað gabelstíðina í Føroyum nakað.

[1]) N. N. R., 13. bind, dagssett 29/4 1661.

# DEILD V

## *Føroya handil o. a.*

### a. Hamborgarhandil um siðaskiftið.

Táið víkingatíðin var aftur um farin, var hugurin hjá føroyingum at leita burtur í fremmand lond fallin. Sjálvt í gomlu føroyingasøgu hoyra vit Trónd í Gøtu finnast at hinum yngra ættarliðinum, Gøtuskeggjunum, at teir tóku sær av løttum, meðan skipið stóð og fúnaði undir bráðini, og ullarnøgdin var liggjandi í landinum. Hóskandi før til at sigla yvir hav við eru tá óivað farin at fækka í Føroyum. Ár gingu, og hetta endaði so við, at kongur pliktaði seg til á hvørjum ári at senda føroyingum farmaskip úr Noreg.[1]) Ymsar vørur, helst korn, mjøl og jarn, máttu føroyingar hava innfluttar, og so máttu teir eisini sleppa av við sínar egnu vørur. Hesar hava tá mest verið ull og vadmal, sum í miðaldri gjørdist høvuðsvøran, hartil kom tálg, fjøður og turrur fiskur. Enn í tingbókini eftir ár 1600 síggja vit, at fjøður varð roknað fyri eina av mest týðandi útflutningsvørum landsins.

Annars er okkara vitan um, hvussu handilsviðurskiftini hava verið í Føroyum innan siðaskiftið, ógvuliga knøpp. Við rætttarbótini 1273 lovaði Noregs kongur Føroyum tvey handilsskip um árið. Oftast man tað tó hava verið so, at kongur hevur givið einstøkum monnum ella handilsfeløgum rætt og skyldu til at reka handil við Føroyar. Enn varðveitt bræv 12. mai 1399 vísir t. d., at Greipur Ívarsson, sýslumaður í Føroyum, hevði keypt sær farmaskip í Noreg at sigla til Føroya við.[2]) Sum árini liðu hevur kongur beinleiðis leigað hin føroyska handilin út. Slík eru tey viðurskifti, sum vit møta um siðaskiftismundið.

Bjørgvin gjørdist brátt Føroya miðstøð fyri allan handil við útheimin. Býurin var bygdur um ár 1070 av Ólavi kongi kyrra, og Magnus Erlingsson gjørdi hann til kongsstað 1164, men eftir 1194 kom Sverri kongur og ætt hansara at merkja býin mest. Eftir miðjuna av 13. øld fóru týskir hansakeypmenn at leggja nógv av handlinum í Bjørgvin undir seg, og frá 1343 høvdu teir fast handilssetur har. Í komandi 200 ár kom meginparturin av øllum handilsskapi í Norður- og Vesturnoreg á týskar hendur.

[1]) Dipl. fær. bls. 24—25: Rættsbót Magnusar løgbøta 1273. [2]) Dipl. fær. 31—34.

Hesir hansakeypmenn rættu eisini sínar armar vestur í hav til Føroya og Íslands. Líkt er tó til, at hansakeypmenn í Bjørgvin hava mist takið á Føroya handli móti endanum av 15. øld, og at hansabýurin Hamborg longu tá hevur lagt Føroya handil undir seg. Hetta tykist rættuliga at vera hent, eftir at oldenborgska kongaættin kom til ræði í Danmark—Noreg 1348.[1] Einki skjal er nú til, sum beinleiðis vísir hetta, men vit vita, at Hamborg og Bremen í hesi tíðini høvdu handilsamband við Ísland og Føroyar,[2] og bræv finnst í skjalasavni Bremens um hansasamráðing í Lübeck 1506 viðvíkjandi klagu frá Bjørgvin um, at keypmenn har vóru troðkaðir burtur úr handilsskapi í Hetlandi, Føroyum og Orknoyum av teimum frá Hamborg og Bremen.[3] Eisini kann verða ávíst, at hamborgari hevur verið kongsins umboðsmaður í Føroyum um 1520,[4] og at hamborgari sat við Føroya handli til 1553.

Verri gekkst um hetta mundið hinum fjarskotnara Grønlandi. Táið hin norska siglingin sovnaði burtur, hvarv eisini sambandið við hetta landið. Við vissu veitst slíkt samband at hava verið til 1410. Í 1261 góvu norðbúgvar í Grønlandi seg undir norskan kong. Hann lovaði teimum knørr á hvørjum ári, men noktaði fremmandum at handla við landið. Í 1484 gjørdu týskir keypmenn í Bjørgvin blóðbað á teir norsku keypmenninar, sum eftir vóru í býnum, og minnið um gamalt handilssamband við Grønland fekk harvið mønusting sín.

Í brævi 12. aug. 1513 úr Nyborg setur Kristian kongur II borgmeistarum og býráðnum í hansastøðunum forboð fyri tí handli, nakrir keypmenn hava byrjað beinleiðis millum staðirnar og Ísland, orsakað av klagu, sum komin var til hansara úr Bjørgvin. Hann sigur Bjørgvin at eiga henda handilin eftir gomlum avgerðum.[5]

Hanseatar ella garparnir á bryggjuni í Bjørgvin verða soleiðis tiknir sum arvtakara í gomlum norskum handilsrættindum við vesturhavslond, teirra millum Føroyar.[6] Sum nevnt tykist Hamborg tó longu at vera komin upp í Føroya handil innan ár 1500, og Bjørgvin misti tá í langa tíð tak sítt á Føroyum, men lá tó javnliga frammi við fyri at vinna handilsrættindi síni við vesturhavslond aftur.

Um 1520 síggja vit, at Kristian kongur annar hevur havt hamborgaran, Joachim Wullenweber, til fúta í Føroyum. Hann fekk 1521 kongligt loyvi at fara til Føroya eftir útistandandi gjaldi frá síni fútatíð.[7] Tá sat sum fúti í Føroyum presturin Niklas. Hann varð hóttur av Joachim at avhenda bót frá eini kvinnu fyri barn, hon hevði dripið, og sum Joachim segðist at vera faðir at. Joachim trongdi inn í hús prestsins, breyt arm og bein á honum og særdi hann illa í høvdið. Síðan rak hann henda Niklas av landi.

Kristiani kongi øðrum stóð tá veikt undir føti í ríki sínum, og longu 1523 varð farbróðir hansara, Fríðrikur hertogi í Holstein og Suðurjútlandi, undir navninum Fríðrikur hin fyrsti valdur til kongs í

1) Kongs Str. bls. 69, 76, 77, 88. 2) Ernst Baasch: Die Islandsfahrt der Deutschen, bls. 12, 16, 20, 31. Í rættarbót Magnus Eirikssonar 1348, N. g. L., stendur: «Vær høvum frætt, at útlendskir keypmenn sigla til skattlanda vára og aðrar staðir, sum ei áður vant hevur verið, og várt land hevur harav skaða . . . » Kongur setur tí longu tá forboð fyri hesum. 3) A. C. E., skjal 1. 4) A. C. E., skjal 15. 5) A. C. E., skjal 2. 6) Kongs. Str., bls. 67—68. 7) A. C. E., skjal 15.



hansara stað. Joachim nýtti hetta kongsskifti til við ránsmannaferð at gera sær gott av Føroyum. Minst í 3 ár hevur Joachim tá herjað Føroyar eftir gjaldi. Táið Kristian kongur annar var flýddur til Hálands, hevur hann sent Frideryk de Friese sum fúta sín til Føroya fyri at fáa sær kongsgjaldið haðani. Navnið Frideryk bendir á, at maðurin hevur verið hálendingur. Frideryk de Friese var í hvørt fall í Føroyum á sumri 1524, táið Joachim Wullenweber uttan kongligt loyvi kom hagar.[1] Helst árið fyri var skip hjá Joachimi strandað í Føroyum, og hann hevði tá selt Hilariusi bispi í Kirkjubø skipsvrakið fyri 70 hoornskar gyllin (Horn í Hálandi), hóast kongur eftir lands lóg og rætti átti alt vrak, sum kom á land. Brævið, skrivað av undirkanslara hjá Kristiani kongi øðrum, Corneille Double, í Ter Veere í Hálandi, sigur, at Joachim var óður inn á Fríðrik (Frideryk) helst av teirri orsøk, at hann áður var farin av landi við kongsins gjaldi, og at hann hevði lagt hond á nevnda skipsvrak.

Tá talaði Fríðrikur við Hilarius bisp og bað hann fáa Joachim til ikki at fara fram við hørðum, men lata rættin avgera málið teirra millum. Teir møttu tá fyri rættinum, hvar bispur, løgmaður og fleiri av landsins dómarum sótu, og har fríkendi rætturin Fríðrik. Joachim tók tá soleiðis til: Tit harrar kunna vera, hvørjir tit vilja; eg skal tó taka góðs hansara, áðrenn sól fer til viða. Tí eri eg komin higar, og tí vil eg hava tað, og so rýmdi hann av tingi.

Fríðrikur bað tá løgmann fáa Joachim til ikki at fara fram við hørðum, og vísir hetta, at hann var mannsterkur og óivað vápnaður. Fríðrikur lovaði Joachimi veð fyri 1000 gyllin í landinum og bað hann síðan flyta seg av landi við skipi sínum. Hann vildi tá fegin standa til svars fyri Noregs ríkisráði ella Danmarkar, fyri hertoganum í Holstein ella ráðnum í Hamborg. Men Joachim tók kongsins góðs frá Fríðriki. Síðan reiv hann úr barmi Fríðriks bók, sum øll kongsins gjøld stóðu skrivað í. Harnæst noyddi hann Fríðrik at undirskriva skjal, hvarí hann viðgekk at hava givið Joachimi gjaldið.

Eftir hetta handtóku menn Joachims Fríðrik og tveittu hann í bát teirra, hóast Fríðrikur sjálvur hevði bát. Til henda dag, sigur brævið, hevði landið ikki svorið øðrum kongi trygdareið enn Kristiani kongi II. Táið Fríðrikur soleiðis var rikin av landi, fór Joachim Føroyar runt og kravdi inn kongsins gjøld eftir teirri bók, sum hann hevði tikið frá Fríðriki, og tað, sum hann ikki kundi fáa við góðum, tók hann við makt. Eisini hevði Joachim bankað ein bónda av, tí hann hevði lænt Fríðriki hús at goyma kongsins góðs í. Joachims menn høvdu eisini rænt góðs úr skipi Fríðriks.

Av hesum síggja vit, at ófriðaligt hevur verið í Føroyum um kongsskiftið, og at hamborgarin, Joachim Wullenweber, sum kendi føroysk viðurskifti, hevur gjørt sær til góðar av tí. Enn miðskeiðis í 1524 var einki kongsskifti hent í Føroyum. Ikki var Joachim hetta árið í landinum sum umboðsmaður fyri Fríðrik kong I, men sum hamborgari var hann ein av kongsins tegnum, og kann hann væl hava sagt kongi frá, hvussu til stóð í oyggjunum.

Stutt aftaná er komin til Føroya Peder Skoggård, sendimaður frá

1) A. C. E., skjal 15.

Vincents Lunge, høvuðsmanni á Bjørgvins húsi, við brævi frá Fríðriki kongi I, og er Fríðrikur tá fyrst á ólavsøkutingi 1524 góðkendur sum kongur føroyinga. Hetta vísir bræv, sum er skrivað 17. aug. 1524 á bispagarðinum í Kirkjubø[1], og sum bæði Hilarius bispur og Tormóð Sjúrðarson (Tormodt Siwrdrson[2])) løgmaður hava skrivað undir og hongt síni innsigli við. Teir takka kongi fyri tað, hann lovar í brævi sínum, sum lisið varð upp á løgtingi «um kirkjenes privilegie og friheit, hvilket Eders nåde med magt vil holde som ein hederlig og kristen kung og landsens indbyggere med gamle privilegie og ret, ti at denne fatike almoge, som her bor i denne yderste landsens ende, havér længe lidet trang og armod, som Gud bædre». Teir báðir, bispur og løgmaður, hefta her fyri landið.

Bræv 22. apríl 1524[3]) vísir, at Kristian kongur II tá hevði givið Jørgen Hanssøn, fúta í Bjørgvin, Føroyar í len, men longu av brævi 13. mai sama ár sæst, at Vincents Lunge var úti eftir at fáa Føroyar frá Fríðriki kongi I lagdar undir Bjørgvins hús. Hesin kongurin hevði størri vælvild fyri holsteinarum og leigaði tí 10. nov. 1524 ella 1525 Peder Fresenberg Føroyar fyri árligt gjald.[4]) Hesin Fresenberg hevur óivað verið hamborgari, og tykist hann at hava sitið við Føroyum í len í nøkur ár, hóast roynt varð ofta at leggja oyggjarnar aftur undir Bjørgvins hús. Hetta sæst t. d. av brævlepa,[5]) sum fylgt hevur við skjali 25. mars 1526, og sum Vincents Lunge hevur sent Ólavi Engilbrektssyni erkibispi í Tróndheimi. Fyrst verða tvey skip nevnd og síðan stendur: «Item ligger der en hamborger i Færø med en stor holk og haver nu med profoss [oyðslusemi] haft landet inde, endog jeg hannem tvende gange vor nådigste herres brev sendt haver, han skulle det land Færø uforvart blive, og de færøske varer skulle hid føres og sælges. Derfore sender jeg mit skib (skyff) med bøsser, værge og hofmænd til Færø at fri landet igen under Norges krone.» Hóast nógvir hava havt í kvittan hesi árini at leggja Føroyar aftur undir Bjørgvin, fekkst hetta ikki í lag. Hamborgarmenn tykjast at hava sitið fastir í Føroyum, og aftan fyri teir stóð veruliga hin danski kongurin.

Kristian kongur II, sum útlagin sat í Hálandi, var í peninganeyð, og táið hann sá, at hann brátt fór at spæla av við útlond síni í Atlantshavi, álegði hann, sum sæst av brævi 4. apríl 1524,[6]) kanslara sínum, Klaus Pedersøn, at fara til Onglands fyri at fáa lán ímóti at seta Føroyar og Ísland í veð; men Heindrikur kongur VIII í Onglandi vildi tó einki lán veita honum móti tílíkari trygd.

Frá 20. mai 1529[7]) sat Eske Bille sum høvuðsmaður á Bjørgvins húsi í staðin fyri Vincents Lunge, og longu 28. mai[8]) sama ár sendi hann bispinum í Føroyum (Hilariusi ella eftirmanni hansara Hilianusi) bræv, hvarí hann sigur, at Fríðrikur kongur við brævi hevði álagt honum at taka Føroyar inn undir Bjørgvins hús. Eske biður bispin tí vera sær hjálpsamur, so at øll konglig gjøld úr Føroyum verða

---

1) Prentað í Varðanum bindi 17 síðu 194, finnst í Langebeks Diplomatarium, rigsarkivet. 2) Formurin *Siwrdrson* kann kanska benda á at vera í yvirgongd: Sigurðsson > Sjúrðarson. 3) A. C. E., skjal 12. 4) A. C. E., skjal 16, N. R. R., bind I. 5) A. C. E., skjal 18. 6) A. C. E., skjal 11. 7) N. R. R., bind I. 8) A. C. E., skjal 21.



látin honum, og lovar hann harfyri at halda landið við Noregs og sankta Ólavs kongs lóg og sambært fornum siðum. Brævið, Eske fekk frá kongi, var stílað føroyingum, og harí stendur:

«. . . Vi have undt og forlent og nu med dette Vort åbne brev unde og forlene Os elskelige Eske Bille, Vor mand og råd, forskrevne Vort og Norges krones land Færø og dermed eder alle og hver særdeles udi være [værg] og forsvar at have. Thi beder Vi eder alle og hver besynderligen strengeligen bjude, at I ere forskrevne Os elskelige Eske Bille og hans foged hørig og lydig, på Vore vegne gørende og givende hannem og ingen anden eders årligen skat, landgild, gæsteri og sagefald . . . Han skal igen holde eder alle og hver særdeles ved sankt Olufs konnings lov og gode gamle sædvaner . . .»[1])

Eske sæst aldri at hava fingið Føroyar undir sítt vald, tí í brævi til kongs í septbr. sama ár klagar hann um, at hamborgarmenn enn fara við hinum kongliga gjaldinum úr Føroyum beint ímóti tí, sum kongligt bræv til hansara ásetur. Tí bað hann um nýtt bræv frá kongi til fólkið í Føroyum við ásannan um, at hann, Eske Bille, átti rætt til hitt kongliga gjaldið úr oyggjunum.[2]) Slíkt bræv kom aldri, men harímóti fekk Eske í brævi í november 1529 frá kanslaranum, Klaus Gørtze[3]), at vita, at kongur hevði givið hamborgaranum, Thomas Koppen, Føroyar í len, og frá kongi fekk hann somu tíðindi í brævi sent frá Gottorpi.[4])

Sum kunnugt var Fríðrikur kongur I sterkt ávirkaður av lutherdóminum, men tók tó aldri heilt við hesi nýggi trúarlæru, sum eftir stutta tíð hevði fingið innivist í Hamborg. Til Bjørgvins kom lutherdómurin eisini skjótt við skipaferðsluni, men tó ikki í sama mun. At Thomas Koppen tíðliga hevur tikið við lutherdóminum, sæst av øllum brøgdum, og av tí, sum seinri hendi, er lætt at skilja, at Fríðrikur kongur hevur ætlað Thomasi Koppen at vera undangongumann í starvinum fyri at fáa lutherdómin innførdan í Føroyum og at leggja kirkjuna í oyggjunum inn undir kong. Longu táið Thomas Koppen fekk Føroyar 1529, sæst hann at hava lovað, at Joachim Wullenweber skuldi eiga helvtina av leninum. Hetta ger kongur almannakunnugt í brævi frá Gottorp 4. des. 1531,[5]) so líkt kann verða til, at eisini Joachim av kongi hevur verið tikin inn í talvið um Føroya kirkju og ognir hennara.

Innan siðaskiftið stóð Føroya kirkja við sínum bispi undir erkibispinum í Tróndheimi,[6]) men miðaldursskjøl vísa, at dómkapitlið við dómkirkjuni í Bjørgvin vildi kanna sær avgerandi orð, táið nýggjur bispur skuldi verða settur í Føroyum. Hóast Tróndheims erkibispur treyður boygdi seg fyri hesum kravi, er líkt til, at Bjørgvin í flestum førum hevur framt vilja sín. Við bispakirkjuna á Kirkjubø tykist tí einki dómkapitil at hava verið. Í 1524 síggja vit tó, at hin føroyska kirkjan fær tryggjað síni forrættindi av Fríðriki kongi I: Tað er skattafrælsi, tíggjundarrætt, egnan kirkjurætt uttan um løg-

---

1) Bræv 7. febr. 1529 til føroyinga, prentað í «Varðanum», bind XVII bls. 204. 2) A. C. E., skjal 24, dagssett 1/8 1529. 3) A. C. E., skjal 26 og 27. 4) Dagssett 28. nov. 1529, prentað í «Varðanum», bind XVII bls. 205. 5) A. C. E., skjal 30, N.R.R., bind I. 6) A. C. E., skjal 3, 4 og 6.

rættin og ivaleyst eisini frí handilsrættindi, men óivað er her ikki sipað til setan av bispum.

Gravsteinur yvir Hilarius bisp hevur verið til staðar í Kirkjubø langt upp í tíðina, sum vitni siga frá,[1]) men kortini vita vit ikki nú, hvat ár hann doyði. Eftir hann kenna vit bert navnið á einum Hilianus ella Chilianus bispi, og má hann vera deyður 1532,[2]) tí 1. jan. 1533 varð síðsti katólski bispurin í Føroyum, Ámundur Ólavsson, settur í starv av Fríðriki kongi I.[3]) Tá hevði kongur tikið sær vald at seta bispin. Skjal vísir tó, at Ámundur, sum hevði verið kannikur í Bjørgvin gjørdist Føroya bispur «efter deres kår og begæring, som der på landet bo», og at hann fekk bispadømið fyri lívstíð við at rinda kongi 1000 føroyskar gyllin og lova honum og hansara eftirmonnum lýdni og trúskap á allan hátt. Kallsbrævið tykist soleiðis at benda á, at føroyingar hava sett á at fáa Ámund í Føroya bispastól; men hetta merkir óivað bert, at prestaskapurin í Føroyum ella Føroya kirkja hevur viljað havt hann. Harav tora vit ikki at ætla, at Ámundur hevur verið føroyingur; helst hevur hann verið norðmaður. At kongur setti bisp fyrst í árinum 1533, vísir, hvussu nær tá var komið upp undir siðaskiftið.

Hin norska kirkjan, umboðað av Ólavi Engilbrektssyni erkibispi, reisti høvur móti kongi fyri tað ræði, hann tá vildi taka sær yvir kirkjuni. Somuleiðis harmaðist erkibispurin um tapið av vesturhavslondum Noregs, at týskarar vóru farnir at ráða í Føroyum og á Íslandi, sum sigst í brævi 19. mai 1531.[4]) Hann vildi hava hesi lond aftur undir Bjørgvins hús. Hin katólska kirkjan í Noreg gjørdist norsk tjóðverja í hesi tíðini, táið siðaskiftið fór at ota seg inn á landið.

Sagt hevur verið eftir C. F. Nielsen prest,[5]) at Heini Jóansson Havreki gjørdist skrivari hjá Ámundi bispi í Kirkjubø innan siðaskiftið, men prógv er fyri, at hann var meira enn skrivari. Hann var katólskur sóknarprestur í Suðurstreymoy. Í Varðanum, bind XII síðu 84, hevur A. Degn prentað kvittunarlepa, sum Heini saman við øðrum manni hevur skrivað í Tórshavn 2. aug. 1533, og sum byrjar so:

«Jeg Heine Jonssøn, sognepræst udi Strømsyd [Suðurstreym] i Færø og Mattis Jude i Nolsøen i samme land kende og gøre vitterligt med dette vort åbne brev...» Hetta brævið er til Eske Bille um nakran við, hesir menn hava fingið úr Noreg.

Heini Jóansson hevur altso verið katólskur sóknarprestur í Suðurstreymoy 1533, og ætlandi hevur hann tá búð í Kirkjubø og viðurin kann hava verið til ábót á bispagarðin. Ein nólsoyingur, ættaður úr Jútlandi, hevur verið saman við honum í viðakeypi.

---

1) A. M. 259, 8°°: «Hilarius biscop i Færø ligger begravet under en ligsten på Kirkebø kirkegård i Færø. Stenen er bleven ulæselig undtagen navnet, og årstallet kand ikke heller læses. Relatio Dom. Mulleri studiosi Færøensis,» helst sonur av Norðstreymoyar presti, Christopher Larssøn Müller, vísir tá aftur í tíðina stutt eftir ár 1700. 2) Sjá «Varðan» bind XVII bls. 198. 3) A. C. E., skjal 34 og A. M. 259, 8°°: «1532 blef Åmund Oluffsøn udvalgt til Bisp på Ferrøe, hand gaf kongen (Friderico I) 1000 ferrøes fl. (ɔ: gylden) for hans confirmats oc vaar en canick til Bergen. Arild Hvidtfeld in vita, Frid. I., pag. 361.» N. R. R., bind I. 4) A. C. E., bræv 29. 5) Færøernes geistlige stat, Fåborg 1879.



Í 1524 var sum sagt Tormóður Sjúrðarson Føroya løgmaður. Hann tykist at vera deyður 1531, tí 4. des. hetta ár[1]) er Andras Guttormsson í hvørt fall vorðin Føroya løgmaður. Óivað hevur politiska vald bispsins verið størri enn løgmannsins; tí skrivar Eske Bille sum nevnt 28. mai 1529[2]) til bispsins um at hjálpa sær við at fáa hendur á kongsskattin í Føroyum. At hetta um siðaskiftið kann hava sett ein vissan klovning í millum teir fremstu menninar á landi, er ikki óhugsandi. Sjálvt um bispur um siðaskiftið var bundin av kongi, kundi hann ikki glaðlyntur ganga við til kongsins krav um ræði yvir kirkjuni. Løgmaður hevur óivað sum verandi av norskari løgmannsætt kent seg bundnan at Noreg og ríkisráði tess. Hin vegin noyddist hann í síni kapping við bispin um tekki hjá kongi at halda seg har, sum kongsvaldið í Føroyum var. Hetta kemur til sjóndar í teim samfelagsdráttum, sum Føroyar bylgjast undir um siðaskiftismundið.

Siðaskiftið í Danmark—Noreg førdi við sær, at einki veruliga katólsk kongsevni beyð sær fram, táið Fríðrikur I doyði 10. apríl 1533. Katolikkar royndu fyrst yngra son Fríðriks kongs, Hans, sum var barn, men valdu skjótt at berjast fyri Kristiani kongi II, sum sat fangi á Sønderborg. Gjøgnum Háland var hann veruliga nógv ávirkaður av lutherdóminum, hóast hann var svágur við týska keisaran, Karl V. Í 1531 var hann farin við herflota úr Hálandi til Noregs, hvar hann fekk nakað av viðhaldi. Hin katólska kirkjan í Noreg styðjaði hann, hóast menn fullvæl vistu, at hann var ikki álítandi katolikkur, og fyrst í november 1532 sigur Ólavur Engilbrektsson erkibispur eisini í brævi, at hann aldri hevði styðjað Kristian kong, um hann hevði annað í at velja[3]). Í juli 1532 gav Kristian II seg í tingingar við menn Fríðriks kongs í Oslo, og lovaði farbróðirin honum tá frítt at koma til Danmarkar at tingast við hann sjálvan og frítt at fara aftur av landinum, um hann vildi. Kristian tók við tilboðnum, og Fríðrikur kongur setti hann tá fastan á Sønderborg.

Soleiðis vóru viðurskiftini, táið Fríðrikur kongur I doyði á Gottorp, og hitt sonevnda greivastríðið um valdið í dansk—norska ríkinum byrjaði. Hóast bardagin fyrst stóð um at fáa Kristian kong II, sum tá sat fangi á Sønderborg, aftur í kongasæti, var nógv annað við í leikinum. Hansastaðurin, Lübeck, við sínum borgmeistara, Jørgen Wullenweber, vildi hava handilsræði sítt í norðurlondum grundfest, og við tí í kvittan styðjaði býurin Kristoffer greiva av Oldenborg, ið segði seg at berjast fyri at fáa Kristian kong II aftur á trúnuna. Aftanfyri lá eisini stríðið millum hina katólsku kirkjuna og lutherdómin. Kristoffur greivi legði skjótt alt Sæland undir seg, men nógvir hildu, at hann var ikki so íðin eftir at fáa Kristian kong leysan. Heldur ikki lá trúarstríðið hjá greivanum so greitt fyri. Lübeck var soleiðis mest ein lutherskur býur. Tá var tað týðuligari, hvat hin ungi Kristian, sonur Fríðriks kongs, vildi sum kongsevni. Sum hertogi í Slesvík—Holstein hevði hann víst sítt lutherska sinnalag, og teir luthersk sinnaðu í landinum tóku tí heldur undir við honum. Holsteinararnir styðjaðu hendan Kristian, og táið 3 ár vóru runnin,

---

1) A. G. E., skjal 31. 2) A. C. E., skjal 21. 3) A. C. E., skjal 33.

var hann 1536 vorðin dansk-norskur kongur undir navninum Kristian III. Tá gjørdist lutherdómurin eisini statskirkja bæði í Danmark og Noregi, men erkibispurin í Tróndheimi, Ólavur Engilbrektsson, bardist tó leingi fyri teirri katólsku kirkjuni og rýmdi fyrst av landi 1537.

Hansastaðurin Hamborg hoyrdi tá við til dansk-norska ríkið, og har hevði hin ungi Kristian at byrja við undir greivastríðnum alt valdið. Hann legði tí skjótt alt Jútland undir seg. Lagamanni var tá hjá Hamborgar keypmonnum at leggja vestur í hav til Føroya og fáa viðmæli til tess frá hinum unga Kristiani, ið skjótt kallaði seg Kristian kong III.

Joachim Wullenweber, ið var hamborgari eins og Thomas Koppen, sló seg tó beinan vegin í part við Lübeck, helst av teirri grund, at Kristoffur greivi alt fyri eitt hevði kríggseydnuna við sær, men kanska eisini tí, at borgmeistarin í Lübeck, Jørgen Wullenweber, var bróðir hansara. Í brævi, Ámundur bispur sendi Eske Bille 17. juni 1533[1]) saman við pundi (24 merkur) av amber, minnir hann á, at hann hevði goldið kongi 1000 føroyskar gyllin, og afturímóti hevði kongur givið honum bispastólin í Føroyum fyri lívstíð. Bispur skrivar tí nú til Eske fyri at fáa fulla greiðu á viðurskiftunum í Danmark og Noreg, tí hann hevði kenslu av, at Joachim Wullenweber, sum tá hevur verið í Føroyum, segði føroyingum ikki sannleikan. Joachim, segði bispur, hevði lagt hond á alla skuld, keypmenn í Bjørgvin átti í Føroyum, og skipið, bispur skuldi senda til Noregs við vørum, vildi Joachim tøma og hótti við at taka bæði segl og stýri frá tí. Vaðmali fekk skipið at endanum loyvi at fara av stað við, men ongum øðrum. Eftir drúgvar tingingar slapp bispur tó við at leggja 20 leypar av fjøður eftir. Í fjør, segði bispur, hindraði hann eisini skipi mínum at sigla, og, legði hann aftrat, soleiðis bera keypmenn seg at móti føroyingum.

Tað er týðuligt, at bispur hevði ringt orð til allar keypmenn í Føroyum, og tó hevur Joachim í somu syftu, 15. aug 1533,[2]) fingið viðmælisskriv frá Føroya løgtingi. Av tí sæst, at hann hevur ætlað at skúgva Thomas Koppen burtur og sjálvur fáa allar Føroyar í len. Í brævinum verður sagt:

«Kom fore os herre Joachim Wullenweber, rådmand i Hamborg, og spurgte biskop og lagmand og lagrettesmænd og menige almue, hvorledes han haver begået sig og skikket sig med al sin håndtæring både med ord og gerning. Herpå svarede biskop og lagmand og menige almue, at han haver begået sig og skikket sig som en ærlig og retfærdig dannamand her på Færø, og hermed er os alle vitterligt, at forn. herre Joachim Wullenweber haver avreit [avleveret] kongens indstøde på alle hans gårde og alle hans steder så fuldt som han modtog, som Jon Nilsson på kongens vegne vel at nøje er, begærende derhos af kongen og riddere og riddersmænds mænd,

---

[1]) Sjá Varðan, bind XVII, síðu 206. Føroyskir gyllin síggjast her fyrstu ferð nevndir í skjali. [2]) Upprunaskjalið finnst enn á savni eftir Arna Magnusson í Keypmannahavn við bispsins og løgmannsins innsiglum undir, Diplom Norvegica C 2 b, avrit á ríkisskjalasavninum, Langebeks Diplomatarium.



såfremt der er muligt, de da ville forlene bemeldte Joachim Wullenweber deres og kronens land Færøy, fordi han haver holdet dem ved lov og ret og alle gamle gode sædvaner, som deres herres kongens bog udviser, og at han måtte være kongens ombudsmand der i landet.»

Bispur og løgmaður hava undirskrivað brævið. Jon Nilsson man hava verið kongsins fúti tá í løtuni. Eftir hesum brævi skuldi Joachim hava skikkað sær væl í Føroyum; men hann hevur óivað sjálvur verið møttur á løgtingi, tá skrivið hevur verið viðtikið. Hann visti væl, at kongsskifti var í umbúna, og hevði roynt brøgd síni undir slíkum viðurskiftum áður. Stríð kom tí skjótt upp um Føroyar millum Noregs ríkisráð og Hamborg, sum fekk stuðil frá hinum komandi konginum, Kristiani III. Her skuldi Joachim verið uttanveltaður, men kom kortini inn í hetta stríð saman við Lübeck.

Innan kongsval kom fyri, varð norskur harradagur settur at vera í Búð í Romsdalinum seinra part av sumri 1533.[1]) Hesin fundur sær út til at hava verið um Mariumessu í hoyna,[2]) og av uppritum til fundarskrá, sum enn eru til, sæst týðuliga, at ætlan hevur verið at fáa varðveitt gomul norsk landsrættindi viðvíkjandi vesturhavslondunum. Tí var spurningurin um Føroyar eisini viðgjørdur her. Á hesum norska harradegi hevur krav verið frammi um, at Føroyar skuldu aftur verða lagdar undir Bjørgvins hús, hvar tær høvdu verið av fornari tíð. Hetta frættist í Hamborg, og hin 15. mars 1534[3]) er bræv skrivað haðani og sent Eske Bille, høvuðsmanninum á Bjørgvins húsi, ið verður biðin um at lata Thomas von Koppen hava lenið Føroyar í friði. Eske Bille hevur annars givið norska harradeginum lyfti um at vilja rætta seg eftir krøvum hansara. Hvat hesi krøv vóru, sæst av brævið 10. apríl 1534, sum bispurin í Bjørgvin, Ólavur Torkilsson, og Vincent Lunge, tá høvuðsmaður á Vardoyhúsi, sendu føroyingum, her sett við vanligari danskari stavseting:

«Vi efterskrevne Oluf med Guds nåde biskop i Bergen og Vincent Lunge, ridder og høvedsmand til Vardøhus, af Norges riges råd hilse Eder værdige med Gud fader, hr. Amund med Guds nåde biskop i Færø, ærlig og fornuftig mand Anders Guttormsøn lagmand med menige almue der sammested boende og besiddende, kærligen med Gud og sankta Oluf konning.

Vider, kære venner, at efter højmægtigste højbårne fyrstes og herres hr. Frederiks med Guds nåde Danmarks, Venders og Goters konning, udvalgte konge til Norge, hertug i Slesvig, Holstein, Stormarn og Ditmarsken, greve i Oldenborg og Delmenhorst, alles vor kæreste og nådigste herre og konges død og affald, hvis sjæl Gud forbarme evindelig, da stod der en almindelig herredag udi Bod [Búð] i Romsdal norder her i riget om vor frue dag, udi hvilken mange Norges riges og dets ølandes orter [steder] og ledemods mærkelige ærende, lejligheder og stor magtpåliggende sager bleve overvejede, betragtede og forhandlede og iblandt andre mange om Norges krones øland og dets menige indbyggeres nytte, bestand og gavn, Færøer, hvilket som nu udi nogle år uden Norges riges råds råd, vilje og samtykke havde været under nogle købmænd af Hamborg, Jacob [Joachim]

---

[1]) A. C. E., skjal 38 og 39. [2]) 15. august. [3]) A. C. E., skjal 40.

Wullenweber og Thomas Koppen kaldede, som aldrig nogen tid have ansøgt, fordret eller begæret noget samtykke af Norges riges råd derpå, ej heller det begærende og fordrende skulle og ej endnu heller derpå nogen rigsens råds samtykke påkomme skulle. Thi det er vel højligen befrygtende, at dersom de Hamborgere fik sligt et Norges krones øland udi nogen langsom besiddelse, at de vel med tiden skulle bjude til at hævde landet under sig og undan [bortfra] Norges krone, som det afhændes og af arilds tid underligget haver og endnu underliggende og tilhørende er, af hvilket tvist, tvedragt, skade, fordærv, krig og riget merkelig afdrægt tilføjes og opvokse kunde udi mange måder. Desligest at de varer, som i samme land Færø pleje at falde altid af gammel arilds tid føres, sælges og forhandles her i Bergen Norges riges indbyggere og besynderligen den menige søfarende mand, som Nordlandene bruger, og så desligest Norges krones borgere her i staden med samt købmændene udi dette tyske kontor, besiddende til ophold, profit og bedste; ej kan heller slig vare uden dens, som fornævnt står, storebrøst og skade ombæres. Da, kære venner, for slig forbenævnt lejligheds og sagers skyld, og andre flere, som nu ikke udtrykkes eller forklares, da have værdigste værdige fædre, hr. erkebisp, bisp, prælater, riddere og riddersmænds mænd, Norges riges råd, alle endrægteligen afsagt forn. hamborgske købmænd forn. land Færø med al dets kongelige rente, herlighed, handel og vandel og af den fuldmagt, de have udi frafald vor rette herres og konges; på Norges krones vegne igen lovet, tilsagt, bevilget, samtykt, befalet, bebrevet og beseglet ærlig velbyrdig mand strenge ridder, hr. Eske Bille, høvedsmand til Bergenhus, forn. land med al sin kongelige rente og rettighed, dermed eder alle på Norges krones vegne udi værg, forsvar og befaling at have. Derfor vi eder alle gunstig og kærlig tryggeligen og troligen bede, fuldkommeligen råde og på Norges krones vegne strengeligen og alvorligen bjude, at I ingenlunde efter denne dag svare eller nogen eders rente, afgift, skat eller hvilkensomhelst kongelig herlighed eller rettighed udgive forn. hamborgske købmænd, men beholde den i landet hos eder af os på Norges krones vegne beslagen og kværsat, indtil så længe I ydermere fange Norges riges råds alvorlige brev og skrivelse, hvad som I eder fuldkommeligen efterrette skulle, og dersom forn. Jacob Wullenweber midlertid der til landet kommende vorder, da forbjude vi eder fuldkommeligen og alvorligen dennem nogen rente, vis eller uvis, at give i nogenhånde måde, såfremt I ikke ville trænges til dobbelt skat et år at udgive skulle og findes siden for Norges krones utro, uhørsomme og genstridige undersåtter, hvilket Gud forbyde og os ingenlunde forhåbes udi nogenhånde måde. Her vider at rette eder efter fuldkommeligen, værende alle om et råd bestandig, om nogen eder herudover høde [tvinge], trænge eller true vilde til, hvilket vi på Norges krones vegne eder som gode tro, villige undersåtter bør at gøre, ganske og aldeles tilbetro og fuldkommeligen os tilforlade befalende eder Gud almægtigste evindeligen. Datum i Bergen fredagen i påskeugen anno domino 1534 under vore indsegl etc.»[1])

[1]) A. C. E., skjal 41.



Av brævinum sæst, at norska ríkisráðið eftir deyða Fríðriks kongs I royndi at taka sær kongsvald í norskum kongsspurningum, og at tað kravdi Føroyar undir Bjørgvins hús, hvar tær høvdu verið av fyrndartíð. Ráðið krevur, at hamborgarmenn ongan kongsskatt fáa úr Føroyum, men at hesin skattur skal ganga til Bjørgvins. Greivastríðið í Danmark var longu brostið á, og kongsevnini vóru Kristian kongar II, sum sat fastur í Sønderborg, og sonur Fríðriks kongs, Kristian hertogi í Slesvík-Holstein, men norska ríkisráðið segði einki um sína støðu í hesum máli. Vit vita kortini, at norska ríkisráðið ikki sørt hevur styðjað Kristian kong II, tí við honum vónaði katólska kirkjan í Noreg at halda sítt veldi; eina fremstur í ríkisráðnum var eisini Ólavur Engilbrektsson, erkibispur í Tróndheimi. Katólsk sinnaðir vóru eisini aðrir menn í ríkisráðnum, teirra millum Eske Bille, tó ikki dyggur katolikkur.

Hitt norska ríkisráðið gekk sína egnu norsku leið og tók sær fyribils kongsvald í landinum. Føroyar skuldu koma undir Eske Bille, høvuðsmannin á Bjørgvins húsi. Joachim stóð í samarbeiði við Lübeck, ið styðjaði Kristoffur greiva og Kristian kong II fyri at vinna sær frama í handilsskapi. Tí finna vit brátt keypmenn úr Lübeck við sínum handilsskapi í Føroyum. Eske Bille hevði lovað at rætta seg eftir norska ríkisráðnum. Soleiðis komu hansastaðirnir, Hamborg og Lübeck, hvør í sín part í greivastríðnum, meðan Noreg fyribils gekk sína egnu leið við erkibispinum Ólavi Engilbrektssyni á odda.

Við viðmælisskrivi sínum til Joachim Wullenweber høvdu Føroyar veruliga kastað seg í part við Lübeck ella Kristiani kongi II. Við skrivi 23. apríl 1534[1]) heilsar Eske Bille føroyingum við Gudi og sankta Ólavi kongi — katólsk heilsan — kunnugt gerandi, «at I som Norges riges rette medbyggere og indfødte mænd og forskrevne Færø et sandt og vist Norges krones land og ledemod, Færø, ej skulle komme udi nogen langsom heft og besidning under Hamborg, de andre steders eller nogen anden udenlandsk eller fremmed værge og ikke forbenævnte Norges rige og krone udi fremtiden til nogen fejde og afbræk eller eder selv til skade og fordærv.» Ríkisdagurin í Búð, sigur Eske, hevði álagt honum at leggja Føroyar undir Bjørgvins hús, og at hann, Eske, og eingin annar skuldi hava tað kongsgjaldið, menn vóru vanir at lata úr Føroyum.

Styðjaður av Kristiani kongi III setti umboðsmaðurin hjá Thomasi Koppen, Hans Thehus, seg hart ímóti, at Eske Bille skuldi hava nakað gjald úr oyggjunum. Hetta sæst av tveimum brøvum frá Ólavi erkibispi og øðrum norskum ríkisráðum, dagssett 23. juni 1534, annað til Ámund bisp, Andras løgmann og Føroya fólk og hitt til Hans Thehus.[2]) Harav sæst, at Hans Thehus hevði tikið gjald av Føroyum Thomas Koppens vegna, og at Eske ongan pening hevði fingið, men at skip hansara noyddist at sigla tómt aftur til Noregs. Føroya fólk verður tí biðið um at goyma allan kongsskattin hjá sær sjálvum til næsta norska harradag. Hans Thehus fær álagt ongan kongsskatt at heinta úr Føroyum og annars ikki at vera Eske Bille til meina. Hendir slíkt, kann hann vænta at verða drigin til svars.

[1]) Prentað í «Varðanum», bind XVII bls. 208. [2]) A. C. E., skjal 42 og 43.

Beinan vegin hetta brævið frá Eske Bille kom til Føroya, tykjast bæði Føroya bispur og løgmaður at hava svarað. Løgmaður var glaður um avgerð norska ríkisráðsins. Bræv hansara, dagssett í Tórshavn 23. mai 1534, ljóðar soleiðis:

«Min ydmyge, pligtige, tro tjeneste nu og altid ganske gerne redebon eder min yderste magt og mue.

Takker jeg eder ganske ydmygelige og gerne for al skrivelse, som I mig og almuen tilskrevet haver i mangfoldig måde og flere gode herrer i Norges riges råd, at det land Færø skulle ikke længer under hamborger være eller nogen anden fremmed, meden under Norges riges krone, som det af gammel tid været haver; det vare vi vel tilfredse med. Så var og jeg med al min magt og formue gerne medhjælpende. Vor kongelige majestæts brev, som de hamborgere have her i landet, forbjuder os, at ej skat, leje eller rettighed nogen give skulle uden dennem efter deres befalingsbrev. Inte mer på denne tid, meden eder liv, sjæl, gods og pendinge og alt, I vel vil, den hellige trefoldighed befalende.

Skrevet i Thorshavn in profesto pentecostes anno domino 1534.[1])

*Anders Guttormsson,*
lagmand i Ffereye.

Ærlig og velbyrdig mand og strenge ridder hr. Eske Bille, høvedsmand på Bergenhus, ydmygelige sendes dette brev. Ex autographo chartaceo.»[2])

Svarið, Eske Bille fekk frá Ámundi bispi, dagssett í Kirkjubø 30. mai 1534, var soljóðandi:

«Vi Amunder med Guds tålemod biskop i Færø hilse eder Eske Bille kærlig og venlig og eders kære fru Sophie desligeste nu og altid.

Takke Vi eder kærlig for eders venlige skænk, som I Os tidt og ofte skænkt have og Vore folk kærlig til vilje haver været, hvilket Vi med Guds miskund altid gerne forskylde ville, og sende Vi eder nu en liden skænk, 1 pakke vadmel, 2 løbe[3]) fjeder, 2 løbe talg, og bede Vi ydmygeligen, at I ville det ej forsmå; det skal anden tid blive bedre, når Gud vil etc. Item eders kærlighed skrev Os til om denne krones årlige leje, at den skulle arresteres og indeholdes hver hos sig, hvilket Vi og lagmanden og Jens Jude, eders tjener, da gjorde efter rigens råds kopi indhold det yderste vi kunde.

Kom da frem Hans Thehus med vor nådigste herres kong Frederiks brev på perm [pergament] skrevet med behænget majestæts insigle og lydende på Thomas Koppens livstid Færø land til forlening med al kongelig rente, og dertil kom der et papirsbrev, som var givet Thomas Koppen i Odense med elleve signet samtykkende fornævnte pergamentsbrev og skrev sig for Danmarks råd og forbydende

1) Fyri hvítusunnu. 2) D. D. R. A., Langebeks Diplomatarim. Sjá «Varðan» bind XVIII bls. 26. 3) Sjá hvat vektvirði var í *laup:* Svend Aakjær: Mål og vægt, bls. 151. Her má leypurin helst ætlast at merkja gomul norsk vág, 3 bismarapund.



her i landet nogen anden kongelig rente nogen anden ud at give uden fornævnte Thomas Koppen, og stode disse hamborgere på disse breve alt fast og sagde, de vilde den rente dette år oppebære og med sådant vilkår, at skulde den igen gives, da vilde de dobbelt betale den dem, som burde den med rette at have etc. Her, sagde de sammeledes om denne landshjælp, havde den blevet sammentaget; thi kvarsatte vi denne hver hjemme hos dem selv, indtil skrivelse kommer ydermere etc...»[1])

Eske Bille hevur altso fingið at vita úr Føroyum fyrst í juni 1534, at Thomas Koppen helt fast um sín upprunaliga lensrætt til Føroya eftir teim lensbrøvum, hann kundi vísa føroyingum, og at hann var til reiðar at verja henda rættin — eisini móti Joachim Wullenweber, sum hann sjálvboðin hevði givið helmingin av oyggjunum. Táið Thomas Koppen frætti um løgtingsins viðmælisbræv til Joachim 1533, hevur hann óivað gjørt seg til at verja sín upprunaliga rætt, sum Fríðrikur kongur I hevði givið honum 1529. Mannsterkur man hann tí hava verið í Føroyum á sumri 1534. Hetta árið tykist Joachim Wullenweber ikki at hava verið í Føroyum, men ivaleyst hava tó keypmenn úr Lübeck vitjað landið.

Eftir frammanfyri nevndu brøvum tykist Andras løgmaður at hava verið hugtikin fyri at fáa Føroyar inn undir Bjørgvin, men nevnir tó meinbogan, sum liggur í lensbrøvunum hjá Thomasi Koppen. Bispur mest sum hongur seg í henda meinbogan, og beinleiðis tráan eftir at fáa Føroyar aftur inn undir Bjørgvin sæst ikki av hansara brævi. Hetta kann tykjasi merkiligt, tá vit vita, at Ólavur Engilbrektsson erkibispur gekk á odda fyri at binda Føroyar nærri at Noreg. Ámundur hevði ivaleyst hug at binda Føroyar nærri at Noreg. Her mega vit tó minnast til, at hann óivað hevur kent seg bundnan av sínum lyfti til kongs um trúskap, táið hann fekk Føroya bispastól fyri lívstíð. Hesi viðurskifti gjørdu, at siðaskiftið varð troðkað inn á Føroyar, uttan at týðuligt stríð kom til sjóndar.

Tíðliga á ári 1535 skrivaði Kristoffur greivi av Oldenborg, sum segði seg berjast fyri Kristiani kongi II, Eske Bille bræv um at fáa fatur í landshjálpina úr Føroyum, sum Noregs ráð hevði viðtikið at fáa til vega. Hann bað um at fáa hana gjøgnum Joachim Wullenweber,[2]) og Eske Bille skrivaði tá 13. mars 1535 bræv til Føroya um hetta.[3]) Eske sat tá heftur í Lübeck, so tað var lætt hjá Kristoffur greiva at fáa fatur í honum.

Í juni 1534 skuldi Eske Bille til Danmarkar at taka lut í kongsvali, men í Oyrasundi varð hann tikin av orlogsmonnum frá Lübeck og førdur hagar sum fangi. Í Lübeck sat Eske Bille heftur til nov. 1535. Sum fangi hevði hann tað frítt, og táið Lübeck hevði tikið seg burtur úr greivastríðnum móti jólum 1535, slapp hann leysur. Haðan fór hann yvir Holstein at finna Kristian kong III, og hóast katólsk sinnaður lovaði hann honum lýdni. Síðan fór hann aftur til Noregs, men har kom nú støða hansara at vera tvískinnað við tað, at hann frammanundan hevði lovað at verja Bjørgvins hús fyri norska ríkisráðið, til kongsvalið var avgjørt. Við Ólav Engilbrektsson

1) Prentað í Varðanum» bind XVIII bls. 26. 2) A. C. E., skjal 44. 3) A. C. E., skjal 45.

erkibisp kom hann í stríð. Í sama viðfangi kallaði Ólavur Engilbrektsson saman harrafund í Tróndheimi, og á vegnum hagar tók erkibispurin Eske Bille til fanga. Eske sat nú heftur eina tíð, men slapp tó leysur móti at lova, at Bjørgvins hús skuldi verða hildið norska ríkisráðnum til handa. Av øllum hesum sæst, at Eske Bille undir greivastríðnum kundi ikki vera førur fyri at taka sær nakað víðari av Føroyum.

Í Føroyum var skilið hesa tíðina út av lagi. Landið lá sum ein kastikleppur millum teirra, sum rivust um valdið. Bræv 10. apríl 1535 sigur, at Kristian kongur III tá hevði gjørt Thomas Koppen til landsins fúta og ljósmann, og hvat tað merkir, er týðuligt. Kristian kongur III býður føroyingum at vera honum lýdnir og lata henda nýggja fúta fáa alt kongsins gjald av oyggjunum. Thomas Koppen skal harfyri halda føroyingar við sankta Ólavs lóg, og hann skal ikki loyva nøkrum at koma inn í landið við brævið frá Kristoffuri greiva ella lübecksmonnum. Thomas skal senda eitt skip um árið úr Hamborg til Føroya, og kongur setur øðrum forboð fyri at handla í landinum. Hetta bræv fekk Thomas Koppen sjálvur at flyta føroyingum:

«Vi Kristian med Guds nåde konning til Danmark, udarving til Norge, hertug udi Slesvig, Holstein, Stormarn og Ditmarsken, greve udi Oldenborg og Delmenhorst.

Hilse Vi Eder Os elskelige og værdige herre med Gud, herre Amunder, biskop udi Færø, lagmand, bønder og menige indbyggere der sammesteds kærligen med Gud og sankt Olav konning.

Kære venner. Vider, at Vi haver tiltroet og med dette Vort åbne brev tiltro og befale denne brevviser, Thomas Koppen, borger udi Vor stad Hamborg, alt Færø land der at være Vor foged og ljusmand og dermed eder alle udi værg og forsvar have.

Thi beder Vi eder alle og enhver særdeles strengeligen bjude, at I herefter ere hannem eller hans fuldmægtige bud hørige, lydige, følgagtige og bestandige gørende og givende hannem eller hans vise bud, som han tidt til eder årligen skikkende vorder, på Vore vegne eders årlige landgilde, sagøre, leding, tolden og al anden kongelig rente og rettighed, som I Os og Norges krone årligen af rette pligtigen ere at give og ingen anden. Han skal igen holde eder alle ved skel, ret og sankt Olav konnings lov og ej tilstede nogensinde af eder herimod at forurettes udi nogen måder, og om nogen andre ville tvinge sig derind på landet til eder med de lübskes greve Kristoffer eller nogen andre deres anhængeres skrivelse, at I dem sandelig ville forhindre, ligesom han eders argeste vide vil, og som eder vel drage til minde, at besluttet er, at hvert år fra Hamborg og hid til landet skal sejle et skib at gøre eder tilføringen med, hvis del I behov have og igen køber, hvis vare I haver der på landet at sælge, da have Vi befalet forn. Thomas Koppen at gøre årligen et skib rede at løbe hid med til landet og gøre eder sådan tilføring, at I der forhandle med hannem og ingen anden eller med hans fuldmægtige bud, og om der kommer nogen andre, at I da forbjude dennem der enten at købe eller sælge på landet, og at ingen af eder handler eller bruger nogen købmandsskab med dem udi nogen måde



med sådan brøde og faldsmål, som vide bør efter loven, at I alle og hver særdeles ville vide at rette eder derefter og lader det ingenlunde, befalende eder Gud almægtigste og sankt Olav konning.

Givet på Vort slot Haderslev ... med Vort signet [10/4. 1535].

*Christian.*» [1])

Kristian kongur III heilsar føroyingum her sum katolikkum, «med sankt Olav konning» og lovar at fáa teim eitt skip um árið úr Hamborg við Thomas Koppen, og at hesin skal vera *ljósmaður* teirra. Hetta kann ikki vera at fata øðrvísi, enn at Thomas Koppen skuldi fáa siðaskiftið ført inn í Føroyum. Annars setur brævið forboð fyri, at føroyingar handla við nakran annan enn Thomas Koppen og serliga vendir tað sær móti Kristoffuri greiva við sínum lübecksmonnum og tí eisini móti Joachim Wullenweber. Í hesum brævi er stríðið gjørt upp í Føroyum viðvíkjandi tí sama, sum tað stóð um í Danmark, og Noregs krav um Føroyar verður ikki nevnt við einum orði. Hvussu føroyingar í hesum stríði hava ligið millum hamar og ambolt, hava vit enn dømi um, men tað er ivaleyst, at hugur føroyinga hevur verið hjá Noreg og Bjørgvin.

Sum katólskur bispur máttu kongsins orð um, at Thomas Koppen skuldi vera ljósmaður hjá føroyingum, falla Ámundi Ólavssyni fyri bróstið, og tað er tí lætt at skilja, at hann vildi ikki vera við til at geva kongi skrivliga játtan um hetta. Hin vegin var tað honum ógjørligt at mótmæla hesum, av tí hann hevði lovað Fríðriki kongi I og eftirmonnum hansara lýdni og trúskap. Ivaleyst hevur Ámundur bispur eisini verið ímóti einum bundnum handilsskapi, helst hvat Føroya kirkju viðvíkti.

Soleiðis statt er Føroya løgting komið saman á sumri, helst á ólavsøku, 1535. Tingið hevur tá hildið seg vera noytt til at taka dagar partanna millum. Tað hevði tá bert at velja millum Hamborg og Lübeck. Katólska kirkjan í Føroyum, umboðað av Ámundi bispi, noyddist tá at falla í part við Kristiani kongi II ella Lübeck, meðan løgmaður helt seg til hin komandi kongin Kristian III og Hamborg. Hann visti óivað longu tá, at hesin var við at leggja alt Danmark undir seg. Kristian III hevði eisini sent boð til Føroya um, at Thomas Koppen hansara vegna skuldi hava allan tann skattin, sum ikki var komin úr Føroyum hesa síðstu tíðina.

Á løgtingi 1535 hava tí bispur og løgmaður verið hvør í sínum parti, og løgmaður hevur fingið hin sterkasta partin við sær fyri Thomas Koppen. Støðan á løgtingið er tí gjørd upp í brævi, dagsett í Tórshavn 15. aug. 1535.[2]) At bispur ikki er við at senda kongi hetta bræv, bendir á, at semja hevur ikki verið á tingi, og at løgmaður hevur havt meiralutan á løgtingi við sær. Harðlig uppgerð millum bisps og løgmanns man tó ikki hava verið á tingi. Brævið er soljóðandi:

---

1) D. D. R. A., D. D. K., næstsíðsta skjal í Frederiks I register. 2) Prentað í «Varðanum», bind XVIII bls. 28 (A. Degn).

«Højbyrdige fyrste og kongelig majestæt kærlig og ydmygelig sendes dette brev.

Kærlig hilsen forsend med vor herre Jesu tro kære, nådige og højbyrdige fyrste konning Kristian med Guds nåde. Gøre vi Eders nåde vitterligt, at vi have set og overlæst Eders nådes brev, som Hans Thehus, Thomas Koppens ombudsmand, berettede for biskoppen og Anders Guttormsson lagmand i Færø og al menige råd.

Alle mænd, som dette brev ser eller hører, læser, sender Anders Guttormsson lagmand i Færø, Joen Nielsson foged i samme land, Guttorm Joensson lagrettesmand i samme land og Joen Gudeleiksson svorne lagrettesmænd og Niels Joensson *koden Gods oc syne* [kvøðu Guds og sína], at beskeden mand Hans Thehus kom for biskoppen og alment råd i Færø med vor nådige herre konning Kristians brev sålydende ord, at Thomas Koppen og hans visse bud brugte der sin købmandskab og ingen anden. Forbød fornævnte Hans Thehus Herman Reinicken at sælge sit gods der i landet efter det, sum vor nådigste konnings brev indeholder. Begærede da Hans Thehus lov og ret på det, at Herman Reinicken havde købslået der i landet i fjor vinter fra sankt Olavs tid i fjor. Svarede da forskrevne Herman og skipper Hans Loss og Hans Søderberg, at vi havde ingen vis konning og måtte frit købslå der udi landet. Der svarede da Hans Thehus, at her ligger i rette konning Kristians brev. Svarede da forskrevne mænd, at han var ikke konning. Da Herman Reinicken læste vor nådigste herre konning Frederiks brev[1]), hvis sjæl Gud nåde, hvad frihed han havde hannem givet på sit gods og pendinge. Hvorpå det lydet og siger eller ej, det kan Eders nåde vel besinde, når I se konning Frederiks brev. Synes Eders elskelige nåde så, at brevet lyder ikke på Færø, da står det til Gud og Eders nåde om Hermans gods og pendinge, som hann havde der i landet solgt. Bede vi Eders nåde, at for tiden til landet måtte ikke løbe mere end et skib for den store umage, vi have haft i sommer af den store trætte, som der haver [været] i landet i år.

Bede vi Eder kærligen, kære Thomas Koppen, borger i Hamborg og min herres nådige foged over alt Færø, at I ville gøre og føre vor nådigste herres brev for konningen, hvilket vi alle forskylde ville med alt godt. Hermed Eder Gud befalende.

Skrevet i Thorshavn aszumptionis Marie Anno domino Mdxxxv.»

Ámundur bispur sæst ikki at hava verið við í hesi løgtingsavgerð, og hann letur heldur ikki navn sítt fylgja við brævinum, sum í stíli er átøkt løgmannsbrævinum til Eske Bille 23 mai 1534. Thomas Koppen skuldi bera hetta brævið fram fyri kong, og hevur hann óivað tá munnliga greitt kongi frá støðuni í Føroyum, at gøtan lá greið fyri siðaskiftinum á landi. Soleiðis sæð má siðaskiftið í Føroyum sigast at vera viðtikið á ólavsøkutingi í Tórshavn 1535,

---

[1]) Sipar óivað til kongliga staðfesting í brævi 4. des. 1531 av avtalu millum Thomas Koppen og Joachim Wullenweber um, at Wullenweber skuldi hava helvtina av Føroyum. Reiniche Hermansøn, bóndi í Kollafirði 1584, var óivað sonur Hermans Reinickens.



men fleiri ár gingu tó, innan kongsins yvirtøka av kirkjujørðini fór fram. Prestaskapurin hevur óivað fyribils verið hin sami.

Í kongsins svarbrævi til Føroya løgtings 17. febr. 1536 er hvørki Ólavur kongur ella Ámundur bispur nevndur, og lutherskur má tónin í hesum brævi sigast at vera, meðan tónin í kongsbrævinum 10 apríl 1535 var katólskur. Brævið 17. febr. 1536 er soljóðandi:

«Vi Christian med Guds nåde udvalgt konning til Danmark og Norge, hertug udi Slesvig, Holsten, Stormarn og Ditmarsken, greve udi Oldenborg og Delmenholst.

Hilse vi eder vore kære tro undersåtter, Anders Guttormsøn lagmand, Joen Nielssøn foged, Guttorm Joensen lagrettesmand, Niels Joensøn med bønder, landboer og menige almue, som bygge og bo udi Færø, kærligen med Gud og Vor nåde.

Kære venner! Vider, at Vi af eders brev og skrivelse, som I Os nu tilforskrevet have og Os ladet antvorde med Os elskelige Thomas Koppen, Vor embedsmand på Færø, have vel forstandet, hvor uskikkeligen og utilbørligen Herman Reinicken skipper, Hans Los [Loes] og Hans Syderborg [Siiderborg] have der i landet haft dennem med deres købmandskab uden alene et skib, som forn. Thomas Koppen årligen sende skal. Sammeledes også formærke Vi udi samme eders skrivelse, at forn. Herman Reinicken skipper, Hans Los og Hans Syderborg have der og åbenbart for eder sagt, at Vi ikke var ret konning udi Norges rige, som Vi dog redeligen, tilbørligen og kristeligen er af mange Norges rigsråder norden- og sønderfjælds tilkåret og kejst for konning at være over alt Norges rige.

Og thi forn. tre mænd have derover truet forn. Thomas Koppens folk og foged at ville dennem berge og slå fra landet imod forn. Vort brev og befaling, derfor bede Vi eder og bjude, at I ikke tilstede nogen anden der udi landet at bruge nogen købmandskab uden aleneste de, som forn. Thomas Koppen årligen tids skikkende vorder. Dersom nogen anden ville derover fordriste sig til at sejle imod Vor befaling, bud og brev, bruge der nogen købmandshandel, da forhindrer dennem og hjælper Os elskelige Thomas Koppens foged og befalingsmand så meget, som ret bør at handles med dennem, der konningens brev og bud ikke holde ville efter Norges lov. Sammeledes bede Vi eder og bjude, at I straks med det allerførste lade antvorde forn. Thomas Koppens bud og befalingsmand al skatten, som nu hos eder er bestandendes, når han den af eder på Vore vegne er æskendes og begærendes. Han skal derfor igen gøre Os rede og regnskab. Vi give eder også nådeligen og gunsteligen til til kende og at vide, at Gud almægtigste haver her udi Vor stad Hamborg føjet Os en god og stadig fred imellem Os og de lübske, for hvilket guddommelig magt, den Vi eder alle befale, være evigt priset og lovet til evig tid.

Skrevet udi vor stad Hamborg torsdagen næst efter sancti Valentini dag år MDXXXVI under Vort signet.»[1])

---

[1]) D. D. R. A., D. D. K., síðsta bræv í Frederiks I register.

Í hesum brævi ber kongur føroyingum tey tíðindi, at hann hevur fingið frið við Lübeck. Hetta hendi í februar 1536. Harav kundu teir ætla, at hann stóð sum sigurharri. Trekir, síggja vit, hava føroyingar verið til at lata kongsskattin av hondum, tí kongur krevur hann framvegis. Heldur ikki kann hann allur vera goldin á ólavsøku 1536.

Í brævi til Eske Bille, dagssett í Hamborg 18. febr. 1536,[1]) ger Kristian kongur III høvuðsmannin á Bjørgvins húsi varan við, at Thomas Koppen hevði klagað um, at sendimaður Eske Billes hevði verið í Føroyum og álagt føroyingum at goyma kongsins skatt, til svar kom frá norska ríkisráðnum. Kongur sigur, at hann hevur álagt Thomas Koppen at heinta skattin í Føroyum og biður tí Eske ikki tálma honum í hesum.

Við endan av greivastríðnum var Kristian kongur III peningaliga illa staddur, og sendi hann í januar 1536 boð til Onglands kongs um at læna sær 100.000 £. Fyri slíkan beina skuldi Ongland millum annað fáa Føroyar og Ísland,[2]) men Ongland tók ikki av tilboðnum, og lánið varð tí av ongum.

Aftur 16. februar 1537[3]) sendi Kristian kongur Eske Bille bræv um, at hann eigur ikki at tálma Thomasi Koppen í at fáa kongsskattin av Føroyum inn. Fyri at tað ikki skal henda, sigur kongur, «da give Vi eder til kende, at samme Thomas Koppen haver højborne fyrstes, Vor kære faders brev og desligeste Vort stadfæstelsesbrev på samme land.»[4]) Bræv, sum kongur hevur sent løgmanni og Nils Jóansson fúta (1535—36) áleggur eisini føroyingum at avhenda Thomasi Koppen landsskattin.[5])

Líkt er til, at kongsgjaldið av Føroyum er goldið Thomasi Koppen uttan tarn í 1537—38, og vit síggja, at kongur 1539 takkar Thomasi fyri móttøku av 100 lübskum mørkum, sum var hitt árliga kongliga lensgjaldið av oyggjunum.

Innan kongur rættuliga kundi leggja eftir kirkjugóðsinum í Føroyum, noyddist kongsgjaldið at koma í rættlag. Tekin eru til, at í 1538 hevur hann latið bisp fáa at vita, at hann ætlaði at leggja kirkjugóðsið undir seg. Millummaður kongs hevur sjálvsagt verið Thomas Koppen. Thomas tykist at hava farið lagaliga fram. Líkt er til, at hann hevur borið bispi kongsins boð og sagt seg vera harman um at noyðast at bera tey fram. Frá bispi finnst í avriti bræv, sum sipar til hesi viðurskifti. Avritið av hesum brævi man stórt sæð vera søguliga rætt.[6]) Tað er dagssett 26. mai 1538:

«*Amundus de patiencia Episcopus pharensis salutam plurimann.*[7]) Item takke Vi Eder elskelige Thomas Koppen for alle Eders ære og dygder, som I have Os og vort folk med ord og skænk i alle måder bevist [have] som en ret kristen dannemand fra det første, jeg hørte eders navn her i landet at nævne, og menig mand her i landet takker Eder synderligen for Eder skænk, I Os nu i år skænkte,

[1]) Prentað í «Varðanum», bind XVIII bls. 18. [2]) A. C. E., skjal 49. [3]) Prentað í «Varðanum», bind XVIII bls. 30. [4]) Sipar til bræv sítt 10/4 1535. [5]) N. R. R., bind I bls. 45. [6]) Prentað í «Varðanum», bind XVIII, síðu 31. [7]) Amund af Guds nåde Færøernes biskop, mange hilsener.



som var den gode tønde Hamborger og den *mør kocke*[1]). Men så skænke Vi Eder nu igen 20 gode færøske gylden[2]) med trolig venskab vel at holdes og længe at stå, *vg agato negotium circa regiam maiestatum vt confido.*[3]) Item sende Vi og eders kære hustru begge i guldpengegods som et stop vin eller to, hvilket Vi bede eders ærlighed ikke heller forsmå. Item sende Vi med Laurents[4]) en *bencke høgendevår*[5]) til eders kære hustru, at hun ville fly *skyn og skiiffuer* [?], som dertil hører, thi fjeder er her hos os, og have vi end her hos os sådanne *kysine*[6]) vår og ingen *skyn* udi, men de *skyn*, der kunde til tjene, begære vi gerne for vore penge til eder, thi som det end er, så er de andre *5 lige [ella: ulige]* lange og lige brede. Item sende Vi eder en Joachimdaler at købe tyffyn med etc.

Item, kære Thomas, som vi have forstået, at vi vare forførte for vor nådige herre, hvilket os Gud bedre! Men da var det ej ret på os ført, *quia inimicus homo hoc feminia.*[7]) Men vi skulle søge sandingen, og bede Vi eder, at I tror ikke alle skvalderstunger, *multum fortis, qui cunctorùm obstruit ora.*[8]) Thi hver siger og skriver stundom, som han vil, og ikke som det er til etc.

Ej mere i denne tid. Gører her vi i alle stykker, som vor tro hun står til eder. Vi skulle gøre det samme, når os tilsiges, *in Christo vale et vige ad multos annos.*[9])

*Papti ex casa nostra.*

Kirkebø anno domini 1538 ipso die Augustini nostro.»[10])

Kann vera, at okkurt í avritinum er komið skeivt fyri, men tað kann tó ikki skerast burtur, at bispur heldur kong hava villleitt teir, og at slatur hevur gingið millum manna um bispin og kirkjuna. Brævið kann bæði benda á, at kongur hevur verið úti eftir kirkjugóðsinum, og at onkur hevur verið úti eftir Ámundi sjálvum sum bispi fyri Føroya kirkju. Helst hanga hesi bæði saman, tí Ámundur hevði jú fingið Føroya bispastól fyri lívstíð.

Kongur var jú í peninganeyð. Táið Ólavur Engilbrektsson erkibispur var rýmdur úr Noreg 1537, tók kongur t. d. sankta Ólavs halga silvurskrín úr Tróndheims dómkirkju, smeltaði tað og gjørdi silvurdálar úr tí. Vit vita einki um, at gull- og silvurvirði hava verið á bispasetrinum í Kirkjubø, men um so var, fór tað sama vegin. Inntøkuna av kirkjujørðini í Føroyum skuldi kongur skjótt hava.

Á ólavsøku 1538 sæst eingin broyting at vera hend frá teirri tingskipan, sum verið hevði í miðaldri, uttan at løgmaður tá er nevndur undan bispinum og líkasum talar tingsins vegna. Hetta sæst av skotsmáli 15. aug. 1538, sum løgtingið gav fútanum Laufrents Pedheg. Tað byrjar soleiðis:

[1]) Mørke (?). [2]) Ámundur bispur nevnir pening bert í føroyskum gyllin. Tí man 1 gl. = 10 alin = 20 skinn ella í øðrum takstvørum hava verið vanligur tá á døgum. [3]) For at udføre opgaven hos kongelig majestæt, således som jeg stoler på. [4]) Laurents Pedheg, Føroya fúti. [5]) Bunke hynder. [6]) Koddi, úr fronskum. [7]) Fordi et fjendtligt sindet menneske har gjort dette. [8]) Meget stærkt, som stopper alles mund. [9]) Hav det godt i Kristo og lev vel i mange år. [10]) Udfærdiget fra vort hus i Kirkebø det Herrens år 1538 selve vor st. Augustins dag [26. maj deyðadagur Augustins av Canterbury, uttanfyri Bretland hildin 28. maj].

«Det bekendes jeg Anders Guttormsson lagmand i Færø og biskop Amunder Olavsson, herre Heine Jonsson officialis og alle præster og lagrettesmænd og menige almuge, som bygge og bo i forskrevne Færø, kærligen med Gud og sin herre, gørendes vi med dette vort åbne brev, at kom for os på almennarligt ting Laufrents Pedheg, foged i Færø, og spurgte, hvorledes han havde begået sig her i forskrevne Færø med ord og gerninger, og svarede menige mand hannem igen, at han havde skikket sig og begået sig som en ærlig mand både med ord og gerning og foged og købmandskab, som vi hannem takke derfor.»

Her vóru møttir á tingi prestarnir allir við bispi og hansara *officialis*. Hin gamla kirkjuliga merkingin av orðinum officialis er tann av klerkunum, sum kemur í bispsins stað, táið honum berst frá. Heini Havreki officialis hevur ivaleyst longu í 1538 havt nakað somu støðu sum próstur, og kann hann sum sovorðin væl hugsast at hava hildið skil á kirkjunnar ognarviðurskiftum. Ár 1538, ið menn eftir Chr. Djurhuus prósti frá 1759 hava nevnt siðaskiftisár í Føroyum, sæst einki avgerandi at vera hent í Føroya kirkju. Siðaskiftið tykist troðkað inn á Føroyar longu í 1535 við løgtingsviðtøku, men annars tykist alt at ganga við sama lag enn um miðjan august 1538. Í fyrstu syftu kann ikki hava verið ætlað at skifta prestaskap í Føroyum. Ámundur Ólavsson má hava virkað sum bispur alt árið 1538 og helst 2 ár aftrat. Glíðandi sæst siðaskiftið at vera komið inn á Føroyar, trýst inn á landið gjøgnum lensmannin, Thomas Koppen. Fyrst táið kongur legði hond á kirkjujørðina, varð grundarlagið heilt tikið undan teirri gomlu kirkjuskipanini. Hetta er ikki hent 1538, heldur ikki í 1539, men avgerandi stig til at leggja kirkjujørðina heilt undir kong tykist at vera tikið 1541—42.

Kann vera, at Thomas Koppen og fúti hansara (Laurents Pedheg) í Føroyum hava kravt landsskyldu av kirkjugóðsinum, innan kongur hevur gjørt fullfíggjaða tøku av jørðini undan kirkjuni. Fyrst 1541 sæst kongur av álvara at hava lagt kirkjujørðina í Føroyum heilt undir seg.

Á sumri 1541 var norski harramaðurin, Tróndur Benckestock, í Keypmannahavn, og siga tá rentumeistarin, Joachim Bech, og Christoffer Hvidtfeldt, sum árið eftir gjørdist høvuðsmaður á Bjørgvins húsi, Johan Friis ríkiskanslara frá hesum í brævi 17. august 1541.[1]) Teir leggja aftrat, at hesin Tróndur nú fer til Føroya, hvar hann eigur nógv arvagóðs. Tí mæla teir til, at kongur biður hann um somu tíð gera ein uppgerðarlista og roknskap yvir alt bispa- og kirkjugóðs í Føroyum: «Thi tykkes os både rådeligt være, at kongelig majestæt lader handle med hannem, at han tager en fuld befaling over alt biskops gods og anden gejstlig rente og rettighed der på landet og gør kongelig majestæt deraf godt regnskab, første år han kan vel bekomme, dersom han tager sig det over, og han får befalingsbrev både til alt landet og Thomas Koppens befalingsmand.»

Eftir hesum man kongsins tøka av bispa- og kirkjugóðsinum í Føroyum vera fullgjørd 1542, og góðsið er tá lagt undir Christoffer

[1]) «Varðin», bind 18, bls. 33.



Hvidtfeldt, høvuðsmannin á Bjørgvins húsi. Tó er líkt til, at triðingur av kirkjugóðsinum framvegis hevur ligið undir kirkjuni at løna prestunum og bispi við.

Undir hesum umstøðum tykist Ámundur Ólavsson at vera farin frá sum virkandi bispur, og orsøkin man hava verið tann, at hann hevur sett seg ímóti hesi nýskipan, og at hin katólska læran treivst undir hansara kirkjuleiðslu.

Í «Varðanum» 1938, bind XVIII bls. 158, skrivar J. Dahl próstur grein: *Føroya seinasti biskupur*, eitt 400-ára minni. Prósturin sigur, at 1538 vórðu allir teir katólsku prestarnir avsettir uttan tveir: Mortan bróðir í Suðurstreymoy og Andras bróðir í Suðuroy, og greiðir hann víðari frá, at teir avsettu prestarnir fingu Traðargarð á Sandi at liva av.[1]) Í somu grein sigur prósturin, at Ámundur bispur doyði í kloystrinum í Antvortskov 1551. Hetta ljóðar merkiligt, tá vit í kongligum skjali 17. okt. 1551 í «Tegnelser over alle lande» á ríkisskjalasavninum síggja, at kongur áleggur *Ámundi bispi í Føroyum*[2]) at skiljast frá frillu síni, annars skuldi bæði verða sett føst á Bjørgvins húsi. Hvar Ámundur hevur búð um hetta mundið, er ilt at siga. Ikki kann hann kortini tá hava virkað sum bispur í Føroyum.

Eftir Ámund kom hin lutherski bispurin, Jens Gregersøn Riber, men ringt er at siga gjølla, nær hann er komin til Føroya. Eftir skjalinum 15. aug. 1538 kunna vit ætla, at hann kann ikki vera komin hetta árið. Líkt kundi heldur verið til, at Jens Riber er komin til Føroya nakað um somu tíð, sum Tróndur Benckestock varð biðin um at gera kirkjugóðsið í Føroyum upp, kanska beint áður. Hóast J. Dahl próstur í grein síni í «Varðanum» einki nevnir um, hvaðan hann hevur sína vitan, er líkt til, at onkur kelda liggur aftanfyri, tá hann sigur, at 29. juli 1541 vígdi Jens Riber bispur teir sjey fyrstu evangelisku sóknarprestarnar í Føroyum, og at teir vóru: Mortan í Suðurstreymoy, Andras í Suðuroy, Peder Jensen í Vágum, Jóan Lydersen í Sandoy, Peder Lydersen í Norðurstreymoy, Heini Jóansson Havreki í Eysturoy og Skovtred Jørundarson í Norðuroyum.

Ilt er at siga nakað um, hvussu álítandi henda kelda J. Dahls er,[3]) men vit síggja beinan vegin, at tá allir katólskir prestar skuldu verða avsettir í 1538 uttan tveir, er tað løgið, at teir luthersku prestarnir fyrst skulu vera vígdir á ólavsøku 1541, altso 3 ár aftaná. Um prestavígslan 1541 er søguliga røtt, kann avsetingin av teim katólsku prestunum 1538 ikki vera tað. Prestaloysi kann ikki hava verið í Føroyum í 3 ár.

Hin søguliga mannagongdin í Føroyum er rímuligast henda: Eftir at Thomas Koppen gjøgnum fúta sín í Føroyum hevði trýst á Ámund bisp fyri ídnari at virka fyri teirri nýggju læruni og eisini biðið hann givið kongi uppgerð av kirkjugóðsinum í Føroyum, hevur bispur aftrað seg og roynt at vinna tíð. Kongur kann tá hava sent Jens Riber til Føroya, kanska á sumri 1540, fyri at fáa skil á teim kirkju-

[1]) Hendan garðin sæst Sandoyar sýslumaður, Jóan Jóansson, at hava fest 6. august 1571. Sjá «Varðan», bind 18 bls. 38. [2]) A. C. E., skjal 72. [3]) C. F. Nielsen sigur í «Færøernes gejstlige stat», at Jens Riber ólavsøkudag 1541 skal hava vígt nevndu prestar, men vísir á onga keldu. Rit C. F. Nielsens vísir seg í nógvum førum óálítandi.

ligu viðurskiftunum. Hann kundi tá haft talað við Ámund bisp og allar prestarnar. Úrslitið av hansara kanning kann hava verið, at kirkjan í Føroyum enn ikki veruliga hevði tikið við hini nýggju læruni. Tá kann ein uppreinsing hugsast at hava verið í kirkjuni. Á bispagarðinum í Kirkjubø man Ámundur enn hava búð, og til uppgerðin kom, man Heini Havreki officialis eisini hava búð har. Hann kann væl hugsast at hava hjálpt Tróndi Benckestock við uppgerðini av kirkjugóðsinum. Aftaná kann hann vera settur í Eysturoyar kall. Tveir bispar mega tá hugsast eina tíð at hava búð á bispagarðinum í Kirkjubø. Ámundur var jú settur fyri lívstíð, men hevur ikki virkað longur í embætinum.

Táið Jens Riber er komin á bispagarðin í Kirkjubø, man Morten Jespersøn Bronck vera vorðin hjálparmaður hansara, og av fyrsta sinni man hann tá hava búð í Kirkjubø. Seinni vita vit, at hann er fluttur til Havnar at búgva. Hin gamli prestaskúlin, seinni látínskúlin, kann soleiðis hava hildið fram á staðnum. Táið vit 1547 hoyra, at kongur gav skúlanum 100 lübskar merkur í árligan studning, prógvar hetta bert, at kirkjan eftir at hava mist góðs sítt (1542) hevur verið ov veik peningaliga til at halda skúlanum uppi.

Í Norske rigsregistranter undir 24. febr. 1544 eru nøkur fá orð um, at kongur gav Thomas Koppen 2 partar av kirkjugóðsinum í Føroyum at umsita, men árið eftir, altso 1545, man kirkjugóðsið veruliga verið tikið frá Bjørgvins húsi og givið Thomasi Koppen, tí bræv hetta árið í Norske rigsregistranter er soljóðandi:

«Til undersåtterne på kongens og kronens land Færø, at kongen har tiltroet og befalet Thomas Koppen, embedsmand på Færø, at skulle oppebære og til sig annamme al kronens landgilde, sagøre og al anden rente både gejstlig og verdslig, som kongen der på landet tilkommer. Han skal selv nyde og beholde den verdslige rente og indkomst, som han hidtil har nydt og oppebåret efter sit forleningsbrev, som han modtog af Frederik den I, og hvad han på kongens vegne modtager af det gejstlige gods og rente, som Christoffer Hvidtfeldt, embedsmand på Bergenhus slot, eller hans fuldmægtige foged før ham der på landet oppebåret haver, det skal han hvert år gøre klart register og regnskab for og forvende til kongens gavn. Og for at Danmarks og Norges indbyggere herefter ikke skulle blive besværede eller mod gammel sædvane blive forhindrede i deres næring, skal det efter den dag være dem frit og åbent for at handle og sejle til Færø, som de af gammel tid gjort have, dog skulle ingen tyske eller andre udenlandske med nogen sejlads eller anden handel besøge landet uden aleneste Thomas Koppen efter hans forleningsbrevs lydelse. Undersåtterne der på Færø skulle derfor give Th. Koppen eller hans foged al den verdslige og gejstlige rente og rettighed, som kongen tilkommer, og de hidtil have givet ham [Koppen] og Christoffer Hvidtfeldt. Thomas Koppen skal atter holde dem ved Norges og Færøs lov og ret.»

Herav sæst, at høvuðsmaðurin á Bjørgvins húsi, Christoffer Hvidtfeldt, til 1544 hevði havt tveir partar av kirkjugóðsinum í Føroyum undir sær. Hetta góðsið verður nu tikið frá Bjørgvins húsi og givið Thomasi Koppen, men aftur ímóti fær Bjørgvin loyvi at nýta



síni gomlu handilsrættindi í Føroyum, tó við ongum forrættindum fram um aðrar ríkisins íbúgvar. Henda loysanin av handilsbandinum vísir, at kongur tá hevur hildið siðaskiftið í Føroya kirkju hava fest seg. Thomas Koppen, sum framman undan hevði allan Føroya handil undir sær, sat framvegis sterkur á landi. Nú hevði hann øll kongsings rættindi undir sær, eisini kirkjugóðsið, men loyst var bert eitt sindur fyri fríum handli.

Eftir lensbrævi sínum frá 1529 skuldi Thomas Koppen fyri at kunna njóta øll kongsins verðsligu rættindi í Føroyum lata kongi árliga til handa 100 merkur lübskar, og vit finna henda pening at ganga aftur í gjaldinum, kongur fær frá honum upp um 1550. Frá 1546 er eingin kvittan at finna; men í 1547 síggja vit, at Thomas aftrat fær kvittan fyri avgjald av kirkjugóðsinum, sama síggja vit fyri 1548.[1]) Av hesum tykist týðuligt, at Thomas Koppen fyri kirkjugóðsið hevur latið 600 merkur lübskar árliga, men 200 merkur hevur hann eftir kongsins boðum goldið í Føroyum. Harav fekk hospitalið á Argjum 100 merkur og skúlin (látínskúlin) 100.[2]) Ein triðingur av hinum gamla kirkjugóðsinum tykist enn tá at hava ligið undir teirri føroysku kirkjuni mest sum prestalønir.

Av hesum at ætla, at bæði látínskúlin í Føroyum og hospitalið á Argjum júst eru sett á stovn í 1547, er ov nógv avgjørt, táið vit vita, at frammanundan hevði prestaskúli verið á bispasetrinum í Kirkjubø. Rímuligt er tá at hugsa sær, at hesin látínskúli var framhald av prestaskúlanum í siðaskiftisanda, soleiðis at næmingar úr honum nú aftaná skuldu á lærda háskúlan í Keypmannahavn fyri at gerast prestar, tí har hevði Luthers læra fingið sín trygga lærustól. Søguliga rætt kann tað heldur ikki vera at rokna við, at hospitalið á Argjum er stovnsett av kongi um 1547, táið vit vita, at tað hevur havt somu skipan sum øll spitalsk sjúkrahús í miðaldri, Sankt Jørgensgarðarnir, og at hesir vóru skipaðir av teirri katólsku kirkjuni. Katólska kirkjan í miðaldri hevði eisini bæði skúlaskap og sjúkrahús undir sær. Fylgjan av, at kongur eftir siðaskiftið legði kirkjugóðsið í Føroyum undir seg, var sjálvsagt tann, at hin føroyska kirkjan kom at standa fíggjarliga veik, og at bæði skúlin og hospitalið máttu hava kongligan studning fyri at kunna halda fram. Hetta hevur verið neyðugt bæði fyri kirkjuna og fyri, at hin spitalska sjúkan skuldi ikki fáa loyvi at breiða seg. Kongur noyddist tí fyri ein part at taka sær av hesum.

Seks ár eftir, at Guttormur løgmaður Andrasson tók við starvi í 1544, fekk hann lívsbræv upp á festið úti á Bø í Kirkjubø,[3]) og soleiðis síggja vit, at kongur longu tá tók ein stóran part av sjálvum Kirkjubøgarði undan bispinum. Tann triðing, sum hin føroyska kirkjan fyrst eftir siðaskiftið fekk loyvi at hava av sínum gamla góðsi, tykist kongur líðandi at hava minkað um, til ikki annað var eftir enn sjálvir prestagarðarnir uttan náðisgarðar. Undir hesum viðurskiftum hava bispagarðurin og kirkjan í Kirkjubø verið illa farin, tí við brævi 16. okt. 1551 gav kongur Jens Gregersøn bispi loyvi at senda 12—14 lesta skip til Noregs eftir viði, sum skuldi verða

[1]) A. C. E., skjal 56, 59 og 61. [2]) A. C. E., skjal 59. [3]) Sjá A. C. E., skjal 52 og 64.

nýttur til at væla um kirkjuna og bispagarðin.[1]) Væl kann tað vera, at bispurin aldri hevur nýtt hetta loyvi, tí 5 ár seinri rýmdi hann úr Føroyum. Bispasetrið í Føroyum lá oyði.

Ikki man handilsskapurin hjá Bjørgvins monnum hava nervað handilin hjá Thomasi Koppen í Føroyum nógv; men handilsloyvi teirra man tó hava givið teimum vón um at fáa Føroyar aftur lagdar inn undir Bjørgvins hús. Síðst í 1552 man Thomas Koppen vera deyður, tí longu 18. febr. 1553[2]) fær høvuðsmaðurin á Bjørgvins húsi, Christoffer Hvidtfeldt, boð um, at Føroyar nú eftir deyða Thomasar verða at leggja undir Bjørgvins hús, og at øll landsskuldin úr Føroyum frá hesum degi skal fara til hansara. Hann skal tí skunda sær at senda sín fúta til Føroya. Longu í febr. sama ár var ráðið í Keypmannahavn hjá kongi við bøn um, at býurin mátti fáa loyvi til frítt at handla við Føroyar.[3]) Kongur svaraði, at hann hevði í hesum umfari lagt oyggjarnar undir Bjørgvins hús, men at hann tó hevði avgjørt, at handilin í Føroyum skuldi vera fríur fyri allar íbúgvar í Noreg og Danmark. Í eitt ár skuldi einkjan eftir Thomas Koppen, segði kongur, njóta rættindi eftir mann sín av Føroyum.[4])

## b. Føroyar á skiftandi hondum.

Til 1556 var tá handilin við Føroyar fríur fyri allar ríkisins íbúgvar, men útlendingum var noktað at handla við Føroyar, segði kongur. Kongur fekk skjótt njósn um, at Thomas Koppen undirhonds hevði loyvt útlendskum monnum at handla í Føroyum, og hann setti tí 1556 strong forboð fyri, at slíkt mátti henda, og 20. febr. sama ár sigur kongur ráðnum í Bjørgvin frá, at hann sjálvur ætlar at reka allan Føroya handil,[5]) og at tað bert loyvdist Bjørgvins monnum at koma aftur til Føroya fyri at krevja inn skuldir sínar.

Hesin kongligi einahandilin vardi bert í trý ár. Grundirnar fyri tí vita vit ikki, men vit vita, at virðið av øllum peningamynti minkaði stórliga í hesi tíðini, og at vørurnar hækkaðu í myntprísi, men allur handil í Føroyum var vørubýti. Um viðurskiftini í Føroyum vita vit annars lítið; men ólevnað við sjóræning á landi tykist at hava vundið upp á seg, kanska nógv av teirri grund, at so hart var stongt fyri øllum fremmandum handli í Føroyum. Hesi árini var Mikkjal Skrivari, borgari í Keypmannahavn, kongsins fúti í Føroyum,[6]) og 27. febr. 1557 síggja vit, at hann hevur fingið kvittan fyri at hava avhent kongi 20 gyllin og 3 gullringar, sum hann hevði fingið í eini føroyskari kirkju.[7]) Hesir gyllin hava ætlandi verið í mynti, í so fall útlendskir. Hin 19. okt. sama ár læt Mikkjal aftur inn í kongsins skattkamar 20 dupultar dukátir og 30 rosenoblar[8]), sum hann eisini hevði fingið í Føroyum. Líkt kann tí vera til, at kongur hevur

1) A. C. E., skjal 71. 2) A. C. E., skjal 75. 3) A. C. E., skjal 77. 4) A. C. E., skjal 60. 5) A. C. E., skjal 84. 6) A. C. E., skjal 85 og 86. 7) A. C. E., skjal 87. 8) Dukát merkti fínan gullmynt, gullgyllin. Rosenobel var stórur fínur enskur gullmyntur o. u. 17 enskar skilingar. Sjá A. C. E., skjal 88,



roynt at fáa fatur á allan gullmynt, sum var í Føroyum. Mikkjal Skrivari var ikki bert fúti í Føroyum, men hann hevði øll kongsins umboð í hondum, eisini handilin. Kongur skuldi eiga tríggjar fjórðingar av tí, landið gav av sær, og Mikkjal ein.[1]) Hetta sæst av kongsbrævi 17. apríl 1556 í «Norske rigsregistranter». Í 1559 er líkt til, at kongur hevur havt annan umboðsmann fyri seg í Føroyum. Hetta árið hava føroyskir bøndur klagað til kongs um, at fútar hansara í Føroyum hava sett teir frá gørðum sínum uttan grund fyri at lata aðrar menn koma á garðarnar í staðin.[2]) Kongur avger tá, at bóndi skal sita fastur á kongsins garði, um hann heldur garðin í standi og svarar leigu sína í rættari tíð, samstundis sum hann er lýðin og ger sínar tegnskyldur. Vanligt má tí hava verið eftir siðaskiftið, at kongsbóndi var settur frá garði.

Hetta árið, 1559, var Fríðrikur II vorðin kongur, og 2. nov. sama ár letur kongur umboðsmann sín í Føroyum, Anders Jude, fáa oyggjarnar í len.[3]) Samstundis endurtekur hann forboðið, at noktað var øllum øðrum at handla við føroyingar uttan Anders Jude. Kristoffur Valkendorf var tá vorðin høvuðsmaður á Bjørgvins húsi og var farin undir at skerja handilsveldi hansiatanna í Noreg. Í 1563 brast á 7-ára kríggið millum Danmarkar og Sviaríkis, og um alt ríki sítt sendir tá Fríðrikur kongur II boð um almennan skatt og landshjálp; hetta boðið kom eisini til Føroya.[4]) Av kongsbrævi 5. mars 1565 síggja vit, at føroyingar hava borið seg undan og biðið um at sleppa frá hesum skatti, av tí at teir vóru so fíggjarliga veikir, og kongur sigur seg tá hava «nådigst undt og tilladt, at I mue blive forskånet samme hjælp at udgive . . ., dog så, at I eder imod Os udi al underdanigst troskab beviser.»[5])

Hin 1. okt. 1565 sendir kongur føroyingum bræv um og 3. okt. sama ár sigur hann høvuðsmanninum á Bjørgvins húsi, Erik Rosenkrands, frá, at Føroyar aftur verða lagdar undir hann.[6]) Hann skal tí krevja hitt vanliga kongsgjaldið av landinum. Brátt kemur kongur tó í tankar um, at faðir hansara hevði lagt oyggjarnar undir Keypmannahavn, tá hann tók tær frá Hamborg, og longu 3. mars 1566 sendir hann Erik Rosenkrandsi boð um, at hann hevði umrátt seg, og at hann vil hava oyggjarnar liggjandi beinleiðis undir sær sjálvum og Keypmannahavn.[7]) Sama dag sendir kongur føroyingum bræv um, at hann hevði hoyrt, at nógvir av teimum selja sína óðalsjørð,[8]) og hann áleggur teimum at selja sær jørðina heldur enn at lata hana koma á aðrar hendur.[9]) Fúti hansara, Anders Madssøn, sum tykist at vera sami maður sum Anders Jude, skal keypa jørðina kongsins vegna. Frá útheiminum vita vit, at ullin í árunum 1540—1580 hækkaði til meira enn tvífalt peningavirði. Annars vita vit lítið um henda kongliga einahandil í Føroyum. Vit síggja at kongur um somu tíð hevur sent føroyskar vørur til Hálands fyri at rinda sína skuld har.[10])

1) A. C. E., skjal 85. 2) A. C. E., skjal 94. 3) A. C. E., skjal 92. 4) A. C. E., skjal 95 og 100. 5) A. C. E., skjal 106. 6) A. C. E., skjal 108 og 109. 7) A. C. E., skjal 111. 8) A. C. E., skjal 110. 9) Longu í brævi 20. nov. 1564 síggja vit, kongur hevur keypt 8 merkur í Skúvoy (Stórastovugarð) frá Margrethe Jacobsdatter, fødd í Føroyum, men búsett í Malmø. Sjá «Varðan, bind XVIII bls. 36. 10) A. C. E., skjal 107, sjá eisini skjal 112 og 117.

Nevndi Andras Júti tykist at hava farið órættuliga fram móti føroyingum, og óivað hevur hann ognað sær sjálvum ein part av teirri jørð, sum kongur skuldi hava, tí 25. juni 1567 skrivar kongur løgrættinum í Føroyum bræv um, at hann hevur hoyrt, hvussu fútin skal hava frátikið føroyingum jørð, og at rætturin aftraði seg við at døma fútan í slíkum trætumáli.[1]) Kongur krevur tá av løgtinginum, at tað ger rætt og skjal og gevur dómar sínar skrivliga frá sær. Í 1568 sendir kongur Mourits Skrivara til Føroya fyri at skriva upp tær klagur, føroyingar høvdu um Andras Júta, og síðan leggja tær fram fyri kong.[2])

Ikki man kongur hava funnið atburðin hjá Andras Júta fellandi, tí árið eftir, 1559, gevur hann honum saman við Mads Lampe Føroya handil í len fyri 100 gamlar dálar árliga,[3]) og samstundis sigur hann føroyingum frá, at hann sendir Mourits Skrivara til Føroya at vera kongsins fúti har. Skal hann krevja inn kongsins vanliga gjald av landinum. Hetta gjaldið, sum var í vørum, skal fútin lata inn í handilin, og fyri tað skulu keypmenninir lata kongi til handa ein gamlan dála fyri hvønn føroyskan gyllin. Hin føroyski peningagyllinin er her nevndur í skjali og settur javnt ein gamlan dála.[4]) Keypmenninir skulu nýta føroyska vekt og alin, sum var eins og tann, ið nýtt var í Bjørgvin, og teir skuldu halda gamlar prísir á øllum vørum. Tað vildi sjálvsagt siga, at lutfallið í prísinum millum innfluttar vørur og føroyskar útflutningsvørur skuldi standa við. Undir slíkum treytum fingu Mads Lampe og Andras Júti lyfti um at hava Føroya handil í 4 ár. Føroyar lógu framvegis fast undir Keypmannahavn, tí báðir handilshavararnir vóru keypmannahavnskir borgarar. Longu í 1569 klagaði Guttormur løgmaður føroyinga vegna um tað stóra viðatrot, sum var í landinum, og bað um rætt til eftir gomlum siði at senda skip til Noregs. Kongur svaraði í brævi 7. juli 1569, at um Mads Lampe og Andras Júti, sum Føroya handil áttu, ikki førdu landinum nóg nógvan við, skuldi føroyingum sjálvum vera loyvt at heinta við úr Noreg við egnum skipi, og hann leggur aftrat, at um føroyingar høvdu meira at klaga um, kundu løgtingið senda løgmann við tveimum ella fleiri av landsins monnum til sín næsta vár, fyri at kongur kundi gerast kunnugur við hesar klagur.[5])

Júst í hesum árunum hoyra vit um ein føroying, Nils Helgason, sum er farin út at sigla, og er hann longu tá skipari. Longu í skjali 24. apríl 1567 er hann nevndur: «Niels Helgessøn, skipper på samme øer [Føroyar»]; í sama skjali er Claus Grøn sagdur at vera fúti í Føroyum. Um 1570 tykist Nils Helgason at hava siglt millum Bjørgvins og Rostocks, og hevur hann tá óivað verið fast búgvandi í Bjørgvin.[6])

Guttormur løgmaður, sum í 1555 hevði fingið Steigargarð til løgmannsgarð, fekk 26. des. 1570 garðin á Sundi leigufrían fyri lívstíð,[7]) og tað er væl hugsandi, at hann sum løgmaður hevur ætlað sær hagar at búgva fyri at vera tingstøðunum nærri. Um hetta mundið

1) A. C. E., skjal 115. 2) A. C. E., skjal 116 og 120. 3) A. C. E., skjal 118 og 119. 4) A. C. E., skjal 119. 5) A. C. E., skjal 121. 6) A. C. E., skjal 114, 122, 124, 125 og 129. 7) A. C. E., skjal 81 og 127.



var hann sum løgtingsins sendimaður, ætlandi við øðrum monnum, í Keypmannahavn. Tað sæst, at hann hevur verið har allan veturin 1570—71 og tingað um handilsviðurskifti føroyinga, tí í brævi 7. mars 1571 gevur kongur føroyingum lyfti um sjálvir at fáa landsins handil um hendur, og at teir fyribils fáa loyvi at halda eitt viðaskip gangandi til Noregs, tí fullmakt um beinleiðis yvirtøku av Føroya handli høvdu útsendingar føroyinga ikki havt.[1]) Óivað skuldi málið verða lagt fyri komandi løgting. Í hesum brævi tekur kongur soleiðis til:

«Vore undersåtter, menige bønder og almue, som bygge og bo på Vort land Færø, have nu haft hos Os deres fuldmægtige og beklaget, at hvis vare, som til dem indføres af vore fogeder, som Vi have tilforordnet at skulle forsørge landet med købmandsskab, bygningstømmer og hvis anden del, de behov have, dem så højt foresættes og opstiges, at de ikke kunne formå det at købe og betale. Sammeledes berette de og at hvis vare, de igen skulle sælge, nødes de til for halv værd at afhænde, hvorover deres næring og bjering dem betages, så de ikke formå til Os og kronen at udgive hvis rente og rettighed, de Os pleje og pligtige ere at give og gøre, da have Vi derfor af Vor synderlig gunst og nåde undt og bevilget og nu med dette Vort åbne brev unde og bevilge, at dersom forn. indbyggere på forn. Vort land Færø ville herefter give Os og kronen sådanne afgift, som forn. Vore fogeder og købmænd Os hertil gjort og givet haver, som er en gammel daler af hver færøske gylden vare, der falder på landet udi al visse og uvisse rente, da mue de selv beholde alle varer og dem sælge og afhænde der på landet eller andensteds, hvor dem selv godt synes, og dertil bruge så mange skibe, som de kunne afstedkomme, og dermed bruge deres næring og bjering og søge deres gavn og fordel, udi hvis måde dem og landet kan være nytteligst og mest gavnligt; dog ville Vi selv tilforordne en skriver, som skal blive på landet forn. vare og rente at oppebære, visse og uvisse, og til dem overantvorde og derfor årligen at gøre Os gode rede og klart regnskab, og skal ingen mue bruge nogen handel eller købmandskab der på landet end forn. Vore undersåtter på forn. Vort land Færø.» Føroyingar skulu nú sjálvir avgera, um teir taka við hesum handilsrættindum, sigur kongur, men eitt 24 lesta viðaskip kunnu teir tó fyribils nýta at sigla við til Noregs. Av brævinum sæst, at avgerðin um handilin skuldi verða tikin á komandi løgtingi.

Nú hendi tann vanlukka, at Guttormur løgmaður kom sjúkur úr Keypmannahavn til Bjørgvins síðst í mars 1571 við skipinum hjá Nils Helgason, sum hevði ligið innifryst í Rostock um veturin. Har doyði Guttormur 19. mai 1571, og hann varð har gravsettur í kórinum á dómkirkjuni í Bjørgvin 21. mai. Bispur og prestar vóru til staðar og stór mannfjøld bæði av norskum og týskum.[2]) Guttormur løgmaður kom soleiðis aldri at fáa Sundsgarð, og Mads Lampe og Andras Júti kundu tá hava vón um framvegis at sleppa at sita við Føroya handli.

Kortini mega vit ætla, at spurningurin um handilin hevur verið

1) A. C. E., skjal 128. 2) A. C. E., skjal 129, 130 og 131.

lagdur fyri Føroya løgting á sumri 1571, og ivaleyst hevur tingið eisini tikið til viðgerðar, hvør ið skuldi gerast løgmaður eftir Guttorm. Vit vita, at løgtingið vanliga gav kongi uppskot um løgmannsevni. Hin 16. aug. kom skip úr Føroyum til Bjørgvins við tveimum løgmannsevnum, sigur Absalon Pedersøn í kapitilsbók síni.[1]) Menninir vóru Jóan Heinason og Peder Oden, og 3. jan. 1572 setti so kongur Jóan Heinason sum Føroya løgmann.[2]) Hann tykist henda veturin at hava verið í Keypmannahavn og havt løgtingsins besta viðmæli. Sama veturin man hann hava fyrilagt kongi løgtingsins ummæli í handilsspurninginum, tí 18. des 1571 avger kongur málið soleiðis, at føroyingar skulu sjálvir hava handilin undir teim treytum, sum áður eru nevndar, og at Føroyar aftur skulu verða lagdar undir Bjørgvins hús, sum nú skuldi taka móti øllum kongligum gjaldi úr Føroyum.[3])

Viðvíkjandi handlinum høvdu føroyingar mest klagað um, at prísurin á teirra útflutningsvørum nú ikki vigaði upp meira enn til helvtar av prísinum á innfluttum vørum. Soleiðis síggja vit, at príshækkanin í Føroyum ikki kann vera farin javnt fram á innfluttum og útfluttum vørum. Skipan føroyinga við handlinum, nú teir sjálvir fingu hann um hendur, man ikki hava verið hin besta. Guttormur løgmaður, sum mest hevði fingist við henda spurning, var nú burtur, og yvirlitsskipan hevur væl eingin verið. Keypmenn í Bjørgvin hava óivað havt handilin á hondum fyri føroyingar, sum tað hóskaði teimum best. Kongur sæst ikki at hava fingið tað gjald, sum hann eftir sáttmálanum skuldi hava, og vørutilflutningurin hevur verið, sum best bar til. Longu 3. nov. 1573 gav kongur Jochim Thim úr Hamborg loyvi at handla við føroyingar, men hann fekk tó ongan onkarrætt.[4]) Føroyingar kundu enn handla, sum teir sjálvir vildu. At føroyingar hava havt eftirstøðu hjá kongi, sæst av brævi 16. aug. 1575, hvar Føroya bøndur verða kravdir eftir gjaldi frá jóanssøku 1573 til jóanssøku 1575 og eftir tvørrandi roknskapi.[5]) Nú høvdu føroyingar roynt sjálvir at handla. Óroyndir sum føroyingar vóru í handilsskapi gjøgnum langar tíðir, var slík fríhandilsroynd sum henda undir øllum umstøðum dømd til at miseydnast. Gjøgnum Bjørgvin tykjast føroyingar í hesi tíðini tó at hava verið vandir nakað í sjómannsskapi.

Henda fríhandilsroynd stóð við til 1578. Tá sigur kongur, óivað eftir Chr. Valkendorfs ráðum, høvuðsmanninum á Bjørgvins húsi frá, at hann ætlar at leggja Føroya handil beinleiðis undir seg.[6]) Hetta varð gjørt í brævi 21. febr., og kongur leggur aftrat, at høvuðsmaðurin skal siga við keypmenn í Bjørgvin ikki at sigla til Føroya á sumri 1578. Um somu tíð var Magnus Heinason heimkomin úr Hálandi, hvar hann hevði verið í hertænastu hjá Morits av Oranjen í o. u. 10 ár, og haðani hevði hann við sær besta skrivliga viðmæli til Fríðrik kong II. Magnus man beinan vegin hava hugtikið Fríðrik kong, tí vinmenn gjørdust teir fyri lívið. Í brævi 17. apríl 1578 síggja vit, at kongur loyvir Magnusi at fara til Føroya at krevja inn skuld, hann hevði útistandandi har.[7]) Hetta tykist at benda á, at

[1]) A. C. E., skjal 132. [2]) A. C. E., skjal 136. [3]) A. C. E., skjal 134. [4]) A. C. E., skjal 138. [5]) A. C. E., skjal 140. [6]) A. C. E., skjal 141. [7]) A. C. E., skjal 142.



Magnus hevur verið aftur úr Hálandi longu í 1577, og at hann hetta árið hevur handlað við føroyingar. Ogn hansara hjá føroyingum kann ikki vera frá tíðini, innan Magnus fór í hálendska hertænastu. Kongur gevur Magnusi hetta loyvi. Ivaleyst hevur Magnus Heinason viljað havt handilin í Føroyum, og á hesi ferð síni man hann hava talað við føroyingar um hetta. Vit vita, at kongur í brævi 6. des. 1578 sigur føroyingar sjálvar at krevja handilin ella ynskja, at Magnus Heinason fær hann, og biður hann Valkendorf tingast við teir um tað.[1]) Ímóti vilja Kristoffurs Valkendorfs hevur tað verið, tá kongur í brævi 7. jan. 1579 áleggur honum at tingast við menn úr Bjørgvin um treytir, hesir skuldu lúka fyri at fáa Føroya handil undir seg.[2]) Kristoffur var jú rentumeistari kongs, og ivaleyst hevur Magnus fingið kong til at taka hetta stig. Hart man hetta hava notið at Valkendorf. Við kongsbrævi 4. febr. 1579 fekk Magnus Heinason og felagar hansara í Bjørgvin Føroya handil í len undir vanligum treytum.[3]) Kongsins skrivari ella fúti í Føroyum skuldi lata inn vørur sínar í handilin, og fyri tær skuldu Magnus og felagar hansara gjalda kongi í Keypmannahavn 1 gamlan dála fyri hvørt føroyskt gyllinsvirði, og Hans Lindenov høvuðsmaður á Bjørgvins húsi skuldi hava vissu fyri kongsins pening, innan keypmenninir fóru til Føroya. Kongur skuldi annars hava sítt fyrsta gjald til jóla 1579, og gjaldárið skuldi verða roknað frá mikkjalsmessu til mikkjalsmessu.

## c. Magnus Heinason.

Magnus Heinason og Jóan Heinason løgmaður vóru hálvbrøður og báðir synir av Heina Jóansyni presti og seinri prósti, vanliga kallaður Heini Havreki. Ættargreiningin verður givin seinri. Magnus Heinason er sagdur at vera føddur 4. mars 1545,[4]) og tá hann má ætlast at vera fluttur til Noregs við faðir sínum, ið kom hagar sum prestur 1566, skuldi hann altso tá verið 21 ára gamal. Hann var soleiðis fullvaksin maður og hevði lært føroyskan lívshátt at kenna, harvið sjólívið hjá føroyingum og sjórænara herjan á landið. Í Noreg kom Magnus Heinason í keypmannslæru hjá einum farbróður sínum í Bjørgvin, men sjógvurin átti allan hug hansara, og brátt kom hann út at sigla og fekk sjálvur skip at føra. Hann tykist eina tíð at hava siglt á føroyaferðum. Tá hann á tílíkari ferð fekk skip sítt rænt av sjórænara,[5]) tók hann sær sinnismun av hesum og rýmdi av landi til Hálands, sum tá lá í hørðum frælsisbardaga við Filip kong II av Spanialandi. Í fyrsta lagi kann hetta hava verið 1568. Hetta árið tykist Magnus fyrstu ferð at hava lært Chr. Valkendorf at kenna, sum júst tá var í Noreg fyri ríkisstýrið í lóggávuørindum.[6]) At Magnus hevur tikið lut í frælsisstríði hálendinga, er ivaleyst; men

[1]) A. C. E., skjal 143. [2]) A. C. E., skjal 144. [3]) A. C. E., skjal 145. [4]) Chr. Heilskov: Af den Heinesenske slægts saga, Kbn. 1916, bls. 33, eingin kelda, tí ivasamt um føðingardagur og -ár eru rætt. [5]) Troels Lund: Mogens Heinesøn, Kbhvn, 1877, bls. 29. [6]) Dansk biografisk leksikon, bind 25, Kbhvn. 1943, bls. 62.

hendingarnar í lívi hansara hesa tíðina eru okkum ókunnugar. Á sjónum í hálendskari tænastu mundi hann fáa sína bestu stríðsvenjing. Táið Magnus fekk Føroya handil, var hann búgvin at taka upp stríðið við sjórænararnar. Ofta var hann tó ringari mannnaður og vápnaliga verri útgjørdur enn ófriðakropparnir, og tó eydnaðist tað honum við snildi og dirvi at basa teimum.

Um hundrað ár seinri hevur Lucas Debes í bók síni fleiri frásagnir um Magnus Heinason, og harav sæst, at fólk í Føroyum við stoltleika og takksemi høvdu varðveitt minnið um Magnus í eini tíð, táið sjórán vanliga fór fram á landi, og eingin var mentur at byrgja fyri tí. Brek kundu vera í Magnusar atburði móti føroyingum, men tey høvdu teir tá longu gloymt. Ikki kann Magnus Heinason verða mettur við vanligum borgarligum máti, heldur ikki í tátíðar týdningi. Hann var bæði víkingur og renessansumenniskja.

Í hesi tíðini, tá Magnus Heinason fekk Føroya handil, hevur siglingarhugur verið til staðar hjá føroyingum; teir hava viljað hildið sær rætt til sjálvir at hava skip gangandi til Noregs eftir viði. Stórur partur av føroyingum hevur tikið móti Magnusi sum ein av sínum egnu, men noktast kann tað ikki, at handilssetur hansara var Bjørgvin. Fram um nakran annan var tó hesin býur í teirri tíðini føroyingum kærur.[1])

Úrslitið av Magnusar ferð til Føroya um várið 1578 tykist at hava verið ein sendiferð av føroyingum til Danmarkar um heystið sama ár.[2]) Sendimenninir hittu Fríðrik kong II fyrst í desember á Koldinghus og bóru har fram ynski síni um frían handil í Føroyum.[3]) Í hvørt fall vildu teir hava rætt til at halda skip sjálvir gangandi til Noregs eftir viði. Á sumri 1578 man løgtingið hava álíknað eykaskatt fyri, at henda sendimannaferð kundi koma í lag. Skjøl, sum seinri skulu verða endurgivin, vísa hetta. Ivaleyst er tað, at Magnus hevur verið við í hesum krøvum føroyinga. Hetta alt endaði sum nevnt við, at Magnus Heinason við nøkrum feløgum fekk Føroya handil í 1579, og óivað var hetta eisini eftir ynski føroyinga.

Í 1579 var Andras Júti deyður, men hann átti enn til góðar hjá føroyingum frá síni fúta- og handilstíð bæði pening og jørð, sum hann hevði tikið í veð. Sama ár gjørdist Mats Paulssøn fúti í Føroyum,[4]) og kongur gav honum boð um at lata arvingarnar eftir Andras Júta krevja inn tað, Andras enn átti til góðar í Føroyum í peningi, men jørðina, hann hevði í veð, skuldi kongur sjálvur hava.

Beinan vegin Magnus Heinason hevði fingið handilin í Føroyum hendi stórt rán í Tinganesi um jóansøkuna 1579. Ein sjórænari, Klerck, ið var komin á land í Havn, tók nógv góðs úr leigubúðini og úr handlinum.[5]) Sami sjórænari hevði hetta árið eisini verið undir Íslandi. Í oktober sama ár var hann sæddur undir Hetlandi av bretlendinginum, Jákup Alday, sum fyri Fríðrik kong II hevði gjørt miseydn-

[1]) A. C. E., skjal 137, ár 1572: «Begraven en mand født på Færø, hed Jacob, haver Jon Heineson, lagmand i Færø, hans søster, døde han af småkopper, hvilke som regere fast i dette nye år i Bergen og mange dø af dem .... samme dag var en tyv hængt, som stjal fra Bærent Færøsk.» [2]) A. C. E., skjal 143. [3]) Troels Lund: Mogens Heinesøn, bls. 33. [4]) 16. mai 1579. Sjá A. C. E., skjal 146. [5]) A. C. E., skjal 147, 148, 149 og 152.



aða roynd at koma á land í Grønlandi. Hesin sjórænari var skoti, sum kongur lovaði at saksøkja, men eingin hjálp kom burtur úr tí. Magnus ætlaði at verja seg sjálvur, og vit síggja, at hann hevur heitt á kong um tað, men hevur samstundis viljað gjørt kongi eina tænastu. Uttan kongligt loyvi mátti hann ikki vápna seg. Um mánaðarskiftið nov.–des. 1579 gav kongur Magnusi loyvi til vápnaferðir á sjónum á tvinnanda hátt. Magnus kundi vápna skip sítt á handilsferðum til og frá Føroyum og har bæði verja seg móti og leypa á sjórænarar, hann hitti á leið síni, men friða sjómonnum mátti hann einki gera. Síðan skuldi Magnus gera seg út til at taka hálendingar, sum í teirri tíðini sigldu norður um Noreg til Arkangelsk fyri at handla við Rusland.[1]) Teir skuldu noyðast at sigla gjøgnum Oyrasund inn í Eystursjógvin fyri, at kongur kundi fáa sundstoll av teirra vørum. Virðið av skipum og vørum, sum Magnus á henda hátt tók, skuldi verða býtt í helvt millum hansara og kongs. Málið um sjóránið á Tinganesi er annars ummælt áður.

Tíðliga á vári 1580 kom ein hamborgari sum loynikeypmaður til Føroya við fullum skipi av vørum, og hann keypti upp hópin av føroyskum vørum, sum hann skjótt slapp sær av við.[2]) Táið Magnus hetta árið kom til Føroya við handilsskipi sínum, høvdu nógvir føroyingar gjørt seg av við allan handilsskap fyri árið. Hin 9. juli bað tá kongur høvuðsmannin á Bjørgvins húsi, Hans Lindenov, um at biðja Magnus Heinason taka henda hamborgaran og ikki vísa mildni móti honum.[3]) Seinri síggja vit, at hamborgarin hevur verið tikin, førdur til Bjørgvins og dømdur at missa alt, hann hevði. Í apríl mánað 1581 hevur tó kongur sent Chr. Valkendorf rentumeistara bræv um, at hann, kongur, hevði eftirgivið hamborgaranum helvtina av góðsinum,[4]) sum hann kundi fáa aftur í Keypmannahavn. At Chr. Valkendorf sjálvur stóð aftan fyri hesa gerð sæst av kongsbrævi 17. febr. 1581,[5]) hvar kongur sigur Valkendorf sjálvan at hava sagt sær frá, at klagurnar úr Føroyum um Magnusar handil júst vóru komnar við hesum hamborgara, sum kongsins rentumeistari tí man hava kent væl. Ivaleyst er tað tí, at hesin sami hamborgari, sum ikki er nevndur, man hava verið Jochim Thim, ið var væl kendur í Føroyum og kongsins keypmaður í Hamborg. Valkendorf hevur, sum seinri sæst, hildið hond sína yvir henda mannin.[6]) Í hesum umgangi fekk Valkendorf kortini ikki sín vilja, tí Magnus Heinason var tá sjálvur í Danmørk og talaði við kong á Skanderborg sloti um standin við Føroya handil. Hann gav kongi síni lyfti um framtíðina, og við kongsins brævi um, at hann framvegis skuldi hava handilin í Føroyum, fór Magnus tá til Chr. Valkendorf.[7]) Hamborgarin skuldi heldur einki fáa eftirgoldið. Seinri man kongur tó í hesum spurningi sum nevnt hava boygt seg fyri Valkendorf. Bæði í 1579 og 1580 hevði handilin hjá Magnusi í Føroyum soleiðis verið fyri óhappi, og rentumeistarin tykist mestsum at hava styðjað hin hamborgska loynikeypmannin.

Móti Chr. Valkendorf hevur Magnus Heinason tó á vetri 1581

[1]) A. C. E., skjal 149, 151 og 159. [2]) A. C. E., skjal 157. [3]) A. C. E., skjal 159. [4]) A. C. E., skjal 164. [5]) A. C. E., skjal 160. [6]) A. C. E., skjal 159. [7]) A. C. E., skjal 160.

kent seg á veikum føti. Hann hevur tilboðið kongi sína tænastu við at leita upp Grønland við tveimum av sínum skipum, sum hann sjálvur skuldi reiða út, sum sæst av kongsbrævi 18. febr. 1581, og dagin fyri tekur kongur við brævi Magnus Heinason og alt hús hansara undir sína vernd.[1]) Hamborgaran tykist Chr. Valkendorf mestsum at hava nýtt ímóti Magnusi. Valkendorf ynskti tó ikki Føroya handil aftur á hamborgara hendur, men hann vildi hava henda handil lagdan undir Keypmannahavn, sum týðuliga sæst av kongsbrævi 8. febr. 1581.[2])

Sjóránið á Tingenesi 1579 kom at seta djúp merki í tátíðar føroyskum politikki. Føroyingar høvdu aftur sendimenn í Danmark á vetri 1579–80, sum kongsbræv 3. des. 1579 vísir:[3])

«Vore undersåtter på Vort land Færø nu have haft deres fuldmægtige hos Os, givendes nogen deres besværing og lejlighed til kende, først hvorledes de udi forgangen sommer af et modvilligt selskab af sørøvere, som have faldet ind på landet, ere blevne overfalden og plustrede,[4]) og befrygte, at de nu skulle lide videre skade, uden at der føres nogen gode råd til. Dernæst om nogen jordfæstning, som de siden år 56 have været besværede med, så de forn. afgifter næppeligen kunne med landskylden afstedkomme, hvorfor de ere begærendes derudi at måtte nyde nogen forskånsel. Sammeledes tilkendegives, hvorledes Anders Judes arvinger, som fordum var foged på landet, udi nogen deres gæld have bekommen nogen jordsmon og pant i dennem, hvilke jorder og pant de ere begærendes dennem at måtte følge, når de have udlagt den del, de hannem pligtige vare.»

Viðvíkjanei fyrstu klaguni svarar kongur: «Ville Vi eder alle og enhver særdeles strengeligen advaret have, at I ere fortænkt udi at have eders våben og værge til rede.» Kongur biður føroyingar verja seg sjálvar, og tað er einki at ivast um, at skansin á Stanganesi tá er farin í gerð, og at Magnus Heinason hevur staðið fyri hesum verki. Útreiðslurnar av tí eru ivaleyst fallnar á handilin ella á føroyingar, tí einki kongsskjal sigur nakað um hetta.

Um leiguklaguna sigur kongur: «Vi ville dog derom lade forfare udi Vort rentekammer og ikke lade dennem videre besværge, end som gammelt og sædvanligt haver været, og jordebogen formelder.» Eftir hesum skuldu jarðabøkur hava verið til innan 1584. Frá hesum ári eru tær fyrstu, vit kenna. Annars vita vit ikki við vissu, hvat tað er fyri leigugjald, sipað er til. Helst man tað vera ágávan, ið skuldi falla triðja hvørt ár við hálvum gyllin av hvørji mørk innangarðs. Í hesum hava føroyingar ongar sømdir fingið.

Um jørðina, sum Andras Júti hevði lagt undir seg, sigur kongur: «Da skal det være forn. Vore undersåtter frit fore at indfri til dennem samme jorder, som så ere pantsatte og selv nyde dennem, dog hvilke jorder, som er solgt til Os og kronen, dennem skulle Vi beholde efter Vort købebrevs lydelse.» Eftir Landslógini hevði maður rætt til at innloysa jørð sína í 30 ár eftir søludag, men kongur tykist sjálvur har at halda seg vera uttan fyri hesa áseting.

[1]) A.C.E., skjal 161 og 162. [2]) A.C.E., skjal 158. [3]) A.C.E., skjal 152. [4]) Sjá bls. 119.



Magnus Heinason sigur seg vera komnan til Føroya, eftir at ránið á Tinganesi var farið fram. Bæði leigubúðin og handilin høvdu liðið undir tí, og óivað var eisini tikið frá fólki yvirhøvur. Lucas Debes skrivar um 100 ár seinri, at rán av landsins kistu skuldi um somu tíð vera farið fram. Skjøl frá hesi tíðini nevna einki um tað, men harfyri kann slíkt væl vera hent. Eftir Lucasi skuldu sjórænararnir eisini havt farið illa við prestinum, harra Mortan.[1]) Í hvørt fall er prógv fyri, at teir frægastu menninir á landi hava tikið seg saman um at vísa við tølum, hvussu nógv góðs var tikið úr leigubúðini,[2]) og sjálvsagt er tað ikki óhugsandi, at Magnus, sum handilsins vegna skuldi gjalda kongi fyri hetta góðsið, hevur roynt at fáa sær prógv fyri, hvussu stórt ránið hevði verið, og at hann tí her hevði lið við í ráðum. Hetta skjalið, sum her varð gjørt, kom um ikki langa tíð hesum monnum dýrt at standa, serliga løgmanni og Magnusi, og tað gav rentumeistaranum, Chr. Valkendorf, góð vápn í hendi móti báðum brøðrunum Heinason. Skjalið, sum er dagssett í Tórshavn 26. august 1579, skal her verða endurgivið í vanligari stavseting:

«Vi efterskrevne hr. Euden Andersøn, gamle provst uden over Ferreum, hr. Torlof Gregersøn, nu provst i Fereum, hr. Morten Jespersøn Brunck, Guds ords tjener ibidem, Joen Heinesøn lagmand, Thomas Simonsøn herredsfoged og Peder Jacobsøn, svorne lagrettesmænd ibidem, kendes og gør vitterligt for alle med dette vort åbne brev, at år efter Guds byrd 1578 efter velfornuftige mands, Mads Poulsøns, kongelig majestæts fogeds registers lydelse lå her efter i stokkestue af alle (meste part) slags vare, som højbemeldte kongelig majestæts fuldmægtig oppebar, som her efterfølger, som ikke kunde komme ind i skibet foruden hans egen, som og var meget godt både af en slags vare og anden:

Fisk 133½ voger, og er deraf borte af sørøvere 119 voger, talg 3 voger 6½ skind, alt borte, skind 10 kipper og borte altsammen og 6 skind, fjer 13 voger og 4 skind er borte af 12 voger 4 skind, uld 159 voger og 1 m rk uld, er borte af 15 voger og 1 mark, salt 10 tønder borte, hjertelåse 8, som sad for kongelig majestæts døre og borte, deller [brædder] 4 tylfter er borte, alt køkkentøj borte, 2 stobe [?], landterning [?] 1, fad 10.

Nu i dette år 1579 alt, som forskrevet står, af disse umilde mennesker ødt og borttaget og meste part af alt forskrevne Mads Poulsøns med og andre flere deres, som derinde lå, og at så i sandhed er, som forskrevet står, trykker vi vores signeter neden dette vort åbne brev, som er skrevet i Thorshavn den 26. august anno 1579.»

Skjalið sigur seg at byggja á, hvat bókin hjá fútanum, Mads Poulsøn, vísti, lá eftir í leigubúðini um heystið 1578. Um bøkur fútans annars vístu, hvat inngingið var í leigubúðina og úttikið var, til ránið fór fram 1579, saman við tí, sum eftir lá aftaná ránið, skuldi harav kunnað verið sagt, hvussu nógv ránsmenninir høvdu tikið av góðsi. Formliga sæð skuldi eingin brekur verið við hesum skjali, og tó síggja vit seinri, at Chr. Valkendorf byggir sín illgruna júst á tann form, hetta skjalið hevði. Valkendorf gjørdi einki beinleiðis við hetta skjalið, men sæst at hava goymt tað væl, og óivað hevur hann seinri

[1]) L.D., «Fram»s útg. bls. 220. [2]) D.D.R.A., B 161, skjal dagssett 26/8 1579.

samanborið tað við fútaroknskapin frá Mads Poulsøn. Vit leggja til merkis, at umframt Jóan Heinason løgmann hava bæði gamli próstur og hin táverandi undirritað skjalið. Havnar prestur hevur eisini gjørt tað og síðan tveir løgrættumenn, sum báðir seinri gjørdust løgmenn í Føroyum hvør eftir annan: Pætur Jákupsson (1588—1601) løgmaður og bóndi í Kirkjubø og Tummas Símunarson (1601—1608) løgmaður og bóndi í Kaldbak. Jóan Heinasøn var hin einasti av hesum monnum, sum hetta skjal kom at geva bakslættur.

Ymist bendir á, at tað káparaloyvi, Magnus Heinason fekk frá kongi móti jólum 1579, hevur hann nýtt dúgliga longu tíðliga á vári 1580, og væl kann tað vera, at hetta hevur gingið nakað nógv út yvir hansara handilsskap. Á hin bógvin var tað neyðugt fyri allan regluligan handilsskap at fáa allar sjórænarar týndar. Her skal ikki vera endurgivið nakað um Magnusar snildi og dirvi í hesum sínum yrki. Frásagnir um hetta finnast í Lucas Debesar bók. Bert mannagongdin eftir samtíðar skjølum verður tikin við her.

Klagubrævið frá føroyingum, sum hin hamborgski loynikeypmaðurin hevði við sær úr Føroyum, var sum nevnt á merkiligan hátt komið Chr. Valkendorf í hendi. Táið Magnus Heinason tók hamborgaran, man hann hava verið á síni aðru ferð til Føroya ella frá Føroyum. Á hesi ferð hevur bræv føroyinga ikki verið við, tí so hevði Magnus fingið fatur á tað, og hann hevði ikki latið tað fallið í Valkendorfs hendur. Brævið frá føroyingum má vera komið fram til Hamborgar áður og er haðani sent til Keypmannahavnar. Í Hamborg sat Jochim Thim keypmaður. Sum kongsins keypmaður má hann hava havt føling við rentukamarið í Keypmannahavn. Persónliga hevur Jochim Thim ivaleyst ikki verið í Føroyum sum loynikeypmaður, men var brævið úr Føroyum komið til Hamborgar við einum av hansara skipum, hevði tað lætt við at finna leiðina til Keypmannahavnar. Á henda hátt kunna tíðindi um Magnusar óhoviska atburð í Føroyum verða gjørd ríkisstýrinum kunnug, og kvørnin, tey soleiðis fóru ígjøgnum, hevur óivað ikki bøtt um tey.

Chr. Valkendorf hevði tá í kvittan at gera Keypmannahavn til høvuðssetur fyri Føroya handil við at leiga handilin út til nakrar menn í Keypmannahavn. Hetta hevði hann sagt við kong og lagt fram prógv fyri, at handilin mátti verða tikin frá Magnusi Heinasyni. Á Skanderborg sloti, hvar kongur tá var staddur, skrivar hann sum nevnt Valkendorfi bræv 8. febr. 1581[1]) og sigur seg fúsan at taka við uppskotinum frá honum, tí, sigur hann, føroyingar vilja tá hava lættari við at føra fram klagur sínar fyri kong.

Magnus Heinason hevði sæð, hvat ið var í umbúna, og var tá farin beinleiðis at finna kong á Skanderborg sloti. Hann man vera komin har út um miðjan februar, og longu 16. februar[2]) sendir kongur Valkendorfi bræv, hvar hann tekur aftur lyfti sítt um at leggja Føroya handil undir Keypmannahavn. Hann vísir á tað tap, sum Magnus hevði havt av sjóráninum 1579, og av tí, at hamborgarin uppkeypti føroyskar vørur 1580. Magnus slapp tá framvegis at

1) A. C. E., skjal 158; sjællandske Tegnelser D. D. R. A. 2) A. C. E., skjal 159; sjæll. Tegn., D. D. R. A.



sita við handlinum, og komandi summar skuldi hann gera ta grønlandsferð, hann hevði lovað kongi. Eisini hevði hann lovað kongi at gerast sterkari í sínum álopum á handilsskip, sum sigldu norður um Noreg, og kongur lovaði at geva honum lóður frá sær til hjálpar.

So statt fór Magnus at búgva seg út til áðurnevndu grønlandsferð. Væl kann tað vera, at henda ferð var ein tænasta, hann persónliga hevði lovað at gera kongi, men ivaleyst man tað vera, at handilsfelag hansara í Bjørgvin kom at bera ein part av útreiðslunum. Í hesum felag vóru serliga tveir menn, Søren Andersøn og Hans Pedersøn, sum søgdu, at Magnus við órætti hevði lagt handilsfelagið undir útreiðslur av ferðini. Soleiðis varð sagt aftan á. Rætt er eisini tað, at Magnus skrivaði Søren Andersøn bræv í mars mánað úr Keypmannahavn, at kongur hevði álagt honum hesa grønlandsferð, og at tað tí var neyðugt at taka hesar útreiðslur.[1]) Fyri handilsfelagið var ferðin hjá Magnusi eisini neyðug á tann hátt, at tað hevði óivað ikki fingið síni handilsrættindi í Føroyum aftur, um Magnus ikki hevði boðið kongi at gera grønlandsferðina. Í Keypmannahavn keypti Magnus til Føroya handil nakað øl, sum seinri verður umtalað undir rættarmáli.

Tíðliga á vári 1581 er Magnus farin til Føroya, og haðani tykist størsti parturin av útreiðslunum til grønlandsferðina at vera komin: neytakjøt og seyðakjøt og kanska livandi seyður við. Meginparturin av manningini á ferðini til Grønlands tykist eisini at hava verið føroyingar. Hetta sæst av seinri endurgivnum rættarskjølum. Soleiðis útbúgvin helt Magnus Heinason ferð sína til Grønlands norður um Ísland. Hin gamla siglingarleiðin sunnan fyri Ísland suður um Hvarvið, sum umtalað er í *Konungssjá*, var monnum ókunnug í teirri tíðini, og tí helt Magnus, eins og Jákup Alday hevði gjørt 2 ár undan honum, leiðina norður um Ísland og beint vestur eftir haðani. Tað var fyrst 4 ár seinri, at bretin John Davis sigldi suður um Hvarvið, og at hann soleiðis kom leiðina fram við vesturstrond Grønlands og víðari gjøgnum Davis strætið. Magnus vildi miða seg vestur úr Snæfjallsnesi á Íslandi móti Hvítserki á Eysturgrønlandi. Hesi fjøllini vóru kend av monnum, sum vóru farnir bert eitt sindur vestur um Ísland. Harvið kom Magnus sum allir, ið høvdu roynt undan honum, í tætt pakkaðan drívís, sum førdi hann suður við Grønlands eysturstrond og í nógva toku. Fyri at koma nærri eysturbygdini, sum menn tá á døgum trúðu lá á Grønlands eysturstrond, royndi Magnus aftur tá at sigla í ein landnyrðing, men harvið gjørdist leiðin honum enn meira stongd av drívísi. Táið náttin nú tók at myrkja, mátti Magnus Heinason harmur í huga taka leiðina heim aftur, og 22. august 1581 var hann aftur í Bjørgvin.

Magnus slapp betri frá ferð síni enn Jákup Alday, hvørs skip varð nærum sundursorað, og eingin, heldur ikki kongur, kundi kasta honum ódugnaskap fyri, men úrslitið var einki annað, enn royndirnar vístu, at ógjørligt var at koma inn á Grønland eystanfrá. Eftir heimkomu Magnusar tykist kongur heldur ikki at hava havt í kvittan at taka Føroya handil frá honum og eftir Valkendorfs ætlan at leggja

1) Herredagsdombog 3. juni 1586.

hann undir Keypmannahavn. Av brævi, kongur sendi Chr. Valkendorf 27. oktbr. 1581[1]), sæst, at keypmaður hansara í Hamborg, Jochim Thim, hevði verið hjá honum og biðið um at fáa Føroya handil í len, og nú sæst kongur at vera soleiðis sinnaður, at handilin í Føroyum skuldi verða býttur millum teir stríðandi partarnar, og lutvís fekk eisini Chr. Valkendorf sín vilja framdan. Hetta sæst av kongsbrævi 1. nov. 1581,[2]) sum gevur Jochim Thim, borgara í Hamborg, Magnusi Heinasyni, borgara í Bjørgvin, og Jørgen Kyd, borgara í Keypmannahavn, rætt til í fimm ár at reka handil í Føroyum. Á hvørjum ári skuldu teir lata eitt av sínum skipum sigla gjøgnum Oyrasund, so kongsins skrivari ella fúti kundi verða fluttur fram og aftur, og føroyingar, um teir vildu, kundu koma beinleiðis fyri kong við klagum sínum. Ár teirra skuldi ganga frá mortansmessu til mortansmessu, og á føstuinngangi skuldu teir greiða kongi skyldur sínar. Ein gamlan dála fyri hvønn føroyskan gyllin í vørum, sum kongsins fúti læt inn í handilin, skuldi kongur hava, og annars vóru treytirnar tær vanligu. Við hesum hendi mestsum bert tað, at partamenn Magnusar í Bjørgvin mistu handilin í Føroyum, men útreiðslurnar av grønlandsferðini høvdu teir fingið lut í. Hetta kundi ikki blíðka teir móti Magnusi Heinasyni í trætumálum, sum seinri komu fram. Chr. Valkendorf slapp sjálvur at velja tann partafelaga, Magnus skuldi hava í Keypmannahavn. Nakað hevði so Magnus mist, og vinmaður Magnusar í Bjørgvin, Hans Lindenov høvuðsmaður á Bjørgvins húsi, sum var hansara loyniligi handilsfelagi, kundi heldur ongan vinning hava av hesi nýskipan við Føroya handli. Soleiðis lá málið viðvíkjandi handlinum fyri um heystið 1581.

Kvinnukærur maður hevði Magnus Heinason verið frá ungdómsárum. Vit vita, at hann má hava átt ein leysingason í Føroyum, áðrenn hann fyrstu ferð fór haðani 1566. Hesin var hin í søgnum nógv umrælti Rasmus Magnusson, sum seinri gjørdist bóndi í Haraldssundi. Henda sonin tykist Magnus beinan vegin at hava viðkent sær, og av hesum stóðust eingir trupulleikar. Men í Noreg kom hann verri fyri av kvinnuvoldum, og har var tað systrarnar, Margreta og Sofía Gyntersberg, sum komu at grípa inn í lagnu Magnusar. Tær vóru aðalbornar og døtur av harramanninum, Axel Gyntersberg, og konu hansara, Kristinu Benckestock. Gyntersberg átti stóran garð, Torget, á Hálogalandi, men búði annars mest í Bjørgvin. Um hetta mundið, 1581, var Margreta longu gift við lensmanninum á Norðurlandi í Noreg, Peder Hanssøn. Eisini hann var aðalborin.

Táið Magnus Heinason kom aftur av síni grønlandsferð, er hann á ein ella annan hátt komin saman við hina yngru systrina, Sofíu Gyntersberg, og henda samkoma teirra hevði havt fylgjur. Tá hendi tað merkiliga, at hin eldra systirin, Margreta, sum sat væl gift á Norðurlandi, setur fram ákæru móti Magnusi Heinasyni um, at hann í síni tíð skuldi hava neyðtikið hana. Um henda ákæran var sprottin av kærleiksøvund móti systrini ella av berum hevndarhugi móti Magnusi Heinasyni, er ilt at siga. Lóggávan tá á døgum var soleiðis vorðin, at maður, sum hevði havt við tvær systrar at gera, sjálvt um

[1]) A. C. E., skjal 165, Sjællandske Tegnelser. [2]) N. R. R., A. C. E., skjal 166.



onnur teirra var deyð, tá hin seinra hendingin fór fram, skuldi verða dømdur frá lívinum. Skjótt kom til tess, at Magnus skuldi giftast við Sofíu, men innan tað kundi henda, mátti Magnus frígera seg fyri ákæruna frá Margretu. Axel Gyntersberg, sum hevði fingið alt málið fyrilagt av Peder Hanssøn og Margretu, stevndi tá Magnusi Heinasyni fyri løgmannsrættin í Bjørgvin, men nakað um somu tíð letur Hans Lindenov Peder Hanssøn fongsla og Margretu sperra inni í stovu hjá faðir sínum. Fyri rættinum noktaði Magnus Heinason sannleikan í ákæruni, men tá Margreta helt fast við sítt, gav rætturin at endanum Magnusi loyvi til at avleggja eið, og í fyrsta umgangi slapp hann soleiðis fríur í málinum.[1])

Um heystið er hann tá í Danmark og gevur frágreiðslu um grønlandsferðina, og tá er tað, at umskipanin av Føroya handli verður avgjørd. Táið Magnus kemur aftur til Bjørgvins, er tað, at brúdleypið við Sofíu Gyntersberg skal fara fram, men Margreta, sum nú sat føst á Bjørgvins húsi, helt fast við sína ákæru móti Magnusi og vísti nú á staðin, hvar barnið, hon hevði fingið við honum, skuldi vera niðurgrivið. Staðurin var kannaður, og barnalík kom til sjóndar. Tá hendir aftur tað merkiliga, at Margreta tók alla ákæru móti Magnusi aftur. Prógvast kann ikki, at hon hevur verið ávirkað at gera hetta, men møguliga kann faðir hennara hava talað við hana um málið.

Fyrst nú var gøtan greið fyri giftarmáli hjá Magnusi við Sofíu, og 25. febr. 1582 fór brúdleypið fram við stórari veitslu á sjálvum Bjørgvins húsi, hvar Margreta sat sum fangi. Peder Hanssøn tykist at vera komin fríur beinan vegin.[2]) Framvegis kom hetta mál at kasta skuggar inn í lív Magnusar.

Magnus Heinason hevði eftir at vera frífunnin í málinum lagt nýtt sakarmál móti Peder Hanssøn og kravdi skaðabøtur av honum fyri lidnan órætt, men Peder Hanssøn svaraði, at hann hevði onga ákæru havt móti Magnusi Heinasyni, og nú tók málið heilt aðra vend, av tí at Margreta, ávirkað av Peder Hanssøn, tók upp aftur sína fyrstu ákæru móti Magnusi og segði seg hava verið noydda til í fongslinum at avsanna hana. Magnus Heinason bað tá kong um at niðurseta nevnd í Noreg til at avgera málið, og Magnus sigldi so til havs um várið 1582 í sítt vanliga starv.

Kongur setti tá lensmannin í Tróndheimi saman við øðrum monnum í hesa nevnd;[3]) men av tí at Margreta og Peder Hanssøn vóru harramannsfólk, høvdu tey onga skyldu at møta fyri slíkum rætti, og í lívs- og ærumáli var einans ríkisrætturin teirra rætta verndarting. Treyður vildi Magnus fyri ríkisrættin, tí har var tað bert harramenn, ið dømdu, og har sat Kristoffur Valkendorf. Á allan hátt royndi hann at sleppa sær undan og at fáa Peder Hanssøn til at møta fyri dómsnevndini í Bjørgvin. Bræv sent Hans Møller býfúta í Bjørgvin frá Hetlandi 16. juni 1582 tykist at benda á hesa Magnusar ætlan. Magnus má hava latið hetta brævið senda, hóast hvørki navn hansara ella innsigli stóð undir, og eintak av brævinum er aldri komið fram í rættinum skrivað við hansara hond.[4]) Sjálvur segði Magnus seinri, at ein skrivari hansara hevði sent tað, og at hann var ógvu-

[1]) T. L., bls. 86. [2]) T. L., bls. 90—92. [3]) T. L., bls. 94. [4]) T. L., bls. 96.

liga óheppin í síni málbering. Av brævinum fingu menn ta uppfatan, at Kristoffur Valkendorf og Magnus Heinason mestsum vóru í parti saman. Peder Hanssøn helt tó fast um, at hann vildi bert møta fyri ríkisráðnum, og tað endaði við, at partarnir fingu báðir boð um at møta fyri hesum rætti í Keypmannahavn mortansmessudag komandi. Teir fóru eisini av stað í rættari tíð, men táið rætturin skuldi verða settur í Keypmannahavn, var Magnus Heinason ikki møttur. Hann var farin til Hamborgar í handilsørindum. Kongur skrivaði tá til Hans Lindenov 9. des. 1582 um at fáa Magnus Heinason til vega, og hann møtti tá fyri rættinum 26. januar 1583.[1]) Ikki man hesin atburður Magnusar hava gjørt rættin blíðari sintan móti honum, og Peder Hanssøn varð tá eisini fríkendur fyri Magnusar ákæru. Av tí at Magnus var hin stevnandi parturin, kundi hann ikki verða dømdur hesa ferð.

Táið Magnus ikki møtti í rættinum fyrru ferð, hevði rentumeistarin givið Hans Lindenov boð um at leggja hond á nakað góðs, Magnus átti í Bjørgvin, fyri skuldir til kongsins kassa. Magnus skundaði sær tá at gjalda kongi tað, hann átti, og góðsið varð aftur leysgivið.[2])

Kristoffur Valkendorf hevði longu um várið 1582 havt sína ætlan um at fáa Magnus Heinason feldan á annan hátt. Hann vildi tá taka Jóan Heinason løgmann við í somu syftu. Hetta árið sendi hann Søren Christensøn Flue sum fúta til Føroya, og hann fekk álagt at kanna gjølla alt, sum fór fram viðvíkjandi Føroya handli og Føroya rættarviðurskiftum yvirhøvur. Táið Søren Flue kom aftur til Danmarkar um heystið, fór hann undir at skriva Kristoffur Valkendorf frágreiðslu um sína føroyaferð,[3]) og Valkendorf bíðaði ikki leingi við at fáa báðar brøðurnar Heinason settar úr starvi. Hetta tykist at vera hent í mars—apríl 1583, men vit kenna ikki gjølla dagin. Kristoffur Valkendorf má hava lagt frágreiðsluna frá Søren Flue fyri kong og beinan vegin fingið hann til at taka hesa avgerð. Stundir kunna ikki hava verið hjá Føroya løgtingi tá at vísa kongi á nýtt løgmannsevni, tí longu 27. apríl 1583 setur kongur Ísak Guttormsson í Føroya løgmannsstól.[4]) Hetta vísir, hvussu formleysur atburðurin hevur verið. Um somu tíð hevur kongur sett Magnus Heinason frá Føroya handli. Av kongsbrævi er eisini líkt til, at ríkisstýrið í apríl 1583 vildi taka upp til kanningar sakarmálið millum Peder Hanssøn og Margretu Gyntersberg øðrumegin og Magnus Heinason hinumegin. Sjálvsagt stóð Kristoffur Valkendorf aftan fyri alt, sum her hendi.

Frágreiðingin frá Søren Flue er týðuliga send Kristoffur Valkendorf: «Kære hr. rentemester. Giver jeg Eder på kongl. majestæts vegne venligen at vide, hvorledes det tilstår på Færø med kongelig majestæts arme undersåtter og kongelig majestæts rente og rettighed.»

Síðan greiðir Søren Flue frá, at Magnus Heinason hevur 2 ella 3 handilssveinar í Føroyum, og ein teirra, Niels Andersøn, ferðast oyggj

1) Rettertingsdom 26. jan. 1583, T. L. bls. 102. 2) T. L. bls. 105. 3) D. D. R. A., B 161, bræv til Chr. Valkendorf ikki dagssett. 4) A. C. E., skjal 173, Isak Gudmundssøn skeivt skrivað fyri Isak Guttormssøn.



av oyggj at keypa upp vørur av bóndum. Úrslitið av tí er, at tá bøndur skulu svara kongi skyldu sína, hava teir onga vøru at gjalda við. Kongur eigur fyrst at fáa gjald sítt, innan keypmenn mega keypa vørur bóndanna. Hvussu Magnus Heinason harumframt hevur borið seg at í sínum føroyska handli, kunna tygum, Valkendorf, annars fáa at vita av Palli Christensøn og Hans Didriksøn, sum hava verið handilssveinar hjá honum í Føroyum.

Á løgtingi síðsta summar, sigur Søren Flue, fingu Magnus og Jóan Heinason løgmaður viðtikið, at hvør maður í Føroyum skuldi lata hálvan gyllin í eykaskatt, og at hesin peningur skuldi verða nýttur til eina sendiferð til kongs fyri at krevja, at fólkið í Føroyum sjálvt mátti fáa loyvi at hava skip siglandi, men, leggur Søren Flue aftrat, harvið ætlar Magnus at flyta út landsins bestu vørur sjálvur, og hvat gagn kongur og føroyingar skulu hava av tí, duga tygum sjálvur at ætla.

Táið Magnus Heinason fór at leita eftir Grønlandi, fekk hann sær fólk úr Føroyum móti teirra vilja, sigur Søren Flue, og tá har var ein maður, sum noktaði at fara við, varð hann dømdur 24 gyllin í bót til kongs. Hesir skipsmenn fingu ikki meira í løn, enn Magnus sjálvur unti teim. Fólk í Føroyum góvu eisini Magnusi mat við á ferðina, neyta- og seyðakjøt, summi av góðum huga og onnur treyðugt.

Á løgtingi síðsta summar, sigur Søren Flue, kom fram 14. aug. klaga um falska alin og vekt, sum Magnusar tænari, Eggert Stadtlænder, hevði nýtt í handlinum, og tá eg á tingi kravdi dóm í hesum máli, varð tað mær noktað, og Magnus Heinason segði, at hann vildi standa til svars fyri hesa alin, sum nú lá goymd í skríni hansara.

Teir báðir brøðurnir Heinason, sigur Søren Flue, høvdu keypt upp jørð av kongsins góðsi og bygt sær hús á kongligari grund ímóti kongligari ásetan, og Jóan Heinason, sum var ein sjúkur maður, hevði tess vegna saman við Magnusi fingið fyrsta bartskera til Føroya á landsins kostnað.[1])

Um førsluna av landsins bók sigur Søren Flue:

«Item også er lagmanden meget forsømmelig, at han ikke holder landsens bog, som kongelig majestæts sager og domme bør at være skreven udi, ved magt som det sig bør, at man derefter kan vide at rette sig på kongelig majestæts vegne, og som andre lagmænd før hannem gjort haver.»[2])

Um Magnus framvegis skal hava landið, sigur fútin, vil fólkið skjótt doyggja í armóð, «thi han holder sig ikke som en af de andre dannemænd som en købmand alene der i landet, men som en regent over landet.»[3])

Eisini er løgmaður so sjúkur, at hann kann ikki ferðast runt, sum embæti hansara krevur av honum.

Ikki er hetta skrivið frá Søren Christensøn Flue sum nevnt dagssett, men helst man tað vera skrivað um heystið 1582. Hesin Søren Flue var annars býarskrivari í Keypmannahavn 1579—84, býarkassameistari 1582—83 og 1584—85, ráðmaður 1590—91 og borgmeistari

1) Gabriel Mitens. 2) Hald av gerðabók á løgtingi skuldi eftir hesum longu tá verið gamalt í Føroyum. 3) T. L., bls. 98.

1591—96. Í Føroyum var hann bert summarfúti til mikkjalsmessu 1582. Táið føroyingar frættu deyða hansara 1596, vil søgn vera við, at orðatakið: «Fáur harmar fútadeyða,» er komið.

Um várið, helst í apríl 1583, beint eftir at hann hevði mist Føroya handil, hevur Magnus Heinason sent kongi svarskiv á klaguna frá Søren Flue. Fyri at síggja, hvussu Magnus verjir fyri sær, skal alt skrivið vera endurgivið:[1])

«Stormægtige, højbårne konning, allernådigste herre.

Jeg fattig mand, Eders majestæts undersåtter, forårsages mig nødagtigen at erklære mod den ubillige angift, jeg af en foged på Færø ved navn Søren Flue, så og af tvende købsvende, mig haver tjenet, ved navn Palle Christensøn og Hans Didriksøn, hvilke, efter de underlig af min tjeneste ere mig frakomne og besynderlig den ene, som er bleven mig en mærkelig sum pendinge skyldig på sin regnskab, haver de mig, som jeg formærker, falskelig for Eders majestæts rentemester angivet og en skriftlig beretning over mig fattig mand indlagt, hvorover jeg er blevet af med landet, som Eders nåde mig nådeligen på nogen år undt havde. Da efterdi samme skrifter ere Eders majestæt tilskrevet, og Eders majestæt mig venligen dennem haver ladet til hænde komme, hvilken Eders majestæts nåde og mildhed Eders majestæt Gud almægtigste belønne, så haver jeg underdanigligen ville mig derom erklære, at Eders majestæt måtte se og fornemme mig med ubillighed for Eders majestæts rentemester at være angiven.

Bedendes underdanigst, Eders majestæt vil nådeligen denne min ringe erklæring antage, og så meget den skriftlige Søren Flues klage belanger, vil jeg have mig henskudt til de beseglede mine skudsmål der på landet, af provsten, præsterne, de fornemste der på landet er beseglede og udgiven, siden han denne klage over mig gjort, og om der nogen tvivl skulde være på deres besegling, tvivler jeg ikke, de godtfolk altid skulle være mig det stændig, når og hvor de derom tilsiges. Desforuden vil jeg gerne være overbødig at stande dennem alle og hver til rette, så mange jeg haver handlet med på landet, siden de selv nogen skade haver kunnet fanget af min handel, måtte møde med mig udi rette, og forser mig til Gud og de godtfolk, at ingen skal have årsag at klage på mig med rette.

Så meget denne Palles beretning belanger, haver han den selv med sin egen hånd underskrevet, er og Gud almægtigste og mange godtfolk vitterligt, at den tid forn. Søren Flue mig i København for rentemesteren anklagede, da var forn. Palle ikke kommen til København, men var endda i min tjeneste. Om han siden haver givet rentemesteren noget beskrevet om mig, er mig aldeles uvitterligt.

I lige måde om denne Hans Didriksøns beretning. Da var han en forløben skalk, rømt både af min og tilforne af andre godtfolks tjeneste, som af disse hosliggende breve vel er at se [eru nú ikki varðveitt], og at begge deres beretninger er aldeles falsk og løgnagtig, vil jeg bevise med mine regnskaber, som jeg haver her til

[1]) D. D. R A., D. D. K., B. 161.



stede og ere skrevne med deres egne hænder, og jeg intet kan forandre derudi, hvilke jeg vil udi Eders majestæts kancelli nederlægge med underdanigste begæring, de må artikelvis efter deres klart igennemses, så skal deres beretning findes aldeles unøjagtig [roknskapirnir eru nú ikki til].

Og efterdi jeg fattig mand uskyldigen og uafladeligen en tid lang i adskillige måder haver været anfægtet og endnu daglig eftertragtes efter min endelige fordærv og undergang, ved jeg ingen anden tilflugt end til Gud almægtigste og Eders kongelige majestæt, vil for Guds og retfærdigheds skyld mig til rette håndhæve og forsvare, at mig fattig mand ikke måtte ske nogen ubillig overlast. Det vil den almægtigste Gud Eders majestæt rigeligen belønne, og jeg fattig mand vil med mit liv og blod og, hvis jeg formår, i underdanighed findes villig det, bedst fortjener, og vil hermed have Eders majestæt den almægtigste Gud underdaneligen befalet.

Eders kongelige majestæts undersåtter, tropligtigste tjener altid.

*Magnus Heinesenn.*»

Í hesum verjubrævi sínum heldur Magnus Heinason fram, at teir báðir tænarar hansara, Palli Christensøn og Hans Didriksøn, sum Søren Flue byggir klagu sína um Magnus á, hava verið honum tveir ótrúgvir tænarar í peningaviðurskiftum, og hann prógvar tað við at leggja fram roknskapir, teir hava gjørt í hansara tænastu. Eisini vísir Magnus á vitnisskjøl um Hans Didriksøn, sum siga frá, at hann áður var rýmdur úr annara manna tænastu. Enntá bendir Magnus Heinason á, at Palli Christensøn má hava verið í hansara tænastu, tá hann hevur skrivað hetta klagubrævið um hann. Eftir hesum skuldi Søren Flue longu, meðan hann var í Føroyum á sumri 1582, hava fingið Palla til at skriva hesa klaguna um Magnus. Hetta er eitt dømi um, hvussu Søren Flue er farin fram móti Magnusi eftir Kristoffur Valkendorfs boðum. Rætt er tí tað, sum Magnus sigur, at Kristoffur Valkendorf var við rætti ella órætti úti eftir at fella hann. Sum sæst, hevur kongur sent Magnusi avrit av teim skjølum, tá lógu fyri í málinum.

Um várið 1583 hevur Kristoffur Valkendorf havt Magnus Heinason og hansara gomlu handilssveinar, Palla Christensøn og Hans Didriksøn, fyri sær í Keypmannahavn, og harav sæst bert, at hvør hevur staðið við sítt, og tá hin skrivligi vitnisburðurin frá Hans Didriksøn fyrst er dagssettur 25. apríl 1583,[1]) mega vit harav ætla, at hesin er gjørdur um somu tíð. Valkendorf vildi tá hava partarnar fyri ráðhúsrættin í Keypmannahavn, men Magnus tók bert og rýmdi sín veg aftur til Bjørgvins. Eftir hetta tykist Valkendorf at hava fingið kong til at frátaka Magnusi hansara handilsloyvi í Føroyum. Væl kann Jóan Heinason løgmaður vera avsettur um somu tíð, tí 27. apríl hetta ár síggja vit sum nevnt, at kongur hevur sett nýggjan løgmann. Kristoffur Valkendorf var vanur at handla skjótt, tá hann sá, at hann hevði takið.

[1]) D. D. R. A., D. D. K., B. 161.

Kristoffur Valkendorf gav tá høvuðsmanninum á Bjørgvins húsi, Hans Lindenov, boð um at lata løgmannsrættin í Bjørgvin kanna málið um hina ov stuttu alina. Rætturin kom saman, og hann gav frá sær fylgjandi skjal:[1])

«Da lod ærlig og velbyrdig mand, Hans Lindenov til Drenderup, høvedsmand på Bergenhus, for os fremæske ærlig og velagte mand Mogens Heinesøn på den ene og Hans Pedersøn på den anden part, og gav forn. gode mænd Hans Lindenov til kende, hvorledes det var berettet for ærlig og velbyrdig mand, Christoffer Valkendorf til Glorup, kongl. majestæts råd og rentemester, at på Færø var indført en uret alen forleden år, som skulde være brugt der på landet imod den gamle sædvanlige færøske alen, højbemeldte kongl. majestæts undersåtter til skade, hvilken alen af kongens foged, Søren Flue, skulde være taget fra forn. mænds tjener, Eggert Stadtlænder. Derpå begærte nu ærlig, velbyrdig Hans Lindenov en rigtig besked om forn. begge parter om samme sag.

Da fremæskede de nu for os deres tjenere ved navn Lambert Jansøn og Eggert Stadtlænder, som havde tjent dennem der på landet i samme madskabi=handel, og af dennem var begærendes vidnesbyrd udi sagen. Da bekendte nu forn. Lambert Jansøn første gang at have annammet deres madskabi=gods af forn. Hans Pedersøn med en alen, som var gjort efter udi landet af Thomas Simonsøn vinterfoged[2]) og forn. Hans Pedersøn, som de hannem antvordet haver, og han ikke vidste, hvad heller den var længere eller stakkere end Bergen bys alen, og var samme alen gjort efter en alen, som hr. Jesper Mortensøn i Thorshavn tilhørde. Og efter at forn. Lambert samme alen en tid lang havde brugt, da leverede han den fra sig med det overblivende gods til forn. Eggert Stadtlænder og sagde, at der aldrig var klagemål på samme alen, medens han havde målt dermed, hvil=ken alen forn. Eggert Stadtlænder nu og bekendte sig at have brugt der på landet, indtil Magnus Heinesøn kom på Færø anno 82 på foråret.

Vidnede og nu skipper Niels Heliesøn og Hendrik Fønbo, at de hos vare på Færø i lagmandens og flere dannemænds nærværelse og hørte, at Magnus Heinesøn adspurte forn. Eggert Stadtlænder, hvem hannem havde antvordet den alen. Da havde han svaret samme tid og gjort sin ed på sin sjæls salighed, at forn. Hans Pedersøn havde leveret hannem den alen med godset, enddog forn. Lambert bekendte sig at have leveret hannem samme alen, som foresiger.

Og den tid lagmanden i Færø hørte disse ord af forn. Eggert, da haver han svaret således, at han kendte forn. Hans Pedersøn altfor from til, at han skulde levere hannem nogen uret alen, og straks i alles deres nærværelse, nogen tid førend Søren Flue kom der på landet, da tog Mogens Heinesøn samme alen fra forn. Eggert og målte den med den gamle færøske alen, og efterdi den ikke fandtes lige ved den færøske alen, da brød han den straks sunder, så at den ikke siden blev brugt der på landet.

Derhos fremæskede forn. Magnus Heinesøn sit sendingsbrev, som

[1]) D.D.R.A., D.D.K., B. 161. [2]) Seinri løgmaður 1601–1608).



han forn. Lambert tilskrevet haver, den tid han drog på den grøn=landsrejse, hvilket brev forn. Lambert nu fremlagde, lydendes iblandt andet, at Mogens Heinesøn alvorligen bjuder og befaler forn. Lam=bert Jansøn at holde almuen der på Færø efter gammelt sædvanligt køb med vægt og mode [mål].»

Av hesum tveimum handilssveinum tykist Lambert Jansøn at hava verið eldri í Magnusar tænastu, og hann sigur seg, at hava fingið tað alnamátið, stríðið stóð um, frá Hans Pedersøn, Magnusar fyrr=verandi handilsfelaga, men bendir samstundis á, at hetta mátið var gjørt eftir eini alin, Havnar prestur, harra Mortan átti, og vetrar=fútin, Tummas Símunarson, hevði gjørt tað. Eggert Stadtlænder nýtti so hetta mátið í handlinum til 1582, tá Magnus Heinason kom til Føroya. Munurin á vitnisburðunum er tann, at Lambert Jansøn sigur seg at hava fingið hetta alnamátið beinleiðis frá Hans Pedersøn. Meðan løgmaður, Nils Helgason og Hendrik Fønbo vóru hjástaddir tók Magnus Heinason og máldi alnamátið við eini rættari føroyskari alin, og tá mátið vísti seg at vera ov stutt, breyt Magnus tað sundur.

Nú sigur vitnisskjalið eisini, at Søren Flue skal hava tikið hesa ov stuttu alin frá Eggert Stadtlænder, altso á sumri 1582, men tá skuldi Magnus eftir vitnisburðinum longu havt brotið hana sundur. Í hvørt fall hevur Søren Flue ikki kunnað lagt hesa ov stuttu alin fram í rættin, og ivaleyst er tí, at hann aldri hevur havt fatur á hesum alnamáti, men bert hoyrt um tað. Øll røtt eintøk av máti og vekt skuldi vera í løgmannsins varðveitslu, og vituligt er tí, at løg=maður var til staðar, tá ið Magnus kannaði hetta alnamátið, handilin hevði nýtt. Søgulig grund er eingin at framføra um, at løgmanns=rætturin í Bjørgvin skal ikki hava kannað málið reiðiliga, hóast vit á annan hátt vita, at Hans Lindenov hevði verið loyniligur handils=felagi við Magnus Heinason. Chr. Valkendorf hevði eisini sent sín serliga umboðsmann til Bjørgvins at vera hjástaddur undir viðgerð=ini av málinum.

Søren Flue hevði mest bygt klagu sína yvir Magnus Heinason á vitnisburðir frá Palle Christensøn og Hans Didriksøn. Í brævapakk=anum,[1]) sum nú finnst á ríkisskjalasavninum, eru hesir vitnisburðir skrivaðir við Valkendorfs hond. Vitnisburðurin frá Palla ljóðar so=leiðis:

«Haver ærlig og velbyrdig mand, Christoffer Valkendorf, kongl. majestæts rentemester, mig forelagt, at jeg skulde sige min sandingen om det brændte korn, som Mogens Heinesøn haver ført til Færø det år 1582.

Først haver han haft af det brændte korn, som han bjerged i den ildebrand, henved en hundrede tønder eller halv andet hundrede tønder. Det haver han skibet i et rum for sig selv i sit skib Falken. Så haver han også købt af Hans Tyest i Bergen henved hundrede tønder byg, og det og skibet i et rum for sig. Så haver han også købt af Anders Skriver, borgmester i Bergen, et halvt hundrede tønder havre. Det og skibet i et rum for sig selv, og samme korn

[1]) D.D.K., B. 161.

haver jeg af dennem annammet. Den tid vi kom til Færø, da lod han hans folk blande det brændte korn og den byg og den havre tilsammen og solgte det lige så dyrt, som det havde været godt korn, og haver han solgt en part tønder for halv tredje gylden, og gammelt køb er to gylden.

Desligest er mig og vitterligt, at der var en uretfærdig alen i kramboden, og den sommer anno 1580 da solgte han og Hans Pedersøn i Bergen en part tønder mel for halv fjerde og fire gylden, og gammelt køb er tre gylden. Også det år anno 1581, den tid han skulde for kongl. majestæt til Grønland, da købte han her i København af Mikkel Ibsøn dansk øl, en læst eller fire, og af Hans Pedersøn i Lejrstræde fik han også noget. Den tid han kom til Færø, fik han mig det i regnskab, og jeg måtte gøre hannem regnskab for en part tre gylden og for en part fem gylden, ligesom det havde været godt rostockerøl, med sådant og andet mere.

Tit og ofte kom de fattige bønder og klagede dennem og sagde: Hvad hjælper det os? Klager vi det for retten, da haver vi ingen gode deraf, for han og lagmanden de gør et, som de også gjorde. Desligest den tid han skulde til Grønland, da måtte bønderne give hannem, en part okse, en part tørt fårekød, en part levende får og et og andet, for han rådede selv. Kongens foged var ikke til stede, og lagmanden var hans broder; han lod hannem gøre, hvad han vilde. Dertil haver han haft de bønder under sig, ligesom han havde været en konge der på landet, for bønderne vilde gerne klage, og ingen turde, for han og lagmanden gjorde et.»

Eisini vitnisburðurin frá Hans Didriksøn í sama brævpakka, dagssettur 25. apríl 1583, er skrivaður við Valkendorfs hond:

«Kendes jeg Hans Didriksøn med denne min egen håndskrift, at år efter Guds byrd 1582, der jeg kom til Færø med Mogens Heinesøn, da havde Egert Stadtlænder en falsk alen udi kramboden, hvilken der var given stor klage på, og samme tid da førte Mogens Heinesøn med sig til Færø noget mel, som han havde ladet male udi Jesvåg af det korn, som var udi ilden, den tid Bergen brændte, og solgte han hver tønde for tre færøske gylden lige som andet godt mel. Samme rejse førte han og til Færø henved hundrede tønder af det korn, som havde været udi forskrevne ildebrand, og solgte jeg Hans Didriksøn hver tønde for 2½ færøsk gylden efter Mogens Heinesøns egen befaling. I lige måde blev og forhandlet noget korn, som Mogens Heinesøn havde blandet med havre. Den anden rejse vi gjorde til Færø med Falken, da lod Mogens Heinesøn fortappe øl og mjød, og det siden fylde med mundgodt[1]). Dernæst haver Mogens Heinesøn også udi dette år 1582 ført danskøl til Færø og solgt det lige dyrt med tyskøl.

Herforuden da haver Mogens Heinesøn også udi dette år 1582 ikke handlet imod sine medredere, som kongl. majestæts brev indeholder, men han haver slaget sine medrederes fordel under sig og tilskrevet dennem et regnskab, som er falsk i alle måder.»[2])

---

[1]) Heimabryggj. [2]) Í svarbrævi sigur Magnus Heinason seg at viðleggja henda roknskap.



Sjálvt um vit rokna við, at hesir vitnisburðir eru eggjaðir fram av Kristoffuri Valkendorf gjøgnum Søren Flue, er einki at ivast í, at rættvíst hevur ikki altíð verið farið fram við føroyska handilin á Magnusar døgum, men kortini ber ikki til at geva Magnus Heinasyni alla skuld fyri hetta. Stóran part av sumrinum varð hann og jagtstraði sjórænarar, og 1581 var hann undir Grønlandi. Ivaleyst hava hesir báðir handilssveinarnir ikki verið so sakleysir, sum teir látast í sínum vitnisburðum, og handilsfelagar Magnusar mega í hvørt fall hava sín lut í tí skeiva, sum er hent. Hetta kom eisini fram við løgmannsrættin í Bjørgvin. Heldur ikki kunna vit uppfata tað, sum Magnus Heinason bert vil hava sín rygg frían, tá hann innan sína grønlandsferð skrivliga áleggur Eggert Stadtlænder at gera føroyingum rætt og skjal við handilin. Eisini eiga vit at minnast til, hvussu tíðin tá øll var vorðin í handli og framferð.

Sjálvt um Magnus Heinason hevði mist Føroya handil um várið 1583, fór hann sjálvur til Føroya komandi summar. Hann hevði enn mangt ymist at tala við føroyingar um. Sama summar sendi eisini Kristoffur Valkendorf tveir av sínum trúgvastu monnum til Føroya at kanna viðurskiftini soleiðis, at hann kundi fáa sterkari prógv yvir fyri kongi um, at avgerð hansara, sum setti báðar brøðurnar Heinason úr starvi á vári 1583, var fult rættvís.

Øsingin í Føroyum gekk tá á bæði borð fyri og ímóti, men tað sær út, sum Magnus Heinason hevur verið fyrr fram við. Í hvørt fall kallaðu Jóan og Magnus Heinason fólkið til fundar í Tórshavn 25. juni 1583 fyri har at fáa alment skotsmál, og teir kongligu sendimenninir vóru eisini til staðar á hesum fundi. Fundurin tykist heilt at hava verið fyri brøðrunum Heinason. Jóan Heinason steig fram, las upp skjal og spurdi alla samkomuna, harí hvønn einstakan, um hann nakra tíð hevði gjørt nøkrum órætt sum dómari, menniskja, vinur ella granni. Hann bað fólkið um skotsmál sítt, meðan Jákup Meier, kongsins høvuðsmaður, og Mikkel Ibsøn, kongsins fúti, hoyrdu tað. Løgrættumenninir og prestarnir vóru serliga spurdir og almúgan við, og allir svaraðu teir, at «ingen beslutning eller domme at være gjort eller afsagt af forskrevne Joen Heinesøn af hans egen råd og tykke, men vores samtykke eller Norges lov,» at «bekende vi uværdige Guds tjenere her samme steds forskrevne ærlige mand, Joen Heinesøn lagmand, ikke at have indfaldet udi nogen måde udi vort kald og embede at forsvare nogen mand eller kvinde, dreng eller pige for nogen synd og forargelse imod Guds bud,» og at «bekende vi og sammeledes menige almue bønder os mod vor vilje ingen skat eller pålægd at være lagt end det, som vi selv finneligen haver gjort og samtykt os fattige folk og indbyggere til gavn og bedste udi vort ærendes forfremmelse her af lands, som nu og da behov gøres kan.»[1])

Magnus Heinason fekk eisini hitt besta skotsmál á hesum sama fundi, men skrivingin av tí man á ein ella annan hátt hava verið skeivt upp sett ella skjalið sjálvt er horvið, tí 17. aug. 1583 tók Heini Heinason hetta skotsmálið um aftur fyri Magnus bróðir sín, sum tá

---

[1]) D.D.R.A., D.D.K., B. 161.

man vera farin av stað úr Føroyum, og tað er hetta skjalið, sum er okkum varðveitt.[1])

Vitnisburðin hjá Jóani løgmanni hava hesir menn skrivað undir: «Hr. Thorlof Gregersøn provst, hr. Ismael Nielssøn, hr. Håldan Andersøn, hr. Anders Hendriksøn, hr. Niels Christensøn, Guds ords uværdige tjenere på Færø, Hans Pedersøn kongl. majestæts herreds-foged,[2]) Peder Jacobsøn, Joen Guttormsøn, Håldan Clementsøn, Håldan Augustinussøn, Niels Joensøn, Simon Jenssøn, Germund Joensøn, Peder Gundersøn, David Andersøn, Oluf Joensøn, Niels Guttormsøn, Anders Østensøn, Niels Hendriksøn, Sjuord Haraldsøn, Joen Joensøn, Anders Olufsøn, Niels Trondesøn og Melcher Trond-søn, svorne lagrettesmænd.» Ikki minni enn 5 prestar og 19 løg-rættumenn hava lagt navn til hetta skjalið. Í løgrættinum sótu 36 menn, og meiralutin gav altso Jóani løgmanni sín besta vitnisburð. Táið vit vita, at løgrætturin frá gamlari tíð hevði valt løgmann, og kongur hevði kallað hann, er hetta prógv um, at kongur eftir Chr. Valkendorfs ráðum hevur sett Jóan Heinason brádliga úr starvi, uttan at løgtingið hevur verið við í ráðum. Annað prógvið er tað, at táið kongur setur Ísak Guttormsson sum løgmann eftir Jóan, er honum skeivt sagt frá, hvussu maðurin hevur itið. Í kallsbrævinum var hann komin at eita Isak Gudmundsson. Hetta vísir, við hvørjum skundi Chr. Valkendorf er farin fram uttan at spyrja um gomul rættindi hjá Føroya løgtingi, og atburður hansara má soleiðis sigast at hava verið løgleysur. Kortini endurtók henda framferð seg 1655, táið Baltzar Jacobsøn, illi løgmaður, varð settur.

Í skotsmálinum, sum Magnus Heinason fekk 17. aug., verður sagt, at menninir standa við sín vitnisburð í skjalinum, teir góvu 25. juni, og teir skoyta at endanum upp í: «Og vide vi ikke andet, ej heller endnu hørt have nogen af dette lands indbyggere at have ham udi nogen måde at beskylde uden takker hannem al ære, dygd og godt for sin omgængelse, handel og vandel, som han hos os og med os haft og bruget haver fra første og til denne dag.» Teir, sum hava undirskrivað henda vitnisburð, standa soleiðis nevndir:

Isak Guttormsøn lagmand på Færø, Thomas Simonsøn, Peder Ja-cobsøn, Niels Hendriksøn, Haldan Augustinussøn, Melkier Trond-søn, Simon Jenssøn, Magnus Andersøn, Isak Ismaelsøn, Sylvester Simonsøn, Anders Østensøn og David Andersøn, svorne lagrettes-mænd.» Hesin vitnisburður sær út sum eitt tólvtaramál, hvar tólv tingmenn vórðu tiknir út sum dómsmenn. Vit síggja, at hin nýggi løgmaðurin er við og báðir teir menninir, sum aftan á hann vórðu settir sum løgmenn. Ivaleyst hava sendimenn Valkendorfs, Jacob Meier og Mikkel Ibsøn, verið við á hesum tingfundi.

Bert 3 dagar framman undan høvdu 24 menn latið Valkendorfs sendimonnum í hendi skjal, hvarí teir viðganga at hava fingið Mag-nusi Heinasyni 1714 dála virði og 60 gyllin. Ein gamal dáli og ein føroyskur gyllin vóru í teirri tíðini eins verdir. Av hesum hevði Nils Helgason skipari, sum jú búði í Bjørgvin, latið Magnus fáa 209 dálar,

[1]) D. D. R. A., D. D. K., B. 161. [2]) Má vera Hans Pedersøn Morsing, ið seinri fór frá, men kom aftur sum sýslumaður (Herredsfoged).



og Jóan Heinason hevði latið 122 dálar. Hetta skjalið tykist at vera komið fram eftir avhoyringar á tingi. Aftan á er skoyttur ein endi upp í, sum sigur, at hesir menn tó høvdu goldið tær vørur, teir høvdu fingið úr krambúðini, og at slíkur vitnisburður er farin fram, vitna hesir fremmandu menn:

«Hans Elstorp, skipper Hans Hermansøn, skipper Hans Foss, Hendrik Fønboe, Clement Rose, Laurits Jørgensen.»

Beint aftaná stendur so:

«Dette klagemål var over Mogens Heinesøn, skipper Niels Helle-søn og Bern Færø.[1])

*Mickel Ibsøn* egen hand.»

Merkiligt, at henda klagan bert skal galda hesar tríggjar føroying-arnar. Av hesum er at ætla, at bæði Nils Helgason og Berint før-oyski hava verið í handilsfelagsskapi við Magnusi Heinasyni.

Søren Christensøn Flue hevur seinri eisini áteknað skjalið:

«Dette forskrevne var og beklaget for mig, der jeg var foged på landet, dog jeg tog det ikke beskrevet anno 1582.»

Mads Poulsøn hevur Kristoffur Valkendorf óivað havt fatur á, tí hansara átekning er eisini á skjalinum:

«Dette forskrevne bekender jeg, Mads Poulsen, at de færøske, som med Mogens Heinesøn og skipper Niels Helgisøn havde part i landet, beklaged og for mig, dog jeg tog det ikke beskrevet»

Tað er skiljiligt, at átekning Mads Poulsøns var løtt at fáa til vega aftaná. Úti á breddanum við endan á skjalinum hevur Valkendorf skrivað við egnari hond hesi klumputu orð:

På denne artikel der ligget alt klagemålet på, hvilket ret — eller uret er — og den er vel ikke sådan at forstå uden uheld og gen-svar og deres regnskab var hos, da kunde man på en time at gøre vel ret forstå.»

Einki hoyra vit um, at Mads Poulsøn, sum skuldi havt størsta vinning av uppgerðini aftan á sjóránið 1579, hevur verið átalaður, enn minni straffaður fyri tað, sum tá hendi. Vit síggja heldur ikki í hesum vitnisburðum avnoktað, at uppgerðin frá 1579 bygdi á hans-ara bókføring. Yvirhøvur eru vitnisburðirnir í hesum máli, helst teir, sum koma fram á sumri 1583, so sjálvmótsigandi, at sami maður í fleiri førum tykist at vitna móti sær sjálvum. Ivi kemur soleiðis fram um, hvørt tað er tí, at trýst hevur verið lagt á teir vitnandi ella, at ein partur av vitnisburðunum er gjørdur eftir eini framman undan lagdari ætlan. Hesi skjøl finnast flest øll ikki í upprunariti. Trýstið frá sendimonum Valkendorfs tykist til staðar í fylgjandi manna-gongd.

Skjal finnst frá 31. aug. 1583, sum hevur fingið hesa átekning á baksíðuna:

«Den ny lagmands bevis med menige lagrettis [mænd], at de vide ingen besked med kongl. majestæts gods, som den fribytter tog på Færø.»

Tað eru 8 løgrættumenn, sum saman við nýggja løgmanni geva

[1]) Allir 3 búðu í Bjørgvin.

vitnisburðin. Talið er ikki bundið í tólvtalsforminum og er heldur eingin meiraluti av tingmonnum. Skjalið ljóðar so:

«Vi efterskrevne Isak Guttormsøn lagmand udi Ferreoum, Haldan Augustinusson, Simon Jenssøn, Joen Guttormsøn af Kollefjord, Anders Østensøn, Joen Joensøn, Isak Ismaelsøn, Peder Gundersøn, Melker Trondesøn, svorne lagrettesmænd her sammesteds, kendes og gør vitterligt for alle med dette vort åbne brev, at år efter Guds byrd 1583 den 31. juli indkom på vort almindelige lagting i Thorshavn ærlige og velforstandige mænd, Mickel Ibsøn og Jacob Meier, kongelig majestæts befalingsmænd på forskrevne Færø, og tilspurgte os menige råd og lagrettesmænd om den vare, som Mads Poulsøn lagde igen her på landet, som kongelig majestæt tilkom, hvilken de fribyttere skuldu have borttaget forleden år 1579, om vi vidste, hvor meget der var oplagt, eller hvor meget der lå ude igen, den tid forskrevne fribytter bortdrog igen, til hvilket vi have alle tilsvaret, at vi det ikke vidste, uden der lå igen nogen slags vare, uld og fjerder og nogen fisk, hvilket Thomas Simonsøn og Niels Joensøn haver os berettet, endog de ikke vidste, hvor meget af hver slags vare det var.»

Vit síggja av hesum skjali, at sendimenn Valkendorfs eru farnir at arbeiða við løgtinginum, beinan vegin tað var saman komið, fyri at fáa sær tað til vildar. Teir høvdu kortini tá verið leingi í Føroyum. Teir fingu altso hin nýggja løgmannin við átta løgtingsmonnum at vátta, at teir einki vistu um, hvussu nógvar vørur sjóræningarnir høvdu tikið úr leigubúðini 1579. Teir vísa á, hvat Thomas Simonsøn og Niels Joensøn skulu hava sagt, men hesir hava ikki undirskrivað teirra váttan. Thomas Simonsøn tykist at vera sami maður, sum gjørdist Føroya løgmaður 1602—08.

Meira enn 14 dagar ganga so á tingi — og tað var leingi í teirri tíðini — og har man tá mangt hava farið fram. Frá 15. aug. 1583 er til skjals fylgjandi skjal:[1])

«Anno 83 den 15. august på vort almindelige lagting på Færø udi Thorshavn opstod Mickel Ibsøn og Jacob Meier, kongl. majestæts befalingsmænd, og tilspurgte Joen Heinesøn, den gamle lagmand, om han var hos den tid, Mads Poulsøn oplagde det gods, som fribyttere borttog anno 79, eller om han vidste, hvor meget samme gods var, og om han var hos og så, hvor meget samme fribyttere borttoge, eller hvor meget der udi igen beliggendes blev, der de vare bortløbne, hvortil han svarede, at han hverken var hos der det blev oplagt, ikke heller der det blev borttaget, eller vidste, hvor meget det var, videre end salige hr. Morten Jespersøn og Thomas Simonsøn havde berettet for hannem, som derhos vare, dog de ikke heller vidste hvor meget det var, enten der det blev oplagt, borttaget eller igen beliggendes.

At dette så i sandhed er, som forskrevet står, trykke vi efterskrevne mænd vore signeter her under, som ere Joen Heinesøn, gamle lagmand, Hans Pedersøn, Halden Clementsøn, Niels Joensøn, Thomas Nielssøn lagrettesmænd og skipper Niels Hellesøn borger udi Bergen.»

Á baksíðuni á hesum skjali er skrivað:

---

1) D.D.R.A., D.D.K., B. 161.



«Joen Heinesøn den gamle lagmands bevis, at han ved ikke, hvis gods der blev taget af kongl. majestæts gods på Færø af den fribytter.»

Hetta skuldi so vera hitt fellandi prógvið hjá Chr. Valkendorf fyri, at Jóan Heinason løgmaður noyddist at vera settur úr starvi longu várið framman undan, innan Føroya løgting fekk høvi til at siga sína hugsan í málinum. Vit leggja til merkis, at skjalið frá 26. aug. 1579 umframt av Jóani Heinasyni og øðrum góðum monnum var undirskrivað av hr. Morten Jespersøn Brunck og Thomas Simonsøn herredsfoged, og at tað enntá kemur fram í hesum skjali 15. aug. 1583, at hesir báðir menn høvdu verið til staðar, táið sjóránið í leigubúðini fór fram. Víðari leggja vit til merkis, at Thomas Simonsøn[1]) aldri hevur sett sítt navn undir, at uppgerðin frá 1579 var ikki samsvarandi veruleikan. Vit síggja, at harra Mortan hevur verið deyður í 1583, men Lucas Debes greiðir um hundrað ár seinni frá, at sjóræningarnir fóru illa við honum.

Mannagongdin vísir, at skjølini eru innførd í táverandi løgtingsbók, men hvør ið hevur ført tingbókina hetta árið, er ilt at siga, tí Gabriel Mitens tók, sum hann sjálvur sigur, fyrst við sum tingskrivari 1584. Nils Andrasson (Niels Andersøn), sum var giftur við dóttur av Jóani Heinasyni, og sum tykist at hava verið tingskrivari áður, er óivað settur úr starvi hetta árið, og sendimenn Valkendorfs hava ivaleyst tá stílað fyri bókføringini, sum Søren Flue júst hevði klagað um.

Vit vita sum sagt einki um, at Mads Poulsøn fúti fekk nakra straff fyri uppgerðina um ránið í leigubúðini 1579. Tað var jú hann, sum í fyrsta umfari stóð til svars fyri tað kongliga góðsið, har lá, og sum hann skuldi avhenda í handlinum á Tinganesi; men vit síggja av brævi frá kongi 3. des. 1579, at handilin skuldi gjalda inn í rentukamarið helming av tí virði, ránsmenninir vóru farnir við.[2]) Longu tá sæst, at Chr. Valkendorf hevur ætlað sær at prógva, at uppgerðin hevði verið skeiv. Kongur sigur í brævinum, at hann vil taka hin hálva missin av ráninum.

Nakað innan ólavsøkutingið 1583 man Magnus vera farin úr Føroyum til Bjørgvins. Har kallaðu hansara gomlu partafelagar, Hans Pedersøn og Søren Andersøn, hann nú fyri rættin fyri at fáa uppgerð til vega í handilsviðurskiftum teirra. Teir søgdu ov nógvar útreiðslur at vera líknaðar í teirra part, men Magnus legði eisini fram sín roknskap og svór, at hann var rættur, og dómur fall tá eingin í málinum.[3])

Um heystið 1583 eru brøðurnir Magnus og Jóan Heinason farnir til Danmarkar at hitta kong.[4]) Teir hava hitt kong á Skanderborg sloti og lagt fyri hann tey skotsmál, teir høvdu fingið frá føroyingum. Chr. Valkendorf var tá í Keypmannahavn. Kongur tykist tá at hava hildið, at Jóan Heinason var órættvíst settur av sum løgmaður, og at rætt var ikki atborið við at taka handilin frá Magnusi.[5]) Kongur hevur havt hug at rætta alt aftur, men skrivaði tó fyrst Valkendorfi

---

1) Hann var enntá nú settur frá sum sýslumaður (Herredsfoged). 2) A.C.E., skjal 153. 3) T.L., bls. 120—23. 4) A.C.E., skjal 176. 5) T.L., bls. 123—25; A.C.E., skjal 176.

bræv um hetta. Tá hevði Valkendorf fingið í hendi tey skjøl, sendimenn hansara í Føroyum, Mickel Ibsøn og Jacob Meier, høvdu havt við sær haðani,[1]) og við teimum sum grundarlag saman við tí, sum Søren Flue hevði fingið til vega framman undan, sendir hann kongi svar, ið gav øllum málinum aðra vend. Valkendorf royndi eisini at fáa Hans Lindenov til at taka upp aftur sakarmálið um hina følsku alina, men Lindenov sendi kongi Valkendorfs bræv við sínum viðmerkingum, og hetta svarið var so bítandi, at málið datt niður fyri.[2])

Í málinum móti Magnusi Heinasyni um handilin í Føroyum kundi Valkendorf nú ikki koma víðari. Jóan løgmaður var avsettur, og Magnus hevði mist handilin, men partamenn Magnusar í Hamborg og Keypmannahavn høvdu eisini mist síni handilsrættindi í Føroyum. Líkt er til, at Jochim Thim í Hamborg tá hevur verið úti um seg eftir einahandilsrættindum í Føroyum, men hetta hevur ikki borið til, tí tað fall ikki saman við Valkendorfs ætlan, og hon var, at handilin skuldi ganga út frá Keypmannahavn.[3]) Soleiðis varð eisini úrslitið, men frásøgnin um handilin má bíða, til søga Magnus Heinasonar er at enda.

Um hásummarstíð 1584 var harradagur settur at vera í Danmark, og har skuldi sakarmálið millum Magnus Heinason og Peder Hanssøn koma fyri. Eisini Hans Lindenov hevði sakarmál móti Peder Hanssøn á hesum harradegi, tí hesin hevði skyldað hann fyri harðskap móti konu síni undir sakarmáli í Bjørgvin. Hesir tríggir menninir fóru tá av stað úr Bjørgvin fyri at møta í rættinum, meðan høvuðspersónurin í trætuni, Margreta Gyntersberg, nú sat á Malmøhus sum fangi. Eftir ákæruna frá Peder Hanssøn vildi Hans Lindenov ikki hava hana longur á Bjørgvins húsi.

Harradagurin varð ásettur at vera í Odense hin 27. juni 1584, 7-ára føðingardagin hjá Kristiani IV, men táið hann var samankomin har, kom pest í býnum,[4]) og valla eydnaðist tað at halda føðingardagin hjá prinsinum, fyrrenn harradagurin varð lýstur fluttur til Antvortskov. Magnus Heinason var møttur í Odense, men hvarv haðani og kom aldri til Antvortskov. Rætturin kendi seg illa við, og málið frá Magnusi kom ikki til viðgerðar. Harmir og illskir inn á Magnus hava bæði kongur og harramenn verið. Magnus var jú hin stevnandi parturin, so í fyrsta umfari kundi hann ikki verða dømdur. Kortini er ymist, sum vísir á, at Chr. Valkendorf nú hevði ætlað at nýta høvi til endaliga at basa Magnusi. Hann kundi, um Magnus hevði tapt sakarmálið, nýtt høvi til at seta hann fastan og so fingið reist nýtt sakarmál móti honum. Í hvørt fall sigur Magnus sjálvur seinri í brævi til kongs, at hóttanir høvdu verið settar fram móti honum í Odense, og at tað var grundin til, at hann rýmdi frá rættinum, sum hann helt Chr. Valkendorf eiga vald á.[5]) Fjúrtan ár seinri sigur Hans Lindenov, at slík hóttan var tað, sum fekk Magnus at rýma. Magnus var horvin og hevði tikið alt sítt húsfólk við, og eingin visti, hvar hann var. Kongi sendi hann tó eitt bræv, hvar hann førir fram grundirnar fyri, hví hann var rýmdur, og 22. des. 1584 sendir

1) D. D. R. A., D. D. K., B. 161, skjal dagssett 15. aug. 1583. 2) T. L., bls. 130—33. 3) A. C. E., skjal 177. 4) T. L., bls. 135—37. 5) T. L., bls. 142.



kongur honum frítt ferðabræv at koma aftur í ríki sítt, til so leingi nýggjur harradagur hevði avgjørt sakarmálið.[1]) Kámt er, hvat síðan er hent, men sakarmalið kom aldri fyri aftur á tingi, og í 1585 fór Magnus aftur til Hálands, hvar hann gekk í hertænastu hjá hinum unga prinsinum av Oranjen. Í tvey ár baksaði hann har sum kápari og kom so heim aftur.[2]) Hann búsettist tá í Ålborg sum keypmaður.

Teir stóru brotasjógvarnir í Magnusar lívi tóktust nú at skula leggja seg. Her kundi hann útinna vinnu sína í friði saman við sjóferðum, sum vóru honum kærast. Ímeðan var Hans Lindenov settur í landsdómaraembæti í Norðurjútlandi, og hann kundi tí her røkja felagsskapin við sín gamla handilsfelaga. Eftir áheitan fekk Magnus í hesi tíð munnligt lyfti frá kongi um at fáa hina lítlu oynna Egholm í len, og sama árið 1588 fekk hann skrivligt lyfti um at gera eina ferð til Føroya fyri at innkrevja gamla skuld.[3])

Um Magnus hevur hugsað um at fáa handilin í Føroyum aftur, er ilt at siga, men óivað hevur hann hugsað um uppgerð við gamlar fíggindar á sjónum. Til Føroya sigldi í hesi tíðini ein loynikeypmaður úr London, sum áður hevði verið sjórænari og nú var steinríkur maður. Santa Jon var hann nevndur.[4]) Hann keypti upp føroyskar vørur, men koyrdi tær í íløt, sum merkt vóru úr Hetlandi, so í Onglandi sá tað út, sum kom hann haðani. Undir Føroyum lá Magnus og bíðaði eftir honum við skipi sínum. Santa Jon fór inn á Skálafjørðin, og tá hann hevði fylt skip sítt, fór hann avstað. Táið Magnus fekk frænir av hesum, helt hann aftaná undir hálendskum flaggi, sigldi upp undir liðina av Santa Jon, leyp um borð í skip hansara við fólki sínum og tók alt góðsið frá honum. Hetta var stórur fongur hjá Magnusi, og óivað er hann sigldur til Bjørgvins við góðsinum, tí í Noreg hevur hann um somu tíð goldið nógvan pening; hann hevur innloyst jarðargóðs eftir verfaðir sín og har keypt skip aftrat, sum æt «Samson». Skipið «Svanen» hevði hann við úr Hálandi. Táið Magnus kom aftur til Ålborg í juni, kanska juli, var Fríðrikur kongur II deyður, og fýra harramenn, teirra millum Kristoffur Valkendorf, sótu tá sum formyndarastýri fyri hin blaðunga kongin, Kristian IV, so hin kongliga vælvildin var nú burtur. Magnus merkti tó onga illvild fyrsta árið, tí í stýrinum sótu Niels Kås og Jørgen Rosenkrans, sum fyrst og fremst hugsaðu um at fremja tann vilja, Fríðrikur kongur hevði havt. Men slapp Kristoffur Valkendorf at taka avgerð um Magnus Heinason einsamallur, kundi hann vænta sær skjóta, um ikki løgliga, viðferð og bráðan enda, og tað var júst tað, ið hendi.

Longu meðan Magnus var í hálendskari tænastu síðstu ferð, hevði Chr. Valkendorf stevnt honum fyri brævið, hann í 1582 skuldi hava skrivað úr Hetlandi til Bjørgvins, hvarí mølmað skuldi vera nakað um ein vissan felagsskap millum Chr. Valkendorf og Magnus Heinason. Magnus møtti á harradeginum í Keypmannahavn 1586, og brævið varð lagt fram, men bert í avskrivt. Magnus helt fram, at ein skrivkallur hansara mundi hava skrivað brævið, og at hann hevði verið ógvuliga óheppin í orðavali,[5]) so úrslit kom einki úr hesi rættarvið-

1) A. C. E., skjal 182. 2) T. L., bls. 151, 160—63 og 176. 3) A. C. E., skjal 190 og 193. 4) T. L., bls. 186. 5) T. L., bls. 169—72.

gerð, ið mestsum gjørdist láturlig. Øðrvísi gekk tað við einum øðrum sakarmáli, sum hevði sín uppruna í Magnusar káparavirki í hálendskari tænastu hesi tvey síðstu árini.

Valla var Magnus komin aftur av síni síðstu Føroyaferð, fyrrenn enskir sendimenn, sum komnir vóru til Danmarkar, førdu fram klagu um hann viðvíkjandi einum enskum skipi, hann sum kápari í hálendskari tænastu hevði tikið yvir undir bretsku strondini. Teir førdu fram, at Ongland tá ongan ófrið hevði við Háland, og tí var henda tøkan ólóglig. Hesin spurningur var eitt sindur ivasamur og hoyrdi í hvørt fall inn undir hálendskan rætt, tí Magnus var í hálendskari tænastu, tá hetta hendi; men hvørki teir ákærandi ella danska stýrið umboðað av Chr. Valkendorf tykjast at hava viljað havt málið beint tann vegin. Heilt væl við Ongland hevði húsið Oranjen av Hálandi ikki verið, tí undir bardaganum við Spanialand, táið hálendingar vóru illa kroystir, hevði Elisabeth drottning av Onglandi sent greivan av Leicester til Hálands sum ríkisstjóra, meðan Vilhelm av Oranjen enn stóð á odda har. Hin ungi sonur hansara, Morits av Oranjen, hevði annars einki stríð við Ongland.

Skipið, sum Magnus hevði tikið 1585, átti handilsfelagið Wollison, Read & Co. í London, og tað kom úr Hull fult av vørum. Nakrir menn ruku yvir borð, tá hann tók tað, men annars førdi Magnus skipið til Bjørgvins, hvar hann seldi góðsið.

Teir ensku sendimenninir hittu ríkisstýrið í Helsingør, og tá bar tað so á, at Magnus lá har við skipi sínum «Svanen».[1]) Hann var nú beinan vegin tilkallaður at geva frágreiðslu í klagumálinum. Formaðurin í ensku sendinevndini, Daniel Roggers, tykist við áliti at hava tikið móti Magnusar frágreiðslu, tí aftaná vórðu teir samdir um í felagsskapi at fara til Hven at hitta Tyge Brahe, og Roggers gav tá Magnusi loyvi at fara undan sær til Keypmannahavnar. Komin nakað frá oynni snúði Magnus norður á móti Helsingør, hvar skip hansara lá, og har setti hann øll segl fyri og sigldi norður um Krónborg. Valkendorf sendi beinleiðis boð til Bjørgvins, táið hann sá, hvussu vorðið var, at taka Magnus, sum hann væntaði fór at koma hagar. Magnus hevði lagt at í Álborg og tikið við sær alt húskið sítt, og táið hann kom til Bjørgvins hvaðan hann óivað hevur ætlað sær at flyta av landi, vóru boðini frá Valkendorf fyri honum. Hann varð tá tikin og førdur sum fangi til Keypmannahavnar, hvar Kristoffur Valkendorf beinleiðis skuldi taka sær av at ansa eftir honum. Valkendorf legði tá Magnus í leinkjur á slotinum í Keypmannahavn, helst í Bláa torni. Hann hugsaði tá óivað mest um at fáa hevnd yvir Magnus í blóðskammarmálinum móti systrunum Gyntersberg og fyri hansara gerðir, meðan hann hevði Føroya handil. Allar ognir Magnusar legði ríkisstýrið eisini hendur á.[2])

Í september 1588 var Thomas Umfredt komin til Keypmannahavnar sum fulltrúi fyri handilshúsið Wollison, Read & Co, og sakarmálið móti Magnusi skuldi nú fara fram við ráðstovurættin í Keypmannahavn. Onglendingar kravdu bert peningagjald fyri tøkuna av skipi teirra, og líkindi vóru soleiðis fyri, at semja kundi fáast í lag um

[1]) T. L., bls. 190—92. [2]) A. C. E., skjal 195 og 196; T. L., bls. 192—95.



málið. Ein dagin beyð Magnus Thomasi Umfredt at avgera málið í semju, við at hann skuldi lata hann fáa gjald fyri hitt tikna skipið. Magnus átti tvey skip, sum lógu her í nánd: eitt skip í Keypmannahavn við stykkjagóðsi og «Svanen», sum lá í Helsingør við salti. Tey vildi Magnus geva Thomasi Umfredt í veð. Júst táið henda semjan skuldi koma í lag, løgdu nakrir danskir harramenn hendur á hesi bæði skipini, tí teir søgdu seg eiga pening hjá Magnusi, og so fall semjan niður fyri.[1]) Thomas Umfredt fekk tá illgruna um, at onkur ynskti, at hann ongan pening skuldi fáa, og at Magnus skuldi sleppa leysur. Hann talaði við Valkendorf og kravdi nú Magnus dømdan frá lívinum. Komið var út í desember mánað, og innan seks vikur kravdi hann Magnus dømdan. Hans Lindenov, sum fekk frænir av hesum, skrivaði tá ríkisráðnum bræv og kravdi, at dómur mátti eingin fara fram í málinum, fyrrenn hann og Magnus høvdu fingið avroknað teirra felags handilsskap. Táið hetta brævið kom til Keypmannahavnar, vóru tveir stjórnarlimir burturstaddir. Niels Kås var í Suðurjútlandi, og Jørgen Rosenkrans var heima á Rosenholm. Bert Peder Munk og Kristoffur Valkendorf vóru staddir í Keypmannahavn, og Valkendorf var tá at kalla einaráðandi. Hann spurdi Thomas Umfredt, um hann ynskti dómin útsettan, og hesin svaraði nei. Valkendorf segði hetta við Magnus og bað hann, táið nú ongar stundir vóru til at gera nakran roknskap upp, skriva eina frágreiðing um handilsviðurskiftini teirra millum, Hans Lindenovs og Magnusar. Slík frágreiðsla kundi ikki siga nógv, táið ongar handilsbøkur vóru til staðar.

Valkendorf skrivaði Lindenov bræv aftur, at Thomas Umfredt nú vildi hava dóm yvir Magnus beinan vegin, og sendi honum annars frágreiðsluna, sum Magnus hevði skrivað um teirra handilsskap. Hin 16. jan. 1589 dømdi ráðstovurætturin í Keypmannahavn Magnus Heinason frá lívinum, og Thomas Umfredt kravdi dómin fullgjørdan beinan vegin. Dómurin hevði kunnað verið sendur ríkisráðnum til eftirkanningar, men Kristoffur Valkendorf segði seg vilja taka ábyrgdina av, at hann varð fullgjørdur alt fyri eitt. Tíðliga á morgni 18. jan. 1589 varð Magnus Heinason bakbundin førdur til rættarstaðin á slotsplássinum. Bøðilin vildi binda klút fyri eyguni á honum, men Magnus svaraði: «Nei, eg havi sæð so mangan blankan brandin áður. Eg eri ikki bangin, ver tú tað heldur ikki.»[2])

Líkið av Magnusi varð jarðað á Nicolai kirkjugarði, sum var næst við, men harvið var stríðið millum Chr. Valkendorf og Magnus Heinason ikki komið at enda, tí vinmaður Magnusar, Hans Lindenov, átók sær nú hansara sakarmál, og Kristoffur Valkendorf skuldi brátt fáa at kenna, at hann hevði misbrúkt sítt kongliga vald.

Hans Lindenov bað beinan vegin um at fáa dómin yvir Magnus Heinason skrivliga tilsendan, men Kristoffur Valkendorf noktaði honum hetta, og hann helt fast við sína noktan, til harradagur var settur á Kolding húsi fyrst í august 1590. Ímeðan høvdu Niels Kås og Jørgen Rosenkrans fingið bræv frá Hans Lindenov, hvar hann

[1]) A. C. E., skjal 197; T. L., bls. 197—200. [2]) A. C. E., skjal 198, 199, 200, 201 og 202; T. L., bls. 200—206; L. D., útg. «Fram»s 1903, bls. 217.

klagaði um tann skund, Valkendorf hevði havt við at taka lívið av Magnusi Heinasyni, og segði teimum frá, at hann ynskti sakarmál um hetta reist á næsta harradegi. Samstundis klagaði eisini Sofía Gyntersberg Chr. Valkendorf fyri dráp av manni sínum. Á harradeginum á Kolding húsi 1590 fekk Valkendorf soleiðis tvey sakarmál reist móti sær fyri dráp av Magnusi Heinasyni.[1]) Fyri stjórnarlimirnar í ríkisstýrinum vóru hetta heldur óhugnalig mál, sum teir helst ikki ynsktu viðgjørd av øllum harradeginum, og dómir í hesum málum finnast tá heldur ikki í tingbókini. Við m. a. einkjudrottningini, Sophie, sum millummanni varð semja fingin í lag 6. aug. 1590 í hesum báðum sakarmálum. Kristoffur Valkendorf skuldi senda Sofíu Gyntersberg dómin yvir Magnus Heinason, og hesin dómur, soleiðis sum hann var innskrivaður í dómsbókina í Keypmannahavn, skuldi verða heilt útstrikaður og deyður og einkisigandi. Hann skuldi ikki kunna skaða børn og konu Magnusar á nakran hátt. Sofía Gyntersberg skuldi fáa rætt til at taka upp lík Magnusar og aftur gravseta tað, hvar hon vildi. Kristoffur Valkendorf mátti gjalda konu Magnusar 2000 ríkisdálar og Hans Lindenov 4000 ríkisdálar. Hin 6. nov. 1590 varð líkið av Magnusi grivið upp aftur og ført yvir land til Álborg; haðani til Ørslev kloystur, hvar tað varð jarðað av nýggjum. Á leiðini yvir land ringdu allar kirkjuklokkur. Hans Lindenov læt seta eina minnistalvu á veggin í Ørslev kirkju, hvará hann rósar Magnusi fyri allar dygdir. Hon er til skjals enn.[2])

Kristoffur Valkendorf varð eisini settur úr starvi bæði sum rentumeistari og stjórnarlimur, og hann varð tá settur at hava umsjón við Vordingborg sloti. Táið onglendingar í 1597 vórðu varnir við tann heiður, ið varð gjørdur av Magnusi eftir deyða hansara, komu teir við fyrispurningi til danska ríkisstýrið, sum hevði ilt við at greiða støðuna fyri teimum. Magnus Heinason gekk soleiðis fyrst yvir í søguna 8 ár eftir deyða sín.

### d. Føroya handil framvegis á skiftandi hondum.

Sum nevnt lá Jochim Thim í Hamborg fram við at fáa allan handilin í len, táið Magnus Heinason varð settur frá Føroya handli. Ætlandi mistu báðir hansara handilsfelagar tá eisini handilin skjótt. Harímóti sæst Jørgen Kyd ongar royndir at hava gjørt fyri at fáa handilin undir seg. Kongur sjálvur hevði havt hug nú at geva hamborgara Føroya handil, men Kristoffur Valkendorf hevur sett seg ímóti tí, og eitt ár er tá gingið, uttan at nøkur avgerð er tikin. Hetta árið kunna møguliga Jørgen Kyd og Jochim Thim hava hildið fram við handilinum í Føroyum. Fyrst við brævi 29. juni 1584 sigur kongur,[3]) at hann vil: «unde og forlene Os elskelige Niels Skinckell til Gerskov, vor mand og tjener, med vort land og ø Færø, til så længe Vi anderledes derom tilsigendes vorder.» Niels Skinckell skuldi eftir

[1]) A. C. E., skjal 203, 206, 207 og 211; T. L., bls. 209—18. [2]) L. D., útg. «Fram»s 1903, bls. 218. [3]) A. C. E., skjal 178.



hesum brævi vera mestsum kongsins umboðsmaður, sum skuldi krevja inn kongsgjaldið: «Og hvis han udi så måde af bønderne oppebærendes vorder, det skal han ved navn af hver bonde, han det lader oppebære, lade opskrive og føre sig til indtægt og derfor årligen hvert år til hver midfaste gøre hos vor rentemester, som nu er og herefter kommendes vorder, på vore vegne god rede og regnskab.» Av hesum eru menn komnir at hugsa, at tað er Kristoffur Valkendorf, sum fyrst hevur fingið jarðarbøkur til vega í Føroyum, men so er ikki; jarðarbøkur í Føroyum eru nevndar fyrr. Framvegis vísir brævið, at tað er kongur sjálvur, sum rekur Føroya handil: «Skal han [Skinckell] og, sålænge Vi selv lade besegle landet med købmandsvarer, have godt tilsyn med vor købmand, .... at almuen der på landet ikke heller sker forkort enten med alen, vægt eller anden forfalsket vare.» Í roknskapinum frá 1584 er ikki lítið nevnt um hval og reka, og kongur skrivar júst í hesum brævi: «Dersom der og falder eller indkommer der under landet noget sælsomt af hvalfiske, rosmer(?)[1]) eller andet sligt, hvis det være kan, det skal han bestille Os til hånde og i alle måder vide at ramme vort gavn og bedste.» Um lønina hjá Niels Skinckell sigur kongur: «For slig hans umage ville Vi årligen lade give hannem til besoldning på hans eget liv to hundrede daler og hofklædning og besoldning på sig selv tredje, og når han kommer til vor købstad København og bruges på denne rejse, da skal han må på slottet der sammesteds have sin underholdning på sig selv tredje.»

Í brævi, Valkendorf sendi kongi 10. febr. 1584[2]) síggja vit, at tað er hann, sum hevur staðið aftan fyri ta avgerð, her er tikin, og at hann, táið hann skrivaði hetta brævið, hevur borið ótta fyri, at kongur skuldi geva Magnusi Heinasyni Føroya handil aftur. Eftir at hava víst á allar teir vitnisburðir og tey prógv, hann hevði fingið til vega móti Magnusi, endar Kristoffur Valkendorf bræv sítt soleiðis:

«Og på det allerunderdanigste takker jeg Eders kongl. majestæt, at Eders majestæt vilde vente og lade mig vide, før Eders majestæt gav noget svar herpå, og beder Eders kongl. majestæt på det underdanigste, at Eders kongl. majestæt vilde ladet allernådigst blive, som det er gjort, til Gud vil, at jeg underdanigst videre har talt med Eders kongl. majestæt.

Jeg haver nu gjort det så med Færø, at med Guds hjælp i stedet for, Eders kongl. majestæt tilforn ikke havde over 2000 daler om året, da skal Eders kongl. majestæt få 3000 daler og mere.»

Ein gamal dáli skuldi í hesi tíðini hava sama virði sum ein føroyskur gyllin í vørum goldin í Keypmannahavn. Ilt er tó at skilja, um tey tøl, Valkendorf her nevnir, sipa til inntøkurnar av Føroya handli ella allar tær inntøkur, kongur hevði av landinum. Sum áður ávíst undir *Fútaroknskapirnir sum heild*, bls. 111, hevur kongsins inntøka á hesum roknskapi ligið júst um tað talið, Valkendorf nevnir í sínum brævi, men táið hetta brævið jú beinleiðis handlar um Føroya handilsskap, mega vit harav ætla, at tølini benda á kongsins

[1]) Kann eftir gomlum málbrúki merkja roysningur (hvalross). [2]) D. D. R. A., D. D. K., B. 161.

inntøku av Føroya handli annaðhvørt við útleiging ella beinleiðis rakstri.

Í 1584 kravdi Niels Skinckell av løgtinginum at fáa at vita, hvat gamalt keyp hevði verið, og føroyingar svaraðu, at har hevði eingin fastur prísur verið á vørum, síðan Thomas Koppen doyði 1553.[1]) Vit síggja við øðrum orðum, at ein prísbroytan er farin fram, og táið føroyingar klagaðu um handilin 1569—70, søgdu teir, at tær føroysku vørurnar ella útflutningsvørurnar tá einans stóðu í hálvum virði í mun til tær innfluttu vørurnar, og Andras Júti fekk tá skuld fyri hetta.

Nú í 1584 verða prísirnir lagdir fastir aftur, og vit finna hesar prísirnar í øllum fútaroknskøpum, sum síðani eru til skjals. Prísir á útflutningsvørum eru áður nevndir.

Av innfluttum vørum kostaði tunnan av byggi 2 gyllin, av byggmjøli 3 gyllin, av rugkorni 2½ gyllin, av øli 3 gyllin og malt somuleiðis, tunnan av grovum salti kostaði 2 gyllin og kannan av brennivíni 1 gyllin.

Allir hesir prísir tykjast at hava staðið við í hvørt fall út at Gabelstíðini, men hin danski ríkisdálin kom seinri at vera meira verdur enn hin gamli dálin, sum enn galt í 1584, ella hin føroyski peningagyllinin, og allar vørur í Føroyum fingu gyllinsprís ásettan ella táið bíligari var, í skinnum, hvarav 20 vóru í hvørjum gyllin.

Hesin Føroya handil við Niels Skinckell á odda gekk bert í tvey ár, men vit vita ikki hví. Ikki man ætlanin hjá Valkendorf um meirinntøkuna hjá kongi hava hildið.

Fyrsti kongligi roknskapur, sum er til skjals av Føroyum, hevur fútin Michel Ibsøn gjørt 1584. Niels Skinckell var soleiðis kongsins lensmaður við fastari løn og hevði ræði á landi. Nakað í hesum fútaroknskapi sipar til handilsviðurskiftini hetta árið, og tað skal tí verða endurgivið:

«Oppebåret for dette efterskrevne gods på Suderø den anden rejse, der jeg kom til Færø 8 dage efter sankt Johannes dag midsommer og formedels uveder blev indtrængt der i Suderøen. Oppebåret for 2 td. mel for hver td. 3 gl. Skind 1 kippe, smør 2 pund [3 pund vóru í vágini], tran ½ td. — er 6 gl. [Hetta gongur upp eftir takstinum vøra móti vøru].

End oppebåret for 3 td. boghvedegryn for hver td. 4 gl. Skind 2 kipper, tran 1 td., fjeder 1 vog, fisk 1 vog — er 12 gl. [Hetta gongur eisini upp eftir takstinum, men vit fáa harumframt at vita prísin á bókhveitigrýnum].

Item for 4 par sko, hvert par ½ gl. Derfor oppebåret 2 voger fisk. [Alt eftir takstinum, og vit fáa umframt at vita prísin á hesum innfluttu skónum].

— Item er solgt udi Suderø på Færø for færøske varer, som findes for udi regnskabet og varerne til indtægt: mel 2 td., boghvedegryn 3 td., mandssko 4 par — er udi gylden 20.»

Um annað handlinum viðvíkjandi stendur t. d.

«Første rejse til Færø 1584 i maj. Skib Thobias, skipper Peder

[1]) N. A. Fær., bls. 12.



Wrager, ankom fra Færø til Bergen 28. maj medførende: skind 169 kipper, tællig 279½ vog, fisk 190 vog. Slotsskriveren i København modtog fra første rejse 968½ vog fisk og anden rejse om høsten tran 4 td. 1 fjerding, fisk 13 vog, tællig 4½ lispund, fjeder 18 lispund. Anden rejse med Thobias, skipper Wrager, afleveret i Bergen d. 18. aug. uld 99 voger 1 pund, skind 32 kipper, tællig 32 voger [1 vág = 2 lispund 8 merkur].

Leveret [af] Niels Jude på Den Lille Fortuna, som kom til Københavns slot: Smør 21½ td., fisk 160 voger, som blev vejet med de vægtskåle, Lyder Augustinussøn, kongl. majestæts købsvend brugte og vejet med og blev vejet med kongl. majestæts landskyldslod, da blev befundet, at forn. skåle, Lyder brugte, vare på hver vog 6 mark fiske lettere at kaste over med, end kongl. majestæts vægtskåle var. Gør på forn. fisk 12 voger ringere. Så er forn. fisk efter kongl. majestæts vægtskåle fisk 148 voger. [Tað var altso galið við vekteindunum í handlinum árið eftir, Magnus Heinason hevði mist hann].

— — End udgivet og bekostet på tørv at lade skære, røgte og hjem at lade føre, først til gårdens behov, som kongl. majestæts folk holder til på både om sommeren og om vinteren [kongur hevur altso sjálvur rikið handilin: mel 2 td., tællig 1 vog, fisk 1 vog 1 pd., malt 1½ td., skerping 4 [krov].

Endnu bekostet på tørv at lade skære på Hvidenæs til at lade brænde kalk med til at forbygge og forbedre kongl. majestæts de grundmurede huse med, som var ganske meget forfalden og nedfalden en stor part: mel 1 td., malt ½ td., tællig ½ vog, fisk 2 pd., skerping 3 [krov], fersk torsk 20. Tomme tønder, som kongl. majestæts smør, tran, kød og fisk blev pakket udi, 28.

— — Blev foromkostet og forspist til lagmand, lagrettesmænd, præster og provsten, desligeste menigmænd, den første rejse jeg kom til Færø det år fjorten dage før påske, og da der holdtes ting på kongl. majestæts vegne med bønder om den Hamborger Jacob [Jochim] Thims gods og andre kongl. majestæts sager, da påkom der så overmåde svar stor storm, fogsne og uveder, at bønder og almue ikke kunde komme derifra. Udi syv dage måtte jeg da på kongl. majestæts vegne og på nådige behag undsætte og spise dennem.

Desligeste den anden rejse samme sommer straks efter sankt olai dag, da velbyrdige Niels Skinckell kom til Færø med kongl. majestæts skib og der at forfare om allehånde kongl. majestæts sager og lejlighed, da lagtinget holdtes så længe, og lagrettesmænd, præster, provst og menige mænd ikke havde udredt dennem længer med fetalje end på 8 dages tid, måtte jeg da pånY igen undsætte dennem med spisning til mad og øl og underholdning i langsommelig tid, og blev derover rejser, omkostninger derefter:

Mel 10 td. — 30 gl., dansk øl 5 td. — 15 gl., malt 16 td. — 48 gl., fisk 4 vog — 4 gl., ferskfisk for 3 gl., smør 3 vog — 4½ gl., kød 1 krop 4 gl., lam og får for 4 gl., ærtekøb ½ td. — 1½ gl., gryn ½ td. — 2 gl., humle forbrugt 16 skippund.»

Roknskapurin endar við hesum orðum:

«Fattes her udi København med slotsvægten på 882 voger fisk, som blev annammet på Færø mellem påske og Philippi Jacobi dag

[1. mai] nytørret fisk og formedels stor hede og solskin i skibet blev indtørket, at den ikke kunde holde sin vægt her igen på 13½ vog nær.»

Fútaroknskapir fyri seinri ár hava ongar slíkar viðmerkingar um handilin. Hesar viðmerkingar vísa eisini, at kongur 1584–86 hevur havt ábyrgd av handlinum, og valla hevur hann givið kongi so nógv í kassan, sum Valkendorf hevði mett hann at gera. Í hvørt fall læt kongur handilin frá sær við brævi 22. febr. 1586[1]), ið byrjar so:

«Jochim Wichmand, borger til Hamborg, og Oluf Madssøn, borger udi København, finge brev at mue udi 10 år besegle Færø.»

Sjálvt brævið við treytunum sigur, at teir skulu halda gamalt keyp, sum nú verður nýtt, at teir skulu keypa alla kongsins vøru úr leigubúðini og gjalda kongi hana á føstuinngangi hvørt ár í Keypmannahavn við einum gomlum dála fyri hvønn føroyskan gyllin, og at teir í hvørt fall skulu lata eitt skip sigla gjøgnum Oyrasund, fyri at kongsins fúti kundi koma til og frá Føroyum, og fyri at føroyingar kundu koma fyri kong við teirra klagum. Hetta síðsta varð stórur dentur lagdur á.

Við hesi nýskipan var býurin Bjørgvin aftur settur út av spælinum um Føroya handil, og handilsstaðurin Hamborg hevði aftur fastatøkur á Føroyum. Hann hoyrdi jú tá gjøgnum Holstein við til dansknorska ríkið. Hesin Jochim Wichmand var eins og Jochim Thim áður kongsins keypmaður í Hamborg. Táið Mads Baltzersøn við kongsbrævi 15. mars 1588[2]) verður settur sum Føroya fúti, síggja vit, at hann fær boð um at lata Jochim Wichmand fáa kongsins vørur í Føroyum avhendar, og skilað verður til, at hann skal —: «der sammesteds lade oppebære al Vor og kronens rente og rettighed både vist og uvist efter landsens vægt og det altsammen lade til god rede levere til Os elskelige Jochim Wichmand, Vor faktor og købmand til Hamborg, hans fuldmægtige med købmandsvægten, eftersom gammelt brug haver været, og hvis overvægten kan beløbe sig med landsens vægt højere end købmandsvægten, skal forn. Mads Baltzersøn gøre Os synderlig for sig klar rede og regnskab for.» Keypmannsvektin var her Kølnarvektin, sum hevði nakað tyngri eindir enn hin føroyska ella hin gamla norska vektin.

Fútin fær eisini boð um at lata skúlan og Argja hospital fáa so mikið, sum tey eru von at fáa av kongsins inntøkum. Vit vita, at hvørt teirra skuldi hava 100 føroyskar gyllin; tað sæst eisini av fútaroknskapinum. Oyðigarðar má hann lata byggja, og táið hann hevur lagt greiðan roknskap fyri rentukamarið, skal hann hava løn sína: «Vi nådigst bevilget at ville lade give hannem til årlig løn og besolding 24 daler og 6 alen engelsk og på så lang tid, han er på rejsen fra København til Færø og derfra tilbage til København, må hannem til sin fortæring godtgøres 3 ortsdaler om ugen og ikke mere.»

Ikki man Oluf Madssøn hava havt hug til sjálvur at reka Føroya handil, tí hann leigaði øðrum manni rætt sín, og tessvegna misti hann sjálvur handilin 1590. Óivað hevur hetta volt Jochim Wichmand

1) A. C. E., skjal 187. 2) A. C. E., skjal 192.



trupulleikar, tí árið eftir bað hann eisini um at sleppa av við Føroya handil. Øll tíðin eftir siðaskiftið vísir, at meðan Hamborg og Bjørgvin kappaðust um at hava Føroya handil undir sær, gjørdi Keypmannahavn lítið fyri at vinna sær hesi rættindi, men handilin kom tó at ganga yvir Oyrasund, av tí at ríkisstýrið ynskti tað og ofta sjálvt tók handilin í sínar hendur.

Í 1592 legði soleiðis ríkisstýrið Føroya handil undir seg. Langar reglur verða tá uppsettar í brævi 8. mai 1592[1]) viðvíkjandi handli og landsskuld, og menninir Søren Nielsøn og Mogens Nielssøn verða sendir til Føroya, hin fyrri sum keypmaður og hin seinri sum skrivari ella fúti. Hesir menninir skulu fara til Føroya við tveimum skipum av vørum. Sum skjótast skuldi tá annað skipið sigla aftur til Keypmannahavnar fult av fiski, smøri, kjøti, saltfiski, lýsi og hosum, og hitt skipið skuldi í Føroyum taka inn farm av skinnum, tálg, vilum, fjøður og vadmali og sigla til Bjørgvins. Har skuldi tað sleppa sær av við vøruna og taka inn aftur farm av húsaviði og bátaviði. Bæði skipini skuldu sigla aftur til Føroya aðru ferð, hitt úr Keypmannahavn fult av vanligum handilsvørum. Skipið, sum kom úr Bjørgvin, skal aftur royna at fáa sær farm av teim somu vørum og selja tær helst í Akurhúsleni og síðan royna at fáa viðafarm við sær til Keypmannahavnar.

Av brævi 30. juni 1593[2]) síggja vit, at Søren Nielssøn, eisini kallaður Søren Islænder, sum hevði verið keypmaður árið fyri, hetta árið var fúti í Føroyum. Hann hevði tá lagt hond á skip hjá Niels Færø, ið er sami maður sum Nils Helgason, og sum einkjan eftir Erik Rosenkrans, Helvig Hardenberg, hevði sent til Føroya at heinta landsskuldina av hinum rosenkranska góðsinum. Hann var skuldsettur fyri um somu tíð at hava rikið loynihandil í Føroyum. Í brævinum biður kongur fútan sleppa Nilsi leysum, men tó ansa eftir, at eingin ólógligur handil fer fram í Føroyum. Hetta árið og árið eftir var Mogens Nielssøn keypmaður í Føroyum, men 1595 og 96 er Sørin Íslendingur aftur keypmaður,[3]) og soleiðis sær tað út, sum hava hesir báðir menninir skift fúta- og keypmannsstarvið sína millum, meðan kongur sjálvur rak handilin í Føroyum.

## e. Bjørgvin fær Føroya handil og missir hann.

Eftir at kongur í 5 ár hevði havt Føroya handil á sínum hondum, gav hann handilin frá sær í 1597,[4]) og í 22 ár kom tá handilin í Føroyum aftur at liggja undir Bjørgvin. Hamborg er nú heilt horvin úr Føroya handilssøgu. Eitt handilsfelag í Bjørgvin fær tá Føroya handil at røkja: Søren Anderssøn, Claus Liudt, Johan Wendelcke og Jacob Jacobssøn. Fyri kongsins vissu og óvissu rentu av Føroyum skuldu teir avhenda í Keypmannahavn eina vág av fiski fyri hvønn føroyskan gyllin, tó skulu vera tiknir frá 200 gyllin, sum skúlin í

1) A.C.E., skjal 215. 2) A.C.E., skjal 218. 3) A.C.E., skjal 224 og 227. 4) A.C.E., skjal 229.

Føroyum og Argja hospital skuldu hava. Teir skuldu halda góðar vørur og gamalt keyp og bert nýta føroyska alin og vekt, sum løgmaður og løgrætturin góðkendu. Sama árið varð Strange Madssøn fyrstu ferð settur sum fúti í Føroyum.[1]) Vørurnar av kongsins inntøku av Føroyum skuldi hann lata í handilin eftir keypmannsvektini, «og hvis overvægten kan beløbe sig med landsens vægt højere end købmandsvægten, skal forn. Strange Madssøn gøre Os særdeles klar rede og regnskab for.» Hann skuldi ansa eftir, at alt fór rættvíst fram við handilin. Handilin varð bert leigaður burtur fyri 3 ár. Árið eftir, 1598, varð Sørin ella Sevrin Íslendingur aftur settur sum fúti í Føroyum[2]) undir somu treytum, sum Strange Madssøn hevði árið fyri; sagt varð eisini, at hann skuldi hava 80 dálar í løn um árið. Henda løn fútans stóð við upp um 1650, men roknskapirnir vísa tó, at dálar hava merkt føroyskar gyllin bert til 1648. Tá er virðið sett í ríkisdálum umroknað í føroyskar gyllin. Hin 8 mai 1599[3]) kom Strange Madssøn aftur í fútaembætið í Føroyum undir somu treytum, sum Sørin Íslendingur hevði havt, og hann varð nú sitandi í hesum starvi í 20 ár. Tvey kongsbrøv frá 27. juni 1599 um Jóan Heinason, gamla løgmann, eru enn til skjals.[4]) Vit síggja harav, at løgtingið hevur dómfelt hann í tveimum málum. Í øðrum málinum hevði hann fingið fýra merkur (9 gyllin 12 skinn) í bót fyri ókvæmisorð móti fútanum og skuldi hareftir verða minnimaður. Í hinum málinum var bótin 185 gyllin 12 skinn. Ætlandi hava málini verið fyri rættinum 1598, meðan Sørin Íslendingur var fúti. Í brøvunum eftirgevur kongur Jóani Heinasyni báðar dómarnar. Hetta vísir okkum ein vissan politiskan spenning, sum verið hevur í Føroyum eftir deyða Magnus Heinasonar. Nevnda handilsfelag í Bjørgvin fekk endurnýggjað sítt handilsloyvi í Føroyum fyri 3 ár 6. mai 1601,[5]) bert at einkjan eftir Johan Wendelcke tá tók við eftir mannin, sum tá var deyður.

Táið bjørgvinska handilsfelagið aftur fekk handilsloyvi sítt endurnýggjað 16. apríl 1603[6]) undir somu treytum, vóru hesir menn í felagnum: Nicolaus de Frunt, Claus Liudt, Jacob Jacobssøn og Hendrik Didriksøn. Loyvið galt sum hini í 3 ár. Sama handilsfelag hevur tríggjar ferðir fingið endurnýggjað loyvi sítt: 16. jan 1605, 3. juni 1608[7]); og endurnýgging man eisini vera gjørd í 1611, tí handilsloyvi fór úr gildi 1. mai 1614.[8]) Vit vita annars nærum einki um tað, sum hendi í hesi tíð viðvíkjandi Føroya handli. Ongar løgtingsbøkur eru at finna, og aðrar søgukeldur lata nærsagt einki hoyra frá sær. Vit vita tó so mikið, at 1612 fór Sørin Sørensøn borgmeistari í Bjørgvin, sum eisini var tollari, snøggliga at krevja toll av vørum, ið skuldu til Føroya, ímóti gomlum rættindum, sum Føroya handil altíð hevði havt. Nicolaus de Frunt sendir klagu um hetta í brævi 8. apríl 1613.[9]) Í brævinum tekur hann m. a. soleiðis til:

«Efterdi vi efter gammel sædvane have der et vist køb med landsens indbyggere ligesom de på Island enten varen her koster lidet

---

1) A.C.E., skjal 228. 2) A.C.E., skjal 231. 3) A.C.E., skjal 232. 4) A.C.E., skjal 234 og 235. 5) N.R.R., 3. bind 2. hefti, bls. 633. 6) N.R.R., 4. bind 1. hefti, bls. 7. 7) N.R.R., 4. bind 1. hefti bls. 96 og 4. bind 1. hefti bls. 256. 8) N.R.R., 4. bind 2. hefti bls. 515. 9) D.D.R.A., D.D.K., B. 161.



eller meget, så haver vi altid været toldfri på samme Færø handel; men forleden år begærede borgmester Søren Sørensøn, tolder i Bergen, at vi endelig skulde fortolde hvis vare, vi sendte til Færø.»

Her kom altso ein maður og legði seg í vegin fyri Føroya handli, og tað, sum síðan hendi vísir, at hann man hava ætlað sær at fáa lut í fyritøkuni. Nicolaus de Frunt, sum var apotekari í Bjørgvin, var serliga væl kendur við Kristian IV frá eini vitjan, kongurin hevði havt í býnum. Áðurnevnda bræv hevði hann skrivað í Keypmannahavn, og táið Strange Madssøn fúti var borgari í býnum og bert fór til Føroya á hvørjum sumri, hava teir báðir ivaleyst talað saman um handilsviðurskiftini í Føroyum. Í Keypmannahavn man Strange Madssøn hava fingið at vita, at Nicolaus de Frunt fegin vildi halda fram við sínum Føroya handli. Vit síggja tó av brævi frá Strange Madssøn, at hesin hevði hug at skúgva hann til viks, men at hann var bangin fyri, at hetta fór ikki at bera til, tí at Nicolaus de Frunt var væl kendur við kong. Brævið, sum Strange Madssøn sendi Kristian Friis kanslara í Keypmannahavn 25. apríl 1613, ber júst á hetta borðið[1]):

«Eftersom jeg fattig mand nu på en 16 års tid (tidt og ofte med stor livsfare) haver ladet mig bruge udi denne ringe bestalling [sum fúti í Føroyum], så og tilforn udi højlovlig konning Frederiks tid haver ladet mig bruge både i England, Sverige og Tyskland, som kvittanser og regnskab kan udvise, og endnu med alsomstørste underdanighed og troskab er overbødig at lade mig bruge, udi hvis måde min ringe tjeneste kunde fornøden gøres, da efterdi jeg erfarer, at Nicolaus de Frunt haver comiste af de tvende andre købmænd udi Bergen underdanigst at begære en værdig og gunstig afsked afregnende den færøske forpagtning, er derfor til Eders strenghed min ganske ydmyge begæring, Eders strenghed for Guds skyld vilde have min lange tjeneste udi betænkende og mig hos Hans majestæt gunstelig vilde forhjælpe, at jeg nådigst måtte bekomme Færø på en vis afgift og gøre regnskab for det uvisse, derhos, at jeg også måtte forsørge landet med købmandsskab og tilføring; jeg skulde ved Guds hjælp forholde mig derudi, så ingen klagemål skulde påkomme.

Og efterdi Nicolaus de Frunt vil gerne blive endnu hos fornævnte handel, da erbjuder jeg mig at tage hannem til mig, eller hvem andre Eders strenghed synes godt at være.»

Claus Liudt og Jacob Jacobssøn hava viljað sloppið sær burtur úr handilsfelagnum, og fútin miðar tá eftir at fáa Føroyar í len við øllum handilsskapinum á landi. Ríkisstýrið hevur ikki viljað tikið Føroya handil frá Nicolaus de Frunt, men hevur viljað gingið Strange Madssøn á møti við at geva honum lut í handlinum. Síðan mega Strange Madssøn og Nicolaus de Frunt vera komnir á tal við Søren Sørensen um tollin og handilin og við hann hava gjørt semju um at taka hann sum luthavara undir teirri treyt, at vørur til Føroya eftir gomlum siði skuldu vera tollfríar í Bjørgvin. Slík semja kann vera gjørd á ferðini hjá Strange Madssøn yvir Bjørgvin til Føroya. Hesir menninir fingu soleiðis einarætt til Føroya handil frá 1. mai 1614.

---

1) D.D.R.A., D.D.K., B. 86.

Hesir tríggir handilsfelagarnir, hvarav tveir búðu í Bjørgvin og í Keypmannahavn ein, sum eisini var Føroya fúti, tykjast at hava sent vørur til Føroya hvør í sínum lagi. Av teim keyptu vørunum skuldi hvør hava sín triðing, og felags keypmann høvdu teir í Tinganesi. Klagurnar í løgtingsbókini um Tinganeshandilin eru mest um Søren Sørensen, og líkt er til, at hesin maður hevur viljað gjørt sær til góðar av Føroyum. Tó kann vera, at tingbókin av góðum grundum ikki hevur so nógv at finnast at handilsskapinum hjá Strange Madssøn.

Hin 5. aug. 1615 fekk Strange Madssøn skotsmál á løgtingi, og sjálvsagt var tað gott.[1]) Eisini Jacob Jacobsen (helst ikki sami maður sum keypmaðurin í Bjørgvin), sum tá var keypmaður í Tinganesi, fekk sítt skotsmál, og skuldi hann eftir tí vera væl umtóktur maður.[2]) Eftir sínum treytum sum fúti skuldi Strange Madssøn hava umsjón við handlinum, altso eisini við sær sjálvum.

Hin 5. aug. 1615 varð klagað á tingi um, at Søren Sørensen við skipi «Gert Skov» hevði sent til Føroya korn og mjøl,[3]) sum næstan ikki var etandi:

«Først kornet efterdi at det er både ringe og hetlandsk eller orknøsk korn og dertil mest fordærvet. Er tønden sat til 1 gl. 5 sk. [niðursett 15 sk.], og efterdi melet er også noget ringe og en part så godt som slet fordærvet og ubrugeligt, som prøver deraf kan udvise, skal deraf slås for tønden, eftersom det haver været godt eller ondt til, og eftersom enhver, som af samme mel bekommet haver, sig bedst med købmanden derom kan forliges, dog hver bør at bevise, hvor ondt og godt det været haver, som han haver bekommet.» Aftan á stendur: «Dette forn. haver kongl. majestæts foged været af os begærende beskrevet.»

Sama dag kemur Strange Madssøn á ting við einum koparloddi og tveimum bismarum og vil hava tingið at góðkenna hesi vigiamboð. Einki stendur um, hvørt tey vóru úr leigubúðini ella handlinum, men tingbókin sigur:[4])

«Hertil svarede lagmand Zacharias Thormodsøn såvel som alle lagrettesmænd, at det var det lod, som højsalig ihukommelse kong Frederik [altso innan 1588] havde hid sendt og altid haver været brugt her udi landet, og ingen understår sig at klage derpå. Bismerene er tvende rette bismere og haver været brugt her udi landet udi langsommelig tid. Ingen kan heller have at klage på dennem.»

Vit síggja herav, at Fríðrikur kongur II hevði sent Føroyum, helst leigubúðini, hetta koparloddið, og at bismararnir vóru báðir avgamlir. Í Noreg vóru alin, vekt og mát broytt við Norsku løgbókini frá 1604. Strange Madssøn man hava kravt hesa broytan innførda í Føroyum, men vit síggja, at føroyingar og handilshavararnir hava sett seg ímóti tí, og við kongligari skipan 6. juni 1606[5]) sigur kongur, at slík broyting hevur ikki verið ætlað Føroyum, og at føroyingar tí skulu hava sína alin, vekt og mát sum áður.

Hin 18. juni 1616 las Strange Madssøn upp á tingi í Havn hini kongligu einahandilsrættindi í landinum.[6]) Hann lovaði fyrst at føra

[1]) Lb. fol. 6 b, fol. 7 a og fol. 7 b. [2]) Lb. fol. 9 b. [3]) Lb. fol. 11 b. [4]) Lb. fol. 13 a. [5]) N.R.R., 4. bind 1. hefti bls. 152. [6]) Lb. fol. 15 b.



fólkinum nóg nógvar og góðar vørur til lands, men segði tó, at hetta umfataði bert hansara triðjapart av handlinum. Síðan minti hann á útistandandi handilsskuld og legði aftrat, at hon mátti verða goldin, «såfremt de ikke ville stå derfor til rette, og om de ville få noget fra købmanden igen til deres underholdning.» Hetta tykist at umfata allan handilin á Tinganesi. Seinast brigslaði hann fólkinum, hvussu tey seldu loynikeypmonnum sínar bestu vørur, og hótti folk við rætti og dómi, um tey gjørdu slíkt. Tingbókin sigur einki um, at Strange Madssøn nakrantíð hevur gjørt álvara av síni hóttan, tó at bókin ber boð um bæði í 1619 og 1620, at nógvur loynihandil er farin fram eftir hetta undir hansara handilsskapi. Menn mega tí halda, at júst handilsskapurin hjá Strange Madssøn og hansara feløgum hevur verið atvold í, at loynihandil innan 1620 fekk líkindi til at fara nærsagt ótarnaður fram í Føroyum.

Hóast allar tær klagur, sum høvdu verið frammi í tíðarskeiðinum 1514—17 um Føroya handil serliga viðvíkjandi Søren Sørensen, biður hetta sama handilsfelag ríkisstýrið um at sleppa at halda fram við sínum virki komandi trý ár.[1]) Søren Sørensøn tykist at hava havt fastatøkur á felagnum, og óivað var tað tollurin í Bjørgvin, sum her lá í buktini. Hetta sama trýmanna handilsfelagið fekk eisini handilsloyvið sítt endurnýggjað. Givið er tað, at tá Strange Madssøn hetta árið tók upp aftur samarbeiðið við sínar gomlu partafelagar, serliga við Søren Sørensen, og hann sjálvur samstundis var Føroya fúti, hevði hann eisini ábyrgd av tí, sum partafelagar hansara gjørdu. Úr Keypmannahavn 28. apríl 1617 hevur Strange Madssøn sent Føroya løgtingi bræv,[2]) sum vísir, hvat var hent:

«Min venlige hilsen forsend med Gud vor herre kære hr. lagmand samt menige lagrettesmænd og almue på Færø næst min taksigelse!

Da for det første, gode venner, eftersom kongl. majestæt af synderlig gunst og nåde påny haver undt og nådigst bevilget, at vi igen på tre års tid må lade besegle Færø med vor vare og tilføring, da efterdi ingenting er bedre end, at man frygter Gud og gør hverandre ret, hvilket jeg næst Guds hjælp skal beflitte mig på, så meget muligt og menneskeligt er, og eftersom jeg på Hans majestæts vegne også haver befaling der udi landet, måtte nogen tænke, at jeg skulde holde med mine konsorter, at dersom nogen haver sig over købmandskabet at beklage, jeg hannem for sådan lejligheds skyld på Hans majestæts vegne til rette ikke skulde forhjælpe, da vil jeg dertil således svare, at hvem som om købmandskabet haver at beklage, være sig udi hvis måde det kan være, skal og vil jeg en og hver forhjælpe til rette så vel over mit eget gods, om det er straf værd, som udi andre måder, såsom jeg det for Gud i himlen og Hans majestæt forsvare vil, og vil hermed venligen begære, at enhver, som haver noget at klage, han det med god besked vil fremføre for mig selv, så jeg det må få at vide, og ikke på min ryg ligge og skvaldre en stor hob, som alt ingen sandhed eller bevisligen er. Jeg skal med Guds hjælp gøre det, mig bør at gøre.»

At Strange Madssøn her roynir at rættvísgera seg í sínum tvíyrki

[1]) N.R.R., 4. bind 2. hefti bls. 613. [2]) Lb. fol. 22 a.

sum keypmaður og fúti í Føroyum, er týðuligt, og táið hann biður fólk lata vera við «på min ryg ligge og skvaldre en stor hob, som alt ingen sandhed eller bevisligen er» og heldur koma til sín, «fremføre for mig selv», tá vísir hetta, at fólk hava havt Strange Madssøns handilsskap nógv á munni, men at hann onga rættargongd ynskti burtur úr hesum. Hann kundi havt stevnt fólki fyri at hava brúkt munn móti sær, menn hann kundi ikki so væl klaga seg sjálvan. Í løgtingsbókini stendur hann tí sum hin reini og rættvísi maðurin í hesum trýmanna handilsskapi. Nicolaus de Frunt sæst heldur eingin klaga at hava verið um. Hvør kundi hugsast at vilja reisa klagu móti Strange Madssøn, táið vit vita, at um somu tíð framdu bæði løgmaður og nærsagt allir løgrættumenninir stóran loynihandil?[1]) Hetta kom týðuliga fram 1620, táið Strange Madssøn var fráfarin bæði sum fúti og keypmaður.

Brævið frá Strange Madssøn minnir víðari tingið á, at tað eigur at ansa eftir alin, vekt og máti og at lata hetta kanna, so skjótt handilsmaðurin á Tinganesi er komin aftur til Føroya. Handilsmaðurin eins og fútin var burturstaddur allan veturin, og báðir høvdu teir tá menn fyri seg. Fútin segði tinginum frá, at hann hevði sent skip við góðsi til Føroya, og at keypmaðurin (Jacob Jacobsøn) var við tí, og hann ivaðist ikki í, at handilsfelagar hansara gjørdu tað sama fyri teirra triðingar av handlinum.

«Og på det I, gode folk, skulle se, at jeg haver omsorg for eder, at I med tilføring noksom skulle blive forsørget, da kunne I af vor købmand fornemme, hvor meget som dette nærværende år er bestilt at skulle forsendes did til landet,» leggur hann landsfaðirliga aftrat, men gloymir tó ikki at minna fólk á at gjalda fyri vørurnar. Hann endar brævið við, at klagað hevði verið um, at ullin, sum kom úr Føroyum síðsta ár, var ring, og biður tí fólk ansa eftir at hava ullina góða til útflutnings. Seinri minkaði vaðmalið, og hosugerðin vaks, men ullarnøgdin í leigubúðini stóð við.

Táið fútin á tingi 4. juli 1617 spurdi, um fólk høvdu nakað at klaga um handilin,[2]) fekk Søren Sørensøn somu ábreiðslu:

«En part af det mel, som kom fra Bergen og Søren Sørensøn med skib Job nu i år, det var en part gammelt og meget fordærvet såvel i fjor som nu i vår. Sammeledes bygkorn, som nu med samme skib er og hidkommet, findes megen havre iblandt, så det ikke kan males på disse små kværne; derfor må det sælges for sit værd, som er $1^1/_2$ gylden.»

Magnus Heinason var á sinni skuldsettur fyri at hava blandað havra í bygg. Her finna vit somu skuldseting frá tinginum, uttan at annað hendi enn, at tingið kastaði hálvan gyllin av tunnuni. Stykkið um handilsviðurskiftini endar við hesum orðum:

«Dernæst spurgte kongl. majestæts foged menigmand, som til stede var, om lagmanden udi nogen måde havde forurettet nogen og ikke hjulpet hver og en til al lov og ret, som hannem burde med rette, og haver nu herhos forn. kongl. majestæts foged og befalingsmand, Strange Madssøn, alvorligen advaret og formanet lagmanden, at han

1) Sjá bls. 145—146. 2) Lb. fol. 21 b.



ikke skulde være som en hykler, som en part sig haver ladet forlyde for kongl. majestæts admiral og kaptejn, [og á breddanum] og forn. Strange Madssøn, desligeste lagmanden formanede dernæst endnu, at de, som sådant haver gjort, skulle sig nu åbenbare [endað á breddanum]. Og forn. Strange Madssøn erbød sig at være dennem alle behjælpelig til al lov og ret, den fattige såvel som den rige.»

Hesin admiralur, sum føroyingar hava ført klagu fram fyri, hevur ætlandi verið Jørgen Då, og eingin uttan framligur maður í føroyska samfelagnum hevur komið sær at gera slíkt. Óivað hevði Strange Madssøn í Keypmannahavn fingið at vita frá Jørgen Då, hvør maðurin var, sum klagaði. Hansara og løgmannsins áheitan á hin seka fekk heldur einki svar á tingi, og ikki tordu teir at reisa klagu ímóti honum. Málið varð tá tagt burtur. Hetta tykist at benda á, at Sakaris Tormóðsson løgmaður og Strange Madssøn fúti gingu hvør øðrum til handa í ivasomum málum, og hitt stóra kærumálið um loynihandil á tingi 1620 frá nýggja fútanum er søguligur stuðul undir hesi hugsan.

Hin 4. juli 1617 bað Jacob Jacobsøn keypmaður um og fekk skotsmál av løgtingi, men hann tók tá eisini skotsmál fyri hálvbróðir sín, Chr. Jenssøn. Av hesum sæst, at Chr. Jenssøn farna vetur hevði verið vetrarkeypmaður í Føroyum fyri bróðir sín, og at keypmaðurin í Tinganesi var fyri allar tríggjar handilsharrarnar.[1]) Skotsmálini, sum brøðurnir fingu, ljóða bæði væl og eru váttað av kirkjumonnum, løgmanni og løgrættumonnum. Sama dag bað Jacob Jacobsøn eisini um og fekk skotsmál á tingi fyri ein handilssvein sín, Hermann von Køllen.

Eftir ólavsøku 1617 var Strange Madssøn í Bjørgvin, tí haðani skrivaði hann løgmanni bræv 13. aug. hetta árið. Føroyingar tykjast at hava verið í ringum skørum um handilin, og fútin man vera farin til Noregs at tala við handilsfelagar sínar um hetta.[2]) Brævið er soljóðandi:

«Min ganske venlige hilsen eder nu og altid forsend med Gud vor herre!

Kære Zacharias Tormodsøn! Næst en venlig taksigelse for alt godt at forskylde findes jeg altid som eders gode ven. Så drager eder vel til minde, hvad klagemål der var sidst forleden ting om mel og korn; da på det at man sådant klagemål engang kan være entlediget, vil jeg eder hermed alvorligen have formanet og på kongl. majestæts vegne alvorligen befale, at I lader kundgøre over alt Færø både på høstting og vårting, at hvem som køber noget gods udi Havnen, da skulle de samme gods straks udi Havnen opslå og besigtige. Og det sig da så hænde kunde, at nogen kunde bekomme noget, som ikke var så godt, som det sig burde, da skulle de det straks til vor købmand igen levere, og han da være pligtig (som hannem allerede af os befalet er), at igen give dennem det gods, som de nøjes med, eller og at afslå på købet, eftersom han da med dennem kan handle. Hvis korn, som kan være sendt did til landet, er vor købmand be-

1) Lb. fol. 31 b og 32 a. 2) Lb. fol. 38 a.

falet at sælge efter sit værd. Hvem der ikke af købe vil, kunde lade det blive liggende [ikki kundu fólk fáa annað uttan gjøgnum loynihandil].

Dette fornævnte altsammen kunde I, som før er meldt, lade almuen der udi landet vide og forstå, hvorefter enhver kan vide sig at rette, thi dersom nogen herimod gør og bekommer nogen skade, kan jeg på kongl. majestæts vegne ingen ret derudi til forhjælpe hannem; thi enhver skal ske fyldest og god ret udi Havnen, eftersom før er meldt, så at ingen med rette næst Guds hjælp skal have sig at beklage.

Dette jeg eder som min gode ven ikke kunde forholde og gør altid gerne, hvis eder kært er, og vil hermed have eder Gud allermægtigste anbefalet.

Actum Bergen, den 13. aug. 1617.

*Strange Madssøn.*

Ærlige og velforstandige mand, Zacharias Thormodsøn, lagmand udi Færø, min synderlige gode ven, ganske venligen tilskrevet.»

Kanska náddi hetta brævið at koma heim til Føroya, áðrenn løgtingið tók málið um tær ringu mjøl- og kornvørurnar til viðgerðar. Hetta hendi longu 10. septbr.

Viðgerðin av hesum máli vísir tó týðuliga, at fútin hevði givið tænara ella fulltrúa sínum, Rasmus Pedersøn, gjølla frágreiðing um, hvat hann fútans vegna átti at siga á tingi, um málið um tær spiltu vørurnar kom fyri, meðan hann, fútin, var burturstaddur. At Søren Sørensøn skuldi sýnast fram sum hin seki, var at vænta, og sekt hansara var ivaleysa størst. Tað er at minnast til, at tvær reisur høvdu hinir báðir handilspartnararnir valt sær Søren Sørensøn til handilsfelaga. Eftir at hava hoyrt klagur løgtingsins um tær ringu vørurnar frá Søren Sørensøn hava hinir báðir menninir í handilsfelagsskapinum enntá ikki í øðrum umgangi viljað sloppið sær av við borgstjóran og tollaran í Bjørgvin. Føroyskur handil gekk mest yvir Bjørgvin og Háland. Í tingbókini undir 10. septbr. 1617 stendur fylgjandi:

«Om det onde og sorte mel, som kom fra Bergen med borgmester Søren Sørensøns skib nu i sommer.[1])

Anno 1617 den 10. dag september vare vi efternævnte forsamlede her udi Thorshavn udi nye stoven: Zacharias Thormodsøn, lagmand her på Færø, Hans Pedersøn Morsing, herredsfoged ibdm., Hans Joensøn på Thrødegård, Joen Thomassøn, Hendrik Thomassøn og Hans på Velbestad, svorne lagrettesmænd her på Færø.

Da udi vor nærværelse tilspurgte kongl. majestæts foged, Strange Madssøns tjener, Rasmus Pedersøn, os efter sin forn. husbondes skriftlige befaling, med hvis skib og på hvad skib det onde og sorte mel var kommet hid til landet, som almuen haver klaget på i denne forgangne sommer, af hvilket mel forn. Strange Madssøn blev leveret prov [prøve] udaf her på et sat lagting at overføre til Bergen [prógvið hevði hann væl við sær á Noregsferðini], og findes endnu prov af

1) Lb. fol. 38 b.



samme mel her i landet igen forvaret [á breddanum: hos Hans Pedersøn Morsing], da kunne vi i sandhed ikke andet bekende, end samme onde og sorte mel, som før er meldt, det kom fra Bergen, fra borgmester Søren Sørensøn, og skib Job havde samme mel inde hid til Færø, som han ikke selv (om videre behov gøres) skal kunne nægte.

Dette var Rasmus Pedersøn efter forn. Strange Madssøns skiftlige begæring af os begærende beskrevet, hvilket vi hannem ikke nægte kunde.»

Fútin og handilsfelagar hansara tykjast at hava verið samdir um, at føroyingar skuldu góðkenna á staðnum tær vørur, teir keyptu við handilin í Havn. Alt mjøl var pakkað í tunnur, og táið keypið fór fram skuldu tunnurnar verða uppbrotnar og mjølið eftirhugt. Um tað varð hildið at vera spilt, skuldi avsláttur kunna verða givin beinan vegin. Á henda hátt ætlaðu teir at sleppa sær undan øllum klagum í framtíðini. Hvønn vansa hetta førdi við sær, er lætt at skilja, og tá helst hjá bygdamonnum, sum komu til handils við bát.

Hin stóri kornmarknaðurin í hesi tíðini var Amsterdam í Hálandi. Korn frá teim baltisku londunum kom í rúgvum hagar, deils í skipsfarmum gjøgnum Oyrasund og deils yvir Lübeck—Hamborg. Hálendingar fingu kornið bíligari við sjálvir at føra tað, men har lá tó Oyrasundstollurin ímillum. Hin vegin gjørdi Lübeck alt fyri at verja handil sín yvir Hamborg, og av hesum stóðst fleiri ferðir bardagi, hvar dansk-norska ríkið lá á øðrum táttinum og Svøríki á hinum. Hin skánski spurningurin lá tá eisini altíð ímillum. Kornið, sum vaks í Hetlandi og Orknoyum, var vánaligt og óivað væl bíligari í innkeyp enn hitt baltiska. Tað keypti Søren Sørensen sær fyri at senda til Føroya. Við slíkum handilsskapi helt maðurin fram, til hetta handilsfelagið í 1619—20 var komið á gravarbakkan.

Í 1617 kom eisini klaga úr Keypmannahavn um tann fisk, sum var komin úr Føroyum. Tað var turrur fiskur, sum Strange Madssøn hevði fingið í sín triðingslut við handilin. Hesa klagu tóku teir somu tingmenn — tí alt løgtingið var tað ikki — um somu tíð til viðgerðar:[1])

«Da udi vor nærværelse og påhørelse tilspurgte Rasmus Pedersøn, kongl. majestæts foged Strange Madssøns fuldmægtige [síðsta orðið yvirstrikað] tjener her sammesteds, Jacob Jacobsøn, fuldmægtig købmand her sammesteds, Herman von Køllen og Christian Jenssøn, købsvende ibdm., efter forn. sin husbonde Strange Madssøns skrivelse, om de vidste at være skibet slemmere eller værre fisk til København til kongl. majestæts behov end den fisk, som er skibet enten til Holland eller til Bergen, hvortil Jacob Jacobsøn samt Herman von Køllen og Christian Jenssøn svarede således, at hvis fisk, som forleden år 1616 blev nedersendt her fra Færø og til København til kongl. majestæts behov, derom ved Rasmus Pedersøn også vel, at Strange Madssøn befalede os at kaste til side det, som tjenstligen var til København til kongl. majestæts behov (og det var ingen udskud), men grov og god fed fisk.

1) Lb. fol. 39 a.

Desligeste de andre åringer kunne vi ikke andet sige og bekende med vor samvittighed ingen fisk her fra at være udskibet på disse ny konsorters, som er borgmester Søren Sørensøn, Strange Madssøn og Nicolaus de Frunts vegne, men at kongl. majestæt, desligeste alle forn. 3 redere, jo havde (dorch de back) bekommet, den ene såvel som den anden af forn. fisk og ikke udskud for den ene reder mere end for den anden.

Til det sidste, hvad belanger den nærværende sommer 1617, eftersom der menes, at den ene reder skulle ske mere forkort som den anden også med færøsk fisk (formedels udskud), eftersom breve og skrivelse, som hid er kommet, videre om formelder, her svarede de så til, at hvis fisk, som dette år 1617 er udskibet her af landet, da haver hver af rederne fået den ene lige gode fisk som den anden, dorch de banck, og dette forn. ville de bestå, når eller hvor som videre behov gøres.

At sådan tiltale og gensvar er gåen og faren, som forskrevet står, vidne vi forn. lagmand og lagrettesmænd med vore signeter her nedenunder.»

Vit síggja herav, at turrur føroyskur fiskur tá hevur verið sendur til Bjørgvins, til Keypmmahavnar og til Hálands, helst soleiðis, at hvør reiðari hevði sín marknað. Fiskin til Keypmannahavnar hevur Strange Madssøn sent, og kongur hevur nýtt hann til matna hjá herfólki sínum. Klagan úr Keypmannahavn rakti tí serliga Strange Madssøn, og í løgtingsbókini er heldur eingin roynd gjørd fyri at leggja skuldina á aðrar, men dentur er lagdur á at halda fram, at kongur hevði fingið ivaleyst líka góðan fisk sum tann, ið fór til Hálands og Bjørgvins.

Í 1918 kom spurningurin um handilin sum vanligt fyrstur fyri á ólavsøkutingi. Fólk vórðu spurd, um tey høvdu nakra atfinning um handilin fyri farna árið. Eftir tingbókini at døma svaraði fólkið einki, og soleiðis tóktist alt at vera í lagi. Eftirhyggingar fóru síðan fram viðvíkjandi alin, vekt og máti.

Fyrst: «Om den alen, vægt og bismer, som bruges udi kongl. majestæts leje- og landskyldbod, hvilket blev nu straks indbåren og på lagtinget forsøgt og befunden endnu som tilforn ret at være, så at ingen derpå kunde klage i nogen måde.»

Hetta galt altso kongsins leigubúð, eins og tað, sum hendi á tingi 5. aug. 1515, eisini má ætlast bert at hava goldið henni. Alin og vekt hjá handlinum vórðu eisini kannað um somu tíð:

«Samme tid blev lagmanden tilsagt af forn. kongl. majestæts foged, at hann skulde levere købmanden en jernalen og rette bismere, som skulde bruges udi kramboden herefter.»

Regla var í teirri tíðini, at løgrætturin skuldi góðtaka øll mát- og vigiamboð, sum nýtt vóru í handlinum, og at tey skuldu vera tey somu, sum Noreg ella Bjørgvin hevði nýtt í gomlum døgum, innan Norska løgbókin av 1604 broytti hesar eindir. Løgtingið má hava havt normar av hesum eindum, og tí mega vit helst rokna við, at tær eindir, sum Fríðrikur kongur II á sinni hevði sent leigubúðini, hevur løgtingið eisini nýtt sum normar fyri at avgera, um mát og vekt við handilin vóru røtt. Her síggja vit, at futin biður løgmann



um at geva handlinum eina jarnalin og rættar bismarar. Beint aftan á frammanfyri endurgivna stendur í tingbókini:

«Kobberloddene bleve befundne ret at være.»[1])

Vigiamboð úr kopari hildu sær sjálvsagt leingi, men verri var tað við eini jarnalin, ið rustar, sum tíðin leið. Føroyar vóru einasta øki innan fyri dansk-norska ríkið, sum enn nýttu gomul norsk mát- og og vigiamboð, og tey verða síðan ofta bert nevnd føroysk. Bæði hin føroyska alin ella stikkan og hin gamla norska mørkin vóru smærri eindir enn tær, keypmenn eftir lógini nýttu. Løgtingið helt tó fast um hesar eindir til um leið 1690, tá tær eindirnar, sum Ole Rømer fastlegði, eisini vórðu innførdar í Føroyum. Í hinum føroyska tunnumátinum, Rostockartunnan, tykist ikki so nógv avvik at hava verið frá tí máti, handilsskapurin var farin at nýta. Undir slíkum viðurskiftum mega vit rokna við, at handilin, sum jú var á fremmandum hondum, so líðandi hevur roynt at troðka sínar vanliga nýttu eindir inn í føroyskan handilsskap. Seinri síggja vit eisini, at løgtingið letur bókføra, at tað heldur fast um føroyska alin, mát og vekt, sum mótmæli móti nýtslu av fremmandum eindum.

Ikki kann altíð vera farið reiðiliga fram í vektabúðini við handilin; tí hevur løgtingsbókin undir 1618 hesa viðmerking:

«Item den fisk eller vare, som købmændene skulde annamme fra bønderne på vægtskålen, skal og retteligen med handles, og ingen skal holde på skålene.»

Síðan kemur ásetingin um mjøl:

«Hvis mel, som er udi tønder, skal her opslås i Havnen, førend det bliver fremført. Hvis bygmel, som nu i år er kommen fra Bergen og er udi tønder, skal sælges 1 td. for 2½ gylden med træet.»[2])

Eftir takstinum er hálvur gyllin sligin av tunnuni, so mjølið kann ikki hava verið gott. Líkt er til, at Søren Sørensøn hevur sent hetta mjølið, tí 26. juli 1618 sendi hann løgmanni bræv um Føroya handil, hvar hann rósar sær av øllum, hann hevur sent við skipi til Føroya. Harí nevnir hann eisini gávu, hann hevur sent løgmanni:

Kære hr. lagmand! Sender jeg Eder et fad øl bedende gerne, I vil tage til takke til husbehov.»[3])

Brævið hevur hesa eftirskrivt:

«Kære hr. lagmand! Haver jeg med det forrige skib sent did til landet 4 læster bygmel i ikke anden mening end, at det jo skulde sælges for bygmel såsom det skottekorn, det, i forgangen år henkom, skulde og sælges for sin pris. Dersom købmanden det anderledes udsælger, er det ikke min skyld, for jeg haver befalet min skipper, Hans Fønbo, at give købmanden det til kende, når skibet blev losset.

Hvordan Nicolaus de Frunt haver skibet landet i disse åringer, er Eders fromhed nok bevidst; hvor det skulde have stået med landet, dersom jeg ikke havde affærdiget (effuentyrett) mit skib og gods så sent på høsten mig ikke til ringe skade, på det jeg ikke vilde have nogen klage på mig —.»

Brævið vísir, hvussu Søren Sørensøn ger álop á Nicolaus de Frunt,

---

[1]) Frammanfyri nevndu úrdrag úr Lb. fol. 42 a og b. [2]) Lb. fol. 42 b. [3]) Lb. fol. 58 a.

og hvussu hann roynir at fáa løgmannin at halda við sær í handilsskapinum og tá serliga í prísinum á tí ringa mjølinum og korninum. Hann man eisini hava havt sína ætlan við øltunnuni.

Strange Madssøn var jú ráðmaður og borgari í Keypmannahavn. Hann man vera vorðin sjúkur har um veturin 1618–19 og er tá ikki komin til Føroya sum vanligt á vári.

Løgtingið man tó hava væntað hann at koma seinri, tí 1619 kom tað ikki saman fyrrenn 12. aug. Fyri Strange Madssøn møtti á tingi Rasmus Pedersøn, «hans tjener og fuldmægtige.» Hann bað tingið um skotsmál fyri Strange Madssøn, eins og hann hevði fingið tað av øllum vártingunum. Hann fekk tað eisini, og eftir tí hevði Strange Madssøn gjørt sína skyldu bæði sum fúti og handilsharri og ikki gjørt mannamun á høgum og lágum. Skotsmál, sum tingið gav, vóru yvirhøvur rósandi, so søguligur dentur kann ikki verða lagdur á tey. Eisini Rasmus Pedersøn biður um og fær um somu tíð skotsmál frá tinginum. Við Jacob Jacobsøn keypmanni hendi tó eitt undantak, sum skjótt skal verða nevnt.

Á vetri 1618, ætlandi upp undir nýár 1619, var eitt skinnslodd burtur ella horvið úr leigubúðini. Loddið var 4 føroyskar merkur «efter færøsk regnen», sum skrivað stendur. Hetta er fyrsta og einasta ferð, skinnsloddið er nevnt í løgtingsbókini, og vit síggja herav, at tað hevur verið nýtt í leigubúðini, men ikki er prógv fyri, at handilin um somu tíð hevur nýtt tað. Tó er tað væl hugsandi. Skinnið var tá ein vanlig føroysk vekteind, sum hvørt ár gongur aftur í fútaroknskapinum. Hin 12. aug. 1619 var spurningurin um hetta loddið fyri á løgtingi, og tilskilað er, at tað «brugtes til Hans majestæts vægt udi landskyldboden», og at fútin í síni tíð hevði fingið tað frá løgmanni, Streymoyar sýslumanni Hans Pedersøn (herredsfoged) og Gabriel Mitens landsskrivara.[1] Gabriel Mitens tók við sum landsskrivari 1584, og fyrst hetta árið kann so loddið vera komið í leigubúðina. Prógv er tó einki fyri, at hetta hevur verið fyrsta skinnslodd í leigubuðini. Fútaroknskapurin 1584 nýtir ikki vektskinnið, meðan skinnið verður nýtt sum vekteind í fútaroknskapinum frá 1588. Løgtingsbókin sigur annars einki um, hvussu løgmaðurin æt, ið flutti leigubúðini hitt burturmista loddið.

Beint aftan á sama dag komu eindirnar úr handlinum fyri á tingi:

«Samme dag blev bismere og kobberloddene indbårne på tinget og alen, som købmanden bruger i kramboden, og blev leveret købmanden, efter at de var rettet af lagmanden og lagretten inde på tinget og leveret købmanden i hænde, hvorefter de sig skulde rette.»[2]

Her stendur einki um nakað skinnslodd, men táið støddin av ongum loddi er nevnd, kann eitt slíkt væl hava verið teirra millum. Rostockartunnan verður í 1617 nevnd í løgtingsbókini sum føroyskt tunnumát. Eftir Lucas Debesar bók 1673 varð hetta tunnumátið tá enn nýtt við handilin. Eisini Hamborgaralin ella stikkan varð nýtt tá, og vekteindirnar tykjast eisini at hava verið tær somu.[3]

Trýmannahandilsfelagið frá 1614 tykist veruliga at vera fallið niður

1) Lb. fol. 63 b. 2) Lb. fol. 64 a. 3) Rostockartunnan ætlandi = Bjørgvinstunna, sjá Sv. Aakjær: Maal og vægt, bls. 120 (162 e). L.D. útg. «Fram»s bls. 267.



fyri á sumri 1619. Nicolaus de Frunt helt seg tá kvirran, Strange Madssøn var sjúkur, og óivað vóru báðir troyttir av Søren Sørensøn. Í hvørt fall síggja vit longu í tingbókini 12. aug. 1619, at løgtingið tók upp kanning um hvussu nógvar vørur handilin hevði á goymslu, og tað sær heilt neyðarsligt út:[1]

«Samme tid blev udnævnt 6 udaf lagretten, som med lagmanden og herredsfogeden skulde gå ind udi kramboden og bese, hvad der nu fandtes inde, som var usolgt og det forrige kompagni tilkom, som var borgmester Søren Sørensøn, Strange Madssøn og Nicolaus de Frunt, og skulde deles udi tre parter, som var:

Sorte hornknivskeder 60, mandsko 3 par, små øskere 70, hvadstene store og små [helst brýni] 600, jerngryder 2, rør og bøsser duer intet 18, gamle hellebarder 12, uldsakse 18, træskufler, bismere 3, osmund [jarn] 1 fad, små kamme 1 dusin.»

Var hetta alt, sum handilin í Tinganesi tá hevði á goymslu, stóð ikki væl til og helst við matvørum í landinum, nú ið summarið fór at halla. Fyrst við kongsbrævi, dagssett 16. des 1619, fekk annað felag, hitt íslendska handilsfelagið, einarætt til handil í Føroyum,[2] men rættindini hjá hinum gamla handilsfelagnum skuldu av røttum fyrst ganga til 1. mai 1620.

Húsini í Tinganesi skuldu eisini sýnast til avhendingar, og nakrar dagar seinri í august kom hetta fyri. Harum sigur tingbókin:[3]

«Om kongl. majestæts huse her i Havnen.

Anno 1619 den 20. august vare vi efternævnte forsamlede her i Thorshavn og tilnævnt af kongl. majestæts foged, Strange Madssøn, at skulle bese og skue alle kongl. majestæts huse her i Havnen, som købmændene haver brugt indtil denne dag, og hvorledes de ere nu ståendes, og hvad bøder derpå skal lægges. (Som?) Vare disse efterfølgende: Zacharias Thormodsøn, lagmand her sammesteds, Daniel Nielssøn, Holdan Gudlacksøn, Michel Joensøn, Joen Thomassøn, Zacharias Pedersøn, Olof Poulsøn, Hans på Velbestad [Nielssøn] og Olof Lauridssøn.

Blev således forefundet og påsagt:

1. Først at blokkestuen er slet forfalden og er nu meget værre, som hun var anno 1613. Den må nedertages med første og af ny tømmer opbygges igen, bødes med 80 gylden.
2. Gårdstuen må forbedres med bjælker, skedestave, muren, desligeste taget og trødet [tróðrið].
3. Stegerhuset er forfaldet vel to parte, må med allerførste forbedres.
4. Svalen uden for loftet og gårdstuen er meget forfalden og må med første nedertages og forbedres med 12 gylden, både træværk og taget.
5. Murkoven må hjælpes og forbedres med næver og taget [ætlandi Munkastovan].
6. Kælderen under loftet må og hjælpes med allerførste og sættes støtter under bjælkerne.

1) Lb. fol. 64 a. 2) Lb. fol. 86 b – 90 a. 3) Lb. fol. 73 b.

7. Koverne ved kramboden både for neden og for oven skulle endnu bødes og forbedres 4 tolft [tylfter] bord og nye hjørnestave.
8. [I] Salterboden skal gulvet forbedres med 2½ tylft bord.
9. Nåburs krog hos Salterboden er slet forfalden, skal forbedres med en tylft bord.
[10]. Gildeskålen (gilde schalen) skal forbedres med bjælker, taget, vinduerne og muren.

Og når Strange Madssøn eller hans fuldmægtige ikke haver (den?) behov at bruge gildeskålen, da ville vi, lagmand og lagrettesmænd, selv have forn. hus til vort eget behov.
Item når blokkestuen bliver nedertagen, da skal samme tømmer eller veden sælges eller [bruges til at] forbedre de andre gamle huse med, som ere forfaldne.»
Heilskapaða mynd av Tinganesi í 1519 gevur henda skráseting av húsunum har ikki. Hetta eru hús, sum handilin hevur nýtt. Gildisskálin er nevndur umframt, tí løgtingið krevur at kunna hava nýtslu av honum. Annars mega vit rokna við, at kongsins leigubúð eisini stóð í Tinganesi, ivaleyst sama húsið, sum seinri hevur itið leigubúðin.
Spurningurin, um sjálv Tinganeshellan enn hevur ligið leys frá landi í 1620, kann ikki verða avgjørdur við vissu. Eftir skrásetingini kann tað vera møguleiki fyri tí. Múrkovin, sum nevndur er, er ivaleyst Munkastovan. Byggningar hava óivað gingið frá henni eystur yvir Tinganes eins og í seinri tíðum. Um smalt sund tá var innan fyri tinganeshelluna, bar væl til hjá byggningum at standa nær oman at sundinum. Vit síggja, at blokkastovan í 1619 hevur verið nærsagt avfallin. Um Tinganeshellan tá hevur ligið leys frá landi, kann henda gamla blokkastovan ikki hava ligið á sama stað sum tann blokkastovan, vit seinri kenna, tí hon hevur Tinganeshelluna undir sær. Náburs krókur kann hava verið drykkjubúð, møguliga eisini eitt lítið hús, sum hevur verið nýtt til alt skrambul. Vit vita, at í 1709 lá stórt hús, sjóbúðin, vestantil á Tinganesi innan fyri Skinnarasker. Møguliga kann Saltarbúðin hava ligið í sama stað; um ikki, man hon hava ligið móti sundinum innan fyri tinganeshelluna.
Hin veruliga avhendingin til hitt nýggja handilsfelagið í Tinganesi fór fram í 1620, og um hana sigur tingbókin:

| | |
|---|---|
| «Først stegerhuset skal bødes med | 30 gylden |
| svalen uden for loftet og gårdstuen | 30 gylden |
| kælderen og loftet | 12 gylden |
| vardhuset og munkekoven | 14 gylden |
| gårdstuen | |
| krambodens kover | 20 gylden |
| salterboden og nåburs krog | 14 gylden |
| blokkestuen må bygges på ny igen og er slet forfalden, bødes med | 80 gylden.»[1] |

Her sæst eisini, at blokkastovan má hava verið bygd av nýggjum eftir hetta. Eingin vissa er fyri, at tað hevur verið gjørt beinan vegin. Skuldin hjá hinum gamla handilsfelagnum vísti seg seinri ring at fáa til vega. Kongur noyddist at strika út ein part av henni. Í hesum sambandi skal verða nevnt, at nýggi fútin, Mads Christensen, í 1623 læt sýna «en stue med forstue og svale, som han forgangen sommer på hans majestæts vegne haver ladet opbygge, hvilket tilforn. aldeles var nederfaldet.» Húsið varð tá: «medet og vurderet til et halvt hundrede færøske gylden.»[1]) At gamla handilsfelagið var komið í afturhond við sínum gjaldi til kongs, var óivað fyri ein part orsakað av, at tað hevði nógva handilsskuld standandi úti hjá føroyingum. Hvussu nógv tað veruliga var, er ringt at siga, tí upp kom í 1619, at bókførslan hjá felagnum undir Jacob Jacobsøn keypmanni hevði verið út av lagi skilaleys; menn vóru javnan kravdir tvær reisur fyri somu skuld. Innan hetta kemur til umrøðu, skal fyrst verða greitt frá, hvussu Søren Sørensøn helt fram við sínum føroyska handli.

[1]) Lb. fol. 97 a.

Út um miðjan august 1619 man Søren Sørensøn hava sent skip til Føroya við vørum, tí tingmenn vórðu kallaðir til Havnar at meta mjøl, sum komið var, og undir 23. september stendur innført í løgtingsbókina:[2])
«Anno 1619 den 23. dag semtember i Thorshavn på Færø vare vi efternævnte Zacharias Thormodsøn, lagmand her sammesteds, Jacob Poulsøn, Joen Guttormsøn, Michel Joensøn og Hans på Velbestad, lagrettesmænd ibdm., tilkaldet af kongl. majestæts ombudsmand her på Færø, Strange Madssøn, til at bese og lade opslå det mel eller gods, som nu i år 1619 var kommet hid til landet fra borgmester Søren Sørensøn i Bergen med skipper Hans Fønbo og siden med skib Jacob Påske, efterdi at af almuen klages, at en part af samme mel eller tønder er ikke fulde og ilde pakket.
Da efter forn. Strange Madssøns befaling og almuens begæring haver vi nu ladet opslå en del af samme mel og befundet, at der fattes meget på en part af tønderne, og var meget grovt og ilde malet og ret ilde pakket, så at der blev vel fyldt mere end 1 bismerpund mel på en part tønder og på en part mere, men i en part tønder var godt mel, op var vel pakket, så det kunde være forsvarligt. Derfor må melet herefter opslås og beses, når det skal sælges, og tønderne fyldes. Efterdi vi fattige folk skal og må give fulde pendinge derfor, da bør os og at få godt og ustraffeligt gods igen.
Men hvis det bygmel er belangende, som nu i år 1619 er hid kommet fra borgmesteren i Bergen, det er og temmeligt, men en part såre ilde malet og ret ilde pakket. Derfor må det og opslås og beses, når det skal sælges og tønden for 2½ gylden. Dette forn. haver Strange Madssøn af os været skriftligt begærende.»
Eitt bismarapund var 24 gamlar norskar merkur, sum vóru væl minni enn merkurnar nú á døgum. Norska løgbókin frá 1604 innførdi Kølnarmørkina í Noreg, sum var nakað størri enn hin gamla norska mørkin. Lutfallið teirra millum var 215:235. Í Norsku løgbókini stendur: «En tønde mel foruden træ skal veje 5 voger og holdes så udi Bergen for kontorets skyld på bryggen.»[3]) Ætlandi skuldi

[1]) Lb. fol. 130 b. [2]) Lb. fol. 70 b. [3]) Norska løgbókin Kiøbe Balcken kap.29, petti 8.

ein mjøltunna eftir hesum viga 5 Kølnarvágir og nakað meira í gomlum norskum vágum. Táið ein vág var 72 merkur, var undirvektin 24 merkur, sjálvt um tað vóru gamlar merkur, sum føroyingar nýttu, ikki so lítið.

Søren Sørensøn tykist at hava gjørt tað av við hin føroyska Bjørgvinshandilin. Tað er einki, sum bendir á, at hann var hugaður at halda upp at við hesum handli. Hann hevði enntá vørur liggjandi á goymslu í Føroyum í august 1620. Tá gav ríkisstýrið honum tvinni kor at velja ímillum: annaðhvørt at selja hinum nýggja handilsfelagnum vørurnar eftir meting ella sjálvur at føra tær av landi.[1])

Árið 1619 er eitt uppgerðarár fyri hitt gamla handilsfelagið. Jacob Jacobsøn, sum hevði verið keypmaður í Tinganesi, man vera fluttur úr Føroyum í 1618, tí í 1619 var hálvbróðir hansara, Christen Jenssøn, keypmaður í Tinganesi. Hin 17. aug. hetta árið bað hesin um skotsmál frá tinginum fyri seg sjálvan og bróðir sín. Í svari sínum kallar løgtingið Christen Jenssøn: «Nu velagt mand borgmester Søren Sørensøn og Strange Madssøns tjener sammesteds.»[2]) Teir tveir handilsfelagarnir mega altso hava hildið saman til tað síðsta, meðan Nicolaus de Frunt longu tá man vera farin út úr handilsfelagsskapinum.

Christen Jenssøn fekk skotsmál sítt eftir vanligum sniði, men Jacob Jacobsøn, sum løgtingið áður hevði sagt gott fyri, kundi nú ikki fáa skotsmál frá tinginum. Landsleigan fyri junkaragóðsið í Føroyum varð tá uppkrøvd gjøgnum keypmannin í Tinganesi. Hin norska harramannsættin Benckestock og hin danska ættin Rosenkrands høvdu hvør sín partin av hesum góðsi. Fløkja var komin í landsleigugjaldið á Benckestockajørðini í Føroyum, og í 1619 kom Rasmus Eriksøn til Føroya fyri at fáa skil á hesum. Jacob Jacobsøn hevði svikið í síni roknskaparførslu, og Christen Jenssøn royndi tá í skrivi til løgtingið at bera í bøtiflaka fyri bróðurin. Tað varð framlagt á løgtingi 17. aug. og var skrivað á heldur klumputum máli:[3])

«Eftersom I ærlige dannemænd eder er vel vitterligt det, Jacob Jacobsøn forgangen år skulde annammet og oppebære, den landskyld af de Benckestockers gods, efter borgmester Søren Sørensøns skrivelse, men nu er der, som jeg fornemmer, nogen molestads imellem bønderne og den, som nu skal annamme og oppebære forn. rettighed udi år formedels den 1618 oppebærelse og udgivne rettighed, idet at en del siger, de haver betalet deres landskyld og nu påny i år kræves igen for samme deres rettighed at udgive; så efterdi og på det at de gode folk her i landet ikke skulle betale tvende gange deres leje, da eftersom jeg ved imellem Gud og min samvittighed, er og haver disse efterskrevne dannemænd betalet deres rettighed, først hr. Thorlof Gregersøn for det, han haver til leje udi Sandø, Jacob udi Tjørnevig, hr. Gabriel, Magge à Ryg, hr. Holdan eller den, som det nu haver, og Stefan Simonsøn.

Disse ere de, som jeg ved at betalet haver, så sandt hjælpe mig Gud, og den samme jordebog fik (finge borgmester S. S. [Søren Sørensen] til Bergen forgangen høst, men hvorledes det er ført til regnskab, eller hvorledes det udi andre måder kan være forset, at borgmester[en] i Bergen haver ej tænkt derpå, efterdi han jordebogen bekom derpå, hvis annammet var forgangen 1618, det ved jeg ikke og besværer mig intet med og haver mig ganske og aldeles her udi undskyldet og vil intet videre have hermed at gøre i nogen måder.»

[1]) Lb. fol. 90 a og b. [2]) Lb. fol. 69 a. [3]) Lb. fol. 67 b.



Skrivið vísir, at Christen Jenssøn roynir at benda skuldina yvir á Søren Sørensøn fyri, at mistøk vóru gjørd við landsleiguni á Benckestockagóðsinum, tí at jarðarbokin var send honum. Framhaldið av Christen Jenssøns skrivi vísir tó, at líknandi mistøk eisini vóru gjørd við handilin:

«Sammeledes og efterdi her er nogle, som nægter og forsværger den skyld, som er udborget på ærlige mænds vegne, som landet her til dags i forpagtning haft haver, endog ingen god eller ærlig mand det gør, som haver nogen consiends udi sig, men dog ikke stort ved, hvem der ere, som nægter, og hvem som bekender, så sætter jeg udi rette og adspørger først kongl. majestæts lagmand og menige lagrettesmænd og udi eders gode betænkende, enten en part løse munde foruden god prov og besked skal stå bedre til troende end en rigtig købmandsbog. Dog hvad med misregning kan være sket, skal og kan blive rettet efterhånden, som folkene (de) kommendes vorder, thi misregning er ingen betaling. Dette indstiller jeg udi lagmandens med menige hossiddende lagrettesmænds betænkende formodendes herpå et skriftligt og rigtigt gensvar.

Eftir hetta biður Christen Jenssøn tingið um skotsmál fyrst fyri bróður sín, Jacob Jacobsøn, og síðan fyri seg sjálvan. Fyri bróðurin spyr hann, «om han dennem udi nogen måder, eller i hvad måder det kan være, uforrettet haver, være sig enten med annammelse eller levering, alen, vægt eller mål,» og nakað líknandi spyr hann fyri seg sjálvan. Í báðum førum ynskir hann, at tingið svarar skrivliga.

Um Christen Jenssøn sigur tingið, at hann frítt kundi fáa sítt ærliga skotsmál aftur, um neyðugt gjørdist, men um Jacob Jacobsøn, sum áður hevði fingið løgtingsins besta viðmæli, sigur tingbókin nú fylgjandi:

«Belangende forn. Christen Jenssøns broder, Jacob Jacobsøn, som en lang tid tilforn haver været købmand her i landet, kunne vi på denne tid ikke videre besked pågive, end som vi hannem tilforn medgiven haver, hvilket vi for vores egen person hannem bestandige ere, endda en part af almuen tykkes at være sket forkort med skrivelse og misgerning, hvilket vel kan og bør at blive rettet, dersom han kommer selv til vedermåls.»

Vit hoyra einki um, at Jacob Jacobsøn seinri vardi fyri sær á tingi, og táið Christen Jenssøn talar um misrokning frá keypmanninum og samstundis spyr, um røtt keypmannsbók ikki er meira at fara eftir enn leys mannatala, eru misrokningarnar eftir keypmannsbókini júst ikki prógv fyri, at keypmannsbókin hjá Jacob Jacobsøn var so álítandi.

Hin 16. aug. 1619 kom fram á løgtingi, at longu í 1618 hevði Nicolaus de Frunt skilt seg út úr handilsfelagsskapinum og sent Niels Danielsøn til Føroya at ansa eftir sínum parti av handlinum. Nicolaus de Frunt man hava havt saman við sær Herman Wøyst. Um

Niels Danielsøn stendur: «fremlagde sin regnskabsbog i rette, som havde ligget her i landet i vinter, og havde afhændet til Christen Jenssøn samme bog forgangen høst, den tid forn. Niels sejlede her fra landet. Angående Nicolaus de Frunt og Hermann Wøysts gods, som her i landet blev forhandlet og en del udborget forgangen år 1618, og satte i rette for lagmanden og lagretten, om forn. hans regnskabsbog skulle stå ved magt eller ikke. Hertil blev samme tid svaret af lagmanden og lagretten, at de på denne tid ikke kunne dømme samme hans regnskabsbog urigtig, men burde at stå ved magt indtil den dag, som var den 16. aug.; men dersom nogen ville skyde på og sige, at de haver betalet til Jacob Jacobsøn samme gæld, da bør dennem det at bevise eller og søge deres hos Jacob Jacobsøn igen.»[1])

Av hesum síggja vit týðuliga, at løgtingið hevur als ikki havt álit á, at Jacob Jacobsøn hevði havt rætta bókførslu við handilin. Tingið ger tó einki fyri at verja teir menn, sum vóru komnir undir skeiva bókførslu og misrokning; tað letur tingið menninar sjálvar um at greiða. Átalað var heldur eingin reist móti Jacob Jacobsøn, sum jú eisini hevði verið tænari fútans. Nógvir føroyingar kundu vísa fram kvittunarlepar, táið teir vóru kravdir aðru ferð, men aðrir søgdu, at teir høvdu mist sínar kvittanir burtur, og hetta er ivaleyst langtfrá ótrúligt. Fløkja tykist at hava verið í øllum roknskapi, sum Jacob Jacobsøn hevði við at gera.

Vit hava eitt annað dømi frá somu tingsetu. Rasmus Magnusson í Haraldssundi, sum var leigulendingur á 9 mørkum av junkaragóðsinum hjá Rosenkrands, var hetta árið stevndur fyri eftirstandandi gjald. Maðurin, sum stevndi, var Hans Jenssøn fulltrúi fyri Nicolaus de Frunt viðvíkjandi hesum góðsi. Hann helt fram, at Rasmus hevði gjørt seg so sekan, at hann mátti missa festið.

«Svarede forn. Rasmus Magnussøn, at han havde budt Jacob Jacobsøn afgaven for samme jord anno 1617, som den tid havde samme fuldmagt på junkerens gods, og han ville på den tid ikke annamme forn. afgave. Men anno 1618, da havde forn. Rasmus Magnussøn givet Strange Madssøn sådant til kende; da havde forn. Strange Madssøn ladet kalde forn. Jacob Jacobsøn for sig, adspurgt hannem, hvorfor han ikke ville annamme afgaven fra Rasmus, efterdi forn. Strange Madssøn tilforn havde fæst hannem jorden, den tid han havde samme fuldmagt på forn. junkers gods, og da havde Jacob svaret, at han ingen synderlig årsage dertil havde, uden at forn. Rasmus boede ikke selv der. Da havde forn. Jacobsøn pány fæst til forn. Rasmus samme jord udi forn. Strange Madssøns og Rasmus Pe[de]rsøns nærværelse, og forn. Rasmus Magnussøn bekendte, at han havde betalet til forn. Jacob Jacobsøn afgaven samme tid, endda at de ikke findes indtegnet i jordebogen. Og forn. Rasmus Magnussøn erbød sig endnu her inde på tinget, at han gerne ville betale afgaven til forn. Hans Jenssøn.»[2])

Hans Jenssøn tordi kortini ikki at taka móti ágávuni, og seks løgrættumenn vóru tá útnevndir at sita til dóms ella at fáa semju í lag í stríðnum. Hesir vildu ongan dóm fella, fyrrenn Jacob Jacobsøn var

[1]) Lb. fol. 70 b og 71 a. [2]) Lb. fol. 71 b.



hoyrdur í málinum, og um hann ikki møtti á løgtingi komandi ár, vildi dómur verða feldur, men málið kemur aldri fyri aftur í løgtingsbókini.

Enn er dømi um fløkjuna í Jacob Jacobsøns bókhaldi og hansara dupultu krevjing av gjøldum og skuld. Alt bendir á, at fólk í hesi tíðini onga kontrabók hava havt við handilin fyri tað, tey keyptu og seldu. Kvittan fyri goldna skuld hevur verið givin teimum í leysum lepum. Løgtingsbókin gevur eisini dømi um, at táið fólk áttu til góðar annaðhvørt hjá leigubúðini ella hjá handlinum, kundu tey fáa kvittunarseðil fyri tað. Við slíkum seðli kundu tey síðan fara til handilin at keypa. Løgtingsbókin gevur dømi um, at fólk eru komin til handils við følskum seðli, ella at maður hevur viljað havt tænaran í leigubúðini at skriva sær seðil, sum ikki var rættur.

Undir slíkum viðurskiftum hevur ein maður sum Jacob Jacobsøn havt lætt spæl. Tingmenn hava soleiðis kunnað hildið sína hóttandi hond yvir handilin og gamla fúta, Strange Madssøn, men teir hava aftur ímóti kunnað havt fríar hendur í sínum loynihandilsskapi, sum tykist at vera vorðin heilt vanligur í Føroyum upp móti árinum 1620.

### f. Hitt íslendska handilsfelagið.

Týðandi skifti fór fram í føroyskari umsiting og við handilin í Tinganesi árið 1620. Við kongsbrævi 20. apríl 1620 varð Mads Christensøn gullandsfari, borgari í Visby, settur sum fúti í Føroyum.[1]) Sum áður nevnt hevði longu tá hitt íslendska handilsfelagið, sum var eitt felag av býunum við Oyrasund við Keypmannahavn sum miðdepil, við brævi, dagssett 16. des. 1619, fingið einarætt til handilin í Føroyum.

Vit finna uppførd her tey korini, hitt íslendska handilsfelagið skuldi virka undir í Føroyum, og treytirnar hjá tí nýsetta fútanum finna vit samstundis bókførdar. Vit síggja eisini, at hetta nýggja handilsfelagið veruliga fekk Føroyar í len:

«Belangende vor og kronens visse indkomst på Færø af jordebogen, den haver vi nådigst forn. kompagni undt og bevilget, og skulle de årligen derfor give os og kronen til afgift efter landsens skik for hver gyldens værd, som beløber sig til tredive og syv lybske skilling, en vog fisk og samme fisk at levere på vort slot København, det først muligt er om året på deres egen omkostning, undtagen så meget må kvettes deraf, som skal gives til skolen. Hvis den uvisse rente kan beløbe sig [til] om året der af landet, det må de beholde, hver gyldens værd for en vog fisk, og samme uvisse indkomst at lade levere på forn. vort slot København på deres egen omkostning.

Desligeste og i lige måde skulle de og forsørge landet med god, uforfalsket købmandsvare, besynderlig mel og malt, så at almuen der på landet må bekomme til nødtørft, og dersom de herudi findes forsømmelige, da skulle de derfor stande os til rette og dermed have

[1]) Lb. fol. 85 a—86 b.

forbrudt dette vort brev og benådning. De skulle ikke heller på forn. Færø ubilligen opsætte eller forhøje deres vare i køb og salg imod almuen, anderledes end som gammelt haver været, og eftersom vore købmænd nu haver gjort og brugt der på landet efter landsens gamle vis og brug, som dennem haver været befalet, den stund de haver været købmænd der sammesteds. De skulle og i lige måde udi alt køb og salg, indtægt og udgift, ikke bruge nogen anden alen eller vægt end ret færøsk alen og vægt, som de skulle lade lagmanden bese, og han med lagrettesmændene kan kende ret at være.

Dersom der og kunne være nogen på forn. vort land Island, Færø, Vestmanø og Nordland, som vilde drage derfra og hid til os og beklage deres sager, da skulle forn. købmænd være pligtige for en billig fragt at lade dennem komme ind på vores skibe ud af landet.

De skulle i alle måder holde dennem venligen og sagtmodigen med god omgængelse både imod de verdslige og gejslige, så at ingen udaf landsens indbyggere kunne med rette have dennem over forn. vore borgere og købmænd at beklage. Og skal forn. kompagni samtlige alle forn. afgifter og told [í føstum árligum gjaldi] til os og kronen i rette bestemte tider erlægge og betale udi vort rentekammer.

De skulle og holde [undirstrikað] vor landfoged der sammesteds udi agt og ære på vore vegne i hvis forefaldende sager, som der på landet kunde sig tildrage og i bud og forbud der sammesteds være hannem hørig og lydig i de sager, som os er anrørend [NB sett á breddanum]. De skulle og være forpligtet at føre vor foged fra København og ind i Færø om året og igen fra Færø og til København på deres skibe, dog på vor underholdning til mad og øl, og skulle deres benådningsår nu straks efter dette brevs dato angå.»[1])

Vit fáa at vita herav, at ein vág av turrum fiski tá kostaði ein føroyskan gyllin. Hetta kann eisini síggjast aðrar staðir. Sagt verður eisini, at gyllinin tá var 37 lübskar skilingar verdur ella 74 danskar, tí 1 lübskur skilingur var 2 danskir. Hetta er júst tað tíðarskeiðið, hvar danskt dálavirði var farið upp um føroyskt gyllinsvirði. Ríkisdálin var tá 96 danskar skilingar.

Nevnda bræv dagssett 16. des. 1619, gav hesum sokallaða íslendska handilsfelagið ikki bert handilsrættindi í Føroyum, men fyrst og fremst á Íslandi, og eisini á Norðlandinum í Noreg. Handil á Norðlandinum mátti hetta felagið tó bert fremja, «så vidt det ikke er imod vor købstad Bergen og konsorters sammesteds privilegier og frihed.» Vit síggja soleiðis, hvussu handilsbýurin Bjørgvin, sum gjøgnum øldir hevði verið miðstøð fyri nærsagt allan handil við Noregs útlond, við nevnda kongl. brævi fær síni handilsrættindi munandi skerd til frama fyri býirnar við Oyrasund og tá serliga Keypmannahavn. Henda flytanin, sum hendi í føroyskum handilssambandi, hevur eisini ført við sær, at føroysk umsiting yvirhøvur øll fór at ganga yvir Keypmannahavn. Viðvíkjandi Hálandi sum marknaður fyri føroyskar vørur tykist hetta handilsskifti annars einki at hava gjørt. Tað tollfrælsið, sum føroyskur handil við hesi broytan tykist at hava fingið gjøgnum Oyrasund, er óivað ein fylgja av teim rætt-

[1]) Lb. fol. 88 a og b.



indum, føroyskar vørur áður høvdu havt í Bjørgvin, og sum Søren Sørensøn fyri bert 6 ár síðan hevði roynt at taka av. Hin føroyska kirkjan, sum áður hevði ligið undir Bjørgvins stifti, varð beint eftir 1620 løgd inn undir Sælands stift,[1]) men á verðsligum økjum hendi annars eingin lógbroytan í bræði.

Álagt var hinum nýggja fútanum, Mads Christensøn:

«på vore vegne efter landsens vægt lade oppebærge landskyld, leding, gårdfæsting, sagefald og al anden vor og kronens rente og rettighed både vist og uvist, hvad det helst er eller være kan, intet undertaget i nogen måde, som os med rette kan tilkomme og derudaf igen på vore vegne fra sig levere

*først* til fattige skolebørn der på landet, så meget som de plejer at bekomme og derpå tage skolemesters bevis, og skal han forfare, hvor mange børn der holdes udi skolen, som disse pendinge udgives til, om det udgives til nødtørft til skolebørns behov eller ikke,

*udi lige måde* skal forn. indtægt give til hospitalet, hvis dennem af vor kære hr. fader, salig og højlovlig ihukommelse, deraf årligen bevilget og forskrevet er efter Hans majestæts brevs lydelse. I lige måde skal han forfare, om samme hjælp til de fattige vorder så kristeligen uddelt, om det sig bør såvel som og hvis til anden nødtørft på vore vegne at udgive til fornøden gøres og bør.

Og hvis det øvrige af vor og kronens rente og indkomst der på Færø anlanger, det skal han straks på vore vegne lade levere til vore købmænd, som forn. landsvare nu af Os bekommer, eller til den, vi det herefter nådigst forunde ville, med købmandsvægten eftersom gammel brug haver været, og hvis overvægten kan beløbe sig med landsens vægt højere end købmandsvægten, skal forn. Mads Christensøn gøre særdeles klar rede og regnskab for, og på alt, hvis han i så måde leverer fra sig og til forn. vore købmænd eller deres fuldmægtige, derpå skal han tage deres klare og nøjagtige bevis, at de kendes dennem samme vare at have af hannem annammet og oppebåret Os til godt og klart regnskab.

Han skal og have god og flittig opsyn med forn. købmænd der på forn. Færø, at de bespiser landet med allehånde nødtørftig tilføring, med gode uforfalskede købmandsvarer, som almuen der på landet kan være tjenlige, og at de handler oprigtigt med vore undersåtter der sammesteds og bruge ret færøsk alen, mål og vægt og dennem ikke udi nogen måde forfordele, så og have indseende, at forn. købmænd, deres fuldmægtige, holde og skikke dennem venligen og sagtmodigen imod almuen der på landet udi alle måder, så at der ikke kommer klagemål over dennem, og dersom forn. købmænd noget herimod gør, da skal forn. Mads Christensøn være pligtig at give os det til kende, og skal forn. Mads Christensøn for sin person skikke sig vel og tilbørligen imod almuen der på landet, som han for os vil ansvare, og udi alle måder vide og ramme vort gavn og bedste på landet, eftersom hannem er befalet.

Og for sådan hans tjeneste og umage haver Vi nådigst bevilget

[1]) L. D., útgáva «Fram»s 1903, bls. 279.

at ville lade give hannem om året *firsindstyve daler* [á roknskapin enn, sum áður nevnt, innført sum føroyskir gyllin], og dennem at lade årligen indføre udi hans regnskab, og skal derfor intet tilskrive Os for hans fortæring i nogen måde, imedens og al den stund Vi bruge hannem i samme bestilling, og skal hans år begynde og pågå fra påskedag sidst forleden og endes til påsken anno et tusend seks hundrede en og tyve, og således år fra år forfølges, imedens og al den stund han er udi samme bestilling og tjeneste. Thi forbyde Vi alle og enhver forn. Mads Christensøn herimod, eftersom forskrevet står, at hindre eller udi nogen måde forfang at gøre. Under vor hyldest og nåde. Givet på vort slot København den 20. april anno 1620.

Under vort signet

*Christian.*«[1])

Kongsins inntøka var í hesi tíðini øll latin í landsins vørum. Øll kongsins gjøld í Føroyum skuldu ganga av hesum vørum, og tað, sum tá var eftir í leigubúðini, skuldi handilin keypa eftir keypmannsvektini og landsins taksti. Fútaroknskapirnir vísa hetta.

Álagt var fútanum at taka inntøkurnar frá fólki eftir landsins vekt, men at avhenda handlinum vørurnar eftir keypmannsvektini, og skuldi hann geva kongi greiðan roknskap fyri hesa vøruumsetan eins og fyri tey beinleiðis útleggini, hann hevði í Føroyum. Kølnarmørkin, sum lá um 235 g, var grundeindin í keypmannsvektini. Hin føroyska mørkin tykist at hava ligið um 214,32 g. Táið 72 merkur vóru í vágini, sæst harav, at 80 føroyskar merkur geva eina stíva Kølnarvág: 225,6 g yvir. Haraftrat kom yvirvektin, sum kongur tók frá fólki, og var hon eitt skinn ella 4 merkur fyri hvørja vág. Sum áður ávíst er upprunin til tíggjundavágina, sum var 80 merkur, ivaleyst at finna í hesum viðurskiftum í samband við peningaeindirnar gyllin og skinn.

Sum frammanfyri sæst, var ein føroyskur peningagyllin nú mettur 37 lübskar skilingar, ið høvdu sama virði sum 74 danskir skilingar. Um hetta mundið var danskur dáli vaksandi í virði, og hin áður sonevndi gamli dálin var mestsum burturfallin. Fram kom ríkisdálin, sum var 96 danskar skilingar verdur, men dálar við minni virði funnust um hetta mundið eisini. Tessvegna hevur hin føroyski peningagyllinin framvegis gingið fyri ein dála.

Undir 1620 er innført bræv frá rentukamarinum, dagssett 17. ápríl 1620.[2]) Brævið er til fútans ella, um hann var frástaddur, løgmanns, og biðið verður um at lata tað lesa á tingi. Sagt verður, at tað var lisið á vártingi í Vágum 1. mai 1620, og bæði Hermann von Køllen og Christian Jenssøn viðganga, at teir hava hoyrt tað lisið sama dag. Brævið stendur í løgtingsbókini undirskrivað av Siuerd [Sivert] Beck og Christoffer Urne. Sivert Beck var rentumeistari frá 16. okt. 1596, til hann doyði 1623. Christoffer Urne var rentumeistari. Hann hevði hetta starv 1617—1627 og hevði annars nógv kongl. umboð. Frá 1629 til 1642 var hann lensmaður á Bjørgvins húsi, og hann sat sum ríkiskanslari 1646—1660.

---

1) Lb. fol. 85 a — 86 b. 2) Lb. fol. 90 a — 91 a.



Í hesum brævi verður fútin biðin um at syrgja fyri, at Søren Sørensen og hansara handilssveinar halda seg frá øllum handilsskapi í Føroyum, so skjótt skip er komið við vørum frá íslendska handilsfelagnum, og at teir tá beinan vegin flyta vørur sínar, sum liggja í kongsins pakkhúsi, av landi ella selja hinum nýggja handilsfelagnum tær.

Enn 14. aug. 1620 lógu vørurnar hjá Søren Sørensøn í pakkhúsi kongs, tí tá spyr fútin Hans Jenssøn, keypmannin hjá íslendska handilsfelagnum, hví hetta er so, og um hann hevði skrivað eftir tí skipinum frá Bjørgvin, sum nú lá á vágni. Søren Sørensøn hevði sent hetta skipið, og Hans Jenssøn segði seg vilja keypa bátsvið frá tí, um hann kundi fáa hann bíligan.[1])

Fútin finnst harðliga at keypmanninum, tí hann ikki, sum brævið frá rentukamarinum ljóðaði, var sloppin av við Søren Sørensens vørur ella sjálvur hevði keypt tær. Keypmaðurin helt fyri, at fyrrv. keypmaður Christen Jenssøn hevði ikki viljað selt honum tær bíliga. Vørurnar vórðu tí liggjandi, og húsarúmdin í pakkhúsinum var nóg stór.

Fútin spyr tá aftur Hans Jenssøn keypmann, um hann hevði hoyrt nakað um tað, at tænararnir hjá Søren Sørensøn skuldu hava selt í loynd annaðhvørt móti føroyskum vørum ella reiðum peningi. Hetta sigur keypmaðurin seg einki vita um.

Ætlandi er hetta skipið, sum tá lá á Havnar vág, farið av stað við vørum, sum Søren Sørensøn átti eftir í Tinganesi. Møguliga hevur keypmaðurin tó keypt nakað av teimum. Um hetta sigur tingbókin tó einki. Ivaleyst man okkurt hava ligið aftan fyri spurningin frá fútanum um loynikeypskap, hóast keypmaðurin segði seg einki vita um slíkt. Hans Jenssøns tíð sum keypmaður í Tinganesi vardi stokkut, tí í 1621 er Laurits Hanssøn komin í hansara stað.

Ymist bendir á, at vøran, sum kom til Føroya í 1620, fyri ein stóran part má hava verið frá Søren Sørensøn úr Bjørgvin, tí summarið eftir verður klagað um handilin sum áður. Hin 23. juli 1621 klaga fólk á tingi um, at mjølið síðsta vetur var ringt, og stórur partur av tí var ikki etandi. Keypmaðurin, Laurits Hanssøn, bað tá fólk lata seg fáa tær tómu tunnurnar aftur, so hann kundi síggja merkið á teimum; hetta skuldi tá ikki henda aftur.

Sýnið var tikið í krambúðini 23. juli 1621 av 12 løgtingsmonnum, og um hetta sigur tingbókin:

«Først rødt klæde, som skulde sælges en alen for 1 gylden 5 skind.
Blåt klæde, som kaldes Pyck, seks stykker, 1 alen for 1 gylden.
Rødt engelsk, et halvt stykke, 1 alen for 4 gylden.
Sort klæde, et halvt stykke.
Blåt engelsk, et stykke, 1 alen for 2½ gylden.
Enbredt lærred, ti bolte, 6 alen for 1 gylden.
Nok enbredt lærred, 5 alen for 1 gylden.
Hollandsk lærred, en bolt.
Fiskesnører, 60 favne for 15 skind.

---

1) Lb. fol. 94 a — 95 b.

Filthatte skulle sælges hver efter sit værd.
Fransk brændevin, 1 kande for 6 skind.
Brændevin, kanden for — [í 1620 kostaði kannan 1 gyllin].
Mel er beset og vejet, holder sin vægt; øllet var ustraffeligt.»[1])

Eisini 1620 varð sýn tikið í handlinum, men einki serligt sæst av tí; t. d. kostaðu tá einir karðar 1/2 gyllin og 1 kvinnuhúgva 15 skinn.

Reiðararnir í Bjørgvin høvdu týðuliga ikki ætlað at sleppa Føroya handli, tí Claus Liude, sum Søren Sørensøn hevði fingið í felag við sær, hevði bygt hús á kongligari grund á Tinganesi, og hetta var í 1621 av 12 løgtingsmonnum mett 100 føroyskar gyllin.[2])

Hin nýggi keypmaðurin í Tinganesi, Laurits Hanssøn, varð í 1621 biðin um at dríva inn skuld fyri hitt gamla handilsfelagið, og kennir løgtingið teir skuldstandandi pliktigar at gjalda skuld sína, um teir ikki verja seg eftir lógini.[3]) Løgtingið hevði enn lyndi til at verja teir gomlu handilsharrarnar, so at teir kundu fáa eftirstøður sínar frá fólki eftir tí, sum bókførslan vísti, hóast sum áður ávíst bókførslan í mongum føri hevði verið skeiv. Sum álitsmaður fyri handilin og junkaragóðsið í Føroyum hevði Jacob Jacobsøn, fyrrv. keypmaður í Tinganesi, tikið móti peningi frá fólki, uttan at skriva hann sum goldnan í bøkur sínar. Skilið var tá út av lagi, og løgtingsins støða í hesum spurningi vísir bert, hvussu neyðarsligt tingið tá var sum fólksins vernd. Løgmaður og løgrættumenn høvdu júst um hesa tíð drivið loynihandil í stórum og biðið kong um fyrigeving.[4])

Gamla handilsfelagið hevði ikki svarað kongi skyldur sínar, og ábøtur á kongsins hús í Tinganesi vóru ikki gjørdar. Hin 26. juli 1622[5]) síggja vit tí, at fútin krevur fyrsta rætt til útistandandi handilsskuld, sum felagið enn átti. Løgtingið avger tá:

«at efterdi de alle til fælles [Søren Sørensøn, Nicolas de Frunt og Strange Madssøn] endnu haver deres restance udestående udi landet, da bør også forn. husbonde [kongur] af fælles kompagnis restance betales.»

Fútin álegði tá sýslumonnunum at inndríva skuldina hvør í síni sýslu. Aftaná hetta tegir tingbókin um hesi viðurskifti í nøkur ár, men ætlast má, at nakað av peningi er komið inn, tí árini 1620—24 tykjast at hava verið góð fiskiár, helst árið 1622.

So í 1627, hin 4. aug., síggja vit, at kongsbræv varð upplisið á tingi, sum álegði fútanum at dríva handilsskuldina inn fyri teir gomlu reiðararnar, og tað man vera tí, at kongur enn ikki hevði fingið sítt. Fútin helt fram:

«menige almue, som kunne være de gamle redere noget skyldig, at de nu straks dermed skulle fremkomme og ingen forsømmelse derfor tage.»[6])

Um hetta mundið sæst fiskaloysið at vera komið í Føroyum, og fólkið gremur seg illa um ringar tíðir:

«Her haver været stor hunger og elendighed i landet, og mange

[1]) Lb. fol. 105 a og b. [2]) Lb. fol. 108 a. [3]) Lb. fol. 107 a og b. [4]) Sjá bls. 145—146. [5]) Lb. fol. 117 a og eftir Lb. fol. 117 b sæst gamla handilsfelagið at hava skyldað Argja hospitali teir árligu 100 gyllin. [6]) Lb. fol. 161 b.



mennesker er bortdøde forgangen vinter af hungersnød; men Vorherre giver dennem noget, da vil de gerne betale efterhånden, som Vorherre giver dennem til. Sammeledes kom der nogen frem og klagede sig, at de haver tvende gange betalt samme skyld [óivað tí teir høvdu mist burtur kvittan sína ella aldri fingið nakra kvittan] og stå endnu åben i bogen og ikke var udskrevet. Blev dennem tilsagt af lagmanden, at de, som nægtede deres skyld, skulle gøre sig fri efter loven eller og at betale [hetta var tann vernd, menn fingu av tinginum móti Jacob Jacobsøns følsku bókføring].

Tilmed er der mange, som er bortdøde af dennem, som skyldige vare, og findes slet intet efter dennem. Alle dennem, som kunne have råd eller formue til at betale forskrevne gæld og skyld, befalede Hans majestæts foged alle Hans majestæts sysselmænd hver i sin ø, at de med al flid på Hans majestæts vegne samme gæld skulle indfordre og levere den til vinterkøbmanden og tage hans rigtige bevis derpå.»[1])

Við løgtingsins samtykki skuldi nú henda bókførda gamla og ógvuliga ivasama handilsskuld verða kroyst út úr føroyingum. At vilja gera tað mestsum til skrøgg táið løgtingsbókin sigur, at mong fólk vóru deyð í hungri farna vetur, fer ikki at bera til. Í hesi tíðini høvdu Føroyar eina fátækra manna stætt, sum einki átti, og sum leið hungur og hall í ringum tíðum. Vit finna hesi neyðar menniskju ofta dømd í bøtur við teirri viðmerking, at har var einki at fáa. Sjálvt árið 1627 hevur óivað sum áður ávíst, og løgtingsbókin vísir, verið ringt ár,[2]) og øll tey fylgjandi árini nakað fram um 1630 hava verið neyðarár í Føroyum við fiskaloysi og felli bæði á seyði og neyti. (Sjá tíggjundakurvuna, mynd 1, bls. 84 og 85.

Kongur sendi harranum á Bjørgvins húsi, Jens Juel til Lindeberg, bræv, dagssett 2. okt. 1630, og bað hann fáa til vega handilsskuldina, sum Søren Sørensøn enn hevði standandi eftir í Føroyum. Søren Sørensøn var tá deyður, og einkjan eftir hann, Sara Michelsdatter, og hennar samarvingar skuldu avstanda skuldina til kongs saman við teirri jørð í Føroyum, sum Søren Sørensøn hevði keypt frá Benckestockunum. Tað árliga leigugjaldið av hesi jørð er sagt at vera: *18 ríkisdálar 21 skil. 1 alb.*[3]) Gjaldið, sum hvíldi á jørðini, mundi vera tað sama, sum kongsjørðin hevði.

Á ólavsøku 1631 legði fútin alt málið fyri á løgtingi:

«Angående afgangen Søren Sørensøn, Strange Madssøn og Nicolaus de Frunt, som dennem restede her på Færø, hvorpå han [fútin] sagde sig at have annammet et hundrede færøske gylden, hvorfor han igen havde gjort rede og regnskab på Hans majestæts rentekammer, eftersom hannem den tid var befalet, og tilholdt kongl. majestæts foged den endnu som tilforn samtligen alle, som udi så måde kunne være de gamle redere noget skyldige, at de dermed nu med det allerførste skulle fremkomme og enhver at betale, som de skyldige er, hvor

[1]) Lb. fol. 162 a. [2]) Sjá bls. 21 [3]) 1 skilingur = 4 album. Sjá Asgaut Steinnes: Leidang og landskyld í Skrifter utgitt av Det norske Videnskaps-Akademi, Oslo 1927. Tí eru 18 ríkisdálar 21 skilingar 1 alb. = 21 gl. 17 1/4 sk. Meðalleigan av føroyskari jarðarmørk bæði innan- og uttangarðs, roknað út frá innangarðsmørkini, liggur kanska yvir 2 gl., men er ikki 3 gl. Vit fara tí ikki nógv skeivir, tá vit meta, at jørðin, Søren Sørensøn hevði keypt frá Benckestockunum lá um 9 merkur.

[hvorpå] blev svaret af alle Hans majestæts sysselmænd hver udi sin ø, at de efter fogedens skrivelse på Hans majestæts vegne noksom haver gjort deres yderste flid samme restance at indfordre, men den største part svarede og sagde sig intet at være dennem skyldige og mange, som havde deres købmands rigtige sedler, at de havde betalt og endnu stod åben i bogen. Tilmed er der mange af dennem bortdøde, og findes slet intet efter dennem; men nogle få, som vedgår gælden, beklager sig, at de udi denne meget besværlige, dyre og knappe tid ikke kunne betale Hans majestæts leje og landskyld, meget mindre, at de kunne betale noget til andre; men når Vorherre vil give dennem sin velsignelse af søen, ville de gerne betale, hvis de skyldige ere, efter deres yderste formue.

Desligeste formeldte højbemeldte kongl. majestæts befaling, at Hans majestæts foged skulle til sig annamme hvis landgods, afgangen Søren Sørensen haver til sig forhandlet af de Benckestocker her udi landet, hvortil de Benckestockers bønder og tjenere svarede, at de ikke nogen tid haver vidst, at afgangen Søren Sørensøn eller hans arvinger haver haft nogen anpart i de Benckestockers gods her udi Færø, men når Hans majestæts foged skaffer sig rigtig adkomst til samme gods, på hvad sted og i hvad ø det ligger, ville de gerne betale deres leje og landskyld til Hans majestæt heller end til nogen anden. Men nu på nogle års tid haver de betalt deres leje og landskyld til det færøske kompagnis fuldmægtige tjenere og købmænd her i landet.»[1])

Hetta vitna við sínum innsiglum:

«Joen Justinussøn lagmand udi Færø, Hendrik Thomassøn, Augustinus Lydersøn, Joen Thomassøn, Joen Joensøn, Thrond Jørgensøn og Hans Nielssøn, svorne lagrettesmænd.»

Av hesum sæst enn týðuligari, at meginparturin av eftirstøðuni í bókunum hjá Jacob Jacobsøn veruliga hevur verið goldin áður; men kortini er einki til skjals um, at Jacob Jacobsøn er komin undir ábyrgd og dóm fyri sína rongu bókføring. At fiskaloysi hevur verið í 1627, sæst eisini, og vit vita, at hetta í hvørt fall hevur hildið áfram í 3–4 ár. Ringast var í 1630. Sjá mynd 1, bls. 84 og 85.

Enn so seint sum 1635 vísir Vága prestur, Rasmus Sørensøn, tvær kvittanir fyri goldna handilsskuld, sum Jacob Jacobsøn, tá deyður, áður hevði givið honum. Hendrik Fønbo Skrædder í Bjørgvin hevði tá fyri Claus Liude sála stevnt prestinum á ting fyri at prógva rætt sín. Á øðrum seðlinum var kvittan fyri 33 ríkisdálar og eina spesiu, og á hinum var kvittað fyri 7 1/2 slættadála. Hetta hevði presturin lovað at gjalda við «33 gode færøske gylden», og hann hevði eisini goldið tað.[2]) Um skuldin tá hevur verið goldin við fullum virði, skuldi hin føroyski gyllinin um somu tíð verið væl meira verdur enn ríkisdálin; avsláttur man tó vera givin.

Undir sama máli heldur tingbókin fram:

«Samme tid fremlagde forn. Hendrik Skrædder en restanceregister på nogen skyld og gæld, en part af almuen her udi landet skulle

[1]) Lb. fol. 187 a og b. [2]) Eftir hesum skuldi føroyskur peningagyllin tá verið væl meira verdur enn ríkisdálin. Hesin gyllin var tá roknaður í føroyskum vørum: skinnum, tálg, ull, fiski, fjøður o. s. fr.



være skyldig bleven til de Bergen-ledere, salig Claus Liude og hans medconsorter, hvilken gæld og skyld skulde være udborget her i landet mere end for tyve år siden, og en part fremkom med salig Jacob Jacobsøns rigtige seddel, at samme gæld var betalt, og ingen haver været, som haver fordret samme gæld førend nu. Synes os samme restance meget urigtig at være.

Hvad den håndskrift er anlangende, som forn. Hendrik Fønbo for os fremlagde, som er afgiften til salig Strange Madssøn, som rester på 59 gl. 8 sk., er kendt af lagmanden og menige lagrettesmænd, at landet skal betale resten næstkommende år, hvorpå Hendrik Skrædder var et tingsvidne begærende.[1])

Endaliga sigur nú tingið, at eftirstøðan uppgivin frá Bjørgvins keypmonnum má haldast at vera skeiv, og fyri at fáa eftirstøðuna 59 gl. 8 sk., sum Strange Madssøns handil enn skuldi eiga til góðar, út av verðini viðtók tingið sjálvt at gjalda henda pening. Hervið tykist eftirstøðan hjá hinum gamla handilsfelagnum at hvørva úr tingbókini, men søgan um hana er syndarlig og ikki minst fyri løgtingið sum fólksins vernd. Sum seinri skal verða ávíst tykist Jacob Jacobsøn hóast hansara rongu bókførslu at hava sitið sum landsskrivari í Føroyum árini 1622–23.

Klagað var sum nevnt um handilin 23. juli 1621. Fútin hevði hetta árið sum vant spurt fólkið, um tey høvdu nakað at finnast at handlinum.

«Hertil blev svaret af menige almue, som til stede var, at det mel, her var forgangen vinter, duede en ringe ting, og en stor del deraf var ikke ædendes. Øllet duede og aldeles intet, som her lå udi forgangen vinter.»[2])

Laurits Hanssøn, sum tá var vorðin keypmaður í staðin fyri Hans Jenssøn, segði seg sum nevnt fúsan at vilja kanna, hvussu hetta var komið fyri.

Hin 21. august sama ár senda prósturin, Thorlof Gregersøn í Eysturoy og Zacharias Thormodsøn løgmaður, Christen Petersøn prestur í Suðurstreymoy og Hans Petersøn sýslumaður, borgmeistaranum í Keypmannahavn, Michel Vibe, líknandi klagu sum tingið hevði frammi:

«Gunstige gode venner. Giver vi eder venligen at vide både på vore egne såvel som på menige almuens vegne her i landet, at det mel her var i forgangen vinter, duede en part lidet eller slet intet såvel som hvis øl lå i forgangen vinter duede og aldeles intet, eftersom vi og have givet beskrevet på lagtinget. Ere derfor begærendes af eder, at vi fattige folk måtte bekomme for vore pendinge hid til landet den del, som god og forsvarlig kunde være.

For det andet er her og kommen en hel hob orkenøsk malt fra Bergen, og er liden dygd udi, hvilket vi sætter til Gud og eders egen gode betænkende at vi fattige folk skal betale eder, hvis vi i så måde af eder bekommende vorder, med vore gode varer. Synes os jo billigt at være, at vi burde at bekomme igen den del, vi kunne have gavn og godt af.

[1]) Lb. fol. 222 a og b. [2]) Lb. fol. 104 a.

For det sidste beklages, at her nu om sankt olai tid burde i det allerringeste at være tilstede alt, hvis som vi efter gammel vis kunne have fornøden, thi da er vor rette markedstid, og mange langvejsfolk hverken haver i formue at komme igen dette år og en part ej kunne for storm og vindes hårdhed, som efter denne dag og tid nemlig falder her udi landet, men nu var her stor brok på malt, bygkorn, klæde, lærred, salt, jern, stål, kobber, jerngryder, deller [borðviður], bådsved, og er ikke det ringeste, vi haver os at beklage, at her er ingen åretræer udi landet at bekomme, hvormed vi kunne søge vor næring til søs, thi når vi ikke haver årer, kunne vi ikke ro til søs efter hvis Guds gave, vi kunne bekomme af søen, hvormed vi kunne betale Hans majestæts leje og landskyld, så vel som vi og kunne have behov til vort livsophold og mere andet, som her fornøden var, eftersom I kunne selv se og forfare af den beseglede register, på hvis gods her nu fandtes udi landet, hvilket register deres købmand haver en kopi af.»[1])

Í løgtingsbókini finnst slík skráseting ikki, men týðuliga sæst tó, at brævið er sent tingsins vegna. Michel Vibe var sum borgmeistari í Keypmannahavn oddamaður fyri hinum íslendska handilsfelagnum. Hitt orknoyska maltið úr Bjørgvin kundi bent á, at Søren Sørensøn enn hevði ein fingur við í spælinum.

Í 1622 varð so at siga einki klagað um handilin, men nakað av mjølinum og maltinum, sum lá eftir frá síðsta ári, segðist ikki at vera gott. Nóg mikið av vørum var komið heim.

Fólk hildu tó, at nakað galið mátti vera við vektini í handlinum, tí keypmaðurin hevði hongt ein blýklump undir aðra vektskálina. Seks løgrættumenn skuldu kannað hetta. Um hetta sigur løgtingsbókin:

«Og lod kongl. majestæts foged ligne kongens vægt imod købmandens vægt; da befandtes de at være lige med blypladen, hvorfor blev så forefunden, at når købmanden vilde lade lige eller ligne skålene, da skulle de lignes ovenpå og ikke under neden skålene.»[2])

Hetta tykist at benda á, at tær nýttu vekteindirnar við handilin og í kongsins leigubúð hava verið tær somu, og við handilin skuldi tað vera hin gamla norska mørkin. Vágin í leigubúðini var í hvørt fall 80 merkur, og aftrat kom tann yvirvekt, sum tikin var. Eftir fútaroknskapinum hevur hon verið skinn aftrat vágini.

Ófriðurin, sum var í Norðuratlantshavi í hesi tíðini, førdi ofta sjórán við sær, og hermenn eygleiddu tí javnan skipini hjá íslendska handilsfelagnum á leið.[3]) Turkaráni 1629 kom tó óvart á føroyingar,

---

[1]) Lb. fol. 112 b–113 b. [2]) Lb. fol. 115 a. [3]) Kongl. boð um at kanna sjóleiðirnar til Føroya og Íslands: «Hendrik Vind, kongens skibshøvedsmand, får ordre til at konvoyere handelens skibe 1/5 1626. Mourits Prinds, kapt. på *Lindormen*, får ordre til at begive sig til de færøske og islandske farvande... Med skib *Hector* 20/7 1627. Instruks for Pros Mund med skibene *Spes* og *Marekatten* på sin færd under Færø 26/3 1630. Instruks for Aksel Movat for med skibene *Lindormen* og *Fides* at inspicere farvandene under Færø og Island til 1. juli for at holde dem fri for tyrker og andre sørøvere 3/5 1631. Instruks for Mickel Mortensen på kongens skib *Raphall* at begive sig på inspektion under Færø, hvis han antræffer tyrker og andre fribyttere, da at bemægtige sig dem, 1/4 1633. Instruks for Kn. Stensen til Stensgård som admiral for kongens skibe *Oldenborg* og *Raphall* at krydse søen mellem Island og Færø 26/5 1636. *Lindormen* og *Gabriel* får ordre 11/4 1638 til at krydse omkring Færø på deres rejse til Island.» Alt tikið eftir prentaðum uppriti á ríkisskjalasavninum, D. D. K.



og herskipavernd var tá eingin. Vítt var um at fara hjá teim herskipunum, hin dansk-norski kongurin hevði ráð at senda út. Hetta ránið varð tá sum nevnt atvold í, at skansaverkið á Tinganesi fór í gerð.[1])

Táið íslendska handilsfelagið var komið reiðiliga í gongd við handli sínum, tykjast væl fleiri vørur at vera komnar til Føroya. Í 1623 var eingin klaga yvir vørur, men nevnt er í tingbókini, at Laurits Hanssøn keypmaður hevði verið ógvuliga harðligur við fólk. Einstøk hevði hann sligið, men hann sigist tó at vera komin á samt við tey aftan á. Ein brádlyndur maður man hesin Laurits Hanssøn hava verið.

Um sjálvan handilin var einki klagað í 1624, men klagan um vektina kom tá aftur fram:

«Da fremkom Joen Justinussøn og Heine Justinussøn [ívaleyst brøður], Joen Unge i Hestø og andre flere og klagede, at købmandens tjenere omgikkes meget utilbørlig med vægten, så at fattige folk derover lide stor skade.»[2])

Møguliga hevur klagan verið um «at holde på skålene», hvat ið var hent fyrr. Keypmaðurin lovaði at kanna málið og at straffa hvønn, sum hevði gjørt seg sekan í slíkum. Jóan Jústinusson var tá løgrættumaður og Norðuroyar sýslumaður, og fýra ár seinni kom hann í løgmannsstólin. Ívaleyst var nakað í teirri klaguni, hesir menn førdu fram.

Laurits Hanssøn hevur óivað dugað væl at fáa nýtiligar vørur til lands, hóast nógv kundi annars vera at finnast at lívi hansara og levnað. Heimavinnan til matna man eisini hava verið góð í árunum 1620–26. Fiskurin tykist at hava verið nógvur og felli er einki klagað um. Neyvan kann deyðadómurin yvir tríggjar brøður í Funningi 1625 fyri stuldur, sum tingið útlegði sum hungursstuldur, hava havt nakað við ringar tíðir at gera í tátíðar týdningi.

Á tingi er eingin klaga um handilin 1625 og 1626. Helst man Laurits Hanssøn keypmaður vera fluttur til Danmarkar um heystið hetta seinna árið. Vit hoyra hann nevndan um summarið 1626,[3]) táið Maren Pedersdatter veturin fyri hevði stolið vín úr kjallaranum á Tinganesi, meðan David Jeronimussøn var vetrarkeypmaður.

Nevnt skal verða í hesum viðfangi, at 26. apríl 1626 sendi ríkisstýrið Føroya fúta bræv um «med flid at undersøge, på hvilke steder på Færøerne der findes stenkul.»[4]) Sama ár sendu løgrættumenninir í Suðuroy, 10 í tali, við sínum innsiglum tinginum bræv um kannan teirra í hesum spurningi, og finnst sama skjal nú á kongliga skjalasavninum í Keypmannahavn. Brævið vísir, at teir hava leitað niður í bergið sunnanfyri Hvalbiareiði fyri at finna kolalind, og sæst harav, at kol hevur ikki verið høgt í Suðuroy uttan har í berginum.[5])

Nýggjur vetrarkeypmaður, Christoffer Hanssøn, er nevndur 1627. Eisini hetta ár hevur verið nóg mikið av vørum í Tinganesi, men funnist varð tó at góðskuni av mjøli og klæði. Klagað var kortini mest um, at vetrarkeypmaðurin hevði vrakað ov nógv av hosum, so at menn máttu flyta tær heim aftur; men Christoffer Hanssøn segði,

---

[1]) Sjá bls. 128. [2]) Lb. fol. 141 a. [3]) Sjá bls. 32. [4]) Norske tegnelser, bind 4, bls. 540. [5]) D. D. R. A., D. D. K., B. 161, skjal dagssett 3/7 1626. Lb. fol. 154 b–155 a.

at tær vóru ikki lógliga gjørdar. Sum vanligt vórðu 12 løgtingsmenn valdir at kanna vørur á goymslu og somuleiðis handilshúsini.

Um vørukanningina er hetta bókført 1627:

«Først befandtes i kramboden at være lærred nok, både bleget og ubleget, dog en del deraf noget forligget.

Var klæde både grønt, brunt og sort, desligeste andet kram, som behov gøres, men hvis klæde og lærred og andet, som fordærvet var, lovede købmanden at sælge efter sit værd.

Dette efterskrevne fejl og fattes os, som er: blå devanter [toy], blå hatte, gode røde kvindehuer, blåt og rødt uldgarn, som ikke kaster farverne, næver, sæbe, tjære, pryssing [sterkt øl], hamp og god bådsved.

Hvad melet sig belanger, da vog en tønde af det mel, Jens Hedselberg hidførte med sig, seks voger 4 skind; nok vog en anden td. af samme mel 5 voger 4 skind med træet. Men det mel, her lå i vinter, vejede en tønde 4 voger 2 skind med træet og en 4 voger 9 skind med træet.

Maltet duer lidet eller slet intet, lovede købmanden at sælge efter sit værd eller føre det af landet. Måletønden med bismeren og alen fandtes ret at være. Hvad vejeskålene sig belanger, lovede købmanden, når bønderne kom til hannem og havde noget at lade veje, at de måtte tage, hvilken skål de vilde.

Hvis bådstømmer, her nu fandtes, skulde 16 bord sælges for 3 gylden af det, som udskudt er, og de bord, som gode er, skulde sælges efter gammelt landkøb. Af de gamle åretræer, her nu findes, skal hvert stykke sælges for 2 skind. Hver af de samme gamle stokker skal sælges for 3 skind, af disse indved-bånd 30 for en gylden, så mange stævner, som gøres behov til en båd, sælges for ½ gylden. Gamle kjøle, som ikke tjener til både, sælges stykket for 6 skind, af de små gamle lægter, her nu findes og ikke duer, 2 for 1 skind.»[1])

Víst er her bert á, hvat tvørraði á goymslu, og hvørjar goymsluvørur vóru ringar, so at minnivirði mátti verða sett á tær. Munurin í vektini av mjøltunnunum vísir, at mjølið er komið ymsar staðir frá. Tunnustøddin var í hesi tíðini ymisk. Vit finna her skinn ella 4 merkur nýtt sum undireind av vág.

Meting av húsunum í Tinganesi fór fram. Laurits Hanssøn hevði fingið 100 gyllin frá hinum gamla handilsfelagnum til bøtan av húsunum. Um hetta sigur tingið:

«Først om gårdstuen, er intet forbedret uden 8 bord og 4 spær og lækker på den ene side neder med muren; men loftet er fuldt af gods, derfor kan det ikke beses, om det lækker eller ikke. Den svale, som er hos loftet, haver Laurits Hanssøn ladet gøre noget større og lækker alt igennem. Murkoven lækker og behøver nyt trod [tróður]. Stegerhuset er nys tækket med halm. Salteboden fejl nyt trod og tag. Nåbis krog er slet borte. Bødkerhuset, som er opsat til rådstuen [gildisskálan], skal flyttes en favn fra rådstuen jævnt med koven, at den kan være dråbefri. Haver kompagniet ladet nederbryde kongl. majestæts blokkestue og ladet opsætte en ny blokkestue i stedet igen.»[2])

[1]) Lb. fol. 160 a og b. [2]) Lb. fol. 161 a og b. Hitt smala sundið innan fyri Tinganeshelluna kann nú tykjast at vera útfylt, tí henda nýggja blokkastovan er ivaleyst flutt út á helluna.



Í 1627 er altso Náburs krókur horvin, ivaleyst eitt vána høli, kanska ein drykkjustova. Vit síggja eisini hina gomlu blokkastovuna niðurtikna og nýggja bygda, men ikki kunna vit vera vísir í, hon er bygd á somu grund. Nú stendur blokkastovan á Tinganeshelluni uttan vert hitt gamla sundið, ið skildi hana frá landi.

Í 1627 hoyra vit føroyingar klaga um fiskaloysi, og hetta er byrjanin til nógv ring fiskiár í Føroyum. Uppgerðin frammanfyri um kongstíggjundina bendir eisini á hetta.[1]) Fyrrapartin í árinum 1628 man Sakaris Tormóðsson løgmaður vera deyður, tí hetta árið er innført í løgtingsbókina:

«Samme tid sad Joen Justinussøn udi lagmandens sted her sammesteds.»[2])

Løgtingið hevði longu tá valt Jóan Jústinusson til løgmanns, og eftir var bert, at kongur skuldi ásanna valið. Ásanningin kom árið eftir.

Vanligt hevði verið, at keypmenninir við handilin høvdu umsitingina av junkaragóðsinum í Føroyum. Soleiðis hevði Jacob Jacobsøn havt hesa umsiting. Laurits Hanssøn fekk hana seinri, men í 1628 síggja vit, at góðsið hjá Rosenkrandsunum verður givið fútanum, Mads Christensen, til umsitingar. Tá kom fram, at Laurits Hanssøn eins og Jacob Jacobsøn á sinni hevði tikið móti leigu av junkaragóðsinum uttan at innføra hana sum goldna í bókum sínum. Viðvíkjandi handlinum sæst eingin atfinning at vera komin fram um skeiva bókføring hjá Laurits Hanssøn.

Ólavsøkutingið 1628 tykist ongan skrivara at hava havt, og líkt er til, at tann løgmaður, tingið tá valdi, hevði virkað sum tingskrivari árið fyri. Handskrivtin í løgtingsbókini bendir á tað, og sama handskrivtin hevur ført inn á tingbókina málini, sum komu frá vártingunum 1628. Hetta árið er einki innført í tingbókina um handilin. Síðst undir hesum ári eru innførd við aðrari handskrivt nøkur skjøl, sum ikki vóru tingmál.

Tess rúgvismiklari er innføringin undir 1629, tá vit vita, at nýggjur tingskrivari hevði tikið við. Fyrst er innført bræv, dagssett 13. mars 1629, hvarvið kongur setur Jóan Jústinusson sum Føroya løgmann.[3]) Eingin klaga er um handilin 1629, «thi her haver været gods nok, besynderlig mel og korn;» men fólk siga:

«Dersom vinterkøbmanden ikke havde så vel ladet de fattige folk her i landet bekomme mel og byg udi denne forgangne vinter for hoser, da havde halvparten af de fattige folk her udi landet blevet død af stor hungers nød, thi fiskeriet haver aldeles slaget fejl for dennem i dette år.»[4])

Vit síggja altso, at fiskaloysi helt fram í 1629, og kongstíggjundagjaldið ásannar eisini hetta (sjá mynd 1 bls. 84 og 85), men um landbúnaðin varð enn einki klagað. Sýnið varð tikið av vørum á goymslu um ólavsøkuna 1629, og harum stendur:

«Dette efterskrevne fattes, som bådsved (baaeds wid), deller, halse, stævner og kjøle og tjære; indvedsbånd er her nok, men duer lidet,

[1]) Sjá mynd 1, bls. 84 og 85. [2]) Lb. fol. 169 a og b. [3]) Lb. fol. 169 a og b. [4]) Lb. fol. 172 a og b.

og den anden bådsved, her nu findes, duer og lidet, bør og sælges efter sit værd. Nok fattes malt og øl og besynderlig vin til kirkerne og blå devanter.»[1])

Hetta, sum trýtur, biður løgtingið handilin fáa til vega innan vetur. Sum dømi um, hvat handilin hevði á goymslu, skal verða nevnt: reytt, gult og svart klæði, reyðar kvinnuhúgvur og bláar hattar. Glógvandi munnu fólk tá hava sæð út í hátíðarbúna.

Tingbókin 1630 sigur framvegis um fiskaloysi og um út av lagi ringar tíðir. Kongstíggjundagjaldið hetta árið ásannar til fulna løgtingsbókina. Tað vísir eisini, at fiskaloysið hevur verið størst hetta árið. Eftir tíggjundagjaldinum at døma hevur seyðinum vitað toluliga væl við. Fiskiskapurin hevur kortini í teirri tíðini verið heilt týðandi vinna hjá føroyingum. Sló hann frá, var hungur í durunum. Fiskur var ikki bert handilsvøra; hann gav eisini mat í húshaldinum. Jú meira fisk menn veiddu, jú minni nýttu teir at keypa frá handli. Vit síggja eisini, at vørurnar við handilin vóru skjótt á troti um veturin 1629–30:

«Siden jul og indtil det første skib kom hid udi landet, som var ved pinsetide, da var her intet at bekomme hos købmanden, hverken mel, rugkorn, bygkorn, malt eller øl, ej heller vin til kirkerne, hvorover mange fattige mennesker er bortdøde her udi landet af stor hungersnød.»

Út av lagi nógv avgjørt er hetta óivað ikki. Neyðin hevur verið stór; fátæk fólk eru ivaleyst deyð í hungri, nógv vóru ognarleys, og trotið við handilin byrjaði longu á jólum (Hvør kelling livir til jóla, sigur gamalt orðatak).

Christoffer Hanssøn,[2]) sum var vetrarkeypmaður 1626–27, var keypmaður í 1630, og svar hansara á tingi var sakligt og vísir, at hjá honum sum keypmanni hevur verið ilt við at gera, tí óvanliga nógv varð keypt í ringum árum, og mong fólk høvdu einki at gjalda við og tóku mest upp á borg. Keypmannsins svarbræv er innført í tingbókina soljóðandi:

«Eftersom almuen udi landet sig beklager, at gods haver ikke været nok udi forråd til at bespise menige almue udi denne forgangne vinter 1629, da hertil svares, at der skib af landet sejlede, som var den 27. august 1629, var da udi forråd nemlig:

40 læster 3 tønder mel,
23 tønder ærter,
12 tønder brøe [má vera: brød],
39 tønder malt,

foruden klæde, lærred, snører, hamp, jern, og hvis ellers fornøden haver været til landsens behov, og som beløber sig til 3800 færøske gylden, hvilket gods jeg på den tid formente at have været nok til landsens behov; men når Gud tager fisken fra landet formedels synd og ondskab, da er det ikke noget under, at der købes mere gods om vinteren, end når Gud giver dennem fiskeri.»[3])

Víðari greiðir Christoffer Hanssøn frá, at ein vetur harfyri seldi

[1]) Lb. fol. 173 a. [2]) Seinri stjóri fyri íslendska handilsfelagið, borgmeistari í Keypmannahavn 1645–64. [3]) Lb. fol. 181 b.



hann bert 20 lestir av mjøli, og táið hann nú hevði 40 lestir upp undir vetur, kundi hann ikki vænta, tað fór at vera uppi. Vørur, sum lógu ov leingi á goymslu, spiltust ofta og máttu tá verða seldar við stórum tapi. Kortini hevði hann ætlað at fáa fleiri vørur heim undir vetur:

«Jeg haver forgangen høst til overflødighed skrevet med skipper Sibrot Petersøn til kompagniet, at de skulde hidskibe et skib med hvis gods, som jeg tænkte fornøden gjordes, som min skrivelse til dennem derom formelder, og årsagen, det her ikke at være ankommen, er sket, formedels at mine breve er ikke så snart overkommen, at de kunde skib hid skikke.»[1])

Víðari sigur Christoffer Hanssøn í brævinum, at tøkk frá íbúgvum landsins fyri góðan tilførning hevði handilsfelagið aldri fingið, hóast handilin ofta var komin at liggja leingi inni við vørum, og hartil vóru eftirstøðurnar vaksnar, tí at handilin hevði latið upp á borg. Útistandandi vóru 2700 gyllin, og harav væntaði hann sær valla at fáa inn 300 gyllin. Handilin mátti soleiðis koma at missa nógv. Brævið, sum er skrivað handilsfelagsins vegna, er dagssett í Tórshavn 30. juli 1630.[2])

Ein lest var um 22 tunnur. Handilin hevði soleiðis havt upp undir vetur 883 tunnur av mjøli. Í meðal man hetta hava verið um 1 ½ tunna til hvørt húshald í landinum.

Fólk, sum høvdu væl av jørð, livdu mest av egnari framleiðslu. Vánaligt veður man hava verið henda veturin, men felli hoyrist einki um. Ringur vøkstur, mestsum misvøkstur, má ætlast at hava verið øll árini um 1630, helst aftaná hetta árið, og fiskiskapurin sæst enn at hava verið ringur.

Henda ójavna framleiðslan av matvørum í Føroyum hevur ofta gjørt tað ilt hjá handlinum at ætla um, hvussu nógvum vørum hann átti at liggja inni við móti vetri.

Brævið frá Christoffer Hanssøn vísir, at virðið av vørum á goymslu móti vetri 1629–30 var 3800 gyllin, men at handilsskuldin hjá fólki summarið eftir var 2700 gyllin. Sjálvsagt er øll henda skuldin ikki komin eftir einum vetri, men hon er øgiliga stór í mun til fólkatalið, sum tá má ætlast hægst at hava verið um 4200 menniskju.[3]) Hon er eisini øgiliga stór í mun til alt virðið av vøru, sum handilin árliga umsetti. Fólks bókførdu skuld hjá hinum gamla handilsfelagnum var sum áður nevnt tá heldur ikki endaliga avgjørd.

Vit síggja soleiðis, at hin fíggjarligi standurin í landinum hetta árið hevur verið út av lagi, og hann skuldi enntá gerast ringari. Ikki

[1]) Lb. fol. 182 a. [2]) Lb. fol. 182 b. [3]) Út frá talinum av skattakontoum metir N. Andersen í bók síni *Færøerne* fólkatalið í Føroyum um hetta mundið til 4280. N. A. Fær., bls. 37. Í grein síni *Fólkatalið og ognarbýtingin í Føroyum um ár 1600* í *Fróðskaparriti 1954* hevur Arnbjørn Mortensen viðgjørt spurningin um fólkatalið í Føroyum út frá jarðarbókunum, og kemur hann í kanning hesum grundarlagi til, at fólkatalið í oyggjunum um ár 1600 lá um 3180, altso væl lægri enn hjá N. Andersen. Annars hevur fólkatalið um hetta tíðarbil gingið upp og niður við umfarasjúkum, t. d. pokunum. Í Tórshavn sæst fólkatalið eftir einum ári soleiðis í 1602 at vera minkað niður í o. u. helvt. Fyrsta árið fólkateljing sæst at vera gjørd í Føroyum er ár 1769. Yvir hesum finnst uppgerð á Oslo skjalasavni saman við jarðarbókum 1642–49. Fólkateljingin 1769 vísir 4774 íbúgvar.

eiga vit tí at undrast á løgtingsins svar, táið kongur biður tingið leggja út pening til leyskeypan av fólkum, sum turkarnir høvdu hertikið árið fyri í Hvalbø. Løgtingið bar seg jú ikki undan at gjalda tað, ið møguligt var, táið tað bert fekk tíð at umráða seg; men ríkisstýrið tykist tá bert at hava lagt málið frá sær.

Á ólavsøkutingi 1631 verður lítið klagað um handilin. Fólk siga tó, at kornið sum var komið hetta summarið, var ringt, men keypmaðurin svarar, at orsøkin til tess var misvøkstur í Danmørk síðsta ár. Tá keypmaðurin kom til Føroya á vári, hevði hann havt við sær «henved ti hundrede tønder byg foruden mel og øl og anden nødtørftig vare.»

Eisini klagaðu fólk um trot á bátsviði, men keypmaðurin svaraði, at hann hevði bílagt bátsvið, sum vildi koma heim í næsta skipi.

Triðja klagan galt hosur, ið summir vildu halda, keypmaðurin við órætti hevði vrakað, og hosur vóru tað einasta, fólk høvdu at selja móti vørum, tí fiskiskapurin var framvegis eingin. Fólk viðgingu, at tey høvdu selt onglendingum tær vrakaðu hosurnar. Í hesum fiskaloysistíðum hava bretsk skip framvegis ligið undir Føroyum, men óivað mest fiskað á ytri leiðum, uttan fyri 16 fjórðingar úr landi, og tey nýttu jú eisini sild til agns.

Løgmaður læt tá gera mynsturhosur, sum hann merkti við innsigli, gav hvørjum sýslumanni sítt par at vísa fólki og keypmanninum eitt par. Christoffer Hanssøn helt jú fram, at tær vrakaðu hosurnar vøru ólógliga gjørdar, og vísti á, at hann við fyrsta skipi til Hálands hevði sent hiðani yvir 12000 pør av hosum, sum handilin hevði keypt farna vetur. Eftir tátíðar prísi skuldi henda hosusølan hava givið av sær minst 3000 gyllin.[1]

Av løgtingsbókini 1632 síggja vit, at fiskur er farin at bragda aftur um ikki í stórum. Um handilin verður klagað, men klagurnar koma nógv av tí ringa bygginum, sum kom heim síðsta ár:

«Var her forgangen vinter slet intet i forråd eller at bekomme undtagen det bare bygkorn alene, og det duede lidet eller slet intet. Her var hverken rugkorn, mel eller malt, ej heller øl og vin, så dersom Vorherre ikke havde givet os nogen fisk af søen, da måtte vi fattige folk have lidt alsomstørste hunger og elendighed. Tilmed haver mange af os fattige folk i denne forgangne vinter mistet en stor hob af vore får»[2]

Vit bíta merki í, at nú, táið fiskurin er farin at bragda, er felli komið á seyðin. Kavavetrar eru í byrjan. Langt var útliðið á summarið, táið fyrsta handilsskipið kom:

«Men hvad tilføringen er anlangende i denne sommer, da er her kommen megen Guds gave med det første skib, her kom i landet efter sankt Hans dag, både bygkorn og rugkorn, det som godt var, så og noget mel og øl, dog en stor part af øllet var ikke bedre end tyndt spiseøl, må dog give lige meget derfor som for det bedste. Og noget malt, ved tyve tønder, kunde lidt forslå til præsterne, meget mindre til et helt land, hvilket forskrevne gods vil lidt forslå den hele vinter over til dette fattige land.»[3]

[1]) Lb. fol. 188 a — 189 a. [2]) Lb. fol. 194 a. [3]) Lb. fol. 194 b.



Keypmaðurin svaraði, at hann væntaði skjótt skip aftur, so nóg mikið av vørum skuldi vera undir vetur, um fólk høvdu nakað at keypa fyri. Vørur sum øl og malt tykjast prestarnir at hava havt fyrsta rætt til. Tjúgu tunnur av malti vóru enntá ikki nóg nógv bert til teirra. Handilsveturin var langur í Føroyum í teirri tíðini. Hann gekk frá mikkjalsmessu, til fyrsta handilsskip kom, og hetta árið var jóansøkan farin aftur um, áðrenn skipið var í havn her. Í vanligum árum mundi tað tó neyvan vera seinri enn 1. mai.

Aftur í 1632 varð klagað um hosuvraking. Fútin beyð tá løgmann og løgrættinum, at teir eins og árið fyri skuldu lata gera mynsturi hosur: tvey pør av fimmskinnshosum og tvey pør av fýraskinnshosum, og seta innsigli á tær. Í hesi tíðini vóru tær nógvu handilshosurnar korkalittar. Av sakarbótum í 1633 sæst bótin eina ferð at vera goldin í hvítum hosum, sum mega hava kostað 4 skinn parið, meðan bøtur fleiri ferðir eru goldnar við korkalittum hosum, sum hava kostað 5 skinn parið.

Løgtingsbókin vísir, at veturin 1632—33 var ein ræðuligur kuldavetur í Føroyum og várið ikki minni, og at árið var eitt satt fellisár,[1]) men at hetta skal hava verið svartafellisárið, frásøgnin veit um at siga, er tó eingin grund til at halda, tí onkuntíð áður, t. d. í 15. øld, hevði kuldin verið harðari í Norðureuropa og yvir Norðuratlantshav. Táið fútin á ólavsøkutingi 1633 spurdi fólkið, hvussu til hevði staðið við handlinum, varð svarað:

«At hvad mangel på tilføringen er anlangende, da haver her slet intet været udi forråd hos vinterkøbmanden siden forleden fastlavn, så vi ikke det ringeste haver kunnet bekomme til vort livsophold, hverken mel, rugkorn eller bygkorn, ej heller malt eller øl, så at vi fattige folk haver måttet leve udi alsomstørste hunger og elendighed, indtil skib kom i landet ved sankt Hans tider, hvorover vi fattige folk haver måttet fortære hvis ringe fisk [teir hava altso fingið nakað av fiski], vi haver bekommet af søen, [og] som vi ellers kunne have til vor jordeleje med at betale.»[2])

Hetta árið hevur so einki verið at fáa í handlinum frá føstugangi til jóansøku. Fyrsta handilsskipið á sumri var aftur seint á veg, og atvoldin til tess tykist meira at hava verið kuldi og høgætt enn harðveður. Fiskiskapur tykist hetta árið mest at hava bjargað fólki frá hungursdeyða, tí beinleiðis er einki nevnt um, at fólk eru deyð í hungri. Seinri parturin av vetri og várið munnu mest hava havt makligt høgættarveður. Eitt sjáldsama hart kuldaveður man hava ligið um landið henda veturin til langt út á várið. Høgætt við kava og frosti hevur átt valdið. Soleiðis var veturin 1632—33 á Íslandi. Ísur í Kattegat og Oyrasundi man hava stongt fyri allari sigling haðani, til summarsólin eina ferð bræddi hann burtur.

Gróðurin í Føroyum man vera komin úr lagi seint hetta várið, og seyðurin er deyður í svølti og raki. Hoyggið í hoygørðunum

[1]) Eftir brævi 17. apríl 1603, N. R. R., 4 bind 1. hefti, bls. 8, var veturin 1601—02 minst líka harður og fellið á landi ivaleysa líka stórt. Ætlandi hevur Kyndilsmessan harða fallið henda veturin og fiskaloysi árini aftaná, men í 1612—13 hevur nógvur fiskur verið aftur. Veturin 1632—33 er á Íslandi nevndur Veturin hvíti. Sjá annars Lb. fol. 203 a. [2]) Lb. fol. 202 b — 203 a.

hevur heldur ikki rokkið, tí neytini hava svøltað og eru deyð í hópatali:

«Tilmed er meste delen af vore får bortdøde forgangen vinter såvel som nogle hundrede køer, så at her aldri haver været så ynkelig en tilstand udi landet, som noget menneske nu kan mindes, så Gud hjælpe os fattige folk.»[1])

Tað skuldi so verið veturin 1601–02, ið var líka ringur. Gomul fólk tá skuldu minnst hann. Veðrið henda fyrra fellisveturin man hava verið nógv harðligari, um so er, at Kyndilsmessa harða fall saman við honum. Søgn vil vera við, at tá legðist sandur upp nógvar staðir í Føroyum, t. d. lógvin uttan fyri Saksun. Á Íslandi var eldgoysan og jarðsjálvti, og øskurokið kann hava verið nógv í Føroyum.

Vit síggja, at nógvur seyður er deyður á vetri og vári 1633, og táið tað stendur, at fleiri hundrað kýr eru farnar, man ein munandi partur av øllum stórdýrunum í landinum vera fallin fyri hungurssvørðinum.

Á ólavsøku 1633 vóru tvey skip komin til lands við vøru, so júst tá var eingin neyð, men tingið vildi tó hava meira vøru heim til veturs. Summarið 1632 hevði einki korn givið av sær heima, og menn mundu heldur ikki vænta sær stórt í 1633.

So man eisini hava verið, tí komandi vetur tykist øll vøran, í hvørt fall matvøran, við handilin at hava verið uppi á jólum, sum tingbókin sigur frá summarið 1634:

«At hvad mangel på tilføringen er anlangende, da haver her slet intet været udi forråd hos vinterkøbmanden siden forleden jul, så vi ikke det ringeste haver kunnet bekomme til vor livs ophold, hverken mel, rugkorn eller bygkorn, så vi fattige folk haver måttet leve udi alsomstørste hunger og elendighed, indtil sankt Valborgs dag skib kom her til landet, hvorover vi fattige folk haver måttet fortære, hvis ringe fisk vi havde bekommet af søen, som vi ellers kunne have til vor jordeleje og afgave med at betale. Men siden skib kom her i landet, er her kommen megen Guds gave både af mel, malt og øl og andre nødtørftige varer, vil dog lidet forslå til vinteren.»[2])

Sama ólagið. Neyðsynjarvørurnar uppi á jólum, og fyrst fyrsta mai kom skip aftur. Størsta atvoldin var óivað tann, at fellið hevði verið á landinum árið fyri, so búnaðurin hevði lítið og einki givið av sær til matna, og handilin hevði roknað ov lítið við tí. Sjógvurin mátti geva tað, ið leigan kravdi, og nú vóru fólk noydd at eta leigufiskin upp fyri at liva.

Tingsins samkomudag, hin 22. juli 1634, vórðu 12 løgrættumenn valdir at hyggja eftir krambúðini, og søgdu teir soleiðis frá:

«Hvis melet var anlangende, da fandtes her tyve læster mel, og vejede tønden 4 voger foruden træet. Bygkorn fandtes her nu, som købmanden sagde, et tusind tønder, ville dog lidet forslå til vinter. Sammeledes fandtes her malt nok så meget der gjordes behov til denne vinter, og vejede en tønde 3 voger og 6 skind foruden træet. Men hvis kramboden var anlangende, da fandtes der nok både klæde

---

1) Lb. fol. 203 a. 2) Lb. fol. 210 a – 211 b.



og lærred – foruden kvindehuer og blå hatte, det fattedes; sammeledes fattedes her bådstømmer. Hvis vægten, skålene og loddet og måletønden er anlangende, da fandtes det at være ret.»[1])

Eingin ójavni tykist at hava verið á mjøltunnunum í vekt, men vektin var lítil. Hin danska mjøltunnan var minni enn hin norska; mjølvektin er tí samsvarandi við, at mjølið var danskt.

Á løgtingi 1635 var yvirhøvur eingin klaga um handilin. Veðurlagið man tí hava verið batnað. Heimakornið kann hava givið nakað av sær í 1634 og somuleiðis fiskiskapurin út um veturin og várið 1635. Tíggjundin sæst eisini at vísa tað. Løgtingsbókin sigur einki. Harfyri kann tað júst hava verið so. Skipanin á seyði og neyti mundi tá neyvan verið komin í hæddina aftur.

Í 1625 var Jacob Mikkelsen vorðin borgmeistari í Keypmannahavn eftir Mikkel Vibe og kom soleiðis inn í hitt íslendska handilsfelagið. Hann var væl kendur við kong, og í 1634 letur kongur hann fáa Føroyar í len og skrivar fútanum í Føroyum bræv um hetta. Lensbrævið hjá Jacob Mikkelsen ljóðar annars soleiðis:[2])

«Vi Christian den Fjerde .... gøre alle vitterligt, at Vi af synderlig gunst og nåde nådigst haver undt, forpagtet og efterladt og nu med dette vort åbne brev under, forpagter og efterlader os elskelige Jacob Michelsøn, borgmester udi vor købstad København, al vor og kronens visse og uvisse indkomst af Færø, indtil Vi anderledes tilsigendes vorder, og skal forn. Jacob Michelsøn årligen os og kronen til afgift deraf for hver færøsk gyldens værd af forn. indkomst fornøje og give tredive og syv lybsk skilling for de trende parter af indkomsten og for fjerde parten af forn. indkomst en vog fisk for hver færøsk gylden, og det her udi vort provianthus levere, det første muligt er om året på sin egen fragt og omkostning, undertagendes så meget må afkortes deraf, som skal gives til skolen. Forbjudendes vore fogeder, ombudsmænd og alle andre hannem herimod, som forskrevet står, at hindre eller udi nogen måde forfang at gøre under vor hyldest og nåde. Givet på vort slot København den 24. mai anno 1634 under vort signet.

*Christian.*»

Aftur her finna vit ein føroyskan gyllin settan javnt við 37 lybskar skilingar ella eina vág av turrum fiski. Stutt aftaná sendi kongur fútanum boð um, at hann hevði at krevja aftur frá íslendska handilsfelagnum tað, sum hann av hesi ársinntøku hevði latið handilin fáa, og at avhenda Jacob Mikkelsen ella hansara fulltrúa í Føroyum tað.

Hvønn Jacob Mikkelsøn hevði sum fulltrúa í Føroyum, fáa vit at vita av tingbókini 1635. Hin 1. aug. hetta ár varð klagað á tingi um, at leiguvøran stóð ikki vekt:

«Fremkom besKeden karl, Hermand Arentsøn, ærlig og vellært og fornemme mand, borgmester Jacob Mikkelsøns fuldmægtige her udi landet, og gav til kende, hvorledes en part af almuen, som fremkommer med deres leje, besynderlig smør og tælle, som er stødt og

---

1) Lb. fol. 211 b. 2) Lb. fol. 209 b.

smeltet udi tønder, en del deraf ikke holder sin fulde [orðið sett inn aftan á] vægt efter Københavns vægt (Kiøbenhafuens wegtt), som forn. Hermand Arentsøn sig formente, hvorfor han vilde veje hver tønde med en punder, og hvilken tønde, som ikke vejede 14 lispund, skulde de fuldgøre, så den kunde holde sin vægt, hvortil blev svaret først af præsterne, lagmanden og menige lagrettesmænd, at hvad den punder og vægt er anlangendes, Hermand haverført hid med sig, haver [den] aldrig været brugelig her udi landet, men at de altid haver brugt Bergen alen, mål og vægt, og [de] forså sig til Hans Majestæt, at de måtte blive ved deres gamle frihed, som af arilds tid haver været, hvorover Hans majestæts foged tilholdt menige almue her i landet, at hvis smør og tælle, som de stødte og smeltede udi tønder efter denne dag, skulde de gøre så lovligen, at de kunde holde deres vægt, eller og smelte det udi hele voger og levere fra sig udi deres leje- og landskyld, hvorpå forn. Hermand Arentsøn var et tingvidne begærende.»[1])

Hermand Arentsøn kravdi her leiguna goldna eftir Keypmannahavnar vekt og segði, at smørtunnan minst mátti viga 14 lispund. Smørtunnan skuldi viga 7 vágir eftir føroyskum taksti og vekt ella $15^3/_4$ lispund. Tá eru roknað $2^1/_4$ lispund í vagina ella 72 merkur.[2])

Út frá tí tali, løgtingsbókin her nevnir, vil tað tó vera ov nógv avgjørt at fastleggja lutfallið, sum tá var til staðar millum Keypmannahavnar vekt og gamla norska vekt. Givið er tað, at smør í tunnum, sum var leigusmør, hevði 80 norskar merkur í vágini. Hin kongliga yvirvektin var fingin til vega í sjálvum smørtunnuprísinum. Útrokningin í vágir av leysum smøri, sum tikið var í yvirvekt ár 1600, vísir okkum eina vág, sum var 80 merkur. Var leiguvágin veruliga 80 merkur uttan yvirvekt, skuldi tunnuvágin, sum hevði fingið sína yvirvekt góðgjørda í prísinum, ligið um 80 merkur.

Her, tvey ár eftir fellisárið 1633, er talan um vekt á leiguvørunum smøri og tálg ella fløti. Svartafelli kann tá ikki hava verið hetta ringa árið. Komandi ár tykjast at hava havt gott veður.

Í 1636 verður eisini sagt frá, at matvøra hevur ikki trotið við handilin veturin framman undan, men klagað verður um ymist annað, m. a. øl. Tingbókin sigur: «Vi fattige folk haver måttet hjælpe os med vandbækken.» Tað vil væl siga, at tey hava noyðst at fara undir lækjuna eftir vatni. Vit hoyra her týðuliga, at tað eru prestar og stórbóndir, ið klaga. Fjøldin av fólkinum í Føroyum drakk tá ikki øl fyri vatn. Tólv løgrættumenn, sum sýna handilin, málbera seg soleiðis:

«Hvad tilføringen er anlangende, så fattedes her i landet forgangen vinter øl, malt, tjære, sæbe, hamp, snører, jern og bådstømmer med mere andet, som landet behøvede, fordi det tømmer, som kom forgangen høst, tjente lidet, så at dellerne, som da hid kom, vare både stakkede og smalle, men mel og korn var her Guds gave i forråd, og er nu i denne sommer kommen nok mel, øl og malt. Hvad melet

[1]) Í hesi tíðini vóru vekteindirnar, sum Keypmannahavn nýtti, størri (mørkin: 248 g) enn bæði gamlar norskar og kølnskar eindir. Sv. Aakjær: Maal og vægt, bls. 262. Sjá annars Lb. fol. 218 a–219 b. [2]) Í leigubúðini sæst tó sum nevnt, at menn hava roknað við 80 marka vág.



er anlangende, da er det intet synderligt, tilmed holder en part tønder ikke sin fulde vægt. Kornet er temmeligt, men maltet, som her kom, duede lidet eller slet intet; thi vi haver ladet det forsøge og kan ikke få mere end en fjerding tyndt øl efter en tønde malt. Hvad kramgodset er anlangende, da fandtes her klæde, lærred, hamp, sæbe og andet mere, så at her fattes nu godt malt, bådstømmer, næver, røde kvindehuer, blåt og rødt uldgarn og gode bandestager. Hvis vægten, skålene, loddet og måletønden er anlangende, da fandtes det at være ret.»[1])

Fiskisnøri, bátsviður og bandastakar vóru neyðug hjá føroyingum í teirra vinnu. Bandastakar nýttu teir til stangararmar. Nævur var eisini neyðug til húsaábót.

Sum áður nevnt var ein hálendari 1636, helst um várið, inni í Vágum, og seldu sýslumaðurin og presturin honum 110 pør av vrakhosum og keyptu fyri peningin øl og tjøru. Vit síggja, at hesar vørur hava ikki verið við handilin. Í Hvalbø fór hálendarin eisini inn. Har seldi hann mjøl, sum fannst við handilin; sýslumaðurin sigur, 20 fólk keyptu ein sekk at býta millum sín, mest fyri hosur, tey tóku av beinunum á sær sjálvum. Sjálvt um hetta kanska er nakað nógv avgjørt, hevur standurin óivað verið ringur.

Hvørki í 1637 ella í 1638 vóru nakrar klagur frammi á tingi um handilin. Harav má kunna ætlast, at frá sumri 1633 og at sumri 1638 hevur veðurlagið verið lagaligt í Føroyum. Í hesi tíð verður einki talað um fiskiskap í tingbókini, og tíggjundagjaldið vísir sløð av fiski, (Sjá mynd 1, bls. 84 og 85). Hungursár hava ikki verið, men tíðirnar mega ætlast at hava verið vánaligar.

Longu summarið 1638 má hava verið ruskut í Føroyum, og veturin aftaná, síggja vit, hevur verið út av lagi ringur, tí í 1639 er klagan á tingi stór:

«At hvad mangel på tilføringen er anlangende, da haver her udi landet straks efter jul været stor hunger og dyrtid formedels daglig storm og uvejr, så fattige folk ikke formedels vinterens hårdhed kunde søge deres næring og bjæring af søen og det langt ud på sommeren tilmed og formedels stor mangel på tilføringen. Men dersom det første skib, kompagniet sendte hid til landet i foråret, havde beholden kommet hid til Thorshavn, da havde det været fattige folk til stor undsætning, hvilket desværre blev i Suderø, hvorover kompagniet i nogen måde kan være undskyldt.»[2])

Vørurnar við handilin hava mestsum verið uppi um jóltíðir 1638, og fyrsta skipið á vári 1639 er sett inn í Suðuroy og farið á land har, so ætlast kann, at standurin í landinum hevur verið ringur.

Veturin 1638–39 kann ikki hava havt nógvan kava, tí einki verður aftaná talað um seyðafelli. Hann man hava ligið við stormi mest á vesturætt og lágætt. Eiðasørt av fiski man ikki hava verið undir landi heldur, tí føroyingar siga seg ikki at hava fingið matfisk fyri óveður.

Góðs tykist at vera komið nógv um summarið 1639: «her er kommen gods nok både af mel, bygkorn, rugkorn og malt, så af anden nødtørftig vare, så her er nok af forråd denne vinter over.»[3])

[1]) Lb. fol. 224 b–225 a. [2]) Lb. fol. 247 b. [3]) Lb. fol. 248 a.

Klagað varð einki heldur um vørutrot á sumri 1640. Keypmaðurin finnst at, at hosurnar, fólk komu við, vóru ringar. Eisini í 1641 tykist alt at hava verið í lagi við handlinum. Á ólavsøku hetta ár funnust løgrættumenn at vørunum á goymslu við hesum orðum:

«Kvindehuer er ikke store nok, båndestager findes ingen, mjød findes intet, øl findes lidet, gryn, bådstømmer, osmund-jern findes intet.»[1])

Innføringin í tingbókina er ógvuliga stutt avgjørd hetta árið, men tað, sum enn trýtur á ólavsøku, er ikki matvørur og kundi væl koma í skipi aftaná.

Í 1642 var at kalla eingin klaga um handilin. Menn søgdu tó, at tvørrað hevði tjøra, bátsviður og hampur. Kvinnuhúgvur fingu sama skotsmál sum áður. Eingin klaga var heldur í 1643 um handilin, og væl av vøru var tá á goymslu á ólavsøku.

Harímóti klagaði fútin um, at føroyingar framleiddu ringar vørur, bæði skinn, hosur, tálg og fjøður. Klagan kom fram orsakað av nøkrum vørum, sum tiknar vóru frá hinum enska loynikeypmanninum Fermus, ið áður er umtalaður.

Í sama viðfangi álegði fútin føroyingum, at teir hereftir sum áður í tíðini skuldu lata skinn og tálg í seyðaleigu, og at hesar vørurnar tá máttu vera góðar.[2]) Eftir hitt stóra seyðafelli 1633 varð tað loyvt monnum at gjalda nakað av leiguni í fiski. Seyðaskipanin man nú aftur vera komin í hæddina, men vøruviðgerðin hjá føroyingum man vera versnað, og og harav kunna vit ætla, at hin almenna mentunarstøðan í landinum man vera sokkin.

Óivað hevur veturin 1643—44 verið veðurringur og várið kanska verst. Lítið mundi heimakornið hava givið av sær árið fyri. Í hvørt fall varð klagað á løgtingi 1644 um, at vørutrot hevði verið:

«Hvis tilføringen anlanger, da haver her været stor trang udi forgangen vinter, eftersom senest forgangen år blev overset udi kompagniets huse og krambod, hvis korn og andet her kunne være i forråd, og på den tid var temmelig godt forråd, og almuen lod sig dermed nøje således, dersom skibe kunne om fastlavn hidkomme med mere korn til landsens fornødenhed, men skibet fra Danmark, som var affærdiget og hid til Færø, var langsommelig tid på rejsen, på en seks ugers tid, og ikke kunne fremkomme.»

Skipið hevur ætlandi møtt høgætt ella vesturhallari høgætt og var noytt at seta inn í Noreg.

Nú er tað fútin, sum biður nakrar skilamenn hyggja eftir handlinum á ólavsøku. Teir hildu mjølið vera lítið á goymslu, men siga annars:

«Og fattes her på landet efterskrevne varer, som er mjød, øl, mel, gryn, ærter, hamp, bådsdeller, lægter til fuglestænger, adskillige små trævarer, fade, tallerkener, skåle, lerkar, potter, fade og andet sådant.»[3])

Eftir summartingsetuna má handilin hava fingið skip heim. Hóast ring viðurskifti á landi var væl av vørum at fáa um veturin 1644—45, tí í 1645 svarar fólkið á ólavsøkutingi viðvíkjandi handlinum:

«At de takkede kompagniet såvel som deres fuldmægtige, som i

[1]) Lb. fol. 257 a. [2]) Lb. fol. 269 a. [3]) Lb. fol. 275 a.



denne bedrøvelige tids tilstand med godt forråd dennem havde forsynet, så ingen havde sig at klage over dennem i nogen måde.»[1])

Tingbókin nevnir einki um felli og fiskaloysi, men hin virkandi sorinskrivarin – ætlandi Hans Madssøn – ger heldur lítið av at føra inn í tingbókina. Hans Willumsøn Hannemand tingskrivari varð sum áður nevnt dømdur úr starvi hetta árið, og handskrivtin vísir, at tingbókin sama ár ikki er førd av honum. Hans Selmer, sum í 1645 varð vorðin fúti, reisti á ólavsøkutingi sama ár ákæru móti Jacob Willumsøn Hannemand sorinskrivara, sum veturin fyri tykist at hava verið vetrarfúti fyri gamla fúta, Mads Christensøn, ið doyði í Keypmannahavn sama veturin. Sakarmálið er umtalað áður. Heldur ikki 1646 var nøkur klaga um handilin, og løgrættumenninir, sum sýndu handilin, lótu innføra í tingbókina um vørur á goymslu:

«Rug lidet, øl lidet, mjød ingen uden til præsterne, kvindehuer og store jerngryder ingen, stokker fattes, få kjøle (koller?), som er tjenlige, nok åretræer og blev sat for 3 skind stykket.»

Sum vit síggja hava prestarnir havt fyrsta rætt til mjøðin eins og til ølið. Í hesum árunum var loynihandilin nógvur. Sakarmálið móti Guttormi í Gerðum viðvíkjandi loynihandli var frammi tá. Hans Madssøn, sonur gamla fúta, var sorinskrivari og hevur skrivað tingbókina hetta árið eins og árið fyri.

Frá tí Nils Jákupsson, glyvraskrivarin, gjørdist sorinskrivari 1647, er lítið nevnt um handilin í tingbókini. Burtursæð frá dómum sigur tingbókin eisini lítið um aðrar hendingar á landi. Á annan hátt vita vit, at fellisár hevði verið undan 1649, tá føroyingar tessvegna sleppa frá at lata alla seyðaleiguna í skinnum og tálg. Hetta fellisárið kann ikki hava verið 1647, tí tíggjundagjaldið hetta árið vísir tað. Í 1648 hava vit einki tíggjundagjald at vísa á, og vit mega tí rokna við, at fellisárið er fallið tá. Sum dømi um skiftandi áringar hava vit søgnina um Norðuroya-Páls vetur. Eftir søgnini um Páll fanga man hann hava verið 1655. Tá skuldi hann følva bert eina ferð í bakka.

## g. Føroyar sum len.

Jacob Mikkelsøn borgmeistari fekk sum nevnt Føroyar í len 1634, men handilin og rættindi á sjónum, t. d. hvalaveiðurættindi, lógu undir hinum íslendska handilsfelagnum. Vit vita tó einki um, at hetta felagið hevur gjørt nakað burtur úr stórhvalaveiðu við Føroyar.

Lensharrin skuldi fáa kongsins skattavørur avhendar frá fútanum eftir tað, at hann hevði tikið burtur av kongsins útreiðslur í Føroyum, sum eru ávístar undir fútaroknskapinum sum heild. Fútin var tænari kongs og ikki lensharrans. Fyri tær vørur, lensharrin soleiðis fekk, skuldi hann gjalda kongi 37 lübskar skilingar fyri hvønn føroyskan gyllin. Lensharrin mátti sjálvur heinta vørurnar í Føroyum og mátti

[1]) Lb. fol. 279 b.

annars sjálvur um, hvat hann fekk burtur úr teimum. Tó ásettu treytirnar, at fjórðingurin av gjaldinum til kongs skuldi vera í turrum fiski. Í pakka, sum finnst á Oslo kgl. skjalasavni, eru tvær ársuppgerðir frá Jacob Mikkelsøn at finna til kongs, ein frá 1641, sum er 2007½ gl. ½ skinn og ein frá 1642, sum hér skal verða endurgivin:

«Kongl. majestæts leje og landskyld på Færø, som min fuldmægtig, Ivar Pederssøn anno 1642 af Mads Christensøn foged sammesteds haver annammet, beløber sig til færøske gylden 1734 fl. 11 skind.

Af forskrevne 1734 fl. 11 skind betales som efterfølger:

Udi fisk ¼ part, beløber sig til 48½ skippund 5 lispund 11 skålpund, er udi gylden 433½ gl. 2½ skind.

Udi penge ¾ parter, er udi gylden 1300 fl. 18½ skind, hver gylden 4½ mark 2 skilling,[1]) er 1503 slettedaler 3 mark 1 skilling lübsk. Gør de til 96 skilling – 1002½ rigsdaler 1 skilling lübsk.»

Herav síggja vit, at lübskur peningur er roknaður fyri at hava dupult virði av donskum, ella at 1 skilling lübsk = 2 skilling dansk. Hin danska mørkin [markurin] var tá 16 skilingar, og slættadálin var 4 merkur, meðan ríkisdálin var 6 merkur. Ein føroyskur gyllin var settur javnt við 37 lübskar skilingar ella 74 danskar. Jacob Mikkelsøn doyði 1644, og uppgerðir til deyðadag hansara eru gjørdar eftir sama sniði.

Reinhold Hanssøn, borgmeistari í Keypmannahavn, tók aftan á við sum lenshavari av Føroyum undir somu treytum, men eftir hann fekk sjálvt hitt íslendska handilsfelagið Føroyar í len 16. des. 1646 fyri hægri gjald: *7 danskar merkur fyri hvørt føroyskt gyllinsvirði,*[2]) og fjórðingur av gjaldinum var sum vant í fiski. Gjaldið man vera sett ov høgt, tí longu 12. des. 1648 fekk einkjan eftir Reinhold Hanssøn, Birgitta, oyggjarnar í len eftir somu treytum, sum maður hennara hevði havt.[3])

Hetta leigumálið gekk til 27. mars 1651.[3]) Tá fekk Frederik Willumsøn Rosenvinge oyggjarnar í len undir somu korum sum Birgitta – roknað frá 1. apríl sama ár. Í 1652 sæst Frederik Rosenvinge at hava verið í Føroyum, og hevði hann í kvittan at búgva har eina tíð av árinum, eins og hann vildi hava fútan í Føroyum at standa beinleiðis undir sær. Kongsins persónligi skrivari, Christoffer Gabel, fekk tó Føroyar úr hondunum á Frederik Rosenvinge, áðrenn hann fekk gjørt nakað, men tók tó upp aftur nakrar av teim hugsjónum, Rosenvinge hevði sett fram, t. d. viðvíkjandi fútanum. Gabel man tó neyvan nakratíð hava sæð Føroyar. Brævið frá Frederik Willumsøn Rosenvinge 28/1. 1653 vísir okkum tær ætlanir, hann hevði viðvíkjandi Føroyum, og tað skal tí verða endurgivið her:

«Stormægtigste højbårne fyrste, allernådigste herre og konning.

Eders kongl. majestæt haver jeg på det underdanigste at andrage, og først for al kongl. nåde og befordring ydmygeligen og på det allerunderdanigste højligen at betænke, idet mig af Eders kongl. majestæt med Færø nådigst forlenet, som jeg nu udi forleden sommer underdanigst haver besøgt og landsens lejlighed udi nogen måder erfaret, og eftersom jeg befinder udi nogen poster skade og nakdel, haver jeg underdanigst fordristet mig til at gøre ansøgning hos Eders kongl. majestæt derudinden nådigst at måtte remideres:

1. Først at jeg underdanigst måtte forundes en foged eller fuldmægtig, som under min direktion måtte forvalte bestillingen på landet, den, som nu er, eller en anden, om han under min direktion ikke vilde tjene, og det er af efterskrevne årsager, at fogeden til des haver og endnu betager mig myndigheden, idet hertildags fogeden efter sit behag haver fæst gårdene bort der på landet, item sagefald af tinget, landsens landgilde og vare oppebåret såvel som siddet og holdt retten for sig alene uden min nærværelse, hvilke poster jeg næst Guds hjælp til majestætens gavn jeg selv med fogeden vilde have indseende tilbørligen at kunne forrettes.

2. Dernæst at Eders kongl. majestæt nådigst vilde forunde mig samme Færø afgift for 800 rigsdaler årligen, eftersom afgiften nu er meget høj, så at jeg en meget ringe del eller intet til overs kan have til min nødtørftige underholdning, desligeste varen, der falder undertiden med ringe pris, må forhandles så ringe til bekostningen, kan forøvres, thi der går stor omkostning på rejsen, og må alt mesten til husholdningens fornødenhed føre med sig til landet, så vilde jeg på Eders majestæts nådige behag residere en tid lang der på landet og ydermere beflitte mig på landet at bringe udi god velstand, desligeste på Havnen, hvor alle købmandsvarer leveres og annammes, erbjuder jeg mig underdanigst at lade reparere den skanse, som er begyndt på og nu næsten igen forfalden, og holde vedlige til landsens defension, når mig med amunition og nogle få stykker, videre end der nu er måtte undsættes, og haver jeg underdanigst betalt dette års såvel som forleden års afgift efter Eders majestæts nådigste bevilling, formodendes Eders majestæt med afgiften på denne min underdanigste ansøgning på 800 rigsdaler lader mig nådigst njude, som rigtigen årligen skal blive erlagt udi Eders majestæts rentekammer, og mig andet på forskrevne måder at måtte befales således dermed at kunne forholde mig, så den fattige almue sammesteds dermed skal og vel med min forvaltning være tjent og i alle måder fornøjet, som jeg, om anderledes befindendes eller sker, vil underdanigst derfor stande til rette. Forventendes herpå Eders majestæts kongl. milde svar og nådigste befordring og ønsker Eders majestæt stedse under den allerhøjeste trygge beskærmelse og et langvarigt livssaligt kongeligt regimente.

Datum København den 28. januar anno 1653.

Eders kongl. majestæts underdanigste og tro tjener

*Frederik Willumsøn Rosenvinge.*»[1])

[1]) Táið 16 skilingar eru í mørkini (nú kallað ein markur) er enn roknað við 1 gl. = 74 skilingar = 37 skilingar lübsk. [2]) 112 skilingar. Um 2 ár aftaná tykist gyllinsvirði fastlagt í 80 skilingum ella 5 mørkum. Sjá annars N. A. Fær., bls. 59. [3]) N. A. Fær., bls. 59. [4]) N. A. Fær., bls. 60.



[1]) D. D. R. A., D. D. K., B. 86.

Við skrivi 29. mai 1653[1]) fekk Frederik Rosenvinge 600 dálar kastaðar av leigu síni, men annars sæst einki at vera hent, og ríkisstýrið sæst onga aðra avgerð at hava tikið júst tá. Frederik Rosenvinge sendi tó ríkisstýrinum 6. mars 1653 uppskot um nýskipanina av skansanum, sum seinri skal verða ávíst. Føroyar stevndu nú beint móti Gabelstíðini; men fyrst 8. jan. 1655 fekk Frederik Rosenvinge bræv[2]) skrivað í Flensborg frá kongi soljóðandi:

«— Vid Vi nådigst agter til Philippi Jacobi førstkommende at lade gøre forandring med Vort land Færø og det til anden at forpagte, hvormed Vi dig fra samme tid indtil på videre nådigste anordning årligen bevilge 1000 rigsdaler til pension efter det Vores nådigste bevillingsbrev derpå, som Vi dig derhos tilskikker. Derefter du dig kan vide at rette. Befalendes dig Gud.»

Innan Føroyar vórðu tiknar frá Frederik Rosenvinge, fekk hann nakað við tað løgmannsskifti at gera, sum fór fram í Føroyum eftir deyða Jóans Jústinussonar 1654. Tá sæst løgtingið longu á ólavsøku hetta ár at hava sett á Jóan Poulsøn sum komandi løgmann og tí fyribils at hava givið honum løgmannsstarvið, men kongur var tann, sum í longri tíð hevði havt kallsrættin. Í hesum hendingum sæst týðuliga, hvat var í umbúna, og at Gabel hevur staðið aftanfyri avgerðina. Kongur lurtaði her ikki eftir, hvat Frederik Rosenvinge segði. Fyrst vendi Rosenvinge sær til skrivara í Danske kancelli, Erik Krag, í brævi 28. oktbr. 1654:

«Min ganske venlige hilsen forsend med Gud allermægtigste med hosføjede taksigelse for alt godt og æresbevisning, hvilket jeg igen med al taknemmelighed forskylde vil.

Kære hr sekretær, synderlige gode ven og broder! Her haver været tvende dage siden en supplicant af Færø ved navn Christen Hansøn, som underdanigst om lagmandsbestilling efter den afdøde sammesteds hos kongl. majestæt haver erholdt, og på samme hans supplication Hans kongl. majestæts nådigste svar er, at jeg mig derudi skal underdanigst erklære.

Om udvælgelsen med specifiserede lagmand på Færø udi den afdødes sted befindes efter landsloven og sædvanlig brug at være tilgangen, da er herpå min allerunderdanigste erklæring, at så vidt mig vitterligt er, det efter landsloven og sædvanlig skik at være sket, dog på Hans kongl. majestæts ratifikation og nådigste behag, tvivlendes ej, at eftersom landsens indbyggere bemeldte person til lagmand særdeles udvalgt haver, at han nok dertil sufficiant befindes, eftersom landsloven dennem bevilger at må udvælge en indfødt der på landet, dog som bemeldt på Hans kongl. majestæts nådigste behag og ratifikation.

Hvis den unge person belanger, som herom samme bestilling anholder, er dertil ikke udi ringeste måde duelig, haver ingen sted tjent, ej heller lært noget uden det, som usømmeligt er. Han tjente mig for to år siden for en dreng på 6 ugers tid og det ilde. Jeg havde hannem for mig — han var hos mig — og gav hannem en god reprimande, hvorledes han turde understå sig Hans kongl. majestæt med slige vrangfærdige beretninger efter hans supplikations lydelse at lade forebringe.

[1]) N. A. Fær., bls. 60. [2]) D. D. R. A., D. D. K., B. 86, N. R. R., bind 11, hefti 1.



Hvis ellers den udvalgte lagmand, som de på Hans kongl. majestæts nådigste behag der på landet haver udvalgt, befinder jeg hans navn udi jordebogen antegnet og er en af Hans majestæts skattebønder.

Denne min underdanigste erklæring på Hans majestæts nådigste befaling ved jeg ikke andet, som sandfærdig at være. Vil hermed have hannem Gud allernådigste med alt kærthavende befalet.

Frederiksborg, den 28. oktober anno 1654.

Min kære broders beredvillige tjener

*Frederik Rosenvinge.*»[1])

Hvør hesin ungi maðurin er, sum søkir um løgmannsembætið, er ringt at siga. Neyvan man hann hava verið føroyingur. Frederik Rosenvinge gevur honum einki gott ummæli. Rosenvinge vil heldur ikki bróta gamlar reglur, men mælir til at seta tann mannin sum løgmann, ið løgtingið hevur sett á, Jóan Pállsson.

Hin 28. oktober 1654 hevur Frederik Rosenvinge eisini sent Erik Krag, bræv[2]) um tilætlaðu nýskipan av Føroyum:

«Næst al venskabs ønske og villige tjenestes erbjudelse altid tilforn.

Kære hr. sekretær og kære broder! Jeg takker hannem på det tjenstvilligste for seneste gode svar på min skrivelse, mig blev på Kragerup behændiget. Jeg beder gerne, at min broder vilde stedse kontinuere sin gode affektion til mig, hvorimod jeg af yderste formue skal lade mig finde taknemmelig.

Jeg haver hørt, dog kan ikke for vist endnu sige, at fogeden Christen Madssøn af Færø skal være arresteret udi Holland for en stor summa penge, han der sammesteds for nogle år er bleven skyldig og dersom således findes udi sandhed, da skal han næppelig redde sig derfra.

Så vilde jeg derfor have min kære broder ombedet på det tjenstvilligste, om nogen måtte komme, som om forn. fogeds bestilling måtte anholde, at det måtte af min broder blive opholdet, indtil mig derom måtte blive äusseret. Årsagen er dette, at eftersom Hans kongl. majestæt nådigst haver benådiget mig med landet, og indkomsten er ringe, at jeg da kunde beholde fogederiet derhos,[3]) som jeg med min tjener vilde lade forvalte, således som jeg Hans kongl, majestæt vilde ansvare og stå til rette for, om noget klagemål derover ske kunde, thi således at flakke omkring fra en og til et logement og andet kan jeg formedels stor bekostning og vanske ikke gøre, søger derfor allernådigst at måtte være på et sted, som jeg kunde residere, såfremt det andet, som jeg min broder om tilskrevet haver, skulde ikke have sin fremgang. Jeg vil sætte til min kære

[1]) D. D. R. A., D. D. K., B. 86. [2]) D. D. R. A., D. D. K., B. 86. [3]) Frederik Rosenvinge fekk aldri fútastarvið undir seg, men tað fekk Chr. Gabel eftir 8. januar 1655. Baltzer Jacobsøn sæst 1655 at hava verið løgmaður og fúti í Føroyum.

broder altsammen som til min høje ven, hvortil jeg forlader mig, tvivler ej på, at han jo derudi betror mig sit venskab. Jeg skal udi alle måder findes taknemmelig. Vil hermed have hannem Gud den højestes protektion troligen befalet.»

Aftaná er skoytt upp í brævið:

«Fogedens bestilling er intet andet, end han tager landskylden ind efter jordebogen og leverer den igen til min tjener og med lagmanden og sysselmændene sidder lagretten, thi bonden han ved årlig, hvad han giver og kan derudi ikke forfalskes en daler. Det er alene mig derfor at gøre om, så skal jeg der på landet residere for autoriteten.»

Eftir hesum brævi sæst, at Frederik Rosenvinge hevur ætlað at búð í Føroyum og havt fútastarvið undir sær. Vit síggja, at honum leingist eftir at fáa eina avgerð í málinum. Líkt er til eftir hesum brævi, at kongsins fúti, Christen Madssøn, tá hevur verið settur fastur í Hálandi, men vegna fyristandandi nýskipan biður Rosenvinge um, at kongur fyribils setur ongan nýggjan mann í starvið. Fútaroknskapirnir vísa, at 9. septbr. 1651 hevur Bartholomeus Jenssøn staddur í Tórshavn Rosenvinges vegna kvittað fyri móttøkuna av kongsins vørugjaldi í Føroyum, men 19. septbr. 1652 kvittar Baltzer Jacobsøn fyri móttøkuna av hesum sama gjaldi frá fútanum, tá stórt 2293 gl. 6 sk. Henda kvittanin er sum hinar givin í Tórshavn, men Baltzer Jacobsøn er har nevndur sum «Frederik Willumsøn Rosenvinges fuldmægtige i København.»

Ígjøgnum Frederik Rosenvinge hevur Baltzer Jacobsøn soleiðis havt við Føroyar at gera,[1]) og ætlast kann, at hann júst hevur verið í Føroyum á sumri 1654, táið løgtingið setti á Jóan Pállsson sum løgmannsevni. Rosenvinge helt tó fast um, at kongur átti at seta Jóan Pállsson sum Føroya løgmann eftir løgtingsins ynski, og vit síggja tað enn í brævi frá honum 7. jan. 1655:

«Kære hr. sekretær, min tilforladendes gode ven og broder! Hosføjede supplikation efter nådigste befaling haver jeg mit underdanigste svar påtegnet, og er således, at indvånerne der på landet efter gammel sædvane en lagmand udvælger, som er indfødt, hvilken siden på Hans majestæts nådigste behag af majestæten bliver konfirmeret, og denne, som de udvalgt haver, haver betjent sysselmandsbestilling og af menige mænd der på landet på offentlige lagting er blevet udvalgt, så at det ikke uden stor konfusion skal kunne ændres. Jeg for min person gerne havde set, at supplikanten derudi kunde blive forhjulpet; men Gud skulde forbyde at berette majestæten andet, som sandfærdigt monne være. Vil nu og altid have min kære alt kærthavende i vold befalet.»[2])

Dagin eftir, altso 8. jan. 1655, sendi kongur sum nevnt Frederik Willumsøn Rosenvinge bræv, hvarvið hann tók lenið Føroyar frá honum og gav honum sum eftirløn 1000 dálar árliga. Lensbrævið hjá Christoffer Gabel er longu dagssett 6. jan. sama ár.[3])

Hin 10. febr. 1655 varð Baltzer Jacobsøn settur sum Føroya løgmaður uttan løgtingsins viðmæli, og einki er at ivast í, at har hevur verið samanspæl millum hansara og Kristoffur Gabels. Í Føroyum kann Baltzer Jacobsøn ikki hava verið fúti 1654, tí 28 oktbr. hetta ár er Christen Madssøn enn fúti,[1]) og Fr. Rosenvinge biður ríkisstýrið tá bíða við at seta nýggjan fúta. Táið Baltzer Jacobsøn var vorðin løgmaður, sigur komandi tingbók hann at hava verið fúta 1655. Føroya løgmaður kom soleiðis samstundis at vera Gabels fúti, hvat kongligt bræv 23. febr. 1655 til Chr. Gabel vísir:

[1]) Eisini sum fulltrúi hjá Christen Madssøn fúta. Sjá N. A. Fær., bls. 211. [2]) D. D. R. A., D. D. K., B. 86. [3]) N. R. R., bind 11, hefti 1.



«Eftersom Vi dig i nåde din levetid til forpagtning haver forundt vore og kronens visse og uvisse indkomst af Vort land Færø efter det dig derpå forpagtningsbrevs videre indhold, da ere Vi nådelig tilfreds, at du vores foged de på landet til Philippi Jacobi førstkommende må aftakke, eftersom Vi hans tjeneste der ej længer behøver og ej heller nogen afkortning for hans løn ville have udi de penge, som du Os af bemeldte land give skal. Derefter du dig kan vide at rette. Befalende dig Gud. Flensborg den 23. febr. 1655.»[2])

Dagin eftir fekk fútin í Føroyum hesi somu boðini, men navn hansara er ikki nevnt. Helst hevur Christen Madssøn enn tá sitið sum fúti. Brævið er soljóðandi:

«Vores hidindtil værende foged på Vort land Færø haver til førstkommende Philippi Jacobi dag fra sig at levere til Os elskelige Christoffer Gabel, vores kammerskriver eller hans fuldmægtige, hvis jordebøger, inventarier og andet, som han hidindtil på Vore vegne i forvaring haft haver og bør igen fra sig til efterretning der på landet at levere. Ladendes det ingenlunde.

Flensborghus, 24. februar 1655.»[3])

Føroya handil hevði hitt íslendska handilsfelagið enn nøkur ár í hondum, men annars byrjar Gabelstíðin í Føroyum frá hesum ári, og samstundis varð Baltzer Jacobsøn, illi løgmaður kallaður, eisini settur sum Føroya fúti, men hetta starvið hevði hann tó bert eitt ár.

## h. Tórshavn og landsins verja.

Lucas Debes sigur í bók síni um Føroyar 1673, at hin fyrsti, sum bygdi skansa á Stanganesi, nú Skansatangi, við Tórshavn, var Magnus Heinason, og var hesin skansin gjørdur fyri at verja handilin á Tinganesi móti sjórænarum. Lucas Debes tekur nakað soleiðis til í bók síni. Helst man hetta vera søguliga álítandi, og árið, táið skansin varð bygdur, kann við nøkurlunda vissu tí verða sett til 1580, árið eftir sum sjórænarin Klerck rændi vørugoymslurnar á Tinganesi.

Skansin tykist at hava verið fyrsta almenna verjan, Føroyar hava havt, og saman við handlinum á Tinganesi er hann tann kjarnin, sum Tórshavnar býur er runnin av. Hásummarstingið ella ólavsøkutingið man vera tað, sum í fyrndini skapti handilin á Tinganesi. Vit hoyra t. d. í gomlu føroyingasøgu um ein keypmann, Ravn, sum

[1]) D. D. R. A., D. D. K., B. 86. Fúti 1648–1655. [2]) N. R. R., bind 11, hefti 1. [3]) N. R. R., bind 11, hefti 1.

var á hesum tingi, og sum keypti hinar faðirleysu smádreingirnar, Sigmund og Tórir, frá Tróndi í Gøtu og førdi teir við sær til Noregs. Fornsøgan bendir ikki á, at bygd ella býur hevur verið í Tórshavn tá. Tann handil, sum í fyrstuni fór fram uttan um Tinganestingið, hevur ivaleyst verið býtishandil á staðnum, og goymsluhús hjá teim handlandi hava tá verið eingi, men menn hava ivaleyst havt leysar búðir standandi innanvert tað smala sundið, sum tá var millum Tinganeshelluna og landið. Tingið sjálvt stóð á sjálvi helluni.[1])

Helst hava niðursetumenn verið í Tórshavn, innan fyrstu handilshúsini eru bygd *úti í Havn*. Tí er slíkt heiti komið aftur ímóti: *heima í Havn*, sum eftir gomlum málbrúki tykist at hava verið miðskeiðis ella kanska heldur uttarlaga í Gongini. Elsta búseting í Tórshavn skuldi so verið *heima í Havn*. Fyrndargomul er henda búseting tó ikki. Tí eitur tað enn at fara *heim til* Kirkjubøar og *heim til* Velbastaðar. Ætlandi eru fyrstu niðursetumenn í Tórshavn komnir úr Kirkjubø so seint, at øll jørðin niðan frá Tinganesi tá hevur verið kirkjuogn. Leigubúð úti í Havn fyri kirkjugóðsið man tá vera bygd, og handilshús eru skjótt eisini komin. Munkastovan hevur ivaleyst í síni tíð verið leigubúð kirkjunnar.

Táið Tórshavnar søga kemur undan kavi, sæst skjótt, at býurin hevur verið avmarkaður við Bringsnagøtu. Haðan og út á Tinganes kundi býurin liggja. Bringsnagøta var eisini mark eystur um Havnará og Ryggurin fyri eystan. Hetta soleiðis avmarkaða økið er Tórshavnar gamli býur, og tað hoyrir til nýggju søgu býarins, at hann breyt seg út um hetta markið. Eftir siðaskiftið hava bóndagarðar ligið uttanvert Havnina á Húsum; væl kann tað eisini vera, at teir hava ligið har í longri tíð sum uppsitaragarðar ella festigarðar hjá kirkjuni.

Navn sítt Tórshavn hevur býurin fingið eftir gudinum Tór, ið var verndargudur tingstaðanna. Fyrndargamal tingstaður hevur Tinganeshellan á Tinganesi verið, sum teir fyrstu landnámsmenninir óivað hava nýtt. Har avgjørdu teir gomlu lóg og rætt á landi eftir tingsiðum, teir høvdu tikið við sær úr Noreg, helst úr Gulatingslagnum. Ætlandi eru sýslutingini ella vártingini av uppruna nærum líka gomul sum løgtingið ella altingið, sum landnámsmenninir ivaleyst hava nevnt hesa sína landssamkomu á hásumri. Í o. u. 200 ár vóru Føroyar soleiðis eitt lítið rættarsamfelag fyri seg, hvørs miðdepil var tingstaðurin á Tinganesi. Føroyar komu ár 1033 inn undir Noregs kong, men ikki undir Noreg og gjørdust soleiðis norskt krúnland. Tá var landið líka vorðið kristnað, og síðan mega vit rokna við, at føroyskar rættartrætur, sum avgjørdar vóru á løgtingi, kundu fyri at fáa endaliga avgerð verða skotnar inn undir Noregs kong. Frá hesum degi sæst týðuliga, at Ólavur kongur hin heilagi, sum júst tá var deyður á Stiklastøðum, brádliga er vorðin ævigi konungur Føroya, og kirkjan hevur sjálvsagt gjørt sítt til tess. Í fólksins huga gjørdist Ólavur kongur tað, ið Tórur gudur áður hevði verið. Hann gjørdist

[1]) Deyðadømdur maður kundi í gomlum døgum bjarga lívinum við at gera roysni. Um hin dømdi av Tinganeshellini kundi leypa um sundi inn á Sælingahellu, var hann bjargaður. Hann var sælingur.



verndarandi tingsins, og skjótt man tað vera hent, at deyðadagur Ólavs kongs er vorðin samkomudagur løgtingsins. Í 500 ár vóru Føroyar katólskar, og í hesi tíðini komu tær undir norsku landslógina. Úti við siðaskiftismundið hoyra vit hesa lóg nevnda *Sankta Ólavs lóg*, og dansk-norskur kongur heilsar føroyingum tá *við Gudi og Sankta Ólavi kongi* og ikki *við Gud og Okkara náð*, sum vanligt var eftir siðaskiftið.

Løgtingsins samkomudag, sum verið hevði ólavsøkudagur, tykist lutherdómurin at hava viljað broytt soleiðis, at tingið kom saman fyrr á sumri. Tað hevur ivaleyst verið gjørt fyri at fáa føroyingar til at gloyma minnið um Ólav kong hin heilaga. Hin elsta varðveitta løgtingsbókin, ið gongur frá 1615 til 1654, vísir, at løgtingið enn tá ofta kom saman innan ólavsøku. Ólavsøkuna hildu føroyingar tó fast um. Hetta var ársdagurin fyri leigugjaldið, og hevði tað óivað verið soleiðis frá teirri katólsku tíðini. Sum frá leið, gjørdist ólavsøkudagur aftur fastur samkomudagur tingsins.

Hvussu stórur Tórshavnar býur hevur verið áður í tíðini, fæst eitt sindur av hylling á við at hyggja at húsmannsskattunum í Havn, sum førdir eru upp á fútaroknskapin frá árinum 1600. Tá er talið av hesum skattaborgarum í býnum 14. Vanligur húsmannsskattur var 5 skinn. Um hesa tíðina má ein ræðulig farsótt hava gingið í Tórshavn, tí 1601 vóru bert 7 húsmannsskattir í býnum eftir,[1]) men 1602 var ein komin aftrat. Fyri árini 1603—12 eru eingir fútaroknskapir at finna, men tá sæst Tórshavn at hava ment seg aftur, so húsmannsskattirnir í býnum 1613 vóru 18 í tali. Hetta er tað hægsta talið av skattaborgarum, Tórshavn hevði innan 1653. Okkurt ár kom talið niður í 13, men annars lá tað javnliga upp undir 18. Stór farsóttarár kunna ikki hava verið 1613—53. Lucas Debes sigur, at pokurnar gingu í Tórshavn 1651, men hóast tað er talið av húsmannsskattum í býnum bæði 1651 og 1652 17. At pokurnar mega hava gingið í Havn um ólavsøkuna 1651, sæst av tí, at løgtingið hetta árið varð hildið í Kirkjubø.

Tað er illa hugsandi, at fólk, sum tæntu handlinum fast, komu undir húsmannsskatt. Vit síggja tó, at lossimenn, dragarar, hava latið húsmannsskatt; soleiðis eru t. d. bæði Christoffer drager og Isak drager á hesum skattalista. Merkiligt er tað tí, at *Siurd drager*, sum vit eftir løgtingsbókini vita doyði 1619, innan hetta árið ikki sæst at hava latið húsmannsskatt í Tórshavn. Kann vera, at hann hevur verið fastur tænari við handilin. Av hesum skattalista síggja vit eisini, at Jákup Gullsmið hevur verið skattaborgari í Tórshavn árini 1622—28, bæði árini viðroknað. Sum skattaborgari í Tórshavn hvørvur hann, tá hann 1629 gjørdist sorinskrivari. Illa ber til at hugsa sær, at hann

[1]) Norske magasin II, bls. 179, M. M. Raschs optegnelser fra Nordlandene 1581—1639: «Anno 1599 begyndte en heftig pestilentse i Bergen, hvilken stod mere end år og dag, og blev den udspredt omkring Stavanger, Throndhjem og Nordlandene ganske hefteligen, og begyndtes hun om høsten ved Bartholomæi tid, og endedes hun sidst hos Thrundhjem anno 1601 om Philippi Jacobi tid.» (Norske Samlinger II, bls. 495). — M. Hofnagels optegnelser 1596—1676 under året 1600: «Dette år døde af pest i domkirkens og korskirkens sogner [i Bergen] over 3000 personer, på kontoret 164 og i Throndhjem over 1800.» — Ivaleyst er henda smittan við handilsins skipum komin til Føroya.

tá knappliga er fluttur úr býnum at búgva. Bróðir hansara, Hans Pedersøn Morsing, sum var sýslumaður í Streymoy í hvørt fall frá 1615 til o. u. 1625, sæst aldri sum skattaborgari í Havn, uttan so er, at hann er sami maður, sum nevndur er Hans Persøn undir 1600. Eftirfylgjandi skattaborgarar í Havn fyri nøkur ár:

*1600: Jacob Olufsøn byfoged, skatt 1 gl.* Fylgjandi persónar høvdu 5 skinn í skatt: Poul Hjelte, Hans Persøn, David Jonsøn, Jon Olufsøn, Jacob Urne, Jon Dolger, Anders Gilbertsøn, Rasmus Albritsøn, Thiørner Magnussøn, Thorberg, Bige Smed, Jon Sudring og Jacob Schinckell.

*1601:* Hans Bentsøn, David Jonsøn, Jon Olufsøn, Jacob Urne, Anders Gilbertsøn, Thiørner Magnussøn og Jon Sudring. Allir høvdu teir 5 skinn í skatt.

*1602:* Teir somu skattaborgarar sum 1601 + Poul Hjeltesøn.

*1613:* Claus Danielsøn, Gutti Jacobsøn, Jacob Skarv, Oluf Klokker, Jon Sudring, Peder Skriver, Anders Lauritsøn, Christoffer Drager, Anders Gilbertsøn, Peder Hanssøn, Hans Væver, Johannes Pedersøn, Søren Land, Anders Mogensøn, Thomas Simonsøn, Hans Bentsøn, Thiørner Magnussøn og David Jónsøn.

Skattaborgaratalið í Tórshavn, her er endurgivið fyri nøkur ár, tykist at benda á, at innan ár 1600 hevur býurin verið líka stórur sum fram móti miðjuni av 17. øld. Um 1600—1601 er komin ein hervilig umfarasjúka, sum er farin við helminginum av fólkinum í býnum. Innan hesa tíð tykist Tórshavn at hava havt býarfúta. Í tíðarskeiðinum 1603—12 er íbúgvaratalið í Tórshavn vaksið munandi. Vit síggja 1613, at býurin hevur fingið klokkara, samsvarandi við, at fyrsta kirkjan í Tórshavn varð bygd 1609. Hví ein havnarmaður er nevndur skrivari 1613, er ringari at avgera. Sorinskrivari hevur maðurin ikki verið. Ein merkiligur maður, Johannes Pedersøn, hevur búð í Tórshavn í hesi tíðini til 1630. Í 1613 fekk hann 100 gyllin í bót fyri at hava gjørt falskan seðil, og seinri kom hann eisini undir bót fyri líknandi gerð.

Ár 1600 bera tveir menn, Jacob Urne og Jacob Schinckell, nøvn eftir donskum harramannsættum. Ætlandi eru teir leysingasynir av donskum harramonnum, sum seinra part í 16. øld eru komnir ferðandi til Føroya. Jacob Schinckell tykist deyður av umfarasóttini 1601, meðan Jacob Urne seinri kom á festi úti á bygd.

Hini elstu prestahúsini í Tórshavn stóðu eystan fyri Havnará um leið har, sum Steikarhús og húsini í Geil seinri komu at standa. Har búði til dømis fyrsti lutherski presturin í Suðurstreymoy [møguliga hevur Heini Havreki havt kallið nøkur fá ár undan honum], Morten Jespersøn Bronck. Eftir siðaskiftið var sóknarkirkjan í gjaldinum enn í Kirkjubø, og hagar fóru tá fólk úr Havn, av Velbastað, úr Hesti og Koltri framvegis í hina gomlu bispakirkjuna. Tórshavn fekk fyrst sína egnu kirkju 1609. Við skrivi 22. juni hetta ár bað kongur lensmannin á Bjørgvins húsi lata við til nýggjan kirkjubyggning í Tórshavn: «5 tylfter 15 alens bjælker, 4 tylfter sparretømmer, 21 4 alens stolper og 10 tylfter huggen bord.» Kirkjan varð bygd í gamla kirkjugarðinum á Tinganesi heimanvert leigubúðina og Munkastovuna, og er hesin kirkjugarðurin ætlandi gjørdur um somu tíð. Hon var 49 føtur long og 20 breið, og 13 kirkjustólar vóru hvørjumegin. Torn hevði hon á vestara enda, og talva varð hongd upp inni í kirkjuni, sum segði:



«Anno 1609 lodt kong. may. fogdt Strange Madzen borger udi Kiøbenhavn denne kyrcke af ny opbygge.»[1])

Tingbókin sigur frá, hvat ið var av húsum á Tinganesi, tá íslendska handilsfelagið 1620 tók við handlinum har. Gildisskálin var brúktur bæði av løgtingi og fúta, og fútin hevði eisini leigubúðina og Munkastovuna. Um hetta mundið man hitt smala sundið, sum var innan fyri Tinganeshelluna, líðandi vera fylt upp. Táið handilshúsini øktust, og tey skuldu standa uttan fyri leigubúðina, og Tinganesskansin fór í gerð, man hava verið ov trongligt innan fyri sundið. Annars fór ivaleyst stór broyting fram í byggingini á Tinganesi eftir hin stóra eldsbrunan, sum var 1673. Reynagarður, sum enn stendur uppi, tykist bygdur beint eftir 1631, tá Hans Rasmussøn gjørdist sóknarprestur í Suðurstreymoy.

Frá 1625 gjørdist sami harra Hanus hjálparprestur hjá Christen Pedersøn presti í Suðurstreymoy, og longu 1628 fekk hann skúlahús bygd úti á Reyni heimanvert kirkjuna. Føroya látínskúli fekk harvið síni egnu hús, tí áður hevði skúlin verið hildin í prestagarðinum eystan fyri Havnará. Fyrsti fólkaskúlin í Havn kom eisini í lag, meðan Hans Rasmussøn var sóknarprestur, hin danski skúlin nevndur, og fólkaskúlin í Havn í dag er beinleiðis framhald av hesum skúla. Aðra lagnu fekk hin gamli studentaskúlin. Samvirkan var tá millum hesar skúlar.

Sum ávíst lótu havnarmenn kongi skatt, hóast teir onga jørð átti. Hetta var væl mestsum grundskattur, hóast hann nevndist húsmannsskattur. Fyri serligt gjald fingu havnarmenn loyvi at skera torv og grava sær flag í Húsahaga til at tekja hús síni við. Bóndurnir á Húsum í Havn tykjast at hava fingið leiguskyldu sína minkaða av hesi grund.

Í 1617 var fyri á løgtingi, at havnarmonnum mátti verða loyvt móti lítlum árligum gjaldi at grava flag til húsateking í Húsahaga. Til tess svaraði fútin:

«Efterdi disse havnemænd, som bo her i Havnen og give kongl. majestæt årligen skat for deres huse og sig selv, da burde de at have lov til at grave flag til nødttørftighed på deres huse at tække med såvel tørvet til brænde og det for en billig værd.»

Í kennilsi frá 12 løgrættumonnum í sama máli er bert talan um flagskurð, men torvskurðarættindi hava tó helst verið við, ella hava tey verið til staðar áður. Flagið skuldu havnarmenn grava yvir á Ryggi, og hitt árliga gjaldið fyri hvønn varð sett til 1 skinn.[2])

---

1) N. A. Fær., bls. 291—92. 2) Lb. fol. 33 a og b.

Ikki hava hesi hagagrevstrarrættindi hjá havnarmonnum goldið annað enn Húsahaga, tí 1621 síggja vit, at Guttorms-Jóan ella Joen Guttormsøn úr Skálavík, sum tá sat á Kirkjubøgarði, hevði loyvt havnarmonnum at skera torv í haga sínum og varð tessvegna dømdur frá festinum.[1]) Hann man tí í hesum føri hava gingið uttan um fútan. Annars sær tað út til, at alt *serligt* lunnindagjald av kongsjørð í gomlum døgum, t. d. jarðarhvalur, hevur verið kongsins ogn.

Skansaarbeiðið, sum føroyingar hava gjørt síðan 1580, vita vit einki um út yvir tað, sum sæst eftir. Víst er á, at kongur tá skeyt verndarskylduna frá sær í brævi, føroyingar fingu upp á klagurit sítt, so mega vit rokna við, at Magnus Heinason við føroyskari arbeiðskraft hevur bygt allan skansan á fyrsta sinni. Longu hetta arbeiðið má hava økt um fólkatalið í Havn. Hitt stóra og mikið umstrídda skansaarbeiðið hjá havnarmonnum er tó tað, sum fór fram eftir 1630 á Reynunum heimanvert Tinganes. Reynagarður kom líka at liggja innan fyri hetta skansavirki, ið var lagt í ein bug uttan um nesið við einum opningi tætt vestan fyri Reynagarð. Hvør parturin av skansavirkinum skuldi kunna skjóta út á Havnarvág síni megin nesið. Aftrat skuldi hesin skansin verja Tinganes móti álopum frá landi.

Í tolni tykjast føroyingar at vera farnir undir skansaarbeiðið á Tinganesi undir ótta fyri turkunum, men sum frá leið, er fólkið farið at knarra, og serliga havnarmenn nutu ilt av hesum arbeiði. Í 1639 sendi Kristian kongur IV føroyingum bræv um at gjalda serligan verndarskatt,[2]) men táið tað var gjørt frívilligt, sæst einki at vera komið burtur úr tí, og tíðirnar í Føroyum vóru heldur ikki góðar. Harímóti vóru havnarmenn farnir at illskast yvir skansagerðina á Tinganesi, og hetta kom rættuliga til sjóndar í 1645, táið táverandi skrivari, Jacob Willumsøn Hannemand, tók somu støðu. Frá hesum degi er skansin á Tinganesi eitt standandi stríðsevni í føroyskum politikki, hvar bygdarmenn og harvið løgtingið tykjast at vera móti havnarmonnum, sum liðu ilt undir hesi skansagerð. Hetta var enntá ein høvuðsspurningur, sum Lucas Debes førdi fram 1672 í sínum klagumálum um Gabelstíðina. Fyrst eldsbrunin á Tinganesi árið eftir tykist at hava loyst spurningin.

Í Tórshavn er gomul søgn, at táið veraldar endi verður, skulu skotar og írar búgva heilt niðan undir Varða. Søgnin man vera komin fram í eini tíð, táið skotar og írar vóru vanligir gestir í Havn. Vit vita, at slík tíð hevur verið eftir siðaskiftið. Hon hevur verið um allar oyggjarnar, og gamlar sagnir um írar og skotar benda á tað. Skotskan fiskiskap við Føroyar hava vit dømi um 1591 í brævi frá Skotlands kongi Jákupi VI.[3]) Hesin fiskiskapur vit tá kenna, hevur verið regluligur, men sagnirnar benda eisini á meira óregluligan fiskiskap við sjóráni.

Sakarmál frá Tórshavn 1618 um Vendell Mattisdatter vísir, hvussu vanligir skotar hava verið í Havn tá á døgum. Kvinnur brigslaðu

[1]) Lb. fol. 106 b—107 a. Fútin sigur, «at ingen lejlænding må forlove nogen at skære torv i kongl. majestæts hage videre, end loven formelder.» [2]) Lb. fol. 247 a. [3]) Sjá bls. 129.



hvør aðrari at hava við skotar at gera. Aftan á hitt stranga forboðið móti fremmandum fiskiskapi við Føroyar frá 1618, man skotsk vitjan á Havnini hava minkað nakað, og teir fremmandu eru óivað tá komnir meira inn á bygdunum, um teir skuldu hava nakað við land at gera.

Burtursæð frá bóndagørðunum á Húsum var eingin jørð, sum hoyrdi til Havnina. Táið fiskiskapurin sveik, var tað ullin, sum øll føroysk húshald máttu dúga á, men táið havnarmenn onga ull áttu, var fylgjan tann, at nógv fólk úr Havn fóru út um bygdirnar at biðja sær ull, sum tey so gjørdu í hosur og seldu við handilin. Henda vinnan gjørdist rættuliga vanlig í Havn. Hon var eisini kend, men minni hjá fátækum fólki úti á bygd. Meðan havnarfólk tykjast at hava ferðast um alt landið í slíkum ørindum, er líkt til, at fátæk bygdafólk hava hildið seg innan fyri sína egnu sýslu. Av gamlari tíð hevur hitt føroyska eins og hitt norska samfelagið roknað við slíkari mannagongd, tí mótsett í Danmørk fór hitt føroyska tíggjundagjaldið í fýra, og fjórðapartin av tí, fátækratíggjundina, skuldi bóndin hava eftir heima at geva teim fátæku.[1]) Í Danmørk ásetti skipan trýbýtan av tíggjundini, sum øll skuldi avhendast, og føroyskir prestar klaga eisini um hetta føroyska ferbýtið 1632, sum ger tíggjundagjald teirra minni, enn kirkjuskipanin ásetti. Kortini tykist føroyska ferbýtið av tíggjundini at hava hildið sær leingi, burtursæð frá smørtíggjundini.

Hóast ring livikor høvdu fátæk fólk í hesi tíðini lyndi til at støðast í Havn, men øll tiltøk, sum gjørd vóru frá almennari síðu, royndu at forða fyri hesum. Bøndurnir ynsktu sær arbeiðskraft úti á bygd. Tórshavn var eisini einasti handilsstaður í landinum, og gentur av bygd, sum ikki vildu vera arbeiðskonur, royndu at fáa sær innivist í Havn fyri har at kunna hitta fremmandar menn, sum við handilsskipunum komu av havinum. Hetta kemur týðuliga til sjóndar í sakarmálinum, sum fór fram 1645 móti landsskrivaranum, Jacob Willumsøn Hannemand, og sum finnst undir XV, Dráp og serlig brotsmál.[2]) Har kemur eisini fram ullabiðingin og mótstøðan, sum var í Havnini móti Tinganesskansanum.

Undir deildini Sjórán er víst á, at Tinganesskansin varð sýnaður í 1637, men liðugur man hann tó ikki hava verið, tí vit hoyra soleiðis 1645 um, at pliktarbeiði skal verða gjørt á hesum skansa. Enn 24. mai 1647 sigur Kristian kongur IV við føroyingar í brævi um Tinganesskansan, at hann tá var í ringum standi:

«Forbemeldte skanse, som til eders bedste bygt er, med forderligste ganske at fuldfærdige og siden tilbørligen at vedligeholde, hvortil Vi ingenlunde kunne påtvivle, at I eder jo alle godvilligen skal lade bekvemme, eftersom eders egne fæderne lands velstand og forsvar derudi består.»[3])

Hetta føroyska verndartiltakið man hava verið nógv frammi millum

[1]) Alt eftir gomlum norskum kristinrætti, sum Gulatingslógin eisini ásetur (N. g. L. I, bls. 346, 401, 414, II, bls. 310, 353). Sagt er fleiri staðir, at bøndur sjálvir skuldu býta út fátækratíggjundina, eisini nevnd bóndaluturin. Sjá annars N. R. R., bind I, bls. 3, 10, 24, 48, 144 og II, bls. 291. Har síggjast eisini norskir bøndur halda fast við gamla norska lóggávu. [2]) Sjá bls. 38. [3]) N. A. Fær., bls. 258.

mannna bæði fyri og ímóti, táið Frederik Willumsøn Rosenvinge var í Føroyum 1652, tók hann spurningin upp til viðgerðar. Dýrt var tað bæði í tíð og peningi hjá einum so fámentum fólki sum føroyingum at hava eitt slíkt verndartiltak gangandi og í góðum standi. Leiðslan skuldi hava sína føstu løn, men hinar meinigu hermenninar skuldu Føroyar leggja til, og fyri alt hetta kom Tórshavn at svíða harðast. Tí kom skansaspurningurin fyrst í Gabelstíðini at taka sær út sum eitt stríð millum Tórshavn og hin partin av Føroyum, ið hevði løgtingið við sær.

Ætlan sína um útbúgvingina av Havnar skansa legði Frederik Rosenvinge fram í brævi 6. mars 1653,[1]) og er hon soljóðandi:

«Underdanigst betænkende, hvorledes skansen på Færø udi Thorshavn kunde monteres og holdes som efterfølger:

| | | |
|---|---|---|
| 1. Først gøres fornøden tvende underofficerer, som kunde eksersere de unge karle, som deromkring bekvemmest er ved hånden, henved 60 mand til bemeldte officerers pagie, enhver 4 rigsdaler månedlig | 96 | rigsd. |
| 2. For det andet en bøsseskytte månedl. 4 rigsd. | 48 | – |
| 3. For det tredje en balberer, månedlig 4 rigsd. | 48 | – |
| Er udi færøske gylden... | 230 | fl. 2 mark. |

| | | |
|---|---|---|
| Af disse udskrevne 60 soldater skal tvende roder stedse være udi skansen i beredskab, hvor de des bedre dagligen kan være udi stedse exercitia og bedst informeres, som hver 14. dag skal igen afløses. Dennem skal gives til underholdning hver uge tre mark danske, beløber sig årlig til 60 mand | 374 | fl. |
| Tilsammen penge... | 604 | fl. 2 mark. |

Til forskrevne officerers og gemene knægtes underholdning kan kontribueres og gives, som følger:

| | | |
|---|---|---|
| Hans kongl. majestæt vilde for godt anse dertil at bevilge | 100 | fl. |
| Kompagniet | 150 | – |
| Landet er 315 skatter, hver skattebonde 4 mark d. er | 252 | – |
| Syv præster, hver præst 3 fl. er | 21 | – |
| Lagmanden | 5 | – |
| Jeg selv | 100 | – |
| Summa... | 628 | fl. |

Herimod går igen til afkortning, som tilforn af kompagniet haver været udgivet, nemlig en balberers og bøsseskyttes kost og bønderne om balberens os bøsseskyttens løn, som skulde bedrage sig til 120 færøske gylden, hvilke dem igen kommer til gode bemeldte kontriburion, som landet næst Guds hjælp med kan være gavnligt, at skansen des bedre kan monteres og blive udi en sikrere stand, end den hidtil været haver, hvilket jeg så enfoldigt og på det allerunderdanigste Eders kongl. majestæt til underdanig efterretning haver villet tilkendegive.

[1]) D.D.R.A., D.D.K., B. 86.



Actum København, den 6. marts anno 1653.

*Frederik Willumsøn Rosenvinge.»*

Frederik Rosenvinge sigur í 1653, at «Landet er 315 skatter.» Hann skuldi sum lensharri vitað tað. N. Andersen sigur í bók síni *Færøerne*, bls. 36, at eftir uppgerð úr skattaroknskøpum vóru skattakontoirnar í Føroyum: «i året 1614 ialt 483 og i året 1715 ialt 470.» Táið skattakontoirnar hjá Fr. Rosenvinge eru færri, kann tað hugsast at koma av tí, at 315 skattir hjá honum kanska bert merkir av kongsjørð. Eftir Andersen vóru skattakontoirnar av kongsjørð í 1614 tilsamans 321, og í 1715 vóru tær 332. Hetta tykist at hóska betri. Neyvan kann tað hugsast, at pokurnar, sum gingu í Føroyum í 1651, hava gjørt skattakontoirnar færri, í hvørt fall ikki av kongsjørð.

Annað, sum vit bíta merki í, er, at táið Fr. Rosenvinge roknar peningin, sum fæst av hesum 315 skattabóndum, um í gyllin ella føroyskt virði, setur hann 1 gyllin = 5 danskar merkur (mark) ella = 80 danskar skilingar. Her finna vit fyrstu ferð lutfallið 5/6 millum føroyskan gyllin og danskan ríkisdála fastlagt, og hetta lutfallið stóð við, soleingi gyllin varð nýttur sum føroyskt peningavirði. Áður var føroyskur gyllin lagdur fastur í lübskum peningi, 1 gyllin = 37 skilingar lübsk, og av tí at lübskur peningur var dupult so nógv verdur sum danskur, var 1 gyllin = 74 danskar skilingar. Nú er føroyskur gyllin komin upp í 80 danskar skilingar,[1]) og hin lübski peningurin er samstundis horvin sum hansara metingarvirði.

[1]) Fútin Christen Madssøn, settur 1648, sæst eisini at rokna sína fútaløn í ríkisdálum, hvør = 96 skilingar, umsetta í gyllum, hvør = 80 skilingar.

# DEILD VI

*Ymist um føroyska jørð.*

## a. Jarðarspurningar á tingi.

Teir jarðarspurningar, sum koma fyri á tingi undir teirri fyrstu løgtingsbókini, geva okkum lítla greiðu á føroyskum jarðarbýti í hesi tíðini. Vit fáa mestsum fatan av, at tann ógreiða, sum seinri hevur verið í føroyskari jørð, eisini hevur verið til staðar í teirri tíðini. Kortini skal eitt sindur verða greitt frá tí jarðarstríði, sum frammi var tá. Táið hagapartur fyrst í 17. øld ikki var einbýttur, var allur seyðurin kenning. Í hesi tíðini hevur lutfallið av kenningaáseyðinum hjá manni í øllum hagapartinum verið tað sama sum lutfallið av hansara óðal í sama hagaparti, men hetta er so seinri vorðið til lutfallið av ogn hansara í innangarðsjørðini undir sama hagaparti. Bøur og hagi eru við øðrum orðum komin at hoyra mestsum fast saman seinri helvt av 17. øld. Ógvuliga ivasamt er tað, um tað hevur verið soleiðis av fyrndartíðum: at bøur og hagi hava verið fast samanhoyrandi. Hagaleysir gyllin og enntá hagaleysar merkur í gomlum bøi hava verið og eru í Føroyum enn, men ilt er nú gjølla at siga, hvussu alt hetta av fyrstu tíð er komið soleiðis fyri. Slíkir hagaleysir gyllin eru tó ávikavist fáir, og ofta er tað soleiðis, at teir hava ikki kunnað gingið inn í ein felagsbýttan haga, uttan at gera felagsbýtið tvørligt. Av seyðabrævinum frá 1298 síggja vit, at menn longu tá hava roynt at koma yvirskipan frá einstøkum monnum í høgunum til lívs, somuleiðis otan um mark. Spurningar um slíkt koma tó framvegis fyri á tingi í hesi tíðini.

Í 1615 er klandur millum tveir menn, Søren Jørgensen og Agmund Nielssøn, «om fæ og åskipen», og tingbókin sigur hetta klandrið hava verið síðan 1613. Um «fæ» her merkir neyt, hava teir klandrast bæði um neytahald og seyð, altso skipan í haga. Semja varð tá gjørd á tingi við teim treytum, at hvør teirra skuldi lata Argja hospital fáa 3 gyllin í peningi, og tann teirra, sum aftur brigslaði hinum trætuna, skuldi gjalda kongi 3 merkur í silvuri. Einki stendur um, hvar menninir búðu.

Sama ár stendur um «den klammer og trætte, som nu på ny er begyndt imellem Magnus Ellendsøn udi Skuø og Olof Simonsøn imod den forrige deres forpligt, som var gjort på lagtinget anno 1610.» Seinri gongur hetta stríðið aftur og hevur ivaleyst verið um áseyð. Eisini her varð semja gjørd um, at hvør teirra skuldi gjalda Argja hospitali eina tunni av mjøli ella 3 gyllin í peningi, sum tá



var prísurin á byggmjøli. Um bjargarættindini í Tjørnuvík sigur tingbókin sama ár:

«Blev så påsagt og samtykt inde på lagtinget udi Eidesmænds og Tjørnevigsmænds nærværelse, at husmænd eller husboene (husbirne?) skal ikke fare udi fuglebjerget udi Tjørnevig uden de, som sidder for fuld leje og skulle sige hverandre lovligen til, når de ville fare. Hvem, som herimod gør, skal bøde 4 mark sølv.

Sammeledes er påsagt om feitelendet, som er Stakken, den skal Jacob i Tjørnevig selv nyde og beholde indtil videre beskeden.»[1]

Hesin Jákup í Tjørnuvík var giftur við Herborg, dóttur av Jóan Heinasyni løgmanni. Avgerðin um Stakkin í Tjørnuvík bendir á, at Jákup hevur havt ein máttmiklan verfaðir. At grasningurin í Stakkinum var Jákups, skuldi standa við. At Eiðismenn verða kallaðir til staðar undir avgerðini um fuglabjørgini í Tjørnuvík, tykist at bera í sær, at teir hava notið rættindi har, ella kanska hava teir bert verið vitni.

Dømi um, hvat óðalsrætturin í gamlari norskari lóggávu kundi føra við sær, hava vit í kravi úr Sunnbø, sum kom á ting 1615. «Niclas Bodilsøn og hans medarvinger» siga seg vera óðalsbornar til nakra jørð í Svínoy, men av tí tingmenn hildu ikki fult prógv vera fyri tí, «må jorden blive inde hos dennem, som hun været haver, indtil anden og bedre beskeden derom kan fremkomme.»[2]

Í 1616 komu skúvoyingarnir aftur á ting við sama jarðarstríði, sum árið fyri, og aftur bóðu fólk um at fáa teir samdar. Eina ferð enn máttu teir lata eina mjøltunnu ella 3 gyllin hvør til hospitalið á Argjum.

Sama ár er eisini marknatræta fyri úr Oyndarfirði millum [Oluff?] Rollufsøn og Augustinus [Olufsøn?]. Hin fyrri klagar hin seinra fyri at hava flutt mark, men prógva kundi hann einki, og menn løgdu seg tá ímillum fyri at fáa semju. Rollufsøn mátti tá viðganga, at sinni hansara var lopið av við honum.

Undir hesum ári stendur eisini innførd í tingbókina fylgjandi arvasak: Hildibrandur Sjúrðarson (Hildebrand Siurdeson) hevur givið keypmanni í Sveinsgarði við Bryggjuna í Bjørgvin eina mørk í jørð í Nólsoy í veð fyri lán. Skuldin verður nevnd garpaskuld, hvat ið vísir, at keypmaðurin var týskur hanseatur. Magnus Heinason, sum saman við øðrum hevði Føroya handil í len 1579—83, hevði sagt seg at hava loyst hesa mørk út aftur við at keypa skuldarbrævið frá keypmanninum í Bjørgvin, og eftir deyða Magnusar 18. jan. 1589) hevði Norðoya prestur, Hans Jørgensøn, sum var giftur við dóttur av Jóan Heinasyni løgmanni, tikið móti leiguni av hesi mørkini í Nólsoy.

Í 1616 stevnir so Jákup Jóansson fyri konu sína, Onnu Hildibrandsdóttir, Norðoya presti, Hans Jørgensøn, eftir hesi mørk — til innloysingar — við tað hann segði, at mørkin enn stóð ógoldin í bókunum hjá keypmanninum í Bjørgvin. Tingbókin sigur tá: «Svarede hr. Hans, at han ikke andet derom vidste end som salig Magnus Heinesøns købe- og pantebreve, som var hidført i landet af salig Søren Islænder anno 15.., derom formelder.» Hesin sami Søren Islænder var keypmaður í Føroyum 1592 og 1595—96 og fúti 1598—99.[3]

Líkt tykist at vera til, at hesi keyps- og ognarskjøl, sum Søren íslendingur hevði havt við sær til Føroya, ikki vóru at finna meira,

---

1) Lb. fol. 10a—11a. 2) Lb. fol. 12b. 3) Lb. fol. 17a—18a.

tí presturin segði seg leysan við jørðina á tingi og bað Jákup hava hana, men Jákup helt fram, at presturin mátti innloysa jørðina, tí hann í mong ár hevði notið av henni leiguna, sum tilsamans var meira enn innloysingin. Á henda hátt er málið innført uttan dóm, og Jákup biður um at fáa hetta skrivligt. Eftir hesum ætlar N. Andersen í bók síni *Færøerne*, at Magnus Heinason aldri hevur keypt jørðina, men um so ikki var, hvussu kundi keyps- og skuldarbrøvini tá verða flutt heim til Føroya? Jørðin kundi líka so væl verið innloyst og aldri strikað úr bókunum hjá keypmanninum í Bjørgvin. Eftir norsku løgbókini frá 1604 galt innloysingarrætturin fyri jørð hjá hvørjum manni og hansara arvingum í 30 ár, og skilað verður til undir hesum máli, at 30—40 ár vóru gingin, síðan veðsetingin varð gjørd.

Av líknandi slagi kom fram sama ár annað stríð um jørð. Eirikur Augustinusson stevndi Líggjasi Tormóðssyni (Elias Thormodsøn) um nakra uppgávujørð, sum Høgni Rytter hevði givið seg upp við til Auden Andersøn próst og prest í Eysturoy. Tingbókin sigur:

«Svarede forn. Elias Thormodsøn på sine egne og salige hr. Audens arvingers vegne og satte i rette, om samme jord nu skulde løses igen, efterdi samme mand havde lovligen opbudt sig til sine næste frænder ...., og dertil med haver ligget under salig hr. Auden og hans arvinger henved 40 år åkæreløs.»[1])

Av málinum sæst, at Høgni Rytter doyði hálvt ár, eftir at harra Eyðun tók sær av honum. Hesin Høgni man helst á ein ella annan hátt hava verið skyldur við Mads Rytter, ið átti nógva jørð í Føroyum, jørð, sum hann hevði fingið eftir Nils Helgason skipara, ið um ár 1600 var ráðmaður í Bjørgvin. Nils Helgason var jú føroyingur og hevði á sinni óivað havt nakran felagsskap um Føroya handil við Magnus Heinason. Mads Rytter búði ikki í Føroyum. Tí skuldi keypmaðurin ansa eftir jørð hansara eins og eftir jørðini hjá Rosenkrandsunum og Benckestockunum. Vit síggja, at Eirikur Augustinusson kravdi arvarætt til jørðina eftir Høgni Rytter. Annaðhvørt hann ella kona hansara mega tí hava verið nær skyld við Høgna. Av navninum er lítið hugsandi, at Høgni Rytter hevur verið føroyingur. Helst hevur hann verið norðmaður, ættaður úr Bjørgvin. Hetta bendir alt á samgiftur millum fólk úr Bjørgvin og føroyingar innan árið 1600. Seinri eru eisini dømi um slíkt, t. d. við giftarmálinum millum Mikkjal í Lamba og Magdalenu, og í 1618 síggja vit, at Dánjal Nigilsson sýslumaður í Vágum hevði havt ein son, Mortan, giftan í Bjørgvin við Femme Bærentsdatter. Hann var deyður, og hon kom tað árið til Føroya fyri at fáa arvasemju í lag við verfaðirin.[2])

Um skyldskap longur aftur í tíðini sigur løgtingsbókin, at Peder Jacobsøn løgmaður hevði næstringar í Bjørgvin, tí undir 1616 stendur, at synir hansara, Sakaris og Jákup søkja um arv haðani eftir Magdalenu Sørinsdóttur. Arvurin var teimum tildømdur við løgmannsdómi í Bjørgvin, og nú galt bert um at fáa fatur í honum. Sakaris Tormóðsson, táverandi løgmaður, og Gabriel Mitens tingskrivari siga, at teir báðir undir eiði høvdu vitnað á løgtingi í Tórshavn,[3]) at hesin skyldskapur var til staðar:

[1]) Lb. fol. 18b. [2]) Lb. fol. 57a og b. [3]) Lb. fol. 16a og b.



«Thi vi haver været hos og hørt på, at forn. Magdalena Sørensdatter og deres afgangne salige fader ved navn Peder Jacobsøn, på den tid lagmand her udi Færø, var til sammen udi Bergen udi forn. Magdalene Sørensdatters hus udi begge deres velmagt og da udi vor nærværelse opregnede deres slægt og byrd, som vores vidnesbyrd vidtløftig derom formelder.» Teir høvdu altso skrivliga greitt frá tí.

Í 1615 hevur tingbókin eitt dømi um, at ein Nólsoyingur, Jóan Pætursson, hevur verið giftur í Keypmannahavn við kvinnuni Elsebe Pedersdatter.[1]) Eins og Mortan Dánjalsson var hesin maðurin deyður, og arvurin eftir hann verður skipaður sum eftir Mortani, við at einkjan fekk alt, sum var í búnum, ímóti, at hon læt kravið falla um at fáa arv úr Føroyum. Alt hetta kann geva okkum eitt lítið dømi um ferðasambandið í teirri tíðini; tað var heilt broytt í 1620 til at ganga beinleiðis til Keypmannahavnar.

Frammanfyri nevndi Líggjas Tormóðsson man gjøgnum konu sína vera vorðin arvingur eftir hr. Eyðun. Táið hetta mál var fyri á tingi, var Elias Thormodsøn festari í Oyndarfirði. Áður hevði hann sitið við festi í Hattarvík í Fugloy, men Jóan Jústinusson hevði fingið hesa festijørð aftrat sínum garði, og í 1614 fekk tá Líggjas garðin í Oyndarfirði frá Jóani. Hvussu kona Líggjasar og kona Jóans tá hava verið skyld, skal seinri verða greitt frá. Líkt er til, at hesin Líggjas Tormóðsson hevur verið bróðir við táverandi løgmann Sakaris Tormóðsson. Líggjas Tormóðsson, sum enntá hevði havt tvey smærri festi í Hattarvík, hevur møguliga ongantíð búð har, men sitið á óðalsjørð í Eysturoy.

Marknatræta í Oyndarfirði kom aftur fyri á tingi. Hon er innførd í tingbókina undir 1618, men sjálvt skjalið um sýningina var tíðarfest í Oyndarfirði 1618.[2]) Undir tingviðgerðini var fútin burturstaddur, og tingið slapp sær fyribils frá málinum við at útseta avgerðina, til fútin kom aftur. Henda avgerðin sæst ongatíð at verða tikin, men vitnisførslan vísir, at stríðið stóð um innangarðsjørð:

«Der, som de tre teige strækker sig op i kongens bø, som Elias Thormodsøn nu lejer af kongl. majestæt, derpå haver forn. Rollof Joensøn [sonurin æt Oluf Rollofsøn] væltet 4 favne i længden mere end, som det sig burde og af gammel tid været haver og op i kongens bø. Dette forn. bekendte Gutte Andersøn [tá bóndi við Hús í Syðrugøtu] og Antonius Joensøn, at dette var sket siden den tid, at forn. Gutte boede i Andefjord.»

Báðar Dímunar verða nevndar undir árunum 1617—18. Sandoyar prestur, Jens Jenssøn Skive, hevði stóru Dímun í festi. Hann klagar á tingi um:

«hvorledes den gård og ø store Dimon, som han af kongl. majestæt haver udi leje, formedels vand- og fjeldskrider var fordærvet på den bedste og fornemste herlighed eller gavnligste plads, som han havde til gården både til fuglebjerg og anden nødvendig brug til gårdens hehov, så at den halve part af gårdens nytte og brug, som de fattige folk, som på øen bo, skulle sig af nære, er bortløben.»[3])

Stór berglop tykjast at hava verið á oynni, eins og fjallskriður óivað hava verið eystantil á henni, tí líðin har tykist at vera gamalt

[1]) Lb. fol. 12b—13a. [2]) Lb. fol. 49b—50b. [3]) Lb. fol. 24b.

vatnskriðulendi. Fýra løgrættumenn høvdu verið á oynni og sýnað skaðan: Isak Ismaelsøn [skúvoyingur], Jørgen Throndesøn [skálvíkingur], Hans udi Trødegård og Simon Thomassøn [heimasands menn], og vit hoyra teirra metan:

«Hertil svarede forn. mænd, at det så udi sandhed findes som før er meldt, men hvad kongl. majestæts inventarium, som på gården står med nød og søud, det står endnu ved sin fulde magt.»

Betri innlit fáa vit í viðurskiftini, táið vit eisini taka fram tingmálið um lítlu Dímun. Holdan Gudloksøn, sýslumaður í Suðuroy, og Peder Poulsøn, báðir úr Hvalbø, søgdu leigumálið av lítlu Dímun frá sær:

«for den årsag, at de nu ikke kunde komme den tunge leje og landskyld af sted, som går af samme ø, thi man tidt og ofte ikke kan komme til øen om høsten at søge den fattige del, man der haver, for storm og uveders skyld, som år efter år forværrer sig.»[1])

Oyggin var tá útboðin til leigu á tingi, men eingin tykist at hava tikið við, og 4. august árið eftir komu somu menn fram á ting og søgdu, at um teir kundu fáa avsláttur í leiguni, kundu teir hugsa sær at hava leigumálið gangandi. Tingbókin sigur herum:

«Da haver Strange Madssøn på kongl. majestæts nådige behag afsat 4 gylden udi lejen, så at herefter skal gå 10 gylden årligen til leje, dog med sådant forord, at dersom Hans majestæt det ikke så nådigst vil bevilge, da skulde de give 24 gylden udi leje som tilforn.»

Undir slíkum treytum kom leigumálið aftur í lag, fyri, sum fútin segði, «at samme ø ikke skulde stande øde.»

Frammanfyri standandi bendir alt á, at veðurlagið hesi árini hevur verið út av lagi ringt við stormi og vatnflóð, kanska eina mest um heystið. — Um heystið 1618 var tað, at Trølla-Símun í Kirkjubø hvarv á ferð síni út í Trøllhøvda eftir einum fremmandum oksa.

Um peningavirði á jørð í teirri tíðini tykist eitt lítið tingmál frá 1617 at tala:

«Den jord, som kom ind i hospitalet med Peder Olofsøn, skal hans broder, Siorder Olofsøn Murt, indløse igen med sine egne pendinge, som er en halv mark jord for 8 gylden, som han nu haver betalt til hospitalet anno 1617.»[2])

Peder Olofsøn var vegna spitalsku sjúku komin á hospitalið á Argjum við hálvmørk í jørð, men eftir óðalsrættinum hevði næsti ættarmaður rætt til at innloysa jørðina í peningi. Sjúrður Ólavsson innloysti tá hálvmørkina, sum jú er 8 gyllin í jørð, við 8 gyllin í peningi. Her gekk so gyllinsvirðið í peningi og jørð javnt upp.[3])

Í tingbókini stendur hetta mál innført beint eftir drápið av arbeiðskonuni á Lambagarði.[4])

Hóast jarðarspurningar í tingbókini ofta bert eru stríð um innloysing av jørð, kunna teir stundum siga okkum nakað um skyldskap og benda longur aftur í tíðina. Eitt tilíkt mál frá 1617 vísir heilt aftur í teirri katólsku tíðina. Antonius Hendriksøn (Selatrað) og Laurids Ellendsøn (Skála) høvdu stevnt Sylvester Simonsøn (í Vágum) eftir eina mørk av jørð á Heyggi á Strondum. Sylvester var

1) Lb. fol. 25 a. 2) Lb. fol. 29 b. 3) Innloysingin kann kanska bert hava verið fyri innangarðsjørð. 4) Sjá undir I, Dráp og serlig brotsmál, bls. 26.



tvær ella tríggjar ferðir stevndur og ikki møttur, og hann átti at prógva, at «Filippus var sira Joens frilledatters søn» (Filippus Gregersøn á Túali í Mykinesi).[1])

Bókført segðist tá at vera í gomlu tingbók, at «Justinus Joensøn af Fuglø og Joen Guttormsøn, greven udi Kollefjord, høvdu vitnað á tingi 15.. (líkt er til, at hetta er ártalið 1557, sum seinri er nevnt í skjalinum), at sira Joen og Gunnar vóru sambrøður og býttu arv soleiðis sína millum, at sira Joen fekk sína jørð í Suðuroy og Gunnar sína norðanfjørðs á Heygum. Jóan Guttormsson, greivin í Kollafirði, klagaði eisini um 6 merkur av jørð, sum Filippus í Mykinesi sat við frá honum, men sum faðir Jóans tó hevði innloyst. Antonis og Lavar (Laurids) fingu tá jørðina, teir kravdu, til Sylvester kundi prógva sín óðalsrættt.

Um Jústinus Jóansson í Fugloy var tingførur maður 1557, var hann hetta 97 ár innan sonur hansara, Jóan Jústinusson løgmaður, doyði. Jóan man tí helst hava verið sonur av eini seinri giftu, men av sambrøðrum man hann hava verið elstur. Jústinus Jóansson hvørvur sum festari í árunum 1603—1613, og tá man hann ætlandi vera deyður av elli. Illa kunna vit seta hann føddan seinri enn 1530, og aldursmunurin millum faðir og son kemur tá at vera um 50 ár. Sira Jóan má ætlast at hava verið prestur í Suðuroy um ár 1500, og hann hevur havt frillu eins og teir katótsku prestarnir á Íslandi. Nógva óðalsjørð síggja vit hava verið til staðar í hesi ætt.

Í søluskjali 1618 verður nevnt, at Simon Joensøn í Haldórsvík hevði selt «Nicolas grevens søn i Kollefjord» hálvmørk av jørð í Kvívík av sínum móðurarvi. Jóan Guttormsson, greivin í Kollafirði, er, tá bóndabókin byrjar 1584, festari á 4 mørkum á Heyggi í Kollafirði, men týðuligt er, at hann áður hevur haft allan Sjóargarð eisini. Í 1584 situr sonur hansara, Niels Joensøn, á Sjóargarði, men bóndabókin sigur, at frá 1600 til 1603 sat Niels Joensøn Greffue á Sjóargarði og frá 1613 til 1625 Niels Gregersøn (Greffuensen). Um somu tíð sum síðstnevndi maður sat á Sjóargarði, er maðurin á Heyggsgarði nevndur Niels Greffuensen.

Her tykist at vera hend ein miskiljan av nøvnunum vegna gamlan skrivingarhátt. Ísakur Guttormsøn, verður í gomlum skjali nevndur Isak lagmandsøn, tí hann var sonur av Guttormi løgmanni. Tí verður sonur greivans í Kollafirði eisini nevndur «grevens søn». Niels Joensøn gjørdist veruliga greivin í Kollafirði, tá hann tók við Sjóargarði eftir faðir sín, men so leingi hin gamli livdi, hevur hann verið kallaður greivasonurin. Ár 1600 er hin gamli deyður, og tá hevur sonurin fingið navnið greivin eftir hann. Eftir hesum skuldi Niels Joensøn Greffue verið sami maðurin. Eftirmaðurin, Niels Gregersen (Greffuensen), hevur óivað verið nevndur greivasonurin Nils, *Niels grevens søn*, og tað man vera hesin maðurin, sum undir navninum *Nicolas grevens søn i Kollefjord* keypir hálvmørkina í Kvívík. Hann man ikki hava itið Niels Gregersøn (Grevens søn), men Niels Nielssøn, grevens søn (Niels og Nicolas er sama navnið).

At tað mangan er farið óreglurætt fram við jørð, sæst av dómi 1620, sum stutt ljóðar soleiðis:

1) Lb. fol. 30 b—31 a.

«Olof Jespersøn i Gåsedal, for han tog sig nogen hagepart til uden lov og dom, skal derfor bøde til kongl. majestæt 3 gylden.»[1])

Hvat kann tá ikki vera hent í jarðarspurningum eftir serliga ringar landfarsóttir?

Í 1622 vóru Peder Poulsøn og Holdan Gudlaksøn komnir til afturs við leiguni av Lítlu Dímun og vóru dømdir at gjalda skuldina, og í 1630 hava teir fingið hr. Poul Rasmussøn við sær í leigumálið.[2])

Undir 1622 eru fleiri smáar innføringar um jarðarstríð, og av tí tær siga nakað um skyldskap og geva lýsing av monnum, skulu tær verða endurgivnar her.

Pætur Gunnarsson í Sunnbø spurdi Niels Andrasson í Leirvík um átta gyllin, hann hevði lænt honum at innloysa jørð við, og Nils Andrasson takkaði fyri veittan stuðul. Av jarðarmáli 1619 síggja vit, at Pætur hevur havt bróðir, Guttorm Gunnarsson, sum tá var deyður, men hevði átt nógva jørð.[3]) Pætur Gunnarsson er nevndur í bóndabókini sum bóndi við Kvíggjá í Sunnbø 1584—1642. Søguliga tykist Snoppriks-søgnin at vera eldri enn hesin Pætur, men líkt er tó til, at hann er komin inn í søgnina undir navninum Vísi-Pætur. Annars skuldi tað verið abbi hansara við sama fornavni. Hesin Pætur Gunnarsson við Kvíggjá var abbi at gandakellingini Barbaru við Kvíggjá, sum gitin er í søgnini um Guttorm í Múla.[4])

Klandrið millum skúvoyingarnar frá 1615—16 kyknar upp aftur 1622. Í staðin fyri Olof Simonsøn er nú sonur hansara, Rasmus Olesøn, á øðrum tátti. Semja kom aftur í lag, og um hon nú var brotin, skuldi hvør teirra geva Argja hospitali 2 mjøltunnur og kongi 1 mørk í silvuri.

Nevnt er hetta árið langt stríð, sum verið hevði millum Kollafjarðar bøndur: Joen Reineckesøn á Kjalnesi og tveir bøndur í Homrum, Peder Thomassøn og Ole (Oluf) Joensøn. Avgjørt varð, at tann, sum atvold hevði verið í hesi ósemju skuldi missa festi sítt. Sum festari hvørvur Ólavur í 1625, og í hansara stað kom eftir bóndabókini Malena (Madelline) Lydersdatter. Navnið Lýðar var sjáldsamt í Føroyum, og henda kvinnan tykist eftir øllum at døma at hava verið einkjan eftir Trølla-Símun í Kirkjubø, Magdalena Lydersdatter. Faðir hennara, Lyder Augustinussøn, var tá enn bóndi í Hoyvík. Hann var komin til Føroya longu í 1583 sum keypssveinur við kongl. handilin. Meðan Guttorms-Jóan hevði Kirkjubøgarð 1619—24, vita vit, at einkjan eftir Trølla-Símun, Magdalena, búði á garðinum. Simon Thomassøn undan Hagabrekku í Skálavík festi Kirkjubøgarð 1624, og tað er tá væl hugsandi, at festið í Homrum aftaná hevur verið givið Magdalenu sum hald.

Aftur finna vit Pætur Gunnarsson í Sunnbø fyri rættinum klagandi Mikkjal í Lamba um eina hálvmørk á Skála, sum Pætur helt seg eiga, men sum Mikkjal hevði notið. Legði tá Suðuroyar sýslumaður, Holdan Gudloksøn, fram í rættinum arvabók, sum vísti, at hálvmørkin var Pæturs óðal. Mikkjal segði seg fyrst tá at hava fingið skil á hesum spurningi og viðgekk kravið.

Eisini kravdi Pætur Gunnarsson frá Mikkjali í Lamba aðra hálvmørk á Skála, sum stóð til at skula verða loyst inn fyri *átta gyllin.* Gyllin í jørð og gyllin í peningi hava altso her verið mett javnt. Fyri hina fyrru hálvmørkina kravdi Pætur 4 gyllin í ógoldnari leigu, og hinar 4 gyllinar skuldi Mikkjal fáa í góðari vøru frá Danjali (ótýðuligt) í Vágum, helst Danjal Nigilsson sýslumaður. Jørðin var tá aftur frí sum ogn Pæturs. — Vit síggja soleiðis, at Pætur við Kvíggjá hevur átt nógva jørð norðanfjørðs. Hetta her nevnda kann ikki vera alt. Í ætt hansara hava verið nøvnini Gunnar og Guttormur. Eftir vitnum á tingi 1557 fekk Gunnar Jóansson arv sín fyri norðan. Guttorms-navnið var gamalt í Húsavík, og til Føroya kom tað eisini við Anders Guttormsøn løgmanni.

Laðangarðsbóndin, Jenis Símunarson í Sunnbø, bróðir Trølla-Símunar, krevur innloysing frá Mikkjali í Lamba av jørð í Húsavík, sum hann helt seg vera bornan til; men tingbókin sigur:

«Så efterdi det befandtes, at forn. jord haver ligget under Michel Joensøns forfædre udi fem langfædres tid upåkraft og upåkæret, da blev de breve, som de derpå havde såvel som jorden dømt efter loven at være under forn. Joen Heinesøns arvinger, også brevene at stå ved deres fulde magt til evig tid.»

Vit síggja herav, at laðangarðsfólkið eins og Mikkjal í Lamba hevur havt ættfedrar úr Húsavík, sum tykjast at vera komnir av seinri ættarliðum.

Gyðja Jóansdóttir, dóttir av Jóani Heinasyni, var gift í Elduvík við Jóani Pállssyni. Synir teirra, Jákup Jóansson og Reinholt, klandraðust við systir sína, Ragnhild, um hálvmørk í jørð. Fýra løgrættumenn talaðu tey til rættis, so at systirin fekk hálvmørkina. Jákup Jóansson lá eisini í ósemju við bróðir sín, Páll, sum gramdi seg illa um bróðurin. Tingið fekk tó semju í lag teirra millum við teim treytum, at tann parturin, sum breyt hana, skuldi missa festið.

Aftaná stendur stutt:

«Agata Audensdatter skal betales 25 gylden af Johannes Pedersøn for et hus, der blev opbrændt for hende her i Havnen.»

Ikki kann verða sagt við nøkurlunda vissu, hvør hesin Johannes Pedersøn var. Hetta er ivaleyst maðurin, sum dømdur var tvær reisur fyri at hava skrivað falskan seðil. Hann man hava búð í húsum, sum Ata átti í Havn. Henda Ata (Agate Eidensdatter) fekk í 1626 átta merkur av festinum á Heygum á Viðareiði eftir Zacharias Pedersøn, son Peder Jacobsøns løgmanns, og hevur hon eftir øllum at døma verið gift við honum, tí festarin eftir hana æt Christen Zachariassøn. Annar bróðurin, Johannes Zachariassøn, tók við øðrum festi, við Garð á Viðareiði, táið faðirin doyði 1623—24. Nevnda Ata var dóttir av Eysturoyar presti og prósti, Auden (Eiden) Andersøn, og soleiðis bróðurdóttir av Guttormi løgmanni. Óivað hevur hon arvað húsini í Havn eftir faðir sín.

Sama ár er fyri rættinum stríð hjá Mikkjali í Lamba um festi á Eiði við Jóan Pállson. Rættur Mikkjals varð undirkendur. Í stríði millum Jóan Pállsson á Eiði og Laurits Hanssøn keypmann missir Jóan beint aftaná festið, ætlandi fyri loynihandil. Somuleiðis fekk Laurits Hanssøn ein annan eiðismann, Jóan Háldansson, dømdan frá festi. Eisini móti Sakarisi Tormóðssyni løgmanni reisti Laurits Hans-

[1]) Lb. fol. 101 a. [2]) Lb. fol. 125 b, Fær. kongsb. bls. 243. Harra Poul fór hetta árið frá sum prestur. [3]) Lb. fol. 78 b. [4]) Fær. kongsb. bls. 279.

søn sakarmál viðvíkjandi junkarajørð á Eiði, sum Guttormur Nilsson (seinri Norðoya sýslumaður) hevði vunnið sær 100 gyllin í pengi av sum millummaður. Løgmaður gekk tó fríur.[1])
Jarðargrískur maður sæst Mikkjal í Lamba at hava verið. Hin harðligi keypmaðurin, Laurits Hanssøn, sæst eisini at hava verið úti eftir føroyskari jørð. Merkiligt er tað, at upprunin hjá nógvum av teim týðandi ættunum í Føroyum tá á døgum peikar aftur á eysturbygdirnar í Sandoynni. Táið søgnin letur Barbaru við Kvíggjá vera ættaða úr Skálavík, man onkur grein av ættini vera komin haðani, tí hon var ávísiliga dóttir av Ísaki Pæturssyni við Kvíggjá. Tann mikla jarðarogn, sum var komin saman í húsavíkarbúnum eftir Húsfrúnna, tykist at vera tann stovnurin, hetta ættartal bendir aftur á. Nevnt verður, at Mikkjal í Lamba kundi nevna 5 ættarlið undan sær í Húsavík. Hetta vísir aftur um ár 1400, táið Húsfrúgvin livdi í síni vælmakt.
Søgnin um Guttorm í Gerðum sigur, at hann lá í stríði um hagagongu við Jósup bónda á Oyri. Hetta verður ásannað í einum tingmáli 1632, sum sigur frá «uenighed, klammer og trætte, dennem imellem haver været forgangen vårting formedels hagegang og anden ulempe.» Fútin kravdi dóm í málinum og hevði frammi, at hann, sum atvold var í hesum klandri, skuldi missa festi sítt. Tá viðgingu teir báðir, at teir kanska kundu hava borið seg skeivt at, og ynsktu semju, og avgjørt var tá, at hann, sum aftur loypti ósemju í, skuldi fara frá festinum, og at teir máttu ikki ganga inn á hagan hvør hjá øðrum uttan at gera samgongubоð.[2]) Jósup úti á Oyri tykist at vera giftur við dóttur Mikkjals í Lamba. Einki finnst í tingbókini um stríð millum Nóa á Skálatoftum, sum søgn er um, og Guttorm í Gerðum. Undir 1641 finnst soljóðandi dómur innførdur: «Clemend Olsøn, for han overfaldt Guttorm Nielssøn, bøde ½ mark sølv.»[3]) Í Norðuroyum er hetta hent, og Guttorm Nielssøn man vera Guttormur í Gerðum, men um hendingina er søgnin kvirr.
Sama dag og ár, 14. juli 1632,[4]) er bókført líknandi stríð millum Joen Joensøn (Jógvan unga) í Skálavík og Bertel Simonsøn í Húsavík. Málið fekk somu avgerð sum tað millum Guttorm í Gerðum og Jósup úti á Oyri, men skilað varð kortini til: «Der klages, at Joen Joensens søjd skulde indtrænge sig udi de andre granders hage og dermed jage deres søjd af hagen.» Tí beyð fútin løgmanni við skrivara og seks løgrættumonnum at fara til Sandoyar at kanna hetta og so gera rætt og skjal eftir seyðabrævinum.
Bartal Símunarson í Húsavík var systkinabarn unga Jóans og hevði tríggjar merkur í festi. Hann er ikki nevndur í søgnini um unga Jóan. Harímóti er Danjal Nilsson á Hamri í Skálavík nevndur, ofta kallaður Danjal Nigilsson. Hetta man vera eitt søguligt mistak, tí Daniel Nielssøn ella Danjal Nigilsson var komin í Vágar innan 1600 og var bóndi á Ryggsgarði í Miðvági í hvørt fall frá 1613,[5]) men rætt er tó tað, at hann var ættaður av Hamri í Skálavík. Í søgn um unga Jóan, sum Hammershaimb próstur hevur skrivað upp,

---

[1]) Alt frammanfyri eftir Lb. fol. 126a–127b. [2]) Lb. fol. 197a. [3]) Lb. fol. 258a. [4]) Lb. fol. 258b. [5]) Fær. kongsb. bls. 203.



kemur fyri Servin í Stórstovu í Húsavík. Teir vóru báðir samtíðarmenn og løgrættumenn saman í minst 20 ár. Servin er skrivaður Søren Rasmussøn. Søgnin sigur, at Servin bøtti mannsbót fyri óargaskap, men løgtingsbókin sigur einki um tað. Heldur ikki kann verða víst á, at synir unga Jóans, Hanus og Símun, sum søgnin avmyndar sum nakrar ránskroppar, hava verið fyri rættinum. Um Servin stendur annars í 1642: «Niels Michelsøn for skældsord imod Søren Rasmussøn, som han ikke kunde bevise, er tildømt at bøde 2 gylden.»[1]) Minnast mega vit kortini, at bæði Servin og ungi Jóan vóru løgrættumenn í 20–30 ár, og valla so at tað hevur ikki ávirkað umdømi teirra við rættin.
Í 1641 vóru annars tvey mál frá Sandoyar sýslu fyri á løgtingi, sum tykjast at siga nakað:
«Jacob Danielsen lod læse et udtog af tingbogen anlangende nogen jord, han opbød til næste arving.»
Og:
«Johannes Hanssøn lod læse et udtog af tingbogen om nogen jord, han og Kristine Joensdatter imellem er, bleve forligte, at Johannes skal give hende en ko og otte gylden.»[2])
Tingbókin, sum hetta varð lisið upp úr, má vera ein onnur tingbók enn tann, sum her er gingið eftir. Í hesi tingbókini finnst tað ikki. Hetta og annað bendir á, at vártingsbók í hesi tíðini hevur verið førd við síðuna av løgtingsbókini. Innføringin er gjørd undir deildini: «Sager, som er forhandlet på vårtingene og lagtinget.»
Hans Hanssøn Hardi var prestvígdur til at taka við Suðuroyar prestakalli í 1630, men hevði treytað sær at fáa størri inntøkur av kallinum enn áður. Í 1632 vórðu tá náðisgarðar lagdir aftrat øllum prestagørðum í Føroyum.[3]) Í 1647 fekk Hans Hansøn Hardi bø sín í Hvalbø umbýttan soleiðis, at hann kom allur at liggja upp at prestahúsunum í Leirum. Haraftrat fekk hann haga sín øktan við fjórðingi av haganum í Hvalvík, nú Sandvík. Eisini hagan í Vági, sum lá aftrat prestagarðinum, tykist presturin at hava fingið øktan. Av hesum býti og umskifti komu hvalbingar illa fyri. Sýslumaðurin, Jákup Háldansson, varð frásettur. Ræturin dømdi teir at hava viljað givið prestinum ov lítið við uppmátan og umbýti av jørðini.[4])
Bygdin Strond, seinri flutt inn í Ánirnar, hevur fingið sítt markatal broytt gjøgnum tíðirnar. Í bóndabókini[5]) stendur:
«I jordebogen 1613–14 er lejen 5 skind (af halv mark pantejord) flyttet så langt til venstre, at der i stedet for 8 gylden 5 skind, medens ½ mark er borfaldet; heraf Bordøens meningsløse marketal 136 marker 5 skind.»
Hetta er ikki tað einasta, sum hent er við markatalinum á Strond. Í 1638 var Jóan Jákupsson, sonur bóndans, sum æt Jákup Rólvsson (1619–1642), dømdur at verða brennimerktur fyri stuldur, men faðirin lovaði tá at geva «kongl. majestæt 4 gylden jord og 4 søjder, er 5 gylden» [peningur], fyri at sonurin kundi sleppa fríur. Henda áttatiálin man hava verið veðsett kongi soleiðis, at hon kundi verða loyst inn aftur, tí málið kom aftur fyri á tingi 1648:[6])

---

[1]) Lb. fol. 264b. [2]) Lb. fol. 258b. [3]) Lb. fol. 193a og b. [4]) Lb. fol. 301a og b. [5]) Fær. kongsb. bls. 112. [6]) Lb. fol. 244a og 305a.

«For retten opstod kongl. majestæts foged, Hans Selmer, og tiltalte Jacob Rolfsøn af Norderø, at han havde forholdet kongl. majestæt skat til en fjerding jord (óivað av hini veðsetti áttatiálini) udi 3 år, hvilket Jacob Rolfsøn for retten ikke kunde nægte. Satte Hans majestæts foged udi rette, om forn. fjerding jord ikke var forbrudt til Hans majestæt, og forn. Jacob Rolfsøn at straffes for ulydighed, hvorpå han var dom begærende. Da blev således dømt, at forn. fjerding jord skulde høre Hans majestæt til, og Jacob Rolfsøn at leje forn. jord af Hans majestæt og at straffes med jern for hans ulydighed.»

Eftir hetta sæst henda áttatiálin ikki í bóndabókini undir bygdini Strond, og óhugsandi er, at hon skuldi ligið aðrar staðir, táið Jákup Rólvsson skuldi hava hana til leigu. Árið eftir er Jákup horvin sum festari, óivað deyður. Seinri kann eisini verða ávíst, at nakað óreglurætt er hent við markatalinum á Strond, jørð burturfallin.

Norðuroya prestur, Danjal Mikkjalsson, ættaður úr Hattarvík (prestur 1667–82), hevur átt jørð á Strond, sum dóttirin, Anna, gift í Hoyvík, arvaði. Táið arvingarnir um 1720 fóru at saknast eftir hesi jørð, var hon vorðin minni. Bæði Guttormur í Múla og BerintHanusson sýslumaður vitnaðu á Norðuroya vártingi, at markataliðá Strond var niðursett mong ár síðan, men hvussu tað annars var hent, nevndu teir ikki.

At løgrætturin við dómi kundi seta bøndur frá festum sínum, hava vit dømi um. Soleiðis dømdi løgtingið 30. juli 1651 nesbóndan í Vági, Klæmint Pætursson, frá garði sínum, tí hann stóð í eftirstøðu við kongsleigu síni í fleiri ár og tó ikki hevði vælt um garð sín.[1])

Hvussu hitt upprunaliga markabýtið hevur verið í Føroyum, er ilt at siga út yvir tað, at mørk í jørð – helst bert innangarðs – eina ferð ivaleyst hevur havt sama virði sum mørk í silvurpeningi. Upprunaliga mega merkurnar tí hava verið toluliga javnar. Illa er hugsandi, at innangarðs- og uttangarðsjørðin tá hava hoyrt fast saman. Seyðabrævið frá 1298 nevnir orðið *seyðamørk*,[2]) sum óivað man vera gomul uttangarðsmørk. Frá 1427 og 1463 hava vit heiti *mørk jarðar*, sum eftir sínum leiguvirði merkir innangarðsmørk,[3]) og leigan av henni er seinri í jarðarbókunum nevnd *Jordeleje*, meðan leigan av seyðamørkini er skrivað sum *Fåreleje*. Hartil hava jarðarbøkurnar nakað, tær nevna *Kojord*, men tað tykist bert at merkja, at øll leigan av henni innangarðs skal hava verið latin í smøri.[4]) Bæði innangarðs og uttangarðs hava menn gjøgnum tíðirnar troðkað um mark hjá øðrum, og eisini sæst, at jørð má vera farin í helvt og aftaná roknað fyri tvífalt virði. Vit hava tí enn nakað, sum eitur hálvskipaður og fullskipaður hagi. Alt tilíkt má hava gjørt jarðarmørkina í Føroyum ójavna til støddar. Innangarðsjørðin hevur ivaleyst altíð verið nakað ójøvn, sum dyrkilendi hevur verið til. Longu 1532 síggja vit, at nakrir føroyskir kongsbøndur hava havt klagu fyri kongi um tílík viðurskifti, ójavna jarðarstødd, og klagan tykist bert at sipa til innangarðsjørð, sjá annars A. C. Evensen: Savn til føroyingasøgu, skjal 32.

1) Lb. fol. 318 a. Í 1651 varð løgtingið hildið í Kirkjubø, og samsvarar tað við, sum L. Debes sigur, at pokur komu til Føroya hetta árið. 2) A. C. E., skjal 63. Áseyðatalið mett í silvurmørk fornari ella mørk í reinum silvuri; myntmørkin ella mørk í silvurpeningi hevði minni virði. 3) A. C. E., skjal 63. 4) Kann møguliga vera komið av at henda jørð upprunaliga onga uttangarðsjørð hevur havt aftrat sær.



## b. Jørð á útlendskum hondum.

Ikki er gjørligt nú at greiða frá, á hvønn hátt jørð í Føroyum er farin úr ætt gjøgnum tíðirnar. Óðalsrætturin kann ikki altíð hava verið nýttur. Viðhvørt kann atvoldin hava verið fátækdómur og viðhvørt, at ættin er útdeyð av ringari landfarsótt t. d. svartadeyða. Ikki minni enn tríggjar bygdir í Føroyum hava navnið *Toftir*, og onnur staðarnøvn hava vit eisini av sama slag.

At kirkjan innan siðaskiftið fekk nógva jørð undir seg, vita vit. Av brævi 21. mars 1551 sæst, at kongur hevði fingið 400 lübskar merkur sum gjald av jørð, sum katólska kirkjan áður hevði átt, og 100 merkur av jørð, sum innan siðaskiftið hevði ligið undir krúnuni.[1]) Longu um siðaskiftið hevur krúnan sjálv verið stórur jarðareigari í Føroyum. Eftir landslóg Magnusar løgbøta skuldi jørð, sum frádømd varð fólki í óbótamálum, falla til kongs.

Eftir siðaskiftið finna vit eisini hina sokallaðu junkarajørðina í Føroyum. Slík jørð finnst ikki meira. Hon er annaðhvørt vorðin kongsjørð ella óðalsjørð. Til dømis var størsti parturin av Sørvági og Haraldssundi áður junkarajørð. Haraldssundsjørðin gjørdist kongs, men hin í Sørvági ogn, somuleiðis junkarahagin í Kvívík. Í gomlum døgum var eisini Kálgarður í Sunnbø festi á Benckestockajørð, men hann gjørdist óðal. Nevnt er áður, hvussu Søren Sørensøn keypmaður hevði keypt Benskestockajørð, sum kongur legði hendur á eftir handilsskiftið 1620.

Harramannsættirnar, Benckenstock og Rosenkrands, áttu hetta junkaragóðsið. Ættin Benckestock var norsk, og møguleiki er fyri, at nógv av góðsinum kann vera arvað úr Føroyum, men nakað kann eisini vera keypt. Ættin Benckestock átti annars nógv góðs í Vesturnoreg, t. d. Hardanger. Tróndur Benckestock, ið var sonur av Tróndi Tróndarsyni Benckestock, doyði 1558. Hann var stutta tíð høvuðsmaður á Bjørgvins húsi. Mannslinjan av ættini doyði tá út, og dóttir hansara, sum sat við føroyska góðsinum fyrst í 17. øld, var Adelyse ella Adelus Benckestock.

Ættin Rosenkrands var donsk av uppruna. Hon var múgvandi, og um siðaskiftið var hon býtt í nógvar greinir. Við byrjan av 17. øld lá góðsið hjá Rosenkrandsunum í Føroyum undir Jacob Rosenkrands til Kistrup, sum doyði í Bjørgvin 1616 á miðjum aldri, og einkjan, Pernille Gyldenstjerne doyði 6 ár seinri. Í 1617 gav Pernille Gyldenstjerne Nicolaus de Frunt umsitingina av góðsi sínum í Føroyum, og hann læt við brævi 4. juli 1617 hesa umsiting aftur í hendurnar á keypmanni sínum í Føroyum, Jacob Jacobsøn.[2])

Jacob Rosenkrands til Kistrup var framúr ríkur maður. Í búnum eftir hann vóru 2526 tunnur av hartkorni í Danmark og 1822 $^{1}/_{2}$ tunna í hartkorni av norskum jarðargóðsi, umframt var í reiðum peningi 304026 spesiudálar. Einki er nevnt um hitt føroyska jarðargóðsi, men tað kann vera roknað upp í hina norsku ognina.

Vanligt var í tíðini um siðaskiftið, at kongunum treyt pening, og nógv dømi eru um, at ríkir harramenn veittu teimum stór peninga-

1) A. C. E., skjal 68. 2) Lb. fol. 26 b–27 a.

lán. Fyri lánið fingu teir tá jørð frá kongi í trygging. Ættin Rosenkrands var ein tílík lángevandi harramannsætt. Tí er tað ikki óhugsandi, at Rosenkrandsarnir hava fingið nakað av jørð síni í Føroyum á tann hátt. Annars sigist sum seinri nevnt meginparturin av góðsinum hjá Rosenkrandsunum í Føroyum at vera arvajørð.

Jørð, ið nevndist *kompagnijord* og *pantejord*, er týðuliga veðsett fyri skuld ella latin sum gjald. Nógv var ikki av hesi jørð, men hon er seinri vorðin kongsjørð ella innloyst til óðals aftur. Í 1615 síggja vit, at ein maður, sum æt Mads Rytter, borgari í Bjørgvin, hevur átt væl av jørð í Føroyum, sum hann hevði fingið eftir Nils Helgason. Ikki kunna tá vera gingin 30 ár, síðan nógv av hesi jørð varð keypt, tí bøndurnir, sum sótu við henni, krevja sama ár rætt til at innloysa hana. Keypmaðurin, sum hevði jørðina til umsitingar, svaraði, at hann kundi ikki geva monnunum loyvi at innloysa jørðina, fyrrenn hann hevði fingið talað við Mads Rytter sjálvan um tað. Mads Rytter kann ikki hava játtað hesum, tí í 1617 verður jørðin seld ella «lovbudt» á tingi.[1]) Undir 1615 stendur viðmerkt úti á breddanum í løgtingsbókini, at Mads Rytter ætlandi við arv hevði fingið hesa jørð eftir Nils Helgason. Hesin var sum nevnt føroyingur og skipari, táið Magnus Heinason hevði Føroya handil, og hann endaði sínar dagar sum ráðmaður í Bjørgvin.

Táið løgtingsbókin byrjar, síggja vit, at junkarajørðin í Føroyum er undir umsiting av handlinum, og veruliga er tað tí keypmaðurin í Tinganesi, sum skal krevja leigu av hesi jørð. Men Tinganes-keypmaðurin, hvør hann enn var, vísti seg at vera ógvuliga óálítandi í hesum viðurskiftum, og 1628 tók fútin sær av at halda skil á junkarajørðini.

Hin 5. aug. 1615 fekk Strange Madssøn fúti og handilsharri skotsmál bæði av «Jacob Rosenkrandses landsbønder» og av «salige, ærlige og velbyrdige frue Adelyse Benckestockes landsbønder», sum møttir vóru á Føroya løgtingi. Sama ár og dag hoyra vit, at fram komu á ting «nogle af salige velbyrdige frue Adelyse Benckestockes landsbønder, besynderlig dem udi Suderø, som her nu til stede vare.» Hesir menn vildu sleppa frá at lata leigugjald sítt í fjøður, sum teir áður høvdu gjørt. Fútin svaraði, at bispurin í Bjørgvin, sum nú hevði hetta góðs undir sær, vildi hava sama leigugjald sum áður. Bøndur mótmæltu: «Alle fuglebjergene er nu meste parten bortløben og fordærvet, som godtfolk noksom er vitterligt.» Tí kundu teir ikki longu lata fjøður í leigu. Av hesum og av tí, sum áður er sagt um stóru Dímun, síggja vit, hvussu meint berglop í hesi tíðini eru farin við fuglabjørgum í Føroyum. Eisini fólkasagnirnar benda á líknandi.

Jacob Jacobsøn, keypmaður í Tinganesi, skuldi krevja inn leiguna bæði av góðsinum hjá Benckenstockunum og Rosenkrandsunum. Tað vísti seg skjótt, at maðurin hevði fløkju í øllum sínum jarðarroknskøpum. Soleiðis kravdi Hans Jenssøn, hálvbróðir Jacob Jacobsøns, Rasmus Magnusson í 1619 eftir ógoldnari ágávu av teim 9 mørkunum, hann hevði av jørð frá Rosenkrandsunum í Haraldssundi, og «som han en tid lang haver lejet.» Eftir bóndabókini er leigumálið

[1]) Lb. fol. 28a: «at forn. Rasmus Pedersøn skulde på hans (M. Rytters) vegne lovbyde på lagting alt hvis gods, som forn. Mads Rytter her haver udi Færø.»



byrjað innan 1613, men eftir 1603. Rasmus kundi vísa fram kvittan fyri tað, sum stóð fyri at vera ógoldið.

Mikkjal í Lamba sat við festi av Benckestockajørð í Skálavík. Í 1617 hevði Jacob Jacobsøn kravt hann at vísa festibrævið fram á tingi, men Mikkjal segði, at brævið lá heima við hús; hann kundi annars altíð vísa tað fram. Á løgtingi í 1618 reisti Símun Símunarson í Kirkjubø ella Trølla-Símun krav um junkarafestið í Húsavík. Hann kundi vísa fram festibræv frá 1567, men Mikkjal í Lamba hevði tvey eldri festibrøv at vísa fram, eitt frá 1537 og eitt frá 1540.[1]) Mikkjal vann trætuna, tí innsiglið var farið av brævinum hjá Símuni, og tað hevði ikki verið á tingborði í 60 ár. So stendur, men tað skal væl vera 50 ár, tá brævið var frá 1567. Í 1619 møta vit óskil við leiguuppkrevjing av hesum festi, ið einans kann hava sín uppruna frá Jacob Jacobsøn, sum leiguna skuldi taka:

«Poul Hanssøn, boende i Husevig, klagede, at han måtte give tvende lejer for den gård, han havde til leje i Husevig, som er først til Michel Joensøn og siden til junkerens foged.»

Umboðsmaður junkarans, her Jacob Jacobsøn, átti bert at krevja Mikkjal í Lamba eftir leiguni av festinum og ikki Poul Hanssøn, sum var niðursetumaður ella leigaði garðin av Mikkjali. Jacob Jacobsøn sæst her at hava stungið leiguna í sin egna lumma.

Tann ógreiða, sum jarðarbøkurnar hjá Jacob Jacobsøn vístu, forðaði ikki, at Laurits Hanssøn, keypmaður hjá íslendska handilsfelagnum frá 1620, aftur gjørdist umboðsmaður fyri junkaragóðsið í Føroyum. Av løgtingsbók frá 1728 sæst, at jarðarroknskapurin hjá Laurits Hanssøn keypmanni hevur verið ógvuliga fløktur. Har verður tó bert jørðin hjá Rosenkrandsunum umtalað.

Sofie Lindenov, einkjan eftir Knud Gyldenstjerne, sum tá sat við hesi jørð, gav við brævi 2. mai 1628[2]) Mads Christensøn fúta umboðsrætt fyri jørðina við skyldu at krevja inn ógoldna leigu frá «Philippi Jacobi dag [1. mai 1623 og til Philippi Jacobi dag 1627.» Sofie Lindenov giftist upp aftur við Hendrik Rantzau, og hesin ásannar við brævi 20. mai 1628[3]) til «Jacob Rosenkrandzes landsbønder og tjenere på Færø», at Mads Christensøn umboðar hesa jørð, og biður hann bøndur vera honum lýdnir.

Í tingvitni, sum tikið varð 25. juli 1628,[4]) stendur:

«Fremkom salige, velbyrdige Jacob Rosenkrandzes bønder og landstjenere på Færø og beklagede sig, at de havde betalt til det færøske kompagnis tjener og købmand her udi Færø, Laurits Hanssøn, de Rosenkrandzers leje og landskyld for anno 1624 og nu kræves pány igen af kongl. majestæts foged, Mads Christensøn, som nu haver salige Knud Gyldenstjernes efterleverskes, velbyrdige frue Sofie Lindenovs fuldmagt og ombud samme landsgilde at indfordre fra 1623 til 1627, og fremlagde en part af salige Jacob Rosenkrandzes bønder og tjenere forn. Laurits Hanssøns seddel og bevis, at han kendte sig samme rettighed at have annammet og oppebåret på det færøske kompagnis vegne, og en part både på Ejde og Sandø be-

[1]) Skuldi hesi festibrøvini havt nakað við giftuna hjá Heina Havreka við Herborg Arnbjarnardóttur í Húsavík at gera? [2]) Lb. fol. 166b–167a og b. [3]) Lb. fol. 167a og b. [4]) Lb. fol. 107b–108a.

klagede sig, at de ingen seddel havde bekommet, mens bemeldte Laurits Hanssøn dog deres landgilde såvel som de andres (deres) haver annammet og bekommet og var begærende af Hans majestæts foged, Mads Christensøn, at han her udi vilde være dennem behjælpelig, at dennem skulde ingen uret vederfares.»

Eftir hesum má Laurits Hanssøn eins og Jacob Jacobsøn áður hava stungið leigugjaldið í egnan lumma.

Í 1631 sigur tingbókin, at Søren Sørensøn, ætlandi meðan hann enn hevði handilin í Føroyum, hevði keypt nakað av jørðini eftir Benckestockarnar, og at kongur tá kravdi hana sum gjald fyri eftirstøðu av kongsins gjaldi av handlinum, ið hitt gamla handilsfelagið eftir 11 ár enn ikki hevði goldið.

Aftaná hetta er henda gamla tingbókin tigandi um junkarajørðina. Eftir N. Andersens bók: Færøerne 1600—1709, bls. 332) skal verða endurgivið nakað um arvaviðurskiftini av junkarajørð í Føroyum.

Góðsið hjá Benckestockunum um 1660—70 var 97½ mørk + 1 hagaleys mørk. Innstøðin á tí var tá 1850 áseyðir, 9 kýr og 4 hestar. Benckestockarnir søgdu seg at vera ættaðar frá Tórolvi Smør, ið var sonarsonur Gríms Kambans. Haðan skuldi ættin hava fingið sítt føroyska arvagóðs. Tróndur Tórðsson Benckestock var sum áður nevnt í Føroyum 1541—42. Hann doyði 1558, og tá fekk dóttir hansara, Adelus Benckestock, gift við Christoffer Eriksøn Bernhoft, høvuðsmanni á Stenvigsholmi, meginpartin av góðsinum, men maður hennara doyði 1563, og í hjúnarlagnum vóru eingi børn. Bróðursynirnir, Tróndur og Jón Benckestock, og systurdóttirin, Magdalena Gyntersberg, verða tá nevnd sum arvingar. Hin parturin av góðsinum er tá ætlandi farin sundur millum 5 systrar av Adelus Benckestock, tí seinri er altíð talan um sættapartar av Benckestockagóðsinum. Í 1619 sæst góðsið hjá Adelus Benckestock at vera farið sundur millum Peder Alfsøn, lækna í Bjørgvin, Bodil Andersdatter, harra Anders Mikkelsøn sæla, fyrrv. bisp í Bjørgvin, og Jacob Jørgensøn, fyrrv. Gulatingsløgmann. Nú fór eisini at verða selt burtur av góðsinum.

Góðsið hjá Rosenkrandsunum í Føroyum hevði navn sítt eftir Holger Eriksøn Rosenkrands. Hann var giftur við Margrethu Flemming, ið hevði arvað góðsið gjøgnum forfedrar sínar. Teirra millum var Ágnes, dóttir av Hákuni kongi fimta og gift við Haftori Joensøn. Sonarsonur eftir henda Holger Eriksøn Rosenkrands var Erik Ottesøn Rosenkrands til Årreskov og Kjærstrup. Hann var høvuðsmaður á Bjørgvins húsi 1560—68 og doyði 1575 sum limur av Danmarkar ríkisráð. Einkjan eftir hann, Helvig Hardenberg, sat tá við góðsinum í Føroyum, til sonurin, Jacob Eriksøn Rosenkrands til Årreskov og Kjærstrup tók við tí. Hann doyði 1616, og einkjan eftir hann, Pernillle Gyldenstjerne, hevði tá góðsið, til hon doyði 1622. Eftir hana vóru 10 børn, sum skiftu arvin millum sín 1630. Innan børnini vóru tilkomin, varð góðsið stýrt av Henrik Rantzau til Brobygård og Sophie Hansdatter Lindenov, sum hevði verið gift við móðurbróður teirra, Knud Gyldenstjerne. Henrik Rantzau varð seinni giftur við Sophie Lindenov.

Sum vit síggja, var alt junkaragóðsið í Føroyum við at verða pettað sundur, tá vit koma eitt sindur upp í 17. øld.

# DEILD VII

## *Ættir og skyldskapur.*

### a. Lambaættin.

Táið vit tala um Lambaættina, hugsa vit um ættina eftir Heina Havreka. Av gamlari tíð sat hon ikki á Lambagarði. Heini Havreki ella Heini Jóansson var Norðmaður, og Herborg, fyrra kona hansara, var úr Húsavík, men sonur teirra, Jóan Heinason, gjørdist stórbóndi á Lambagarði,[1]) og ætlandi er tí, at kona hansara hevur verið haðani, men givið er tað ikki, tí burturfestingin av gørðum man eftir okkara hugsan eftir siðaskiftið ofta hava verið gjørd óregluliga. Umframt Lamba, sum var 21 merkur, sat Jóan Heinason við 13 mørkum í Søldarfirði og 6 mørkum á Glyvrum í festi. Aðrar staðir hevði hann eisini festi, t. d. á Skála, og óðalsjørðin í búnum tykist at hava verið rættuliga nógv og ligið spjødd ymsar staðir um Føroyar. Nevnt skal verða, at Chr. Heilskov sigur í grein síni «Af den Heinesenske Slægts Saga» í «Personalhistorisk Tidsskrift» 1915 uttan at vísa á nakra keldu, at Jóan Heinason var giftur við dóttur av Øgmundi bónda í Lamba. Tað sigst at hava verið søgn í Lamba.

Heini Jóansson Havreki var sum nevnt fyrst giftur við Herborg Arnbjarnardóttur úr Húsavík. Við henni tykist hann at hava havt tvey børn: Áðurnevnda Jóan Heinason, sum Chr. Heilskov sigur er føddur 1541,[2]) og Herborg Heinadóttur, ið sami maður sigur er født 1542. Hon var gift við keypmanni, Jákup føroyingi, sum búði í Bjørgvin og doyði har av pokum 1572, javnfør bræv 137 í A.C. Evensens skjalasavni. Henda Herborg tykist at vera kallað upp eftir móður síni, sum tá man vera deyð. Í 1544 giftist Heini Jóansson upp aftur við Gyrid Arnbjarnardóttur Gran. Hann hevði verið trúlovaður við henni í Noreg, innan hann fór haðani, og hon var tá einkja. Við henni fekk Heini tveir synir: Hin áður umrødda Magnus

[1]) Landsskjalasavnið. Í vár- og løgtingsbók 1656—66 undir 1665 fol. 231 stendur: «Hans kongl. majestæts landfoged havde i rette ladet stævne Jacob Zachariassøn og Bærent Jacobsøn anlangendes den jord i Skålebotn, som de dennem med andre adelsmænd tilegner, hvilket Søren Pedersøn formente, at Hans kongl. majestæt burde at tilhøre, efterdi den for langsommelig tid siden af Hans kongl. majestæts bonde i Lamhauge, nemlig Joen Heinesøn, er opvelt og i Hans majestæts jordebog indskreven.» Løgtingið bað bert aðalsmenninar velta sær tilsvarandi jørð upp úr haga í Skálabotni. [2]) «Af den Heinesenske Slægts Saga», uppgevur onga keldu. Eftir hesum kann Heini Havreki fyrst vera giftur um 1540.

Heinason, eftir Chr. Heilskov, føddur 4. mars 1545,[1]) og Heina Heinason, eftir sama manni føddur 1546 og so at siga eina kendur av hansara framstígan á løgtingi 17. aug. 1583 fyri at fáa bróðursins, Magnusar, vitnisburð frá Føroyingum har endurnýggjaðan.

Um uppruna faðirs Herborgar, Arnbjørn Guttormsson í Húsavík, eru menn ikki eins á máli. Av tí at einki fullfíggjað søguligt prógv er ført fram um hansara uppruna, ber illa til at siga hann at hava verið beinleiðis av norskari ætt ella son av Gulatingsløgmanninum, Guttormi Nilssyni. Arnbjørn æt maður Guðrunar ríku, húsfrúin í Húsavík, undan árinum 1400, og navnið skuldi soleiðis verið eldri har á staðnum. Innan annað er fult prógvað, mega vit hugsa okkum Arnbjørn Guttormsson í Húsavík føddan í Føroyum. Herborg Arnbjarnardóttir og Guttormur Arnbjarnarson í Húsavík vóru systkin. Guttormur í Húsavík er nevndur í brævi 14. aug. 1583.[2]) Tað er sami maður sum hin í søgn nevndi Guttormur á Skarvanesi. Í bóndabókini er hann nevndur Guttorm Asbjørnsøn, bóndi bæði á Skarvanesi og í Húsavík.[3])

Eftir mannasøgn eru ættarliðini frá Húsfrúnni í Húsavík tá hesi: Óli Seyðamaður, Einivaldur og Herborg ríka. Sonur hennara var so Arnbjørn í Húsavík og á Skarvanesi. Herborg ríka skuldi eftir søgnini fáa barn við løgmannssyni, ið doyði, áðrenn barnið var følt. Hesin løgmannssonurin man tá helst hava itið Guttormur.[4]) Eftir hesum ættartali skuldi Herborg Arnbjarnardóttir, kona Heina Jóansonar Havreka, verið 5. lið eftir Húsfrúnna, og hon doyði 1542 nakað um 30 árs aldurin.[5]) Rokna vit haðani 30 ár fyri hvørt ættarlið, til Óli Seyðamaður var føddur, koma vit til árstalið 1392, og nú tá tann ríka Guðrun Sjúrðardóttir í Húsavík, vit søguliga hoyra nevnda, eftir skjølunum tykist at vera deyð 1402, er søgnin væl á leið, men Óli Seyðamaður kann tó ikki vera sonur av hesi kvinnu.[6]) Hetta hóskar eisini við, hvat sagt varð um jørðina í Húsavík hjá Mikkjali í Lamba 1622, at forfedrar hansara høvdu havt hana «udi fem langfædres tid.»[7])

Mest umtalaður av øllum børnunum hjá Jóani Heinasyni er Mikkjal í Lamba. Har stóð hart stríð um búgvið eftir Jóan, tí Mikkjal, sum sat við festið í Lamba, vildi bert lata frá sær í minsta lagi. Við seinri konu sína, Magdalenu, hevði Mikkjal eisini nógv stríð, og ikki lítið av øllum hesum finnst í løgtingsbókini. Sum umboðsmaður fyri góðs hjá Rosenkrantzunum í Húsavík tiltalar Jacob Jacobsøn keypmaður Mikkjal á tingi 1617,[8]) men Mikkjal fekk gjørt stevningina ólógliga, og tólv løgrættumenn fóru tá at sýna henda garð. Árið eftir var aftur stríð á tingi millum Mikkjal og Trølla-Símun í Kirkjubø um sama

---

[1]) Eingin kelda ávíst. [2]) D.D.R.A., D.D.K., B. 161, maður nevndur «Guttorm i Husevig». [3]) Fær. kongsb., bls. 236–37. [4]) Útiseti 1949, bls. 87; løgmannssonurin kann sjálvsagt hava verið norskur. Abbasonur Herborgar ríku í Húsavík tykist at vera fyrsti maður sum hevur borið Guttorms-navnið har á staðnum. [5]) Sjá Færøske Folkesagn og Æventyr bls. 560. Mikkjal Jóansson í Lamba sigur jú jørð í Húsavík hava ligið undir ætt síni har «i fem langfædres tid.» [6]) Eftir skiftisskjølum eftir Guðrun Sjúrðardóttir í Dipl. Fær. bls. 43, var sonur hennar deyður uttan lívsarvingar. [7]) Útiseti 1949, bls. 87. Mikkjal í Lamba man vera føddur um 1566. Fimm ættarlið (30 ár) haðani aftur í tíðini geva árstalið 1416. Har umleið skuldi hansara elsti «langfader» verið føddur. [8]) Lb. fol. 27 b–28 a.



festi. Sum áður frágreitt vann tá Mikkjal. Húsavíkarætt hansara var jú gomul, og hesi Rosenkrantz-festini tykjast at hava fylgt við ættini. Laðangarðsættin, sum Trølla-Símun var av, man tí eisini hava havt forfedrar úr Húsavík, um enn í seinri ættarliðum.

Svágur Mikkjals, Jákup í Tjørnuvík, søkir 1617 eftir arvi fyri konu sína, Herborg. Hon hevði aldri fingið henda arv sín út úr búnum í Lamba:

«Thi at hun havde ikke fået den jord udi Sandø, som hende var tilsagt udi hendes bytte efter hendes registers lydelse. Blev så tilsagt inde på tinget, at Herborg skulde have den ene mark norder i Deble udi tilbod på hendes part, efterdi hendes part var ringere.»[1])

Sama árið kom tó arvastríðið fyri aftur á tingi, og eftir teim fáu orðunum í tingbókini sær tað nú út til, at Herborg sjálv hevur gripið inn. Seks løgrættumenn verða settir at avgera málið, og siga teir:

«At efterdi Herborg Joensdatter haver arvet 4 gylden ude Vølingsmyre å Sande foruden løsningsøre, da haver vi så forefundet, at forn. Herborg skal igen have og beholde 80 all jord [áttatiál] i Husevig, som Michel haver efterladt, og 2 gylden jord fra hver søster i Husevig, og dersom forn. søstre ikke ville afstå samme jord, da byde hun dennem at tage samme part, som hun haver, og hun nyde den part igen, som de haver.

Og er forn. Herborg begærende, at hun måtte bekomme den halve mark i bytte i Svinejord (swyneiord) udi Skålevig for den jord i Husevig, efterdi hun haver i Husevig ikke noget andet, og dersom de dette ikke vilde indgå eller efterkomme, da skulde de stå hende til rette på hendes skade, hun derpå kan regne.»[2])

Av tí at Herborg hevði bíðað so leingi eftir arvinum, sigur tingbókin víðari, skuldi hon aftrat hava mørkina í Depli, «som Michel haver bevilget hende.» Tað var gaman í hjá Mikkjali; hann fekk tá fýra gyllin á Vølingsmýri heima á Sandi, sum innangarðs eru eina størstir í Føroyum og uttangarðs vanliga góðir.

Framman fyri endurgivna tykist at benda á, at Herborg Jóansdóttir í Tjørnuvík hevur havt tvær systrar giftar í Húsavík. Ein fjórða dóttir Jóans Heinasonar var gift við Nils Andrassyni (Niels Andersøn), bónda á Skálatoftum (1613–31). Í 1583–84 verður hann í fútaroknskapi nevndur «kongl. majestæts landstingsskriver.» Líkt er tí til, at hann hevur verið løgtingsskrivari, innan Gabriel Mitens tók við hesum starvi, og hann skuldi soleiðis verið komin í ónáðir um somu tíð, sum verfaðir hansara, Jóan Heinason, varð frásettur sum løgmaður. Jóan Heinason átti øgiliga nógva jørð eisini í Norðuroyum, og tingbókin nevnir slíka jørð á Skálatoftum, so tað var kanska ikki so løgið, at versonur hansara júst festi búgv har. Annars nevnir tingbókin eina ferð Nils Andrasson giftan við dóttur Jóans Heinasonar. Pætur Gunnarsson í Sunnbø stevndi sum áður nevnt í 1619 arvingunum eftir Jóan Heinason eftir jørð, 1 mørk á Skála og 1/2 mørk á Skálatoftum, jørð, sum Jóan skuldi hava keypt eftir Guttorm, bróðir Pæturs.

---

[1]) Lb. fol. 30 b. [2]) Lb. fol. 33 b.

Gyðja æt dóttir Jónas Heinasonar. Hon var gift við Jóani Pálls-syni í Elduvík, og í 1619 møtti sonur teirra, Jákup Jóansson, á tingi fyri móður sína. Tvær ónevndar døtur Jóans Heinasonar vóru giftar við prestum, ein við Hans Jørgensøn Fønbo presti á Viðareiði og onnur við Gabriel Torleivssyni presti á Nesi. Søgnin letur annars eina dóttur Jóans koma fyri barn við einum húskalli og giftast við honum til Kunoyar. Umframt Mikkjal hevur Jóan átt ein son, sum æt Heini. Líkt kann vera til, at hann hevur búð onkustaðni á Skála-firðinum, kanska á Skála, men um hann vita vit bert, at hann hevur átt son, sum æt Jóan. Hesin Jóan Heinason, sum í skjali er sagdur at vera bróðursonur Mikkjals, var fyrst bóndi í Streymnesi og síðan á Glyvrum, har hann var dømdur frá festinum. Hann var eina tíð eisini vetrarfúti.

Jóan Heinason løgmaður átti dóttur, sum gift var við donskum manni, Gunnar Poulsøn, mikkjalsmessudag 1598.[1]) Hesin maðurin festi Sundsgarð og hevur sitið á honum í hvørt fall til 1603.[2]) Bæði hann og konan, sum æt Ata ella Agata, eru tá brádliga deyð. Tey áttu eina dóttir, Elsupa, sum síðan vaks upp í Lamba hjá móður-bróður sínum. Hon var til staðar í roykstovuni í Lamba, táið Ólavur Jóansson (Jarnheysur) sló gentuna, Onnu Ólavsdóttur, til deyða. Sjá bls. 26.

Jóan Heinason hevði festi bæði í Árnafirði og á Norðoyri. Av bóndabókini sæst, at Mikkjal í Lamba hevur roynt at halda fast um garðin á Oyri eftir faðir sín, og at endanum fekk hann dótturmann sín, Jósup úti á Oyri (Josep Joensøn), til at festa garðin. Innan Jóan Heinason doyði, hevði hann latið dótturson sín av Skálatoftum, Pætur Nilsson, festa garðin í Árnafirði. Bróðir hansara var hin seinri gitni Guttormur í Gerðum.

Guttormur Nilsson er fyrstu ferð umtalaður í tingbókini 1618. Tá hoyra vit, at han «en tid lang haver tjent velbyrdige folk udi Dan-mark,»[3]) og at hann ætlar sær av landi aftur til Danmarks ella Týsk-lands. Til tess biður hann um og fær skotsmál frá løgtingi. Blað-ungur maður hevur Guttormur ikki verið tá, tí bróðir hansara, Pætur, sum ætlandi hevur verið eldri, hevði longu fest ár 1600. Faðir teirra, Nils Andrasson, hevur eftir bóndabókini sitið við festi á Skálatoftum til 1631. Hann man tá hava verið um 90 ár, tí faðir hansara, Andras Guttormsson løgmaður, er deyður 1543.

Í 1618 møtti Mikkjal í Lamba á tingi við klagu fyri konu sína, Magdalenu, um Guttorm Nilsson.[4]) Tey bæði vóru komin upp at klandrast, meðan Guttormur hevur gist hjá skyldfólkinum í Lamba. Magdalena fekk beitt Mikkjali eftir Guttormi, men á tingi vórðu tey øll «vel forligte, og bekendte de på både sider, at de intet andet vidste med hverandre end det, som var ærligt og godt i alle måder.»

Guttormur kendi seg ættbornan til tað mikla góðsið hjá Lamba-ættini, og óivað hevur hann sæð, at Mikkjal móðurbróðir hansara hevði lagt meira enn bróðurpart sín av tí undir seg. At klandursevnið var Lambaarvurin, síggja vit av tí, sum kemur fram sama ár í tingbókini:

---

1) Lb. fol. 35 a. 2) Smbr. ta ringu umfarasjúkuna, sum hevur herjað Tórshavn um 1601–02. 3) P. Nolsøe: Føroya siglingarsøga I, bls. 17–18. 4) Lb. fol. 43 b.



«Guttorm Nielssøn på sine egne og hans medarvingers vegne ta-lede Michel Joensøn boende i Lamhage til om Arnefjord og Øre gård i Norderøen og søjden udi Lamhage med al anden afgift og gods, som var efter salig Joen Heinesøns død og ikke byt var, at forn. Michel derom herefter skulde give regnskab.»[1])

Á hesum sinni kom ikki meira fram um arvastríðið í Lamba. Óivað hevur Mikkjal sum vant bert latið so mikið frá sær, at hinir arving-arnir hava tagt. Líkt er til, at Guttormur hevur verið úti eftir Oyra garði, sum Mikkjal festi árið eftir. Hetta gruggið mundi liggja á botninum, táið Guttormur sum bóndi í Gerðum seinri kom at liggja í stríði við Jósup bónda á Oyri.

Av skotsmáli Guttorms frá tinginum, sum givið var 4. aug. 1618, sæst annars, at hann hevur ætlað sær av landinum aftur.[2]) Hann tykist at vera komin til Føroya aftur um várið 1618, tí skotsmálið sigur, at hann í ungdómi sínum hevur skikkað sær væl í Føroyum «såvel som nu på denne sommers tid, han her haver været udi landet.»

Guttormur kann nú væl hava verið burtur úr Føroyum í trý ár, men hann man tá hava verið heima aftur í 1622, tí hetta árið er hann nevndur sum millummaður í einum stríði um junkarajørð á Eiði. Í 1624 finna vit hann sum festara á garði í Hvannasundi. Fólka-søgnin sigur eisini, at hann hevði hetta festið. Bóndi í Gerðum á Borðoy gjørdist hann fyrst í 1626. Tað er sum bóndi í Gerðum og sýslumaður í Norðuroyum, at Guttormur er mest kendur. Nóa, sum nevndur er í søgnini um Guttorm í Gerðum, man helst hava verið uppsitari hjá honum á Skálatoftum. Navnið er helst eyknevni.

Søgnin sigur, at Guttormur tók lívið av Nóa, og at hann segði við konu sína, táið hann hetta hevði gjørt: «Sissel min! Nu er Noa på Skåletofte død.» Líkt er tí til, at kona hansara hevur verið donsk ella norsk. Tingbókin 1655 ásannar, at hon hevur itið Sissal, Sissel Stefansdatter.

Nils Andrasson, faðir Guttorms, má hava verið yngsti sonur av Andrasi Guttormssyni løgmanni (1531—43), og Guttormur løgmaður Andrasson (1544—72) hevur ætlandi verið elstur. Triði bróðirin var Eyðun Andrasson, fyrst prestur í Sandoy og síðan prestur í Eysturoy og próstur.

Guttormur í Gerðum kom í 1646 illa fyri, við tað at hann hetta árið varð dømdur bæði frá sýslumannsembætinum og Gerðagarði, sjá bls. 41. Kongl. loyvi fekk hann tó til at sita við garðinum, og dóm fyri tað tykist hann at hava fingið 1649.

Gabriel Torleivsson, fyrst hjálparprestur hjá faðir sínum, Torleivi Grækarissyni, og síðan prestur í Eysturoy (1625—27), var sum nevnt svágur Mikkjals í Lamba. Stríð var teirra millum um arv, og teir komu til løgrættin 1617 fyri at fáa málið avgjørt:

«Hæderlig mand hr. Gabriel Torlofsøn på den ene side og ærlig mand Michel Joensøn boende i Lamhage på den anden side haver os venligen ombedet det, vi ville være over en venlig forhandling mellem dennem, om hvis irringer, misforstand og trætte, som var den-nem imellem angående arvebyttet efter salige Joen Heinesøn og andet.»

---

1) Lb. fol. 53 b. 2) Lb. fol. 56 a.

Løgtingið fekk teir samdar eftir fylgjandi treytum:

«Først angående de 2 mark jord i Skåle, som hr. Gabriel efter sin arveseddels indhold ikke bekommen haver. Fornævnte 2 mark skal Michel Joensøn nu straks levere og afrede til forn. hr. Gabriel udi godt folks nærværelse, ikke af den værste, ej heller af den bedste, men af både, såsom dannemænd kunne skønne at være ligest på både sider. På disse forn. tvende mark jord skal Michel Joensøn levere forn. hr. Gabriel femti syv søjder, så som de går der nu i hagen, hvilket hr. Gabriel og resterede på sin arveseddel.

Nok resterede hr. Gabriel 20 søjder, som han betalte til Morten Nielssøn. For disse 20 søjder haver Michel Joensøn af sin gode vilje og til broderligt venskabstegn givet sin svoger hr. Gabriel halvdelen af et smalt hundrede [smalt hundrede = 100] søjder, som går udi Glyvroms hage, som kaldes *ad Skølldum*, og dersom samme søjd er nu ikke så mange, da skal hr. Gabriel alligevel have de 50 søjder fuldt.

Nok haver hr. Gabriel på samme sted gående 60 søjder. Derimod skal Michel Joensøn oplægge også 60 søjd, så at de altid haver halvparten med hverandre, og dersom der fejl som for er meldt på det smalle hundrede søjder, som Michel der haver, da skal Michel udi lige måde oplægge så mange, som fejl, når hr. Gabriel haver bekommet sit, så at de altid kunne have halvparten hver med anden.

Nok skal Michel Joensøn levere fra sig det bælte, som hr. Gabriel eftertaler, og når hr. Gabriel haver bekommet samme bælte såvel som hvis andet, som det brev om formelder, hvilket uden alt ophold inden krossmesse førstkommende skal være leveret til hr. Gabriel udi det allerlængste, og dersom det ikke er sket inden den tid, da haver Michel Joensøn forbrudt en læst mel til de fattige og alligevel efterkomme brevet, dog er beskeden, at dette altsammen skal nu straks leveres, og når hr. Gabriel det altsammen bekommet haver, som for er meldt, da ere de på både sider venligen og vel forligte, så at forn. hr. Gabriel for sig og sine arvinger til evig tid aldrig skal anke...»[1])

Hetta skjali vísir hitt sama lyndi hjá Mikkjali í Lamba: at vilja skava inn undir seg og leggjast á arv, sum hini systkini áttu. Hann vildi ikki geva tað frá sær, fyrrenn rætturin kom upp í. Rætturin hevði eisini illgruna um, at Mikkjal vildi drála við at lúka treytirnar, sáttmálin álegði honum, og hann legði tí bót á Mikkjal, um hann gjørdi tað. Bótin var stór, og hospitalið á Argjum skuldi hava hana. Í 1618 komu báðir svágrarnir aftur fyri rættin við sama arvamáli, sum í vissum førum enn skuldi vera ógreitt, og aftur søgdust teir at vera vinarliga samdir um grundarlagið í semjuni.

«Hermed er de udi alle måder venligen og vel forligte og refererer sig dette forligelsesmål til deres forgangen års, så at alting skal agtes og holdes udi sin beslutning efter forgangen års forligelse og forpligt med dobbelt på af straf, som før siges. Dette blev skreven i forgangen års forpligtsbrev.»[2])

Mikkjal hevur ikki viljað slept arvinum, og líkt er til, at bót hansara

1) Lb. fol. 34a og b. 2) Lb. fol. 48a og b.



nú hevur verið tvífaldað. Presturin hevur óivað dugað at føra mál sítt til sigurs.

Í 1617 fekk Mikkjal frænir av, at systurdóttir hansara, Elsupa, sum búði hjá honum í Lamba, dóttir av Atu og Gunnar Poulsøn, stóð fyri arvi í Danmark, og beinan vegin leitar hann sær stuðul hjá løgtinginum:

«At eftersom ærlig mand Michel Joensøn boende på Lamhage er kommen udi forfaring, at hans afgangne svoger Gunner Poulsøns efterlevende barn skulde være nogen arv tilfalden i Danmark i Jylland (hvorom han ikke endnu ved vis besked), derfor haver forn. Michel Joensøn for os fremført disse efterfølgende mænd: Gabriel Mitens tingskriver, Zacharias Joensøn på Kolter, Laurids Ellendsøn og Joen på Husegård, og var begærende af dennem et sandfærdigt vidnesbyrd og prov, at forn. Gunner Poulsøn haver været her udi Færø og haver været ægtegift med forn. Michel Joensøns søster, Agathe Joensdatter.»

Til sanningar herum siga hesir 4 menn:

«Haver hæderlig og vellærd mand, hr. Thorlof Gregersøn, provst her udi Færø, givet dennem sammen udi sin sognekirke, som er på Næs udi Østerøen, der man skrev 1598 om St. Michelsdags tid, og levede [de] så udi deres ægteskab tilsammen udi nogle år. Derefter kaldte Gud almægtigste forn. Gunner Poulsøn og hans hustru, forn. Agathe Joensdatter, og forn. Elsebe Gunnersdatter lever endnu...»[1])

Tingið gav hareftir Strange Madssøn fúta fullmakt til at sóknast eftir hesum arvi og at fáa hann til vega, um hann var at finna. Hann segðist at vera til í Jútlandi.

Leingi sæst stríðið um arvin eftir Jóan Heinason at hava varað. Í 1629 komu tvær systrar Mikkjals, Marita og Brita, fram á ting við klagu um bróðurin fyri at vera lagstan á teirra faðir- og móðurarv. Málið varð dømt av løgmanni einsamøllum:

«Kender jeg, Joen Justinussøn lagmand udi Færø, at anno 1629 den 3. august på et sat lagting udi Thorshavn fremkom salige Joen Heinesøns arvinger, besynderlig Marritte og Britte Joensdøtre, og havde i rette for mig ladet stævne deres broder, Michel Joensøn og hannem tiltalede for deres fædrene og mødrene arv, som de formente sig at have inde hos forn. deres broder Michel Joensøn.»

Eftir hesum tykist stevningin at umfata allar arvingar, men systrarnar høvdu lagt navn til. Løgmaður dømdi tá, at sjálvt skiftið, sum var váttað av kendum monnum við teirra innsiglum og undirskrivtum, og sum síðan varð skrivað út í arvaseðlar, kundi einki gerast við nú,[2]) men:

«hvis som de kan lovligen bevise, at de ikke haver bekommet af deres broder, Michel Joensøn, efter arvebogen og skifteseddelens formelding, som enhver af dennem haver bekommet, den tid skifte og bytte stod, at derfor forn. deres broder, Michel Joensøn, at stande dennem til rette og betale, hvis de udi så måde efter deres skifteseddel kunde reste.»

Einki kom fram undir hesum máli, hvat Mikkjal enn hevði inni

1) Lb. fol. 35a. 2) Lb. fol. 177a og b.

av arvinum hjá hinum systkjunum. Løgtingsbókin hevur í hvørt fall einki um tað. Sum Mikkjal hevði borið seg at í øðrum førum, kundi hetta tó verða útjavnað við eini semju.

O. u. 15 ár vóru tá liðin, síðan Jóan Heinason var deyður, men ófriður var alsamt um Lambaarvin. Løgmannsdómurin skapti ikki frið um spurningin. Systrarnar ríva hann upp aftur, og tær skylda týðuliga bróðurin fyri at hava stungið ov nógv til sín. Hin 31. juli 1630 er bókført stríð í Lambaættini, sum óivað hevur sín uppruna í arvinum:

«Anno 1630 den 31. juli på et sat lagting i Thorshavn på Færø fremæskede kongl. majestæts foged, Mads Christensøn, Michel Joensøn i Lamhage og hans søster, Sige [Sigga] Joensdatter og tilspurgte forn. Michel Joensøn, om han på sin hustrus Magdalene Andersdatters vegne vilde lide dom med sin søster, Sigge Joensdatter, om de utilbørlige skældsord forn. Michels kone og søster imellem havde været, hvortil Michel Joensøn svarede, at den ene var hans kone og den anden hans søster og så heller, det kunde komme til god forligelse end til dom, hvortil kongl. majestæts foged svarede, at han på Hans majestæts vegne denne gang vel vilde forlige dennem til forligelsesmål, dog Hans majestæts ret uforbrudt i alle måder, med sådant forord, efterdi der findes brøst på begge sider, at hvem af dennem efter denne dag, der først gav årsag til nogen skældsord eller anden klamber og uenighed, skulde straffes på det højeste, hvis lov og ret kunde medføre, og denne sag med alt stå dennem åben for efter deres forligelsesbrevs videre indhold.»

Sigga, systir Mikkjals, hevur verið í Lamba óivað í teim ørindum at fáa skil á arvi sínum, og har er hon komin í orðstríð við Magdalenu, sum hevur verið hin orðfúsa í øllum heimligum viðurskiftum. Mikkjal hevur tagt og bølt, men at tað er hann, sum átti at hava hildið fyri viðvíkjandi arvinum, er ivaleyst. Semju vildi hann sjálvsagt hava fyri at fjala út yvir arvaspurningin. Yvir fyri fútanum var Mikkjal altíð hin eyðmjúki. Helst hevur tað kunnað givið honum ein rættarligan fyrimun at halda seg góðan vin við fútan. Vit hoyra, at Magdalena brigslar Mikkjali tað, táið tað seinri kemur til uppgerðar hjúnanna millum.

Mikkjal í Lamba átti bróður, sum æt Heini. Henda Heina hoyra vit sum nevnt annars einki um, men tess meira sigur løgtingsbókin um son hansara Jóan Heinason. Jóan var bóndi á Glyvrum og vetrarfúti 1628 - 47. Hann varð dømdur frá festinum og misti starvið sum vetrarfúti, sjá bls. 44, og í dóminum stendur týðuliga, at hann var bróðursonur Mikkjals í Lamba. Væl er hugsandi, at herverkið, sum hesin yngri Jóan Heinason varð dømdur fyri, hevði sín uppruna í Lambaarvinum.

Ein dóttir av Jóani Heinasyni løgmanni var sum áður nevnt gift við Norðoya presti, Hans Jørgensøn Fønbo (1571—24). Hann hevði í síni tíð lænt Magnusi Heinasyni pening og fekk síðan jørð eftir Magnus í Føroyum til nýtslu; soleiðis hevði hann eisini Kálgarðsjørð í Sunnbø. Kálgarður tykist annars at hava verið festijørð av Benckestockagóðsi. Í 1619 krevja Sjúrður Jákupsson og Pætur Gunnarsson rætt til at innloysa hesa jørð, og ein mørk í Nólsoy, sum Magnus



hevði keypt, er áður nevnd. Fyri prestin í rættinum møtti Johannes Zachariassøn, (møguliga sonur av Zacharias Thormodsøn løgmanni). Fýra synir av Hans Jørgensøn presti sjólótust eftir søgn í báti eystan fyri Eiðsvík á Viðareiði, men helst man hann hava átt ein son eftir, tí tann Absalon Hanssøn, sum fær hálvan Heygagarð 1626, kundi væl hugsast at vera sonur hansara. Ata Eyðunsdóttir, sum festir hin helmingin av garðinum, er óivað einkjan eftir Sakaris Pætursson, ið hevði havt allan garðin. Ata var dóttir av Eyðuni Andrassyni presti og prósti. Sonur teirra, Sakarisar og Atu, kom fyri rættin 1634, tí hann hevði skrøggað av at kenna 2 fjøll av jarni í Viðoy og eitt av tini í Suðuroy.

Chr. Heilskov sigur í síni ættarsøgu «Af den Heinesenske Slægts Saga», at Jóan Heinason løgmaður átti ein son sum æt Guttormur, men løgtingsbókin sigur einki um tað.

Norðara helvt í Kunoy er hálvmørk í kenning størri enn syðra helvt, og søgn er um, hvussu henda kenningarhálvmørkin er komin til vega. Húskallurin, sum giftist við eini dóttir av Jóani Heinasyni, legði sær nakað av jørð inn og fekk aftrat loyvi til at halda kenningarseyðir í haganum. Hetta skal Jóan Heinason hava fingið gjørt um til eitt hálvmarkafesti. Søguligur stuðul, um enn ikki stórur, tykist at vera fyri søgnini í bóndabókini og vártingsbókini.[1])

Eitt mál, sum brestur á í 1622, gevur okkum innlit í, hvussu Mikkjal var umtóktur í almennum starvi. Hetta árið var Mikkjal í Lamba ikki møttur á Eysturoyar vártingi, hóast hann tá nýliga var vorðin sýslumaður í Eysturoy, av hvørji orsøk vita vit ikki. Á hesum tingi nýttu Eysturoyar tingmenn skemdarorð móti Mikkjali og lótu tey bókføra. Fútin, Mads Christensøn, stevnir so Eysturoyar tingmonnum í brævi 2. juli 1622[2]) við hesum orðum:

«Hilsen forsend med Vorherre. Vide må I, Laurids Ellingsøn, Antonius Hendriksøn, Gutte Andersøn og Ole Lauridsøn, lagrettesmænd udi Østerø, at Michel Joensøn udi Lamhage haver berettet for mig, at han haver tiltale til eder, for at I skulde sidst forleden vårting have skældet hannem på hans ære og ladet hannem indskrive udi tingbogen, som er, at I vilde hverken sidde i lov eller dom med hannem efter den dag, thi han var en hykler og en falskner eller bagvasker efter tingbogens videre indhold, uanset at han var ikke selv til stede.

Thi beder jeg eder på kongl. majestæts vegne, at I retter eder efter hannem at møde her udi Thorshavn til næstkommende stævne, som skal holdes Marie Magdalene dag, som er den 22. juli, tagende med eder, hvis I eder udi denne sag med forsvare ville, og da at lide og undgælde på begge sider, hvis lov og ret er.»

Orðini *hyklari*, *falsari* og *bakvaskari* hava altso verið bókførd, men ikki í hesa løgtingsbókina, vit kenna. Tað skuldi so verið ein serlig vártingsbók, sum nú er burtur.

---

[1]) Sjá Fær. kongsb. bls. 126. Eftir vártingsbókini 30. mars 1699 á Norðuroya vártingi. Fútin sóknast eftir eini kongsbóndamørk í Kunoy, sum eingin leiga var latin av í langa tíð, og fleiri menn vísa seg tá at sita við gyllin av hesi jørð.
[2]) Lb. fol. 118 a.

Við brævi 15. juli 1622 [1]) læt fútin síðan eftir áheitan frá Jóhannesi Torleivssyni stevna Mikkjali í Lamba:

«Først med de tvende breve, som I have skrevet til vårtinget. Desligeste, at I med Eders råd haver flyet dennem (tingmonnunum) ugunst hos deres øvrighed, den tid salig Strange Madssøn. *Item for de begærede af Eder, at I skulde stævne Jacob Jacobsøn, fordum købmand, til forleden vårting, hvilket I skulde have forment Eder at have gjort og ikke skulde findes udi sandhed.* Sammeledes lader Johannes Thorlofsøn Eder stævne, for at I ikke vilde besegle hans skudsmål, eftersom han siger og Eder ydermere berette kan.»

Ákærurnar siga einki um, hvørji evni hesi tvey brøv Mikkjals umtalaðu, men táið vit minnast, at tann sorinskrivarin, sum førdi tingbókina í Føroyum 1622 og 1623, æt Jacob Jacobsøn, og at skrivtin hjá honum er meinlík skrivtini hjá keypmanninum Jacob Jacobsøn, kann tað ikki vera ov nógv avgjørt at rokna við, at hetta er sami maður, og at hesin svikafulli keypmaðurin er vorðin skrivari í Føroyum aftan á Gabriel Mitens. Dømi um hesar handskrivtir verða sýndar seinni. Út frá hesi ætlan hevur Jacob Jacobsøn keypmaður sitið sum sorinskrivari á Eysturoyar vártingi 1622, og Mikkjal í Lamba man tí hava aftrað seg við at stevna honum. Brøv Mikkjals kunna væl hugsast at hava havt stevningarspurningin á máli. Mikkjal var tá bæði sýslumaður og løgrættumaður fyri Eysturoy. Eingin undanførsla sæst givin fyri, hví hann tó ikki var møttur á hesum vártingi. Í tingbókini hetta árið er Jóhannes Torleivsson nevndur sum «Johannes Thorlofsøn udi Højvig.» Hetta er merkiligt, tí Jóhannes sæst fyrst at hava verið bóndi í Hoyvík 1626—28. Tá 1622 var Lyder Augustinussøn bóndi har. Jóhannes Torleivsson sat sum festari á $5^1/_2$ mørk á Selatrað 1614—19, og 1619—30 hevði hann 10 merkur á Selatrað í festi. Fyri vist sæst, at Jóhannes Torleivsson hevur verið sýslumaður í Eysturoy til 1619. Skjótt aftan á tykist Mikkjal í Lamba at hava fingið hetta sýslumannsstarvið frá honum. Av hesum sakarmáli síggja vit, at Jóhannes er óður inn á Mikkjal, og at hann stígur fram sum sakførari fyri Eysturoyar løgrættumenn móti Mikkjali, og orsøkin man nógv vera at finna í sýslumannsskiftinum í Eysturoy. Jóhannes Torleivsson má tí ætlast at vera rýmdur av Selatrað at búgva, táið hann er farin frá sum Eysturoyar sýslumaður. Tó tykist hann at hava fingið eina vissa samsýning á Selatrað við festing av kongsgørðum um somu tíð. Nær liggur tað fyri at hugsa at tann ókendi sorinskrivarin, sum hevur ført tingbókina 1624—26, kanska hevur verið Jóhannes Torleivsson.

Hví løgtingið slepti Jacob Jacobsøn keypmanni so lætt frá ábyrgd síni 1619—20, er nú lættari at skilja. Fyri avgerðum á tingi ráddu mest nakrir máttmiklir menn saman við fúta og løgmanni, og Mikkjal tykist altíð at hava hildið seg góðan vin við fútan. Í 1620 vóru løgrættumenn, sum áður nevnt, komnir í neyð av teirri klagu um loynihandil, hin nýggi fútin hevði frammi móti teimum, og sum teir máttu til kongs við.

[1]) Lb. 118b—119a.



Um Antonis Heindriksson á Selatrað, sum um hetta mundið var løgrættumaður í Eysturoy, er bókført í 1615:

«Den 2. august på lagtinget udi Thorshavn opstod Antonius Hendriksøn og åbenbarligen sagde til lagmanden, at lagmanden havde altid været efter hannem med forfølgelse, hvor han kunde.» Tá sigur tingbókin: «Dermed stod lagmanden op og vigede fra tinget og gav kongl. majestæts foged sådant til kende.» Fútin fór tá aftan á løgmanni og fekk hann inn aftur, og so stendur, at hann «lydeligen adspurgte forn. Antonius Hendriksøn, om han vidste, hvad det var at overfalde lagmanden med ubeskedne ord nu på det sted, han sidder og skal forhøre sager og dømme udi nogen sag [1]).»

Ikki er tilskilað, at Antonis fekk bót fyri henda sín atburð. Harðligur maður man hesin Antonis hava verið og somuleiðis bróðir hansara, Jaspir, tí í 1619 spyr fulltrúi fútans, Rasmus Pedersøn, Víkarmenn: «om de vilde have Jesper Hendriksøn (á breddanum: Sellestrød) til nabo og granne igen,» men Víkarmenn svara, «at forn. Jesper var en klammers mand, og de begærede hannem ikke igen til granne.» Hesin Jaspir hevði festi í Haldórsvík 1601—15 og á Selatrað saman við øðrum 1601—28. Fútin man hava havt í kvittan at geva honum festið í Vík aftur. Antonis Heindriksson sat um hetta mundið við tveimum festum á Selatrað, $2^1/_2$ mørk og 6 merkur. Á Skála hevði hann havt $5^1/_2$ mørk í festi 1601—03.

Umframt Antonisi hevði Mikkjal í Lamba stevnt fedgunum Laurids Ellendsøn og Olav Lauridssøn á Skála, sum eisini vóru løgrættumenn í Eysturoy. Hin seinri er tann í søgn kendi Ólavur Lavarsson, og systir hansara var Marjun Lavarsdóttir, sum giftist til Ørðavíkar. Hin fjórði løgrættumaðurin, sum Mikkjal stevndi, var Gutte Andersøn, bóndi við hús í Syðrugøtu, ættaður úr Oyndarfirði.

Ivaleyst hava Eysturoyar løgrættumenn havt grein í sínum máli viðvíkjandi teim klagum, Jóhannes Torleivsson førdi fram á ting fyri teir, men teir hava borið seg óhøviskliga at, og tí fingu teir lógina ímóti sær. Heldur ikki sæst, at teir hava stevnt Mikkjali á Eysturoyar várting 1622. Hin 26. juli sama ár síggja vit, at teir eru fallnir í fátt. Teir viðganga á løgtingi, at teir hava sagt hesi hørðu orð um Mikkjal undir ávirkan av brennivíni og í hugsunarloysi og biðja enntá um fyrigeving og siga: «at de vidste intet andet med hannem end den del, som ærlig og kristelig var og en ærlig mand anstår i alle måder.» Haraftrat gingu teir undir: «at om nogen af forn. lagrettesmænd efter denne dag enten med ord eller gerninger lader sig høre eller mærke om forskrevne stykker, de hannem haver tillagt, da skal denne forn. sag stå dennem åben for.»

Eysturoyar tingmenn siga altso, at teir hava verið druknir á Selatraðar vártingi 1622, men norska løgbókin kravdi, at løgrættumenn skuldu vera edrúir í sínum starvi. Løgtingsmenn tykjast annars tá at hava verið samdir um at royna at fáa semju í lag, og soleiðis kom málið ikki til dóms, tí 30. juli sama ár hava Eysturoyar tingmenn ásannað brot sítt og biðið um fyrigeving; í brævi henda dag taka teir soleiðis til:

[1]) Lb. fol. 13b.

«Da efter sådan berørt lejlighed er kongl. majestæts foged, Mads Christensøn, opstået og æskede dom over os på kongl. majestæts vegne, hvad vore bønder og straf bør at være efter loven for sådan vor grove forseelse, og om vi var de mænd, der kunde klæde nogen øvrigheds sæde efter den dag, og efterdi vi nu fornemmer, sådan vor store forseelse ikke alene vil gå på vort gods og formue, men på den del, som meget bedre er, på vor ære og velfærd, da haver vi venlig ombedet lagmanden, Zacharias Thormodsøn, hr. Christen Pedersøn, sognepræst udi Thorshavn, Hans Pedersøn, Laurids Hanssøn købmand, Daniel Nielssøn og Holdan Gudloksøn, at de på vore vegne ville Velgøre og tale med kongl. majestæts foged, at han for Guds skyld og vore fattige hustruers og vore mange små børns skyld ikke vil strenge mod os efter vor ære og velfærd, og han vil lade den dom falde, han haver været begærende over os, thi vi kender os noksom skyldig at være i denne sag og begærer nåde og ikke ret for Guds skyld[1]).»

Í slíkum máli sum hesum sigur norska løgbókin frá 1604 undir tingfarabalken kap. IV soleiðis:

«Efter en mands egen bekendelse og lovlige vidnesbyrd skulle alle sager dømmes. En mands vidne er som ingen vidne, og to mænds vidne er som ti mænds vidne, undtagen der føres bedre vidnesbyrd imod. *Ingen vidnesbyrd, som gælder på nogen mands ære, liv og gods, skal tages eller gives beskreven, uden den, det pågælder, er derimod lovligen stævnet og kaldet og er også selv til vedermålsting nærværende til stede.* Skulle og ikke lagmanden eller lagrettesmændene dømme efter nogen bevisning, som ikke er tagen til tinge for lagmanden eller lagrettesmændene, som stævnes på fjerdings- eller fylkesting der, som tingstuer eller stævnestuer holdes, og dér vundet (vidnet) og beseglet som vedbør.»

Herav sæst týðuliga, hvussu sterkur Mikkjal stóð viðvíkjandi teim hørðu orðum, Eysturoyar tingmenn høvdu nýtt um hann og bókført á Selatraðar tingi. Hann snýr sær undan teirra kærumálum við at siga, at tað, at teir vóru so seinir at koma við teimum, vísir, at einki var í teimum, men hann mælir ikki orð um klaguna, at hann skuldi hava skulkað sær undan at stevna Jacob Jacobsøn keypmanni. Hetta kann eisini benda á, at hesin maður hevur sitið sum tingskrivari hetta árið; Strange Madssøn var deyður 1622. Mikkjal viðgongur einki, heldur ikki klaguna frá Jóhannesi Torleivssyni.

Eftir at tingingar vóru farnar fram um semju í málinum, hevur fútin lovað at lata málið falla, um hesir Eysturoyar tingmenn viðgingu hóskandi bót, og Jóhannes Torleivsson sæst har at vera komin upp í part.

Fedgarnir Laurids Ellendsøn og Ole Lauridssøn, somuleiðis Antonius Hendriksøn komu undir 12 gyllin í bót hvør, Gutte Andersøn skuldi «for hans armods skyld» bøta 7 gl. og Johannes Thorlofsøn 10 gl. Fedgarnir lótu alla bót sína beinleiðis við 12 vágum í fiski hvør. Hetta samsvarar við, at fiskiskapurin hevur verið góður hetta árið, men sigur eisini, at teir hava verið múgvandi menn.

[1]) Lb. fol. 121 a og b.



Ivaleyst er tað sakarmálið 1622, sum hevur verið havt á lofti, táið hetta bótarmálið er at finna undir 1625:[1]) «Michel Joensøn for skældsord mod Olof Lauridssøn skal bøde til kongl. majestæt 3 mark sølv.»

Tekki hjá tingmonnum hevur Mikkjal í Lamba ikki vunnið við sínum atburði. Ættborin skuldi hann verið til løgmannsembætið, táið Sakaris Tormóðsson fall frá 1628, men løgrætturin valdi tá annan mann til at seta í løgmannsstólin, Jóan Justinusson, bónda á Kellingagarði í Hattarvík.

Hjúnarlagið hjá Mikkjali í Lamba við Magdalenu Andrasdóttir var ikki gott, sum árini liðu. Mikkjal var tvær reisur giftur, og við fyrru konuni hevði hann flestu børnini, men vit kenna hana hvørki av navni ella av ætt. Við Magdalenu átti hann ein son, Jónas Mikkjalsson, ið seinri gjørdist prestur á Kjalnesi í Norðurstreymoy, og eina dóttur, Karin, sum seinri giftist í Keypmannahavn. Magdalena var prestadóttir úr Noreg. Nógv bendir á, at tey hava lært at kenna hvørt annað, táið Mikkjal sum ungur gekk í skúla í Bjørgvin.

Magdalena var einkja, táið hon giftist við Mikkjali o. u. 1616, og hørð sum hon var av lyndi, tykist hon at hava staðið einsom í Føroyum. Hon tykist skjótt at hava mist alla virðing fyri Mikkjali og fyri fútanum, Mads Christensøn, sum yvirvald. Í 1618 finna vit hana sum nevnt í orðastríði við Guttorm Nilsson, systurson Mikkjals, men annars tykist arvastríðið í Lamba mest sum at vera yvirstaðið, táið Magdalena rættuliga kemur í stríð við fútan og mann sín. Ivaleyst hava fútin og Mikkjal hildið saman. Aldri talaði Mikkjal á tingi øvugt orð móti fútanum, og hann tykist heldur aldri at hava stillað seg fram sum vernd fyri Magdalenu. Gjøgnum arvastríðið og kanska eisini undir málinum 1622 man hon hava sæð einhvønn eginskap við manni sínum, sum henni ikki hevur líkst á. Eisini vóru í húsunum nógv stjúkbørn, sum vóru væl á veg komin.

Magdalena hevði eina tíð búð sum einkja í Bjørgvin, og Mikkjal hevði í 1619, o. u. 3 ár eftir giftuna, biðið um at fáa skotsmál haðani um Magdalenu. Skotsmálini eru 3 í tali, og vit finna tey innførd í løgtingsbókina undir 1623, men dagsett í oktober og november 1619. Okkurt man hava verið atvold í, at skotsmálini hava verið kunngjørd júst tá, men um hetta nevnir tingbókin einki.

Hitt fyrsta skotsmálið er givið av «Theophilus Theophili, Guds ords medtjener til korskirken i Bergen,» og maðurin, sum hevði biðið um skotsmálið, er nevndur «Jørgen Jansøn, borger og indvånere her udi Bergen.» Tó verður einki sagt um, hvør ið hevði biðið henda mannin farið eftir skotsmálinum. Vit fáa at vita í skotsmálinum, at Magdalena áður hevði verið gift við Niels Joensøn, og at hon, eftir at hon var vorðin einkja, hevði búð í húsi hjá áðurnevnda presti. Faðir og móðir at Magdalenu verða nevnd, og hon fær annars besta viðmæli fyri lív sítt bæði í orð og gerð. Skotsmálið er dagfest 21. okt. 1619.

Annað skotsmálið er frá býarstýrinum í Bjørgvin við Søren Sørensøn borgmeistara á odda og dagsett 4. nov. 1619. Knud Gyldenstjerne til Ågård, sum hetta árið var vorðin høvuðsmaður á Bjørg-

[1]) Lb. fol. 148 a.

vins húsi, bað um hetta skotsmálið. Ætlandi hevur Mikkjal í Lamba biðið hann heinta skotsmálið fyri seg. Orðalagið í hesum skotsmáli er eins gott og í hinum fyrra, og sagt verður í tí:

«Hendes fader haver været hæderlig og vellærd mand hr. Anders Poulsøn Kolding, sognepræst til Gloppens præstegæld udi Nordfjords len og moderen Caren Christensdatter[1].»

Triði og síðsti vitnisburðurin er frá handilsskrivstovuni við bryggjuna í Bjørgvin, dagssettur 19. nov. 1619, og harí stendur m. a.:

«At eftersom ærlig og forstandig mand, Michel Joensøn, boende udi Lamhage, på os med hans skrivelse haver anmodet at give hannem vidnesbyrd om hans itsige [nuværende] hustru, Magdalene Andersdatter, salig Niels Joensøns forrige hustru, . . . da efter sådan lejlighed er det os vel noksom og fuldkommen vitterligt, at hun . . . haver forholdet og skikket sig ærlig og vel . . ., men hvad belanger, at efter hendes salig mands død er befattet med stor skyld og gæld, det er os vitterligt, at hun det ikke udi nogen måde haver unyttigt fortæret, men formedels Guds vejr og vind haver lidt stor søskade og derudover kommen til agters, hvormed ingen kunde komme til kort uden de godt folk, hun haver handlet og købslaget med, og er nogen med rette skyldig bleven, at hun dennem med tid og lejlighed haver kunnet tilfredsstille, og efterdi forn. hendes itsige ægtemand, Michel Joensøn, haver os sådant anmodet hannem på forn. hans hustrus vegne at meddele beskrevet, haver vi det med rette ikke kunnet benægte eller vægre ville under vort sekret at meddelt hannem beskrevet, og dersom han på forn. hans hustrus vegne det i nogen måde ydermere behøver, ville vi det gerne med loven fuldgøre og stadfæste[2].»

Her verður sagt týðuliga, at tað er Mikkjal, sum hevur biðið um henda vitnisburðin. Hann hevur altso viljað fregnast hjá handlinum um, hvørt Magdalena mundi hava nakra skuld har frá teirri tíðini, hon búði í Bjørgvin, og hvussu hennar fíggjarviðurskifti annars høvdu verið. Hon tykist at hava havt skipamiss, eftir at fyrri maður hennar er deyðar, og er harvið komin í nakra skuld, men hon tykist at hava goldið hana aftur.

Hetta, at Mikkjal uttan um Magdalenu hevur njósnast um hennar ognarviðurskifti í Bjørgvin, kann hava sett ilt hjúnanna millum, og ikki er at taka fyri, at Magdalena sjálv hevur latið skotsmál síni kunngjørt á tingi, eftir at hjúnarlagið veruliga var farið í spønir. Tingbókin sigur einki um, hví skotsmálini hjá Magdalenu júst verða kunngjørd í 1623. Tá má vera hent brot hjúnanna millum. Stívsinnið í Magdalenu er, sum árini liðu, vorðið brekað og gjørt eintáttað av smásinni Mikkjals.

Hin 14. juli 1625 møtti Mikkjal á løgtingi sum stevndur av fútanum til at gera reiði fyri ein stórhval, sum veturin fyri var rikin á Skálafirði[3]). Staðarnavnið *Hvalsins rætt* undir Lambareiði kann møguliga verið komið harav. Mikkjal var tá sýslumaður og skuldi sum sovorðin ansa eftir kongsins parti av hvalinum. Líkt er tó til, at fútin illkendi Mikkjal fyri at hava lagt undir seg sjálvan ov nógv av hesum hvali, tí hann spyr á tingi:

[1]) Lb. fol. 139a og b. [2]) Lb. fol. 140a. [3]) Lb. fol. 146a og b.



«hvor mange tønder af den tykke tran kongl. majestæt tilkom af den storhval, som kom i Skålefjord forgangen vinter, såvel som hvor meget der blev solgt af samme hval til bønderne her udi landet for færøske pendinge, hvortil forn. Michel Joensøn svarede, at kongl. majestæt tilfaldt af den tykke lyse otte tønder, som han haver leveret til fogedens tjener, Morten Andersøn. Nok blev solgt til indvånerne her i landet, som beløber sig til tyve halv syvende gylden og fire skind, på hvilken Michel Joensøns bekendelse om samme hval var kongl. majestæts foged Mads Christensøn, af os et tingsvidne begærende.»

Fútin tykist hereftir at hava góðtikið Mikkjals frágreiðing.

Magdalena í Lamba man hava havt okkurt í kvittan, tá hon í 1629 biður um og fær skotsmál[1]) av løgtingi:

«Anno 1629 den 3. aug. på lagtinget udi Thorshavn udi provstens, præsternes, lagmandens og lagrettesmænds samt menige almues nærværelse og påhørelse opstod ærlig og gudfrygtig kvinde, Magdalene Andersdatter i Lamhage, og lydeligen lod skyde sit skudsmål til alle og enhver, som til stede var, om der var nogen gejstlig eller verdslig, ung eller gammel, fattig eller rig, som sig udi nogen måde på hende havde at klage, og hvorledes hun havde sig skikket og beteet imod dennem alle og enhver, som havde været udi hendes omgængelse.»

Tingið gav tá Magdalenu hitt besta skotsmál og viðmæli.

Í 1633 síggja vit Magdalenu koma í harðligt stríð bæði við mann sín, Mikkjal, og við fútan. Fyrst kallar fútin Mikkjal fyri rættin um tveir spurningar, og í báðum vitnar Mikkjal fútanum eftir vild. Fútin hevði lænt bát frá Mikkjali, og árið fyri, altso í 1632, hevði hann selt Suðuroyar presti, Hans Hanssøn Hardi, henda bát. Mikkjal vitnar, at hann hevði biðið fútan selt bátin fyri seg. Aftan fyri liggur, at Magdalena hevði verið á kroppinum á fútanum fyri ólógliga at hava selt bátin. Mikkjal takkar enntá fútanum fyri góða samsýning.

Henda bátssøla má verða sett í samband við, at í 1625 hevði Mikkjal borgað fyri gjald, 20 gl. av 110 gl., ið skuldu keypa tríggjar brøður í Funningi leysar frá at verða hongdir, sjá bls. 23. Eisini spyr fútin Mikkjal á tingi 1633:

«om de pendinge, han om året udgav med de andre dannemænd for de tre brødre i Funding, som var dømt til at skulle være hængt, dennem med at befri for galgen, om han havde nødt og tvunget ham til samme pendinge at udgive, hvortil han svarede nej, at han samme pendinge af fri vilje havde udgivet[2]).»

Mikkjal tykist at hava drálað við at lata sítt gjald («om året»), og líkt er til, at fútin hevur tikið hesar 20 gl. burtur av peninginum, hann hevur fingið fyri bátin. Magdalena brigslar fútanum at hava havt Mikkjal í lummanum. Hon hevur væl ikki kunnað hugsað sær, at Mikkjal av fríum vilja hevur hjálpt við til at loysa hesar menn frá gálganum, og sjálv helt Magdalena tað vera óneyðugt at lata henda pening út, tí, sum hon seinri segði, hesir tríggir brøðurnir vóru als ikki skyldir við Mikkjal. Hin gamla ættarkenslan og ættarhugsanin kemur her týðuliga til sjóndar. Sjálvsagt vitnaði Mikkjal, at hann av

[1]) Lb. fol. 177b—178a. [2]) Lb. fol. 204a. Sølan av bátinum var eisini her frammi.

fríum vilja hevði lagt teir 20 gyllin út fyri at leyskeypa teir deyðadømdu brøðurnar í Funningi. Beint aftaná hetta læt fútin innføra í tingbókina klagurit yvir Magdalenu:

«Eftersom jeg haver ladet stævne Magdalene Andersdatter i Lamhage i dag for nogen usandfærdige ord, hun haver talet på mig forgangen vinter her i Thorshavn, siden jeg var dragen af landet, i hustru Doretes hus såvel som på andre steder, og eftersom jeg hører, da agter hun ikke stort, hvad hendes mund taler og besynderlig om øvrigheden her udi landet, som Gud og Hans majestæt haver betroet til øvrighedsembede, hvilke hendes utilbørlige ord ingen ærlig mand, som haver nogen bestilling på Hans majestæts vegne, bør at lade passere, og eftersom jeg hører, at hun vil drage af landet at beklage sine sager, hvilket skal stå hende frit for, når hun først haver lidt den dom her udi landet, og eftersom jeg hører, at hende ingen lov eller ret må vederfares her i landet, som hun dog uretfærdigen indbilder sig og aldrig skal bevise, *thi* jeg nogen gange på Hans majestæts og rettens vegne haver ladet hende stævne hid til Thorshavn til lagtinget at lide og undgælde lov og dom, hvilke stævninger hun dog modvilligen haver siddet overhørig, retten til respekt og foragt, og lader sig endda uforskammet forlyde, at hende ingen ret må vederfares. Hvad hendes utilbørlige liv og levned er anlangende, som hun daglig øver mod sin egen mand og stedbørn, sætter jeg hen til sin sted. Er begærende, at dette mit indlæg måtte læses og påskrives og i landsens bog indføres.

Datum Thorshavn, den 29. juli anno 1633.

*Mads Christensøn*[1]).»

Dagin eftir er innført klagumál frá Samsoni Mikkjalssyni um Magdalenu. Samson var stjúksonur Magdalenu, og táið vit samanbera hetta við endan av brævi fútans, er tað týðuligt, hvør ið stendur aftan fyri hetta álopið á Magdalenu. Mikkjal sjálvur kundi ikki so væl føra fram beinleiðis klagu á tingi móti konu síni. Hetta prógvar júst tað, sum Magdalena hevði at manni sínum fyri, at hann altíð gjørdi fútanum eftir vild.

Í brævi sínum klagar Samson um, hvussu ilt faðirin og bróðir hans, Sámal, liðu av Magdalenu)[2]; bróðirin, Jákup, skuldi ikki hava tað stórt betri. Slatur hevur gingið um hetta, «som landrygt er.» Samson nevnir so, hvussu Magdalena ber seg at:

«udi synderlighed imod min broder, Samuel Michelsøn, hvilken hun således forhåner og misunder, at han ikke må være værdig at være i den stue, hun udi er, hverken når Guds ord af postillen om søndagen oplæses, eller andre tider, medens han med sin anden broder og folkene der på gården i Lamhage må særdeles i en anden stue lade for dennem læse. Han ikke heller må gå til sin faders bord, men han og hans broder, Jacob Michelsøn, næsten lige med andre tjenere der på gården spises, in summa, hunde og katte må hun langt

---

[1]) Lb. fol. 204 b. [2]) Lb. fol. 207 a–208 a.



bedre i huset hos sig lide og fordrage end mine fattige brødre, hvilket jeg selv haver set og erfaret, at hun til dennem haver et stifmoderhjerte.» Í brævinum talar Samson, eins og hann ikki sjálvur tá búði í Lamba, tí fyri seg sjálvan klagar hann ikki um Magdalenu. Í 1637 tók hann við festi á Glyvrum eftir Mikkjal. Møguliga kann hann longu í 1633 vera fluttur hagar at búgva.

Í endanum á brævinum biður Samson yvirvaldið taka sær av at fáa skil á húsunum í Lamba, tí Magdalena má verða tamd:

«Er og at beklage, at bemeldte min stifmoder min fattige faders formue svækker og forringer, idet hun til sig anammer hoser, smør og andet, som der på gården er forhvervet og avlet og sig det til nytte gør efter hendes eget gefal og tykke, uanset min fader må bekoste og lønne alle gårdens tjenere, så og kongl. majestæts leje og landskyld, item hvis til husens fornødenhed skal indkøbes.» Sigur Samson víðari, at Mikkjal missir allar ognir sínar, um hetta skilið heldur fram; einki verður tá eftir til børn hansara, og tí má yvirvaldið, meðan tíð er, steðga hesum óskili.

Niðri undir brævinum stendur:

«Anno 1633 den 30. juli læst på et sat lagting udi Thorshavn på Færø udi Michel Joensøns og hans søns Samuel Michelsøns nærværelse og påhør, og Magdalene Andersdatter selv, ej heller nogen på hendes vegne mødte hendes forfald eller erklæring at gøre, og var Michel Joensøn og Samuel den klage stændig.»

Magdalena vildi ikki koma upp í leikin á tingi nú. Hon visti, hvat ið áleikaði. Løgtingið hevði jú givið henni sítt besta skotsmál í 1629. Einki sigur løgtingsbókin seinri um hesar tvær stevningar, Magdalena fekk. Bæði fútin og alt húsið í Lamba var eftir henni. Hon møtti tó aldri, og eftir løgtingsbókini at døma fekk hon hvørki dóm ella átalu frá tinginum. Fútin man tí, sjálvt um hann hevði Mikkjal í lummanum, ikki hava staðið heilt sterkur.

Í stevning fútans bíta vit merki í, at hann sigur seg hava hoyrt, at Magdalena ætlar sær til Danmarkar at klaga hann. Í stevning Samsons er vert at leggja í geyma tað, hann sigur um, at Magdalena tekur til egna nýtslu ýmist av garðinum. Vit vita, at sonur Magdalenu og Mikkjals, Jónas Mikkjalsson, júst tá skuldi til Bjørgvins at ganga í skúla, og hetta er tí lættari at skilja. Tað kostaði at halda sonin í læru, og Mikkjal mundi ikki vera íðin eftir at sleppa av við slíkan pening, tey eldri børn hansara óivað minni. Útlandsferðin hjá Magdalenu sjálvari vildi heldur ikki koma at kosta lítið.

Á sumri 1634 tykist Magdalena at vera farin til Bjørgvins við soninum, Jónas. Eftir at hava sett hann í skúla har, er hon farin víðari fram til Keypmannahavnar. Har hevur hon klagað fútan fyri kongi og hansara stjórnarmonnum og hevur í klagu síni nevnt bátin, fútin hevði selt Suðuroyarpresti. Fútin hevði longu fingið at vita um klaguna, táið hann var í Keypmannahavn um veturin 1634—35, tí longu á løgtingi 1635 dró fútin Mikkjal til svars fyri, hvat kona hansara hevði gjørt. Hann spurdi Mikkjal:

«om det var med hans vilje, at hans kone, Magdalene [stendur: Mallene], skulde nedrejse til København [fútin hevði sjálvur loyvt henni at fara] og give hannem an for Hans majestæt eller den høje

øvrighed, hvad årsag der var til, og hvad han havde forgrebet sig mod hannem eller hans kone i nogen måde, og om han ikke havde forhjulpet hannem til al lov og ret, såvidt som forsvarligt kunde være[1]).»

Hetta vildi fútin hava Mikkjal at viðganga á tingi, og tingbókin sigur:

«Hvortil forn. Michel Joensøn svarede, at Hans majestæts foged, Mads Christensøn, hannem aldrig udi nogen måde havde forurettet, men [han] betakkede hannem for alt godt, for hans kristelige omgængelse i alle måder og sagde derhos, hvad hans kone var anlangende, havde han forgangen år bevilget hende at rejse til Bergen og sætte deres søn i skole, men at hun løber fastelavn med godt folk og vil påføre dennem nogen unyttig trætte, vil han aldeles intet have med at skaffe i nogen måde, men at hun [det] må tage på sin egen hånd, thi Gud skulde vide, hvad han selv havde udstået med hende på nogle års tid, som han ikke kunde klage over til noget menneske.»

Enn rak Mikkjal bert fram undir, hvussu skilið hevði verið í Lamba hjúnanna millum. Hann vitnaði heldur ikki konu síni til frama, men fútanum eftir vild, og við vitnisburðum Mikkjals frá 1633 og 1635 hevði fútin fingið øll kort upp á hondina, sum skotsmálið, Magdalena fekk av løgtingi 1629, ikki kundi viga upp ímóti.

Á sumri 1638 hevur Magdalena verið aftur í Føroyum, tí 31. juli hetta ár letur fútin løgmannin stevna henni fútans vegna[2]), *tí:*

«forn. Magdalene Andersdatter havde nederrejst til København og hannem [fútanum] imod al lov og ret og nogen billig årsag usandfærdig og løgnagtig angivet for hans allernådigste herre og konning og den høje øvrighed for en båd, forn. Mads Christensøn skulde med magt og vold have hende frataget efter et tingvidnes videre formelding, og var dom over forn. Magdalene Andersdatter begærende efter Norges lov.»

Fútin var jú í Keypmannahavn hvønn vetur. Har hevur hann sjálvsagt vart seg móti klagunum frá Magdalenu og víst fram vitni síni úr tingbókini. Magdalena tykist at hava vunnið sær nakað viðhald í Keypmannahavn, men vitnisburður Mikkjals í Føroyum mátti í endanum fáa ríkisstýrið til at taka undir við fútanum og lýsa klagurnar frá Magdalenu grundleysar at vera. Hetta tykist stýrið at hava gjørt á sumri 1638 í brævi til fútans, tí tingbókin sigur víðari:

«Da eftersom bemeldte Mads Christensøn nu i dag haver bekommet den gode, velbyrdige hr. kanslers brev, haver han efterladt dommen over hende, som han haver haft god årsag til og derfor endnu her inde på lagtinget tilspurgte Michel Joensøn af Lambage i Magdalene Andersdatters nærværelse, om han haver taget hannem samme båd fra, som hannem meget utilbørligen eftersiges og det for den høje øvrighed, hvortil forn. Michel Joensøn svarede endnu som tilforn...»

Brævið frá kanslaranum, sum hevur verið skrivað, aftaná at hann hevur fingið vitnisburð Mikkjals úr Føroyum tilsendan, tykist at vera komið til Føroya 31. juli 1638. Tað hevur tá givið fútanum allan

[1]) Lb. fol. 218 a. [2]) Lb. fol. 241 a—242 a.



rættin. Mads Christensøn hevur óivað lisið brævið fyri tinginum og so aftaná hetta sagt, at hann vildi lata krav sítt um dóm yvir Magdalenu falla. Magdalena var á løgtingi hin 31. juli 1638, táið hetta fór fram, men eftir tingbókini hevur hon tá ikki latið munnin upp.

Í 1637 hevði Mikkjal latið son sín, Sámal, festa hálvan Lambagarð. Hetta hevði Magdalena á ein ella annan hátt kastað fútanum fyri og sagt, at hann hevði noytt Mikkjal at gera tað. Um hetta spyr fútin Mikkjal á tingi 1638, men Mikkjal segði, at hann hevði gjørt tað av fríum vilja, tí hann var vorðin gamal og vánaligur:

«Dersom han ikke havde haft forn. hans søn, måtte han have opladt den [garðin] til en fremmed for forn. hans kones Magdalene Andersdatters ulovlige fraværelse på syv [*siuff* tykist at vera eitt mistak] års tid, og de havde endda mere end nok af den ene halve part af samme gård at hjælpe dennem med, og sagde forn. Michel Joensøn, dersom hans kone, Magdalene Andersdatter ikke vilde blive bedre herefter end tilforn, måtte hun vel have blevet der, hun var, thi den tid hun var hjemme hos hannem, skikkede hun sig meget utilbørlig imod hannem, idet hun løb efter hannem om nattetide i hans gård udi hendes bare særk med et hvalspyd og vilde have stukket hannem ihjel, og hans klæder blev skåret i stykker, som de hængte på bjælken udi stuen, med meget andet mere, som han for skams skyld ikke nu vilde opregne.»

Mikkjal ber seg her ikki undan at vitna móti konuni sjálvt viðvíkjandi náttligum viðurskiftum í heiminum. Henda hending man helst vera farin fram, áðrenn Magdalena fór av landinum við soninum, Jónas. Um hetta kunna tey eisini hava verið ósamd.

Á tingi biður Mikkjal konu sína koma við sær aftur til Lamba og nú skikkað sær betri. Fútin býður tá Mikkjali at lata son hansara, Sámal, flyta til Glyvrar, men Mikkjal svarar, at um Sámal fór av bygdini, so fór hann við, tí einsamallur kundi hann ikki standa fyri garðinum í Lamba longur.

Hetta er síðstu ferð, tingbókin umtalar Magdalenu í Lamba. Ein harðlynt kvinna var hon, men meira fræls í sjónarmiðum, enn føroyingar annars vóru tá á døgum. Hon var vaksin upp undir øðrum viðurskiftum. Hennar einsemi í Føroyum og hennar stríð bæði innan- og uttanhýsis hevur óivað við tíðini gjørt hana beiska. Hendingin hina náttina í Lamba, sum Mikkjal nevnir fyri rættinum, hevur nakað í sær, sum bendir á, at Magdalena møguliga kann hava drukkið sær kenning við hvørt. Hon kann ikki hava verið ørlig, tí so hevði hon gjørt meira um seg fyri rættinum. Tað, at hon á náttartíð, táið hjúnini í Lamba eru komin til illnar, fer eftir Mikkjali við hvalvápni í hendi, hon í berum serki og hann í berari stúku, og í ferðini rennir spjótið gjøgnum klæðini hjá Mikkjali, sum hanga á bitanum, vísir ein atburð átøkan tí, drukknir menn kunna gera, táið øði kemur í teir.

Ikki kann Magdalena hava dvølst leingi í Lamba hjá Mikkjali, tí veturin 1638—39 hevur hon verið í Keypmannahavn,[1]) og hon má

[1]) Ivasamt um Magdalena tá kom nakratíð aftur til Føroya. Dóttur hennara og Mikkjals, Karin, giftist í Keypmannahavn við Anders Olsen. Í løgtingsbók 1666—77 fol. 50 b síggjast bæði Karin og Anders at vera deyð 1669. Hann hevur enntá tá verið uppaftur giftur. Sámal Mikkjalson í Lamba sæst tá eisini at vera deyður, óivað júst hetta ár.

tí longu vera farin aftur av landinum um heystið 1638. Hetta sæst av einum brævi, hon hevur skrivað til kongs í Keypmannahavn á vetri 1639. Dagssett er brævið ikki; einans árstal stendur á tí. Svarskrivið frá fútanum er tó bæði staðsett og dagssett: Keypmannahavn, 31. mai 1639.

Í hesum brævi til kongs tekur Magdalena upp aftur alt stríð sítt og biður um at fáa tað fyri ræ ttin í Keypmannahavn, tí í Føroyum finnst veruliga eingin ræ ttur. Fyrst krevur hon dóm yvir systir Mikkjals, Siggu, sum so blóðiga hevði sært hana heima hjá henni sjálvi við at brigsla henni ólevnað í Bjørgvin, áðrenn hon kom til Føroya. Uttan hennar vitandi hevði Mikkjal ynskt semju í málinum. So kemur hon við bátinum, sum fútin leingi hevði havt til láns og síðan selt, uttan at hon visti av tí. Tað var hon, sum átti bátin og ikki Mikkjal, og hon skuldi nýta hann at bjarga sær undan turkinum við, um hann herjaði á bygdina. Ætlandi hevur báturin tí staðið móti Skálafirðinum við Hvalsins rætt. Magdalena vísir eisini á eitt bræv frá kanslaranum, sum fútin hevði roynt at stinga til viks, ætlandi tí at tað gav henni ov nógv viðhald. Síðan nevnir hon bótina, sum Mikkjal legði út fyri teir tríggjar brøðurnar í Funningi. Fútin vil siga, at skyldskapur var til staðar millum Mikkjal og hesar tríggjar brøðurnar. Mikkjals festan burtur av garðinum til Sámals, son sín, hevði hon eisini frammi. Hat hennar til fútans, við rætti ella órætti, kennir einki mark. (Sjá Varðan, bind 18, bls. 209).

Jón Ólavsson indiafari greiðir frá í bók síni,[1]) at hann var á ferð við herskipunum Victor, Jupiter, David og Einhyrninginum, tá teir í 1616 løgdu inn í Føroyum og steðgaðu har í 14 dagar. Á hesi ferð gistu teir Mikkjal í Lamba í tvær nætur, og tað var ikki eiti av blíðskapi, ið har beyðst bæði til matna og drykkju. Hamborgarøl, lübskt øl, rostockarøl, enskt øl, norskt øl og danskt øl í tunnuvís. «Har var gleði høvd á mangan hátt við ljóðlæti mongum og eftir føroyskari vísu dansur og ringbrot við sangi og kvæðum.»

Magdalena hevur tá verið nýkomin húsfrú í Lamba, og hon man hava skipað fyri hesi veitslu, ið Jón indiafari letur so nógv um. Ikki finnst nú nakað skrivligt, sum bendir á, at Magdalena hevur verið aftur í Føroyum eftir ferð sína til Keypmannahavnar í 1639. Hon hvørvur harvið út úr søgu okkara, á hvønn hátt vita vit ikki, men dóttir hennara, Karin, giftist í Keypmannahavn. Mikkjal í Lamba livdi fleiri ár eftir hetta. Hann sæst at vera deyður um jóltíðir 1646, sjá bls. 45. Sonur Magdalenu og Mikkjals, Jónas Mikkjalsson, gjørdist seinri prestur á Kjalnesi í Norðurstreymoy. Sonur hansara var hin gitni harra Jónas, sum var prestur í Ónagerði og giftur aðru ferð við hini tiltiknu Beintu.

Faðir at Magdalenu var sum nevnt Anders Poulsøn, prestur í Gloppens prestagjaldi í Norðfjarðar leni í Noreg, og móðir hennar æt Caren Christensdatter. Presturin var ættaður úr Kolding og varð tí ofta nevndur Anders Poulsøn Kolding. Hann var ikki bispur í Bjørgvin, sum N. Andersen vil siga í síni bók: Færøerne 1600–1709.

[1]) Sjá Æfisaga Jóns Indiafara, sum Hitt íslendska bókmentafelagið gav út 1908–1909, bls. 120.



Bispurin í Bjørgvin frá 1508 til 1615 æt Anders Mikkelsøn Kolding, og hetta síðsta navnið hevði hann eisini tikið eftir føðibýi sínum. Kona hansar æt Bodil Andersdatter Buch.

Av løgtingsbókini sæst ikki, sum Chr. Heilskov sigur í «Af den Heinesenske Slægts Saga», at ein bróðir Mikkjals í Lamba æt Guttormur. Harafturímóti sæst sum áður nevnt, at ein bróðir Mikkjals hevur itið Heini. Nú kann verða ávíst, at ein Heini Jóansson (Heine Joensøn), sum má hava verið av Lambaættini, hevur búð í Sørvági, og er hann nevndur undir sakarmálinum móti Jákupi Jóanssyni í Elduvík 1623. Hesin Heini Jóansson í Sørvági man hava havt væl av jørð, tí í 1620 síggja vit, hann hevur havt húskall, Jóan Guttormsson, sum var komin fyri barn við eini gentu. Nakað av hesi jørð kann væl hava verið junkarajørð, hann hevur havt í festi. Í 1643 verða vit varir við ein annan mann í Sørvági, sum eitur Jóan Heinason (Joen Heinesøn) og ætlandi er sonur fyrrnevnda Heina. Hann varð tá dømdur 8 gyllin í bót fyri loynihandil. Hesin Jóan Heinason kann ikki vera bróðursonur Mikkjals í Lamba, sum tá sat sum bóndi á Glyvrum. Hvaðan kann so Heini Jóansson í Sørvági vera ættaður? Táið hann ikki kann vera komin beinleiðis úr Lamba, kann hann hava verið ein systursonur Mikkjals, sonur Gyðju í Elduvík, altso bróðir Jákups Jóanssonar. Ættarliðið í Elduvík tykist at hava verið fyrr á veg enn í Lamba. Hesin møguleikin er so nærliggjandi, at hann er nærum vissur.

Tríggjar synir Mikkjals í Lamba í teirri fyrru giftuni síggja vit nevndar: Sámal, Jákup og Samson, og aftrat hevur ein dóttir verið, sum var gift við Jósupi Jóanssyni, bónda á Norðoyri.

## b. Aðrar ættir.

Andras Guttormsson løgmaður (1531–43) búði í Kálgarði í Sunnbø og hevur ætlandi har sitið við junkaragóðsi frá Benckestockunum. Menn siga hann vera av norskari ætt, son av Gulatingsløgmanninum, Guttormi Nilssyni. Sum áður nevnt átti hann tríggjar synir: Guttormur tók við starvi eftir faðir sín og er kendur undir navni Guttormur løgmaður (1544–71). Undir Bjørgvins húsi finnst keypsuppgerð úr Føroyum frá 1567, og í henni eru ymsir persónar nevndir. Har stendur millum annað nevnd *móðir løgmannsins*, men ikki verður sagt, hvussu hon æt. Vit síggja harav, at bæði Andras og Guttormur eru sum løgmenn deyðir hálvungir. Í somu uppgerð 1567 er nevndur *Ísakur løgmannssonur*. Hann man vera sonur av Guttormi løgmanni, men má hava verið ungur tá. Hetta man vera sami maður sum Ísakur Guttormsson løgmaður. Jákup Guttormsson sat sum bóndi á Ryggi í Miðvági 1584–90. Fólkasøgnin kallar hann Vísa Jákup og sigur hann vera son av Guttormi løgmanni.

Millum hesa Guttorms-ættina og Heina-ættina ella Lambaættina hevur eftir siðaskiftið og fram móti 1600 verið ein kapping um valdið á landi. Eftir Guttorm løgmann gjørdist Jóan Heinason løgmaður, og táið Jóan varð feldur 1583, kom Ísakur Guttormsson í løgmanns-

sætið. Ikki kunna vit ávísa, at Pætur Jákupsson, sum kom í løgmannsstólin 1588, var skyldur við hesar ættir. Sjálvur var hann bóndasonur úr Porkeri og kom sum stórbóndi á gamla bispasætið Kirkjubø, hvarav Guttormur løgmaður 1550 fekk festið úti á Bø við 20 mørkum. Í 1584 síggja vit Pætur Jákupsson sita við øllum hinum gamla bispagarðinum, eisini garðinum úti á Bø. Hetta tykist at benda á, at Pætur Jákupsson hevur havt konu av Guttormsættini ella kanska verið svágdur við hana á annan hátt. Pætur Jákupsson man vera komin á Kirkjubøgarð stutt eftir, at Jens Gregersøn Riber bispur er farin haðani (1556). Har kann neyvan nakar festari hava verið á garðinum undan Pætri.

Auðun ella Eyðun Andrasson, sum var bróðir við Guttorm løgmann, var prestlærdur maður. Hann var fyrst prestur í Sandoy og síðan í Eysturoy.[1]) Próstur gjørdist hann êftir Heina Havreka. Longu i brævi 1579 er hann nevndur gamli próstur og Torleiv Grækarisson táverandi próstur.[2]) Í skjølunum frá 1583 viðvíkjandi Magnusi Heinasyni er hann ikki nevndur og man tá helst vera deyður. Eyðun Andrasson tykist at hava verið giftur við eini dóttir av Guttormi Arnbjarnarsyni í Húsavík, men tað kann tó illa verða fult søguliga prógvað.[3]) Ein dóttir hansara, Katrin, giftist við Dánjali Nigilssyni, ið fyrst var sýslumaður í Sandoy og síðan í Vágum. Sonur teirra var Bartal Danjalsson, ið gjørdist sýslumaður í Vágum eftir faðir sín.

Triði sonurin av Andrasi Guttormssyni løgmanni, Nils Andrasson, man hava verið væl yngstur. Hann var sum nevnt giftur við dóttur av Jóani Heinasyni. Um 1580 hevur hann kanska eftir fútaroknskapinum at døma verið løgtingsskrivari, men sat seinri sum bóndi á Skálatoftum. Eftir bóndabókini er hann helst deyður um 1630. Sonur hansara var hin tiltikni Guttormur í Gerðum, bóndi og sýslumaður.

Ísakur Guttormsson løgmaður var sum nevnt sonur Guttorms løgmanns. Hann doyði í starvi 1588. Sigga Ísaksdóttir æt dóttir hansar. Hon sæst at hava havt eitt lítið festi í Sandavági, men varð annars gift við Jóani Jústinussyni løgmanni.[4]) Óivað hevur tað verið ein atvold til, at Jóan gjørdist løgmaður í 1528. Annars sæst faðir Jóans at hava verið ein av mest múgvandi monnum í Føroyum.

Jústinus Jóansson, bóndi í Kellingargarði í Hattarvík, sat eftir miðjuna av 16. øld við eini rúgvu av festijørð á ymsum støðum í Føroyum. Ilt er at fáa Jústinus at hóska inn í tær ráðaríku ættirnar, sum tá vóru í Føroyum. Illgruni kann vera um, at hann hevur verið giftur við eini dóttur av Heina Havreka í seinni giftu, tí eftirkomarar hansara fingu fleiri navnið Heini, men aldursmunurin millum hansara og sonin Jóan hevur í hvørt fall verið rættuliga stórur. Av tí at Jústinus er nevndur sum tingførur maður 1557,[5]) kann hann illa setast at vera føddur eftir 1530. Merkiligt sær tað út, at Jústinus Jóansson

[1]) Sjá seinri undir *prestum*. [2]) D. D. R. A., D. D. K., B. 161. [3]) N. A. Fær., bls. 406. [4]) Vár- og løgtingsbók 3. sept. 1657, bls. 124. Har stendur, «at Sigga Isaksdatter, salig Joen Justinussøn forrige lagmand her på Færø sin efterladte hustru, jo bekendte, at det hus, som stod udi Thorshavn den salig mand tilhørte, deraf gav han hr. Ole Bodilsøns kone, Agnes Joensdatter, som var hans datter, nemlig det halve hus, hvilket Sigga Isaksdatter samtykte også til forn. sin datter.» Sigga sæst í somu tingbók deyð á ólavssøku 1659. [5]) Lb. fol. 31 a.



hevur viljað búð á 7 mørkum í Hattarvík, tá hann samstundis sat við festinum á Heygum á Viðareiði, sum var 16 merkur. Í Oyndarfirði hevði hann 2 merkur, og han sat eisini við garðinum á Signabø, sum var 6 merkur. Á Kirkju í Fugloy lá festið í Miðtúni, $2^1/_2$ mørk, eisini undir honum, og í Svínoy hevði hann festi saman við øðrum manni, Albert, sum kanska hevur verið bróðir hansara. Aftrat hevði hann festi á Norðtoftum, og seinri eisini festi í Depli, men misti tá Heygagarð. Ivaleyst er eisini, at hann hevur átt rúgvu av óðalsjørð. Ótrúligt, hvat hesin maður hevur havt av jørð undir sær.

Løgmannssonurin Sakaris Pætursson úr Kirkjubø fekk Heygagarð frá Jústinusi. Viðurskiftini seinri á løgtingi millum Sakaris og Jóan Jústinusson vísa, at Heygagarður ivaleyst hevur verið tikin frá Jústinusi. Sakaris skuldi hava festið, og Heinaættin var við falli Jóans Heinasonar komin illa fyri. Á Kirkjubøgarð var komin Laðangarðsmaðurin, Símun Jenisarson, kanska giftur við dóttur av Pætri Jákupssyni.

Jústinus Jóansson var løgrættumaður, men ikki løgmaður, sum søgnin vil gera hann til. Sonur hansara, Jóan Jústinusson, gjørdist harímóti løgmaður, men søgnin hevur blandað báðar fedgarnar nógv saman. Søguliga vita vit meira um Jóan, men ilt er tó at síggja, hvør av fedgunum í tí einstaka førinum hevur verið uppruni sagnarinnar. Lív Jústinusar hevur kanska verið meira athugavert, men í hvørt fall hevur Jóan búð allan seinra part av lívi sínum í Sandavági, har hann hevur notið somu lagnu sum aðrir løgmenn, at lítið av søgn er um teir. Jústinus hevði eftir bóndabókini 7 merkur av festijørð í Hattarvík, men Jóan hevði 15. Henda løgmannstíðin, táið fedgarnir Jústinus og Jóan vóru í vælmaktini, hevur sett sjónsk merki eftir sær í Hattarvík. Feitioksar hava verið hildnir, og størri gásahald hevur verið. Enn sæst vallgarður við baki heim eftir innanvert Kleivina í Skarðsvík, og úti við eggina er eisini vallgarður, sum skuldi forða oksunum at fara út av har. Gásatrøðin er innast í bønum undir fjallinum í Hattarvík, um tvær merkur í vídd. Seks toftir eftir gásarhús síggjast har enn. Í bygdini niðanvert Djúpukeldu er staðarnavnið Gásareygað, sum nú er burtur.

Um siðaskiftið er Guttormur Jóansson nevndur.[1]) Hin áður nevndi Jóan Guttormsson, greivin í Kollafirði, hevur óivað verið sonur hansara. Múgvandi hava hesir menn verið. Hetta Guttormsnavnið kann ikki vera flutt inn til Føroya um siðaskiftið, men tað má hava verið eldri í oyggjunum. Uttan at kunna ávísa nakað søguligt samband kunna vit hóma ein vissan arvafelagsskap millum gamlar múgvandi føroyskar ættir, sum sína millum nýta nøvn sum Grækaris, Gunnar, Guttormur og Jóan. Hetta síðsta sigur ikki so nógv, tí tað hevur verið so vanligt.

Ein av synum Jústinusar á Kellingargarði æt Danjal. Hann fekk festið á Signabø eftir faðir sín. Kona hansara var av Laðangarðsfólkinum og systir Trølla-Símunar í Kirkjubø ella dóttir av áðurnevnda Símuni Jenisarsyni. Navnið Danjal finnst aftur á Kellingargarði. Abbasonur Jóans Jústinusarsonar var presturin Danjal Mikkjalsson

[1]) A. C. E., skjal 50.

á Viðareiði. Sama navnið kom seinri á Hellugarð í Kvívík.[1]) Av tingbókini 1619 sæst, at einkjan eftir Trølla-Símun, Magdalena Lýðarsdóttir, helst dóttir av Lyder Augustinussøn í Hoyvík, vildi tá ikki av við silvurspón og silvurnál, sum Elsupa, kona Danjals á Signabø, hevði arvað og biðið bróðir sín, nevnda Trølla-Símun, ið árið fyri var deyður á ferð út í Trøllhøvda, smíða sær gylta silvurnál burtur úr.[2]) Bókføringin bendir her á ættarband og skyldskap. Bóndabókin vísir, at Jústinus Jóansson má hava átt systur, sum æt Agnes Jóansdóttur, og sum hevur havt festi í Norðuroyum. Jóan Jústinusson átti dóttur, sum eisini æt Agnes og giftist við Vága presti, Oluf Bodilsøn.

Søguligar og ættarligar grundir kunna ikki verða førdar fram fyri, hví Tummas Símunarson, bóndi á Áargarði í Kaldbak, gjørdist løgmaður eftir Pætur Jákupsson, men hann hevði longu tá verið sýslumaður í Suðurstreymoy. Enntá ringari er at síggja grundir fyri, hví Sakaris Tormóðsson kom í løgmannsstólin eftir hann, tí Sakaris sæst hvørki at hava verið stórbóndi ella sýslumaður, men hann kann væl hava havt nógv av óðal og kanska sitið við junkarajørð. Sakaris og Líggjas Tormóðsson hava ivaleyst verið brøður, og vit síggja, at Líggjas hevur verið giftur inn í Guttorms-ættina við eini dóttur av Eyðuni Andrassyni prósti, tí hann verður taldur millum «hr. Audens arvinger.» Í fútaroknskapinum fyri 1620 stendur: «Hvis restancen belanger, som der på landet blandt bønderne tilbage står, [og] beløber 171½ gl. 6½ sk., deraf kortes 7½ gl. 3 sk., som er givet Elias Thormodsøn på Færø for han som en styrmand ledsagede kaptejn Prince med kongl majestæts skib der fra landet under Island og siden fremdeles til Bergen.» Líggjas Tormóðsson sæst soleiðis at hava verið siglingarmaður í yngri árum.

Millum fremstu menn á landi eru eisini fedgarnir á Skála og við Sjógv á Strondum, Laurids Ellingsøn og Olaf Lauridssøn. Ilt er at síggja nú, hvussu teir hava verið skyldir við Lambaættina, men at skyldskapur hevur verið til staðar sæst av sakarmáli VI undir Dráp og serlig brotsmál bls. 30, hvar báðir fedgarnir veðhalda fyri Jákup Jóansson í Elduvík. Ólavur Lavarsson og Vísa-Marjun í Øravík ella Marjun Lavarsdóttir vóru systkin. Táið Jón indiafari 1616 nevnir føroyskan bónda, Ólav, hjá hvørjum 22 sjúkir menn av herskipum teirra fingu innivist, tykist tað eingin annar at kunna vera enn Ólavur Lavarsson.[3]) Jón sigur: «Hesir allir vóru í eini stovu á einum bóndagarði hjá manni, sum æt Ólavur og var góður smiður í øllum jarnsmíði. Hesin maður var frálíkur við meg. Hann hevði lært handaverk sitt í Tróndheimi. Hann átti tvær enskar øltunnur av strangbjóri, fyrst eg kom hagar, og hevði hann tær helst fyri meg. Eina íslendska bók gav eg honum og seldi aðra prentaða; tær itu «Ódauðleiki sálarinnar» og «Enchiridion» [prentað á Hólum 1600]. Tær las hann reint, tí lítið skilti mál okkara frá teirra... Men nú er har komin donsk vísa bæði í kirkju og uttan við vanligum donskum tungumáli.» Hetta í samanburði við tað, sum fór fram í Lamba, gevur okkum innlit í størri føroysk heim í teirri tíðini. Vit síggja av hesum, at hitt málsliga sambandið hjá føroyingum og íslendingum bert stutta tíð, áðrenn hetta fór fram, hevur verið slitið, tí stórur var felagsskapurin enn. Smíðikynstrið, og serliga at smíða bátar er arvað víðari í hesi ætt av Skála.

Av tí, sum fram er ført, síggja vit, at ættarbondini millum tær mest múgvandi ættirnar á landi hava verið nógv, men tá galdandi hjúnarlagsreglur, Stóridómur, setti strong mørk fyri, hvussu nær hjún kundu vera skyld, táið fólkið var fáment, er tað ein grund fyri, at útlendskar ættir, sum bóru við Føroyar, so skjótt ganga inn í tær mest múgvandi føroysku. Tað sum her er fram ført, er bert um múgvandi føroyskar ættir, men múgvandi var bert ein lítil partur av fólkinum. Hin stóra fjøldin tykist at hava verið meira ella minni ognarleys.

[1]) Hans Olsen í Ólavstovu, Hvalvík, sjá Fær. kongs. bls. 79 og 61, var giftur við dóttur harra Danjals Cathrine Danielsdatter. Sonur teirra kom á Hellugarð í Kvívík. Sjá Fær. kongsb., bls. 60. [2]) Lb. fol. 77a. [3]) Sjá Æfisaga Jóns Indiafara, sum Hitt íslendska bókmentafelagið gav út 1908—1909, bls. 121.

# DEILD VIII

## *Rættur og umsiting.*

### a. Lóg og rættur á landi.

Ættarnøvnini hjá Føroyingum vísa, at flestu føroysku landnámsmenninir eru komnir úr Gulatingslagnum í Noreg um Bjørgvinsleiðina (landsynningur, útsynningur, útnyrðingur og landnyrðingur).

Í Noreg guldu sum í øllum londum í gomlum døgum fleiri lógir ein fyri hvønn landspartin. Tær vóru tó ógvuliga líkar, og hvørt lógarøkið hevði sítt løgting. Í Gulatingslagnum í Vesturnoreg galt Gulatingslógin. Í elstu tíðini var hon bert varðveitt á mannamunni, men seinri hevur hon verið niðurskrivað, og hetta hevur verið hin sokallaða eldra Gulatingslógin.[1]) Óivað er tað henda Sankta Ólavs lóg, sum Føroyingar ofta seinri sipa til, og sum í sínum ásetingum gekk aftur í Landslógini.

Henda gamla lóggávan má vera komin til Føroya við landnámsmonnunum, helst borin á mannamunni, og eftir henni hava Føroyingar gjørt sína egnu tingskipan við altingi fyri alt landið, sett á hásumri á Tinganesi í Havn, og óivað við undirtingum í teim seks sýslunum, sum seinri fingu navnið várting, av tí at tey oftast vóru hildin um várið. Sýslurnar í Føroyum vóru sum nevnt seks, og henda skipanin tykist at vera fyrndargomul.

Longu í landnámstíðini hava Føroyingar óivað havt løgmann ella lógsøgumann. Í teirri elstu tíðini skuldi hann duga alla galdandi lóggávu uttanat. Gamla Føroyingasøga sigur frá, at meðan Tróndur í Gøtu hevði unga Sigmund, son Leivs Øssurssonar og Tóru Sigmundsdóttur, til fosturs hjá sær, hevði hann longu lært smádreingin at kenna lógir, innan hann var 9 ára gamal. Gamla søga okkara nevnir eisini Gilla løgmann, og ivaleyst hevur løgmaður í gomlum døgum verið valdur á løgtingi. Soleiðis er ting Føroyinga nevnt táið tað mest gjørdist rættarting. Kongur kann ikki vera komin inn í løgmannsvalið í Føroyum við at ásanna løgtingsins val, fyrrenn Føroyar eftir 1035 vóru komnar undir norskan kong ella vóru vorðnar norskt skattland.

Upprunaliga møtti hvør fríur maður á tingi og tók beinleiðis lut

---

[1]) Ólavur kongur heilagi verður sagdur fyrst at hava skrivað hana upp (Sankta Ólavs lóg); seinri umskriving gjørd av Magnusi løgbøta.



í avgerðum har (alting). Tíðliga tykist tó løgting (rættarting skipað á tann hátt, at tað fekk 36 løgrættumenn, 3 tylftir, hálva tylft í hvørji sýslu. Sjá annars løgskipanina um tingfaratoll í *Diplomatarium færoense* eftir J. Jakobsen doktara, bls. 27, og tær viðmerkingarnar hann gevur skjalinum.

Ivaleyst hava Føroyar havt sína gomlu tingskipan langt út í miðaldur við teirri lóggávu, Føroyingar høvdu arvað úr Noreg. I fyrra parti av miðaldri fór lítil broyting fram í Noreg í hesi lóggávu, men 1274 [1]) samskipaði Magnus kongur løgbøti alla norska lóggávu í landslógini, bygd á áður galdandi lógir, og kom hon at galda fyri alt ríkið. Sjey ár áður hevði hann givið yngru Gulatingslógina.

Magnus løgbøti hevur givið rættarbót fyri Føroyar 1273, hvar hann sigur við Føroyingar: «Vær høvum játtað tykkum staðfest eftir bøn tykkara og eftir ráði av øllum teim bestu monnum, at her skulu ganga slíkar lógir, sum ganga um alt Gulatings samlagið, uttan tað at búnaðarbólkurin skal standa eftir tí, sum bók tykkara sjálvs áður vitnar.»[2])

Eftir hesum tykjast Føroyar til 1273 at hava havt sína egnu løgbók, hvarav búnaðarbólkurin framvegis skuldi standa við makt, men annars komu Føroyar tá inn undir vanliga norska lóggávu.

Bert 25 ár seinri varð búnaðarbólkurin í teirri føroysku løgbókini eisini umgjørdur og óivað bøttur við Seyðabrævinum, sum kom út sum serlig føroysk lóg 1298, givið av Hákuni Magnussyni hertoga eftir ráðum frá Erlendi bispi í Kirkjubø og Sjúrði løgmanni í Hetlandi.[3]) Henda elsta føroyska serlógin, vit kenna, hevur goldið við smærri broytingum upp at okkara døgum. Táið vit koma upp um siðaskiftið, eru Føroyar undir norsku Landslógini og Seyðabrævinum.

Alt bendir á, at íslendska kirkjulógin eftir Árna Þorlakssyni bispi á Skálholti (1269–98) eisini hevur verið nýtt í Føroyum. Táið kirkjulóggávan eftir siðaskiftið kom undir verðsligt vald, viðtók íslendska altingið 1564 á Tingvøllum Stóradóm, ið bygdi á gamla kirkjurættin og gjørdist lóg fyri Ísland í barna-, skyldskapar og horsmálum, og við Stóradómi varð íslendska kirkjulóggávan sett úr gildi. Stóridómur, sum var á miðaldurs íslendskum máli, varð 1564 eisini staðfestur av Fríðriki kongi II, og vit síggja, at hann í hesum líki eisini er komin at galda fyri Føroyar. Vit kunna ávísa,[4]) at hetta er hent 1584 við

---

[1]) Landslógin tykist viðtikin á Gulatingi 1273, á Frostatingi 1274 og á Eidsivatingi og Borgartingi 1276 Bind IX Norsk biografisk leksikon bls. 38. [2]) Dipl. Fær., bls. 24. [3]) Formæli Seyðabrævsins tykist at vátta, at løgtingið hevur verið við í ráðum: «Andligur faðir og kærasti vinur vár harri Erlendur biskupur í Føroyum, og harri Sjúrður, løgmaður í Hetlandi, sum vær høvdum til tykkara sent, gjørdu vist fyri osum oyggjafólksins vegna um teir lutir, sum teim tóktist skorta í búnaðarbólkinum.» Dipl. Fær., bls. 3. [4]) Landsskjalasavnið. Í løgtingsbók 1666–77, fol. 3, undir 17. aug. 1666 stendur um systkinabørn, sum vóru komin fyri barn saman: «Da blev herpå for retten således afsagt, at efterdi den Islandske dom, som er gjort *anno 1584* her udi landet, udi langsommelige tider haver været brugelig, når nogle sådanne sager indfaldt, og Hans kongl. majestæt, salig højlovet ihukommelse, konning Christian den 4., ved sit indgivne brev til lagmanden her på Færø, salig Joen Justinussøn, anno 1637 nådigst haver befalet sådanne tilfælde forn. Islandske dom at følge.»




Mynd 5. Byrjanin av Stóradómi í A. M. 316 fol.






Mynd 6. Forblaðið av lógarsavni, nevnt A. M. 316 fol., við m. a. Stóradómi og Seyðabrævinum. Sjá viðm. 2 bls. 319.



Mynd 7. Byrjanin av Seyðabrævinum í A. M. 316 fol.



løgtingsviðtøku og líkt er til, at kristinrætturin eftir Árna bisp hevur verið nýttur í Føroyum, til henda løgtingsviðtøkan varð gjørd.[1])

Stóridómur við síni kongligu váttan á gomlum máli er innførdur í lógarsavn, A. M. 316 fol., sum føroyingurin, Nils Helgason, tá búsettur í Bjørgvin, hevur fingið gjørt liðugt ár 1600, og hann, sum endaliga hevur greitt hetta lógarsavn úr hondum, er táverandi føroyski tingskrivarin, Gabriel Mitens, ið var tingskrivari í Føroyum 1584—1621; hann segði seg tó frá starvinum 1620, men hann sæst kortini at havaført tingbókina 1621. Hetta lógarsavn finnst nú á skjalasavninum eftir Árna Magnusson í Keypmannahavn og vísir seg annars at vera skrivað av nógvum monnum. Tað síggja vit á skrivtini; men tað er Gabriel Mitens (G. M.), sum ár 1600 hevur endað lógarsavnið og sett tað saman í bók, á skjalasavninum nevnt A. M. 316 fol.[2]) Flestu skipanir í tí eru norskar løgskipanir, men ein deild finnst har, sum hevur serligar føroyskar løgskipanir, og sæst Gabriel Mitens persónliga at hava skrivað tær. Handskrivtin er hin sama, sum finnst í teirri elstu tingbókini 1615—21, og umframt stendur merkið G. M. undir hesi deildini.[3])

Í hesi føroysku lógardeild finnst Seyðabrævið á gomlum máli. Umframt finnast Stóridómur og konglig váttan av honum eisini í gomlum málbúna. Tvey samtíðar konglig brøv til Føroyinga á donskum máli eru har eisini. Viðvíkjandi Stóradómi í hesum føroyska lógarsavni er at siga, at hansara kongl. staðfesting er dagssett líka eitt ár aftan á tí eintaki, Ísland hevði av hesi staðfesting, sum er á donskum máli prentað í gomlu lógum Íslands av Oddgeir Stephansen og Jón Sigurðsson 1853. Sum nevnt skal verða seinri, hevur hetta verið uppfatað sum skeiv dagsseting av teirri kongl. staðfestingini í føroyskari varðveitslu. Merkiligt, at hon í 1584 er komin til Føroya í fornum málbúna. Í A. M. 316 fol. finnst landslógin týdd á danskt mál, og onkuntíð eftir siðaskiftið hevur slík týðing verið gjørd fyri at lætta um arbeiðið hjá donskum embætismonnum í Noreg. Føroya løgting hevur tó aldri nýtt hesa donsku týðing av landslógini, tí løgmannsstólurin í Føroyum átti tá føroyska løgbók á gomlum máli, hvar bæði Landslógin og Seyðabrævið stóðu. Henda løgbók finnst nú á ríkisskjalasavninum í Stockholm undir navninum skinnbók nr. 33. Á henni stendur navnið Peder Jakobson og ártalið 1599. Løgmaðurin, Pætur Jákupsson, hevur altso havt bókina og kanska sjálvur ella eftirmaður hansara avhent hana, helst í Bjørgvin. Í umbúna var tá hin Norska løgbókin, sum var ætlað at vera ein týðing av Landslógini, men tíðin hevði gjørt ymsar broytingar neyðugar, t. d. deildina um leysinganna

1) Í fútaroknskapinum 1584 stendur fylgjandi løgtingsdómur: «En dreng, som kaldes Isak Myrmandssøn, som tjente Per [Peder] Jacobsøn i Kirkebø, og han havde beligget Niels Thorbergsøns datter af Kolter, som var hans frænke i 3. led, blev hannem derfor tildømt at bøde til kongelig majestæt efter *kirkeloven*, efter *dommens lydelse*, 3 mark sølver, som er 7 gl. 4 skind.» Gentan fekk somu bót, alt samsvarandi Stóradóm. 2) Á forblaðnum stendur: «Niels Hellieson rådmand i Bergen åger denne bog med rette, brug hende ret, så skiller hun trætte.» Og niðast á síðuni: «Alt, hvad vi haver, det er Guds gaver. G. M. på Færø.» 3) Handritið A. M. B 16 fol. fekk Árni Magnusson 1720 frá einkjuni eftir Thormod Torfæus assessara. Hann var íslendingur og kannaði norðurlanda søgu, skrivað nógv m. a.: «De rebusgestis Færoensium», Kbv. 1695.

rættarstøðu. Hin forna trælastættin var langt síðan blandað burtur. Ymsar aðrar broytingar komu eisini inn í hina Norsku løgbókina frá 1604, men annars bygdi hon heilt á Landslógina. Hin Norska løgbókin kom til at galda fyri Føroyar við vissum undantøkum. Soleiðis ásannaði kongur við kongligari skipan 6. juni 1606, at í Føroyum einans skuldu verða nýtt gomul norsk (bjørgvinsk) vekt og mát, eftir at Føroyingar og handilin í Tinganesi høvdu sagt seg ikki vilja nýta ta Kølnarvekt og ta donsku alin, sum Norska løgbókin ásetti.[1]) Øll norsk løgting, sum løgbókin skuldi umfata, eru nevnd í formælinum, men Føroya løgting er ikki nevnt, so treytaleyst galt hin Norska løgbókin ikki fyri Føroyar. Hetta sæst eisini av nevndu kongligu skipan av 6. juni 1606. Ein ásannan ella góðkennan frá Føroya løgtingi var tí neyðug. Við Norsku løgbókini frá 1604 og við teirri kongligu skipan av 6. juni 1606 vóru Føroyar komnar inn í eina rættarstøðu, sum eftir bókstavinum tykist at hava varað til 1688,[2]) tá Norska lóg varð sett í gildi fyri Føroyar í staðin fyri hina Norsku løgbókina.

Hin elsta løgtingsbókin gevur okkum tó dømi um, at danskar løgskipanir vóru nýttar av føroyskum rætti í tíðarskeiðinum 1604–1688. Soleiðis sæst, at Føroya løgting 1653 hevur dømt bæði eftir Stóru recess Kristians kongs IV frá 1643 og eftir Stóradómi í málum, sum vóru meinlík hvørt øðrum. Hin danska lógin var eitt sindur harðari í sínum ásetingum. Hin gamla løgtingsbókin vísir ikki nakra tinglesing fyri Føroyar av teirri nýggju lóggávuni, tingið fór at nýta. Tinglesing sæst heldur ikki gjørd í tingbókini av teirri donsku týðing av Seyðabrævinum, sum gjørd varð í 1637, men lógin finnst annars í Norske rigsregistranter.[3]) Vit síggja soleiðis, at rættarstøða Føroya her hevur verið í eini umráðatíð. Hetta hevur óivað sín uppruna í tí mentunarbroti, sum kom inn yvir Føroyar eftir siðaskiftið, og sum tykist at hava gjørt seg nøkurlunda liðugt um ár 1600, soleiðis at gamalt føroyskt miðaldursmál tá var farið úr nýtslu í øllum skjølum, og fatan av hesum máli samstundis var farin at kámast fyri Føroyingum. Seyðabrævið varð jú týtt 1637. Stóridómur sæst fyribils ikki at vera týddur.

Frá fyrndartíðum hevur løgmaður verið føroyskur embætismaður, men vit vita einki um, hvat landið hevur boðið honum fyri sína tænastu. Í teirri gomlu skipan um tingfaratoll frá um 1400 síggja vit, at álitsmenn hava fingið nakað fyri sínar tingferðir, og løgmaður man tí eisini hava fingið nakað fyri starv sítt. Eftir siðaskiftið sæst løgtingið eisini at hava valt sær løgmann, men nú var hann ikki rættur embætismaður, fyrrenn kongur hevði ásannað valið. Soleiðis hevur tað óivað eisini verið nakað innan siðaskiftið, men eftir siðaskiftið sæst kongur viðhvørt at hava tikið sær nakað stórt vald í avgerðini um, hvør ið skuldi verða løgmaður. Í hvørt fall avsetti hann Jóan Heinason løgmann uttan løgtingsavgerð um várið 1583, og 1655 setti

[1]) N. R. R. bind 4, hefti 1, bls. 152. Hin føroyska alin tá var Hamborgaralin ella stikkan = 55,3 cm. Føroysk tunna var Rostockartunnan ella Bjørgvinstunnan = 162 litur, sjá Sv. Aakjær: Mål og Vægt, bls. 120. [2]) Norska lóg sett í gildi fyri Føroyar við kongl. skrivi 8. mai 1688. Sjá N. A. Fær., bls. 175. [3]) Bind 7 hefti 1, bls. 309.



hann Balzar Jacobsøn í løgmannsstólin ímóti løgtingsins avgerð og vali.

Løn løgmannsins fall øll úr Føroyum, og frá 1555 hevði hann Steigargarð. Skipanin send Strange Madssøn fúta, er soljóðandi: «Vider, eftersom vore og kronens undersåtter, som handler på vort land Færø underdanigst for os have ladet berette, hvorledes de der på landet besværes med det nye mål, som Vi udi vore riger Danmark og Norge have forordnet, såvel som og med strengere alen og vægt end tilforn og af arilds tid haver været brugeligt, da efterdi Vi befinde, at hvis vare der på landet sælges og købes, er sat for et vist køb, og forn. Vores forordning med det nye mål, som her nu er brugeligt, ikke om forn. vore undersåtter på forn. Vort land Færø er ment eller in specie formeldet, bede Vi dig og ville, at du lader gøre den forordning, at forn. Vore undersåtter, som der sammesteds nogen vare have at forhandle, såvel Vore undersåtter, der på landet bo, ikke blive besværget i nogen måde med strengere mål, længere og større alen og vægt eller højere køb, end som af arilds tid der på landet har været brugeligt og sædvandligt, såfremt du ikke derfor vil stande Os til rette.»[1]) Afturat fekk hann í hesi tíðini 1 skinn frá hvørjum manni millum 15 og 50 ár; undantiknir vóru tó prestar, sýslumenn og løgrættumenn.[2])

Løgmaður var dómari og formaður í løgrættinum. Løgrættumenninir vóru sum nevnt 36. Við í dómsmálum vóru aldri fleiri enn 12 teirra hvørja ferð. Teir virkaðu mest sum hjálparmenn hjá løgmanni, svarandi nakað til nevningar nú á døgum. Almenn rættarbót 13. mars 1568 áleggur øllum løgtingum skyldu at føra gerðabók,[3]) men tað tykist, sum hevur Føroya løgting ført bók yvir sínar avgerðir innan ta tíð. Okkara elsta varðveitta løgtingsbók bendir 1617 á, hvat ið stóð í gomlu løgtingsbók 1557. Tá var Guttormur Andrasson løgmaður, í søgn bert nevndur Guttormur løgmaður. Hann tók upp starvið eftir faðir sín 1544. Væl er tí hugsandi, at løgtingsbók eisini hevur verið førd innan 1557. Í dag kenna vit tó onga løgtingsbók, sum gongur longur aftur enn til 1615. Løgmaður var dómari bæði á vártingunum og á løgtingi. Hetta var hann, táið núverandi elsta løgtingsbók byrjar 1615, og hann tykist at hava verið tað út í miðjuna av 17. øld, men vit eiga tíverri onga vártingsbók varðveitta frá teirri tíðini. Táið vit koma inn í Gabelstíðina, er sorinskrivarin dómari á vártingunum, og løgmaður møtir tá ikki á hesum tingum. Vártingini vórðu hildin frá síðst í mars til fyrst í juni. Haðan kundu mál verða beind løgtinginum til endurdømingar. Løgtingssamkoman fellur í hesum tíðarskeiði, elsta tingbókin umtalar ofta, innan ólavsøku; men óivað kemur tað av tí, at siðaskiftið hevur roynt at beina fyri ólavsøkuhaldinum, og kanska nakað av, at Norska løgbókin frá 1604 ásetti, at løgting í Noreg skuldu koma saman á miðjum sumri. Hetta segði landslóg Magnusar løgbøta tí eisini.

[1]) N. R. R., bind 4, hefti 1, bls. 152. Hin føroyska alin tá var Hamborgaralin ella stikkan = 55,3 cm. Føroysk tunna var Rostockartunnan ella Bjørgvinstunnan = 162 litur, sjá Sv. Aakjær: Mál og Vægt, bls. 120. [2]) N. A. Fær., bls. 181. [3]) N. A. Fær., bls. 180.

Við vissu vita vit, at tingskrivari, kallaður landsskrivari, hevur verið í Føroyum frá 1584, táið Gabriel Mitens tók við hesum starvi. Táið Nils Andrasson, seinri bóndi á Skálatoftum, 1583—84 í fútaroknskapi verður kallaður «kongl. majestæts landstingsskriver», er rímuligt at hugsa sær, at hann hevur verið tingskrivari undan Gabriel Mitens. Á fútaroknskapinum sæst sorinskrivarin at hava fingið 5 gyllin árliga í fastari løn. Frá Noreg vita vit, at har vóru fastir tingskrivarar fyrst settir við lóg 1591, men innan ta tíð tykist tað, sum løgrættumenn hava virkað sum skrivarar. Fasta løn fingu teir norsku tingskrivararnir ikki, men bert gjald fyri hvørja foliosíðu, 4 skilingar ella 1 skinn, av hvørjum skjali, teir skrivaðu. Dómarar vóru teir ikki á fyrsta sinni. Við kongligari skipan 1634 gjørdust norskir tingskrivarar dómarar við undirrættirnar. Ikki er líkt til, at viðurskiftini í Føroyum hava fylgt beint teim norsku. Av tí at hin fasta lønin hjá sorinskrivaranum í Føroyum á fyrsta sinni var so lítil, er tað væl hugsandi, at hann hevur tikið nakað fyri sítt skriviarbeiði, ið nógv var at skriva tingskjøl og senda monnum, sum avvaraðu, hesi skjøl við undirskrivtum og innsiglum. Innan hann læt tey frá sær, átti hann at føra avrit av teimum inn í tingbókina. Óhugsandi er tað ikki, at hitt fasta árliga gjaldið var fyri førsluna av tingbókini, sum út yvir tingskjølini mangan ikki hevur annað enn frásøgn um handilsviðurskiftini. Seinri fekk sorinskrivarin størri inntøkur, eisini fastar. Soleiðis 50 gyllin árliga av jarðaskattinum. Í almennum skiftum kom bókhaldið undir hansara varðhald.

Tingskrivarin var tikin í eið, var svorin skrivari, og harav er navnið sorinskrivari komið. Eisini løgrættumenninir svóru løgtingseið, fyrsta árið teir komu á ting. Teir vóru valdir mest sum fyri lívstíð. Í hesum tíðarskeiði kallaði fútin løgtingsmenninar. Við Norsku lóg 1688 gjørdust løgtingsmenninir 48 í tali, 8 í hvørji sýslu, og valið av monnunum galt tá bert fyri eitt ár í senn. Fría ferð á ting og frá tingi skuldu bæði løgrættumenn og løgmaður hava, 1 skinn fyri hvørja míl á tingstaðin. Sjá annars J. Jakobsen í Skipan um tingfaratoll í Dipl. Fær., bls. 27.

Av elstu løgtingsbókini síggja vit, at løgting tá hevur verið hildið í Gildisskálanum á Tinganesi. Henda byggningin nýtti fútin annars, táið tingið ikki var saman. Fyrsta tingdagin møttu eisini landsins prestar og sýslumenn; hesir síðstu vóru aloftast eisini løgrættumenn. Sum kongsins umboðsmaður var fútin altíð á tingi. Teir, sum høvdu tingmál fyri, sluppu sjálvsagt sjálvir at møta fram. Fjøld av fólki stóð uttan fyri tingið og lýddi á. Úr hesi fjøldini sluppu menn at leggja upp í. Tað síggja vit t. d. í viðgerðini av handilsmálum. Á vártingunum gekk tingviðgerðin fyri seg á sama hátt uttan tað, at har vóru bert fólk úr avvarandi sýslu møtt fram. Tingstaðir vártinganna í hesi tíðini vóru: í Norðuroyum í Vági, í Eysturoy á Selatrað, í Streymoy í Tinggarðinum í Kollafirði, í Vágum á Ryggi í Miðvági, í Sandoy í Trøðum á Sandi og í Suðuroy í Øravík. Ting vóru hildin í bóndaroykstovu. Úti og ofta á øðrum støðum vóru vártingini hildin í eldri tíðum. Á tingstøðunum hava fólk fylgt væl við almennu viðurskiftum landsins, og innan Norska lóg kom í gildi, hava løgrættumenn kunna fingið sær góðan kunnleika um galdandi





Mynd 8. Løgmannsins tingopningarrøða eftir A. M. 316.

lóg og rætt. Norska lóg tók tingførleikan frá monnum við at gera valskeiðið bert eitt ár.

Løgtingið skuldi verða sett, táið sól var í eystri, altso kl. 6 á morgni, og sita til nóns, kl. 3 á degi[1]. Mat og drekka mátti eingin hava við sær á ting. Løgrættumenn høvdu skyldu at møta á tingi, uttan teir høvdu løgligt forfall. Gjørdu teir ikki tað, skuldu teir



Mynd 9. Løgmannsins røða við tingslit eftir A. M. 316.

bøta 1 mørk í silvuri hvør. Hetta avgjørdi løgmaður. Teir møttu í serligum búna við pípukraga um hálsin.[2] Í málum, sum ikki vóru dómsmál, var ofta bókført, hvat fjøldin helt um tey. Løgtingið varð sett fyrsta dagin, við at løgmaður segði fram forna tingopningarrøðu, sum lýsti frið á tingi og álegði hvørjum manni at gera rætt og skjal. Óbótamaður skuldi hvør maður vera, sum breyt henda tingsið, og alt fæ sítt og jørð sína skuldi hann missa. Løgmaður sendi eisini tingið heim við røðu, sum lýsti tingfriðin at galda, til menn komu til sín sjálvs, og hann takkaði øllum, sum hjálpt sær høvdu í sínum starvi við tí, sum gjørt var eftir lógum. Í somu røðu álegði hann eisini monnum ikki at hýsa landastrokum. Eintøk av tingopningar-

[1] N. A. Fær., bls. 183. [2] Th. Tarnovius: Feroernes Beskrivelser, udgitt av Håkon Hamre, 1950, bls. 71.



røðu løgmannsins og heimsending tingsins eru at finna fyrst í handritinum A. M. 316 fol., og er líkt til eftir skrivtini, at Gabriel Mitens hevur skrivað tey. Orðalagið í hesum røðum er fornt og sjálvt málið við, men tað er tó nakað avlagað við nýggjari orðasniði. Hetta bendir á fornan uppruna av røðunum, og táið landastrokini ella leysingarnir verða havdir á lofti, vísir upprunin aftur í 12. ella 13. øld, táið trælirnir vórðu frígivnir. Óivað hava hesar fornu løgmannsrøður verið nýttar í Føroyum upp um árið 1600. Sjá mynd 8 og 9, bls. 323 og 324. Tær løgmannsrøður við tingopning og fráfaring, sum finnast í løgtingsbók, ið byrjar 1655, eru meira danskar í málbúna og óivað lagaðar eftir seinri føroyskum viðurskiftum.[1]

Fútin var kongsins umboðsmaður á landi. Upprunaliga hevur hann ivaleyst rætt og slætt verið kongsins skattauppkrevjari. Enntá innan Føroyar komu undir norskan kong, síggja vit, at hann sendi sínar skattakrevjarar til Føroya. Í gomlum døgum vóru fútarnir bert í Føroyum um summarið. Teir komu til Føroya við fyrsta handilsskipi á vári og fóru av landi við síðsta skipi um heystið. Vetrarfúta settu teir fyri seg í Føroyum, meðan teir vóru burtur. Frá 1598 til 1647 sæst løn fútans at hava verið 80 gyllin um árið. Árið 1648 hækkaði lønin til 80 ríkisdálar, svarandi til 96 gyllin árliga. Innan 1598 tykist fútin at hava fingið løn sína goldna á ymsan hátt, men í peningi hevur hon væl ligið lægri. Viðhvørt hava Føroyar tá verið givnar sum len, og ofta hevði lensharrin tá eisini fútavald. Kongsgjaldið varð goldið í føroyskum vørum og gekk inn í leigubúðina. Útreiðslur fútans vórðu tiknar av hesum vørum, og tað, sum eftir var, fór inn í handilin, sum avhendi kongi hansara ágóða av landinum í Keypmannahavn. Leysar inntøkur høvdu fútarnir dugað at fáa sær óregluliga, t. d. við at festa garðarnar burtur. Gamalt gjald frá manni fyri at fáa festi var 1 gyllin fyri hvørja mørk. Hetta skuldi koma á landsroknskapin. Umframt tað hevur fútin tikið sær sjálvum frammihjágjald. Hetta hevur óivað verið vanligt beint eftir siðaskiftið, tí rættarbót 1559 um garðfesting tekur soleiðis til: «Vore og kronens bønder ... på vort land Færø haver ladet berette for Os, hvorledes at de storligen haver været besværet af de fogder, som landet udi befaling haft haver, så at når som nogen mand haver fæst sin gård og den bygt, forbedret og med magt holdet, da haver fogden uden al skellig årsag sat hannem af gården og den lejet og fæst en anden.»[2] Fútarnir hava her roynt at fáa meira pening inn við fleiri festigjøldum, og teirra egni frammihjápeningur hevur harvið verið størri. Táið kongur stedgaði hesi framferð fútans at seta menn frá gørðunum, eru fútarnir farnir at hækka frammihjágjaldið til sín sjálvs av hvørji festing. Hesin atburður hevur vundið upp á seg í um 100 ár, og hann varð fyribils stedgaður, táið Lucas Debes sjálvur triði førdi klagur um hetta fram fyri danska ríkisstýrið 1672.

Innan ta tíð høvdu synir kongsbóndans ongan frammihjá festirætt, táið faðir teirra doyði. Fútarnir nýttu tá høvi til at geva festini burtur til hægstbjóðandi í festipeningi. Í gomlum døgum hava fútarnir sum nevnt eina tíð fingið 1 gamlan dála fyri hvørja festing av mørk í

[1] N. A. Fær., bls. 184 og 189. [2] A. C. E., skjal 94.

jørð, men so við og við høvdu teir fingið tað upp í tað fimmfalda. Orsakað av harra Lucasar klagum fekk elsti sonur bóndans við kongl. skipan 1673 frammihjárætt til festið eftir faðir sín, og fútans gjald av festingini kom niður, men tó aldri niður í gamla legu.

Í Noreg fór fútavaldið at vaksa, táið Margreta drottning tók stýrið í landinum, og grund er til at halda, at Føroyar sum Noregs skattland hevur verið fyri nakað somu lagnu, men myrka miðaldurssøga okkara gevur okkum ongar frásagnir. Siðaskiftismundið sigur okkum tó ymist um fútaveldið á landi.

Óivað hava norskir kongar í miðaldri kravt trúskapareið av Føroya løgtingi, hvørja ferð nýggjur kongur kom. Um siðaskiftið sæst, at løgtingið hevur givið nýggjum kongum slíkan trúskapareið. Í hesum førum hevði kongur sínar umboðsmenn á landi, sum tóku mót eiðinum kongsins vegna. Í øllum førum tykjast fútarnir at hava umboðað kong. Brot móti landsins lógum skuldi kongur átala, og sum kongsins umboðsmaður hevði fútin ákæruskyldu.

Endaligir vóru løgtingsins dómar ikki. Teir kundu verða førdir fram fyri kong til ummetingar. Slíkt man sjáldan vera hent, men vit hava tó dømi um hetta. Táið Fríðrikur kongur III 1649 vildi krevja hilniseið av skattlondum sínum, sendi hann Henrik Bielke og Gabriel Akeleye til Íslands og Føroya at taka móti eiðinum í kongsins navni. Fyrst fóru teir til Íslands og komu á heimferðini inn í Føroyum, hvar teir 3. august tóku móti eiðinum kongsins vegna. Umboð fyri Føroya fólk var alt møtt á løgtingi. Undirskrivað trygdareið føroyinga til kongs hava sjey prestar, løgmaður, seks sýslumenn, 28 løgrættumenn og 11 bøndur. Skjalið er staðarsett í Tórshavn. Tað finnst nú í Langebeks diplomatarium á ríkisskjalasavninum.

Um várið sama árið, sum Henrik Bielke gjørdi ferð sína til Íslands og Føroya, fekk hann boð frá kongi um at døma av nýggjum í málinum hjá Guttormi í Gerðum, sum dømt var á løgtingi 1646. Guttormur hevði sent málið til kongs til endurdømingar, og nýggjur dómur má vera gjørdur á løgtingi 1649 undir leiðslu av Henrik Bielke, hóast løgtingsbókin einki sigur um hetta, tí Guttormur varð sitandi við Gerðagarði, men misti tó sýslumannsembætið. Í brævinum til Henrik Bielke[1]) tekur kongur soleiðis til, og tað er dagssett 19. mars 1649:

«Vider, at eftersom Guttorm Nielsen, boende på vort land Færø, for Os underdanigst haver ladet andrage, hvorledes Joen Joensøn [skal vera Justinussøn], lagmand, der på landet med 12 andre svorne lagrettesmænd forleden år 1646 udi en tvistig sag, som hannem af afgangne Hans Selmer, forrige foged på forn. Færø, imellem haver været, skal hannem have tildømt sit lejemål og sysselmandsbestilling at skulle have forbrudt, medmindre vores ombudsmand hannem på vore vegne benåde vilde, som forn. udstedte dom videre skal udvise, med hvilken lagmandsdom forn. Guttorm Nielssøn underdanigst formener sig stor uret at være sket, som han videre og udførligen agter at ville bevise.

Thi byder Vi Eder og nådigst ville, så og hermed fuldmagt give

1) D.D.R.A., B 86. N.R.R., bind 9, hefti 2, bls. 323.



at rette Eders lejlighed efter på Eders hjemrejse fra forn. vort land Island at begive Eder til forn. Færø og der en vis tid, når eragter Eder did at kunne komme, dertil at bestemme, på hvilken I forn. lagmand, lagrettesmænd og Guttorm Nielssøn for eder kunne indstævne og sagen tilbørligen forhøre, hvortil I nu straks her i byen bemeldte Guttorm Nielssøn stævning haver at meddele, den vores foged der på landet, efter hans ankomst did på tilbørligen steder haver at lade læse og forkynde og I siden, når I der til landet ankommendes vorder, haver I bemeldte tvistige parter at imellem sige og bemeldte lagmands dom at påkende, som I ville ansvare og være bekendt. Hvis I og herudinden kendendes, sigendes eller dømmendes vorder, det haver I til de interesserede fra eder under Eders hænder og signeter tilbørligen at give beskrevet.»

Guttormur í Gerðum hevði altso kravt kongsins endurdøming av løgtingsdómi frá 1646. Hann var í Keypmannahavn, tá hetta bræv var skrivað, og kongur letur so nýggja dómsgerð fara fram á Føroya løgtingi, men við sínum serliga útsenda manni sum dómara í staðin fyri løgmann. Hann letur ikki endurdøming av løgtingsdómi fara fram fyri donskum ríkisrætti. Tær sømdir man Guttormur hava fingið við hesum kongsdómi á Føroya løgtingi, at hann slapp at sita við Gerðagarði, tí vit vita, hann sat við garðinum enn í 1655. Vit síggja, at kongur leggur Henrik Bielke eina við at lata stevning fara fram «her i byen». Maður skuldi vera stevndur minst 14 dagar, innan hann var dømdur.

Nýggjar lógir komu sjáldan, og tær stóðu við í mannaminni. Rættarbøtur, sum kongar av og á góvu, guldu oftast bert fyri landslutar ella serlig viðurskifti. Rættarbótin um festiviðurskiftini í Føroyum frá 1559 er eitt tílíkt dømi.

Í hesi tíðini høvdu Føroyar amtmann saman við Íslandi. Í føroyskum viðurskiftum hoyra vit lítið um henda mann, menn undir hesum amtmanni stóð Føroya fúti. Beint eftir siðaskiftið komu Føroyar undir bispin í Bjørgvin, men seinri varð Føroya kirkja flutt undir Sælands bisp. Ilt er nú søguliga at ávísa, hvat ár tað er hent, men løgtingsbókin vísir, at 1632 lá Føroya kirkja undir Hans Resen bispi á Sælandi. Søguliga er tað væl hugsandi, at hin føroyska kirkjan kom undir Sælands bisp beint eftir 1620, tá Føroya handil av álvara kom at ganga yvir Keypmannahavn.[1])

Gomul er skipanin um nevtoll í Føroyum. Eftir henni skuldi hvør maður millum 15 og 50 ár á hvørjum ári lata eitt ravnsnev ella tvey krákunev, ella, um hann ikki kundi tað, 1 skinn í sekt. Hetta vísir, at ravnaplágan hevur verið stór í Føroyum áður í tíðini. Táið hesin nevskattur var latin, vórðu hesi nev hvørt ár brend á Krákusteini í Havn.

## b. Løgmenn.

Løgmenn í Føroyum í forntíð og miðaldri vita vit einki um meira enn tríggjar. Gamla føroyingasøga nevnir Gilla løgmann, og í skjali

1) Lucas Debes sigur hetta í bók síni um Føroyar 1673.

frá 1412 er Haraldur Kálvsson nevndur sum Føroya løgmaður. Ivaleyst hevur hann verið sonur av prestinum Kálv Lítla, sum søgn er um, og sonurin Haraldur er nevndur í hesi søgn. Í skjali 1479 er Jørundur Skógdrivson løgmaður nevndur.

Løgið kann tað tykjast, at føroyskur løgmaður er ikki nevndur at hava verið við í ráðum, táið Seyðabrævið, sum givið varð í 1298, var í umbúna. Í sambandi við Seyðabrævið eru bert nevndir Erlendur bispur í Kirkjubø og Sjúrður løgmaður í Hetlandi. Hetta hevur ført til ta hugsan, at Føroyar og Hetland tá á døgum hava verið felags um sama løgmann. Ov veikt søguligt prógv er fyri slíkari ætlan, og við teirri tingskipan, sum Føroyar óivað longu tá høvdu, helst við vártingunum, kundi tað illa bera til at hava løgmann, sum var tingdómari, búgvandi í Hetlandi. Væl hevði ræði kirkjunnar í Føroyum verið vaksandi, og Erlendur bispur er óivað mætasti umboðsmaður fyri hetta kirkjunnar veldi í Føroyum. Hóast bispur kann hugsast at hava viljað lagt nakað av løgmannsins ræði undir seg, hevur hann tó aldri skúgvað løgmann úr dómarasæti í verðsligum málum. Kirkjan skuldi sjálv døma í kirkjuligum spurningum og standa yvir øllum verðsligum, men ikki beinleiðis seta seg í verðsligt sæti.

Eisini er tað dømi um kirkjunnar høga meti, at Hákun hertogi tók Erlend bisp við í ráðum fyri at seta saman hitt føroyska Seyðabrævið, og óhugsandi er tað ikki, at Føroya løgting júst hevur sett á hann sum skrivtkønan mann. Sjúrður løgmaður í Hetlandi kann vera tikin við, tí at hann hevur verið serliga kønur í teim viðurskiftum, Seyðabrævið umtalar.

Fyrst tá vit koma út at siðaskiftinum kenna vit allar løgmenn, sum verið hava í Føroyum, at navni. *Tormóður Sjúrðarson* løgmaður sæst 17. aug. 1524[1]) saman við Hilariusi bispi í Kirkjubø á bispagarðinum at hava givið Fríðriki kongi I trúnaðarlyfti í skjali Føroya vegna við landsins innsigli undir og bispsins. Í Kirkjubø er henda gerð gjørd og ikki á løgtingi, men óivað eftir løgtingsviðgerð, og er hetta dømi um, hvat ræði kirkjan hevur havt. Hesin Hilarius bispur, sum er nevndur um 1486, sigur A. Degn í «Varðanum bind XVII síðu 195 var føroyingur, men gevur einki søguligt prógv fyri tí. Henda Tormóð (Siwdson) løgmann vita vit annars einki um uttan, at hann má ætlast at vera deyður 1531.

Seinast á hesum ári, eftir at Joachim Wullenvæver 4. des. fekk helming av Føroyum í len og gjørdist fúti á landi, er *Andras Guttormsson* vorðin løgmaður í Føroyum.[2]) Andras løgmaður er hildin at vera norðmaður og sonur av Guttormi Nilssyni, løgmanni í Bjørgvin. Hann hevur búð í Kálgarði í Sunnbø og sitið á Benckestockajørð har. Táið sonur hansara Guttormur var tilkomin, sigur søgnin Andras løgmann at hava gjørt brotsgerð, sum átti at hava ført við sær, at hann var settur úr starvi, men løgmannssonurin fer tá niður fyri kong og býður bót fyri faðir sín, og tað eydnast honum at endanum at fáa kong at taka við bótini, so faðirin varð sitandi í embætinum. Søguliga er einki prógv fyri hesum. Við stýrið skuldi tá

1) D. D. R. A., Langebeks Diplomatarium, Varðin bind 17, bls. 194—95. 2) A. C.E., skjal 31.



sitið Kristian kongur III. Táið Andras løgmaður doyði 1543, kann hann ikki hava verið gamal maður.

Løgmannssonurin, *Guttormur Andrasson*, tók upp starv eftir faðir sín við kongligum skrivi 22. febr. 1544,[1]) og óivað eftir løgtingsins vali. Hann er nógv gitin í søgnum undir navninum Guttormur løgmaður og má ætlast at hava verið ein týðandi maður. Guttormur løgmaður hevur ivaleyst tey fyrstu árini búð á Kálgarði eftir faðir sín. Í 1550 síggja vit, at hann fekk lívsbræv frá kongi upp á garðin úti á Bø í Kirkjubø,[2]) helst 20 merkur, og 19. mars 1555[3]) fekk hann Steigargarð í Sandavági gjørdan til løgmannsgarð. Kongsbrævið um Steigargarð varð stolið av fronskum sjórænarum, men varð endurgivið 22. nov. 1557. Beint áðrenn Guttormur doyði, fekk hann eisini lívsbræv upp á garðin á Sundi. Guttormur løgmaður doyði í Bjørgvin 19. mai 1571 á heimferð úr Keypmannahavn.[4]) Har hevði hann sum áður nevnt frá kongi fingið lyfti um, at føroyingar sjálvir skuldu kunna reka Føroya handil.

Fyrst 3. jan. 1572 ger kongur við brævi *Jóan Heinason* til løgmann í Føroyum,[5]) men óivað hevði løgtingið longu valt hann summarið fyri. Søga Jóans Heinasonar er mest øll frásøgd áður undir Føroya handli og saman við søguni um Magnus Heinason. Eisini undir Lambaættini er Jóan Heinason umtalaður. Sum áður nevnt tykist Jóan at vera frásettur sum løgmaður um várið 1383. Hann livdi mong ár eftir hetta, hóast hann tykist at hava verið ein sjúkligur maður. O. u. 1580 hevur hann innkallað úr Noreg Gabriel Mitens, Føroya fyrsta bartskera.[6]) Lagnan hjá Magnusi Heinasyni tók honum dygt, og vit síggja, at hann sjálvur eisini hevur verið gjørdur æruleysur maður. Ikki sæst tað tó at vera hent, táið hann var koyrdur frá sum løgmaður. Í «Norske registre» finnast tvey brøv, dagssett 27. juni 1599, sum kongur sendi løgtinginum viðvíkjandi Jóan Heinasyni um tveir dómar, tingið hevði felt yvir hann. Annað brævið eftirgevur Jóani 185 gyllin 12 skinn, tingið hevði dømt honum í bót, og eftir hinum brævinum hevði løgtingið dømt honum fýra merkur av silvuri í bót og gjørt hann til minni mann fyri nøkur hørð orð, hann hevði nýtt móti fútanum. Hetta fyrigevur kongur honum við at siga: «han herefter som tilforn må gå og stå udi loug og toug og søge loug- og gildehus med gilde mænd og gæve og være fri, hellig og sikker og ej være mand desværre for denne sag udi nogre måder efter denne dag.»[7]) Hóast allar trupuleikar tykist Jóan Heinason[8]) at hava liva nær umleið, tá elsta núverandi løgtingsbók okkara byrjar 1615. Stríðið um Lambaarvin er jú ein fittur partur av fyrra helmingi av hesi bók.

1) A. C. E., skjal 52. 2) A. C. E., skjal 64. 3) A. C. E., skjal 81. 4) A. C. E., skjal 130. 5) A. C. E., skjal 136. 6) D. D. R. A., D. D. K., B 161, klaga send Chr. Valkendorf 1582 frá Søren Flue: «Lagmanden er sjuk og skrøbelig, så han må altid have en badsker hos sig, som kan hjælpe på hannem. Nu på det den bekostning skal ikke være hannem alene på, haver han og Mogens gjort det, at almuen der på landet giver altsammen til at opholde den badsker med, hvilket aldrig var brugeligt der på landet førend nu, at lagmanden havde samme badsker behov.» Fyrsti bartskerin sæst soleiðis at vera løntur alment av Føroyum. 7) N. R. R. undir 27. juni 1599, A. C. E., skjal 234 og 235. 8) J. H. Schrøter og aðrir hava viljað sett deyðaár hansara til 1588 ella 1589, men løgtingsdómarnir við tilsvarandi kongs-

*Ísakur Guttormsson*, sum kongur gjørdi til Føroya løgmann við brævi 27. apríl 1583,[1]) var sonur av Guttormi løgmanni (Isak lagmandssøn). Líkt er til, at hann er longu deyður 1587 sum ungur maður. Táið hann gjørdist løgmaður, hevði hann festi í Suðuroy, men annars vita vit einki um hann.

Eftir hann gjørdist *Pætur Jákupsson* Føroya løgmaður við kongsbrævi 15. mars 1588.[2]) Hann var bóndasonur úr Porkeri, men sat tá sum bóndi á Kirkjubøgarði. Ungur maður tykist hann ikki at hava verið, tá hann tók við embætinum, tí vit síggja, at hann hevur



Mynd 10. Løgmannsins innsigli, veðrurin.

átt tingføran son 1591. Sakaris Pætursson hevur sum nevnt áður áteknað avrit av skjali frá Jákupi kongi VI av Skotlandi hetta árið. Við brævi 25. juni 1599[3]) tók kongur Pætur Jákupsson undir síni kongligu vernd: «Hegn, værn, fred og beskærmelse,» fyri at hann, sum kongur sigur, kundi gerast tryggari í sínum starvi. Ósagt skal vera, um hetta hevði nakað við tey brøv at gera viðvíkjandi Jóan Heinasyni, sum kongur sendi løgtinginum tveir dagar seinni. Pætur Jákupsson má vera deyður ár 1600. Hann er ivaleyst aldri fluttur vestur til Sandavágs at búgva.

Um *Tummas Símunarson*, sum gjørdist løgmaður við kongsbrævi 13. apríl 1601,[4]) er lítið at siga. Hann hevði áður verið sýslumaður (herredsfoged) í Streymoy og stórbóndi í Kaldbak. Hann var sýslumaður longu, táið handilsuppgerðin og løgmannsskiftið var í 1583, so hann hevur verið væl til árs, tá hann tók við løgmannsstarvi. Deyður tykist hann at vera í 1607.

Við kongligum brævi 9. apríl 1608[5]) sæst *Sakaris Tormóðsson* at vera vorðin løgmaður. Hann sæst at hava sitið við festi bæði á Eiði og í Streymnesi, og sum løgmaður hevur hann sjálvsagt eisini havt Steigargarð. Í hansara løgmannstíð tekur hin fyrsta løgtingsbókin við. Eftir henni sæst hann at vera deyður undan løgtingssetuni 1628, tí

brøvum frá 1599 avsanna hetta, og ivaleyst hevur Jóan Heinason livað eitt sindur út um ár 1600. At hann síni síðstu ár hevur verið nógv í Bjørgvin, er lógarhandritið A. M. 31 oct. eitt døm: um. Hetta handritið hevur hann 1597 í Bjørgvin givið einum Oslo-manni, sum tá búði hjá «Karin Færøes», og í tí hevur hann — ætlandi við egnari hond — skrivað inn ein part av Seyðabrævinum og «en dommers bønn» á dansk-føroyskum blandingsmáli. Sjá annar grein av Mikjel Sørlie, Varðin, bind 16, bls. 99. 1) A. C. E., skjal 173, í skjalinum skeivt nevndur Isak Gudmundssøn. 2) A. C. E., skjal 191. 3) A. C. E., skjal 233. 4) N. R. R. undir hesum ári. 5) N. R. R.





Mynd 11. Endin av brævið, endurgivið á bls. 157, við hond Jóan Justinussonar løgmanns.

hetta árið setti løgtingið Jóan Jústinusson, løgrættumann og bónda á Kellingargarði í Hattarvík í løgmannsstólin.

*Jóan Jústinusson* varð tá við kongsbrævi 13. mars 1629[1]) settur í løgmannsembætið. Umframt at vera bóndi á Kellingargarði sat hann við nógvum øðrum festum. Sum løgmaður tók hann við, sama árið turkaránið fór fram í Hvalbø, og táið neyðarárini í Føroyum byrjaðu. Tinganesskansin fór tá í gerð, og nógvur tvídráttur stóðst seinri av honum. Mest stóð Tórshavn øðrumegin og bygdirnar hinumegin. Góðar tíðir komu ongantíð aftur í Føroyum, meðan Jóan Jústinusson var løgmaður. Hann er síðsti føroyski løgmaður, ið sæst at hava nýtt hitt gamla føroyska løgtingsinnsiglið við veðramerkinum. Sjá mynd 10, bls. 330. Líkt er til, at hann hevur virkað sum tingskrivari 1627 og á vártingunum 1628. Brævið, har hetta innsigli er nýtt síðstu ferð, er endurgivið á bls. 155. Mynd 11, omanfyri, er tað seinasta av hesum brævi við hond Jóan Jústinussonar. Hann tykist at vera deyður á vári 1654, tí hetta árið setti løgtingi Jóan Pállsson, bónda á Oyrargarði í Eysturoy og sýslumann í Norðuroyum, í løgmannsstólin á tingi. Hesin nýtti annað innsigli, ein rennandi seyð. Sjá mynd 12, bls. 332. Samanber annars bls. 157. Løgtingið bað kong um at seta hann sum Føroya løgmann, men kortini gav kongur Baltzari Jákupssyni løgmannsembætið, og við honum byrjar Gabelstíðin í Føroyum.[2]) Ivaleyst stóð eisini Christoffer Gabel aftan fyri hesa kongsgerð.

1) Lb. fol. 169 a og b. 2) Gabels fúti brigslar Baltzari løgmanni lygn á løgtingi 25. aug. 1658 (løgtingsb. 1655–61 bls. 214): «For det andet sagde Johan Heidemand, at Baltzer Jacobsøn havde løjet sig til sin lagmandsbestilling.»

## c. Sorinskrivarar.

Tingbøkur tykjast at vera førdar í Føroyum aftur í miðjuna av 16. øld, og bókhaldið á tingi kann væl vera eldri enn. Skjøl vita vit hava verið skrivað áður, og spurningurin er bert, um hesi skjøl eisini hava verið førd í bók. Prógv tykist at vera fyri, at Føroya løgting hevur ført tingbók, áðrenn almenn skipan 1568 álegði øllum løgtingum at føra bók. Ætlandi er, at skrivkønir løgrættumenn, helst kirkjuni nærstandandi menn, av fyrsta sinni hava gjørt tað skrivliga arbeiði á tingi.



Mynd 12. Innsigli Jóan Pállssonar løgmanns, ein rennandi seyður.

Táið sum nevnt áður løgmannssonurin, *Nils Andrasson*, (1584) verður nevndur landstingsskrivari, og vanligt er í elstu løgtingsbókini, at sorinskrivarin verður nevndur landsskrivari, er rímuligt at hugsa sær henda Nils Andrasson sum fastan tingskrivara til 1583, táið verfaðir hansara, Jóan Heinason, varð frásettur sum løgmaður.

Álitandi er í hvørt fall, at *Gabriel Mitens* hevur verið landsskrivari ella sorinskrivari í Føroyum frá 1584. Hann sigur tað sjálvur í teirri elstu løgtingsbókini 1620, táið hann sigur starvið frá sær[1]), men av tingbókini síggja vit kortini, at hann hevur virkað sum tingskrivari í 1621. Gabriel Mitens var komin úr Noreg til Føroya sum bartskeri, áðrenn hann gjørdist tingskrivari. Faðir hansara var Christoffer Mitens, magistari í Bjørgvin og ættaður úr Flandern. Abbasonur Gabriels Mitensar, hin í søgn gitni Hanus í Gerðum, kallaði ein son sín Kristoffer. Sjá annars «Varðan» bind 16 síðu 246, grein eftir Mikjel Sørlie.

Nýggjur tingskrivari hevur ikki fingist at taka við starvinum 1621, og løgtingsbókin vísir tí fyrst nýggja handskrivt 1622. Sama handskrivtin gongur aftur 1623. Ikki høvdu vit kent henda tingskrivaran, um ikki kvittan fyri skrivaragjald, dagsett 27. aug. 1622, enn hevði funnist í fútaroknskapinum. Skrivarin hesi bæði árini hevur itið *Jacob Jacobsøn*, og við at samanhalda hesa kvittan við aðra kvittan, sum Jacob Jacobsøn keypmaður 1618 hevur givið fútanum fyri móttiknar vørur úr leigubúðini, síggjast báðar handskrivtirnar at vera so líkar, at hetta má vera sami maðurin, vit hava fyri okkum. Sjá annars mynd 13 og 14 bls. 333. Eftir navninum og handskrivtunum kann valla ivi vera um, at Jákup Jákupsson keypmaður, sum hevði farið óreiðiliga fram móti føroyingum, er settur sum tingskrivari við byrjan av 1622, sama árið, sum Eysturoyar løgrættumenn á vártingi kravdu Mikkjal í Lamba sýslumann at reisa ákæru móti Jacob Jacobsøn keypmanni.

---

[1]) Lb. fol. 102 b. Her stendur m. a.: «Opstod Gabriell Mitens bardsker och landsthingschriffer.» G. M. nýtir her sama orðið um seg, sum fútin 1584 nýtir um Nils Andrasson.







Mynd 13. (Ovara). Jacob Jacobsøn, keypmaður, kvittan 1618.

Mynd 14. (Niðara). Jacob Jacobsøn, sorinskrivari, kvittan 27. aug. 1622.

Alt hetta fall fyri bakka, av tí at hesir løgrættumenn á sama tingfundi nýttu óhøvisk orð og øhøviskan atburð móti Mikkjali. Líkt er til, at avgerð longu tá hevur verið gjørd um, at Jacob Jacobsøn skuldi vera tingskrivari í Føroyum, og at hetta hevur fallið monnum fyri bróstið.

Nýggjur maður skrivar so tingbókina fyri 1624, 25 og 26. Frá honum er eingin kvittan at finna í fútaroknskapinum, og vit kenna tí ikki mannin. N. Andersen sigur í síni bók: *Færøerne 1600—1709*, at Streymoyar sýslumaður, Hans Pedersøn Morsing, var tingskrivari frá 1621 til 1628. Sum ávíst hóskar hetta ikki. Helst er hann deyður í 1626, tí tá tykist bróðir hansara, Jacob Pedersøn Morsing, kallaður Gullsmið, at vera vorðin Streymoyar sýslumaður. Annað, sum sagt kann verða um henda tingskrivaran, er mest gitan[1]).

Heilt onnur handskrivt sæst í tingbókini fyri 1627 og í fyrra helmingi av tí, sum innført er undir 1628, og sum er frá vártingunum hetta árið. Henda handskrivtin er meinlík skrivtini hjá Jóani Jústinussyni løgmanni, soleiðis sum vit kenna hana frá skjali 1647. Eisini tað, at Jóan Jústinusson varð settur í løgmannsstólin á sumri 1628, kann benda á, at hann hevur virkað sum sorinskrivari 1627 og til ólavsøkutingið 1628. Hvør ið hevur ført inn tey skjøl, sum standa í síðsta helmingi undir 1628 í tingbókini, kann einki verða sagt um. So lítið er innført undir árinum 1628, at tað ber mestsum vitni um skrivaraloysi. Soleiðis er einki sagt um handilsviðurskiftini.

Frá 1629 tekur Jacob Pedersøn Morsing Gullsmiður við sum tingskrivari, og hann hevur ført tingbókina til og við 1639. Hann man hava verið yngstur av brøðrunum Morsing. Presturin í Suðurstreymoy tykist at hava verið elstur ella kanska Streymoyar sýslumaður, Hans Pedersøn Morsing.

Tingbókin fyri 1640 er førd av nýggjum manni, men hann ger tað bert hetta árið. Prógv kann einki verða ført fyri, hvør maðurin hevur verið. Í fýra ár á rað førir tá sami maður tingbókina: 1641, 42, 43 og 44, og hesin maður má vera sorinskrivarin Jacob Willumsøn Hannemand, sum varð settur úr starvi við løgtingsdómi sjálvan ólavsøkudag 1645.

Hetta árið og árið eftir, 1646, hevur sama hond ført tingbókina, og vita vit, at maðurin er Hans Madssøn, sum var sonur av gamla fúta, Mads Christensøn.

Í 1647 tekur Nils Jákupsson, eisini kallaður Glyvraskrivarin, við sorinskrivarastarvinum. Hann var sonur at fyrrverandi tingskrivara, Jákupi Gullsmiði. Hann fekk beinan vegin kongsfesti á Glyvrum, sum Jóan Heinason, bróðursonur Mikkjals í Lamba, sama ár varð dømdur frá. Nils Jákupsson var giftur við Onnu Hanusdóttur, dóttur av Havnarpresti Hans Rasmussøn. Sýslumaður í Eysturoy gjørdist hann eftir Sámal Mikkjalsson í Lamba 1670, men fór tá frá sum sorinskrivari.

### c. Fútar.

Sum áður nevnt er fútastarvið avgamalt, men sum fastbúgvandi embætismaður í Føroyum er fútin ikki so gamal. Fútin var kongsins

1) Møguliga Jóannes Torleivsson, sum tá var komin at búgva í Hoyvík.



skattakrevjari. Í gomlum døgum hevði fútin altíð vetrarfúta fyri seg, og soleiðis var tað eisini hetta her umtalaða tíðarskeiðið. Fútin skuldi eisini á tingi føra fram almenn kærumál. Hann var kongsins umboðsmaður meira enn nakar annar embætismaður.

Ilt er at fáa fatur á raðnum av fútum frá siðaskiftinum og út eftir, og stórt meira enn tað, sum sagt er undir handilsviðurskiftunum frá hesi tíðini, er ringt at fáa til vega, men burtursæð frá teirri fyrstu tíðini skal ein roynd verða gjørd. Skrivararnir, sum vit hoyra kongur sendir til Føroya av og á eftir miðjuna av 16. øld, hava verið kongligir fútar, sum skuldu ansa eftir lenshørrunum. Nevndur er fútin Laufrents Pedheg 1538.

Í 1556 og 57 sæst ein Mikkjal Skrivari at hava verið í Føroyum fyri kong, og 1569 sendi kongur Mourits Skrivara til Føroya, orsakað av klagum, sum føroyingar høvdu sent honum um Andras Júta. Hesin Mourits tykist at hava vitjað Føroyar í nøkur ár fyri kong, men fyrst táið Magnus Heinason fær Føroya handil, tykist skil at kunna fáast á, hvørjir fútar, ið hava verið í Føroyum.

Frá 1579 til 1581 var *Mads Poulsøn* fúti í Føroyum, í 1578 var hann eisini keypmaður, og vísir hetta, hvussu fúta- og keypmannsskapur ofta gingu saman í eitt í gomlum døgum. Hann var jú fúti, táið uppgerðin varð gjørd yvir ránið í Tinganesi 1579, sum seinni førdi til, at Jóan Heinason løgmaður var feldur.

Í 1582 sendi Christoffer Valkendorf *Søren Christensøn Flue* til Føroya sum fúta og annars við tí í kvittan at kanna viðurskiftini á landi. Frágreiðsla hansara førdi við sær hina stóru uppgerðina millum brøðurnar Magnus og Jóan Heinason øðrumegin og Christoffer Valkendorf hinumegin. Hon er umtalað undir Føroya handli, bls. 198 ff.

*Mikkel Ibsøn* hevur verið fúti 1583—84. Jarðarbók og fyrsti fútaroknskapur, vit kenna, eru frá hansara fútatíð. Ikki mega vit kortini trúgva, at eingir fútaroknskapir áður hava verið gjørdir. Fylgjandi ár til 1613 eru teir flestu fútaroknskapirnir burtur, men onkran av hesum ársroknskøpunum kenna vit tó.

Fúti í 1585 var *Niels Skinkel til Gierskov*. Í 1584 hevði hann fingið umsjón við Føroyum mestsum len.

*Lyder Augustinussøn* var fúti 1586—87[1]). Hann er í fútaroknskapinum 1584 nevndur «kongl. majestæts købsvend». Av hesum kunna vit ætla, at hann tá hevur verið við handilin, tó valla ábyrgdarhavandi keypmaður. Hann veitst at hava verið vetrarfúti ár 1600 og sama ár at hava sitið við allari jørðini í Hoyvík í festi, samstundis eisini við festi í Streymnesi. Í eitt ár, 1613—14, sat hann eisini við Sundsgarði. Streymnesfestið hevði hann mist ímeðan. Ikki sæst hann at hava havt festi í Føroyum 1590, men ætlandi man hann kortini árini innan 1600 hava verið í landinum.

Árini 1588—91 er *Mads Batzersøn* fúti í Føroyum. Fútaroknskapirnir frá 1588 og 1590 eru varðveittir. Hann tók sum áður nevnt skjal frá Jákupi kongi VI av Skotlandi til Føroya løgtings 1591 við sær úr Føroyum til Danmarkar hetta heystið, sjá bls. 129 ff.

Í 1592 sendi kongur eftir brævi 8. mai sama ár Søren Nielssøn og

1) Tað, sum frammanfyri er sagt um fútar, er nógv eftir A. Degn, Varðin, b. XVIII.

*Mogens Nielssøn* til Føroya, hin fyrra sum keypmann, hin seinra sum fúta. Eftir samtíðar brøvum sat Mogens Nielssøn við fútastarvinum til juni 1593.

Longu síðst í juni sama ár er *Søren Nielssøn* ella Sørin Íslendingur nevndur Føroya fúti í kongligum brævi[1]), men hetta kann hann tá bert hava verið eitt ár, tí kongligt bræv 22. mars 1594 nevnir hann aftur keypmann[2]). Líkt er til, at Sørin Íslendingur og Mogens Nielssøn hava býtt um størv, soleiðis at Mogens aftur er vorðin fúti, sum hann var á fyrsta sinni, tí eftir brøvum sæst Sørin Íslendingur at vera nevndur keypmaður í Føroyum til 1596, meðan eingin fúti sæst nevndur. Enn eitt ár, 1598, sæst Sørin Íslendingur at hava verið fúti í Føroyum[3]). Við kongligum brævi fekk hann tá ta løn ásetta, sum fútar í Føroyum høvdu til 1648, og reglugerðin, hann fekk at ganga eftir sum embætismaður, varð endurtikin, tá seinri fútar vórðu settir í starv.

Í 1597 gjørdist *Strange Madssøn* fyrstu ferð fúti í Føroyum[4]). Sama árið leigaði kongur Føroya handil burtur til eitt handilsfelag í Bjørgvin. Sum nevnt kom Sørin Íslendingur aftur til Føroya sum fúti 1598, men longu árið eftir letur kongur aftur fútastarvið upp í hendurnar á Strange Madssøn[5]). Hann sat tá sum fúti í Føroyum til og við 1619, men búði annars í Keypmannahavn. Hin norska løgbókin frá 1604 er gjøgnum hann sett í gildi í Føroyum, og at hann hevur ætlað hana í síni heild at galda í Føroyum, sæst av, at handilshavararnir og føroyingar fóru fyri kong við klagu um tað nýggja mát (donsk alin) og ta nýggju vekt (Kølnarmørkina), sum Norska løgbókin ásetti. Kongur gav føroyingum viðhald (1605), at norska løgbókin galt ikki fyri Føroyar uttan treytir — og tað vil óivað siga uttan Føroya løgtings samtykki — og at gamalt mát og gomul vekt, sum føroyingar áður høvdu nýtt, og sum teir alsamt ynsktu at nýta, framvegis skuldu galda í Føroyum. Undir handilsviðurskiftunum er greitt frá, hvussu Strange Madssøn, meðan hann var fúti, fekk lagt triðjapartin av Føroya handli undir seg. Umframt fúti í Føroyum var Strange Madssøn ráðmaður í Keypmannahavn.

Í 1620 tók *Mads Christensøn* Gullandsfari, borgari í Visbý, seinri í Keypmannahavn, við fútastarvinum í Føroyum. Hann tóktist í fyrstani at vilja fara hartandi fram móti monnum, sum ikki høvdu hildið kongsins ásetingar og lógir, innan hann kom til Føroya. Soleiðis átalaði hann á Føroya løgtingi 1620 Føroya prestar, løgmann og meginpartin av løgrættumonnunum fyri loynihandil. Vert er eisini at minnast, at Jacob Jacobsøn keypmaður tykist at hava fingið skrivarastarv í hansara fyrstu fútatíð. Han man eisini hava fingið sett Jóhannes Torleivsson frá sum sýslumann í Eysturoy og tikið Mikkjal í Lamba í staðin. Av stríðinum í Lambaættini sæst, at Mikkjal var ógvuliga lýðin fyri hesum fúta Harímóti var kona hansara, Magdalena, fútanum beisk, og illa tykist hon eisini at hava farið við Mikkjali. Mads Christensøn doyði í Keypmannahavn á vetri 1644—45.

Í 1645 setti kongur *Hans Selmer*, borgara í Keypmannahavn, til

1) A. C. E., skjal 218. 2) A. C. E., skjal 221. 3) A. C. E., skjal 231. 4) A. G. E., skjal 228. 5) A. C. E., skjal 232.



fúta í Føroyum. Á ólavsøkutingi hetta ár reisti hann kærumál móti sorinskrivaranum, Jacob Willumsøn Hannemand, sum løgtingið tá dømdi úr starvi, og í 1646 førdi hann almenna klagu fram á ting móti Guttormi í Gerðum, sum varð settur frá sum sýslumaður. Sakarmál móti vetrarfúta sínum, Jóani Heinasyni á Glyvrum, sum Sámal Mikkjalsson í Lamba hevði klagað, mátti hann eisini taka upp 1647, so Jóan misti festi sítt umframt sjálvsagt, at hann slapp ikki aftur at vera vetrarfúti. Hans Selmer doyði frá starvi sínum.

Eftir tað gjørdist *Christen Madssøn* fúti í Føroyum 1648. Hann var sonur av Mads Christensøn fúta, og tá hann kom í starv, fekk hann fútaløn sína hækkaða frá 80 gyllin til 80 ríkisdálar árliga (1 gyllin = 5 merkur; 1 ríkisdáli = 6 merkur). Hann tykist at hava sitið sum fúti til 1655, tá lensharrin, Gabel, sjálvur fekk loyvi at seta fútar í Føroyum. So merkiligt tað ljóðar, tykist Baltzer Jacobsøn bæði at hava verið løgmaður og fúti í Føroyum árið 1655, sum sæst av fylgjandi løgtingsbók.

## d. Sýslumenn.

Sýsluskipanin í Føroyum er avgomul, og sýslan hevur óivað av fyrstu tíð merkt tað økið, sum lá undir hvørjum várting. Í søguligari tíð kenna vit bert sýslumenninar sum undirmenn fútans í hvørji sýslu. Teir skuldu fáa honum kongsskattin til vega av landinum og annars ansa eftir, at kongur fekk tað, sum lógin tilskilaði honum. Eisini skuldu teir vera verjar lógarinnar hvør á sínum øki. Sýslumenninir búðu altíð í Føroyum og oftast, men ikki altíð, hvør í síni sýslu. Vanliga vóru teir føroyskir bøndur. Í hesum tíðarskeiði eru dømi um, at teir hava búð uttan fyri sýslu sína. Hitt mest vanliga jarðargjaldið, leigan, hevur óivað oftast verið goldið fútanum beinleiðis, helst á ólavsøkuferðum til Havnar, og gamalt var, at leiguárið gekk frá ólavsøku til ólavsøku. Kongsins partur av tíggjundargjaldi, hvalaveiðu og reka kom inn gjøgnum sýslumenninar. Tað góvu sýslumenninir fútanum á ólavsøkutingi. Nógvar av hesum sýslumannsuppgerðum liggja við fútaroknskøpum, soleiðis at tað sæst, hvat komið er úr hvørji sýslu, og nøvnini á sýslumonnunum, sum latið tað hava úr hondum, standa viðmerkt, men á summum uppgerðum stendur sýslumannsnavnið ikki. Um nøkur ár gleppa burtur úr, og sama sýslumannsnavnið finnst aftaná, er einki at ivast í, at maðurin hevur verið sýslumaður alla tíðina. Umframt finnast sýslumenninir nøkur ár nevndir í løgtingsbókini frá 1615. Eftir hesum er sett upp fylgjandi talva yvir sýslumenn, sum hava verið í hvørji sýslu gjøgnum árini:

| Ár | Norðuroyar | Eysturoy | Streymoy | Vágar | Sandoy | Suðuroy |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Niels | | Sylvester | | |
| 1584 | Antonius | Andersøn | Thomis | Simonsøn | Daniel | Simon |
| 1588 | Joensøn | Reinicke | Simonsøn | Zacharias | Nielssøn | Jenssøn |
| 1590 | ? | Hermandsøn | – | Joensøn | – | – |
| | | | | | Thomis | |
| 1600 | Niels | Trond | – | – | Jørgensøn | Holdan |
| 1601 | Hendriksøn | Andersøn | Lyder | – | Jørgen | Gudelocksøn |
| 1602 | – | – | Augustinuss. | – | Trondesøn | – |
| 1613 | ? | ? | ? | ? | ? | – |
| 1614 | ? | ? | ? | ? | ? | – |
| 1615 | Zacharias | Johannes | Hans | Daniel | Isak | – |
| 1616 | Pedersøn | Thorlofsøn | Pedersøn | Nielssøn | Ismaelsøn | – |
| 1617 | – | – | – | – | – | – |
| 1618 | – | – | – | – | – | – |
| 1619 | – | – | – | – | – | – |
| 1620 | ? | ? | – | – | – | – |
| 1621 | ? | ? | – | – | – | – |
| 1622 | Joen | Michel | – | – | – | – |
| 1623 | Justinussøn | Joensøn | – | – | – | – |
| 1624 | – | – | – | – | – | – |
| 1625 | – | – | – | – | Trond | – |
| 1626 | – | – | Jacob | Bertel | Jørgensøn | – |
| 1627 | – | – | Pedersøn | Danielsøn | – | – |
| 1628 | – | – | – | – | – | – |
| 1629 | – | – | – | – | – | – |
| 1630 | Joen | – | – | – | – | Jacob |
| | Arentsøn | | | | | Holdansøn |
| 1631 | Guttorm | – | – | – | – | – |
| 1632 | Nielssøn | – | – | – | – | – |
| 1633 | – | – | – | – | – | – |
| 1634 | – | – | – | – | – | – |
| 1635 | – | – | – | – | – | – |
| 1636 | – | – | – | – | – | – |
| 1637 | – | – | – | – | – | – |
| 1638 | – | – | – | – | – | – |
| 1639 | – | – | – | – | – | – |
| 1640 | – | – | Augustinus | – | Jacob | – |
| 1641 | – | Samuel | Lydersøn | – | Tiørnersøn | – |
| 1642 | – | Michelsøn | – | – | – | – |
| 1643 | – | – | – | – | – | – |
| 1644 | – | – | – | – | – | – |
| 1645 | – | – | – | – | – | – |
| 1646 | Joen | – | – | – | – | – |
| | Heinesøn | | | | | |
| 1647 | Joen | – | – | – | – | – |
| 1648 | Poulsøn | – | – | – | – | Oluf |
| 1649 | – | – | – | – | – | Mortensøn |
| 1650 | – | – | – | – | Thomas | – |
| 1651 | – | – | – | – | Joensøn | – |
| 1652 | – | – | – | – | – | Ellender |
| | | | | | | Pedersøn |

Tað er at viðmerkja, at táið fútaroknskapirnir fyri 1613 og 1614 einki nevna, hvussu sýslumenninir hava itið, sum hava givið kongstíggjundina frá sær hesi árini, er einans møguligt at siga, hvør tá hevur verið sýslumaður í Suðuroy. Fyrst 1615 gevur løgtingsbókin okkum nøvnini á øllum sýslumonnunum. Bæði í Norðuroyum og Eysturoy



hevur sýslumannsskifti verið um ella líka eftir 1620, men táið hvørki fútaroknskapirnir ella løgtingsbókin nevna sýslumenninar við navni hesi árini, er ringt at avgera, hvørjir ið hava sitið sum sýslumenn í hesum báðum sýslunum 1620 og 1621. Løgtingsbókin sigur, hvørjir vóru sýslumenn 1622. Aðrar umstøður við hinum nýggja fútanum, Mads Christensøn, sum kom 1620, gera tað rímuligt at hugsa, at hetta sýslumannsskiftið longu er hent 1621. Lagt skal verða aftrat, at hvørki av fútaroknskapi ella løgtingsbók sæst, at sýslumaðurin í Suðuroy, Oluf Mortensøn, hevur tikið við starvi 1648, men táið sýslumaðurin, sum var undan honum, Jacob Holdansøn, longu varð dømdur úr starvi 18. juli 1648, mega vit ætla, at Oluf Mortensøn hevur greitt sýslumannsins skyldur úr hendi eftir ólavsøku hetta ár.

## Norðuroya sýslumenn.

Um teir tveir fyrstu sýslumenninar, sum nevndir eru, skal bert verða sagt, at Antonis Jóansson var bóndi á Húsum, og at Nils Heindriksson longu fekk festi í Mikladali og Leirvík 1570, sum kongligt bræv vísir[1]).

Sakaris Pætursson var sonur av løgmanninum, Pætri Jákupssyni, og kona hansara var Ata (Agata) Eyðunsdóttir. Hon var dóttir av Eysturoyar presti og Føroya prósti, Eyðuni Andrassyni (Auden Andersøn). Sakaris festi Heygagarð á Viðareiði, 16 merkur, eftir Jústinus Jóansson sama ár, 1601, sum faðir hansara, Pætur Jákupsson, eisini bóndi á Kirkjubøgarði, doyði, og Kirkjubøfestið varð givið Símuni Jenissyni úr Laðangarði í Sunnbø. Umframt fekk Sakaris seinri festið við Garð á Viðareiði, 4 merkur. Løgtingsbókin undir 5. aug. 1616 vísir, at hann saman við bróðuri sínum, Jákupi, hevur arvað Magdalenu Sørinsdóttir í Bjørgvin. Í 1618 varð Sakaris klagaður á tingi fyri drykkjuskap og aðrar ólótir, men slapp at sita við sýslumannsembætinum eitt royndarár við at lova at halda seg frá brennivíni.

Hesi viðurskifti kunna møguliga hava ført við sær, at Jóan Jústinusson er vorðin sýslumaður longu í 1620. Jógvan hevði 15 merkur í festi í Hattarvík í Fugloy. Eftir bóndabókini hevði hann umframt nógva aðra festijørð. Faðir Jóans var Jústinus Jóansson. Ein 4 marka haga í Fugloy í Skarðsvík, nevndur úti í Vík; við innangarðsjørð á Kirkju[2]), sigur søgnin Jústinus løgmann at hava givið yngra syni sínum, tá hann flutti av oynni vestur í Vágar. Ilt er at siga, hvønn av feðgunum hetta sipar til, men løgtingsbókin frá 1615 sigur einki um hesa gávu. Jóan Jústinusson var giftur við Siggu Ísaksdóttur, óivað dóttir av Ísaki Guttormssyni løgmanni.

Jóan Arantsson sæst at hava verið bóndi á Uppsølum, sýslumaður 1630.

Longu 1626 tykist Guttormur Nilsson ella Guttormur í Gerðum at hava fingið nakað av Gerðagarði, men 2 ár áður hevði hann fingið fatur í festi í Hvannasundi. Í 1631 var hann Norðuroya sýslumaður.

1) A. C. E., skjal 126. 2) Á vártingi norður í Vági 1740 vitna skilamenn úr Fugloy, at teir bert vita, at soleiðis hevur verið frá gamlari tíð.

Faðir hansara var Nils Andrasson, bóndi á Skálatoftum, og móðir hansara var dóttir av Jóani Heinasyni løgmanni. Løgtingið dømdi hann úr starvi 1646. Kona hansara, Sissal Stefansdóttir, hevur ætlandi verið donsk ella norsk.

Jóan Heinason, sum var sýslumaður eitt ár eftir Guttorm, hevur ætlandi verið bóndi í Miðtúni á Kirkju í Fugloy, tá, 1646, ungur maður.

Jóan Pállson, bóndi á Oyrargarði í Eysturoy og Norðoya sýslumaður 1647—61, sæst einki festi at hava havt í Norðuroyum. Hann var giftur við Karen Olesdatter, eini dóttur av Vágapresti, Oluf Bodilsøn, og Agnes Jóansdóttur. Agnes var dóttir Jóans Jústinussonar.

## Eysturoyar sýslumenn.

Líkt er til, at hvørgin av teim tveimum fyrstu sýslumonnunum í Eysturoy, sum nevndir eru, hava búð í oynni. Nils Andrasson er helst dótturmaður Jóans Heinasonar, og eftir søguligari tilgongd kann hann væl hava mist sýslumannsstarvið 1585. Reinicke Hermandsøn sæst at hava verið bóndi á Kjalnesi í Kollafirði, og hann hevur óivað verið sonur av einum hansiatiskum skipara, Hermand Reinicken, sum var í Føroyum í handilsørindum um siðaskiftið sum umboðsmaður fyri Lübeckarmenn. Um Trond Andersøn veitst einki annað enn, at hann hevur verið bóndi í Syðrugøtu.

Jóhannes Torleivsson var sonur av Eysturoyar presti og Føroya prósti, Torleivi Grækarissyni. Kona hansara var Biritta (Birgitte) Rasmusdóttir, dóttir av prestinum Rasmus Ganterup. Løgtingsbókin nevnir hann 1615 sum sýslumann í Eysturoy, men hann kann eisini hava verið tað áður. Helst man hann hava verið sýslumaður til og við 1620. Hann sæst ikki at hava verið sýslumaður í Streymoy, sum N. Andersen vil siga hann hava verið, hóast hann í 2—3 ár eisini hevði festi í Hoyvík. Hann var talsmaður ella sakførari fyri Eysturoyar løgrættumenn móti Mikkjali í Lamba 1622, tó ikki sum sýslumaður, men heldur sum frásettur sýslumaður búgvandi í Hoyvík. Sum løgrættumaður er navn hansara ofta nevnt í løgtingsbókini. Hann kann møguliga hava virkað sum tingskrivari 1624, 25 og 26.

Tað, at Mikkjal Jóansson í Lamba tók sýslumansstarvið eftir Jóhannes Torleivsson, hevur óivað gjørt óvinskap teirra millum. Bróðir Jóhannesar, Gabriel Torleivsson prestur, hevði jú nógv stríð við Mikkjal í Lamba um Lambaarvin, so alt tykist at hava borið sama vegin. Fútaroknskapirnir vísa, at Mikkjal hevur sitið við sýslumannsembætinum til 1640.

Sámal Mikkjalsson tók við sýslumannsstarvi í Eysturoy eftir faðir sín, og hann sat við tí, til hann doyði 1669—70. Eisini allan Lambagarð fekk Sámal, og hann sæst at hava sitið við honum til 1670. Umframt hevði hann allan Søldarfjørð og stóran part av Glyvrum.

## Streymoyar sýslumenn.

Undir vitnisburðarskjali hjá Jóani Heinasyni løgmanni 25. juni



1583 stendur nevndur Hans Pedersøn herredsfoged, sum merkir sýslumaður í Streymoy, ætlandi Hans Pedersøn Morsing[1]).

Thomis Simonsøn er ivaleyst sami maður sum hin seinri løgmaðurin Tummas Símunarson, sýslumaður 1583—1600. Lyder Augustinussøn var komin til Føroya sum handilssveinur, gjørdist seinri vetrarfúti og bóndi í Hoyvík, sýslumaður 1601. Hóast hann hevði hetta festið til 1625, sæst hann longu at vera fráfarin sum sýslumaður í løgtingsbókini 1615; fráfaringin kann enntá vera hend áður.

Hans Pedersøn Morsing er nevndur sum sýslumaður í løgtingsbókini 1615, og hann sæst at hava sitið við embætinum til og við 1625. N. Andersen sigur hann í síni bók um Føroyar eisini at hava verið sorinskrivara í nógv ár; men líkt er til, at hann aldri hevur verið sorinskrivari, tí tann handskrivtin, sum finnst í løgtingsbókini 1624, 25 og 26, kann illa vera hansara, táið bróðir hansara Jacob Pedersøn Morsing, nevndur Gullsmiður, longu sæst at hava tikið við sýslumannsstarvi eftir hann 1626. Herredsfoged sæst Streymoyar sýslumaður at vera nevndur. Beinleiðis undir honum lá hospitalið á Argjum, sum tó hevði sín egna fyristøðumann.

Jacob Pedersøn Morsing var eisini sorinskrivari næstan alla sína sýslumannstíð 1625—39. Hann livdi longst av teim trimum brøðrunum Morsing og man ætlandi hava verið yngstur. Ætt hansara sæst at hava hildið fram í Føroyum gjøgnum sorinskrivaran, Nils Jákupsson. Jacob Pedersøn sæst at hava búð í Havn, tá hann gjørdist sýslumaður.

Augustinus (Aggusttinus) Lýðarsson, bóndi á Sundi og í Hoyvík, var sonur av Lýðari Augustinussyni. Sundsgarð tykist hann longu at hava fingið í 1614, sýslumaður frá 1640.

## Vága sýslumenn.

Eftir bóndabókini er einki at siga um teir fyrstu sýslumenninar í Vágum, Sylvester Simonsøn og Zacharias Joensøn. Ætlandi hava teir verið stórir óðalsmenn. Nøvn teirra finnast í fútaroknskapinum.

Harímóti er nakað at siga um Danjal Nilsson ella Nigilsson, ið ættaður var av Hamri í Skálavík, sýslumaður í hvørt fall 1615—25. Longu í 1601 sóu vit, at hann hevði fest løgmannsgarðin. Innan ár 1600 man hann vera fluttur vestur í Vágar, tí longu tá er hann horvin sum sýslumaður í Sandoy. Tá hann heldur ikki innan 1603 sæst sum festari har, hevur Pætur Jákupsson løgmaður ætlandi tá havt hann sum uppsitara á Steigargarði, løgmannsgarðinum, og táið løgmaður doyði 1601, hevur hann biðið um at sleppa at festa garðin. Strange Madssøn fúti hevur eftirlíkað hesum, men hin nývaldi løgmaðurin, Tummas Símunarson, hevur tá mótmælt festingini við at vísa á kongsins bræv frá 1555, sum gjørdi Steigargarð til løgmannsgarð, og festingin varð soleiðis gjørd til einkis. Lyfti um festing av øðrum garði man Danjal tá hava fingið, og tað merkiliga hendi, at Guttormur Jákupsson, sum tá nýliga hevði fest Ryggsgarð í Miðvági, eftir 1603

1) D.D.R.A., D.D.K, B 161.

er horvin sum bóndi har, og tá jarðarbøkurnar taka við aftur 1613, er sami Guttormur ella «Gutte på Ryg», sum løgtingsbókin kallar hann, bóndi í Mykinesi. Ivaleyst er hetta sami maður sum Stóri Gutti í fólkasøgnini. Hetta kundi bent á, og søgnin nevnir tað, at hin stóri bátaskaðin í Føroyum er hendur um fellisárið 1602. Danjal Nigilsson sat í hvørt fall á Ryggsgarði 1613 og sæst at vera vorðin sýslumaður í Vágum 1615 eftir løgtingsbókini, var kanska heldur ikki tá nýkomin í embætið. Søgnin sigur Danjal Nigilsson at hava verið harðrendan mann, og tingbókin 1621 ber vitni um, at menn hava verið illa í øgn við hann:

«Oluf Poulsøn i Sandevåg for, han overfaldt Daniel Nielssøn i Sørvåg med Skældsord, desligeste på kirkebakken i Sandevåg og der truede og undsagde forn. Daniel Nielssøn, er tildømt at bøde til kongl. majestæt for sådan modvillighed 6 mark sølv.»[1])

Oluf Poulsøn tykist tá líka at hava verið um at taka við festi í Sandavági. Kann vera, at Danjal Nigilsson hevur verið honum nakað beiskur sum sýslumaður.

Danjal Nigilsson var giftur við Katrinu Eyðunsdóttur, ið var dóttir av Eyðuni Andrassyni prósti.[2]) Tey siggjast at hava átt tríggjar synir. Jóhannes Danjalsson festi Ryggsgarð eftir faðir sín. Mortan sæst at hava verið giftur í Bjørgvin og tíðliga deyður, og hin triði tók upp sýslumannsstarvið.

Helst man Bartal Danjalsson[3]) sum sýslumaður hava búð í Miðvági, har hann hevði festi við Kirkjar; men hann hevði eisini festi í Bø. Óðalsjørð hevur hann óivað átt. Hann var giftur við Marin ella Marjun Rasmusdóttur, sum var dóttir av prestinum Rasmus Christensøn Ganterup, og soleiðis svágur við Jóhannes Torleivsson. Bartal og Marjun áttu synirnar Danjal og Jóhannes. Hin fyrri doyði sum studentur.

## Sandoyar sýslumenn.

Danjal Nigilsson er áður umtalaður. Hann er horvin sum sýslumaður í Sandoy millum 1591 og 1600. Tá man hann vera farin vestur í Vágar.

Thomis Jørgensøn, sýslumaður 1600, tykist at hava búð í Skúvoy og at hava havt festi har, men hann hevði eisini Stóru Dímun og á Sandi var hann somuleiðis bóndi.

Jørgen Trondesøn hevði tær merkurnar á Sondum heima á Sandi í festi, sum seinri gjørdust náðisgarður, sýslumaður 1601—?

Ísakur Ísmaelsson, sýslumaður 1615—23, var prestasonur úr Hvalbø og gjørdist bóndi í Stóru stovu í Skúvoy.

Tróndur Jørgunsson, sýslumaður 1625—39, hevði festi í Skálavík. Hann var giftur við prestadóttur av Sandi, Marion Nilsdóttur. Líkt er til, at hann hevur verið sonur av áðurnevnda sýslumanni, Jørgen Trondesøn.

---

1) Lb. fol. 110 b. 2) N. A. Fær., bls. 406. 3) Í vár- og løgtingsbók 1656—66 hin 6. mars 1665, fol. 111 b, kallaður «Bertel Danielsøn på Ryg».



Jákup Tjørnirssøn, sýslumaður 1640—49 var ikki sandoyingur. Hann var nólsoyingur.[1])

Víst er á áður, at nógvir sýslumenn hava búð uttan fyri sýslu teirra. Tummas Jóansson, sýslumaður, sæst heldur ikki at hava verið kongsbóndi í Sandoyarsýslu. Hann tykist at hava verið óðalsmaður í Skálavík.

## Suðuroyar sýslumenn.

Laðangarðsbóndin í Sunnbø, Símun Jenisson, er fyrstnevndi sýslumaður í Suðuroy eftir fútaroknskøpunum. Hann er óivað sami maður, sum 1601 festi Kirkjubøgarð, og faðir at Trølla-Símuni.

Hálvdan Guðlaksson var bóndi í Hvalbø, sýslumaður 1600—1629, og hevði leingi hálva Lítlu Dímun í festi saman við øðrum hvalbingum.

Eftir hann tók Jákup Hálvdansson, sonur hansara, við sýslumannsstarvinum 1630. Hann kom illa fyri við uppmáting og umbýting av prestajørðini í Hvalbø, sum honum var álagt saman við løgrættumonnunum í Suðuroy, og var dømdur úr starvi av Føroya løgtingi á sumri 1648.

Ólavur Mortansson, sýslumaður 1648—51, sæst at hava havt festi í Hovi, og Ellendur Pætursson, sýslumaður frá 1652, búði í Porkeri, har hann hevur havt nakra pantijørð í festi.

## e. Prestar.

Undan siðaskiftinum er prestaskapurin í Føroyum okkum mestsum ókendur. Tað er líkasum lutherdómurin hevur vilja dult alt burtur av tí, sum lá undan siðaskiftinum. Peder Claussøn umtalar í sínum «Norriges Beskrivelse» frá 1632 ikki sørt Føroyar. Tey føroysku nøvnini, har verða nevnd, eru ógvuliga nógv avlagað, og annað er eisini skeivt komið fyri, t. d. samanblanding av oyggjum og bygdum. Av bókini sæst tó, at í teirri katólsku tíðini hava fleiri kirkjur verið í Føroyum enn eftir siðaskiftið, og hetta hóskar væl við ta vanligu mannagongd, sum var í Norðurlondum. Soleiðis sigur bókin, at Eysturoyggin í gomlum døgum hevði 10 kirkjur, men tá 7, og at 6 kirkjur høvdu verið í Sandoy. Skúvoy má tá vera roknað upp í, helst eisini Stóra Dímun. Eftir at kirkjurnar í Føroyum eru nevndar, sigur bókin:

---

1) Landsskjalasavnið. Í vár- og løgtingsbók 1656—66, fol. 197 a, undir 16. septbr. 1663 finnst soljóðandi: «For retten opstod kongl. majestæts landfoged Johan Heidemand, som havde udi rette ladet stævne Jacob Tørnesøn af Nolsøe anlangendes nogen gæld, som han til kompagniet skulde være skyldig, nemlig 22 gl. 4 1/2 sk., og eftersom forn. Jacob Tørnesøn foregiver, at han ikke kan svare til samme gæld af årsage, at restancen og dommen er fra hannem kommen til Christen Madssøn, den tid han gik fra sysselmandsembedet, da findes, at om endskønt han bliver tildømt at betale, da befindes intet andet hos hannem end stor armod, alderdom og skrøbelighed.» Christen Madssøn var fúti 1648—54. Sjá annars Fær. kongsb., bls 97.

«Dette register på Færøernes navne og kirker er skrevet før den store mandedød, hvilken skete anno 1350.» Peder Claussøn tykist at hava havt skrivligt skjal at styðja seg til, helst skrivað á gomlum máli; navnabronglingin kemur óivað harav. Hetta bendir eisini á, at Føroyar mega vera settar nógv til afturs av svartadeyða. Umframt kirkjur hava bønhús verið í Føroyum í teirri katólsku tíðini. Bønhústoftir finnast enn, og sagnir eru eisini um hesi bønhús.

Í «Varðanum», bind XVIII, bls. 69, hevur Mikjel Sørlie skrivað grein nevnd «Biskop Arnes lovbok». Har vísir hann á, at tveir føroyskir klerkar: Tróndur føroyski og Eirikur føroyski, eru nevndir í Noreg um somu tíð í byrjan av 14. øld. Eisini ger hann tað heilt trúligt og nærum vist, at Tróndur føroyski hevur skrivað hesa løgbókina fyri Árna bisp, harav handritið nú finnst á skjalasavni í Lund undir merkinum «Lund 12 fol». Ellendur bispur í Kirkjubø doyði 1308, Á hansara døgum og upp undir svartadeyða síggjast føroyskir klerkar soleiðis at hava verið við í tí bókmentaarbeiði, sum tá fór fram. Ymist bendir á, at hin katólska kirkjan í Føroyum hevur havt stórt vald á landsins rættarviðurskiftum. Undan árinum 1300 var Ellendur bispur tann føroyingur, Hákun hertogi ráðførdi seg við, innan hann gav føroyingum Seyðabrævið 1298. Hilarius bispur skrivaði Fríðriki kongi I trúnaðarbræv føroyinga vegna á bispagarðinum í Kirkjubø saman við løgmanni, og táið Kristian kongur III vildi hava Føroyar undir sítt vald og siðaskiftið innført, heitti hann serliga á Ámund Ólavsson bisp.

Í 1759 hevur Chr. Djurhuus próstur skrivað niður nøvn á teim luthersku prestunum, sum hann sigur hava verið í Føroyum innan hansara tíð. Virkistíð teirra fyrstu prestanna, prósturin uppgevur, er í nógvum førum ivasom, og ikki er gott heldur at siga, um allir teir fyrstu prestarnir eru komnir við. Viðmerkingar skulu aftan á verða gjørdar um teir elstu prestarnar, prósturin nevnir. Hann sigur, at siðaskiftið kom til Føroya 1538. Heilt rætt kann hetta ikki sigast at vera. Skjøl vísa, at Ámundur Ólavsson enn er nevndur Føroya bispur í august 1538, og einki bendir har á, at honum tá hevur staðið veikt undir fótum. Ámundur bispur boygdi seg fyri siðaskiftinum, tí tað kom sum kongsboð. Hann hevði jú fingið Føroya bispadømi fyri lívstíð við at lova kongi og hansara eftirmonnum trúskap; men katólikkur hevur hann verið av hjarta. Tí er hann farin úr starvi sum sæst 1551, helst settur frá áður. Trúarkampur var eingin í Føroyum sum í Íslandi; men kongsboðini frá Kristiani III vunnu longu frama á Føroya løgtingi 1535, og honum varð givið valdið. Tí má siðaskiftið í Føroyum verða roknað frá hesum ári og ikki frá einum ári, táið Ámundur Ólavsson *kanska* fór frá sum bispur.

Á Íslandi endaði kirkjukampurin 1551 við, at Dáði Guðmundsson bóndi fangaði Jón Árason bisp við synum sínum og fekk teir allar dripnar. Hann fekk nógv jarðargóðs lagt undir seg fyri hetta bragdið. Eftir 1584 møta vit monnum í Føroyum við einum øgiligum festigóðsi í ymsum bygdum. Jústinus Jóansson í Hattarvík í Fugloy er ein av teimum, men teir vóru fleiri. Tað kundi verið líkt til, at nógv av hesum festigóðsinum hevur verið kongsgáva fyri góða hjálp undir og eftir siðaskiftið.



Prestakøllini í Føroyum um siðaskiftið vóru 7, og hari hendi eingin broyting. Sóknarprestarnir vita vit hava havt hjálparprestar, og hetta var væl eisini so í teirri katólsku tíðini. Heini Havreki, sum kom til Føroya upp undir siðaskiftið, hevur 1533 verið sóknarprestur í Suðurstreymoy, sum sæst av kvittunarlepa, hann og ein nólsoyingur, Mattis Jude, hava skrivað í Tórshavn 2. aug. 1533 og sent Eske Bille á Bjørgvins húsi fyri nakran við, hann hevði sent teimum. A. Degn hevur prentað lepan í «Varðanum», bind XIII bls. 85. Í 1533 var einki siðaskifti komið til Føroya, og vit hava einki prógv fyri, at Heini Jóansson Havreki helt fram í sama kalli, eftir at kirkjubroytingin var hend. Eftir tí sum áður nevnt Chr. Heilskov hevur sagt um, nær elsti sonur hansara, Jóan, er føddur, skuldi Heini Havreki fyrst verið giftur eftir 1540, helst 1542—43. Illa rímar hetta við siðaskiftið og tann mikla kærleika, sum eftir søgnini birtist millum Heina og Herborgar, eftir at hann var rikin á land í Húsavík. Táið Heini var vorðin sóknarprestur, skuldi tað ligið væl fyri hjá honum at gifta seg, beinan vegin siðaskiftið kom til Føroya, um hann tá segði seg vera fyri lutherdóminum. Sjálvsagt hevði lutherdómurin fríar ræsur í Føroyum, eftir at Kristian III hevði fingið kongsvald her. Sum áður nevnt var Heini Jóansson eftir skjali frá 1538 tá longu officialis ella próstur í Føroyum undir Ámundi bispi.

## Norðuroyar prestar.

Fyrsti lutherski presturin í Norðuroyum, sigur prósturin Chr. Djurhuus, var Skoutrod Joensøn.[1]) Hann skuldi falla út av eini rók yvir Uppsølum og doyggja. Prósturin sigur: «Hr. Schoutrod Joensøn, om hvilken fortælles, at, da han havde arbejdet som evangelisk sognepræst i 11 år, faldt han ud af en høj klippe i Upsalons hauge på Bordø og døde 1549. Pladsen kaldes endnu af det samme Schoutrods roug.» Merkiligt er, hvat maðurin hevur viljað har. Hava katólskinnaðir fíggindar verið eftir honum? Vit síggja, at prósturin fær hetta alt at hóska væl við sítt siðaskiftisár. Frágreiðingin er eingin, og eingin kelda verður ávíst. Sum eisini skal verða ávíst seinri, tykist tíðin at vera nakað tilgjørd, men óivað liggur tó nakað av søgu aftan fyri.

Ole Thomassøn nevnir prósturin næsta mann í Norðuroya kalli: «Hr. Ole Thomassøn, han skal have været sognepræst i 22 år, og 1571 døde han.» Henda mannin vita vit annars einki um. Í eini handilsuppgerð frá Føroyum undir Bjørgvins húsi 1567 verður nevndur ein *hr. Mourits* í Norðuroyum. Eftir navninum at døma skuldi hesin maðurin hava verið prestur.

Hans Jørgensøn Fyenbo tók eftir Djurhuus prósti við sum prestur 1571.[2]) Hetta man vera ivasamt, men vit vita, hann sat sum prestur í Norðuroyum 1584, táið jarðarbøkurnar taka við. Merkiligt at navn

---

[1]) Møguliga Skógdriv Jørundarson, sonur av løgmanni, sum var 1479. Dipl. Fær. bls. 52. [2]) Skyldskapur prestanna her aftaná er mest tikin eftir bók N. Andersens: Færøerne 1600—1709.

hansara ikki verður tikið upp á tunguna í tí stríðnum, sum Jóan og Magnus Heinason høvdu, tí hann var jú giftur við eini dóttur av Jóani Heinasyni. Hann kom jú upp í stríðið um Lambaarvin, og um jørðina eftir Magnus Heinason varð hann eisini saksøktur. Chr. Djurhuus próstur sigur um hann: «Han var en ulykkelig fader, thi han så selv sine 4 sønner i en båd på søen udi megen brænding ved Østvig på en gang at omkomme og drukne. Han døde 1624 i sit embeds 53. år.» Hetta árstalið tykist at vera rætt og samsvarar við jarðarbøkurnar. Hans Jørgensøn man tó hava havt ein son á lívi. Absalon Hanssøn, sum festi hálvan Heygagarð á Viðareiði 1626, hevur ivaleyst verið sonur hansara. Eina dóttir, Anna Hansdatter, átti hann, sum giftist við Vágapresti, Rasmus Christensøn Ganterup.

Hans Gabrielsøn Mitens gjørdist Norðuroya prestur 1625. Hann var sonur av sorinskrivara og bartskera, Gabriel Mitens. Í 1612 varð hann innskrivaður við lærda háskúlan í Keypmannahavn. Chr. Djurhuus próstur sigur um hann: «en brav mand i sine sager. Han døde 1670, og da havde han været i dette sognepræsteembede, en Guds tjener, i 46 samfulde år.» Deyðaár hansara er ivasamt, tí ongar jarðabøkur eru at samanbera við; men vártingsbókin nevnir eftirmann hansara, sóknarprest 1667. Hjálparprestur hevði hann verið í embætinum. Frá 1651 var Hans Gabrielsøn Mitens Føroya próstur. Nevnd eru trý børn hansara: 1) Sara Hansdatter, gift við eftirmanninum, Danjali Mikkjalssyni, ið var bóndasonur úr Hattarvík, abbasonur av Jóani Jústinussyni løgmanni, 2) Hans Hanssøn ella Hanus í Gerðum nevndur, giftur við Annu Berintsdóttir av Todnesi í Kollafirði, 3) Anna Christiane Hansdatter, gift á Viðareiði.

## Eysturoyar prestar.

Eftir Chr. Djurhuus próst skal her verða sagt, at Heini Jóansson Havreki gjørdist sóknarprestur í Eysturoy um siðaskiftið. Sum áður frágreitt er tað ivasamt. Sama kelda sigur, at hann var Føroya próstur frá 1559 og flutti úr Føroyum til Noregs 1568. Rættari man vera at halda, at hann hevur tikið við kirkjunnar hægsta starvi 1557, táið Jens Gregersøn Riber bispur var farin úr Føroyum. Av tí at skrivligt prógv er fyri, at hann hevur verið sóknarprestur í Suðurstreymoy 1533 og ikki bert skrivari hjá Ámundi bispi, sum prósturin vil siga, men officialis, er rímuligt at halda, at hann í hvørt fall hevur sitið í hesum starvi í nøkur ár, helst soleingi Ámundur enn sat sum bispur. Ámundur hevur helst verið bispur, soleingi kongur ikki heilt hevði lagt bispa- og kirkjujørðina í Føroyum undir seg. Henda kongsins endaliga tøka av bispa- og kirkjujørðini tykist at vera hend 1541—42, táið hann sendi Trónd Benckestock til Føroya at taka uppgerð yvir hesa jørð, og soleiðis kann Heini Havreki illa vera komin til Eysturoyar innan hetta ár. Í skotsmálsbrævi, fútin, Laufrents Pedheg, fekk frá løgtingi 15. aug. 1538, stendur Heini nevndur officialis, tað má merkja próstur ella tiltaksmaður bispsins, og Ámundur Ólavsson er í sama brævi nevndur bispur. Eftir hesum skuldi Heini havt verið próstur longu tá, og rímuligast er at halda, at hann hevur verið



próstur longu frá siðaskiftinum, helst búgvandi í Kirkjubø, og har greitt bispsins skrivliga arbeiði úr hondum. Heini Jóansson Havreki var fyrst giftur við Herborg Arnbjarnardóttur úr Húsavík. Táið hon var deyð, giftist hann upp aftur við Gyrid Arnbjarnardóttur Gran, sum tá var einkja í Bjørgvin, og sum hann segðist at hava havt tokka til, áðrenn hann fór úr Noreg. Sonur Heina við fyrru konuni var Jóan Heinason løgmaður. Við hini seinri konuni átti hann dóttrina Herborg og synirnar Magnus og Heina.

Eyðun Andrasson (Auden Andersøn) er síðan nevndur sum prestur í Eysturoy og próstur eftir Heina Jóansson. Kona hansara var dóttir av Guttormi Arnbjarnarsyni í Húsavík og soleiðis bróðurdóttir fyrru konu Heina Havreka. Rit Djurhuusar frá 1759 sigur, at Eyðun próstur doyði 1598. Í 1579 var hann í hvørt fall farin frá sum próstur og ætlandi eisini sum prestur, tí tá nevnir hann seg sjálvan í skjali gamla próst, meðan Torleiv Grækarisson er nevndur verandi próstur, og ikki vóru prestar í gomlum døgum vanir at fara tíðliga frá. Í 1584 er Eyðun próstur í hvørt fall deyður, tí í jarðabókini hetta árið síggja vit «hr. Audens arvinger» uppførdar sum festarar.

Torleiv Grækarisson (Thorlof Gregersøn) skal eftir Djurhuus prósti hava fingið kallið í Eysturoy 1598, men jarðabøkurnar siga nakað annað. Eftir teimum hevur hann longu verið prestur í Eysturoy 1583 og sum áður nevnt eftir skjali frá 1579 enntá verið próstur tá. Torleiv Grækarisson gekk fyri at vera ein lærdur maður og hevði brævaskifti við Peder Vinstrup bisp. Tveir synir hansara kenna vit: Gabriel Torleivsson prest og Jóhannes Torleivsson, sum var sýslumaður í Eysturoy og bóndi á Selatrað, seinri eisini í Hoyvík. Torleivur tykist at hava verið føroyingur. Hann doyði 1625, óivað sum heilt gamal maður.

Gabriel Torleivsson var í nógv ár hjálparprestur hjá faðir sínum og gjørdist sóknarprestur eftir hann 1625. Hann hevði verið innskrivaður við lærda háskúlan í Keypmannahavn 1599. Sóknarprestur var hann bert til 1627, tí hetta árið umkomst hann við allari manning síni á veg úr Havn inn á Nes, við at bátur hansara í mjørkaveðri róði seg á Flesjarnar. Eftir hesa hending sigst orðatakið: «Enn hýkur hann Torkil á Heyggi,» at vera komið, tí at presturin skuldi tá hava í umbúna at seta uppsitara sín á Torkilsheyggi frá garðinum, men so doyði hann ímeðan, og Torkil varð sitandi á Heyggi. Sum áður nevnt var Gabriel giftur við eini dóttur av Jóani Heinasyni løgmanni. Andras Jóansson, bóndi í Kunoy, var giftur við eini dóttur hansara.

Rasmus Christensøn Ganterup, áður prestur í Vágum, sat síðan sum prestur í Eysturoy 1627—42. Hetta síðsta árið var hann við til at skriva undir umsókn til Pros Mund, sum áður er nevnt undir brotsmálum, bls. 37. Kona hansara, Anna Hansdatter, var dóttir av Norðuroya presti, Hans Jørgensøn Fønbo. Børn teirra og ættarlið tikið eftir N. Andersen:

1. Hans Rasmussøn, prestur í Suðurstreymoy og giftur við Anna Rasmusdatter.[1]) Hon var dóttir av Vágapresti, Rasmus Sørensøn, sum fyrst hevði verið prestur í Suðuroy.

[1]) Sum áður nevnt sigur óundirskrivað og ódagssett skjal, at Hans Rasmussøn giftist í Keypmannahavn.

2. Birgitta (Biritta) Rasmusdatter, gift fyrstu ferð við Jóhannesi Torleivssyni sýslumanni.
   a) Dóttir teirra, Anna Johannesdatter, var fyrstu ferð gift við Jónasi Mikkjalssyni og aðru ferð við Gregers Hanssøn Varde, báðir, hvør eftir annan, prestar í Norðurstreymoy.
   Aðru ferð varð Birgitta Rasmusdatter gift við Berinti Jákupssyni, bónda á Todnesi í Kollafirði.
   a) Dóttir teirra, Anna Berintsdóttir, varð gift við Norðuroya sýslumanni, Hanusi í Gerðum.
   b) Sonur teirra, Jóhannes Berintsson, bóndi og løgrættumaður, var sendimaður til Keypmannahavnar 1682. Sonur hansara var Suðuroyar prestur, Søren Johannessøn.
3. Rakel Rasmusdatter, deyð í Keypmannahavn 1663.
4. Kristine Rasmusdatter.
5. Maren Rasmusdatter, gift við Vága sýslumanni, Bartal Danjalsson. Tey fingu børnini: Danjal Bartalsson, deyður sum studentur, og Jóhannes Bartalsson.
6. Anna Rasmusdatter, fyrstu ferð gift við Haraldi Jóanssyni, bónda í Oyndarfirði; hann var sonur av Jóani Jústinussyni løgmanni, og er sagdur druknaður í Hólmasundi.[1]) Haraldur og Anna áttu børn, men tey mega vera deyð ung. Anna Rasmusdóttir giftist tá upp aftur við prestinum, Peder Hellesøn Viborg.

Peder Hellesøn Viborg var sóknarprestur í Eysturoy 1642—79, men hevði frá 1636 verið hjálparprestur í embætinum. Hann var sum áður nevnt fyrst giftur við Anna Rasmusdatter Ganterup, ið tá var einkja eftir Harald Jóansson. Eftir at Jóan Jústinusson løgmaður var deyður, finna vit Peder Hellesøn í stríði um arvin eftir hann. Løgmannssonurin, Mikkjal Jóansson í Hattarvík, møtti í rættinum hinna arvinga vegna móti Peder Hellesøn. Bæði í Eysturoy og Kallsoy finna vit Peder Hellesøn sum festara á gørðum, Jóan Jústinusson áður hevði havt. Við Onnu Rasmusdottur hevði Peder Hellesøn hesi børn:

1. Gregers Pedersøn, seinri prestur í Suðurstreymoy.
2. Mikkel Pedersøn.
3. Rasmus Pedersøn.
4. Hans Pedersøn, skósmiður útlendis.
5. Poul Pedersøn.
6. Johanne Pedersdatter, gift við Mortani Jóanssyni í Trøðum.
7. Rakel Pedersdatter, gift við Mads Knudsen bakara í Vesterbrogade, København. Hesin Mads Knudsøn og Rakel Pedersdatter áttu dóttir, Elsebet Madsdatter, sum seinri giftist til Føroya, fyrst við fútanum Søren Skeen og eftir deyða hansara við Søren Mortensøn Hoyvík, loytnanti.

Eftir at Anna Rasmusdóttir var deyð, giftist Peder Hellesøn upp aftur 1658 við systur at Lucasi Debesi, Ellen Jacobsdatter Debes. Hon var minnst 31 ár yngri enn maðurin og doyði fyrst 1713 82 ára gomul. Tey áttu fylgjandi børn:

1. Jacob Pedersøn Debes, snikkari í Tórshavn.

---

[1]) N. A. Fær.



2. Lucas Pedersøn Debes, prestur í Noreg.
3. Anna Pedersdatter, gift við Peder Samuelsøn, bónda í Lamba.
4. Maria Pedersdatter, gift við Peder Clementsøn, presti á Sandi.
5. Elsebet Pedersdatter, gift fyrst við Jens Clementsøn og síðan við Søren Johannessøn, prestar hvør eftir annan í Suðuroy.
6. Dorethe Pedersdatter, gift við Elias Olufsøn í Fuglafirði, sendur á landsins besta til Keypmannahavnar við øðrum monnum 1690.
7. Margrete Pedersdatter, gift við Christian Clementsøn á Toftum, ið var sonur av harra Klæminti á Sandi. Tríggjar systrar vóru altso giftar við Klæmintssynum. Illa tykist hetta at samsvara við Stóradóm.

Ættin Debes í Føroyum hevur sín uppruna frá hesi Elinu Jákupsdóttur og Peder Hellesøn. Lucas Debes sjálvur var barnleysur. Peder Hellesøn var um 80 ára gamal, tá hann doyði 1679. Chr. Djurhuus próstur sigur Peder Hellesøn at hava átt 21 børn. Óhugsandi er tað ikki, at 7 eru deyð sum ung. Hann sigur eisini, at Hellesøn var illa plágaður av fronskum sjórænarum. Elin á Nesi var kona harra Peders seinri kallað sum einkja.

## Norðurstreymoyar prestar.

Chr. Djurhuus próstur nevnir Peder Lydersøn fyrsta lutherska prest í Norðurstreymoy, «hvilken, da han rejste til lands fra Thorshavn til Kvivig, faldt ud af en høj brekke på fjældet ned i en dal og døde, hvilken dal deraf endnu kaldes Lydersøns skár.» Eftir somu frásøgn hevði hann tá verið sóknarprestur í 50 ár og skuldi so hava verið katólskur sóknarprestur fyrst. Í skjali frá 1583 sæst tó «hr. Anders udi Kvivig» nevndur, og í jarðabókunum frá sama ári situr hann eisini við prestagarðinum í Kvívík, so hesin Peder Lydersøn er, um hann hevur verið prestur í Kvívík, óivað deyður væl innan 1588. Søgan um, at hann er dottin oman norður eftir oyggj, minnir eitt sindur um deyðan hjá Skoutrod Joensøn í Norðuroyum.

Anders Henriksøn, næsti maður í kallinum, sæst eftir jarðabókunum at hava verið prestur longu 1583 og at hava sitið við embætinum til 1602, kann enntá hava sitið nøkur ár longri. Chr. Djurhuus próstur sigur hann at hava verið prest 1588—1608. Hesi árstølini, í hvørt fall hitt fyrsta, eru ivaleyst skeiv, men táið hann skrivar: «Denne mand, der han engang var på Myggenæs for Vågø prest, kom han til at ligge der en lang tid vejrfast og samme tid komponerede den færøske salme: «Natten nu forgangen er og dagen igenkommen,» liggur óivað gomul fólkasøgn aftanfyri hetta. Anders Henriksøn gav kallinum hálvmørk av jørð aftrat. Dóttir hansara, Katrine Andersdatter, giftist við eftirmanninum í embætinum.

David Joensøn prestur í Norðurstreymoy 1602—1631. Hann var hjálparprestur í kallinum frá árinum 1600 og finnst skrivaður í kommunitetsmatrikulin 1597 sum David Ferrøe. Hann segðist at vera 20. maður eftir Sigmund Brestisson. Líkt kundi verið til, at forfedrar hansara hava verið katólskir prestar, tí Djurhuus próstur sigur, at

fólk høvdu nakrar merkiligar søgur um hann: «Disse folk har fået sanket sammen en hob gammelt sagn og historier, sande og usande, om de fordum herværende romerskkatolske gejstlige og ført dem alle alene hen på denne mand.» Undir 1619 er harra David nevndur í løgtingsbókini: «Fremkom hr. David Joensøn, sognepræst udi Kvivig, og fremlagde udi retten et velbeseglet pergamentsbrev, helt og uskadt i alle måder, indeholdende en otteti alen jord beliggende udi Kvivig, som afgangen Jon Sigurdson havde undt og givet salig hr. Anders Henriksøns datter, Katrine Andersdatter, i lovgave, som var forn. Jacob Sigurdsons fosterdatter og det med forn. Jacobs kvindes ja og samtykke, og er forn. brev under hr. Thorlof Gregersøn, official og sognepræst udi Østerøen, Peder Jacobsøn, lagmand på den tid, og Thomas Simonsøn herredsfoged, deres besegling dateret.» Brævið hevði áður verið á løgtingi og var nú aftur kent lógligt. Gávubrævið kann væl ikki vera gjørt eftir ár 1600, helst áðrenn Katrine Andersdatter og harra David hava verið gift. Líkt er til, at Katrine Andersdatter eftir deyða harra Davids er komin sum fátæklimur á Argja hospital.

Peder Hanssøn Lund var prestur í Norðurstreymoy 1632—49. Chr. Djurhuus próstur sigur, at hann var bert 8 ár prestur her og flutti hiðani til eitt betri kall í Noreg. Av brævi frá Suðurstreymoyar presti, Hans Rasmussøn, til Jesper Brockmand bisp 1646 sæst, at Lund prestur tá hevur ætlað at flyta, og at Hans Rasmussøn hevði í uppskoti sum hansara eftirmann systurson sín, Daniel Bertelsøn, son av Vága sýslumanni, Bertel Danielsen. Sum nevnt doyði hesin Daniel sum studentur.

Jonas Michelsøn gjørdist tá prestur í Norðurstreymoy 1650. Hann var sonur av Magdalenu og Mikkjali í Lamba. Hin 27. apríl 1657 fekk hann náðisgarðin í Kvívík umskiftan við garðin á Kjalnesi í Kollafirði. Ikki er tað rætt sum Djurhuus próstur og N. Andersen siga, at Norðstreymoyar prestagarður frá gamlari tíð hevði verið á Kjalnesi, tí Kjalnesgarður hevði áður verið vanlig festijørð, hvat ið sæst av bóndabókini. Jónas Mikkjalsson kann tí heldur ikki, sum N. Andersen sigur, hava flutt prestagarðin til Kvívíkar. Tvørtímóti flutti hann prestasetrið úr Kvívík til Kjalnes. Frá látínskúla í Bjørgvin kom hann 1644 til lærda háskúlan í Keypmannahavn. Kona hansara var Anna Jóhannesdóttir, dóttir av Jóhannesi Torleivssyni. Tey áttu seks børn: 1) Mikkjal Jónasson, bartskeri í Føroyum, 2) Karin Jónasdóttir, gift við Páll Jóanssyni, bónda á Oyrargarði, 3) Magdalena Jónasdóttir, gift við Mortani Mortanssyni, sorinskrivara, deyð 1705, 4) Jónas Jónasson, prestur í Norðuroyum, 5) Jóhannes Jónasson, bartskeri í Randers, 6) Rasmus Jónasson.

## Suðurstreymoyar prestar.

Burtursæð frá Heina Havreka tykist Mortan Jespersøn Bronck at hava verið fyrsti lutherski sóknarpresturin í Suðurstreymoy. Nær hann hevur tikið við kallinum er ilt at siga. Chr. Djurhuus próstur roknar við árinum 1538, sum hann nevnir siðaskiftisárið, og sigur



so, at hann var prestur í 40 ár og doyði 1578. Eftir bóndabókini skuldi hann í fyrsta lagi verið deyður 1590, og tað er ivaleyst rætt. Ávíst kann ikki vera, at hann hevur verið prestur í 40 ár, men um tað er rætt, skuldi hann fyrst hava tikið starvið 1550. Táið Lucas Debes 1673 sigur, at franskir sjórænarar fóru illa við harra Mortani, kann tað neyvan vera hent 1579, tá ránið fór fram á Tinganesi, tí tað var skotin Klerck, sum hetta herverk gjørdi. Virkistíðin 40 ár hjá Mortan Jespersøn Bronck kann illa fáast at hóska, uttan vit rokna hann at hava tikið við Suðurstreymoyar kalli undir Jens Riber bispi um 1550.[1]) Helst mega vit tó rokna við, at okkurt er hent við Suðurstreymoyar kalli 1550, táið Guttormur løgmaður fekk garðin úti á Bø festan burtur av bispagarðinum. Kona harra Mortans æt Billa. Jónas Bronck,[2]) sonur teirra, var ein teirra, sum grundaðu býin New York. Hvar harra Mortan hevur búð, er ilt at siga. Eingin kirkja var tá í Havn, og sóknarkirkjan hjá Havnarfólkum var í Kirkjubø. Í Syðradali, hvar prestagarðsjørðin lá, hevur prestur ikki búð eftir siðaskiftið, verður sagt í nevndarbók fyri yvirtøku av Gabels handli 1709—10. Avnokta kunna vit ikki, at harri Mortan kann hava búð fyri vestan fjall síni fyrstu prestaár, og at prestahúsini í Suðurstreymoy eystan fyri Havnará, um leið har sum Steikarhús seinri komu at standa, eru bygd til hansara.

Christen ella Christian Pedesøn Morsing var hjálparprestur hjá harra Mortani í nøkur ár, áðrenn hann sjálvur tók við kallinum. Í fyrsta lagi kann tað vera hent 1590. Chr. Djurhuus próstur sigur, at Christian Pedersøn Morsing livdi, til hann var tætt við 100 ára gamal. Hetta ber illa til, uttan hann hevur verið prestur í Danmørk, áðrenn hann kom til Føroya. Sum áður nevnt vóru tveir brøður hansara eisini embætismenn í Føroyum. Hann búði í hvørt fall í prestahúsunum eystan fyri Havnará í Havn og hevði eisini látínskúlan har. Í hansara prestatíð varð fyrsta kirkjan í Havn bygd 1609 úti á Reyni. Føroya próstur var hann 1625—28, men við prestaembætinum sæst hann at hava sitið til 1630. Kirkjan stóð í kirkjugarðinum norðan fyri Munkastovuna, og í 1628 vóru bygd serlig látínskúlahús eystan fyri kirkjuna.

Hans Rasmussøn var sonur av prestinum Rasmus Christensøn Ganterup og soleiðis uppvaksin í Føroyum. Frá 1625 var hann hjálparprestur hjá Christian Pedersøn, og av hansara ávum man tað vera, at serligur látínskúli varð bygdur 1628. Føddur var hann í Miðvági 1603. Hann var ein lærdur maður og stóð alt lív sítt í brævaskifti við Ole Worm professara, sum fekk sendandi frá honum ymist av fugli, fiski og øðusløgum. Hann tók við embætinum 1630, árið eftir sum hitt stóra turkaránið var farið fram í Hvalbø. Orsakað av hesum turkaráni, sum hevði sett hvøkk í fólk, ætlaði hann 1632 at rýma úr Føroyum. Hann var enntá farin til Danmarkar við húski sínum og var vorðin prestur við Hellig Geist kirkju í Keypmannahavn. Kirkjufólkið í Suðurstreymoy bar tá ótta fyri, at eingin nýggjur prestur

[1]) C. F. Nielsen sigur hr. Mortan at hava verið vígdan lutherskan prest í Suðurstreymoy 29/7 1540, men at hann áður skuldi hava verið katólskur prestur. Alt hetta rímar illa saman. [2]) Ætlandi sami sonur harra Mortans, nevndur Johannes Martini Farinsulanus, sum 1619 frá studentaskúlanum í Roskilde var innskrivaður við lærda háskúlan. N. A. Fær., bls. 385.

fór at tora at søkja kallið har, og tað heitti tí á Sælands bisp, Hans Resen, um at fáa Hans Rasmussøn aftur til Føroya at vera prest. Í pakka B 161 á ríkisskjalasavninum undir danska kancelliinum, sum tykist nógv samandrigið, um Hans Rasmussøn, men tað er hvørki dagssett ella undirskrivað. Helst er tað frá Hans Resen bispi til ríkisstýrisins. Ætlast kann týðuliga, at tað er skrivað 1633, og er tað soljóðandi:

«Hr. Hans Rasmussøn, født på Færø, haver sin fader der, hr. Rasmus af Jylland med slægt og svogre flere etc. Kom did for nogle år siden til Thorshavn at holde også skole der med tillæggebø etc. Og blev hans rente af kongl. majestæt i fjor forbedret næsten med een gang så meget, som han havde tilforn, med 100 får, 3 køer og andet mere. Er han og bevilget at være vice-præpositur at succedere den anden, når Gud kalder hannem.

Haver og ombedet de fattige sognefolk, der han nu sidst fik lov at drage herned, at han vilde komme igen og dem ikke forlade, eftersom han tog sine børn med og sin hustru, som han havde tilforn fået her i byen etc. Og var Mads Christensøn, som haver befaling på landet, til stede, der det skete og derpå tog hannem med sig etc.

Er ikke heller duelige personer at bekomme, som ville drage så langt bort til helt fremmede folk, besynderligen eftersom de høre, at han drager derfra af frygt for tyrken etc., hvilket de og give til svar, når dem anmodes derom, så endnu ingen haver været at bekomme, som kunde agtes bekvem etc. Om det da må så tilstedes, uden at det underdanigst gives Hans majestæt tilkende, og vi får forlov dertil, eftersom det er kongl. majestæts bedste havn på landet etc.»

Brævið er skrivað árið eftir, at kongur gav prestunum náðisgarðarnar. Umframt síggja vit, at Hans Rasmussøn hevur verið giftur í Keypmannahavn, áðrenn hann fyrstu ferð fór til Føroya sum prestur í fylgi við Mads Christensøn fúta, eftir at hesin hevði verið til staðar við brúðarvígslu hansara, og at Hans Rasmussøn hevði fingið sær konu í Keypmannahavn. Eftir hesum áttu vit helst at ætla, at kona hansara hevur verið donsk; men í bók síni um Føroyar sigur N. Andersen, at hon var dóttir av Rasmus Sørensen presti, og at hon soleiðis skuldi verið føroysk. Í 1633 kom Hans Rasmussøn aftur til Føroya og gjørdist vara-próstur hjá táverandi Sandoyarpresti, Jens Jenssøn Skive, sum longu tá var gamal maður, og tí mátti Hans Rasmussøn beinan vegin gera mestsum alt próstaarbeiðið fyri hann. Próstur gjørdist Hans Rasmussøn fyrst í 1646. Hann bað tá um nakra góðgjørslu fyri sítt fyrrverandi próstastarv og fekk tá próstagarðin, men fyrst 1648 doyði tó Jens Jenssøn Skive. Eisini søkti hann um at fáa próstagarðin, Garðshorn, umbýttan við Kirkjubøgarð, av tí at hesin garður lá honum so nógv høgligari fyri. Hetta gekk tó ikki í lag, men í 1647 fekk hann tó 11¼ mørk í Norðradali sum festigarð aftrat náðisgarðinum har, sum var 9½ mørk. Hini nýggju prestahúsini, Reynagarð, fekk Hans Rasmussøn bygt fyrst í síni embætistíð. Húsini vórðu bygd í 4 leingjum uttan um eitt opið garðspláss. Húsini standa enn og lógu tá innanvert (sunnanvert) Tinganesskansan, sum fór í gerð 1630. Her á Reynagarði búðu Suðurstreymoyar prestar til 1828; her hevði eisini løgtingið innivist í 19 ár, frá 1673, tá Gildisskálin fór við eldsbruna á Tinganesi, til 1692, tá nýtt tinghús varð bygt í Gongini, núverandi Müllers hús. Festið í Norðradali fekk Hans Rasmussøn sum rektari fyri látínskúlan, men Suðurstreymoyar prestar lótu tað tó altíð fylgja við kallinum. Fyri skúlan gjørdi Hans Rasmussøn nógv. Umframt at vera ein dugandi rektari, fekk hann í lag fyrsta fólkaskúlan í Havn, og einki avbrot hevur verið í hesum skúla upp at okkara døgum. Sum eingin annar hevur hann nørt um ognir látínskúlans. Fólkaskúlin varð nevndur hin danski skúlin, og kirkjudeknurin var lærari við hann. Hans Rasmussøn var ógvuliga avhildin av kirkjufólki sínum, sum av fríum vilja gav honum offur á teim trimum stóru árshátíðunum. Hann doyði 1651 bert 48 ára gamal, kanska av pokunum, tí árið var ringt pokuár. Ein gravtalva yvir hann stendur í kórinum í Havnar kirkju. N. Andersen sigur sum nevnt Hans Rasmussøn at vera giftan við Onnu Rasmusdóttur, sum var dóttir av Vága presti. Hann átti 6 børn: 1) Rebekka Hansdatter, gift við Suðuroyar-, seinni Eysturoyar presti, Jacob Christensøn Klinte, 2) Christen Hanssøn, eina tíð vetrarfúti, 3) Bærent Hanssøn, 4) Lucia Hansdatter, 5) Rakel Hansdatter, 6) Anna Hansdatter, gift við Niels Jacobsøn sorinskrivara, Glyvrar, deyð 90 ára gomul 1716.



Lucas Debes, ið tók við Suðurstreymoyar kalli 1651, var tá 28 ára gamal og ættaður úr Stubbekøbing á Falster, hvar faðirin, Jacob Nielsøn, seinri prestur á Bogø, tá var hjálparprestur. Lucas skuldi fara til Føroya sum hjálparprestur hjá Hans Rasmussøn, men hesin var deyður, áðrenn Lucas kom til lands. Stutt aftan á gjørdist Lucas sóknarprestur, og árið eftir giftist hann við einkjuni. Lucas og Anna Rasmusdóttir fingu eingi børn saman, men eftir brøvum frá Lucasi sæst, at Anna tá hevur havt 9 børn við fyrra manninum, so Lucas hevði beinan vegin tungt hús. Sum framman undan tikið eftir N. Andersen eru har bert 6 børn nevnd. Lucas tók sær nógv av sínum sóknarbørnum og hjálpti teimum til rættis, og eisini skúlaarbeiðið gekk væl undir hansara leiðslu. Lucas Debes gjørdist hjálparpróstur 1667, landspróstur 1670 og magistari 1673. Hann doyði 1675, og kona hansara sat tá á øðrum sinni sum einkja. Hin 7. mars 1656 fekk hann 2 merkur í Sandagerði lagdar til prestakallið. Hesa jørðina, sum var gingin av Kirkjubøgarði, hevði Gabriel Mitens havt í festi til 1640 — tá man hann so vera deyður — og síðan Suðurstreymoyar prestar, og nú varð hon løgd til teirra kall. Lucas Debes tók sær nógv av at hjálpa hinum meiniga manninum í Føroyum. Hann royndi at hjálpa Havnarmonnum við at koma undan tí nívandi skansaarbeiðinum, sum hvíldi á teimum. Hann lá javnan í stríði við fútar Gabels í Føroyum, sum hann sá misbrúktu sína makt. Við peningatrýsti royndu fútarnir at halda Føroya bøndur undir oki. Garðarnir vórðu ofta givnir til teirra, sum buðu mestan pening í innfesting, og tí javnan festir burtur úr ætt, men við Lucasar arbeiði varð við skipan av 16. april 1673 ásett, at elsti sonur skuldi eiga festirætt eftir faðir sín, og at innfestingargjaldið mátti ikki vera størri enn 3 gyllin fyri hvørja mørk í jørð. Táið Lucasar stóra arbeiði hoyrir undir Gabelstíðina, skal tað ikki verða nærri umtalað her. Lucas hevði nógva sorg av sínum fosturbørnum. Christen Hanssøn var vetrarfúti undir Johan Heideman og fór úr tænastuni uttan at kunna gera reiði fyri

sínar skyldur, og Lucas mátti standa við endan. Fosturdóttirin, Rakul, kom fyri barn við høvuðsmanninum á skansanum, Claus Becker, og hetta voldi honum nógvar trupulleikar og stríð. Løgmannin, Balzer Jacobsøn, lá hann eisini í stríð við. Sjálvt kongsbøndurnar og Havnarmenn, sum hann talaði til frama fyri, kundi hann ikki altíð líta á. Táið Lucas var á síni Keypmannahavnarferð 1672—73, gav hann út bókina: *Færoæ et Færoa reserata* (Lýsing Føroya). Henda bókin er ein av teim fáu keldunum til Føroya søgu frá hesi tíðini. Um somu tíð gav hann eisini út bókina: *Kongelig Majestæt*.

## Vága prestar.

Um fyrsta lutherska prestin í Vágum vita vit ikki annað, enn hvat prósturin Chr. Djurhuus sigur í skrivi sínum frá 1759:

«Hr. Peder, som engang på en båd under Vågø land ved en udhuk, endnu kaldet Præsttange, var i yderste livsfare, han var sognepræst i 30 år og døde 1568.»

Håldan Andersøn man vera komin í Vága kall eftir harra Pætur. Próstaritið frá 1759 sigur um harra Håldan: «Han har digtet den færøske søvise: «Vi ro til søs i Jesu navn.» Han var en gudfrygtig mand, og udi sit 46. sognepræstelige embedsår, men efter Christi fødsel 1614, hensov han i Herren.» Harra Hálvdan var stórur og sterkur, og eftir Peder Claussøns bók «Norges Beskrivelse» helt hann seg vera ættarmann eftir Trónd í Gøtu. Á opnum tingstaði í Tórshavn hin 25. juni 1583 var hann við til at geva Jóani Heinasyni, gamla løgmanni, álitisváttan saman við 4 øðrum prestum og 19 løgrættumonnum. Harra Hálvdan var efter bóndabókini prestur frá 1584 til 1602.

Rasmus Christensøn Ganterup var prestur í Vágum 1603—27. Djurhuus próstur sigur um harra Rasmus, «hvilken efter 13 års læretid i sognet blev forflyttet til Østerø 1627.» Árið 1627 er í hvørt fall rætt. Rasmus Christensøn Ganterup var giftur við Anna Hansdatter, sum var dóttir av Hans Jørgensøn presti í Norðuroyum. Frágreitt er um ætt hansara undir Eysturoyar kalli.

Rasmus Sørensen, ið fyrst hevði verið prestur í Suðuroy, sat sum prestur í Vágum 1627—41. Árstølini hóska saman við tað, Djurhuus próstur sigur um hann.

Ole Botelsøn Gullandsfar sat í Vága kalli 1641—81 og var hjálparprestur í Vágum frá 1632. Umdømini um hann siga, at hann var heldur evnalítil, men hann tykist tó at hava verið umtóktur sum prestur. Í 1628 varð hann innskrivaður við lærda háskúlan undir navninum Olaus Botolphi Gotlandus. Prestaprógv fekk hann 23. mars 1632, og hann varð vígdur prestur 28. í sama mánað. Prestaprógvið tykist hann at hava fingið mestsum av náði, tí lærarnir við lærda háskúlan siga um hann: «Olaus Botulphi, som tre gange er blevet eksamineret, og som har bestemt sig til virksomhed ved kirkerne på Færøerne, har ganske vist hverken fyldestgjort fordringerne i kongens bekendtgørelse eller os, men siden nødvendighéden kræver det, kan vi dog ikke andet end foretrække ham for Claudius Christierni [komin



frá Ribe skúla], der efter ham er blevet eksamineret i samme øjemed» — altso at fara til Føroya. Ole Botelsøn var tvær reisur giftur, fyrst við Maren Jensdatter Skive, sum var dóttir av Sandoyar presti og aftan á deyða hennara við Agnes Joensdatter, ið var dóttir av løgmanni Jóani Jústinussyni. Í báðum hjúnarløgunum hevði hann 9 børn: 1) Rasmus Olesøn, seinri prestur í Vágum, 2) Jens Olesøn, búsettur í Bø, 3) Harald Olesøn í Sandavági, tykist uppkallaður eftir móðurbróður sínum, 4) Katrina ella Karen Olesdatter, gift við Jóani Pállssyni løgmanni, og høvdu tey børnini: a) Jákup Jóansson í Dalsgarði, giftur við Kristinu Klæmintsdóttur, b) Marjun Jóansdóttir, gift við J. H. Weyhe løgmanni, 5) Birgitte Olesdatter í Kvalvík, 6) Agnes Olesdatter, ið eisini var gift, 7) Maren (Marjun) Olesdatter, gift við Poul Jacobsøn á Selatrað, 8) Elsebet Olesdatter, gift við Zacharias Jacobsøn á Selatrað og 9) Sigga Olesdatter, gift í Vestmanna.

## Sandoyar prestar.

Um teir tvéir fyrstu luthersku prestarnar í Sandoyar kalli vita vit einki annað, enn hvat prósturin Djurhuus sigur í skrivi sínum frá 1759:

«Hr. Joen Lydersøn Færø, ellers kaldet Joen den gamle. Han har i en dansk kirkebog, prentet i Lybek 1567, skrevet sit navn på denne måde:

> Bogen siger så for sig,
> Joen Lydersøn ejer mig,
> han er Sandø sognepræst,
> han forstår den hellige læst.»

Um eftirmann hansara sigur Djurhuus próstur:

«Joen Joensøn Færø, af almuen kaldet Joen den yngre, thi han havde en broder af samme navn, som man kaldte hr. Joen den ældre, hvilken tillige med sin broder blev holdt til studeringen under biskoppen i Kirkebø, og dog han havde fremfor broderen valget, vilde ej være præst, da han havde set i præsteregelen, som måske har været kirkeordonnansen. Hans [Joen den yngre] sognepræsteembede var 20 år, da han døde 1581.»

Síðan skrivar prósturin:

«Thorlof Gregersøn Færø, en i de tider lærd mand, som tjente her for sognepræst i 10 år og i 1598 blev forflyttet til Østerø.» Tá vit vita, at eftirmaður hansara longu sat við Sandoyar kalli 1583, hevur prósturin her sum í øðrum førum skotið árini ov langt fram í tíðina. Vit vita, at harra Torleiv var prestur á Nesi og próstur 1583, og at hann var tað longu í 1579, meðan gamli próstur, Eyðun Andrasson, livdi, tí vit síggja, at hann hevur undirskrivað bræv 26. aug. 1579, sum uppgevur, hvussu nógv sjórænarar tá høvdu rænt av kongsins góðsi í Tinganesi. Táið prósturin sigur Joen Lydersøn sum verandi prestur í Sandoy at hava sett árstalið 1567 í nevndu kirkjubók, verður lítil tíð eftir til Joen Joensøn Færø at hava verið prestur í hesum kalli.

Niels Christensøn frá Jútlandi var prestur í Sandoy 1583—98. Hann hevur undirskrivað skotsmálið hjá Jóani Heinasyni løgmanni á løgtingi 25. juni 1583, so tá og kanska áður hevur hann verið í Føroyum. Chr. Djurhuus próstur umtalar hann vánaliga sum prest – «lemfældig mod ungdommen,» men sigur annars, at hann var ein vakur maður og spaklyntur. Hann átti dóttrina, Marion, sum varð gift við Trónd Jørgensøn sýslumanni.

Jens Jenssøn Skive sat við Sandoyar kalli 1598—1648, men kom til Føroya sum hjálparprestur í Vágum hjá harra Hálvdani. Hann giftist fyrst við einkjuni eftir Niels Christensøn, men fekk við henni eingi børn. Eftir deyða hennar giftist hann upp aftur við dóttir av Vága sýslumanni, Danjali Nigilssyni, Elsebeth Danielsdatter.[1]) Harra Jens sigist at hava verið ein ógvuliga stórur og sterkur maður. Ritið frá Djurhuus prósti sigur frá, at hann eina ferð var komin í havsneyð saman við trimum monnum vestan fyri Sandoy kyndilsmessuaftan, og at tað var hansara manndómur, sum fekk bjargað bátinum móti nátt inn undir land vestantil á oynni. Teir vunnu inn á eina gjógv, sum enn á døgum eitur Kyndilsmessugjógv eftir hesum tilburði. Bergið oman fyri var 70 favnar, og heima Sands menn, sum vóru á eggini í erva, drógu teir allar upp á slætt í línu. Føroya próstur var harra Jens 1630—46, men sum áður nevnt røkti Havnar prestur, Hans Rasmussøn, hetta kallið fyri hann nógv av tíðini. Táið harra Jens fekk náðisgarð á Sondum aftrat 1632, slapp hann samstundis frá útreiðslum til prestflutning og føring, Stóru Dímun fekk hann leigufría og somuleiðis 1—2 merkur av kongsjørð á Sandi. Harra Jens tykist at hava notið virðing í kalli sínum. Í síðsta hjúnarlag við Elsupu Danjalsdóttur átti hann 3 døtur: 1) Maren Jensdatter, gift við Ole Botelsøn presti í Vágum, 2) Ane Jensdatter, gift við harra Klæminti presti á Sandi, 3) Ellen Jensdatter, gift við harra Klæminti, táið systirin var deyð. Samsvarandi Stóradóm er síðstnevnda gifta ikki (ætlandi kongl. undantak).

Clement Laugesøn Follerup gjørdist hjálparprestur hjá harra Jens í 1638 og tók við Sandoyar kalli í 1648. Hann sat sum sóknarprestur í hesum kalli í 40 ár. Hann varð innskrivaður við lærda háskúlan í 1630 frá Malmø skúla undir navninum: Clemens Lagonis f. Vellejus. Virki harra Klæmints sum sóknarprestur á Sandoy fellur mest inn undir Gabelstíðina, og tað skal tí lítið verða umtalað her. Aftrat prestagarðinum tók harra Klæmint við teirri festijørð, sum verfaðir hansara hevði, og av tí at hann giftist við tveimum døtrum av harra Jens hvørjari eftir aðra, fall meginparturin av óðalinum í prestagarðinum eisini honum í lut. Sjálvur fekk hann fatur í nógva óðalsjørð móti at læna fólki pening fyri at seta jørð í veð, og táið peningurin ikki varð goldin aftur, kravdi hann jørðina. Eisini tók hann nógv uppgávufólk í húsið hjá sær, og jørðin, tey áttu, fall so honum í lut. Táið hann doyði 1688, vóru 47 óðalsmerkur í búnum, og táið hann kom til Føroya, kundi øll ogn hansara vera í einum klæðsekki, sigur søgnin. Eftir søgnini skuldi hann eiga 23 børn við báðum konunum, men táið jørð og annað kom til skiftis eftir hann, vóru bert

[1]) N. A. Fær., bls. 406.



15 børn. Tey skulu her verða nevnd: 1) Ole Clemensøn, giftur í Klæmintstovu í Dali, 2) Lave Clemensøn, bóndi undir Skarði á Sandi, 3) Simon Clemensøn á Sandi, 4) Christopher Clemensøn á Sandi, 5) Christian Clemensøn á Toftum, giftur við Margrete Petersdatter Viborg, 6) Daniel Clemensøn, Eystindiafari, seinri sýslumaður í Suðuroy, 7) Hans Clemensøn á Sandi, 8) Jens Clemensøn, prestur í Suðuroy, giftur við Elsebet Pedersdatter Viborg, 9) Peder Clemensøn, prestur í Sandoy, giftur við Maria Pedersdatter Viborg, 10) Rakel Clemensdatter, gift við Joen Joensøn, Skálavík, 11) Sara Clemensdatter, gift við Joen Rasmussøn á Áargarði á Sandi, junkaragóðs, 12) Susanne Clemensdatter, gift við bónda í Froðbæ, 13) Rebekka Clemensdatter, gift við Johannes Pedersøn bónda, Kirkjubø, 14) Christina Clemensdatter, gift við Jacob Joensøn, Skálavík, bóndi í Dalsgarði, sýslumaður, 2 ár løgmaður, sonur av Jóani Pállsyni løgmanni, 15) Catarina Clemensdatter, gift við Hans Magnussøn, bónda í Trøðum.

## Suðuroyar prestar.

«Hr. broder Andreas, hvis embedstid var 22 år og døde dagen i året 1560.» Soleiðis tekur Djurhuus próstur til um fyrsta luthérska prestin í Suðuroy. Eftir orðinum «broder» at døma man maðurin helst fyrst hava verið katólskur prestur. Vit síggja, at prósturin fær virkistíð hansara at hóska við siðaskiftisárið *1538*, ið hann nevnir sum broytingarár í skrivi sínum. Árið 1560 er í hvørt fall ikki rætt, og í 22 ár kann hesin «broder Anders» ikki hava virkað undir lutherdóminum.

Hr. Ismael Nielssøn, síggja vit, hevur fingið kallsbræv upp á Suðuroyar kall 12. mars 1550,[1]) og hann doyði 1601. Hann var ofta rændur av sjórænarum, og prósturin sigur um hann: «Ham tog engang en engelsk fisker bort med sig og satte ham omsider op i Island, hvorfra han kom igen til sit kald.» Kona hansara æt Anna. Ein sonur teirra var Ísakur Ísmaelsson, bóndi í Stórustovu í Skúvoy og sýslumaður í Sandoy. Ismael Nielssøn var við til at undirskriva skotsmál til Jóan Heinason løgmann 25. juni 1583.

Rasmus Sørensøn, prestur í Suðuroy 1601—27 og síðan í Vágum, varð 1615 píndur av sjórænarum, «således med en line om hans hoved for penges skyld, at han derefter var moxen ubekvem til sit embede,» sigur próstaritið. Av børnum hansara eru nevnd: 1) Søren Rasmussøn, giftur í Stórustovu í Húsavík og løgrættumaður fyri Sandoy, illa gitin í søgn undir navninum *Sevrin*, 2) Poul Rasmussøn, prestur í Suðuroy eftir faðir sín, 3) Anna Rasmusdatter, gift við Hans Rasmussøn presti, Suðurstreymoy, og upp aftur gift við harra Lucasi Debes.

Poul Rasmussøn, prestur í Suðuroy 1627—30, var sonur av áðurnevnda harra Rasmusi. Frá skúla í Bjørgvin varð hann 1619 innskrivaður við lærda háskúlan í Keypmannahavn sum: Paulus Erasmus

[1]) A. C. E., skjal 66.

Feroensis. Hin 5. juli 1620 varð hann vígdur til hjálparprest í Suðurstreymoy hjá harra Christiani. Frá 1625 var hann hjálparprestur í Suðuroy hjá faðir sínum, og táið faðirin 1627 flutti til Vága kall, gjørdist harra Poul sóknarprestur í Suðuroy. Á sumri 1629 herjaðu turkar Hvalbø; løgtingsbókin nevnir tvey turkaskip, men søgnin sigur, at tað vóru trý. Í «Færøske folkesagn og æventyr» undir søgnini «Turkar í Suðuroy» verður sagt frá hesi hending. Frásøgnin broytir annars lítið av frá tí, sum løgtingsbókin sigur, men hevur fleiri einstakar tilburðir undir turkaráninum. Turkarnir drupu 6 fólk og tóku 30 kvinnur og børn við sær. Søgnin sigur frá, at teir drupu son prestsins, og at presturin slapp undan teimum við at leypa út av, har kann kom standandi niður í eina rók, Gimbrarók, 15 favnar høgt. Hendingin tók honum so dygt, at hann gjørdist ørligur í høvdinum eftir hetta. Í 1630 fór hann frá sum prestur, og segðist tað at vera av hesum atvoldum. Í 1632 møtti hann sum áður nevnt í rættinum í eini barnasøk, hvar hann viðgongur, at hann í 1624 hevði fingið bróðurin, Sevrin, at ganga undir barn, sum hann, Poul, átti við Onnu Ólavsdóttur. Bótin, hann fekk í hesum máli, 60 gyllin, stendur í 1633 innførd undir Streymoy. Hr. Poul Rasmussen stendur 1634–42 uppførdur sum festari av 6 mørkum í Streymnesi. Hans Rasmussøn prestur i Havn man hava hjálpt honum til henda garðin. Í 1649 er hann horvin sum festari, man tá vera deyður ella fluttur til Noregs, sum presturin Jacob Christensøn Klinte nevnir í skrivi.

Hans Hansøn Hardi var prestur í Suðuroy 1630–55. Aftan á turkaránið var ringt at fáa nakran at søkja kallið í Suðuroy, og Hans Hardi vissaði sær, táið hann søkti, meira inntøkur av kallinum. Hinir prestarnir fingu hetta at vita og bóðu ríkisstýrið um eisini at bøta um kall teirra. Við kongl. brævi 8. april 1632[1]) vórðu náðisgarðar tá lagdir aftrat øllum prestagørðum, men Hans Hardi dámdi hetta lítið, at hinir prestarnir í hesum føri skuldu njóta sama fyrimun sum hann. Harðrendur maður var hann eisini, og tá hann á løgtingi 1634 hevði verið óhøviskur móti løgmanni og fúta, bað hann teir árið eftir á tingi um fyrigeving fyri tey hørðu orð, hann hevði nýtt. Í 1633 síggja vit, at hann árið fyri gjøgnum fútan hevði keypt stóran bát frá Mikkjali í Lamba, helst seksáring, at ferðast til Havnar við. Í 1750 skrivar Mikkjal Arrabo próstur um Hans Hardi, at mikið hat var millum hansara og harra Hans í Tórshavn. So ein dagin Hans Rasmussøn hevði guðstænastu í Havnar kirkju, og Hans Hardi sat á uttasta beinki, dró hesin loyniliga knív úr slíðra við teirri ætlan at stinga Hans Rasmussen niður. Tá hann á odda fyri kirkjufólkinum kom út úr kirkjuni, aftraði Hans Hardi seg tó í síðstu løtu. Hann fór tá fram, tók í hondina á Hans Rasmussøn og fylgdist við honum til húsa. Har hevði hann opinberað, hvussu til stóð við sær, og síðan vóru báðir vinmenn.[2]) Í 1647 fekk hann løgmannsdóm fyri, at prestagarðsbøurin í Hvalbø, 12½ mørk, skuldi verða mátaður av nýggjum og lagdur uttan um prestahúsini í Leirum. Aftrat fekk prestagarðurin fjórðing av haganum í Hvalvík, núverandi Sandvík, fyri at seyðaskipanin á prestagarðinum kundi haldast uppi, og uttangarðsrættindi

1) Lb. fol. 193 a og b. 2) N. A. Fær., bls. 436.



aftrat til eina mørk í bø. Eisini við nýggjari uppmáting av náðisgarðinum í Vági fekk presturin fyrimun. Húshagin vestan fyri Gjógvará, sum bøndur fyrr høvdu notið part av, fekk prestur allan.[1]) Málið fekk eftirspæl, tí presturin prógvaði, at sýslumaðurin við løgrættumonnum hevði mált jørðina skeivt av, og umframt at fáa bót varð Jákup Hálvdanson 1648 dømdur úr starvi sum sýslumaður. Hóast alt var Hans Hardi illa til friðs við at vera í Hvalbø. Hann hevði fingið lyfti um embæti í Danmark og gjørdi seg út móti ólavsøku 1655 til at fara av stað við øllum sínum húski og øllum, hann átti. Yvirfyltur var seksáringur hansara av góðsi og fólki, tá hann helt av stað úr Hvalbø til Havnar. Saman við øðrum hvalbiarbáti kom hann vegin fram til Skálavíkar, men tá var veðrið øtlað so nógv av landnyrðingi, at teir gjørdu støðg har. Hin báturin avgjørdi ikki at fara longur fyri fyrst, tí vindurin vaks í hvørjum, men Hans Hanssøn Hardi gekk altráur eftir at sleppa vegin fram til Havnar beinan vegin. Ein av húskøllum prests, ein sonur av bóndanum í Toftum í Hvalbø, vildi ikki fara víðari, tí hann helt tað ikki vera veður at fara. Tá sló presturin hann yvir andlitið, so hann bløddi. Bóndin í Toftum, sum í hinum hvalbiarbátinum var komin til Skálavíkar, beyð seg tá til at fara við prestbátinum í staðin fyri sonin, og í tí skili helt prestbáturin ferðina fram úr Skálavík til Havnar. Prestur setti seg sjálvan aftur á rong at stýra. Nógv góðs var í bátinum og 21 fólk. Ein dóttir prests, sum sat oman á góðsinum, stakk av einum nosi, báturin fekk, út fyri borð, og prestur, sum sat í rongini, slepti róðrinum og toygdi seg eftir dóttrini. Hetta hendi líka fyri Hvalnesboðum, og báturin kom soleiðis tvørur undir boðbrot og umkomst. Øll fólkini, sum vóru við, doyðu, men átta dagar aftan á vanlukkuna rak líkið av prestakonuni upp í Kvívík. Eitt sindur av góðsinum rak upp á land á Hvalnesi, og eitt sindur aftan á rak peningakistan hjá presti upp í Hvalbø. Tilburðurin var sæddur av manningini av hinum hvalbiarbátinum, sum frá landi eygleiddi prestbátin.[2]) Har fór Hans Hanssøn Hardi við øllum húski sínum uttan einum syni, sum tá var í Havn og las, og einari dóttur, sum var eftir í Hvalbø og skuldi taka sær av tí, sum aftan á var at stíla fyri í kallinum eftir harra Hans. Sonurin, Hans Hanssøn, fór niður til Keypmannahavnar at lesa. Sum Johannes Johannis Fæøensis sæst hann innskrivaður við lærda háskúlan í Keypmannahavn 1660. Hann gjørdist hjálparprestur í Helsingør [kanska ivasamt] og doyði 1684.[3]) Prestadótturin, Elisabet Hansdatter, búsettist í Hvalbø. Longu í 1652–53 hevði hon 2 merkur á Hamri í festi, sum óivað er tikið frá fyrrv. sýslumanni Jákupi Hálvdanssyni. Hon giftist við Niklasi Tormóðssyni á Toftagarði í Hvalbø, sum seinri løgtingsbók vísir. Í Bóndabókini finnst navn hennara sum Lisbeth Hansdatter.

1) Lb. fol. 301 a og b. 2) N. A. Fær., bls. 437–38. 3) N. A. Fær., bls. 438.

# DEILD IX.

## *Samfelagsstovnar.*

### a. Føroya skúli.

Lucas Debes kom til Føroya sum prestur í 1651. Hann læt prenta bók sína um landið og tess søgu í 1673, og táið hin katólska tíðin í Føroyum liggur bert o. u. 140 ár, innan bókin varð prentað, er grund til at halda, at tað, sum hann umtalar av føroyskum skúlaskapi frá tíðini undan og eftir siðaskiftið, stórt sæð samsvarar við tey søguligi viðurskiftini. Á Lucasar døgum skuldu 140 ára gamlar sagnir verið toluliga álítandi. Tíverri sigur Lucas Debes lítið um hin eldra skúlan, og serliga fáa vit onga gjøllari frágreiðing um, hvat ið hendi við Føroya skúla um siðaskiftismundið.

Um skúlan í teirri katólsku tíðini sigur Lucas Debes bert hesi fáu orð:

«Da de katolske bisper var besiddende på Kirkebø bispegård, have de haft deres munke hos sig, som eru blevne oplærte udi Guds ord og latinske sprog efter den tids ruditet eller grovhed, hvilke de også viede til præster over landet, som erfares af ovenmeldte kong Sverres historie.»[1])

Vit nýtast ikki at ivast um, at prestaskúlin í Kirkjubø hevur verið ein veruleiki, og vit vita, at Sverri kongur var vorðin prestlærdur við henda skúla. Beinleiðis kunnleika um henda prestaskúlan hava vit annars ongan, men noyðast at hugsa okkum hann riknan sum dómskúlar, ið funnust í øðrum norðurlondum, ella sum kloysturskúlar. Tílíkir eru rættuliga væl kendir. At tilsvarandi bókaskattur hevur verið til staðar á bispagarðinum í Kirkjubø, er ivasamt, og eftir tí, sum nú er komið undan kavi av toftunum á hesum gamla garði, hevur húsarúmdin verið stór. Aftan á siðaskiftið er skjótt alt farið fyri skeytið, bæði hús og tað, sum hevði verið varðveitt undir hesi stóru lon. Um Føroya gamla bispasetur sigur Lucas Debes 1673:

«Der da disse herrebisper ere hidkomne, have de bekommet deres residens udi Kirkebø paa Strømø, hvor fordum have været mange store stenhuse bygde, som nu ere ødelagte, og står nu igen ikkun et stenhus med en stor blokkestue efter gammel maner bygt.»[2])

Virðingin fyri tí, sum var bygt upp á hinum føroyska bispasetr

[1]) L. D., útgáva «Fram»s, bls. 297. [2]) L. D., útg. «Fram»s, bls. 277.



inum gjøgnum øldir, hevur verið lítið til staðar í Føroyum eftir siðaskiftið, tí 100 ár eftir at Jens Riber bispur er farin úr Føroyum — og tá man bispagarðurin hava hokið uppi — eru øll steinhúsini rivin av grund uttan tað, sum seinri hevur verið undir sjálvum bóndahúsunum. Annað kunna vit ikki fáa út av Lucas Debesar orðum. Longu um 1550 tykist bispagarðurin illa farin, tí í brævi 16. oktbr. 1551 stendur:

«Til Jens Gregersøn, superintendent på Færø, at måtte holde og have en skude på 12 eller 14 læster til at hente bygningstømmer i Bergen for dermed at bygge biskopsresidentsen og kirken med, indtil anderledes forordnes.»[1])

At bøkur hava verið til staðar á bispagarðinum, er ivaleyst. Nú á døgum kenna vit onga tílíka bók. Eru slíkar bøkur oyddar her á landi ella tiknar av sjóræningarum? Síðsti katólski bispurin, Ámundur Olavsson, fekk í 1533 lívsbræv upp á Føroya bispastól, men frá man hann vera settur kortini sum virkandi bispur. Hann sæst tó at hava livað í 1551. Ikki síggja vit, nær Jens Riber er komin til Føroya sum luthherskur bispur, men Lucas Debes sigur frá, nær hann er farin úr Føroyum:

«Da derefter her haver været en evangelisk biskop eller superintendent ved navn Jens Riber, hvilken boede her udi nogle år, indtil han på det sidste blev nogle gange røvet af franske sørøvere, og var da en gammel mand, hvorfor han begav sig herfra til København, hvorfra han blev sendt til Stavanger i Norge og blev der biskop anno 1556.»[2])

Av hesum er trúligt, at Jens Riber aldri hevur nýtt kongsloyvi sítt til at føra við úr Bjørgvin fyri at bøta um bispagarðin, og táið kongur hevði lagt kirkjujørðina undir seg, kundi hann heldur ikki hava serliga góð ráð til tess. Táið kongur í 1547 hevur goldið Føroya skúla 100 lybskar merkur, kunna vit ikki við nøkurlunda vissu siga, hvar hesin skúli tá hevur verið hildin, kanska helst í Kirkjubø. Ivaleyst hevur skúlin havt til endamáls tá at fáa til vega prestar uppaldar í hini nýggju trúarlæruni, men óivað skuldu teir aftaná á hin lærda háskúlan í Keypmannahavn, áðrenn teir sluppu út at virka.

Tað sum vit annars vita um hin lærda skúlan í Føroyum eftir siðaskiftið, vísir, at hann tá var eingin beinleiðis prestaskúli, men ein látínskúli ella ein forskúli til lærda háskúlan í Keypmannahavn; tó var ætlanin, at teir ungu skuldu venda aftur til Føroya sum prestar. Hetta sæst av Lucas Debes, ið sum undantak nevnir tríggjar ungar føroyingar úr Havnar skúla, sum høvdu fingið embæti í Danmark. Ikki allir føroyingar, sum gingu í skúlan í Havn, fóru beinleiðis inn á lærda háskúlan. Nógvir gingu fyrst 1 ella 2 ár á donskum látínskúlum, helst í Keypmannahavn, Roskilde ella Helsingør. Í teirri katólsku tíðini tykjast teir vanligu prestarnir í Føroyum at hava nomið lærdóm sín á bispasetrinum í Kirkjubø. Um teir aftaná eru farnir út um Føroyar, hevur tað ikki verið fyri at gerast prestlærdir, men bert fyri at leita sær meira kunnleika. Soleiðis var tað ikki aftan á siðaskiftið. Tá skuldu ungir føroyingar út um Føroyar at læra fyri

[1]) A. C. E., skjal 71. [2]) L. D.. útg. «Fram»s, bls. 279.

at kunna gerast prestar. Um siðaskiftið síggja vit, at katólskir prestar í Føroyum eru gingnir yvir til at virka í teirri luthersku kirkjuni. Óivað hevur siðaskiftið verið nakað mildnað av tí, men táið ættarliðið frá broytingartíðini er farið í grøvina, man mentunarskiftið í Føroyum hava verið fullgjørt, men einstakir katólskir siðir hava livað sítt stilla lív í fólkinum. Um siðaskiftið hevði hin katólska kirkjan gjøgnum 500 ár ár sett sítt merki á lív Føroyinga; tað er longri enn vit enn hava havt lutherska kirkju á landi.

Ikki er tað nógv vit vita um látínskúlan í Havn í teirri elstu tíðini. Kongur læt hann fáa 100 føroyskar gyllin árliga í studning, og av teirri grund er hann av og á nevndur í tingbókini. Í 1620 verður soleiðis tikið til, táið spurt verður um skúlan á tingi:

«Hertil svarede først hr. Thorlof Gregersøn official, desligeste hr. Christian Pedersøn sognepræst og skolemester her sammesteds, at forn. hr. Christian Pedersøn nu en tid lang havde samme genant annammet udaf kongl. majestæts fogeder og den anvendt, som han for Gud og sin øvrighed forsvare vilde, og haver han altid haft 6 eller 7 fattige skolebørn, som både vinter og sommer dagligen haver haft deres ophold med underholdning, klæder, bøger, papir og lærdom af samme genant, hvilket præsterne, lagmanden og menige almue, som nu til stede vare inde på lagtinget, med hannem bekendte, og var derfor endnu samme genant efter kongl. majestæts brevs lydelse begærende, hvilket han formener sig at have fortjent og endnu tilbød sig i alle måder villig og flittig at lade sig befinde.»[1])

Sum skúlameistari skuldi Suðurstreymoyar prestur hava 70 gyllin árliga, og skuldu hinir 30 gyllin ganga til skúlans og næmingarnar. Í hesi tíðini hevur hitt árliga næmingatalið ligið um tað talið, sum nevnt er 1620, og í 1649 vóru 9 næmingar. Eftir at Lucas Debes var deyður í 1675, hevur næmingatalið í látínskúlanum verið fallandi. Umframt tær vanligu lærugreinirnar í einum látínskúla tá í tíðini høvdu næmingarnir skriving, lesing og kristindómskunnleika. Nógvir av næmingunum fóru aftur í bóndaarbeiði, og á tann hátt gjørdist lesi- og skrivikynstur rættuliga vanligt í Føroyum. Til dømis vóru allir føroyskir sýslumenn bøndur upp at okkara døgum.

Skúlin tykist av fyrstu tíð at hava verið hildin í prestahúsunum eystan fyri Havnará, helst í einum serligum kamari har. Táið Hans Rasmussøn gjørdist hjálparprestur í Havn, fekk hann í 1628 nýggjan skúla bygdan úti á Reyni. Fútin, Mads Christensøn, bað í 1630 løgtingið sýna henda skúla og meta, hvat hann hevði kostað. Hetta ger so Jóan Jústinusson løgmaður 2. aug. sama ár við seks løgrættumonnum: Michel Joensøn, Hendrik Thomassøn, Oluf Lauridssøn, Simon Thomassøn, Augustinus Lydersøn og Hans Nielssøn, og er harum bókført:

«Efterdi den anden gamle skole var nederfalden, og de fattige skolebørn havde ingen hus, som de kunde tilholde og informeres udi, da haver vi samme bygning og arbejde beset og vurderet, at den ikke er opbygget i det allerringeste end med hundrede færøske gylden.»[2])

Prestagarðurin eystanfyri Havnará man tá eisini vera illa farin, og

1) Lb. fol. 91 b. 2) Lb. fol. 182 b.



stutt aftaná, at Hans Rasmussøn í 1630 gjørdist prestur í Suðurstreymoy, hevur hann bygt prestahúsini Reynagarð, sum tykjast at hava verið liðug í 1633. Bæði skúlin og Reynagarður komu at liggja uttan (sunnan) fyri tann tinganesskansan, sum tá fór í gerð og var lagdur sum ein ringur um tinganesøkið við gjøgnumgongd mitt út eftir Reynunum. At eingi serlig skúlahús hava verið, innan Hans Rasmussøn kom til Havnar, sæst av einum brævi, dagssett 24. juni 1646, hann hevur skrivað Jesper Brochmand bispi. Harí sigur hann, at táið hann kom til Havnar, var «ingen ordinarie skole opbygt, undtagen at *rector scolæ* udi et lidet kammer haver informeret disciplene.»[1]) Í 1628 vóru hesi fyrstu skúlahús liðug, og tað eru tey, sum fútin fær løgtingið at sýna í 1630, og sum mett verða til minnst 100 føroyskar gyllin. Í 1669 vórðu skúlahúsini flutt á Reynið norðan fyri skansavirkið, tí tey vóru komin at liggja ov nær sunnara kanti av virkinum, sum tá var ætlað at skula verða útbygt betri. Á hesum staði stóð kommunuskulin í Havn, til nýggjur skúli varð bygdur í 1894.

Í gomlum døgum er tað eingin, sum hevur gjørt so nógv fyri Føroya skúla sum Hans Rasmussøn prestur. Hann fekk sum nevnt bygt hini fyrstu skúlahúsini og fekk harnæst í lag ein fólkaskúla fyri Havnina, ein sokallaðan danskan skúla. Eisini arbeiddi hann fyri, at ein bóndagarður nærindis Havnini varð lagdur skúlanum til. Hann ynskti í sama sambandi, at próstaembætið, sum tá fylgdi við Havnar kalli, eins og skúlin gjørdi, læt avlopið av inntøkunum hjá kirkjunum gjøgnum próstin koma skúlanum til góðar. Táið Hans Rasmussøn var vorðin próstur í 1646, bað hann um at fáa próstagarðin, Garðshorn, í Oyndarfirði umbýttan við Kirkjubøgarð. Hetta eydnaðist ikki, líka so lítið sum at fáa próstakalli knýtt at Suðurstreymoyar prestakalli. Harafturímóti fekk Hans Rasmussøn sum nevnt $11^1/_4$ mørk av jørð í Norðradali í festi, og var hetta ætlað sum ein samsýning til skúlans. Í sama brævi til Jesper Brochmand bisp 24 juni 1646 biður Hans Rasmussøn eisini um, at føroyskir studentar mega fáa frían kost við lærda háskúlan í Keypmannahavn. Eisini á annan hátt royndi Hans Rasmussøn at fáa skúlanum inntøkur til vega. Lucas Debes, sum við heiður helt fram við arbeiðinum hjá Hans Rasmussøn, sigur í bók síni 1673 nakað um skúlans viðurskifti og tær ringu fíggjarligu umstøðurnar hjá teimum, sum høvdu hug at lesa:[2])

«Ikke des mindre er der dog nogle landsens indfødde børn, dog så i så lang tid, der fra skolen udsendt på andre steder at blive ydermere undervist, hvilke omsider er blevne præster der udi Færø, nemlig disse efterfølgende: hr. David udi Kvivig, hr. Poul Rasmussøn udi Suderø, hr. Gabriel Thorlofsøn udi Østerø, hr. Hans Gabrielsøn Mitens udi Norderø, hr. Hans Rasmussøn udi Thorshavn, hr. Joen [Jonas] Michelsøn udi Kollefjord. Hvilket dersom dog ikke havde været sket, så haver dog skolen givet denne frugt og nytte af sig, at de unge personer, som haver ganget udi skolen og have lært at læse og skrive, er udspredte i landet, af hvilke indbyggerne mange have lært at læse udi bøger, nogle også nogenlunde skrive, formedels hvilket den største part af mandfolket i landet kan læse udi bøger.

1) N. A. Fær., bls. 303. 2) L. D., útg. «Fram»s, bls. 299.

Men eftersom indbyggerne er her meget fattige, at de formå ikki at holde deres børn til skole, hvormed de sig udi almindelighed undskylde, da haver min salig formand, hr. Hans Rasmussøn, allerunderdanigst sådan deres fattigdom andraget for Hans kongl. majestæt, allerhøjlovligst udi hukommelse, konning Kristian den Fjerde, og supplicando soliciteret om nogen stipendio til sådanne fattige skolebørn, hvilket højstbemeldte Hans kongl. majestæt udi allerstørste nåde haver optaget og af synderlig kongelig mildhed og rundhed anno 1647 den 27. marts givet og perpetueret til fattige og nødtørftige skolebørn udi Færø deres underholdning og skolegang et *vicarie*, som da udi Roskilde vakerede, *Bona altaris Wilhelmi kaldet*, med al dets rente og rette tillæggende på efterfølgende måde: At superintendenten over Sjællands stift skal have inspektion og indseende med samme vicarie, at alting dermed rigtig og efter kapittels statuter tilgår og lade årligen den visse og uvisse indtægt oppebære og fogden der på landet i rette tide levere, hvilken det skolemesteren der på landet rigtig årligen skal tilstille, og skolemesteren det siden med hans og den fornemste sysselmands der på landet deres betænkende der sammesteds ligeligen og ret distribuere og udbytte skal, som de vil ansvare og være bekendte: så at hvert skolebarn, som det behøver og haver nemme og lyst til bogen, så vidt fornævnte indtægt tilstrække kan, ungefær så meget som 10 currant-daler eller færøske gylden årligen deraf bekomme, og skal bispen af skolemesteren der på landet lade gøre sig regnskab af samme penges udgift og, så vidt muligt er, have indseende, at ikke de, som selv formue have, disse penge nyde, på det at den fattige derudover skulde miste og lide nød, i betænkning, at det til de fattiges promotion aleneste udi en gudelig intention og mening af Hans kongl. majestæt allernådigst er destineret. Herforuden samme år haver højstbemeldte salige herre allernådigst foræret til Færøs skole et halvt hundrede rigsdaler in specie, og ærlig og velbyrdige mand, hr. Niels Trolle til Trolleholm, da Danmarks riges råd, befalingsmand på Roskilde gård og rigens viceadmiral, i lige måde til samme skole af egen rundhed og mildhed givet et halv hundrede rigsdaler in specie og således forordnede, at fornævnte hundrede rigsdaler kapital altid skal blive på rente, bestående hos provsterne på Færø en efter anden, som skulle være skolens inspectores, og deraf til fattige skolebørns underholdning årligen til påsken, beregnet fra påsken, skal erlægge seks rigsdalers rente og skal sætte til underpant deres nådsens år for kapitalen, rente og anden skadegæld der på kan komme. For hvilke to[1]) hundrede rigsdaler hr. Hans Gabrielsøn Mitens for nogle år haver købt to marker jord udi Suderø, at deraf den årlige skolens rente kan bekommes uden provsternes besværing, eftersom provsten kunde ikke bruge pengene, og de ej anderledes der i landet kunge amplieres.»

Táið Lucas Debes kom til Føroya í 1651, hevði skúlin fylgjandi inntøkur:

---

1) Orðið «to» kemur av, at tað, sum Lucas kallar «et halvt hundrede rigsdaler in specie» hava verið 100 ríkisdálar, tí ein spesia var tveir ríkisdálar. Við umvekslingina 1874 var spesian = 4 kr., ríkisdálin = 2 kr.



1. 100 føroyskar gyllin árliga frá kongi. Henda pening hoyra vit fyrstu ferð um í 1547 sum hundrað lübskar merkur. Tað er ivasamt, um peningurin hevur verið givin áður, tí ætlandi hevur kongur fyrst um hetta mundið heilt lagt hond á alla kirkjujørðina. Seinni er gávan endurnýggjað í gyllin ella gomlum dálum av Fríðriki kongi II. Suðurstreymoyar prestur fekk 70 gyllin av hesum peningi sum skúlameistari, og hinir 30 gyllin fingu næmingarnir fyri kost, klæði, bøkur og pappír. Foreldrini máttu lata 10 gyllin umframt, um tey ynsktu, at sonur teirra skuldi eta við borð skúlameistarans.
2. 50 spesiudálar gav Kristian kongur IV skúlanum í 1647, og Niels Trolle til Trolleholm gav honum eisini 50 spesiudálar. Avgjørt varð tá, at hesir 200 dálarnír ella 100 spesiurnar skuldu standa inni hjá Føroya prósti og geva 6 ríkisdálar í árligari rentu, sum hvørt ár skuldi koma skúlanum til nýtslu. Í veð fyri peningin skuldi prósturin seta inntøkurnar av sínum náðisgarði. Í 1648 gav Hans Rasmussøn fyrstu ferð skuldarbræv fyri hesar 200 dálarnar, men viðmerkti í tí, at hann hefti ikki fyri peningin, um hann varð rændur av sjóræntarum. Hetta tvungna lánið var ikki lagaligt hjá próstunum altíð at skula hava, og tí keypti Hans Gabrielsøn Mitens 2 merkur í jørð í Trongisvági fyri hesar 200 dálarnar frá Reihold Horn í Havn, sýslumanni og bartskera. Hetta var gomul Benckestockajørð, og ognarskjalið varð givið 1667. Tað sigur, at jørðin varð keypt, tí tað var ógjørligt at fáa hesar 200 dálarnar læntar út til rentu. Rentan av hesum tveimum mørkunum var 6 dálar ella 7 gyllin 4 skinn. Seinni í tíðini minkaði leigan av hesum mørkunum niður í 5 gyllin 8 skinn. Táið 200 dálar svara til 250 føroyskar peningagyllin, og jarðarprísurin fyrra part av 17. øld stórt sæð tykist at hava verið ein jarðargyllin fyri ein peningagyllin, kanska uttan innstøðu og bert innangarðs, siggja vit herav, hvussu nógv jørðin longu í 1667 er farin upp í prísi, tí í tveimum jarðarmørkum eru jú 32 jarðargyllin. Har aftrat tvífalt virði uttangarðs gevur til samans knappar 100 gl. í gomlum prísi.
3. Vicarie í Roskilde, *Bona altaris Vilhelmi*, góðsið við rentum og lunnindum eftir gávubrævi 27. mars 1647, sum ásetti, at Sælands bispur skuldi hava umsjón við ognini, at rætt skuldi vera farið fram, og at festigóðsið læt ásett árligt gjald, sum bispurin skuldi avhenda Føroya fúta, og sum hesin aftur skuldi lata skúlameistaran fáa. Suðurstreymoyar prestur skuldi síðan lata bispin fáa roknskap yvir nýtsluna av peninginum. Inntøkurnar av Roskildegóðsinum vóru 1688 býttar um við kirkjutíggjundina av Lyngby og Bloustrød, sum Sælands bispur seldi eftir kapittilstakstinum, og hvarav hann sendi skúlanum í Havn so nógv, hann hevði brúk fyri. Næmingarnir í Havn skuldu fáa 10 føroyskar gyllin árliga hvør, svarandi til 8 dálar. Annars fingu teir næmingar, sum fóru niður at lesa víðari, studning av hesum peningi. Hin árliga inntøkan av nevndu kirkjutíggjund ætlast at hava ligið um 57 ríkisdálar.[1])

---

1) Henda inntøka látínskúlans tykist ikki at liggja søguliga greið fyri.

Ikki var tað so lítið, sum Hans Rasmussøn prestur fekk avrikað skúlanum til frama, og Lucas Debes, sum royndi at halda fram somu leið, møtti harða mótstøðu frá Gabels fúta. Orsøkin var óivað fyri ein part Lucasar politiska starv fyri at sleppa Havnarmonnum frá hinum nívandi skansaarbeiðinum eins og hansara stríð móti fútavaldinum í Føroyum, ið nívdi tungt á føroyskar festibøndur. Báðir hesir prestarnir leiddu skúlan við dugnað og ídni.

Nevnt er áður, at Hans Rasmussøn var tann, sum fekk fólkaskúla settan á stovn í Havn, og lærari við henda skúla gjørdist kirkjudeknurin. Hann fekk 16 føroyskar gyllin árliga fyri starv sítt. Sjálvsagt skuldi presturin hava eftirlit við hesum skúla. Vert er at leggja til merkis, at einki slit hevur verið í fólkaskúlanum í Havn, síðan hann var stovnaður fyri stívt 300 árum síðan, men søga hansara er tíverri lítið kend, fyrrenn vit koma upp um árið 1800. Táið látínskúlin doyði strádeyða í 1804, vórðu ognir hansara fluttar yvir á fólkaskúlan í Havn, sum tá var einasti skúli í landinum.

## b. Argja hospital.

Fyrstu ferð vit í skjølum hoyra hospitalið á Argjum nevnt er í 1547, táið kongur gevur tí 100 lübskar merkur í studning, eins og hann sama ár gjørdi við Føroya skúla. Ikki er rætt at ætla harav, at hospitalið á Argjum er sett á stovn hetta árið, og at kongur hevur latið tað stovnað. Hetta er júst sama árið, prestaskúlin ella látínskúlin fyrstu ferð sæst at fáa kongligan studning. Alt hetta hendir jú um tað tíðarhvarvið, tá kongur beint hevði fingið kirkjujørðina í Føroyum undir sítt vald, og kirkjan soleiðis hevði mist fíggjarmegi sína. Tá vit vita, at skúlaskapur og spitalskarøkt í øllum norðurlondum innan siðaskiftið lógu undir kirkjuni, skuldi tað ligið beint fyri at hugsa sær, at hin katólska kirkjan í Føroyum hevur havt bæði prestaskúlan og Argjahospital undir sær. Sjúklingar, sum komu á hospitalið á Argjum, hava óivað fingið nógva jørð við sær undir kirkjuna; men eftir siðaskiftið síggja vit, at jørð, sum soleiðis var komin undir hospitalið, varð innloyst av næstringum. Henda rætt høvdu fólk bæði eftir landslógini og hini Norsku løgbókini.

Av fútaroknskøpunum frá 1584 síggja vit, at hospitalið fekk fasta árliga inntøku av seyðaleigu frá nøkrum bóndagørðum, 60 lomb árliga mett 12 gyllin; hesin peningur gekk inn í teir 100 gyllin, sum kongur hvørt ár gav Argja hospitali. Við lítlum undantaki høvdu hesi leigulombini dupult leiguvirði av vanligari seyðaleigu á fútaroknskøpunum. Hesin ójavnin í leigustødd kann væl hugsast at stava frá eini tíð, táið lambið bert hevur havt helvtar virði, mett í vørum. Tað eru grundir fyri at hugsa sær lombini nakað út í miðaldur væl smærri, enn føroysk lomb vóru í nýggjari tíð. Um talið av leigulombunum hevur verið fast, og kropparnir gjørdist størri, vaks sjálvsagt virði teirra. Ilt er at geva aðrar grundir fyri hetta tvífalda virði, sum seyðaleigan í lombum veruliga hevði.



Í A. C. Evensens brævasavni finnst undir 27. apríl 1539 soljóðandi: «Thomas Koppen i Hamborg fik kvittans på 100 mark lübsk på den genant af Færø.»[1]) Hetta er tað, sum hann eftir sáttmálanum frá 1529 skuldi gjalda kongi. Kirkjugóðsið er ikki við her. Um 1542 hevur kongur av álvara lagt hetta góðsið undir seg, í hvørt fall teir tveir partarnar av tí, og í 3—4 ár tykist tað tá at hava ligið beinleiðis undir Bjørgvins húsi, men bræv í «Norske registranter» 15. febr. 1547 sigur: «Thomas Koppen fik kvittans at have gjort Jørgen Pedersøn [rentumeistari] regnskab på kongens vegne for, hvad han har oppebåret af det gejstlige gods på Færø 1545 og 1546.»[2]) Hitt kongliga gjaldið, hann skuldi lata eftir sáttmálanum frá 1529, verður hildið fyri seg í eini aðru kvittan. Bræv í «Norske registranter» 14. apríl 1547 ljóðar soleiðis: «Thomas Koppen fik brev ad gratiam på de to parter af stigtens gods på Færø uden alt regnskab deraf at gøre, dog at han særlig skal give deraf til skolen på Færø 100 mark lübsk og 100 mark lübsk til hospitalet sammesteds til st. Olavs dag, og 500 mark lübsk skal han årligen til påske fornøje kongen deraf, hvor kongen er her i riget, og da medbringe fornøden kvittans, at pengene til skolen og hospitalet er betalte.»[3])

Fyribils má kirkjan í Føroyum ætlast at hava havt ein triðing av sínum góðsi eftir. Enn vóru jú bispar í Føroyum, møguliga tveir. Ámundur Ólavsson hevði jú fingið lívsbræv upp á Føroya bispadømi frá 1. jan. 1533, og vit síggja, hann hevur livað 1551 og kanska enn tá búð í Føroyum. Árini 1548, 1550 og 1551 sæst Thomas Koppen eftir A. C. Evensens brævasavni at hava latið kong fáa 500 lübskar merkur av leninum Føroyar, og skilað verður til, at tær 400 merkurnar vóru av kirkjujørðini og tær 100 fyri hitt gamla lenið.[4])

Skrivligt finnst einki um, at hospitalið á Argjum fyrst er stovnað 1547. Sjálvt hospitalshúsið kostaði pening at byggja, og fýra merkur av innangarðsjørð lógu aftrat tí. Søgan sigur okkum einki um, hvussu hetta er komið til vega, og vit noyðast tí at rokna við, at alt hetta longu hevur verið gjørt í okkara søguliga myrka miðaldri, altso innan siðaskiftið. Tað tykist eisini samsvarandi almanna søguliga gongd í okkara grannalondum frá teirri tíðini. Tað, sum Lucas Debes sigur um Argja hospital í bók síni frá 1673, er eingin vísan á, hvussu tað hevur verið stovnað. Fyri Lucasi hvørvur stovnan tess burtur í søguligum myrkri. At hann hevur hug at geva gomlum kongum æruna fyri at hava bygt hospitalið á Argjum, er bert samsvarandi við tíðarandan og vísir, at hann onga vitan ella søgn hevði at byggja á. Lucas Debes sigur:

«Fremfarne kristelige konger have funderet en sær sted, kaldet Arge, liggende straks ved Thorshavn, hvortil ligger 4 marker jord til at føde deres kvæg på, og dertil årligen allerunderdanigst og kristeligt perpetueret 100 færøske gylden, som årligen dertil af Hans majestæts foged udlægges, hvorhen de besmittede indføres og underholdes.»[5])

Søguliga er hetta so kámt, at tað sigur okkum einki um stovnanina av hospitalinum. Lucas nevnir heldur ikki Kristian kong III, sum gav

---

[1]) A. C. E., skjal 51. [2]) A. C. E., skjal 56. [3]) A. C. E., skjal 54. [4]) A. C. E., skjal 59, 67 og 68. [5]) L. D., útg. «Fram»s, bls. 269--70.

hospitalinum fyrstu gávuna, og sum innførdi lutherdómin í norðurlondum. Hetta var tó hent um 100 ár, innan Lucas Debes kom til Føroya. Øðrvísi týðuliga greiðir Lucas frá hospitalinum, sum tað hevði verið á hansara døgum. Lucas var jú prestur fyri teim spitalsku á Argjum. Hospitalið var ikki bert spitalskahús; tað var eisini fátækrahús. Óivað var tað heldur ikki nakað nýtt. Sum nevnt tykist einkjan eftir David Joensøn, prest í Kvívík, at hava verið á Argja hospitali.

Hinir luthersku prestarnir tykjast helst ikki at hava viljað minnst hina katólsku tíðina, og eftir siðaskiftið og tá helst í einaveldistíðini var kongur vorðin landsfaðir at øllum. Um talið á sjúklingum á Argjum sigur Lucas, «at der nu kan indføres snart så mange, som blive besmittede, da dog tilforn almindelig annammedes i hospitalet ikkun 12 personer.»[1])

Vit finna altso her talið 12, sum hitt spitalska hospitali í miðaldri skuldi taka. Í forntíðini fannst spitalskasjúkan serliga í eysturlondum, og táið krossferðirnar fóru herjandi fram móti halga landinum, tók sjúkan um okkara leiðir rættuliga ferð á seg, helst í syðra parti av Europa, men eisini í norðurlondum gjørdist hon bágin. Á Íslandi var spitalska sjúkan í hæddini um ár 1400. Hin katólska kirkjan í miðaldri tók sær tá av teim spitalsku við víða hvar at seta á stovn smá hospital ella skt. Jørgunsgarðar, ið vóru lagdir uttanvert býarmark. Hesir garðarnir vóru roknaðir til at taka 12 spitalsk hvør ella talið av apostlunum, og táið vit lesa, hvat Lucas Debes sigur um hospitalið á Argjum, finna vit aftur talið 12 sum framman fyri nevnt. Hetta bendir á, at hospitalið á Argjum er stovnað av teirri katólsku kirkjuni, og at tað hevur ligið undir bispasetrinum í Kirkjubø. Við sjúklingunum hevur kirkjan óivað fingið nógv jarðargóðs; men táið kongur eftir siðaskiftið tók alt jarðargóðsið frá kirkjuni, var hann noyddur at veita hospitalinum stuðul, um tað ikki skuldi falla niður fyri. Tað sama kunna vit eisini siga viðvíkjandi látínskúlanum í Havn, sum tók við eftir prestaskúlan, ið verið hevði á bispasetrinum.

J. Chr. Svabo sigur síðst í 17. øld, at áður í tíðini vóru bygdar serligar smáttur fyri tey spitølsku uttanvert bøgarðarnar í ymsum bygdum. Soleiðis hevur Argja hospital eisini ligið uttan fyri Havnina. Men táið søguligar keldur taka við í Føroyum eftir siðaskiftið, er spitalska sjúkrahúsið á Argjum tað einasta, sum verður nevnt. Møguliga hevur spitalska sjúkan tá verið minkandi í Føroyum, og sjúkrahúsini á bygd hava tá verið niðurløgd. Tær fíggjarligu umstøðurnar hjá tílíkum sjúkrasmáttum eru væl eisini tá vorðnar ringari. Táið Svabo skrivar soleiðis um spitalskahúsini í gomlum døgum, man hetta hava verið mannasøgn tá. At katólska kirkjan hevur havt bønhús í ymsum føroyskum bygdum, sum seinri hava verið niðurløgd, er ivaleyst, og táið leivdir og gomul søgn benda á, at slíkt bønhús sum t. d. við bygdina Hattarvík hevur ligið uttan fyri bøgarðarnar uppi á Skarði, ógvuliga ólagaliga atgongt, er møguleiki fyri, at bønhús undir tílíkum viðurskiftum hevur verið bygt í samband eina spitalskasmáttu. Vit vita, at bønhús var bygt áfast við hospitalið á

1) L. D., útg. «Fram»s, bls. 270.



Argjum, og at øll guðstænasta fyri tey spitalsku fór fram her. Tey sjúku skuldu vera hildin fyri seg og ikki koma saman við onnur fólk.

Um spitalskasmittuna skrivar Lucas Debes: «Jeg haver trende eksempler udi mine menigheder, hvor kvinderne have været urene og have avlet mange børn, som mest alle ere gifte, og ingen befindes endnu at være besmittet.»[1]) Av hesum má kunna ætlast, at ikki øll, sum hava fingið spitalskasjúkuna, hava verið koyrd á hospitalið á Argjum, og Lucas sigur eisini: «Det befindes også, at når to leve tilsammen udi ægteskab, og en af parterne befindes besmittet, da så længe der ikkun ymtes derom, holde de sig tilsammen som tilforn, indtil de ved øvrigheds middel adskilles; dog alligevel bliver den karske uskadt, da dog en anden ofte ved en ringe omgængelse kan blive besmittet. Her findes eksempler, som endnu er for øjen, at fattige krøblinge, dog rene, men uden al hjælp, der indsatte udi hospitalet iblandt de syge, æde med dennem, omgås daglig med dennem, og blive dog ganske ubesmittede deres ganske livs tid.»[2])

Herav síggja vit, at hjálpaleys fátæk menniskju eisini hava verið send á hospitalið á Argjum, og at spitalska sjúkan hjá einstaklingum ofta hevur verið duld í síni byrjan, men táið yvirvaldið fekk kunnleika um tey sjúku, vórðu tey send á hospitalið. Hetta hava vit dømi um frá tingbókini. Undir 1617 er innført í løgtingsbókina: «Nicolas Rollofsøn, som er udi Andefjord, er befængt med en slem sygdom. Blev så påsagt inde på lagtinget, at han nu med det allerførste skal fare til hospitalet.» Ikki hevur henda løgtingsavgerð verið aktað beinan vegin, tí árið eftir er innført í tingbókina: «Samme dag [5. aug.] inde på lagtinget blev afsagt af lagmanden, desligeste kongl. majestæts foged, at den mand udi Andefjord ved navn [fornavn ikki skrivað, men opið pláss sett] Rollofsøn, som er befængt med en ond besmittelig sygdom, skulde endeligen lade føres hen til hospitalet med det allerførste, og hvis han åger [ejer], skal optegnes.»[3])

Eigindómur er soleiðis komin hospitalinum til góðar við teim sjúku, men næstringar hava havt rætt til at innloysa jørð aftur eftir reglunum í norsku løgbókini, og tað vil siga innan 30 ár. Eftir siðaskiftið hevur hetta væl altíð verið gjørt, tí vit vita einki um, at hospitalið á Argjum átti nakra jørð.[4]) Í 1617 vísir løgtingsbókin, at slík innloysing er gjørd: «Den jord, som kom ind i hospitalet med Peder Olufsøn, skal hans broder, Siuorder Olufsøn, måtte indløse igen med sine egne pendinge, som er en halv mark jord for otte gylden, som han nu haver betalt til hospitalet anno 1617.»[5]) Sjá undir *Dráp og serlig brotsmál I*, bls. 26—27.

Umframt teir 100 gyllin frá kongi, sum altso 60 leigulomb gingu inn í, mett 4 skinn stykkið, hevði hospitalið á Argjum rætt til at biðja gávur av fólki, og av hesum kundi tað hava góðar inntøkur. Lombini komu 30 av Skælingi og 30 av Signabø til ár 1600. Frá og við hesum ári komu 20 lomb av Signabø og 10 úr Hósvík (Toftum), meðan lombini av Skælingi vóru tey somu. Sum nevnt gingu hesi

1) L. D., útg. «Fram»s, bls. 273. 2) L. D., útg. «Fram»s, bls. 273. 3) Lb. fol. 30 a og 50 a. 4) Møguliga kunna leigulombini, Argja hospital fekk av Skælingi og Signabø, vera dømi um, at hospitalið eina ferð hevur átt hesar garðar. 5) Lb. fol. 29 b.

leigulomb inn í fútaroknskapin við virðinum 4 skinn stykkið, og seyðaleigan í leigulombum gjørdist tí tvífalt so høg, sum í vanligum leiguvørum. Viðmerkt skal tó verða, at tey 30 lombini av Signabø innan ár 1600 standa á fútaroknskapinum sum leiga av 80 áseyðum í staðin fyri 60. Áttati áseyðir skuldu annars eftir leigulambstakstinum givið 40 lomb ella 8 gyllinsvirði, so árini innan 1600 hevur seyðaleigan av Signabø í leigulombum verið $2^2/_3$ skinn fyri lambið. Líkt er tí til, at hetta lambsvirði er sett í eini broytingartíð.

Innstøðan á teim 4 mørkunum av innangarðsjørð, hospitalið á Argjum hevði, var 3 kýr, 1 kvíga og 2 hestar, og hesum skuldi matmeistarin, hospitalið hevði, taka sær av. Hesin matmeistarin skuldi annars taka sær av øllum dagligum arbeiði, og fyri hetta starv átti hann triðing av øllum inntøkum, hospitalið hevði. Til starv hansara hoyrdi eisini tað við at fara runt um landið at biðja fólk geva hospitalinum gávur. Hann tykist at hava átt framíhjárætt til bidding. Fjórðingur av allari tíggjund í Føroyum var nevnd fátækratíggjund, sum bøndurnir hildu aftur fyri seg sjálvar til at geva fátækafólki. Hesin fjórðingur var bóndaluturin.[1]) Seinri royndu myndugleikarnir at geva áseting um, at tað, sum bøndur ikki góvu teim fátæku av bóndalutinum, skuldi hospitalið á Argjum fáa. Av smørtíggjund fór helst eingin bóndalutur seinni tíðina. Av innangarðsjørðini á Argjum eins og av øðrum inntøkum læt hospitalið hvørki leigu ella tíggjund.

Endaliga skal nevnast ein inntøka, hospitalið á Argjum hevði, og sum í løgtingsbókini 1615—1654 mest tykist at vera til staðar tey fyrstu árini. Tað eru rættarbøtur. Í løgtingsbókini 1615—54 fær kongur nærsagt allar slíkar bøtur, men tey fyrstu árini fær hospitalið á Argjum nakrar bøtur tildømdar, og hetta tykist at benda á, at innan tingbókin byrjar, hevur tað kanska verið meira vanligt at døma hospitalinum bøtur til. Frá 1615 eru tvey tílík mál:

«Den klammer og trætte, som nu påny var begyndt imellem Magnus Ellendsøn udi Skuø og Oluf Simonsøn imod den forrige deres forpligt, som var gjort på lagtinget anno 1610. Haver kongl. majestæts foged, Strange Madssøn, for gode mænds bøns skyld endnu efterladt, så han ikke på denne tid vilde stå på den strengeste ret efter dennem; dog skulde de give til de fattige på hospitalet hver for sig 1 td. mel eller 3 gylden.»[2]) Sama ár er innført í tingbókina:

«Om den usemme og skældsord, som Søren Jørgensøn og Agmund Nielssøn var imellem siden 1613 haver kongl. majestæts foged, Strange Madssøn, på denne tid efterladt for gode mænds bøns skyld, at de på både sider skulde forliges, .... og skal de på både sider give til de fattige udi hospitalet hver 3 gylden.»[3])

Undir tingmálum frá Norðuroyum 1616 finnst hesin dómur:

«Marion Joensdatter udi Kunø for nogen klammer og trætte, som hun havde begyndt med, skal give til de fattige udi hospitalet 2 gylden.»[4])

Hóast dómin 1615 kyknaði klandrið millum Skúvoyingar upp aftur 1622. Harum sigur tingbókin: «.... skal bøde til de fattige 2 td. mel og 1 mark sølv til kongl. majestæt.»[5])

[1]) Kap. VII í Gulatingslógini ásatti, at tíggjundin skuldi býtast í fýra millum bisp, prest, kirkju og tey fátæku. [2]) Lb. fol. 11 a. [3]) Lb. fol. 10 b. [4]) Lb. fol. 19 a. [5]) Lb. fol. 126 ba.



Hin dagliga eftiransingin við hospitalinum á Argjum man ikki altíð hava verið hin besta. Undir *Dráp og serlig brotsmál III*, bls. 28, er sagt frá, at matmeistarin á hospitalinum, Simon Joensøn, í 1619 heima í Havn í fyllskapi hevði stungið ein mann, so hann aftaná doyði av stinginum, og í 1623 kom Mýmaður Sjúrðarson í Dali fyri barn við einum konufólki á Argjum.

At vera Argjalimur merkti í gomlum døgum nakað tað sama sum at vera fátækralimur, og Lucas Debes sigur eisini, at fátæk fólk, sum ikki kundu bjarga sær sjálvum, vórðu beind hagar. Hann vísir eisini á, hvussu merkiliga hin spitalska sjúkan smittaði, ella hvussu lítil smittuvandin var við beinleiðis samveru. Hospitalið á Argjum hevur óivað gjørt sítt til, at spitalska sjúkan doyði út í Føroyum, men pokurnar, sum ofta herjaðu Føroyar, hava eisini verið við í hesum arbeiði. Soleiðis doyði meginparturin av Argjalimunum av teim ringu pokunum, sum gingu 1709, og mætari hava pokurnar væl ikki farið við teim spitalsku, sum hava livað uttan fyri hospitalið.

Vit síggja í teirri elstu løgtingsbókini og fram eftir, at Streymoyar sýslumaður verður kallaður *herredsfoged*, og harav kann hann væl hugsast at hava havt starv fram um aðrar sýslumenn. Nú vita vit, at hospitalið á Argjum lá undir honum. Hann skuldi ansa eftir teirri dagligu gongdini, og árliga gera roknskap fyri raksturin av hospitalinum.

DEILD X.

*Tingbøkur.*

Sum áður nevnt gongur hin elsta løgtingsbókin, sum varðveitt er, frá 1615 til 1654. Vártingsbók kenna vit onga nú frá hesum tíðarskeiði, men dómar frá vártingunum um hetta mundið eru stutt innførdir í løgtingsbókina. Um allir vártingsdómarnir eru innførdir her ella bert teir, sum eru sendir løgtinginum til eftirkanningar og metingar, er ilt at avgera. Hesir frá vártingunum komnu, stutt innførdu dómar hava hvørt ár soljóðandi yvirskrivt:

«Kongl. majestæts sager og sagefald, som er forhandlet og forordelet på vårtingene og på lagtinget udi Færø anno . . .»

Eftir hesum orðaljóði at døma tykjast tey mál, sum eru dømd og endað á vártingunum, ikki at vera komin inn í løgtingsbókina. Helst er tað tó soleiðis, at hetta eru øll kongsins bótsmál, tí tey ganga inn í fútaroknskapin. Av løgtingsbókini 1615 til 1654 sæst, at hon hevur verið beinleiðis framhald av eini eldri løgtingsbók, og at vártingsfundir frá hesum tíðarskeiði hava verið bókførdir, helst í eini serligari vártingsbók. Forblaðið í hesi elstu løgtingsbók, vit kenna, byrjar prentað í stórum støvum soleiðis:

«Anno 1614 lod jeg, Sacharias Thormodsen, laugmand paa Ferrø, denne bog kiøbe udi Kiøbnehaffn, og førde kongl. majestæts foged, Strange Madtzen, borger udi Kiøbnehaffn, den hied til Ferrø samme aar.»

Eftir hesum skuldi bókin verið keypt í Keypmannahavn og førd til Føroya, táið fútin kom higar *á vári 1614*. Fútin kom altíð til Føroya við fyrsta skipi á vári. Vanliga kom hetta skipið í fyrsta lagi um mariumessu, 25. mars, men hendingaár kom tað ikki fyrrenn um jóansøku, «ved skt. Hans tider.» Bókin, sum keypt var í Keypmannahavn, átti altso at vera tøk til nýtslu á løgtingi á sumri 1614, og tó er hon ikki tikin í brúk fyrrenn fyrst í august 1615. Táið hetta er hent, man tað vera tí, at hin eldra løgtingsbókin tá hevur ikki verið heilt útskrivað.

Saman við Søren Sørensøn borgmeistara, Bjørgvin, og Nicolas de Frunt keypmanni í Bjørgvin hevði Strange Madssøn fúti við kongl. brævi, dagssett 3. febr. 1614 á Koldinghus, fingið onkarrætt til handilin í Føroyum frá 1. mai 1614[1]). Øll grund skuldi tí verið til hjá

[1]) N. R. R., bind 4 hefti 2, bls. 515.



fútanum at vera aftur í Føroyum við yvirtøkuna av handlinum fyrst í mai hetta ár. Eisini hetta er prógv fyri, at tingbókin nýggja má hava verið í Føroyum í góðari tíð innan ólavsøkutingið 1614.

Hervið kann eingin ivi sigast at vera um, at eldri løgtingsbók hevur verið førd fyri árini beint undan 1615.

Undir árinum 1615 er í løgtingsbókina nærsagt eingin innføring gjørd um bóta- og straffimál, men í fútaroknskapin fyri sama ár eru øll hesi mál førd inn, og vísir hetta, at bókin er tikin til brúks miðskeiðis í 1615. Hetta kann bert vera tí, at ein eldri løgtingsbók hevur verið førd beint framman undan. Givið er tað í hvørt fall, at løgtingsbók hevur verið førd áður, tí tingbókin 1615—54 talar fleiri ferðir um «den gamle tingbog». Hin elsta ávísingin á gomlu tingbók bendir sum nevnt áður á árið 1557. Longu tá má løgtingsbók hava verið førd í Føroyum, hóast áseting um, at tingbøkur skuldu verða førdar í øllum løgdømum undir Noregs veldi fyrst kom 1568[1]). Eingin grund er fyri heldur at halda, at fyrsta tingbók í Føroyum er byrjað árið 1557, sum liggur miðskeiðis í tíðarskeiðinum, tá Guttormur Andrasson var løgmaður. Løgtingsbókin 1615—54 kann ikki sigast orðrætt at endurgeva nakað úr hesi gomlu tingbók, men sagt verður frá, hvat ið hendi á tingi tá. Henda ávísta gamla tingbókin er burtur og var tað eisini í 1709[2]). Møguleiki er fyri, at tær elstu tingbøkurnar í Føroyum hava verið skrivaðar á gomlum føroyskum máli, tí so seint sum frá 1479[3]) er slíkt jarðarskjal enn til skjals, og lóggávan, sum nýtt varð í Føroyum upp um ár 1600, var á fornum norskum máli. Til 1604 nýttu føroyingar landslóg Magnusar løgbøta í sínum forna málbúna. Hetta sæst sum áður nevnt av, at Pætur Jákupsson, sum var løgmaður í Føroyum til 1601, hevur sett navn sítt á tað lóggávusavn, løgmannsstólurin í Føroyum hevur átt, tað, sum nú finnst á bókasavni lærda háskúlans í Stockholm. Í tí eru bæði Landslógin og Seyðabrævið á fornum máli. Hin triðja lógin, Føroyingar tá nýttu, var *íslendski stóridómur*. Hann finnst í handritinum, A. M. 316 fol., á handritasavninum eftir Árna Magnusson í Keypmannahavn undir teirri føroysku lógardeildini á fornum máli. Stóridómur varð viðtikin á Øksarátingi 1564 og fekk sína staðfesting av kongi árið eftir á donskum máli, men undir teirri føroysku deildini í hesi løgbók finnst henda staðfesting á fornum máli, og handritið tykist at vera liðugt gjørt um ár 1600 av Gabriel Mitens, sum var føroyskur tingskrivari. Enn eftir miðjuna av 16. øld hava Føroyingar tí ætlandi viljað havt lógir sínar skrivaðar á fornum máli; annars vildi staðfestingin av stóradómi óivað verið á donskum máli, soleiðis sum hon er endurgivin í íslendskum lógarsavni eftir Oddgeir Stephansen og Jón Sigurðsson 1853. Sum áður ávíst er Stóridómur viðtikin á løgtingi 1584 og tá settur í gildi fyri Føroyar.

Í 1604 kom hin norska løgbókin á donskum máli í staðin fyri landslóg Magnusar løgbøta eisini stórt tikið at galda fyri Føroyar, men fyrst í 1637 fekk Seyðabrævið, henda elsta og mest sermerkta før-

[1]) N. A. Fær., bls. 180. [2]) Sjá *Úr Føroya søgu um ár 1700* eftir Louis Zachariasen um uppgerðina av landsins kistu 1709. [3]) Sjá *Diplomatarium Færoense* eftir Jakob Jakobsen bls. 52.

oyska lógin, danskan málbúna, tó soleiðis, at allar ásetingar í hesi lóg, sum ikki viðvíktu seyðahaldi, fullu burtur[1]). Við hesum tiltaki má danskt rættarmál sigast at vera vorðið einaráðandi í Føroyum. Kortini hevði alt skrivligt, sum kom frá Føroya rætti tá í mong ár verið skrivað á donskum máli. Ein skuldi trúð, at Stóridómur, sum Føroyingar upprunaliga høvdu á fornum máli, varð týddur til brúks í Føroyum um somu tíð, men søguligt prógv er einki fyri tí. Fransar rændu Tinganes 1677 og tóku tá upprunaskjalið úr Føroyum av *Stóradómi.* Tá varð fingin til vega úr Føroyum donsk týðing av hesi lóg. Í brævi 4/5 1682 til kongs tekur Fr. Gabel soleiðis til: «. . . haver jeg . . . en kopi af forn. *Store islandske dom* tilvejebragt . . . og beder allerunderdanigst, at der contentu med den forøvrigt af landet allerunderdanigst indskibede kopi måtte kontereres og derpå efter dets rigtig befindelse Eders kongl. majestæts allernådigste konfirmation udfærdiges . . .»[2])

Sum nevnt vísir løgtingsbókin 1615—54 fleiri ferðir á, hvat ið stendur í gomlu tingbók, men hitt elsta árstalið, sum har er nevnt, er 1557. Tað er innført í tingbókina undir 1617. Sylvester Simonsøn, sum sæst at hava verið sýslumaður í Vágum 1584, var stevndur av Antonisi Heindrikssyni og Lavarsi Ellendssyni eftir jørð, hann hevði sitið við, men Sylvester hevði ikki verið møttur á tingi. Sín óðalsrætt til jørðina átti hann at prógva við vitnum um, at «Philippus var sira Joens frilledatters søn.» Tingbókin 1617 sigur:

«Men det bevistes med lovlige vidner, som her på lagtinget er både båren og vidnet anno 15 . . ., som et vidnesbyrdsbrev derom formelder. Justinus Joensøn af Fuglø og Joen Guttormsøn, greven udi Kollefjord, den tid derom båren og vidnet haver, at sira Joen og Gunnar Joensøn var fulde brødre og byttede deres odel sig så imellem, at sira Joen skulde have sin odel udi Suderøen og hans broder her for norden udi Østerøen å Hoygem, og dette deres odelsbytte stod så dennem imellem deres levetid, så ingen ankede derpå i nogen måde, som det vidnesbyrdsbrev der videre om formelder. *Item findes* udi den gamle tingbog indskeven anno 1557 udi salig Guttorm Andersøns tid en sentens sålydende. Blev disse sager afsagt på rådstuen udi Thorshavn.

Joen Guttormsøn klagede på 6 marker jord, som hannem var sket forkort udi af Philippus udi Myggenæs, og samme jord havde hans fader løst igen og nu findes ingensteds. Da blev dom afsagt for retten, at de skulde dele den jord, som vis er, og søge efter den jord, bort er kommen, og siden dele den igen.»

Antonis og Lavars fingu jørðina, teir søktu um frá Sylvester, ið á tveimum tingfundum áður ikki var møttur fram fyri at verja sín rætt, og hann kundi ikki fáa hana aftur, uttan hann sjálvur møtti fram við nýggjum prógvi fyri sín ognarrætt. Hesin tingfundur er váttaður av 5 løgrættumonnum og løgmanni, altso hálvari tylvt.

Hetta tingskjalið vísir heilt aftur í hina katólsku tíðina. *Sira* Joen hevur ætlandi verið prestur í Suðuroy, tí fekk hann arv sín har. Eins

---

1) N. R. R. undir 24. febr. 1637; L. D., útg. «Fram»s, bls. 253. 2) D. D. D. A.; D. D. K., C 21.



og teir katólsku prestarnir á Íslandi hevur hann verið nevndur *sira* og havt frillu. Maður, ið er sagdur at vera dóttursonur hansara, Philippus Gregersøn, var festari á Túali í Mykinesi 1584—90. Hann er í hvørt fall horvin, helst deyður, ár 1600, tí ikki sæst sonur at hava tikið festið eftir hann. Um hesin Filippus doyði sum gamal maður, kann móðir hansara ætlast at vera fødd um ár 1500. Tá skuldi *sira Jóan* staðið í sínum manndómi. Eftir Chr. Djurhuus próst sigur N. Andersen í bók síni *Færøerne,* at ein bróður Andras var prestur í Suðuroy um siðaskiftið og gjørdist lutherskur prestur.

Jústinus Jóansson í Fugloy og Jóan Guttormsson í Kollafirði høvdu altso givið vitnisburðarbræv frá sær á tingi 1557. Tað má hava verið til í 1617, tí lagt verður aftrat, at somuleiðis — item — er innført í gomlu tingbók 1557. Orðið «sålydende», sum endar setningin um gomlu tingbók verður ætlað at vísa fram á «vidnesbyrdsbrev» og ikki aftur eftir. Tingbókin hevur nærsagt onga teknseting uttan *komma* og als ikki linjubrot.

Í nevnda skjali er tvær reisur bent á árstal. Hóast hitt fyrra bert er skrivað við 15 og tveimum prikkum aftan fyri og hitt seinra við øllum tølunum 1557, tykist skjalið í báðum førum at benda á sama árstal. Skrivingin av talinum 1557 vísir týðiliga, at fyrst hevur skrivarin innført 15 við tveimum prikkum aftan fyri; seinri hevur hann innført 57 fyri prikkarnar, sum enn eru sjónligir í opninginum á 5- og 7-talinum í erva. Henda rættingin er eins og undirstrikingin av orðunum: *item findes,* gjørd við myrkari blekki. Skrivarin, Gabriel Mitens, hevur í síni innføring í tingbókina undir 1618 nýtt slíkt myrkari blekk. Annað dømi, sum vit skjótt skulu koma til, er um, at skrivarin má hava havt eldri tingbók fyri sær 1618, tá hann hevur ført inn frágreiðsluna um, hvat hent er á tingi hetta ár.

Sum sagt er gamla tingbók nevnd fleiri ferðir í tingbókini 1615—54, men bert undan árinum 1620, tað árið, Gabriel Mitens segði seg frá sum tingskrivara. Undir árinum 1615 er bent á tingviðtøkur í 1610 og 1613, uttan at víst verður á nakra tingbók. Tingbók, sum endaði 1615, hevur ivaleyst tá verið har. Eisini í 1616 verður víst á gomlu tingbók viðvíkjandi «salige Magnus Heinesøns købe- og pantebreve, som var hid ført i landet af salige Søren Islænder anno 15 . . ., derom formelder, som findes registreret og indskreven udi den gamle tingbog.» Skrivarin hevur tá ikki havt tingbókina fyri árini eftir 1590 fyri sær. Vit vita, at Søren Islænder var keypmaður og fúti í Føroyum 1592—96 og fúti 1598. Undir 1617 er sum nevnt árstalið úr gomlu tingbók rættað aftan á, men árstalið úr gomlu tingbók undir 1618 er harímóti skrivað fult út beinan vegin, og hetta er prógv fyri, at skrivarin má hava havt gomlu tingbók fyri sær, tá hann innførdi árið 1618. Hartil kemur, at rættingin í árstalinum undir 1617 er gjørd við sama blekki, sum skrivarin nýtti 1618. Hetta árið má tingskrivarin hava leitað gomlu tingbók fram úr landsins kistu. Undir 1618 sær ummælda innføring soleiðis út: «Og herimod haver forn. Lisabet kaldet forn. Wendell en tyvs (tious) unge, thi det *befindes indtegnet* udi den gamle tingbog 1591, at forn. Wendells fader, Mattis Christofferson, var feld for 3 souder, som han var skyldet føre, at bøde

4 mark sølver til kongl. majestæt for et felle.»[1]) Ætlandi eitt brot ella seyðastuldur. Undirstrikingin her sum undir 1617 bendir á, at skrivarin veruliga hevur hugt í hina gomlu løgtingsbókina.

Illa ber til at látast sum einki um, hvat tingskrivarin her hevur givið til sjóndar, og annars bert at lurta eftir, hvat gamlar manna-sagnir halda seg vita um rán av landsins kistu.

Ymist í løgtingsbókini bendir á, at vártingsbøkur eisini hava verið førdar fyri hetta tíðarskeiðið. Stórt sakarmál á løgtingi 1622, sum Mikkjal í Lamba førdi móti Eysturoyar tingmonnum, vísir, at vár-tingi í Eysturoy hetta árið má hava ført bók. Mikkjal í Lamba, sum nýliga var vorðin sýslumaður í Eysturoy, var ikki møttur á hesum vártingi. Eysturoyar løgrættumenn søktu á hesum vártingsfundi harðl-iga at Mikkjali við orðum, sum vóru mannminkandi fyri hann. Teir nevndu hann «en hykler, en falskner eller bagvasker» og lótu enntá hesi orð bókføra. Soleiðis sigur løgtingsbókin, men í hana finnast hesi orð ikki innførd uttan í stevningini frá Mikkjali. Táið Mikkjal í stevning síni bendir á hesi ræðuligu orð um hann, sum innførd eru í tingbók, má tað vera ein onnur bók enn løgtingsbókin 1615—54, vit nú kenna.

Undir 1641 er eisini innført í løgtingsbókina frá Sandoyar sýslu:

«Jacob Danielsøn lod læse et udtog af tingbogen anlangende no-gen jord, han opbød til næste arving.»

Beint aftan á stendur:

«Johannes Hanssøn lod læse et udtog af tingbogen om nogen jord, ham og Christine Joensdatter imellem er. Bleve forligte, at Johannes skal give hende en ko og otte gylden, og dersom hun det ikke vil annamme, da at beholde det hos sig til videre beskeden.»[2])

Hetta, sum her varð lisið upp úr tingbók, stendur ikki í løgtings-bókini 1615—54. So má tað hava staðið í eini vártingsbók.

Av nevndu orsøkum noyðast vit at rokna við, at javnbjóðis við løgtingsbókina í hesum tíðarskeiði hevur vártingsbók verið førd, og at tað eru úrdrøg úr henni, sum víst verður á. Slíka vártingsbók kenna vit ikki, men hon skuldi altso verið í Føroyum 1641.

Síðst undir 1619 er innført skotsmál, løgtingið gav Jóhannesi Tor-leivssyni 16. aug. hetta ár, og viðmerkt er beint aftan á:

«Dette blev læst på Østerøs vårting anno 1620 udi lagmandens, k. m. herredsfogeds, desligeste lagrettesmændenes nærværelse og på-hørelse og samme tid samtykt.»[3])

Óivað hevur hetta nakað við tað at gera, at Jóhannes Torleivsson fór frá sum sýslumaður í Eysturoy um hetta mundið. Løgmaður var møttur á hesum vártingsfundi, ivaleyst sum dómari, og eisini Streym-oyar sýslumaður (herredsfoged). Av tí at eingir bókførdir vártings-fundir úr fyrra parti av 17. øld nú eru at finna, er ringt avgjørt at siga, nær tingskrivarin hevur vunnið sítt dómaramæti á vártingum, helst fyrst seinri.

Tingfundirnir, sum endurgivnir eru í løgtingsbókini 1615—54, hava ikki beinan vegin verið førdir inn í bók. Teir hava verið skrivaðir niður á leys skjøl, og aftan á hava skjølini verið førd inn í bókina.

[1]) Lb. fol. 52 a. [2]) Lb. fol. 258 b. [3]) Lb. fol. 80 a.



Skjølini vóru beinleiðis undirskrivað av løgmanni og løgrættumonnum, og innsigli teirra vóru viðheft. Í tí skili skuldu tey verða send av-varandi til kunngerðar. Løgtingsbókin er tí øll gjørd í avriti við tingskrivarans handskrivt. Sum dømi skal verða nevnt skjalið frá 1626 um kolakanning í Suðuroy, sum Suðuroyar tingmenn gjørdu, skrivaðu síni nøvn og settu síni innsigli undir. Tað stendur orðrætt ført inn í tingbókina við teirri viðmerking, at innsiglini standa undir, men í bókini eru eingi innsigli. Sjálvt tingskjalið finnst nú á ríkis-skjalasavninum í Keypmannahavn, og á tí standa innsiglini.

Í tingbókini eru dømi um, at tingskjølini ofta hava ligið í langa tíð, áðrenn tey hava verið førd inn í løgtingsbókina. Viðhvørt tykjast tey at hava ligið ár ella meira.

Miðskeiðis undir 1616 eru innførd tvey mál frá 1617, og eingi tekin eru til, at hesi mál eru innførd í løgtingsbókina aftaná. Einasta óvanliga við hesum málum í tingbókini er, at á vinstra breddanum uttan fyri málini er árstalið *1617* tvær reisur skrivað, og tað er einki at ivast í, at henda viðmerkingin er gjørd fyri at vísa, at málini eru skeivt innførd undir 1616, tí viðgerðin av teim er hend í 1617. Hetta kann ikki vera hent á annan hátt enn, at innan tingskjølini frá 1616 eru innførd í løgtingsbókina, hava tingskjøl frá 1617 longu verið gjørd. Nevndu skjøl frá 1617 eru tá á ein ella annan hátt vorðin blandað saman við skjølini frá 1616 og, áðrenn skrivarin hevur ansað tað, førd inn í tingbókina við hesum skjølum. Týðuligt er á inni-haldinum, at hesi tvey skjølini eru komin frá vártingunum 1617:

«Christoffer Jouckeson udi Lervig for løselevned med Magdalene Olofsdatter, ere slægt udi 3. led på både sider, bøde til kongl. maje-stæt hver 3 mark sylvr, benådet på 6 gylden for deres fattigdom.»

«Mattis Throndeson udi Norderdal for hor sag med W. Jonas-dotter udi Bø ved Kirkebø, han bøde til kongl. majestæt for enfalt hor ........................................ } 25 gl.»[1])
og kvinden ................................... }

Beint undan hesum málum stendur innført mál frá 5. aug. 1616. Av hesum kann ætlast, at løgtingsskjølini frá 1616 eru ikki bókførd, fyrrenn eftir ólavsøkutingsetuna 1617. Ætlandi hevur ikki bókføringin av tingskjølunum hvørt ár verið gjørd so langa tíð aftaná. Serlig viðskifti kunna hava verið til staðar her, t. d., at tingskrivarin kann hava verið burturstaddur eina tíð.

At øll tingskjølini, sum skrivað hava verið á tingi, eru komin inn í løgtingsbókina, hava vit onga vissú fyri. Hugsast kundi, at ting-skjal stundum kundi hava verið gjørd. Í hvørt fall síggja vit, at tey leysu skjølini, sum innførd eru í tingbókina, minni enn so altíð hava ligið tíðarrætt fyri. Fyrri dagur í árinum er ofta seinri innførdur. Nógv av tingskjølunum eru als ikki dagssett í tingbókini.

Íðuliga er løgtingið í hesum tíðarskeiði ikki sett á ólavsøku, men bert eina ferð á miðjum sumri. Táið so hevur verið, hevur løgtingið ofta verið sett millum søkurnar (24. juni og 29. juli), hendinga ferð eitt sindur eftir ólavsøku.

[1]) Lb. fol. 17 a.

Í 1618 tykist løgtingið at verða sett á ólavsøku. Fyrsta skjalið í tingbókini hetta árið er bert nevnt undir juli, men annað skjalið er dagssett 30/7. Tingið vardi tað árið bert nakrar dagar inn í august. Í 1619 byrjar tingið harímóti 12. august og tykist at hava sitið til hin 20. Síðan er undir 23. september innført ummæli frá nøkrum tilkallaðum løgtingsmonnum um nakað ringt mjøl. Aftaná hetta kemur aftur innføring av málum frá 17. og 16. august. Ein orsøk til, at løgtingið kom so seint saman hetta árið, var kanska tann, at fútin var sjúkur, og at fulltúi hansara at endanum møtti fyri hann.

Hyggja vit at tingbókini undir 1622, er løgtingið hetta árið komið saman 23. juli, og undir 1625 finna vit 14. juli. Í 1632 sæst tingið eisini at vera komið saman 14. juli. Í hasum tíðarskeiði verður løgtingið kanska oftast sett á ólavsøku. Í 1640—41—42 er tingsins samkomudagur soleiðis ólavsøkan, men í 1643 er hann aftur 23. juli. Í 1644 er bert eitt tingmál innført, og tað er dagssett 4. august. Aftur í 1645—46—47 hava vit ólavsøkutingið, men í 1648 møtir tingið 11. juli. Ólavsøkutingið gongur so aftur til 1654; tó er fyrsti innførdi tingdagur undir hesum ári 1. august.

Í 1651 síggja vit, at løgting verður hildið í Kirkjubø, men tingbókin gevur onga grund fyri tí. Lucas Debes kom til Føroya hetta ár, og hann sigur í bók síni 1673, at 1651 var ringt pokuár í Føroyum. Harav kunna vit ætla, at pokurnar hava gingið ringar í Havn um ólavsøkuna 1651, men vóru tá enn ikki komnar til Kirkjubøar.

Eftir tingbókini at døma hava menn í fyrra helmingi av 17. øld ikki hildið heilt fast um ólavsøkutingið, men fjøld av fólki man tó hava hildið fast um tað; tí varð ólavsøkan seinri altíð hin vanligi tingsetudagurin. Óivað er tað soleiðis, at eftir siðaskiftið hevur hin lutherska kirkjan í Føroyum roynt at fáa ólavsøkutingið avlagt, tí hetta tingið minti ovnógv um hitt katólska halgimenni, Ólav kong. Heldur ikki var tað fyriskrivað í galdandi lóggávu, at Føroya løgting skuldi koma saman ólavsøkudag. Í norsku løgbókini stóð, at løgtingini skuldu koma saman á miðsumri. Hini norsku løgtingini komu heldur ikki saman ólavsøkudag. Ólavsøkutingið tykist at hava kirkjuligan katólskan uppruna í Føroyum, og gjøgnum 500 ár hevur tað sett seg so fast í hina føroysku fólkasálina, at myndugleikarnir kundu enntá ikki fáa bukt við tí. Heilt upp at okkara døgum hevur tað verið soleiðis, at leiguárið hjá kongsbóndum gekk frá ólavsøku til ólavsøku, ólavsøkuárið. Tá skuldi leigugjaldið verða goldið, og ivaleyst hevur hetta eisini sín uppruna í teirri katólsku tíðini. Kirkjan átti tá meginpartin av leigujørðini, og ásetingin um, at leigan skuldi vera goldin á ólavsøku, hevur óivað longu tá verið til staðar. Munkastovan man hava verið leigubúð kirkjunnar. Í teirri katólsku tíðini mega vit hugsa okkum allar 36 løgrættumenninar við løgmanni á odda á ferð heim til Kirkjubøar ólavsøkudag fyri at halda gudstænastu í kirkjuni har saman við bispinum. Í Havn var tá eingin kirkja, kanska bønhús. Á hesum deyðadegi Ólavs kongs hevur halgimenni, Ólavur kongur, verið løgtingsins verndarandi, og so statt hevur bispur við sínum klerkum aftaná morgunmessu í Kirkjubøar kirkju saman við løgmanni og løgrættumonnum farið til Havnar, fyri at løgtingið eftir gomlum siði kundi verða sett har. Vit fáa líka um endan av



teirri katólsku tíðini í Føroyum, táið Kristian kongur III 1535 í brævi heilsar Ámundi Ólavssyni bispi við Gudi og *sankta Ólavi kongi.* Einki vita vit um, at Ólavur kongur heilagi átti part í serligari føroyskari lóggávu, og tað er eisini illa hugsandi, men vit vita, at hann átti part í Gulatingslógini, endurtikin í Landslógini, sum kom at galda fyri Føroyar, og sum í skjølum verður kallað «skt. Olavs lov.»

Tað kann einki vera at meta um, at okkara elsta varðveitta løgtingsbók er avritað eftir leysum gomlum tingskjølum. Undir 1618 standa soleiðis tvey skotsmál hvørt eftir annað innført í løgtingsbókina: fyrst eitt hjá Guttormi Nielssøn og so eitt hjá Corneliusi Jørgensøn. Nakað miðskeiðis í hinum seinra skotsmálinum, men heldur seint í tí hevur tingskrivarin mistikið seg og er farin at føra inn úr skotsmálinum hjá Guttormi Nielssøn. Eftir at hava skrivað 8—9 reglur, sær hann mistakið, setur strikur yvir tað skeiva og heldur fram við teirri sonnu tekstini. Í 1522 er váttan frá Eysturoyar tingmonum í sakarmálinum við Mikkjal í Lamba tvær reisur innførd á rað. Seinri er sett við aðrari handskrivt á breddanum við hina fyrru innføringina: «NB. er tvende gange indført.» Her er so ikki at ivast í, at einki hevur verið skrivað inn í løgtingsbókina á tingfundunum, og ógvuliga ivasamt er, um bókin yvirhøvur hevur verið til staðar á tingfundunum. Tær innføringarnar í bókina, sum ikki beinleiðis eru sakarmál, hava ætlandi eisini verið skrivaðar niður á leys skjøl, áðrenn innføringin í bókina er gjørd. Annars hevur slík innføring í bókina bert verið gjørd eftir minninum um tað, sum hent var á tingi, og táið innføringin sum áður nevnt ofta er hend langt eftir tingfundin, hevur møguleikin fyri at minnast eitt sindur skeivt verið til staðar og enn meira møguleikin fyri at gloyma nakað burtur. Valla kann tó ætlast herav, at munandi søguligur skeivleiki hevur fingið loyvi at koma inn í hesa elstu løgtingsbók okkara. Heldur man tað vera soleiðis, at minkað hevur verið um einstakar søguligar hendingar.

Í Noreg var tað soleiðis, at ríkisstýrið fyrst við skrivi 1633 mælir løgtingunum til at taka sorinskrivaran til dómara í vanligum málum. Longu í 1634 kom skipan, ið mestsum gav sorinskrivarum í Noreg alt dómsvaldið. Í Noreg misti løgmannsstarvið skjótt allan týdning sín, meðan løgmaður í Føroyum framvegis var dómari á løgtingi, men á vártingunum er hann ikki møttur, eftir at nýggj tingbókførsla byrjaði frá 1655. Av tí at hendingarnar í Føroyum altíð hava ligið væl aftaná, at tær eru farnar fram í Noreg, mega vit halda, at Jóan Jústinusson løgmaður upp at ellisárum eisini hevur virkað sum dómari á vártingunum. Í 1647 síggja vit, at Jóan Jústinusson hevur virkað sum dómari á heysttingi í Hvalbø í jarðarstríði har á staðnum, men av tí at løgrættumenn uttan fyri Suðuroy eisini vóru við har, noyðast vit at halda, at hetta tingið má hava verið løgting.

Taka vit nú eitt yvirlit yvir, hvat løgtingsbókin 1615—1654 sigur okkum um eldri tingbókførslu, noyðast vit at halda, at *gamla tingbók* — í hvørt fall tíðarskeiðið 1557—1614 — hevur verið til staðar í Føroyum í minnsta lagi til 1618, og at vártingsbók hevur verið førd við síðuna av løgtingsbókini 1615—54, men at báðar hesar bøkurnar — tær kunna hava verið fleiri — síðan eru horvnar. Illa ber tá til at hugsa, at tað eru fremmandir sjórænarar, sum eru farnir av-

stað við teimum í hesum tíðarskeiði. Um so var, vildi løgtingsbókin 1615–54 ella seinri tingbøkur nevnt okkurt um tað. Táið Lucas Debes, sum kom til Føroya í 1651, í bók síni 1673 skrivar um rán av landsins kistu, er tó einki at ivast um, at slík søgn hevur gingið á mannamunni tá, men Lucas sipar um 100 ár aftur í tíðina. Ein møguleiki er tá tann, at slík søgn bendir á eina hending sum kann vera farin fram um 1550. Annar møguleikin er, at tann persónurin, sum hevur verið atvold til, at hesar tingbøkurnar eru horvnar, hevur loypt út í orð, at tær eru tiknar av sjórænarum. Stutt eftir at Balzar Jacobsøn, illi løgmaður kallaður, í 1655 tók við starvi stendur bókført, at hann «havde brødet op landsens skrin,» men hvat ið var hent tí, sum í skríninum var, sigur tingbókin einki um, tí meira er ikki bókført um málið. Søguligt prógv fæst ikki fyri nøkrum, men vit vita bert, at Balzar Jacobsøn drakk illa, og at hann var ein óhøviskur persónur. Tað tykist í teirri tíðini at hava verið soleiðis, at fútin skuldi hava landsins skrín í varðveitslu. Í bók síni um Føroyar frá 1809 sigur J. Begtrup, at fransar 1678 rændu landsins kistu, men løgtingsbók aftur til 1615 er tó enn til staðar.

Frá 1655 til 1690 eru løgtingsfundirnir og vártingsfundirnir mestsum førdir inn í somu tingbók; men eftir 1690 eru løgtingsfundirnir førdir í bók fyri seg og allir vártingfundirnir í aðra bók. Í Balzars Jacobsøns løgmannstíð hava vit tvær tingbøkur við nærum sama innihaldi. Annars kann verða ávíst, at í hesi tíðini, tá henda blandingsbókførsla fór fram, eru bæði tingfundir og mál burtur úr gloppin. Undir 1677 er soleiðis bert innførd ein løgtingsseta í jan. Víst verður stundum aftur á áður viðgjørd mál, sum ikki eru at finna.

J. C. Svabo tekur einastaðni til í sínum skrivtum, at fútin Hammershaimb, sum virkaði fyri og eftir ár 1800, hevði sagt fyri sær, at meðan abbi hansara sum unglingi var hjá Fríðriki Gabel, mintist hann, at hesin hevði fingið nakrar handritaðar bøkur úr Føroyum til láns. Næst liggur tað ikki fyri at hugsa, at hetta hevur verið tingbøkur, hóast tað ikki er óhugsandi; nærri liggur tað fyri at hugsa um jarðarbøkurnar, sum frá 1653 upp ígjøgnum meginpartin av Gabelstíðina ikki longur eru at finna.

Frá tíðini 1655–1690 eru fylgjandi tingbøkur til skjals enn:

1. Løgtings- og vártingsbók 1655–1661.
2. Løgtings- og vártingsbók 1656–1666.
3. Løgtingsbók 1666–1677.
4. Løgtings- og vártingsbók 1667–1690.
5. Løgtingsbók 1680–1690.

Í hesum tingbókum finnast persónligar undirskrivtir av løgmonnunum Jóan Pállsson og Johan Hendrik Weyhe. Annars hevur tingskrivarin skrivað alt, í bókunum stendur. Fyri tað kunna tær vera skrivaðar av eftir leysum tingskjølum eins og hin elsta tingbókin.

Stórt sæð mega vit halda løgtingsbøkurnar vera álítandi søguligar keldur, men ikki er tó at ivast í, at teir, sum hava avgjørt, hvussu innihaldið skuldi verða uppsett, viðhvørt kunna hava bent orðalagi eftir sínum tykki. Her kann í fyrsta umfari verða talan um fúta og løgmann. Táið Lucas Debes í 1672–73 førdi sítt stóra stríð móti Gabelsveldinum í Føroyum, kastar hann Gabels fúta, Søren Pedersøn, fyri, at hann hevði fingið bókføringina á tingi gjørda sær eftir vild.

# DEILD XI.

## *Gamlar føroyskar jarðar- og virðiseindir.*

### a. Formæli.

Hvussu føroysk jørð upprunaliga er løgd í merkur, sum aftur eru býttar í gyllin við skinnum sum minsta eind, er ringt nú at reiða út til fullnar. Vit vita, at 16 gyllin eru í eini jarðarmørk, og at 20 skinn eru í hvørjum gyllin. Eisini vita vit, at allur hin gamli bøurin hevur verið lagdur sundur í slíkar eindir, tó soleiðis, at gomul innangarðsjørð, sum í fleiri hundrað ár ikki hevur verið sundurarvað, t. v. s. festijørð, bert hevur ligið í mørkum, í einstøkum føri í hálvmørkum, táið festini hava verið soleiðis, og við undantaki í gyllin.

Markatalið í eini føroyskari bygd ella býlingi innangarðs hevur altíð ein avmarkaðan haga aftrat sær uttangarðs. Hesin hagi er aldri býttur í merkur, gyllin ella skinn, men áseyðurin, sum gongur í hagagum, kann vera lutaður sundur eftir innangarðsjørðini, og hagin er tá tað, vit kalla kenningarhagi. Kenning tykist at vera hin elsti rakstrarhátturin í føroyskum seyðabrúki og hevur væl sín uppruna í tí, at hagin ella hagaparturin av fyrsta sinni hevur verið eins manns ogn. Eftir landnámstíðina eru tær stóru hagavíddirnar á eins manns hondum sundurarvaðar; men ætla mega vit, at bygda- ella býlingahagarnir seinri eru hildnir felags, og í staðin fyri at býta hagarnar smærri er áseyðurin tá vorðin býttur. Hetta skuldi so verið upprunin til hitt gamla kenningarhaldið. Áseyðurin sæst tá at hava verið býttur í seyðamerkur.

Misbrúkið av kenningarhaldi í høgunum hevur verið stórt gjøgnum tíðirnar, og fyrsta kenda tiltakið til at steðga hesum misbrúki er Seyðabrævið frá 1298, sum er elsta føroyska serlógin, vit kenna. Reglurnar í hesi lóg hava verið í gildi upp at okkara døgum. Innan ár 1700 vóru tó nógvir menn í norðrara parti av Føroyum gingnir burtur frá hesum kenningarhaldi, serliga í Norðuroyum, og avgerð herum tykist at vera gjørd á løgtingi 2. aug. 1659. Flestir av teim norðraru høgunum komu tá skjótt undir felags rakstur, soleiðis at áseyðurin gjørdist felagsogn, og skurður og ull vórðu tá býtt eftir tí kenningarhaldi, sum verið hevði í haganum, á okkara døgum eftir marka- og gyllinatalinum innangarðs.

Nakrir gyllin og enntá merkur, t. d. í Vágum, finnast í Føroyum, sum ongan ognarrætt eiga uttangarðs. Hví tað er komið soleiðis fyri

er ringt at siga avgjørt, men hugsast kann t. d., at sumt av hesi jørð hjá uttanbýggjaeigarum ongan áseyð hevur havt á, táið hagin er lagdur í felag. Eisini kann hagi onkuntíð vera tikin frá innangarðsjørð og lagdur upp í sama haga,[1]) og endaliga kann væl hugsast, at hagi og bøur í miðaldri stundum hava verið arvað sundur hvør fyri seg. Søguliga kann verða víst á, at ein áttatiál í festinum Stovan í Skálavík innangarðs er løgd inn úr haga, men hevur samstundis eingi hagarættindi fingið. Hitt upprunaliga haga- og innangarðsbýti finnst valla nú á døgum. Ein bygd kann t. d. vera býtt í helvt ella triðingar, og partarnir kunna tó hava ymist gyllinatal. Mangt er hent við hinum upprunaliga býtinum, sum nú er ringt at greiða upp.

Góðskan av einum gyllin av jørð er langtfrá eins um allar Føroyar og støddin heldur ikki. Ein gyllin innangarðs hevur onga ávísa vídd. Hann er bert 1/16 av teirri mørk, hann liggur í, og sjálvt merkurnar í somu bygd eru ójavnar til støddar. Oftast er tað so, at tær óhøgligastu merkurnar eru størstar í vídd. Eisini sæst summar staðir, og sagnir eru um tað, at nakrar merkur eru minkaðar og aðrar vaksnar, av tí at menn hava velt um mark. Uttangarðs er eisini ymist, hvat ein mørk ber av seyði. Føroyingar kalla summar hagar hálvskipaðar og summar fullskipaðar. Fullskipaður hagi tykist at svara til 40 áseyðir á mørkini norðanfjørðs av nútíðar seyði, og hálvskipaður hagi skal so bera 20 á mørkini. Sunnanfjørðs tykist fullskipaður hagi at merkja 48 áseyðir á mørkini, meðan hálvskipaður hagi tá hevur 24 á mørkini. Hesir 40 áseyðirnir norðanfjørðs og 48 sunnanfjørðs samsvara hina gomlu seyðamørkina. Eftir bókini «Færøske kongsbønder» av A. Degn skuldi hetta mestsum verið reglan. Táið seyðamørk merkir áseyðavirðið í silvuri, koma fleiri áseyðir at vera í seyðamørkini,[2]) táið seyðaslagið er smátt. Útgrevstrar ymsar staðir í oyggjunum tykast at vísa, at í forntíðini og fyrra parti av miðaldri hevur eitt tílíkt smátt seyðaslag verið hildið í Føroyum, og tað er tí væl hugsandi, at tá hava verið nógv fleiri áseyðir í seyðamørkini. Eftir hesum, sum nevnt er, kunna vit ikki krevja, at innangarðsmørkin og seyðamørkin eru samanhoyrandi og upprunaliga tilsvarandi heiti. Vit finna eisini nú

---

[1]) Soleiðis hevur løgmannsgarðurin á Steig fingið 8 marka haga afturat. [2]) Í løg- og vártingsbók 1666—1690 undir 18. mars 1669 fol. 32a á Norðuroya vártingi er hetta bókført: «For retten fremkom Joen Josepsøn på Øre og på Zacharias Joensøns vegne, som havde opgivet sig til forn. Joen Josepsøn anlangendes et havt markfrælse udengårds, som lige til forne haver været udsat til salig Michel Joensøn i Lamhauge, for 20 søjder på Øre hagfast gåendes, og derfor tiltalede hr. Gregers Hanssøn, sognepræst i Strømø, som samme frælse på sine stifbørns vegne indehavde„ og tilbød forn. Joen Josepsøn hr. Gregers værd for samme søjd, da ere de for retten således forenede, at Joen Josepsøn skal give hr. Gregers Hanssøn 15 færøske gylden udi kramboder, eftersom frælset blev Joen Josepsøn tildømt.» Hetta hálva markfrælsið uttangarðs við 20 áseyðum er ivaleyst hin hálva gamla seyðamørkin, og eingin bøur er nevndur í samband við hesa hálvu mørk. Hagin á Norðoyri ber nú á døgum 12 áseyðir á mørkini. Løgtingsbók 1666—77, fol. 77, 7. aug. 1671: «For retten fremkom Jacob Guttesøn lagrettesmand på Myggenæs, som havde i rette ladet stævne Rasmus Stefansøns arvinger, Gåsedal, anlangende nogen arvejord, *et markfrælse udengårds*, som haver ligget uløst og ukært udi 64 år.» Skuldi verið frá 1607. Tá kann faðir Jákups, Stóri Gutti, Guttormur Jákupsson, vera fluttur út í Mykines av Ryggi í Miðvági. Dømini vísa, at áður í tíðini mega bøur og hagi hava verið hvør sær.



í Føroyum norðanfjørðs nógvar hagar, sum bera minni enn 20, og nakrar hagar, sum bera upp um 40 áseyðir á mørkini, táið vit rokna áseyðatalið í haganum samanborið við markatalið innangarðs. Í Suðuroy finnast enn fullskipaðir hagar við 48 á mørkini.

## b. Gomul føroysk virðismetan.

Norsk búseting í Føroyum í 8. og 9. øld gav landinum ikki bert gamalt norskt talumál, men fólkið roknaði sjálvsagt eisini við gomlum norskum jarðar- og virðiseindum, sum menn vóru vanir við í Noreg, innan teir fluttu higar at búgva. Í máli okkara hava vit enntá dømi um, at menn hava flutt ættarnøvnini óbroytt við sær til Føroya, hóast tey ikki her eins og í Noreg hóskaðu saman við landslagið í oyggjunum. Tað er týðuligt, at landnyrðingur, landsynningur, útnyrðingur og útsynningur eru gomul norsk ættarnøvn frá vesturlandinum í Noreg.

Í enn eldri tíðum, fólkaflytingartíðini, var gullið tað virðismetal, allar ognir vóru mettar eftir. víkingatíðini er hesin gullaldurin horvin, og silvur er komið í staðin sum alment virðismetal. Í hesi tíðini gjørdist silvurmørkin grundeindin undir allari virðismetan í norðurlondum. Soleiðis lógu viðurskiftini fyri, táið Norðmenn festu búgv her á landi, og øll víkingarríkini í norðurlondum nýttu hesa somu silvurmørkina.

Mørkin var upprunaliga ein vekteind, og silvurmørkin altso markarvekt í silvuri. Eftir jarðfunnum lutum hava menn roknað út, at hin forna norska mørkin hevur vigað 214,32 g. Tó viga teir jarðfunnu lutirnir ikki heilt eins. Í søguligari tíð fóru teir norsku kongarnir at útmynta silvurmørkina í peningar. Í eini silvurmørk vóru tá 240 peningar. Áttundaparturin av eini silvurmørk nevndist oyri. Oyrin var also 30 peningar, men eins og mørkin var oyrin eisini ein vekteind. Triðingurin av einum oyra nevndist ertog ella ørtog. Ertogin var altso 10 peningar. Oyrin var tá í dagligum lívi líka nógv nýttur sum vekt og virðiseind.

Táið silvurmørkin var útmyntað í peningar, hendi skjótt eitt fall í peningavirðinum. Kongarnir fóru at blanda kopar í myntsilvurið fyri at fáa fleiri peningar til vega, men hetta førdi bert við sær, at sjálvt peningavirði fall. Skjótt var ein mørk í peningi bert hálva mørk verd í reinum silvuri.

Hin føroyski frístáturin helt sær nøkurlunda óheftur av Noreg til 1035. Tá tók Leivur Øssursson Føroyar í len av norskum kongum, og oyggjarnar gjørdist norskt krúnland. Í allari teirri føroysku frístátstíðini hevði hin norska silvurmørkin í peningi sítt fulla virði; men longu um 1050, meðan Haraldur harðræði var kongur í Noreg, varð norskt myntsilvur fallið í helvtar virði. Hetta myntfallið steðgaði viðhvørt, men helt annars fram allan miðaldurin.

Táið Føroyar gjørdist norskt krúnland, er ivaleyst eitt skattagrundarlag gjørt fyri oyggjarnar við eini meting av føroyskari jørð. Harvið skal ikki vera sagt, at henda metingin ikki er umgjørd seinri.

Givið er tað í hvørt fall, at skattagrundarlagið hevur verið mett í silvurmerkur fornar, stundum kanska í eindina oyra.

Í miðaldri fekk hitt gamla tvær alnir breiða vadmali fast silvurvirði bæði í samanburði við forna silvurmørk og hina galdandi mørkina í peningi. Eftir at fall var komið á myntsilvurið, mettu menn ofta ymiskar vørur í reinari silvurmørk, sum teir kallaðu mørkin forn ella mørkin brend. Silvurmerkurnar, bæði hin forna og hin galdandi peningamørkin, fingu sítt fasta virði í alnatali av vadmali; men av tí at peningamørkin broyttist ella rættari sagt minkaði, var hennar mótvirði í alnatali av vadmali eisini minkandi, tó bert táið mett var eftir sama slag av vadmali, tí sløgini av vadmali í miðaldri vóru fleiri.

Ivaleyst er tað, at ein mørk av innangarðsjørð í Føroyum eina ferð nakað tíðliga í miðaldri hevur verið sett javnt við 320 alna virði í vadmali. Eftir í máli okkara hava vit enn orðið áttatiál — áttati alnir — sum merkir fjórðingsmørk. Fútaroknskapurin frá 1584, sum er hin elsti, vit kenna, nevnir eisini «15 alen jord.» Ivaleyst er eisini, at hin gamla seyðamørkin hevur sín uppruna í hini fornu silvurmørkini. Hin elsta íslendska løgbókin «Grágás», sum er úr forntíðini, setur silvurmørkina fornu javnt við 360 alnir í vadmali, meðan hin nýggjara løgbókin, «Jónsbók», ið er givin nakað um somu tíð sum hin norska landslógin (1274), metir hesa somu mørk í 288 alnir av vadmali.[1]) Sum vit síggja, liggur metanin av føroyskari jørð í alnatali miðskeiðis ímillum hesi tvinni íslendsku virðini. Grundir kundu tí verið fyri at halda, at henda jarðarmetanin í Føroyum er gjørd eina ferð miðskeiðis í 12. øld, men søguliga leysar eru hesar grundirnar at byggja á.[2]) Heldur fastari verða tær, um vit rokna við, at virðissetingin av føroyskari jørð er komin úr Noreg inn á Føroyar og gjørd eftir samtíðar íslendskum vadmalsprísi á norskum marknaði, tí meira enn føroyskt vadmal avgjørdi hitt íslendska norska uppfatan av, hvat henda vøran var verd. Helst er henda jarðarmetanin í Føroyum komin sum ein ásetan uttanífrá. Vit vilja síggja, at Føroyingar innanífrá gjøgnum løgtingið mega hava gingið ímóti hesi metan júst út frá føroyskum vadmalsprísi.

Um ta tíðina, tá norska landslógin varð gjørd, komu 6 alnir av vadmali at galda fyri lógoyra í norskum rætti, og hesin lógoyrin kom eisini at galda fyri Føroyar. Peningamørkin skuldi tá verið 48 alnir av vadmali verd. Hetta seksalna- ella lógoyrarvadmalið hevur valla nakratíð verið framleitt í Føroyum, men á norskum marknaði var hetta vadmali vanligt um ta tíðina. Seinri tykist at hava verið minni av tí. Vit mega rokna við, at Føroyingar í hvørt fall í eldra miðaldri bert hava framleitt myrkamorreytt vadmal. Hitt gamla smáa føroyska

---

1) Mørkin í gulli er bæði í «Grágás» og «Jónsbók» mett javnt við 2880 alnir í vadmali; men meðan «Grágás» setir silvurmørkina = 1/8 av gullmørkini, setur «Jónsbók» silvurmørkina = 1/10 av gullmørkini. 2) Sv. Aakjær: Maal og Vægt, bls. 161. Eftir «Grágás» vóru jú í forntíðini á Íslandi 2880:8 = 360 alnir í silvurmørkum. Tá innangarðsjørð í Føroyum á fyrsta sinni hevur verið skuldsett og mett hava 2880:9 = 320 alnir verið í silvurmørkini. Eftir «Jónsbók» vóru um 1274 á Íslandi 2880:10 = 288 alnir í silvurmørkini. Føroysk innangarðsjørð tykist soleiðis mett eftir eini silvurmørk, sum var 1/9 av gullmørkini ella 320 alnir í vadmali.



seyðaslagið, sum nógvar fornleivdir eru funnar av, var svart at liti. Tað helt sær á oynni Lítli Dímun til 1868, tá tað har varð skotið niður sum vargur. Sørt man tað kortini ikki vera blandað upp í hin seinri innflutta seyðin.

At hetta ásetta lógoyravadmali í hvørt fall ikki hevur funnist í Føroyum um ár 1300, vísir tann 20 alna taksturin fyri leiguna av seyðamørkini, sum kemur fram í Seyðabrævinum 1298. Hetta er jú sama leigan í vadmalsvirði, sum gongur aftur í jarðabókunum frá 1584, og tað kann tí einki vera at ivast í, at 20 alnir har merkja oyran av einum silvurmarkarvirði, sum var 160 alnir og ikki 320 alnir av vadmali. Seyðabrævið var jú ein føroysk sérlóg, og táið tað hevur roknað við einum 3-alnavadmali í oyranum, man tað vera tí, at hetta hevur verið vanligt føroyskt vadmal. Sum áður ávíst man uppskotið til Seyðabrævið vera gjørt í Føroyum. Onkur vil kanska siga, at tá Seyðabrævið var umsett á danskt mál 1637, vóru 20 alnir umsettar við 1 gyllin, og tí man lógin kortini hava roknað við 6-alna oyranum. Hartil kann verða svarað, at tað broytir ongan veruleika, at týðarin av Seyðabrævinum hevur roknað við 6-alna oyranum, sum var vanligur í gamlari norskari lóggávu, og at seyðaleigan, sum 1584 var 2 gyllin á seyðamørkini, kundi ikki vera helvtina minni um ár 1300. Eftir vanligari mannagongd í samanburði við Noreg átti hon heldur at verið helvtina størri um ár 1300. Aftrat kemur, at gamal føroyskur rættur alt tað, vit vita um, hevur dømt menn í bót eftir 3-alna oyranum. Tað vil siga, at hin føroyski løgrætturin hevur nýtt eina 24-alna mørk í føroyskum vadmali svarandi til hina norsku 48 alna mørkina. Í seinri helvt av 15. øld er líkt til, at ein alin av føroyskum vadmali er mett javnt við 2 føroysk seyðaskinn. Tá er ætlandi nýtt seyðaslag komið í Føroyum, burtursæð frá teim «svartafylgjum», sum eftir mannasøgn einstøk hava verið av longri upp í tíðina. Lítla Dímun hevði sum nevnt hitt smáa svarta seyðaslagið til 1868. Á henda hátt kom ein alin av tí vadmali, sum hevði ligið til grund fyri 6-alna oyranum, at fáa sama virði sum eitt føroyskt seyðaskinn, og hetta má hugsast at vera atvoldin til, at skinn sum virðismetari í Føroyum er komið inn fyri alin í vadmali. Skinn fyri alin sum virðismetari merkir tí einki prísfall á føroyskari jørð. Skinnið hevði tá sama virðið sum 1 alin av 6-oyravadmalinum.

Landslógin galt í Føroyum til 1604. Tá kom í staðin hin Norska løgbókin givin av Kristiani kongi IV, og ásetingarnar í hesi lóg vóru í flestu førum tiknar eftir Landslógini. Avvikini vóru mest málslig og slík, sum tíðin kravdi.

Til skjals enn á døgum eru fútaroknskapir úr Føroyum, sum ganga aftur til 1584, og í hesum roknskøpum standa allar tær bøtur, Føroya løgrættur hevur dømt kongi til bæði eftir Landslógini og eftir hini Norsku løgbókini, og her vísir seg eingin munur á teirri virðismetan, løgrætturin hevur gjørt eftir hesum báðum lógum. Hin gamla norska 48-alna peningamørkin er av løgrættinum gjørd til eina 48-skinna peningamørk. Soleiðis síggja vit eisini, at hin føroyski lógoyrin er mettur í 6 skinnum og ertogin í 2 skinnum. Hesi gomlu nøvnini verða ofta nýtt í dómsgerðunum við síðuna av gyllin og skinnum. Sum ávíst skal verða seinri, tykist upprunin til hin føroyska gyll-

inin at vera hin rínski gyllinin í seinra parta av 15. øld, mettur í tveimum loddum av silvuri. Hin elsti 2 lodda silvurdálin, Joachimsdálin, sum útmyntaður var í Týsklandi um somu tíð, fekk sítt silvurvirði eftir hesum gyllinum. Gjøgnum handil við Hamborg tykist gyllinsmetanin at vera komin inn í Føroyum í tíðarskeiðinum 1450—1480. So mikið av eini føroyskari vøru, t. d. vadmal, skinn, fiskur, fjøður, tálg o. s. fr., sum kostaði 1 gyllin í peningi, fekk tá navnið ein føroyskur gyllin ella bert ein gyllin, og hugsað varð ikki meira um upprunavirði í silvuri ella gulli. Í 200 ár hava Føroyingar mestsum kunnað hildið fast við sítt upprunaliga gyllinsvirði í føstum takstum bæði á útfluttum og innfluttum vørum, og enntá í o. u. 350 ár hevur hesin føroyski gyllinin verið nýttur mestsum einasti virðismetari í Føroyum. Peningametanin í Danmark og Noreg legði seg við aðrari ávirkan úr Týskalandi frá miðaldri til nýggjari tíð á dálan, sum skjótt gjørdist høvuðsmynturin í dansk-norska ríkinum. Fyrsta silvurvirðið av honum varð sett eftir hinum gamla týska dálanum.

At Føroyingar hava hildið fast við sína egnu gomlu virðismetan bæði í handli og á tingi, síggja vit av handilstaksti og av bótum, løgrætturin dømdi menn í. Øðrvísi hevur tað gingið í Noreg. Har hevur virðismetanin av markarbót eftir gomlum lógum t. d. minkað við peningafallinum. Ár 1600 galt landslógin enn í Noreg. Tá var 1 mørk í bót til kongs har roknað = 1 lodd í silvuri = ½ dála, soleiðis sum sæst av «Leidang og landskyld»[1]), meðan 1 mørk við løgrættin í Føroyum tá galt 2 gyllin og 8 skinn ella 4,8 lodd av silvuri eftir upprunavirði.

Enn nøkur orð um, hvørja søgu gyllinsmynturin hevur havt. Í 1252 var mynturin *florin* fyrstu ferð sligin í Florence í Italiu við eini gullvekt av 3,537 g. Við handlinum gjøgnum Miðeuropu kom hesin mynturin norður um Alpurnar, og fekk hann har navnið gyllin, av tí hann var av gulli. Prógv hava vit einki fyri, at hesin florentinski gyllinin um ár 1300 hevur verið nýttir á okkara handilsleið Bjørgvin, og óhugsandi er, at tað er av hesum myntinum, hin føroyska gyllinseindin er komin. Tíð mátti eisini ganga, innan menn vóru so væl kendir við slíkan fremmandan mynt, at teir settu hann í fast samband við gamlar norrønar virðiseindir sum t. d. alin av vadmali. Táið Seyðabrævið varð givið 1298, er tað ótrúligt, at 20 alin av vadmali høvdu fingið fast virði í gyllinsmyntinum, soleiðis sum týðarin av hesi lóg 1637 hevur uppfatað tað. Tí kunna vit síggja burtur frá. Vit kunna bert meta um, hvørt tær 20 alin av vadmali, Seyðabrævið sipar til, hava merkt ein oyra ella hálvan oyra. Gyllinin hevur tá ikki verið kendur í Føroyum.

Norðan fyri Alpurnar varð hin florentinski gyllinin skjótt eftirgjørdur, ofta í ymiskum útgávum. Hetta gjørdist nakað brókut, og at endanum tóku smáríkini uttan um Ríná norður at Hamborg seg saman í eitt myntfelag, og frá 1330 slógu tey felags gyllinsmynt, nevndan hin rínski gyllinin, við eini gullvekt av 2,3—2,4 g. Hesin rínski gyllinin gjørdist í langar tíðir høvuðsmynturin í allari Miðog Vestureuropu, og enn táið Eirikur kongur av Pommern um 100 ár seinri fekk álagt Oyrasundstollin, gekk nógv av hesum gjaldi inn í rínskum gyllin.[1]) Hesin gyllinin kom altso inn í norðurlondum, og hann var enntá eftirgjørdur her í ymsum útgávum. Soleiðis fingu vit ein Bjørgvinsgyllin, sum bert hevði helvtar virði av hinum rínska gyllinum. Upp undir siðaskiftið var eisini ein silvurgyllin sligin í hertogadømunum Slesvík og Holstein.

Spurningurin er nú, hvønn vegin hin føroyski gyllinin hevur fingið virði sítt, og svarið er avgerandi, tí tað kann siga okkum nakað um Føroya handilssamband við útheimin í síðsta parti av miðaldri.

[1]) Eftir Asgaut Steinnes, finnst í Skrifter utgitt av Det Norske Videnskabs-Akademi i Oslo 1927, No. 9, bls. 25.



### c. Takstir í eldri skjølum.

Fyri at fáa kastað eitt sindur meira ljós yvir henda spurning skulu vit royna at kanna nakað eftir, hvat tær fáu gomlu keldurnar siga. Um seyð, sum leggst hagfastur inn á annan mann, sigur Seyðabrævið, at hesin kann taka í hagaleigu 20 alnir (av vadmali) fyri hvørja seyðamørk (mǫrk sauði). Seyðabrævið var jú givið av Hákuni hertoga Magnussyni 1298; men av formælinum til hesa elstu føroysku serlóg, vit kenna, sæst, at Hákun hertogi hevur givið hana eftir at hava ráðført seg við Erlend bisp í Kirkjubø og Sjúrð løgmann á Hetlandi, og orðalagið í formælinum tykist eisini at benda á, at hesir báðir menninir framman undan hava ráðført seg við løgrættin í Føroyum.[2]) Ivaleyst man tí vera, at henda lógin veruliga er føroysk av uppruna, og tí eisini viðvíkjandi teim heitum, sum har vera nýtt. Ein seyðamørk var so nógvir áseyðir, sum tilsamans høvdu virði av eini fornari silvurmørk, mørkin brend, sum hon ofta tá var kallað. Av hinum smáa svarta seyðaslagnum, sum eftir fornleivdum at døma tá hevur verið vanligur seyður í Føroyum, ætlandi flutt higar við Keltum úr Írlandi ella teim bretsku oyggjunum, innan víkingabúseting fór fram, kunna úti við 80 áseyðir metast at hava verið í seyðamørkini. Eftir jarðarbókunum at døma eru av nútíðarseyði norðanfjørðs 40 áseyðir í seyðamørkini og sunnanfjørðs 48 áseyðir. Jarðarbókin frá 1584 sigur, at Lítla Dímun tá hevði 700 áseyðir. Eftir at hitt gamla seyðaslagið varð avtikið har á oynni 1868, og oyggin fekk nútíðar føroyskan seyð í staðin, ber hon bert um 270 áseyðir. Nú kann tað væl vera, at oyggin gjøgnum omanlop hevur mist nakað av biti sínum gjøgnum 300 ár, men stór omanlop har eru ongar sagnir um. Sjálvt um vit seta áseyðatalið á Lítlu Dímun at vera minkað við 150 áseyðum frá 1584 til 1868, tá hitt gamla smáa seyðaslagið varð niðurskotið sum vargur, hevur oyggin tó tá borið tvífalt so nógv í tali av hinum gamla seyðaslagnum sum av nútíðar føroyskum seyði. Hetta bendir týðuliga á, hvussu nógv størri áseyðatalið hevur verið í Føroyum — og eisini í seyðamørkini — í gomlum døgum.

[1]) Nógv av Oyrasundstollinum kom eisini inn í Rosenoble, enskur gullmyntur um 17 kr. verdur eftir fullum silvurvirði. [2]) Í formæli Seyðabrævsins stendur jú: «Harra Erlendur biskupur í Føroyum og harra Sjúrður løgmaður í Hetlandi, *sum vær høvdu til tykkara sent*, greiddu fyri okkum almúgans vegna teir lutir, teim tóktust hentast um búnaðarbólkin.»

Orðið jarðarmørk, mǫrk jarðar, verður ikki nýtt í Seyðabrævinum, men einans orðið seyðamørk. Harvið skal ikki vera sagt, at innangarðsjørð í Føroyum tá als ikki hevur verið mett í merkur; men hevur hon verið tað, man henda metingin tá hava verið ógvuliga nýggj, og nýggj í tátíðar týdningi kann væl merkja upp til 100 ára gomul. Væl umtalar Seyðabrævið mest seyð, men neytahald verður eisini umtalað í samband við at geva niðursetumonnum jørð at sita á, og tá gevur Seyðabrævið reglu fyri, at slík jørð, niðursetumaður fær, má ikki vera minni enn búgv, ið kann halda tríggjar kýr. Her er týðuliga talað um innangarðsjørð, men hon er mett í *kúfóður* og ikki í merkur. Grundir kundu her verið fyri at nevna markatalið, um innangarðsmørkin tá var gomul í føroyskum jarðarbýti.

Gyllinin er komin soleiðis inn í føroyska jarðarmeting, at hann svarar til ½ oyra eftir gomlum virði ella 2 gyllin til oyran. Eftir føroyskari metan eru 40 skinn ella 20 alnir í 2 gyllin,[1]) og um Seyðabrævið roknar við føroyskum vadmali, merkja 20 alnir har tað, sum seinri kom at eita 2 gyllin í leigu fyri seyðamørkina.

Hesa leiguna, 2 gyllin fyri seyðamørkina, finna vit aftur á teim seyðamørkum, Munkalívskloystur 1427 hevði á jørð síni í Norðuroyum, í Vági og á Norðoyri,[2]) og sama leigan gongur aftur um allar Føroyar í jarðarbókunum, sum byrja 1584. Tað kann soleiðis eingin ivi vera um, at 20 alna leigan í Seyðabrævinum merkir 2 gyllin í seinri peningi og ikki 1 gyllin. Annars skuldi seyðaleigan í Føroyum verið vaksin í tíðarskeiðinum 1298–1427, og hetta er óhugsandi.

Júst í hesum tíðarskeiði um 1350 kom svarti deyði, og frá Noreg vita vit, at hann har ávirkaði eitt fall í leiguni. Tí er eingin grund til at halda, at seyðaleigan um somu tíð skal vera hækkað í Føroyum. Hon kann hava staðið við, og tað er ivaleyst tað, hon hevur gjørt.

Um leiguvirði á føroyskari innangarðsjørð hava vit einki skjal, sum vísir aftur um svarta deyða. Vit hava har fyrst leiguna á innangarðsjørðini hjá Munkalívskloystri í Norðuroyum frá 1427. Leigan á mørkini stendur har at vera 10 alnir í vadmali, og eftir føroyskum vadmalstaksti skuldi tað verið 1 gyllin. Táið jarðarbøkurnar taka við 1584, er leigan á innangarðsjørð í Sandoy yvirhøvur 1 gyllin fyri mørkina, men í Norðuroyum bert ½ gyllin. Hesin hálvi gyllinin gongur aftur um nærsagt alla Eysturoy og nakað av Streymoy, men í hinum pørtunum av Føroyum liggur leigan á innangarðsmørkini millum hálvan og heilan gyllin. Vit síggja soleiðis, at innangarðsleigan hevur verið ógvuliga ójøvn í Føroyum, tað vit vita um, og at hon í Norðuroyum tykist at vera fallin niður í helvt, helst onkuntíð um siðaskiftismundið. Av skjali 1532 sæst,[3]) at kongsbøndur í Føroyum hava klagað um at hava ov nógvan skatt á innangarðsjørð, og at kongur gevur Knud Gyldenstjerne í umboð at skifta jørð ímillum teirra eftir landskuld. Vit vita ikki, um hetta kann hava ávirkað fyrrverandi leigu av innangarðsjørð summar staðir í Føroyum.

---

[1]) Á norskum marknaði fannst eitt vadmal, nevnt helmingarlagsvadmal. Hetta vadmalið var tvær reisur so høgt í prísi sum lógoyravadmalið. Av tí gingu 60 alnir fyri 120 (nevnt hundrað) av hinum. Búaløg nevnir alsamt helmingarlagsvadmal javnbjóðis við lógoyravadmal. [2]) A. C. E., skjal 63. [3]) A. C. E., skjal 32.



Vit kunna altso ikki ávísa nakað fall í leiguni av innangarðsjørð í Føroyum beint eftir svarta deyða, men minkan av hesi leigu má vera hend í summum støðum, t. d. í Norðuroyum, innan 1584. Fyri tað, um tað søguliga ikki kann vera ávíst, kann eitt fall í innangarðsleiguni væl vera hent í Føroyum eftir svarta deyða. Seyðamørkin og innangarðsmørkin svara nærsagt aldri saman í Føroyum, í Suðuroy tó nøkurlunda, og tað kann stórliga vera ivi um, at tær nakratíð hava verið tvær samanhangandi heildir, sum undir eitt hava verið mettar í eina silvurmørk, av tí at seyðamørkin einsamøll tykist at hava havt silvurmarkarvirði. Helst man tí innangarðsmørkin upprunaliga fyri seg vera mett í silvurmørk, og metingin hevur verið gjørd í reinum silvurvirði eins og seyðamørkin, man leigan av henni vera fallin — kanska eftir svarta deyða — ella hon sjálv er minkað í vídd. Hesi tvey kunna bæði vera hend, um skuldseting av innangarðsjørð hevur verið gjørd, innan svarti deyði rakti Føroyar. Ivaleyst er nógvur bøur fallin aftur í haga, eftir at sóttin var farin við stórum parti av fólkinum, og nýtt markarbýti innangarðs kann síðan vera farið fram. Summar staðir kann hetta vera hent meira enn eina ferð. Eisini kann jørð gjøgnum tíðirnar vera býtt í helvt og hálvmerkur gjørdar til heilar merkur. Mangt tílíkt kann vera farið fram. Hóast alt kunna vit ávísa, at alnabýti hevur verið á innangarðsjørð 1584, tí fútin hevur hetta árið á sínum roknskapi 15 alin av jørð, sum hann setur javnt við 15 skinn í peningi. Gyllin í jørð tykist ikki nevndur í skjølum, innan fyrsta løgtingsbókin tekur við 1615.

Av skjali frá 1412[1]) síggja vit, at meting ella matrikulering av innangarðsjørð tá hevur verið gjørd, og at sambandið millum innangarðsog uttangarðsjørð tá hevur verið leyst. Hetta brævið skrivað í Kirkjubø er eitt sáttmálabræv gjørt millum Jóan bisp og Harald Kálvsson løgmann um Nikkajarðir á Sandi — staðarnavnið finnst ikki longur. Sira Haraldur Siggason hevði óløgliga veðsett hesar jarðir undan kirkjuni, og av tí at løgmaður fráfall sakarmál móti kirkjuni, skuldi hann eiga hagan allan, sum lá til Nikkajarðir, ið vóru 4½ mørk, og hartil hólm og heimabeiti og ruddstaðir í Brekkum yvir Sanda húsum. Kirkjan fekk so innangarðsjørðina aftur. Nú er eingin hagaleys innangarðsjørð á Sandi. Okkurt man síðan vera hent í hesum jarðarviðurskiftum. Tað fyrsta, vit vita um, hevur leigan á innangarðsmørkini ikki verið meira enn til helvtar av seyðamørkini, og tí kunna vit hava illgruna um, at eitt leigufall er hent á innangarðsjørð eftir svarta deyða, ella at innangarðsjørðin eina ferð er virðismett eftir myntmørkini. Eftir Seyðabrævinum er eisini líkt til, at seyðamørkin sum virðiseind er væl eldri enn innangarðsmørkin.

Av gomlu Føroyingasøgu síggja vit eisini, at Tróndur í Gøtu hartar teir unglingar, sum hjá honum búðu, tí teir ikki syrgdu fyri at føra ullina av landi, meðan skipið stóð og fúnaði undir bráðini. Øðrvísi var tað, táið eg var ungur, tók hann til. Harav sæst, at við byrjan av miðaldri er ullin hin mest týðandi útflutningsvøran úr Føroyum, og størsta inntøkukeldan hevur tí seyðurin verið. Óivað eru tí seyðamerkurnar tann meginstovnur, teir norsku kongarnir tíðliga hava bygt sína skattainntøku av Føroyum á.

---

[1]) Dipl. Fær., bls. 49–50.

### d. Viðurskifti í Føroyum eftir Seyðabrævinum.

Seyðabrævið umtalar mest seyðahald og rættindi og skyldur teirra, ið seyðin eiga; men lógin í sínum elsta formi rørir eisini við onnur viðurskifti, sum fullu burtur við teirri donsku umsetingini frá 1637. Júst hesi viðurskifti siga okkum nakað um standin í Føroyum í teirri tíðini, Seyðabrævið varð givið.

Seyðabrævið finnst í trimum uppritum á fornum máli, men heilt einsljóðandi eru tey ikki. Lógargreinirnar eru nakað umfluttar. Hitt elsta uppritið av Seyðabrævinum er hildið at finnast í skinnbók nr. 33 kvarto á kongliga skjalasavninum í Stockholm. Løgmannsstólurin í Føroyum tykist áður at hava átt hesa skinnbók, tí fremst á permuni stendur navnið Peder Jakobson og aftan á permuni stendur árstalið 1599. Pætur Jákupsson var jú løgmaður 1588–1601. Onnur skinnbókin, hist. lit. 12 Lund, er eitt prýðuliga gjørt verk skrivað bæði við bláum og reyðum støvum, og harí finnst Seyðabrævið eisini. Hetta ritið er ætlandi gjørt av føroyskum klerki, Tróndi føroyska, tíðliga í 14. øld, og var hesin maður í tænastu hjá Árna Sjúrðarsyni bispi í Bjørgvin (1304–1315), sum upprunaliga hevur átt bókina.[1]) Triðja handritið av Seyðabrævinum finnst í pappírsbók, A. M. 316 fol., á savninum eftir Árna Magnusson á lærda háskúlanum í Keypmannahavn.

Ganga vit út frá handritinum í Stockholm, umtala greinirnar 1, 4, 5, 6 og 10 bert seyð og hagar, têirra ognarviðurskifti, skipan og røkt og harav fylgjandi rættindi og skyldur. Neyt og ross verða líka nevnd, men svín ikki. Í grein 6 stendur t. d.: «So nógvan seyð skal maður hava, sum hann eigur haga til. So er eisini við aðrari ogn, neyti og rossi.» Í handritinum í Lund stendur tilsvarandi: «Ikki skal meira í skipa, hvørki neyt ella seyð, enn eftir rættum útroknaðum tali.» Hetta sipar alt til hagar, menn hava átt í felag. Í slíkum høgum sæst allur seyður tá at hava verið kenning. Hagar, sum vóru eins manns ogn, hava eisini verið. Vit síggja herav, at kenningarskipanin hjá hvørjum manni í felagshøgum hevur verið ásett «eftir rættum útroknaðum tali» ella «sum hann eigur haga til.» Henda skipanin hevur tá einki havt við innangarðsjørðina at gera. Eingin vending í Seyðabrævinum sipar til felagsskap millum bø og haga.

Vit noyðast tó at rokna við, at hagaeigarar eisini hava átt bø, tí teir hava havt ásetta skipan av neyti í haganum eins og av seyði. Um vit ganga út frá, at neytini vóru innifóðrað um veturin, skuldi bøur teirra svara til teirra hagarættindi. Hesum kunna vit tó ikki heilt rokna við, tí ein partur av neytunum, helst geldneytini, hava óivað gingið nógv í haganum um veturin. Hitt gamla neytaslagið, menn tá høvdu, var smátt og harðbalið. Víddin av bønum nýttist tí ikki at svara heilt til hagarættindini. Hon er í hvørt fall ikki nýtt til at avgera, hvussu stór hesi hagarættindi vóru.

Innangarðsmerkur verða sum sagt ikki nevndar. Harímóti síggja vit kúfóður nevnt. Greinirnar 7 og 8 í Stockholms handritinum umtala fátækrafólk, sum ivaleyst hava verið eftirkomarar av leysingum.

[1]) Mikjel Sørlie: Biskop Arnes lovbok, Varðin, bind XVIII, bls. 69.



Trælir hava óivað verið hildnir tvey ættarlið undan Seyðabrævinum. Tó nýtir lógin ikki orðið leysingur, men húskallur. Summir av hesum ognarloysingum gjørdust niðursetumenn hjá óðalsmonnum; tí nýtir grein 7 hesa málbering: «Nú skal eingin hereftir seta búgv saman við minni fæ enn trimum kúm; men um nakar fær honum minni land at seta búgv á, skal hvør teirra bøta oyra til kongs. Men eingir aðrir skulu vera sjálvføðslumenn uttan teir einir, sum ikki kunna fáa sær undirhald til fosturs.» Henda grein ber týðuliga at tí borði at binda fátækrafólk í húskallatænastu. Húskallar hjá bónda hava kunnað verið giftir. Niðursetumenninir eru búsettir á burtur frá liggjandi jørð hjá bóndanum. Innan Seyðabrævið kom, tykjast teir at kunna hava havt minni enn tríggjar kýr. Óivað hava hesir menn velt nakað av jørð upp úr nýggjum, og ivaleyst hava teir havt rætt til at hava neyt síni í haganum, táið til bar. Onnur lunnindi á staðnum hava teir notið t. d. fuglaveiðu. Reglur fyri grøði av innmark, táið maður flytur av ella á búgvið, verða eisini givnar. Hesar reglur tykjast bæði at galda niðursetumenn og leiglendingar. Um seyðahald hjá hesum monnum verður einki talað; men leiglendingarnir hava ivaleyst havt nakað tær somu treytir sum t. d. leiglendingarnir hjá Munkalívsskloystri í Norðuroyum, meðan niðursetumenninir ætlandi hava havt uppsitaratreytir. Enntá gomlu løgtingsbøkur okkara nýta orðið niðursetumenn fyri uppsitarar. Eftir hesum tykjast niðursetumannatreytirnar í Føroyum hava verið tær, at hesir menn sótu fyri og svaraðu fyri jørðini hjá avbygda óðalsmanni, og at teir fyri hetta einans lótu frá sær á hvørjum ári krov, skinn og tálg av seyðaskurði. Øll avroð og várull saman við øðrum, sum jørðin gav av sær bæði innangarðs og uttangarðs, áttu teir. Í tálgina vóru roknað bert nýrumørur og netja.[1])

Av jarðabókunum síggja vit, at festibøndur ofta upp um miðjuna av 17. øld sótu við gørðum í fleiri bygdum. Sjálvsagt hevur festibóndin tá bert búð í einari bygd, men ivaleyst havt niðursetumenn fyri seg í hinum bygdunum fyri uppsitaratreytir. Um uppsitarin tá fekk seyðin at geva toluliga væl av sær, kundi avbygdagarðurin enntá geva bóndanum nakað til avlops, eftir at leigan var goldin. Vanlig leiga var eitt skinn fyri hvønn áseyð av innstøðseyði og hálvan til heilan gyllin av hvørji innangarðsmørk. Garðurin bar altíð nakað av seyði út yvir innstøðuna. Fýra merkur av tálg guldu tað sama sum eitt skinn. Harav kunna vit rokna út, at tá væl bar til við seyðinum, kundi slíkur avbygda festibóndi fáa alt skerpikjøtið fyri seg sjálvan; men ivaleyst hevur hann í flestum førum selt niðursetumanninum nakað av tí, ella hesin hevur havt frammihjáseyð í haga hansara fyri ásett gjald, og so kundi leigan í øllum førum fáast inn umframt í kjøti. Undantikin eru tá tey ringu fellisárini.

Hesin munurin millum leiglendingar og niðursetumenn hevur óivað verið til staðar í Føroyum í heilt gomlum døgum, og hann tykist eisini at koma fram í Seyðabrævinum umtala týðuliga leiglendingatreytir, og ivaleyst hevur Erlendur bispur fingið tær inn.

Í Seyðabrævstíðini tykjast húskallarnir at vera teir nógv flestu av ognarloysingunum. Sjálvt um teir hava verið giftir, sær tað út, sum

[1]) Slíkar hava í hvørt fall uppsitaratreytirnar verið í Norðuroyum upp um ár 1900.

hava teir búð á garðinum hjá bóndanum ella tætt við garð hansara — slík viðurskifti kunna vit ávísa seinri í tíðini. Líkt er tó til, at teir hava havt egið húshald, tí grein 8 í Seyðabrævinum byrjar soleiðis: «Nú um húskallar hjá bónda hitta hval á havi og skera skipsfarm av, tá hava teir sjeynda part; men um teir flyta hval til lands óskornan, tá havi teir slíkt av, sum landsbók mælir.[1]) Nú reka menn hval á land, menn, sum ikki eiga jørð omanfyri, veiða og bjarga úr flóðarmála. Teir skulu hava fjórðing burtur av. So er um træ somuleiðis. Men um menn finna neyt og seyðir ella annað fæ úti á havi og flyta á land, tá skulu teir hava fjórðing burtur av.» Um fiskaveiðuna hjá húskøllum nevnir Seyðabrævið einki, men annars er høvuðsreglan tann, at av tí, teir flyta av havi til lands, fáa teir bert fjórðing. Fongur av rekandi stórhvali tykist undantikin hesi reglu. Seyðabrævið tykist at vilja lata jarðareigaran fáa 3 partar av grind, sum rikin er á land, men nevnir tó bert hval. Jarðarhvalurin hevur, tað vit vita um, aldri verið meira enn helmingur av grindini, og er líkt til, at soleiðis hevur verið eftir norskari lóg. Reglurnar í Seyðabrævinum um hval hava ivaleyst bert verið nýttar innan svarta deyða.

Eftir Seyðabrævinum hevur ikki verið lætt at seta sjálvstøðugt búgv hjá ognarleysum. Leiglendingar kundu teir kanska gerast ella fáa sær niðursetubúgv við minst trimum kúm. Annars komu teir undir vanligar húskallatreytir. Av orðinum leysingabarn, sum er komið inn í føroyskt mál eina ferð eftir ár 1200, síggja vit, at ein partur av hesum leysingum ella frígivnum trælum, er vorðin landastrok. Seyðabrævið er ætlandi úti eftir at steðga hesum t. d. við reglum um ikki at hýsa fólki, sum ongan fastan bústað hevur, longri enn 3 dagar; men tað roynir at draga hitt ognarleysa fólkið inn undir húskallatreytir. Táið Seyðabrævið varð týtt á donskum máli 1637, fullu allar slíkar ásetanir, sum frammanfyri eru nevndar, burtur. Seyðabrævið gjørdist tá einans lóg um seyð. Kortini kom minsta mát fyri smámannabúgv aftur fram 140 ár seinri í hini sokallaðu húskallalógini ella skipan av 21. mai 1777. Í henni gjørdist umsiting av hálvari mørk í jørð tað minsta, maður mátti seta egið búgv á.

Av seyðabrævinum sjálvum síggja vit, at táið lógin var givin í 1298 var einki fast samanhang millum innangarðsjørð og uttangarðsjørð í Føroyum. Seyðamørkin sum virðiseind uttangarðs hevur tá verið nýtt, men einki í lógini bendir á, at jarðarmørk tá hevur verið nýtt sum virðiseind innangarðs. Harvið er sum nevnt ikki sagt, at virðissetingin í jarðarmerkur hevur ikki verið gjørd tá, men gomul kann hon ikki hava verið. Táið kúfóður er nýtt um innangarðsjørð og ikki markarvirðing, kemur tað kanska av tí, at viðvíkjandi niðursetumonnum hevur mesta talan verið um at vinna bø úr haga.

## e. Hin føroyski gyllinin.

Sum áður nevnt finnst skjal í skjalasavni Bremens frá 1506, sum vísir, at keypmenn í Bjørgvin tá hava klagað um at vera troðkaðir

[1]) N. g. L., bind 2, bls. 146–147, helming.



út úr sínum gamla handilsskapi við Hetland, Føroyar og Orknoyar. Líkt er til, at Hamborg og Bremen longu tá hava lagt henda handilin undir seg. Eftir tí, sum 20 ár seinri sæst at koma undan kavi, tykist Hamborg tá at hava sitið við øllum handlinum í Føroyum, og ivaleyst hevur hesin býurin longu fingið troðka Bjørgvin til viks í føroyskum handilsskapi í seinra helmingi av 15. øld. Hetta er líkt til at vera hent stutt eftir, at teir oldenborgsku kongarnir fingu ræði í Danmark—Noreg. Frá 1520 síggja vit, at Føroya fútar hava verið Hamborgarar, og at Hamborg tá sat við Føroya handli til 1553. Hamborgarkeypmenn hava fingið kongligan einarætt í hesum handilsskapi, hóast Kristian kongur II í skjali frá 1513 nevnir,[1]) at eftir gomlum avtalum átti Bjørgvin at røkja henda handilin.

Gjøgnum henda hamborgska handilin hava Føroyingar fingið beinleiðis føling við hin rínska peningagyllinin og eisini við kølnskar vekteindir, og henda ávirkanin saman við hini eldri norsku ella bjørgvinsku ávirkanini tykist at hava skapt hina føroysku gyllinseindina eins og hina 80 marka ella 20 skinna vágina, ið sæst at hava verið nýtt í kongsins leigubúð á Tinganesi í Føroyum, táið fútaroknskaparnir í 1584 koma undan kavi. Herígjøgnum høvdu Føroyingar fingið bæði ein 20 skinna gyllin og eina 20 skinna vág. Beinleiðis ávísa, at 20 skinna vágin eisini hevur verið nýtt við handilin í Føroyum kunna vit ikki, tí vit kenna ongan roknskap frá hesum handli. Táið vit vita, at kongur um siðaskiftismundið leigaði Føroyar burtur til einstakar menn saman við handli og kongligum inntøkum av landinum, er illa hugsandi, at hesir menn hava nýtt eina vág (80 m.) í leigubúðini og aðra vág (72 m.) við handilin. Upp at okkara døgum er henda 20 skinna vágin betri kend av Føroyingum sum tíggjundavág enn hin eldra 72 marka vágin. Enn á døgum nevna Føroyingar 4 merkur 1 skinn.

Í 1449 var vanligt í Danmark at rokna 1 rínskan gyllin javnt við 24 skilingar í góðum silvurpeningi,[2]) og so seint sum 1486 varð 1 lodd í silvuri roknað javnt við 12 skilingar.[3]) Vit vita eisini, at í síðsta helmingi av 15. øld varð silvurdálin útmyntaður við 2 loddum av silvuri, ið tá vóru mett javnt við 1 rínskan gyllin. Í tíðarskeiðinum 1449—1486 hevur metingin av 1 rínskum gyllin verið = 2 lodd í silvuri = 24 skilingar = 2 Bjørgvinsgyllin. Í nærsagt allari 16. øld síggja vit 1 føroyskan gyllin mettan javnan við 1 gamlan dála, ið hevði virði av 1 rínskum gyllin, og tá vit halda okkum at vita, hvønn veg føroyskur handilsskapur hevur gingið um og undan árinum 1500, hava vit rætt at halda, at hitt føroyska gyllinsvirðið av fyrstu tíð er fastlagt eftir rínskum gyllinsvirði í vørum. Hetta gyllinsvirðið var fastlagt í vágini. Ein føroyskur gylllin var = 20 seyðaskinn = 10 alin av vadmali = 1 vág av turrum fiski = 1 vág av fjøður = 1 vág av ull = 1 vág av garnatálg. Ein føroyskur gyllin var = $^2/_3$ vág av smøri ella 2 pund, og 4 korkalitt hosupør ella 5 hvít pør vóru eisini í einum føroyskum gyllin. Alt hetta sæst týðuliga av teim elstu fútaroknskøpunum eftir 1584, og ivaleyst eru teir nógvu

[1]) A. C. E., skjal 2. [2]) Aarbog for nord. Oldkyndighed og Hist. 1886, s. 171.
[3]) Diplomatarium Norvegicum X 263.

av hesum takstum tá 100 ára gamlir, innkomnir gjøgnum hin hamborgska handilin í síðsta helmingi av 15. øld.

Frá elstu tíðum hava Føroyingar ivaleyst brúkt «Bergens alen, mål og vægt», sum teir ofta seinri taka til; men hin upprunaliga norska metanin er tá gjøgnum Hamborgarhandilin vorðin blandað ella samansett við tátíðar hamborgska virðismetan. Hin rínski gyllinin var býttur í 20 undireindir, og hesar 20 undireindirnar fekk hin føroyski gyllinin í seyðaskinninum.[1]) Hin føroyska alin av vadmali varð ikki tikin sum undireind, hóast hon gekk upp í gyllinin við 10. Kølnarvágin var sum hin norska vágin býtt í 72 merkur, men hon var kortini væl tyngri enn hin norska vágin, ella við øðrum orðum sagt var hin norska mørkin nakað lættari enn hin kølnska. Nær við 79 norskar merkur hava verið í eini Kølnarvág. Táið 80 marka vágin er komin í brúk í Føroyum, liggur tað nær fyri at hugsa, at merkurnar í henni eru norskar, og at vágin er ætlað at vera kølnsk. Í kongsins leigubúð var enntá tikin yvirvekt við 4 mørkum ella 1 skinni aftrat hvørji 80 marka vág á øllum innvigaðum søluvørum. Táið vágin í nógvum føroyskum vørum eisini fekk gyllinsvirði, fullu gyllinin og 20 skinna vágin beinleiðis saman í skinnatali. Skinnið gjørdist soleiðis metingareind bæði í vekt og peningi. Keldutilfarið sigur okkum nærum einki um framvøksturin av føroyskum virðiseindum í síðsta parti av miðaldri. Vit noyðast tí at gera okkum eina hugsan um hetta út frá teim søguligu viðurskiftunum, og hamborgartíðin í Føroyum tykist at hava sett sær týðulig merki júst í føroyskum virðiseindum.

Gyllinseindin er gingin inn í hitt eldra føroyska markarbýti. Sekstan gyllin komu at vera í jarðarmørkini, og táið peningagyllinin varð mettur í skinnum, er henda skinnametingin aftur yvirførd á jarðargyllinin. Ringt er at siga nakað gjøllari um tíðarskeiðini, nær gyllin og skinn eru komin inn í føroyska jarðarmeting, tó helst stutt innan ár 1600; men ivaleyst er tað, at hin minna eindin, skinnið, hevur verið seinri á veg. Sum nevnt hava vit dømi um, at fútaroknskapurin 1584 nevnir alin av jørð og setur hana javnt við skinn í peningi. Í løgtingsbókini, sum byrjar 1615, finnst skjótt gyllin í jørð nevndur. Hann kann hava verið nýttur áður, um fútaroknskapirnir eftir 1584 ikki nevna hann. Táið ognin hjá Munkalívskloystri í Hetlandi, skrivað upp í 16. øld, verður nevnd í jarðargyllin, kann einki vera at ivast í, at jarðargyllinin um somu tíð hevur verið nýttur í Føroyum.[2]) Annað er, at hin hetlendski jarðargyllinin tykist at hava merkt Bjørgvinsgyllin, meðan jørðin í Føroyum hevur verið mett eftir føroyskum peningagyllin.

Í skjali sæst hin føroyski peningagyllinin fyrstu ferð nevndur 1533. Hetta árið skrivar Føroya bispur, Ámundur Ólavsson, høvuðsmanninum á Bjørgvins húsi, Eske Bille, bræv og harí minnir hann á, at hann hevur latið kong fáa 1000 gyllin fyri, at hann gav honum

---

[1]) Hetta seyðaskinnið, sum gekk inn sum virðiseind í gyllinum við 20 í tali, var av hinum nýggjara seyðaslagnum í Føroyum, sum altso man hava verið vanligt her í seinra helmingi av 15. øld. Hitt smáa svarta seyðaslagið man tá hava verið útdoyggjandi. [2]) A.C.E., skjal 63.



Føroya bispastól fyri lívstíð.[1]) Aftur í brævi til Thomas Koppens 1538 sigur Ámundur bispur, at hann sendir Thomasi «20 gode færøske gyllene» sum gávu.[2]) Sjálvsagt vóru hesir føroysku gyllin í vørueindum.

Um siðaskiftismundið hevur altso hin føroyski peningagyllinin verið vanligt gjaldoyra hjá Føroyingum, og alt bendir á, at hann hevur sín uppruna nakað longri aftur í tíðina. Henda gyllinseindin hevði sítt virðið í føstum vørueindum, sum samsvara virði av rínskum gyllin og gomlum dála í seinri helvt av 15. øld. Hetta tíðarskeiðið tykist Bjørgvinsbispurin Geble Pedersøn, ið doyði 1557, eisini at sipa til, táið hann skrivar, at *eftir gomlum* skuldi ein føroyskur gyllin vera javngóður við tveir Bjørgvinsgyllin. Øðrvísi man hetta hava verið á hansara døgum, í hvørt fall eftir 1550.

Í eini uppgerð 1567 á Bjørgvins húsi av føroyskum keypi er fylgjandi roknskapur uppsettur:

«Guttorm Andersøn for 2 td. mel ½ kippe skind 3 voger talg.
Isak lagmandsøn for 1 td. mel 20 skins 2 voger fisk.
Peder Børresøn for 1 td. mel 2 voger fjer 1 vog fisk.
Hr. Jon Lüdish for 1 td. mel 2 voger fjer ½ vog talg 1 pund smør.
Thomas Andersøn for 1 td. mel 1 vog fjer 1 vog smør ½ vog talg.
Hr. Mourids (norderø) for 1 td. mel 20 skind 2 vog fisk.
Lagmands moder for 1 td. mel 2 vog fjer 1 vog talg.
Johannes i Kaldbak for 1 td. mel 20 skind 1 vog fisk 2 pund smør.
Jon i Kollefjord for 2 td mel 1 vog smør 2 voger talg 1 kippe 10 skind.»

Tunnan av mjøli kostaði 3 gyllin í fútaroknskapinum 1584. Tað hevur hon eisini gjørt her, táið vit rokna við teim føstu prísunum á føroyskum vørum, sum vit kenna frá sama fútaroknskapi og fylgjandi. Á henda hátt hava Føroyingar keypt og goldið við vøru móti vøru eftir føstum prísum. Prísirnir á útlendskum vørum síggjast at hava verið fastir frá 1584, og tað hava teir stórt sæð eisini verið áður. Summi ár, t.d. 1569, hava Føroyingar knarrað um príshækkan, og tað er væl tí, at keypmenn tá hava sett summar innfluttar vørur upp um tann áður ásetta takstin í føroyskum vørum.

Føroyskar vørur síggjast eisini seldar í Bjørgvin 1567. Tá varð dálin á roknskapin settur javnur við 54 skilingar, og sum 2 lodda silvurdáli hevði hann uppruna sín í rínskum gyllinsvirði og var samanfallandi við føroyskt gyllinsvirði. Soleiðis hevur eisini verið roknað, tí táið kongur leigar Føroyar burtur 1569, krevur hann, at leiguhavararnir rinda honum kongsgjaldið av oyggjunum, sum gekk inn í føroyskum gyllin, út aftur í Keypmannahavn í gomlum dálum, soleiðis at dáli = føroyskan gyllin. Harímóti síggja vit, at útsølan í Bjørgvin 1567 av føroyskum gyllinsvirði í ymsum vørum er ójavnt mett í skilingum. Sølan í Bjørgvin sær soleiðis út:

2 bismarpund av smøri = 1 før. gl. = í Bjørgvinsprísi 72 skilingar.
1 vág av tálg = 1 før. gl. = í Bjørgvinsprísi 48 skilingar.
1 vág av fiski = 1 før. gl. = í Bjørgvinsprísi 48 skilingar.

---

[1]) Varðin bind XVII, bls. 206. [2]) Varðin bind XVIII, bls. 31.

1 vág av fjøður = 1 før. gl. = í Bjørgvinsprísi 96 skilingar.
20 skinn = 1 før. gl. = í Bjørgvinsprísi 87¾ skilingar.[1])

Samstundis var 1 Bjørgvinsgyllin = 12 skilingar, og eftir hesum var lutfallið í 1567 millum 1 føroyskan gyllin og 1 Bjørgvinsgyllin: 6, 4, 8 ella 7 5/16.

Vit síggja soleiðis, at føroysk gyllinsvirði í Noreg 1567 er mett ymist, og at Bjørgvinsgyllinin er vorðin enn minni í sammeting við hin føroyska gyllinin. Víðari síggja vit, at hin føroyski gyllinin í øllum teim nevndu vørunum uttan tálg og fiski liggur yvir dálavirðinum.

Kongsins krav um, at hann skal hava 1 gamlan dála í Keypmannahavn fyri hvønn føroyskan gyllin í Føroyum, sæst at vera endurtikið í leiguskjali 1586.[2])

At endanum skal verða endurtikið, at eingin gomul kelda, ið nevnir føroyskt jarðarbýti, vísir, at innangarðs- og uttangarðsjørð í Føroyum hava hoyrt fast saman í gomlum døgum. Nógv tykist enntá at benda á, at gyllinin er komin inn í føroyska jarðarmetan, innan uttangarðsjørðin og innangarðsjørðin hava verið fast samanknýttar. Í løgtingsdómi frá 1638 síggja vit, at 4 gyllin í jørð + 4 seyðir vóru mettir 5 gyllin í peningi.[3]) Líkt kundi verið til, at hesir 4 seyðirnir vóru áseyðir á hagajørðini. Annars síggja vit í løgtingsbókini frá 1617, at hálv mørk í jørð, – óivað innangarðs — sum Argja hospital hevði fingið við sjúklingi, varð útloyst haðani av bróður sjúklingsins við 8 gyllin í peningi. Í báðum hesum førunum síggja vit, at gyllin í jørð tá hevur verið mettur javnur við gyllin í peningi, tí 4 seyðir hava óivað verið mettir 1 gyllin í peningi. Í fútaroknskøpunum innan 1653 er eitt lamb mett 4 skinn í peningi. Í løgtingsbókini frá um 1635 síggja vit tó, at lomb hava verið seld fyri frá 5 til 7 skinn, áseyðir um 8. Støddin og prúddin var avgerandi.

At enda skal verða nevnt, hvussu virðismetanin frá hesi tíðini hevur sett seg fast í føroyskan hugsunarhátt, t.d. skinn í tálg og orðalagið um, at nakað ikki hevur skinnsvirði. Gyllins- og skinnsvirðingin verður enn nýtt bæði í jarðarbýti og grindabýti. Merkiligari er, at menn nógvar staðir í Føroyum, t.d. norður á Eysturoy og Streymoy, enn á døgum meta lomb í skinnum. Til dømis man eitt seks skinna lamb hava eitt virði í løtuni av minst 100 kr.

---

1) Eftir uppgávu frá Asgaut Steinnes, kongl. skjalavørði, Oslo. 2) A.C.E., skjal 187.
3) Lb. fol. 244.

# SAMMENDRAG

## Kap. I.

Her gives en kort oversigt over samfundsforholdene på Færøerne i tiden fra reformationen til Chr. Gabel fik øerne i len.

a. Lov og ret på øerne. Den norske landslov af Magnus Lagabøte fra 1274 gjaldt på Færøerne, til den i 1604 blev afløst af Den norske lovbog, som Christian IV udgav, og som nærmest var en ajourføring i dansk sprogform af den ældre lovgivning. Med kongelig forordning 1606 beholdt Færøerne dog det ældre mål- og vægtsystem. Færøerne havde desuden deres egen pengeværdi i varer, færøske gylden og skind. Mens hertug Håkon Magnusson havde Færøerne i len, gav denne øerne en jordlov i 1298, det såkaldte Søjdebrev. Denne særlov gjaldt uændret på Færøerne til 1637, da den blev oversat til dansk og noget forkortet, således at alle de bestemmelser, der ikke omfattede fårebrug, bortfaldt. Desuden brugtes på Færøerne Den store islandske dom om horeri og skørlevned, særlig i slægtskabsforhold, en lov vedtaget på Islands alting 1564 og stadfæstet af kong Frederik II 1565. Den byggede på ældre islandsk kirkeret fra den katolske tid. Fra ældgammel tid var øerne inddelt i 6 sysler, hvoraf hver havde sit eget ting, nærmest en underret bestående af 6 medlemmer med øernes lagmand som formand. Ved slutningen af det omtalte tidsrum, ca. 1650, indtrådte landsskriveren, der ved denne tid blev kaldt sorenskriver, som formand for denne underret kaldet vårting, fordi deres mødetid var om foråret. Fra denne underret i hvert syssel kunne dommene appelleres til lagtinget, øernes fællesting, der bestod af alle øernes vårtingsmedlemmer med øernes lagmand som formand og dommer. I hver domsafgørelse deltog dog højst en tylft, d. v. s 12 medlemmer. Endnu bestod der en mulighed for at indanke lagtingets afgørelse for kongen.

b. Omkring reformationstiden besad kirken henved halvdelen af det færøske jordegods. Ved reformationens indførelse beslaglagde kongen dette gods, som nu blev fæstegods under kronen. Kongens fogeder på øerne fik derved deres magt forøget, og misbrug af dette jordegods' forvaltning med hensyn til fæsterne foranledigede i det 16. århundrede et par kongelige skrivelser. En mindre del af kirkens gods blev tillagt de 7 sognepræsteembeder på Færøerne. Efter refor-

mationens indførelse blev kirkebygningerne færre på øerne, og bønhusene, som nogle bygder havde haft i den katolske tid, bortfaldt. Færøernes gamle bispesæde, Kirkjubøur, blev en storbondegård, og i kirkelig henseende blev øerne et provsti, først under Bergens stift, antagelig til 1620, og derefter under Sjællands stift.

c. Færøernes handelsforbindelse med omverdenen gik fra gammel tid over Bergen, og i middelalderens sidste halvdel blev handelen efterhånden et kongeligt monopol. Kongen udlejede den til visse personer, der til gengæld lovede at forsyne øerne med nødvendige varer. En del af handelen foregik dog i smug både fra de britiske øer og de tyske hansestæder, og mod slutningen af det 15. århundrede ser det ud til, at tyske købmænd i Hamborg har opnået eneret af den dansk-norske konge til at drive handel på øerne. Denne hamborgske handelsperiode på Færøerne varede til 1553, og den kom til at præge den færøske værdiberegning i gylden og skind. Sidste halvdel af det 16. århundrede var den færøske handel på skiftende hænder, til den lige før år 1600 blev lagt under bergensiske købmænd. Disse blev i 1620 afløst af Det islandske kompagni med hovedsæde i København. Efter godt 40 års forløb blev dette kompagni atter afløst af Den gabelske handel på Færøerne.

d. Den fremmede påvirkning, Færinger blev udsat for i denne periode, kom dels gennem monopolhandelen og dels gennem andre fremmede, der besøgte øerne under mer eller mindre lovlige forhold. Især Hollændere og Britter drev smughandel på øerne, og fremmede fiskere i små skibe, især Skotter, var årlige gæster deroppe om sommeren. Færinger klagede over dette fiskeri, og i 1618 lovede kong Jacob I af Storbritannien, at dette skulde være slut; men Britterne ses dog senere at være kommet til Færøerne i fiskeriøjemed og at have haft en del omgang med Færinger, især på mindre centrale steder.

e. Den væsentligste værdikilde i denne tid på Færøerne var jorden. Ca. halvdelen af den færøske jord var lejejord i kongens eje. Resten var odelsjord, en mindre del adelsgods. For hvert slægtled blev odelsboet skiftet ud til alle arvingerne, og kongens lejlænding fik også sin arvelod ubeskåret, hvis han var en af arvingerne. Dette medførte, at en stor del af odelsjorden efterhånden kom på kongslejlændingenes hænder. Der opstod derfor en nærmest jordløs eller ejendomsløs underklasse, hvorfra bønderne hentede deres arbejdskraft til deres gårdes drift, og som ofte var nødt til at pantsætte den smule odelsjord, den ejede, for at eksistere. Denne ejendomsløse underklasse genfinder man ofte i lagtingsprotokollen i de afsagde bødedomme, hvor man gentagne gange finder ordene: «Var intet at bekomme» eller ejede aldeles intet.» Bøden skulle da afsones med straf.

## Kap. II.

a. Nogen egentlig viden om de af Færøernes lagting afsagde dødsdomme får man ikke før 1615, da den ældste opbevarede lagtingsprotokol begynder. Af landfogedernes regnskaber over Færøerne, der går tilbage til 1584, ser man dog, at der har været ansat en bøddel på Færøerne for offentlig regning, og i regnskabet for 1601—02 bemærker fogeden: «Haver jeg haft 4 fanger siddende en måneds tid på min omkostning, hvoraf 3 er rettet for deres misgerninger og haver kostet mig 12 gl.» Det var kun indtægterne og udgifterne, regnskaberne omtalte. I 1601—02 har der altså mindst fundet 3 henrettelser sted. Af lagtingsprotokollen 1615—1654 kan man iøvrigt påvise 6 dødsdomme. Af disse er de 4 for tyveri, 1 for uægte barn i nært svogerskabsforhold og 1 for voldtægt.



b. Af drab og særlig slemme forbrydelser forekommer der i nævnte lagtingsprotokol 21 sager. For drab idømtes der ikke dødsstraf, men for mord. En stor del af disse 21 sager henføres til ulykkelige hændelser, flere med døden som udgang, andre drejer sig om uægte børn i alt for nært slægtskabsforhold, og atter andre er domme for tyveri. For disse uægte børn blev de skyldige dømt efter Den store islandske dom. Denne forbød giftermål mellem to, der var beslægtede i 3. led eller nærmere. Forbudet gjaldt også mand og kvinde, der var besvogrede i samme forhold. Hvis to avlede børn sammen nærmere beslægtet eller besvogret end i 2. led, blev de dødsdømt.

## Kap. III.

a. De bøder, folk blev idømt på lagtinget, tilfaldt så godt som alle kongen, og de kommer derfor alle ind på fogedens årsregnskab. Flere af regnskaberne fra de ældre årgange mangler. Regnskaber findes for følgende år: 1584, 1588, 1590, 1600, 1601 og 1602. Derefter mangler regnskaber for en tiårsperiode. De følgende år i tiden til 1653 mangler enkelte regnskaber, helst i fyrrerne. Regnskaberne findes på det danske rigsarkiv. Pengebøderne er i hovedteksten opsat i gylden og skind ud fra fogedregnskaberne til 1615; fra dette år er lagtingsprotokollen brugt. Efter en stikprøve er de overensstemmende. Der er 20 skind i en færøsk gylden, og skind betød oprindelig tørret lamme- og fåreskind. Kongens årlige indtægter af disse pengebøder varierede en del, men den har i hvert fald gennemsnitlig været over 100 gl. om året. Af tyverisagerne ser man, at de indtræffer hyppigst, når tiderne er dårlige.

b. Til bedømmelse af, hvornår der har været gode eller dårlige tider, har man kongens tiendeafgift, der indgår i landfogedens regnskab. Kongen fik en fjerdedel af hele tienden, svarende til den gamle bispetiende. Tienden skulle ifølge middelalderlig norsk lovgivning deles i fire dele, hvoraf biskoppen, kirken, præsterne og de fattige hver fik en del. Ved reformationen overtog kongen biskoppens andel, og iøvrigt fortsattes tiendens deling på Færøerne uforandret, skønt den i henhold til reformationens kirkeordinans burde tredeles mellem kongen, kirken og præsterne, men uagtet disse sidste klagede i 1632, skete der ikke nogen forandring. Det er indlysende, at jo større ind-

tægten er hos folk, jo større bliver tiendeafgiften, og den samlede tiende kan endda opløses i fisketiende, fåretiende og kotiende (smør). Hver af disse dele for sig giver et billede af henholdsvis fiskeriet som årlig indtægtskilde, hvormeget fårene hvert år giver af sig, samt koholdets årlige ydelse, alt angivet i færøske varer. Det bemærkes, at vægtenheden en vog i forbindelse med tienden regnes i 80 marker eller 20 skind; et vægtskind = 4 marker. Vogen angaves oprindelig i 72 marker. Når en vog tør fisk, uld, tælle og fjeder hver for sig kostede 1 gylden, faldt et vægtskind eller blot skind af disse varer sammen med et skind i penge. En vog smør kostede 1 1/2 gylden. Deraf tiendens værdi i penge. Tiendekurven viser, at omkring 1612 og 1622 har tiderne været gode, særlig hvad fiskeriet angår, medens lige op under eller omkring 1630 har landets indtægter været nede på et lavmål. Dette fremgår også af lagtingsprotokollen.

c. Kongen havde også visse indtægter af hvalfangst og vrag eller drivtømmer. Hans andel i en flok grindehvaler bestod foruden i den hval, der tilfaldt hans jorder på det sted, grindeflokken blev dræbt eller gjorde landgang. Jordens andel i den fangede — småhval eller grind — ses ved år 1800 at have været halvdelen af hvalfangsten. Jordehvalen tilfaldt odels- og kongsjorden på stedet i henhold til marketal (jordenhed). Ved beregningen af den kongen tilfaldne part af grindehvaler i tiden 1584—1653 kan en deling som den ovennævnte d. v. s. en deling om den ved år 1800 påviste ikke påvises.

d. Af fogedregnskaberne ses kongens indtægt af jordegodset at have været langt de betydeligste. Derfor er landfogedens statskasse på Færøerne fra gammel tid blevet kaldet Jordebogskassen. Med små undtagelser var fårelejen ensartet over hele Færøerne, et skind af hvert besætningsfår, medens kolejen var temmelig uensartet, 5—20 skind. Lejen af hver mark opdyrket jord indengårds var 1/2—1 gl. Den samlede leje af kongsjorden både inden- og udengårds var henved 2000 gl. årlig. Hvert 3. år gaves der en ekstraleje, den såkaldte ågave, af den opdyrkede jord indengårds. Denne var 1/2 gl. af hver mark jord, og den samlede ågave over hele øerne var henved 500 gl. årlig.

e. De fleste af de kongelige indtægtsposter, bortset fra indtægterne af jordebogen eller af jorden i det hele taget, var forskellig fra år til år. En opgørelse over kongens samlede årlige indtægt af øerne viser sig derfor at svinge mellem 2237 gl. 8 sk. i 1650 og 4306 gl. 19 sk. i 1637. Kongens udgifter på øerne var derimod temmelig konstante i det omtalte tidsrum. Til år 1632 var kongens faste årlige udgifter 291 gl. Dertil kunne komme enkelte husreparationer. Efter det nævnte år blev der ansat en bøsseskytte på kongens bekostning, og de faste årlige udgifter blev da 311 gl. Årsagen til bøsseskyttens ansættelse var den, at tyrkiske sørøvere fra Algier i året 1629 gjorde et indfald på øerne i Hvalbø, hvorved de dræbte flere mennesker og bortførte 30 stykker, og at man året efter besluttede at anlægge en skanse ved Thorshavn for at beskytte de derværende handelsbygninger mod angreb. Fra 1620 ser man, hvor stor restancen af kongens



afgifter har været hos befolkningen. Denne restance er vokset i de dårlige år omkring 1630 og når sit maksimum i 1636, hvorefter den aftager jævnt, alt i overensstemmelse med befolkningens øknomiske kår.

## Kap. IV.

a. De tilfældige fremmede, der besøgte Færøerne omkring og efter år 1600, optrådte ofte som sørøvere. På Færøerne bestod der jo et kongeligt forbud mod handel med fremmede under trussel om straf. De fremmede, som forsøgte smughandel og blev afvist af befolkningen, tog sig derfor ofte selv til rette uden at yde noget til gengæld. Disse var Britter og vistnok også Hollændere. Værste var dog de såkaldte Tyrker fra Algier. De kom til øerne blot for at røve. I det tyrkiske overfald på Hvalbø 1629 deltog i henhold til lagtingsprotokollen to store armerede skibe — traditionen opgiver tre skibe. Det ene af skibene strandede i et uvejr. Den værgeløse befolkning forsøgte flugt op i fjældene, men Tyrkerne røvede alt, hvad de kunne få fat på. Adskillige blev dræbt, og 30 mennesker, mest kvinder og børn, tog Tyrkerne afsted med sig. Der er noget, der tyder på, at allerede inden 1615 har de algierske sørøvere besøgt øerne, men man har ingen sikker historisk beretning derom. Det store tyrkiske indfald på Island 1627 ses ikke at have berørt Færøerne. Medens flere af de islandske fanger blev løskøbt fra Tyrkerne og vendte tilbage til deres hjemland, blev de færøske fanger borte for bestandig.

b. Fremmede fiskere har vistnok fra gammel tid af og til besøgt Færøerne, men historisk bevis derfor findes ikke, før man nærmer sig år 1600. Under Island ved man derimod, at engelske fiskere har været allerede i det 15. århundrede. Sandsynligvis har de også berørt Færøerne. Omkring år 1600 var Nordatlanten allerede et internationalt fangstfelt, især hvad hvalfangst angik. De dansk-norske konger, især Frederik II og Christian IV, forsøgte da at hævde deres overhøjhed over dette havområde, hvori Svalbard, Færøerne og Island indgik med Grønland som vestlig afslutning. Ved de skotske kyster var Hollænderne på denne tid begyndt at drive et omfattende fiskeri, så Skotterne følte sig fortrængt fra deres egne fiskefelter. De har da søgt op til Færøerne med deres små fiskefartøjer. Bevis derfor har man i et brev, kong Jacob VI af Skotland har sendt Færinger. Heri anmoder han dem om at tage vel imod to skotske fiskere og tillade dem fiskeri ved øerne under opsyn imod, at de betaler *den sædvanlige afgift*. Den dansk-norske regerings forhandling i Bremen 1602 med engelske udsendinge angående en klage fra Færøerne om altfor nærgående engelsk fiskeri ved øerne førte ikke til noget resultat. Da Skotlands konge i 1603 blev konge af hele Storbritanien, synes stemningen i britiske regeringskredse med hensyn til det søterritorium, ethvert land bør have rådighed over, at være blevet en hel anden. I 1617 sendte Færinger en alvorlig klage til den danske regering over altfor nærgående skotsk fiskeri ved Færøerne. I jan. 1618 sendte kong Christian IV klagen i latinsk oversættelse samt sin egen ufor-

beholdne tilslutning i et følgebrev til den britiske regering. Kong Jacob I af Storbritanien lod hele sagen gå til det skotske råd, Lordis of Secrite Council, til udtalelse. Dette behandlede da sagen og søgte føling med skotske fiskere, der indrømmede, at klagen fra Færøerne var i overensstemmelse med sandheden, men at de var drevet til dette deres fiskeri ved Færøerne af Hollænderne, der i tusindvis fiskede på de skotske fiskebanker indenfor en sømil fra land. Disse bad derfor rådet anmode den britiske konge om gennem sin gesandt i Holland at udvirke, at hollandske fiskere i henhold til international ret ikke kom nærmere Skotland og de skotske øer end «Sight of land.» Dette lovede rådet, men udtalte samtidig, at det samme gjaldt for det skotske fiskeri ved Færøerne, og at rådet derfor ikke kunne anerkende den begrundelse, at de hollandske fiskeres nærgående fiskeri ved Skotland, skulle give de skotske fiskere noget ret til at være ligeså nærgående ved Færøerne, men at de dér uden speciel tilladelse måtte holde sig uden for «Sight of land.» I to skrivelser 12/3. 1618 fik kongen rådets betænkning tilsendt. I skrivelse 27/3. 1618 svarede da kong Jacob sin svoger kong Christian IV, at de britiske fiskere for fremtiden ville holde sig borte fra Færøerne for ikke at genere Færinger i deres erhverv. I 1631 kom territorialgrænsen ved Færøerne atter på tale, og efter en meddelelse fra Christian IV til Charles I af Storbritannien om, at den dansk-norske regering tænkte på at fastlægge en 24 sømiles territorialgrænse ved Færøerne, blev dog den senere 16 sømiles territorialgrænse da fastlagt. Man ser denne grænse hævdet med en særlig inspektion til op over år 1700. Efterhaanden faldt inspektionen ved Færøerne bort, og i Norge og Danmark faldt man lidt efter lidt tilbage til en 4 sømiles grænse, men de nyere bestemmelser ses ikke at være blevet gjort gældende for Færøerne. I 1882 vedtog Danmark sammen med alle Nordsøstaterne 3 sømiles fiskerigrænse, men denne kom da ikke til at gælde for Færøerne, thi ved en særlig beslutning fik Island og Færøerne en 3 sømiles fiskerigrænse fastsat i 1901.

c. Trods forbud og trusler om straf foregik der til tider en ret livlig handel i smug på Færøerne med fremmede skibe, der anløb øerne. Disse fremmede synes for det meste at være Briter og Hollændere. For Briternes vedkommende foregik smughandelen mest gennem fiskefartøjer. Det er vanskeligere at påvise, at Hollænderne har drevet noget fiskeri af betydning ved Færøerne; men af og til har nok enkelte hollandske fartøjer fisket ved øerne. Således angives hollandske fartøjer at have ligget på Vestmanhavn 1615, uden at det omtales i forbindelse med smughandel. Iøvrigt ser man hollandske fartøjer anløbe Færøerne udrustede som smughandelsskibe. Dog synes de britiske skibe, der har drevet smughandel på øerne, de talrigste. Før lagtingsprotokollen begynder 1615, er det vanskeligt at påvise, hvad der foregik. Man har dog et par eksempler om smughandel fra det 16. århundrede. Til 1620 ser man af lagtingsprotokollen, at smughandel dengang har floreret. Ny landfoged blev ansat i 1620, og denne tog straks fat på dette uvæsen. Det viste sig da, at så godt som alle medlemmerne af lagtinget og lagmanden var impliceret



i denne sag. Tinget kunne ikke dømme sig selv og sendte da en ydmyg anmodning til kongen om fritagelse for straf. Smughandelsspørgsmålet belyses bedst gennem sagen mod den britiske borger Fermus i 1643. Han blev taget på fersk gerning i færøsk havn og stillet for retten. Man ser da, at denne mand først har mistet et skib ved Færøerne i Hvannasund 1619, er dernæst blevet borte fra øerne i flere år, vel sagtens på grund af kong Jacobs forbud 1618 om britisk fiskeri ved Færøerne, men senere kommet igen med et nyt skib, der blev skudt i sænk af en britisk kaper på Hvalbø i Suderø, Færøerne. For de to skibsvrag og andet, han havde solgt, havde han en del restance hos Færinger. Han lod da, vistnok i 1640, sin søn blive en vinter tilbage på Færøerne for at ordne hans pengesager der. Lagtinget nærmest frikendte Fermus i 1643. Tre år senere finder man denne mand igen som smughandler i færøsk havn, Klakksvík, Færøerne, og ind i havnen kommer samtidig et hollandsk smughandlerskib.

## Kap. V.

a. Allerede i middelalderen tildelte kongen visse personer eller handelsfirmaer eneret til at handle på Færøerne med pligt til at forsyne øerne med nødvendighedsvarer. Hjemstedet for denne handel var oprindelig Bergen. Skønt de sikre historiske beretninger er ganske få, er der meget, der tyder på, at i sidste halvdel af det 15. århundrede har købmænd fra Hamborg erhvervet sig kongelig ret til at drive handel på Færøerne. I hvert fald har de drevet denne handel. Påvirkningen fra Hamborg i pengeværdi, længde- og måleenheder er tydelig. Ved århundredskiftet, f. eks. 1506, klager Bergen til hansastæderne over, at byen er gået glip af handelen på de norske kronlande i vest, skønt den havde en forret til denne handel. Den var blevet fortrængt fra Orknøerne, Hetland og Færøerne af Hamborg og Bremen. Fra 1520 kan man tydelig se, at den færøske handel er gået over Hamborg, og fra 1529 til 1553 ses Hamborgeren Thomas Koppen at have haft Færøerne i len af den dansk-norske konge. Den vordende konge, Christian III, pålagde Færøernes lensmand 1535, Thomas Koppen, at være *ljusmand* for øerne, og formelt synes reformationen da denne sommer at være indført til Færøerne ved en lagtingsbeslutning, men det katolske præsteskab med biskop Amund Olufson i spidsen fungerede dog foreløbig videre. Biskoppen var ansat af kongen på livstid fra 1. jan. 1533. Det samme præsteskab ses endnu at have fungeret i august 1538. Omkring 1540, måske 1541, synes et personskifte at være foregået ved den færøske kirke. Nogle af sognepræsterne udskiftedes, og en luthersksindet biskop, Jens Riber, indsattes. Kongen inddrog kirkens jordejendomme under kronen. Denne første og sidste lutherske biskop forlod dog øerne allerede 1556, og Færøerne blev da et provsti først under Bergens stift og siden under Sjællands stift. Fra 1553 til 1556 var handelen på Færøerne nærmest fri.

b. Dette år meddeler kongen Bergens byråd, at han selv agter at drive den færøske handel. De kongelige fogeder på Færøerne må da have misbrugt deres magt, thi Færinger klager over, at de ofte uden grund bliver sat fra deres fæstegårde, hvilket foranledigede en kongelig forordning 1559, der nægtede fogeden ret til at sætte fæstebonden fra sin gård, når denne var kongen tro, svarede ham sin afgift og holdt besætning og gårdens huse ved magt. Klagerne gik også ud på, at fogederne tilegnede sig personlig odelsjord, og handelsforholdene var Færinger stadig misfornøjede med. I 1569 gav da kongen fogeden Anders Jude og Mads Lampe øernes handel i forpagtning for en årlig afgift af 100 gamle daler, og kongen sendte da sin egen foged til øerne. Der klagedes om mangel på tømmer ved handelen, og Færinger opnåede tilladelse til selv at sende skib til Norge efter tømmer. I 1571 fik Færinger selv øernes handel på egne hænder. Uvante som Færinger var med selv at drive handel, synes dette forsøg ikke at have gået. En Hamborger, Jochim Thim, opnåede 1573 ret til at handle med øerne, til kongen i 1578 besluttede selv at overtage hele øernes forvaltning. Da var Magnus Heinesøn lige hjemkommen fra hollandsk krigstjeneste, og han bad kongen om lov til at indhente nogen restance, han ejede på Færøerne.

c. Som født og opvoksen på øerne fik Magnus Heinesøn nu lejlighed til at tale med sine landsmænd om øernes forvaltning, og det hele endte med, at kongen overlod Magnus Heinesøn med kompagniskab fra 1579 at drive øernes handel. Øernes lagmand, Joen Heinesøn, var en halvbroder til Magnus Heinesøn. Sommeren samme år røvede sørøveren Clerck, der var Skotte, handelens lagerbygning samt forvaltningsbygningen i Thorshavn til stort tab for Magnus Heinesøn. Kongen bevilgede ham godtgørelse for halvdelen af tabet; men i 1580 skete endog det, at tidlig på foråret indfandt et smughandelsskib fra Hamborg sig på Færøerne, solgte sine varer, før Magnus Heinesøn var ankommet til øerne, og købte sit skib fuldt af færøske varer, hvorved Magnus Heinesøn også led tab. Med kongelig tilladelse skulle Magnus Heinesøn samtidig med at passe den færøske handel have et skib udrustet som kaper for at spærre Hollænderne og Briterne handelsvejen til Rusland nord om Nordkap. Kongens rentemester Chr. Valkendorf ville have denne til at fratage Magnus Heinesøn den færøske handel, og for at formilde kongen tilbød Magnus Heinesøn da at gøre en opdagelsesfærd til Grønland på egen bekostning 1581, men rejsen gav ikke noget direkte resultat. Kongen satte da 3 mænd i spidsen for den færøske handel, en Hamborger, en Københavner og Magnus Heinesøn, der da var Bergenser. Der blev omtrent samtidig rejst anklage mod Magnus Heinesøn om forskellige misligheder ved handelen, bl. a. om brug af for kort alen, men rètsforfølgelsen gav intet resultat. Hen på foråret 1583 blev handelen dog frataget Magnus Heinesøn, og hans broder, Joen Heinesøn, blev afsat som lagmand. Skønt en folkeforsamling i Thorshavn om sommeren 1583 krævede dem begge genindsat, skete det ikke, og Chr. Valkendorf fik da sit ønske opfyldt, at handelen på Færøerne igen kom på kongens hænder, foreløbig bestyret ved Niels



Schinckell. Magnus Heinesøn gik da igen i hollandsk krigstjeneste, og i denne tid kaprede han et skib tilhørende selskabet Wollison, Read & Co., London, nær Englands kyst, og efter Magnus Heinesøns hjemkomst til Danmark, krævede dette selskab denne idømt en hård bøde. Da denne ikke kunne opnås, krævede selskabet under Chr. Valkendorfs tilskyndelse manden øjeblikkelig dødsdømt og henrettet, hvilket skete 1589. Bagefter blev Chr. Valkendorf anklaget for at have forvoldt Magnus Heinesøns død, og Magnus Heinesøn fik æresoprejsning.

d. Allerede 1586 fik en borger i København og en borger i Hamborg eneret til handelen på Færøerne i 10 år. I 1592 blev dog handelen frataget dem på grund af misbrug og atter lagt i kongens hænder. Han holdt både foged og handelsforvalter på øerne til 1598, men dette år blev et bergensisk selskab forlenet med den færøske handel. Dette handelsselskab, hvis indehavere i årenes løb skiftede lidt, beholdt den færøske handel i 15 år og fik dets ret fornyet hvert 3. år. Den 1. mai 1614 afløstes da dette af et 3-mands selskab, hvis ene indehaver, Nicolaus de Frunt, apoteker i Bergen, havde været medindehaver af det forrige selskab, og de to andre indehavere var Bergens borgmester, Søren Sørensen, og kongens foged på Færøerne Strange Madssøn.

e. Med dette selskab får man et nærmere indblik i de færøske handelsforhold gennem lagtingsprotokollen. Af dokumenter ser man, at oprindelig har landfogeden villet have den færøske handel for sig alene, men Nicolaus de Frunts venskabsforhold til kongen trak denne med ind i selskabet, og Søren Sørensøn, der havde truet med at toldbeskatte færøske varer over Bergen, blev taget med i selskabet af den grund. Det var da denne, der kom til at dominere selskabet. Landfogedens medlemsskab af handelsselskabet som kontrollerende kongelig embedsmand var tvivlsom, og der kom mange klager over dårlige varer, ligesom smughandelen florerede.

f. Fra 1620 blev den færøske handel drevet af Det islandske kompagni med hovedsæde i København. Antagelig er Færøerne da i kirkelig henseende lagt under Sjællands stift. Øerne blev nu bedre forsynet udefra, men kompagniets første købmænd synes at have været temmelig hårdhændede. Efter de sløje tider omkring 1630, ses de færøske varer, der ønskedes afsat ved handelen, at have været af så dårlig kvalitet, at en del blev vraggods, som smughandlerne synes at have taget i bytte for varer. Kongens varer i lejeboden skulle handelen eller den lenshavende betale kongen i København i lybske skillinger for hver færøsk gylden.

g. I 1634 fik den københavnske borgmester, Jacob Mikkelsøn, kongens indtægter i len på de nævnte betingelser. Borgmesteren var iøvrigt formand for handelskompagniet. Reinold Hanssøn overtog som borgmester lenet 1644 efter Jacob Mikkelsøns død på samme vilkår. Lenet gik i 1646 atter over til Det islandske kompagni, men

nu skulle hver færøsk gylden betales med 7 mark dansk. Denne betaling har sikkert været for høj, thi i 1648 overtog enken efter Reinhold Hanssøn lenet for den gamle takst. Hun besad lenet til 1651. Derpå fik Frederik Willumsøn Rosenvinge Færøerne i len 1652–1655. Da overtog Christoffer Gabel Færøerne som len og senere dennes søn, Frederik Gabel, og slægten Gabel besad da øerne til 1709.

h. Alt forsvar af øerne knyttede sig til Thorshavn. På den østre pynt, Stangatangi, nu Skansatangi, havde Magnus Heinesøn i sin tid 1580 anlagt en skanse til værn mod sørøvere, der ville angribe byen. Foranlediget ved det tyrkiske overfald på Hvalbø, Suderø, 1629, besluttede man at bygge en skanse til i selve Thorshavn, lige inden for Tinganes. Da soldaterne på disse skanser var Færinger, gav dette anledning til byens vækst. Ude på Tinganes samledes alle øernes lagtingsmedlemmer til ordinær lagtingssamling om midsommeren, sædvanlig den 29. juli, skt. Olavs dag. I Thorshavn var denne dag øernes festdag, men byen har dog i hedensk tid fået navn efter guden Thor. En kirke fik Thorshavn først i 1609. Før den tid søgte byens befolkning til den gamle bispekirke i Kirkebø. De tog *heim* til Kirkebø, som man siger den dag i dag.

## Kap. VI.

a. Den ældste lagtingsprotokol har nogle domme eller afgørelser i tvistigheder om jord. Nogen egentlig forståelse af, hvilken sammenhæng der i første halvdel af det 17. århundrede var mellem inden- og udengårdsjord på Færøerne giver disse protokollater ikke. De giver nærmest kun indtryk af en hel del uklarhed med hensyn til ejendomsforholdet til jorden. Det faste ejendomsforhold mellem inden- og udengårdsjord, der senere har været til stede på Færøerne, lader sig ikke påvise af disse stridigheder. Hvis man tør drage nogen slutning af disse protokollater, må det nærmest være den, at indengårdsjorden dengang var matrikuleret i mark jord med underenhederne gylden og skind, og at disse gylden og skind praktisk talt faldt sammen med de tilsvarende pengeværdier. Udengårdsjorden blev vurderet i mark får; denne bestod nordenfjords af 40 besætningsfår og søndenfjords af 48 besætningsfår. Fodringsenheden under et besætningsfår kaldtes et *ærfrælsi*. Faktisk betød en mark får værdien en mark af besætningsfårene.

b. Foruden det kongelige gods på Færøerne samt odelsjorden var der i det 17. århundrede også adelsgods, hvis indehavere boede uden for Færøerne. Den vestnorske adelsslægt Benckestock, der besad betydelige jordejendomme på Færøerne, angives oprindelig at have fået sit gods gennem arv. Den danske adelsslægt Rosenkrands menes også at have fået sit færøske gods i arv over Norge, men alt dette ligger så langt tilbage i tiden, at det er vanskeligt at klarlægge. I hvert fald var de Benckestockers og de Rosenkrandsers godser på



Færøerne omkring år 1600 ret betydelige. De blev efterhånden først splittet og solgt i det 17. århundrede. Kongen overtog en del af det, og resten blev odel. Adelsgodset blev bortfæstet til Færinger efter samme regler som kongsgodset.

## Kap. VII.

a. Den Heinesønske slægt eller slægten fra Lamba er en af de slægter, som efter reformationen har gjort sig stærkest gældende på Færøerne. Slægtens stamfader var Heine Joensøn, der efter sagnet kom drivende fra Norge. Han blev præst og provst på øerne. Dennes søn, Jon Heinesøn, blev storbonde i Lamba og en tid øernes lagmand. Hans halvbroder var kaperen og købmanden Magnus Heinesøn. Gennem sin moder, Herborg Asbjørnsdatter fra Husevig, har Jon Heinesøn arvet et betydeligt odelsgods, som han sikkert selv har forøget. Foruden den store gård Lamba har Jon Heinesøn besiddet andre fæstegårde på Færøerne. Hvor betydelig arven efter Jon Heinesøn har været, ser man af arvestriden i lagtingsprotokollen. Jon Heinesøn havde mange børn, og sønnen Michel Joensøn fæstede hovedgården Lamba, men han havde dog svært ved at give afkald på sine søskendes arvedele; deraf arvestriden. Michel Joensøns sidste kone, Magdalene Andersdatter Kolding, en præstedatter fra Norge, var en meget stridbar natur. Hun lå ikke blot i strid med øvrigheden, men med hele sin mands familie. Han havde to søstre gifte med præster. To andre, Herborg og Gydje, er navngivne, og mindst 3 andre søstre har været gift på øerne. Desuden havde Michel Joensøn en broder. Alt dette fremgår af arvestridighederne, så slægten har været meget udbredt på øerne. Michel Joensøn selv opnåede at blive sysselmand på Østerø, men ikke øernes lagmand.

b. En anden kendt slægt på Færøerne har også en Nordmand til stamfader. Anders Guttormsøn kom til Færøerne lige før reformationen vistnok som fæster på Benckestockernes gods og blev valgt til øernes lagmand. Hans søn, Guttorm Andersøn, blev lagmand efter ham, og denne er meget omtalt i sagn som Guttorm lagmand. Denne havde to brødre, hvoraf den ene, Audun, blev provst på øerne, og en søn af Guttorm, Isak Guttormsøn, besad lagmandsembedet på øerne i 5 år. Af andre bønder på øerne, der opnåede indflydelse, ses flere at være besvogret med de to nævnte slægter.

## Kap. VIII.

a. De love, der gjaldt på Færøerne ved reformationstiden, stammede fra middelalderen. Først var der den norske landslov fra 1274, der på Færøerne ofte blev kaldet skt. Olavs lov. Den blev brugt på øerne, men ikke i jordspørgsmål, hvor Færøerne havde deres egen særlov, Søjdebrevet, fra 1298. Den islandske kirkelov eller kristenret af biskop Arne Thorlaksson synes at have været brugt på øerne.

Efter at denne i 1565 blev lavet om til borgerlig lovgivning i form af Den store islandske dom, er denne i hvert fald blevet brugt på Færøerne. Alle disse love blev brugt i gammel sprogform på øerne til op forbi år 1600. I denne tid gjaldt kongen som højeste retsinstans for øerne; for ham kunne lagtingets afgørelser indankes. Landsloven blev i 1604 afløst af Den norske lovbog, der dog ikke medførte nogen væsentlig forandring. Først ved Norske lov 1688 kom Færøerne under dansk højesteret.

b. Siden reformationstiden kender man alle lagmænd på Færøerne i sammenhængende række. Før den tid har man kun enkelte navne på lagmænd: fra oldtiden Gille lagmand, fra 1412 lagmand Harald Kalfsson, fra 1479 lagmand Jørund Skogdrifsson og fra tiden lige op til reformationen lagmand Thormod Siorderson. Efter reformationen har Færøerne haft følgende lagmænd: Anders Guttormsøn (1531—1544), Guttorm Andersøn (1544—1571), Jon Heinesøn (1572—1583), Isak Guttormsøn (1583—1588), Peder Jacobsøn (1588—1601), Thomas Simonsøn (1602—1608), Zacharias Thormodsøn (1608—1628), Joen Justinussøn (1629—1654) og derefter Balzer Jacobsøn til 1661. I gamle dage boede lagmanden forskellige steder på øerne, men fra 1555 blev Stegård, 16 marker jord, i Sandevåg på Vågø fast lagmandssæde. Ved reformationstiden udnævnte kongen lagmanden, men lagtinget havde indstillingsret. Lagmanden var rettens formand og dommer, på vårtingene dog kun til år ca. 1650.

c. Sorenskriveren kan kun påvises som tjenestemand efter 1584. Han var lagtingets sekretær, men opnåede dommermyndighed ved vårtingene ca. 1650. Gabriel Mitens var sorenskriver 1584—1621; han var tillige landsbarber eller -kirurg. Følgende mænd synes derefter at have fungeret som sorenskrivere: Jacob Jacobsøn (1622—1623), Hans Pedersøn Morsing (?) (1624—1626), Joen Justinussøn, (?) (1627—1628), Jacob Pedersøn Morsing (1629—1640), Jacob Willumsøn Hannemand (1641—1644), Hans Madssøn (1645—1646) og Niels Jacobsøn (1647—).

d. Fogeden eller landfogeden var fra gammel tid kongens skatteopkræver, hans regnskabsfører samt offentlig anklager på øerne. I ældre tid opholdt han sig kun på Færøerne om sommeren; om vinteren vikarierede en lokal mand som vinterfoged for ham. En fuldt sammenhængende række af landfogeder kan man ikke påvise, før Strange Madssøn bliver foged (1599—1620). Efter ham har man følgende landfogeder: Mads Christensøn (1620—1644), Hans Selmer (1645—1647) og Christen Madssøn (1648—1655).

e. Sysselmændene var seks, en i hvert syssel. De fleste af dem var tillige bønder. Sysselmændene var fogedens underordnede tjenestemænd i syslerne. Den direkte opkrævning af de kongelige afgifter besørgede sysselmanden. Han var også offentlig anklager på vårtingene, hvis fogeden ikke var til stede. Sysselmændenes navne kan påvises i tiden 1584—1655 og findes angivet i hovedteksten i skema på side 338 for hvert syssel.



f. Antallet af sognepræster på Færøerne var 7. Strømø syssel var delt i to præstekald: Nordstrømø og Sydstrømø. De øvrige præstekald faldt sammen med syslerne. Øernes provst var en af sognepræsterne. Efter reformationen kan man påvise alle præsternes navne, og indbyrdes slægtskabsforhold kan påpeges. En del af præsterne er født på Færøerne, hvoraf de fleste er præstesønner, men mange af præsterne var danske. Disse blev gerne resten af deres liv på Færøerne, og mange af deres børn blev færøske bønderfolk. Hovedteksten side 343—345 skildrer disse forhold.

## Kap. IX.

a. I den katolske tid var en præsteskole knyttet til den færøske bispestol i Kirkjubø. Man ved meget lidt om den, men den har antagelig været noget i retning af klosterskolerne i andre lande. Den har uddannet de færøske sognepræster. Efter reformationen skiftede denne skole karakter. Nu forlangte man, at præsterne skulle uddannes, ved Københavns universitet, og den forhenværende færøske præsteskole blev til en latinskole, der forberedte til universitetet. Denne blev lagt under sognepræsten i Sydstrømø, der kom til at bo i Thorshavn. Præsten blev skolens rektor. Skolen fik tillagt visse årlige indtægter, men elevantallet var ikke stort; det synes at have ligget omkring 7 årlig. Præsterne Hans Rasmussøn og Lucas Debes var de ivrigste for at fremhjælpe skolen.

b. En anden offentlig institution på Færøerne var Arge hospital ved Thorshavn. Det er antagelig i sin tid anlagt af den katolske kirke som hospital for spedalske i lighed med de skt. Jørgens gårde, der fandtes i andre lande. De beskrivelser, der findes om hospitalet, viser, at der skulle være plads til 12 patienter. Hospitalets faste indtægter var 100 gl. af den kongelige kasse årlig, heri inkluderet 60 lam for 12 gl. Et stykke opdyrket indmark, vurderet 4 mark jord, var hospitalets ejendom. Enkelte retsbøder tilfaldt også Arge hospital. De spedalske patienters ejendom tilfaldt hospitalet med ret hos familien til at indløse eventuelle jordejendomme. Ret til at bede om almisse havde hospitalsforstanderen også. Sysselmanden i Strømø skulle have opsyn med hospitalet og føre dets regnskab.

## Kap. X.

Hvor langt tilbage i tiden lagtinget har ført protokol over sine sager, kan ikke påvises, men at tinget har ført protokol før 1615, da den ældste af de nu opbevarede lagtingsprotokoller begynder, er givet. Denne bog, står der på forbladet, er indkøbt om foråret 1614, men den er først taget i brug 2. aug. 1615. Det må have sin forklaring i, at en ældre protokol først da er blevet udskrevet. Iøvrigt henviser protokollen fra 1615 flere gange til ældre lagtingsprotokoller, endda så langt tilbage som 1557. Det fremgår også af protokollen

fra 1615, at de ældre protokoller dengang må have eksisteret i *lands sens kiste*, da disse notater i nævnte protokol blev gjort. Det er derfor meget lidt sandsynligt, at fremmede sørøvere, som sagnet vil påstå, har røvet landsens kiste med de ældste protokoller. Større sandsynlighed er der for, at da disse ældste protokoller muligvis har været ført i gammel sprogform, som senere slægtled ikke rigtig har kunnet læse, er de blevet smidt bort og derved gået tabt. Op til 1690 har man nu følgende tingprotokoller:

1. Lagtingsprotokol 1615—1654.
2. Lagtings= og vårtingsprotokol 1655—1661.
3. Lagtings= og vårtingsprotokol 1656—1665.
4. Lagtingsprotokol 1666—1677.
5. Lagtings= og vårtingsprotokol 1667—1690.
6. Lagtingsprotokol 1680—1690.

Efter 1690 er alle vårtingene samlet i en protokol, og lagtinget har en protokol for sig.

## Kap. XI.

a. De jordenheder, man endnu benytter på Færøerne, er af gammel oprindelse. Den gamle opdyrkede indengårdsjord er delt i mark, og hver mark er 16 gylden. Hver gylden indeholder 20 skind. En jordejendom indengårds angives altså i mark, gylden og skind, men den behøver dog ikke at ligge samlet. Tværtimod ligger odels= jorden ofte meget spredt. Disse mark, gylden og skind har til= svarende rettigheder i haugen udengårds til fårehold, kohold og hestehold. Deraf er fåreholdet det vigtigste. Den ældste form for fårehold er, at der svarede et bestemt antal besætningsfår til en mark jord. Disse var særeje, det, man kalder *kenning*. Hver ejer får da kun de slagtelam, disse får avler af sig. En anden form for drift af udmarken er fælleshold af besætningsfår, hvorved hver får slagte= får i forhold til sin andel i indmarken. Enkelte steder findes dog indengårdsjord uden udmarks= eller haugerettigheder.

b. Med den norske bosættelse på Færøerne fulgte vikingernes værdiansættelse. Marken var en vægtenhed, og dens værdi i sølv blev en pengeenhed. En mark deltes i 8 ører, og i hver øre var der 3 ertoger. Den gamle marks vægtværdi synes at have ligget omkring 214,32 g. De gamle begreber: en mark får eller en mark jord, har sikkert engang svaret til sølvværdien af en mark. Da de norske konger begyndte at slå sølvpendinge, 240 stk., af en sølvmark, faldt sølvværdien snart derved, at kongerne blandede kobber i møntsølvet. I stedet for sølvet brugte man da ofte vadmelet som værdimåler. I det 13. århundrede gjaldt 6 alen normalvadmel for en *lovøre*. Der gik således dengang 48 alen vadmel på en mark penge. Vadmel af anden værdi, f. eks. 3 alen for en øre fandtes dog også i handelen dengang. En kopi af den italienske mønt florin fra 1252 blev nord for Alperne til gylden, og henimod midten af det 14. århundrede



blev den rinske gylden kendt i nordisk handel. Den er også kommet til Færøerne og gået ind i færøsk jordværdi, således at der blev 16 gylden jord i hver mark. I den gamle sølvmark er den gået ind med ½ øre, svarende til 20 alen normalvadmel. Man ser af gamle be= tegnelser, at den færøske jord må være matrikuleret fra Norge af i alen normalvadmel, således at en mark har fået værdien 320 alen. Normalvadmelet var imidlertid ikke nogen færøsk vare. Det vadmel, som man tilvirkede på øerne, synes derimod at have haft værdien: 3 alen for en øre.

c. Skal man forklare taksterne i gamle færøske dokumenter, kan de ikke gøres indlysende uden at tage de færøske forhold med i betragtning. Taksten i det gamle Søjdebrev fra 1298 angiver 20 alen vadmel i årsleje for foder til en mark får, men dette kan ikke være normalvadmel. Det må være færøsk vadmel, der svarer til 3 alen for en øre. Fra 1584 og ud efter ser man, at årslejen for en mark får var 2 gl. I færøsk vadmel svarer det til 20 alen, men i normalvadmel til 40 alen. Historisk set er der ingen grund til at antage, at fåre= lejen skulle være steget til det dobbelte, fra 1298 til 1584. Det skulle nærmest være omvendt, og man må derfor slutte, at fårelejen har holdt sig på samme niveau i dette tidsrum. Altså skulle de 20 alen i Søjdebrevet svare til 2 gl. eller en øre rent sølv. De færøske får i oldtiden og den første del af middelalderen har været mørke og små af vækst. Racen er før vikingetiden indført fra Skotland eller Irland. Den fandtes vistnok ublandet på en lille isoleret ø på Fær= øerne, Lille Dimon, til ind i midten af det 19. århundrede. Det gamle færøske vadmel har derfor helst været mørkt af lød. Den større og lysere, noget brogede, fårerace er vistnok indført til Fær= øerne i begyndelsen af det 15. århundrede, måske lidt opblandet med den ældre race, som sagnet angiver at være nærmest uddød i et forfærdeligt uår.

d. Søjdebrevet fortæller os en del om forholdene på Færøerne, dengang det blev givet. Jorden har til dels været smådelt, men der har været forholdsvis mange store jordejere og en stor ejendomsløs klasse, der stammede fra de dengang frigivne trælle. Disse frigivne synes at have opdyrket en del jord, som de har lejet af jordbesid= derne, men største delen af dem har dog været tjenestefolk hos jordejere. Det ser nærmest ud til, at indengårdsjorden dengang ikke har været matrikuleret i marker, for der nævnes kun kofoder af indengårdsjord. En mands ret til fårehold i udmarken og kohold dèr om sommeren synes dengang ikke at have været betinget af indengårdsjorden, for Søjdebrevets bestemmelser lyder: «Så mange får skal en mand have, som han ejer hauge til.» Eller: «Ingen skal have flere køer og får [i haugen] end efter rigtig udregnet tal,» d.v.s. end efter sin forholdsvise andel i udmarken. Indmarken lægges her ikke til grund for en mands ret i udmarken. Det faste ejendoms= forhold mellem indmark og udmark synes ikke at have eksisteret dengang. Der skelnes i Søjdebrevet mellem lejlændinge og opsiddere af jord. Endvidere siger Søjdebrevet, at ingen må blive opsidder på

mindre jord, end han derpå kan holde 3 køer. En opsidder omtales aldrig i forbindelse med fårehold, kun i forbindelse med kohold og afgrøde, altså i forbindelse med indengårdsjord. I et dokument fra 1412 ses gylden indengårdsjord første gang nævnt.

e. Den færøske gyldens værdi i varer ses at være fastlagt i sidste halvdel af det 15. århundrede efter samme værdi, som en rinsk gylden på to lod sølv dengang har haft. Denne gylden gav dengang værdiansættelsen af den første daler. Gennem hele det 16. århundrede ser man derfor, at den færøske gylden sættes lig en gammel daler. Den havde også værdien af 20 fåreskind eller 10 alen færøsk vadmel. Man ser således, at et fåreskind er kommet til at dække en alen normalvadmel på Færøerne, og skindet går derfor ind for alen i færøsk jordbetegnelse. En mark jord blev 320 skind Værdien af en mark penge var i lovgivningstiden, omkring landsloven, faldet til 48 alen normalvadmel. I færøsk værdiberegning bliver dette til en mark = 48 skind = 2 gl. 8 sk. ved ansættelse af alle retsbøder til langt op i tiden. Iøvrigt havde en vog af mange færøske varer værdien en færøsk gylden. Den vog, Færøerne fik gennem den hamborgske handel omkring år 1500, kom til at indeholde 80 gamle norske marker, omtrent svarende til en Kølnervog på 72 Kølnermarker. På den måde blev et skind vægt 4 marker, og gylden og vog kom således til at falde sammen. I det 16. århundrede og senere er disse værdier ansat i jordebøgernes takster. Man har dog eksempler på, at færøske varer, der hjemme havde faste priser, efterhånden er blevet forskudt i værdi på fremmed marked. Denne tids værdiansættelse har sat sig fast i færøsk bevidsthed, at endnu kan man f. eks. høre mænd vurdere et lam til 6 skind, hvilket blot nutildags er et udtryk for, at det er et værdifuldt lam.

# NAVNALISTI


Akeleye, Gabriel 326.
Alday, Jákup = Altray, Jacob 119, 190, 195.
Amsterdam 227.
Andersdatter, Katrine 350.
Andersen, N. 35, 38.
Anderssøn, Søren 16, 195, 209.
Andersøn, David 54
» Gutte 23, 299, 300.
» Håldan 354.
» Thomas 395.
» Trond 338, 340
Andrassardóttir, Magdalena 296, 301—308.
Andrasson, Eyðun 193, 293, 297, 310, 339, 342, 347.
Andrasson, Gutttorm, 15, 321, 329, 373, 395, 407, 408.
Andrasson, Nils 89, 90, 198, 209, 291, 293, 310, 322, 332, 338, 340.
Anthoniussøn, Samuel 30.
Arentsøn, Anders 26, 40—44.
» Hermand 255, 256.
» Joen = Árason, Jón 13, 42, 43, 338, 339, 344.
Arentsøn, Oluf 42, 43.
Argja hospital 366, 409.
Arnbjarnardóttir, Herborg 287, 289, 290, 347, 407.
Arnbjarnarson, Guttormur 290, 310.
Arnbjørnsøn, Niels 35, 48.
Arni bispur 10, 344.
Arrabo, Mikkjal 358.
Augustinussøn, Lyder 91, 115, 298, 312, 335, 338, 341.

Balcken Kiøbe 233.
Baltzersøn, Mads 103—106, 335.
Bartalsson, Danjal 348, 350.
» Jóhannes 348.
Bastiansøn, Peder 90.
Bech, Joachim 180.
Beck, Sivert 240.
Becker, Claus 354.
Begtrup, J. 380.
Benckestock, Adelus 285, 286,288.
» Jens 181.
» Kristina 196.
» Trøndur 180, 182, 346.
Berintsdóttir, Anna 346, 348.
Berintsson, Johannes 348.
Bertelson, Peder 23.
Bielke, Hendrik 326, 327.
Bille, Eske 14, 164—174, 176, 178. 345, 394.
Bjørgvin 12—16, 69, 161—164, 182, 184, 195, 218, 219, 226, 228, 386, 392, 393.
Blasiussøn, Nicolas 37.
Bodilsøn, Oluf 147, 310, 312, 340, 356.
Bona altaris Wilhelmi 364, 365.
Bremen 162, 392, 393.
Brestisson, Sigmund 349.
Broberg, Peder Sørensen 160.
Brochmand, Jesper 350, 363.
Bronck, Jónas 149.
« Mortan Jespersøn 118, 182, 268, 350, 351.
Brunck, Jóan Jespersøn 209.
Buch, Bodil Andersdatter 309.
Børgesøn, Hans 29.
» Peter 41.
Børresøn, Peder 395.

Christensdatter, Caren 308.
Christensøn, Mads 23, 37—40,

113, 126–128, 145–147, 150, 153, 237, 239, 240, 249, 250, 260, 287, 288, 297, 300, 301, 303, 304, 306, 307, 334, 336, 337, 339, 352, 362, 408.
Christensøn, Niels 356.
» Palli 199–201, 203.
Christoffersøn, Mattis 375.
Claussøn, Peder 343, 344.
Clemensdatter, Catrina 357.
» Christina 357.
» Rakel 357.
» Rebekka 357.
» Sára 357.
» Susanne 357.
Clemensøn, Christian = Clementsøn, Christian 349, 357.
Clemensøn, Christopher 357.
» Daniel 357.
» Hans 357.
» Jens = Clementsøn, Jens 349, 357.
Clemensøn, Lave 257.
» Ole 357.
» Peder = Clementsøn, Peder 349, 357.
Clemensøn, Simon 357.
Cok, Patricius 129.
Cromwell, Oliver 142.

Daa, Jørgen 122, 123.
Danielsdatter, Cathrine 312.
» Elsebeth 356.
Danielsøn, Bertel 25, 147, 148, 310, 338, 342, 348, 350.
Danielsøn, Jacob 376.
» Niels 235, 236.
Danjalsson, Jóhannes 342.
Darnley 129.
Davis, John 195.
Debes, Ellen Jacobsdatter 348, 349.
» Jacob Pedersøn 348.
» Lucas 12, 33, 35, 96, 109, 116–120, 123, 125, 160, 190, 193, 194, 209, 230, 265, 267, 270, 284, 325–327, 351, 353, 354, 360, 363, 367–369, 378, 380, 409.
Debes, Lucas Pedersøn 349.
Didriksøn, Hans 199–204.
» Hendrik 16.
Dímun, lítla 385, 387.
Djurhuus, Chr. 180, 344–351, 354–357, 375.

Eilensøn, Blasius 25, 40.
Eiriksson, Magnus 162.
Eliassøn, Johannes 24.
Ellendsøn, Laurids = Ellendsøn, Lavars 23, 31, 299, 300, 312, 374.
Ellendsøn, Magnus 370.
Engilbrektsson, Ólavur 164, 166–168, 173, 174, 179.
Erlendur bispur 315, 328, 344, 387, 391.
Esaiassøn, Hans 24.
Evensen, A. C. 367.
Eyðunsdóttir, Ata 297, 339.
» Katrina 342.
Eysturoy 98.

Fermus, Johan 41–43, 149–154, 403.
Florense 386.
Flue, Søren Christensøn 198–200, 203, 205, 207, 209, 210, 329, 335.
Follerup, Clement Langesøn 25, 356.
Fresenborg, Peder 12, 164.
Fríðrikur I 12, 177.
» II 10, 129, 188, 190, 365, 397, 401.
Fríðrikur III 159, 326.
Friis, Christian Hendriksen 121, 126.
Friis, Frederik 124, 163.
» Johan 180.
Frunt, Nicolaus de 16, 124, 220, 224, 231, 234–236, 242, 243, 285, 372, 405.
Funningur 89, 90.
Fønbo, Hans Jørgensen 292, 296, 297, 345–347.
Fønbo, Hendrik 202, 203, 244, 245.
Færo, Joen Joensøn 355.
» Joen Lydersøn 355.
» Thorlof Gregersøn 355.

Gabel, Christoffer 109, 160, 260, 263–265, 331, 397, 406.
Gabel, Frederik 374, 380, 406.



Ganterup, Anna Rasmusdatter 348.
» Hans Christensøn 25.
» Rasmus Christensøn 25, 340, 342, 346, 347, 351, 354.
Gerðum, Guttorm í 41–44, 47, 149, 152, 153, 259, 292, 293, 310, 326, 327, 337, 339.
Gerðum, Hanus í 43, 332, 348.
Gildisskálin í Tinganesi 322.
Glyvrar 289, 292.
Gottorp 12, 13, 165, 167.
Grágás 384.
Gran, Gyrid Arnbjarnardóttir 289, 347.
Gregersøn, Jens 361.
» Philippus 375.
» Thomas 48.
» Torlof = Grækarisson, Torleiv 193, 206, 234, 293, 295. 310, 340, 347, 350, 362.
Gudeleiksson, Joen 176.
Gudelockson, Holdan 31, 47, 338, 343.
Guðmundsson, Dáði 344.
Gulatingslógin 9, 271, 314, 315, 370, 379.
Gullandsfar, Ole Botelsøn 354, 355.
Gunnarsdóttir, Elsuba 28, 295.
Gunnarsson, Pætur 291, 296.
Guttedatter, Elsebe 48.
Guttesøn, Jacob 382.
» Simon 40, 41.
Guttormsson, Andras 12, 167, 171, 172, 176, 177, 180, 183, 186–188, 292, 293, 309–311, 328, 407, 408.
Guttormsson, Arnbjørn 290.
» Ísak 198, 206, 208. 309, 310, 330, 339, 407.
Guttormsson, Jákup 100, 226, 233, 309.
Guttormsøn, Joen 374, 375.
Guttormur løgmaður 41, 187, 330.
Gyldenstjerne, Knud 388.
» Pernille 285.
Gyntersberg, Axel 196, 197.
» Margreta 196–198, 210.
Gyntersberg, Sofía 196, 197, 214.
Gørtze, Klaus 165.
Gøtu, Trøndur í 314, 354, 389.
Háland 102, 226, 228.
Hálvdansson, Jákup 47, 48, 127, 129, 148, 359.
Hamborg 13, 14, 16, 103, 104, 162, 168, 175, 185, 194, 218, 386, 393.
Hannnemand, Jacob Willumsøn 38–41, 152, 270, 271, 334, 337, 408.
Hansdatter, Anna 346, 347, 353, 354.
Hansdatter, Elisabet 359.
» Lucia 353.
» Marion 35.
» Rakel 353, 354.
» Rebekka 353.
» Sára 346.
Hanssøn, Absalon 297, 346.
» Bærent 353.
» Christen 353.
» Christoffer 247, 250–252.
Hanssøn, Gregers 382.
» Hans 346, 359.
» Johannes 376.
» Jørgen 164.
» Laurits 30–32, 241, 242, 245, 247–249, 287.
Hanssøn, Peder 196–198.
» Poul 287.
» Reinhold 260, 405, 406.
Hardi, Hans Hanssøn 35, 47, 303, 358, 359.
Harildsøn, Gunnar 28.
Havreki, Heini Jóansson 180–182, 189, 268, 287, 289, 290, 310, 345–347, 350.
Havn 13, 14, 18, 20, 53, 97, 266.
Heideman, Johan 331, 343, 353.
Heilskov, Chr. 189, 289, 290, 297, 309, 345.
Heinadóttir, Herborg 289.
Heinason, Heini 290.
» Jóan (løgmaður) 30, 44, 47, 188–190, 193, 194, 199, 201, 205–209, 220, 275, 289–297, 309, 310, 320, 329, 330, 332, 334, 335, 337, 338, 340, 346, 347, 354–357, 404, 407, 408.
Heinason, Jóan (bóndi á Glyvrum) 44–46.
Heinason, Jóan (yngri) 296.

Heinason, Magnus 15, 53, 54, 117, 119, 120, 143, 188–207, 210–215, 220, 224, 265, 270, 276, 286, 290, 296, 329, 335, 346, 375, 404, 405.
Heinesøn, Joen (bóndi í Fugloy) sýslumaður 43.
Heindriksson, Antonis 299, 300, 374.
Heliesøn, Niels = Helgason, Nils 186, 187, 202, 203, 207, 219, 286, 319.
Hellesøn, Peder 348, 349.
Helsingør 16, 212, 213.
Hendriksøn, Anders 349.
» Hans 107.
» Jesper 299.
» Niels 91, 338, 339.
Hermandsøn, Peder 35, 36.
» Reinicke 176, 338, 340.
Hesti 286.
Hetland 328.
Hilarius bispur 163, 164, 166, 344.
Holdansøn, Gutte 48, 49.
» Jacob 25, 338, 339 343.
» Joen 33.
» Morten 25.
Horn, Reihold 365.
Húsfrúgvin í Húsavík 290.
Hvalbø 17, 120, 123, 148, 151, 252, 257, 351, 358, 359, 400.
Hvalvík 54.
Hvannasund 18, 149.
Hvidtfeld, Arild 166.
» Christoffer 180–182, 184.

Ibsøn, Mikkel 103, 105, 205–208, 210, 216, 335.
Ísaksdóttir, Billa 49.
» Sigga 310, 339.
Ísaksson, Andras 147.
Isaksøn, Joen 26, 40.
» Poul 25, 47.
Ismaelson, Isak 22, 338, 342.
Ívarsson, Greipur 161.

Jacobsdatter, Margrete 185.
Jacobsøn, Andfind = Jákupsson, Anfinnur 24, 30.
Jacobsøn, Balzar = Jákupsson, Balzar 9, 157, 206, 263–265, 321, 331, 337, 354, 380, 408.
Jacobsøn, Bærent = Jákupsson, Berint 41, 289, 384.
Jacobsøn, Ísak 29.
» Jacob 16, 219–222, 225, 227 230, 233–237, 242–245, 249, 285–288, 290, 298, 300, 332–334, 336, 408.
Jacobsøn, Michel 33, 34.
» Niels 353, 408.
» Peder 23, 90, 100, 115, 116, 118, 193, 194, 310, 312, 319, 330, 339, 341, 350, 373, 390.
Jacobsøn, Per 319.
» Poul 24, 355.
» Zakarias 355.
Jakobsen, J. 315, 322.
Jákup I. 129, 138, 141, 402.
Jákup VI. 129–131, 133, 401.
Jákupsson, Guttormur 341, 382.
» Nils, 45, 46, 160, 334, 341.
Jákupsson, Sjúrður 296.
Jansøn, Jørgen 301.
» Lambert 202, 203.
» Thens 128.
Jensdatter, Ane 356.
» Ellen 356.
» Maren 356.
Jenssøn, Christen 234–236, 240, 241.
Jenssøn, Hans 236, 241, 245.
» Peder 181.
» Simon (í Laðangarði) 89, 90, 100, 311, 338, 339, 343.
Jeronimussøn, David 32, 33.
Jóan bispur 389.
Jóansdóttir, Ata 292, 295.
» Brita 295.
» Herborg 291.
» Sigga 296, 308.
Jóansson, Andras 347.
» Harald 348.
» Heini 166, 180, 189, 198, 309, 347, 407.
Jóansson, Mortan 348.
» Nils 178, 301, 302.
» Ólavur (Jarnheysur) 27, 292.



Jóansson, Páll 350.
Joensdatter, Agnes 310, 312, 340, 355.
Joensdatter, Christine 376.
» Maren 25, 295.
» Marion 355, 370.
Joensøn, Antonius 48, 338, 339.
» Bærent 42.
» David 28, 349, 350, 363, 368.
Joensøn, Gunnar 374.
» Guttorm 176, 177, 311.
» Jacob = Jóansson, Jákup 30, 31, 37, 292, 309, 355, 357.
Joensøn, Jesper 26, 47.
» Joen = Jóansson, Jóan 25, 26, 48, 181, 357.
Joensøn, Josep 292, 293, 309.
» Justinus = Jóansson, Jústinus 310–312, 339, 344, 374, 375.
Joensøn, Michel = Jónsson, Mikkjal 23, 24, 226, 233, 287, 290, 338, 340, 362, 407.
Joensøn, Olof 24, 26, 27.
» Simon 28, 371.
» Skoutrod 345, 349.
» Thomas 338, 342.
» Zakarias = Jóansson, Sakaris 23, 338, 341, 382.
Jógvansdóttir, Gyðja 27.
Johannesdatter, Anna 348, 350.
Johannessøn, Páll (fangi) 11, 49, 63.
» Søren 348, 349.
Jón indiafari 308, 312.
Jon, Santa 211.
Jónsbók 384.
Jónasdóttir, Karin 350.
» Magdalena 350.
» W. 377.
Jónasson, Johannes 350.
» Jónas 350.
» Mikkjal 350.
» Rasmus 350.
Josepsøn, Joen 382.
Jonckesøn, Christoffer 377.
Jude, Anders 15, 185–187, 190, 192, 216, 335, 404.
Jude, Jens 172.
Jude, Mattis 166, 345.
Jústinusson, Jóan 23, 25, 26, 34, 36, 40, 152, 157, 249, 262, 277, 279, 301, 310–312, 314, 326, 331, 334, 339, 346, 348, 355, 362, 379, 408.
Jústinussøn, Heine 25, 40.
» Hendrik 44.
Jørgensøn, Cornelius 379.
» Hans 354.
» Laurids 54.
» Søren 370.
» Thomis 338, 342.
» Trond 338, 342, 356.
Jørundarson, Skovtred 181, 345.

Kaas, Niels 211, 213.
Kálvsson, Haraldur 328, 389, 408.
Kandell, Jans 147.
Keypmannahavn 13, 15, 51, 160, 185, 192, 194, 198, 201, 212–215, 228.
Kirkjubø 12, 13, 117.
Klakksvík 18, 91, 95, 96, 152.
Klerck 105, 116, 119, 190, 265, 351, 404.
Klinte, Jacob Christensøn 35, 72, 119, 353.
Klæmintsdóttir, Kristina 355.
Knudsen, Mads 348.
Kolding, Anders Mikkelsøn 309.
» Anders Poulsøn 308.
» Magdalene Andersdatter 407.
Koltri 268.
Koppen, Thomas 12, 14, 106, 165, 168–184, 216, 367, 395, 403.
Kristian II. 12, 17, 162, 393.
» III. 11, 13, 174, 175, 178. 329.
Kristian IV. 62, 129, 132, 133, 138, 159, 315, 365, 385, 397, 401, 402.
Kvívík 54.
Kyd, Jørgen 53, 54, 196, 214.
Køllen, Hermann von 240.
Kønig, Niels 128.

Lagonis, Clemens 356.
Lamba 289.
Lamba, Mikkjal í 26, 27, 30, 41, 46, 287, 290–309, 332, 334, 336, 340, 350, 358, 376, 379.
Lampe, Mads 15, 186, 187, 404.

Landslógin 9, 10, 88, 96, 97, 315, 379, 384—386.
Lauridssøn, Oluf (Olav) 24, 31, 88, 299—301, 312, 362.
Lavarsdóttir, Marjun 299, 312.
Linde, Claus 16, 219—221, 242, 244, 245.
Lindenov, Hans 189, 191, 196—198, 202, 203, 210, 211, 213, 214.
Lindenov, Sofie 287.
Loss, Hans 176, 177.
Lund, Peder Hanssøn 350.
Lund, Troels 189, 190.
Lunge, Vincents 164, 169.
Lübeck 13, 14, 168, 175.
Lýðarsdóttir, Magdalena 312.
Lydersen, Jóan 181.
» Peder 181, 349.
Lydersøn, Augustinus 338, 341, 362.

Madsdatter, Elsebet 348.
Madsøn, Anders 185.
» Christen 82, 94, 263—265, 273, 337, 343, 408.
Madsøn, Hans 334, 408.
» Strange 16, 27, 28, 113, 115, 122, 145, 146, 149, 220—227, 230—234, 236, 237, 242, 243, 245, 278, 295, 298, 300, 321, 336, 341, 370, 372, 405, 408.
Magnus kongur góði 9.
Magnus løgbøti 161, 314, 315, 321, 397.
Magnusdóttir, Anna 49.
Magnusson, Arni 168, 319, 390.
» Hákun 315, 387, 397.
» Olof 22.
» Rasmus 196, 236, 286.
» Sakaris 30—32.
Malmø 16.
Mandus 123.
Margreta drotning 326.
Matson, Olof 15, 218.
Meier, Jacob 206, 208, 210.
Michelsdatter, Bille 22.
» Maren 33.
Michelsøn, Samuel = Mikkjalsson, Sámal 334, 337, 338, 340.
Miðvági 54, 95, 96.
Mikkelsen, Jacob 255, 259, 260, 304, 309, 405.
Mikkjal skrivari 184, 185, 335.
Mikkjalsson, Danjal 311, 346.
» Jónas 301, 305, 308, 348, 350. 363.
Mikkjalsson, Samson 304, 305, 309.
Mitens, Christoffer 332.
» Gabriel 10, 107, 113, 131, 199, 209, 230, 276, 291, 295, 298, 319, 325, 327, 329, 332, 353, 373, 375, 408.
Mitens, Hans Gabrielsøn 43, 44, 152, 346, 363, 364.
Morsing, Christian Pedersøn 46, 351.
Morsing, Hans Pedersøn 47, 206, 334, 341, 408.
Morsing, Jacob Pedersøn 46, 334, 341, 408.
Mortan í Suðurstreymoy 181.
Mortanson, Mortan 350.
Mortensdatter, Billa 28.
Mortensøn, Jacob 29.
» Jesper 202.
» Oluf, 338, 339, 343.
» Søren 348.
Mourits skrivari 15, 186, 335.
Mund, Pros 24, 25, 37, 246, 347.
Munk, Peder 213.
Müller, Christopher Larssøn 166.
» H. C. 96.
Myrmandssøn, Isak 319.

Nicolaussøn, Andras 23.
» Blásius 23.
» Joen 36.
» Mikkjal 23.
Nielsdatter, Marion 44, 342.
Nielssøn, Agmund 370.
» C. F. 166, 351.
» Daniel = Nigilsson, Danjal 22, 100, 310, 338, 341, 342, 356.
Nielssøn, David, 26.
» Hans 362.
» Ismael 357.
» Jacob 37, 353.
» Mogens 16, 219, 336.
» Søren 16, 219, 335, 336.



Nilsson, Guttorm 41, 43, 290, 292, 293, 301, 309, 326—328, 338, 339, 379.
Nilsson, Jón 168, 169, 176, 177.
» Pætur 292.
Nólsoy 53.
Norðoyar 98.
Noreg 9, 102, 103, 161.
Norska løgbókin 10, 11, 20, 88, 89, 96, 103, 233.

Oden, Peder 188.
Ólavsdóttir, Anna 34, 292.
Ólavsson, Ámundur 11—13, 166, 168, 169, 171, 173—175, 178—182, 344—346, 361, 367, 379, 394, 395, 403.
Ólavsson, Jákup 49.
» Jón 308, 312.
» Sjúrður 27.
Ólavur heilagi 314, 379.
Olesdatter, Agnes 355.
» Birgitte 355.
» Elsebet 355.
» Karen 355.
» Maren 355.
» Sigga 355.
Olesøn, Harald 355.
» Jens 355.
» Rasmus 355.
» Thormod 33.
Olofsdatter, Anna 26, 27.
» Magdalene 377.
Olofsøn, Anders 23.
» Siurdur 369.
Olsen, Hans 312.
Olufsdatter, Marion 33, 34.
Olufsøn, David 41.
» Elias 349.
» Jens 24, 25.
» Peder 369.
» Richart 41.
Oyrasundstollur 387.

Pállsson Ísakur 49.
Paulssøn, Mats 190, 193, 194, 207—209, 335.
Pedersdatter, Anna 349.
» Dorethe 349.
» Elsebet 349.
Pedersdatter, Johanne 348.
» Margrethe 349, 357.
» Maria 349.
» Rakel 348.
» Sunneva 32.
Pedersøn, Absalon 188.
» Christen 107, 269, 351, 362.
Pedersøn, Ellender = Pætursson, Ellendur 26, 47, 338, 343.
Pedersøn, Geble 395.
» Gregers 348.
» Hans 22, 195, 202—204, 206, 208—210, 338, 341, 348.
Pedersøn, Ivar 260.
» Jacob 128, 338, 341.
» Johannes 357.
» Jørgen 367.
» Klaus 164.
» Mikkel 348.
» Poul 348.
» Rasmus 28, 149, 226, 227, 230, 286, 299, 348.
Pedersøn, Zacharias = Pætursson, Sakaris 23, 131, 149, 289, 311, 330, 338, 339, 380.
Pedheg, Laurents 179, 180, 346.
Petersdatter, Maren 32.
Poulsøn, Anders 308.
» Gregers 25, 26, 41.
» Gunnar 292, 295.
» Jacob = Pállsson, Jákup 22, 23, 226, 233.
Poulsøn, Jóan = Pállsson, Jóan 24, 27, 43, 157, 262—264, 292, 331, 338, 340, 355, 357, 380.
Poulsøn, Melchor 107.
» Oluf 23, 342.
Pætursson, Abraham 26.

Rasmusdatter, Kristine 348.
» Rakel 348.
Rasmusdóttir, Anna 29, 347, 348, 353.
Rasmusdóttir, Biritta 340, 348.
» Marjun 342, 348.
Rasmussøn, Hans 25, 35, 128, 152, 269, 334, 347, 350—353, 356, 358, 362—366, 409.
Rasmussøn, Joen 357.

Rasmussøn, Lambert 48.
» Poul 34, 35, 357, 358, 363.
Rasmussøn, Søren 26, 34, 357.
Reesen, Hans 34, 352.
Reinicken, Herman 176, 177.
Riber, Jens Gregersøn 12, 118, 181–183, 310, 346, 351, 361, 403.
Roggers, Daniel 212.
Rollofsøn, Nicolas 369.
Rosenkrands, Erik 54, 185.
» Jacob 285–287.
» Jørgen 211, 213.
» Niels 124.
Rosenvinge, Frederik Willumsøn 260–265, 272, 273, 406.
Rytter, Mads 286.

Samuelsøn, Peder 349.
Sandi 389.
Sandoy 98.
Schinckell, Jacob 53.
» Niels = Skinkel, Nils 15, 53, 106, 214–217, 335, 405.
Schougård, Søren Pedersøn 160.
Schrøter, J. H. 115, 329.
Sehested, Christian Thomesen 157,
Selmer, Hans 41–43, 47, 259, 326, 336.
Seyðabrævið 9–11, 88, 89, 96, 99, 315, 317–319, 328, 385–392, 397, 411.
Siggason, Haraldur Sira 389.
Sigurdson, Jacob 350.
» Jón 350, 373.
Simonsdatter, Agathe 35.
» Magdalene 36.
Simonsøn, Anders 25, 26.
» Joen 26.
» Michel 44.
» Oluf 370.
» Peder 26.
» Sylvester 338, 341, 374.
» Thomas=Símunarson, Tummas 193, 194, 202, 203, 208. 209, 312, 330, 338, 341, 350, 408.
Símunarson, Tormóð 44.
Sivertsøn, Morten 47.
» Myrmand 33.
Sjúrðardóttir, Guðrun 290.
Sjúrðarson, Árni 390.
» Mýmaður 371.
» Tormóð 164, 167, 328, 408.
Sjúrður løgmaður 328, 387.
Skála 289.
Skeen, Søren 348.
Skive, Jens Jenssøn 24, 25, 31, 352, 356.
Skive, Maren Jensdatter 355.
Skógdrivson, Jørundur 328, 408.
Skoggaard, Peder 163.
Stadtlænder, Eggert 199, 202, 203, 205.
Stefansdatter, Sissel 293, 340.
Stefansøn, Rasmus 382.
Steigargarður 329.
Steinnes, Asgaut 243.
Stephansen, Oddgeir 373.
Stóridómur 10, 11, 49, 315–317, 319, 373.
Streymoy 98.
Stuart, Maria 129.
Suðuroy 86, 87, 99, 148.
Svabo, J. Chr. 368, 380.
Sverri kongur 360.
Svínoy 54.
Søderberg, Hans 176, 177.
Søldarfirði 289.
Sørensøn, Hans 151.
» Rasmus 347, 352, 354, 357.
Sørensøn, Søren 16, 122, 124, 220 –224, 226, 227, 229, 231, 233, 234, 241–244, 246, 285, 288, 301, 372, 405.

Thehus, Hans 171, 172, 176.
Theophili, Theophilus 301.
Thim, Jochim 15, 188, 191, 194, 196, 210, 214, 217, 218.
Thomasdatter, Anna 48.
Thomassøn, Hendrik 24, 362.
» Joen 23–25, 40.
» Ole 345.
» Simon 25, 362.
» Thormod 26.
Thomsen, Jóannes 129.
Thorlaksson, Árni 315, 319, 407.
Thormodsøn, Enevold 25.



Thormodsøn, Zakarias 22–24, 26, 28–33, 146, 222, 225, 226, 231, 233, 300, 301, 312, 330, 372, 408.
Thorolfssøn, Gabriel 292–294, 340, 347, 363.
Throndesøn, Mattis 377.
Tinganes 103, 105, 115, 116, 232, 269.
Tiørnersøn, Jacob=Tørnesøn, Jacob 291, 338, 343.
Tockertt 123.
Torbergsdóttir, Sigga 11, 49, 63.
Torkilsson, Ólavur 169.
Torleivsson, Johannes 24, 30, 298 –300, 334, 336, 338, 340, 342, 347, 348, 350, 376.
Tormóðsson, Líggjas 312.
» Niklas 359.
Tórshavn 53, 97, 106, 265–268, 400, 406.
Trolle, Niels 364, 365.
Trondarson, Jóan 49.
Trondedatter, Katrine 36.
Trondesøn, Jørgen 338, 342.
Trølla-Símin 290, 291, 311, 312, 343.
Tyest, Hans 203.
Tørnesdatter, Magge 33.

Umfredt, Thomas 212, 213.
Urne, Aksel 53.
» Christoffer 240.
» Jacob 53.
» Nichlas 39.
Vágar 99, 148.
Valkendorf, Kristoffer 119, 185, 188, 189, 191–198, 201–203, 205 –207, 209–215, 329, 335, 404 405.
Varde, Gregers Hanssøn 348.
Velbastað 53, 268.
» Hans á 226, 233.
Vestmanna 18, 120, 123, 144.
Vibe, Michel 246.
Viborg, Elsebet Pedersdatter 357.
» Maria » 357.
» Peder Hellesøn 25, 348.
Vind, Hendrik 124, 246.
Vind, Jørgen 124.
Vinstrup, Peder 347.

Wendelcke, Johan 16, 220.
Weyhe, J. H. 355, 380.
Wichmand, Jochim 15, 104, 105, 107, 218.
Worm, Ole 351.
Wullenweber, Joachim 12–14, 162, 163, 165, 168–171, 173, 175, 176, 328.
Wullenweber, Jørgen 167, 168.
Wøyst, Herman 235, 236.

Zakariassøn, Christen 25.
» Jacob 41, 289.
» Johannes 297.
» Simon 36.

Ørslev 214.
Øssurson, Leivur 9, 383.

## KELDUTILFAR

1. Løgtingsbók 1615–54, Landsskjalasavnið, Tórshavn.
2. Løgtingsbók 1666–77, Landsskjalasavnið, Tórshavn.
3. Vár- og løgtingsbók 1656–66, Landsskjalasavnið, Tórshavn.
4. Vár- og løgtingsbók 1667–90, Landsskjalasavnið, Tórshavn.
5. Norske Riksregistranter, bd. I–IV, VII–XI, XIII, Kristiania 1861 f.f.
6. Norske Tegnelser.
7. Norske Magasin II.
8. Norges gamle Love.
9. Norska løgbókin frá 1604.
10. Fútaroknskapir 1584–1653, Ríkisskjalasavnið, Kbhvn., (1645–46 og 1647–48 á ríkisskjalasavninum í Oslo).
11. Frederik I's Norske Registre, Ríkisskjalasavnið, Kbhvn.
12. Langebeks Diplomatarium, Ríkisskjalasavnið, Kbhvn.
13. Sjællandske Register, bd. XVI., Ríkisskjalasavnið, Kbhvn.
14. Sjællandske Tegnelser, Ríkisskjalasavnið, Kbhvn.
15. Latina 1616–31, Ríkisskjalasavnið, Kbhvn.
16. Árnasavnið á lærda háskúlanum í Kbhvn.
17. Kong Christian den Fjerdes Lille Reces, 1615.
18. Kong Christian den Fjerdes Store Reces, 1643.
19. Herredagsdombog 3. juni 1586.
20. Register of The Scottish Privy Counsil, bd. XI, National Library of Scotland, Edinburgh.
21. Andersen, N.: Færøerne 1600–1709, Kbhvn. 1895.
22. Baasch Ernst: Die Iclandsfahrt der Deutschen.
23. Debes, Lucas: Færoæ et Færoa reserata, 1673 (útg. «Fram»s 1903).
24. Dansk biografisk Leksikon, bd. 25.
25. Degn, A.: Kommissionsbetænkningen 1709–10, Tórshavn, 1934.
26. Degn, A.: Færøske Kongsbønder 1584–1884, Tórshavn 1945.
27. Diplomatarium Norvegicum, bd. X.
28. Evensen, A. C.: Savn til Føroyinga søgu í 16. øld, Tórshavn, 1908–09.
29. Fróðskaparrit, bd. 4, 1954.
30. Hammershaimb, V. U. (útg.): Føroyingasøgur, Tórshavn 1884.
31. Heilskov, Chr.: Af den heinesenske Slægts Saga, Kbhvn. 1916.
32. Jakobsen, Jakob: Diplomatarium Færoense, Kbhvn. 1907.
33. Jakobsen, Jakob: Færøske Folkesagn og Æventyr, 1898–1901.
34. Lund, Troels: Mogens Heinesøn, Kbhvn. 1877.
35. Nielsen, C. F.: Færøernes geistlige Stat, Fåborg 1879.
36. Nolsøe, P.: Føroya siglingarsøga I, Tórshavn 1955.
37. Norsk biografisk Leksikon, bd. 9.
38. Ræstad, A.: Kongens Strømme, Kristiania 1912.
39. Steinnes Asgaut: Leidang og landskyld (í Skrifter udgitt av Det Norske Vitenskabs-Akademi, Oslo 1927).
40. Stephensen, O og Sigurðsson, J.: Lovsamling for Island, bd. I, Kbhvn. 1853.
41. Tarnovius, Thomas: Færøers beskrivelser, udgitt av Håkon Hamre, 1950.
42. Tingakrossur 1953, nr. 24 og 25.
43. Útiseti 1949.
44. Varðin, bd. 12, 17, 18.
45. Zachariasen, L.: Úr Føroya søgu um ár 1700, Tórshavn 1952.
46. Æfisaga Jóns Indiafara (íslendska bókmentafelagið gav út 1908–1909).
47. Aakjær, Svend: Maal, Vægt og Taxter i Danmark, Nordisk Kultur, bd. 30, 1936.
48. Aarbog for nordisk Oldkyndighed og Historie, 1886.